Miðvágs kommuna

1873 - 2008

Onnur bók

Sonni Jacobsen

MIÐVÁGS KOMMUNA
1873 - 2008

Onnur bók

Miðvágs kommuna 1873 - 2008 Onnur bók

Sonni Jacobsen

Forlagið Ytstifjórðingur/Vága kommuna © 2024
Uppseting og perma: Sonni Jacobsen
Prent og innbinding: Clemenstrykkeriet, Viborg, DK

ISBN: 978-99972-900-6-9

Innihald

Inngangur ... 7
Miðvágs skúli 1829 - 2008 ... 9
- Tíðin 1829- 1915 ... 9
- Fyrsti bygdarskúlin ... 10
- Miðvágs skúli undir Vága prestagjalds kommunu ... 13
- Gamli skúli ... 15
- Elias Joensen lærari ... 26
- H.A. Djurhuus lærari ... 27
- Miðvágs skúlasøga 1915 - 2008 ... 30
- Lærarar 1920 - 1961 ... 33
- Skúlaskapur 1915 - 1961 ... 39
- Reingerðafólk við skúlan 1915 - 1961 ... 65
- Miðvágs kvøldskúli ... 70
- Vikarar og faklærarar ... 77
- Vatnsoyra skúli ... 81
- Viðlíkahald av skúlanum 1931 - 1944 ... 88
- Svimjing og svimjihylur ... 90
- Viðlíkahald av skúlanum 1945 - 1970 ... 101
- Skúlin á Giljanesi (Miðvágs-Sandavágs skúli) ... 106
- Lærara 1961 og fram ... 113
- Skúlaskapur 1962 - 1979 ... 118
- Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli ... 121
- Reingerðarfólk við skúlan 1970 - 1985 ... 125
- Bygdarskúlin í Miðvági ... 126
- Reingerðarfólk við bygdarskúlan ... 144

Kommunuskrivstovan ... 145
- Kommunuskrivarar og skrivstovufólk ... 159
- Reingerðafólk á kommunuskrivstovuni ... 167
- Lokalir grannskoðarar hjá kommununi ... 170

Bygaráðsarbeiði 1915 - 2008 ... 175
- Kommunusamanleggin ... 208

Kommunalt politi ... 217
Ruskinnsavnan ... 235
- Ruskkoyringin byrjar ... 240
- Ætlan um brennistøð í Vágum ... 245
- I.R.F. ... 250

Barnaansing ... 253
- Kommunal dagrøkt sett á stovn ... 254
- Spælistova í Gamla skúla ... 256
- Útibarnagarður/Barnagarður ... 266
- Barnagarður í missiónshúsinum ... 271
- Várgleði ... 272
- Frítíðaransingin ... 273
- Útibarnagarður í Vatnsoyrum ... 275

- Heiðastova 275
- Miðvarður 277

Læknamiðstøðin 285
Landbúnaður 309
- Ull- og eplateljing 1918 309
- Landbúnaðarteljingar 1924 310
- Eplavelting 1937 - 1987 311
- Seyðateljingar 1941 - 1993 312
- Neyt og neytaeigarar 1954 - 1987 326
- Høsnateljingar 1966 - 1972 326
- Innangarðs- og uttangarðsútskifting 328
- Skattamerkur 329

Kálvalíð 331
Jansagerði 343
Kirkjugarðar í Miðvági 347
- Gamli kirkjugarður 1878 347
- Umsjónarmenn við gamla kirkjugarð 348
- Nýggi kirkjugarður 1935 353
- Líkkoyring 363
- Minnisvarði fyri sjólátnar 363
- Útbygging av kirkjugarðinum 1988 370
- Hermannakirkjugarðurin 1942 378

Keldur 383
Navnalisti 384

Inngangur

Søga er sera áhugaverd at granska, hon sigur okkum ikki bara, hvat ið hendi áður, sum ofta er sera áhugavert í sær sjálvum, men hví tingini eru, sum tey eru nú. Og tað er júst tí, søga hugtekur meg so nógv. Til dagin í dag er tað okkara einasta "tíðarmaskina" har vit kunnu vitja farnar tíðir og hóma, hvussu tað var tá.

Tá ein situr og blaðar í teim elstu protokollunum, verður ein førdur aftur í tíðina. Orðavalið, skriviháttur og enntá lukturin. Tær lukta av brendum torvi. Minnist eg hugsaði í fyrstuni: Hvat er hetta fyri luktur? So kom eg at minnast aftur á barnaárini, tá onkur framvegis brendi torv. Tað var torvluktur! Sjálvandi, tann, ið fyri 150 ella 100 árum síðan, ella styttri enn tað, fyri tann saks skuld, sum hevur sitið og skrivað, hevur sjálvandi brent torv. Tað var haðani meginparturin av hitanum kom tá, køldu vetrardagarnar. Og so nakað av koli av og á eisini. So tað var kanska hálvtannaðhundrað ára gamal torvluktur, ein kendi, tá ein las. Tað setur ein so sanniliga aftur í tíðina eisini, umframt innihaldið í protokollunum - sjálvandi.

Kann vera at onkur heldur, at tilfarið í hesi søgugongdini er rúgvusmikið. Og tað er tað. Men tað er gjørt við beráddum huga, um ein so kann siga. Havi hugsað sum so, at tá ein nú hevur alt tilfarið frammi, so er jú gylta løtan at fáa hetta fram og at sýna borgarum og fólki annars, hvat er at finna í skjølunum hjá kommununi. Sjálvandi skal alt ikki takast við, og ein má viga til og frá, hvat kann vera áhugavert og viðkomandi. Havi tó valt at tikið somikið nógv við til hvørt søgubrotið, at hetta kann lýsast væl og virðiliga.

Sjálvur haldi eg tað eisini vera nokkso áhugavert og stuttligt at kunna siga frá t.d. hvør arbeiddi í ymsu arbeiðunum. Av hesum eru mongdir av upplýsingum. Aftur her hevur verið neyðugt at avmarka heilt nógv, sjálvt um nógv er tikið við eisini. Tað skal heldur ikki gerast keðiligt ella troyttandi. So rímiliga avmált av tí og av kostnaði av ymsum arbeiðum. Har havi eg so serliga lagt meg eftir, tá ymsu tingini er gjørd av fyrstan tíð. T.d. hvør var við í arbeiðinum, tá tann og tann vegur varð gjørdur upprunaliga, ella tá ein skúli ella bygningur hjá kommununi var gjørdur upprunaliga t.d. Tað er ikki altíð ein finnur tað í skjølunum, men sum oftast.

Sum longu nevnt í innganginum til fyrru bókina, so byggir tilfarið í hesum bókum á sera umfatandi granskingararbeiði í skjalasavninum hjá gomlu kommununi, har ein kann siga, at stórt sæð hvørt skjal er vent og eftirmett.

Tað eru tríggar langar søgur í hesum samlaða verkinum um Miðvágs kommunu, tað eru um vegagerðirnar, skúlasøgan og um havnabyggingarnar. Havi valt at hava eina av hesum longu søgunum sum byrjan til hvørja av teim trimum bókunum. Í tí fyrstu var tað um vegirnar og so aðrar søgur. Her er tað so um skúlan. Í tí seinastu er tað so um havnabygingar v.m.

Annars er, sum longu nevnt í yvirlitinum til hesa bókina, skrivað um kommunuskrivtovu og kommunuskrivarar, bygdaráðsarbeiði 1915 - 2008, har mál verða tikin upp, sum ikki koma undir hinar partarnar, skrivað er um. Kommunalt politi, sum kom undir krígnum, ruskinnsavnan, sum byrjaði í sekstiárunum, barnanasing, sum byrjaði í áttatiárunum, læknamiðstøð fyri Vágar, sum Miðvágs kommuna lat byggja. Nakað um landbúnað, um Kálvalíð,

Jansagerði, har farið verður nakað inn á søguna um hesi hús og garðar, sum vóru. Og so um kirkjugarðar í Miðvági.

Kálvalíð bleiv ogn hjá kommununi longu í sekstiárunum, so tað er rættuliga natúrligt at taka tað við, haldi eg. Ikki minst, tá vit vita, hvussu søguligt hetta hús er. Og Jansagerði, sum var gamli prestagarðurin á Prestlandinum, sum tey siga, gjørdist eisini ogn hjá kommununi seinni í tíðini, men varð latin til Fornminnisfelagið í bygdini at umsita. Eisini ein sera søguligur bygningur, har nevnast kann í kommunuhøpi, at teir flestu av fundunum hjá gomlu Vága prestagjalds kommunu vóru hildnir har. Til seinast í hesi bókini er skrivað um kirkjugarðarnar í bygdini. Har tað serstaka er, at Miðvágur, sum einasta bygd í Vágum, heilt frá tríatiárunum hevur havt fastan mann at halda kirkjugarðarnar.

Men nógv av hesum er søga í dag. Tí nógv av hesum er ikki undir kommununi longur. T.d. politi, fólkapensjón o.a. Meðan onnur ting seinni vóru gjørd í samstarvi við aðrar kommunur, sum umrøtt er eisini. T.d. skúli og havnaverk.

Tað verður ikki nakar slíkur inngangur í tí triðju bókini, so hesin má galda fyri hana eisini. Har verða annars eisini nógv áhugaverd evni tikin upp. Sum nevnt høvuðsevni um havna-byggingar, men eisini um tá og hvussu vatnveitingin í Miðvági varð útbygd og t.d. um sløkkiliðið í bygdini. Um flakavirkið Snarfrost, har kommunan var størsti eigari, og sum er ein rættuliga sprennandi søga. Og so nakað um Miðvágs Bóltfelag, sum mest snýr seg um tað rakstrarliga við felagnum og sambandið millum felagið og kommununa.

Má siga, at tað hevur verið mær ein fragd at sitið og arbeitt við hesum øllum. Vóni at tit fáa minst líka nógva gleði av at lesa úrslitið av arbeiðinum, sum eg havi havt við at finna fram til úrslitið. Kundi sett eitt “smiley” aftanfyri hesi orðini, men tað hóskar seg helst ikki so væl í slíkari bók. Men við hesum fáu orðum, sum kundu verið so nógv meira um tað skuldi verið, vil eg eisini lata hesa bók upp í tykkara hendur. Og enn einaferð takk fyri heiður og álit at gera hetta arbeiðið.

At enda takk til tykkum, sum á ymsan hátt hava hjálpt til, við at læna myndir, greiða frá ymsum og við aðrari hjálp. Og takk til rættlesarar. Og tøkk til Hann, sum øllum, valdar.

Við kvøðu
Sonni Jacobsen

Miðvágs skúli 1829 - 2008

Miðvágs skúli

Hesin parturin snýr seg um skúlaskap í Miðvági og um lærarar, onnur starvsfólk og skúlar í Miðvági.

Tíðin 1829 - 1915

Jørgen Frans Jacobsen, lærari

Jørgen Frans Jacobsen, ið var ættaður úr Tórshavn, byrjaði at halda skúla í Miðvági í 1829. Tó at hann ikki hevði læraraútbúgving og var sera ungur, so var hetta kortini litið honum til. So hann hevur óivað verið gávaður og fingið nakað av skúlaundirvísing sjálvur. Ein høvuðs fyrisprákari at fáa skúla í prestagjaldinum, var Niels Struer prestur í Vágum, sum gekk høgt uppí, at børnini lærdu at lesa, m.a. fyri at tey kundu standa seg at vera fermd. Samsýningin Jørgen Frans fekk var 10 ríkisdálar um árið av presthaldinum frá kirkjunum í Sandavági, Sørvági og Mykinesi. Hartil fekk hann eisini samsýning frá sóknarfólkunum í prestagjaldinum.

Jørgen Frans Jacobsen giftist 21 ára gamal hin 2. august 1932 í Miðvágs kirkju við Rachel Niclasdatter, ið var 23 ár. Hon stendur við teirra giftu at vera úr Miðvági, men við hennara føðing sæst, at hon var ættað av Steig í Sandavág. Hevur møguliga tænt í Miðvági í 1832.

Jørgen Frans Jacobsen

Í fólkateljingini 1834 fyri Miðvág síggja vit eisini, at Jørgen Frans er ungur maður og hevur ikki verið meira enn 18 ára gamal, tá hann er byrjaður sum lærari í Miðvági.

Húsfólkini eru trý: Jørgen Frans Jacobsen, 24 ár, giftur, skúlalærari, Rakel Niclasdatter, 26 ár, gift, kona hansara og Jákup Jørgensen, 2 ár, sonur teirra. Í FT 1940 hava tey tvey børn afturat, Maria Susanna, 4 ár og Niklas, 1 ár. Elsta barnið, Jákup, er tá 7 ár og tessvegna byrjaður í skúla.

Frá umleið 1832 og til 1845 verður virksemið hjá Jørgen Frans víðkað til at vera økislærari í bygdunum Miðvágur, Sandavágur og Sørvágur. Í FT 1834 fyri Sørvág sæst t.d., at eini manntóm hús í bygdini "bruges for tiden til omgangsskolehold". Í 1845, og helst áðrenn tað eisini, verður komið eftir, at røkja so nógvar bygdir er ov nógv hjá einum lærara. So í 1845 verður ein lærari settur afturat í oynni. Jørgen Frans heldur so áfram sum lærari í Miðvági og Sandavági fram til 1854, tá skúlaskapurin heldur uppat í fleiri ár.

Jørgen Frans fór nú at lívbjarga sær sum handilsmaður. Handisloyvi fekk hann í Miðvági 18. februar 1856 og var fyrsti handilsmaðurin í Miðvági. Hann handlaði í Skúlanum fyri Skipsteds handel í Havn. Í lista frá 1870 verður Jørgen Frans m.a. nevndur sum ein av teimum fýra fyrstu fiskakeyparunum í Miðvági. So ein kann siga, at hann var frammalaga á nógvum økjum.

Hin 1. oktober 1868 keypti Jørgen Frans, smb. skeyti, 2 gyllin jørð í Miðvági frá Niclas Niclasen, við innangarðsjørð í Kirkjabø og uttangarðs í Nýpuni. Keypsprísurin var 200 ríkisdálar. Umkostningar 3 ríkisdálar og 18 markar. Í skattalista fyri Miðvágs sókn 1880 stendur

Jørgen Frans framvegis at eiga 2 gl. í jørð, tað kostaði honum 8 oyru í jarðaskatti til sóknina. Sama ogn var í 1887, men tá var jarðaskatturin hækkaður til 16 oyru um árið.

Í 1884 gavst Jørgen Frans Jacobsen, sum tá var 73 ára gamal, við handlinum, og Niklas, sonur hansara, tók við. Hetta árið fekk Jørgen Frans nevniliga eftirgivið 6,43 kr. í skatti vegna at hann var givin við at handla.

Jørgen Frans Jacobsen, føddur í Havn 1. juni 1811, andaðist í Miðvági, 29. desember 1890, 79 ára gamal, smb. kirkjubókini, deyður av appoplexi, einkjumaður og f.v. skúlalærari. Rakul, kona hansara, andaðist 15. mars 1883, 74 ára gomul, deyðsorsøk "alderdom".*

[* Kelda: Føroya siglingarsøga VI, Páll J. Nolsøe, fólkateljing í Miðvági 1834 og 1840, roknskaparbók, Vága prestagjalds kommuna, og Vága kirkjubók, avskrift Johan G. Mikkelsen.]

Sum vanligt var nógv tey fyrstu árini við bygdaskúlum, so hevði lærarin íbúð í skúlanum. Og vórðu húsini, eisini eftir at givist var at hava skúla í húsunum í 1854, framvegis nevnd, "Skúlin" og fólkini "skúlafólkið" ella "í skúlanum". Í staðin fyri at fáa eftirløn, so fekk Jørgen Frans bjóða, at fáa skúlan sum ogn og brúk av trøðni, Steinsmørk, so leingi hann livdi. Hesum tók hann av. Fyrsti skúlin endar soleiðis sum privatur handil og sethús.

Fyrsti bygdarskúlin

Við skúlabyggingini í Miðvági var tað soleiðis, at í 1829, sama árið Jørgen Frans byrjaði sum lærari í Vágum, varð farið undir at byggja ein skúlabygning, og var hetta fyrsti bygdarskúlin í Føroyum. Skúlin stóð liðugur í 1830.

Peningurin og nakað av tilfarinum til skúlan varð fingin til vega á tann hátt, at Vágafólk lótu 64 ríkisbankadálar (rbd) og 8 skillingar (sk.) í peningi, og av viði ein pommerskan stokk, 8½ alin langan og 20 tummar í fýrkant. Mejer, fúti, lat 10 rbd. og C.L. von Tillisch, amtmaður, lat ein pommerskan stokk, 23 alin langan og 12 tummar í fýrkanti. Av presthaldinum var frá Sandavágs, Sørvágs og Mykines kirkjum latnir 4 rbd. Av inntøkuni av grind, 22 rbd. 3 markar (mrk.) 14 sk. Og til seinast fekk skúlin, við kongaligari samtykt frá 16. september 1929: 1) 200 rbd. av rentunum av sølupeninginum fyri Steigagarð í Sandavági og 2) inngarðsjørðina Steinsmørk í Miðvági í ogn til skúlabrúks burtur av prestagóðsinum, og var hetta ein hampuliga stór trøð. Peningurin var tilsamans 300 rbd. 4 mrk. 6 sk.

Skúlin kostaði 317 rbd. 0 mrk. 13 sk. at byggja, so tað restaðu bert 16 rbd. 2 mrk. 7 sk. í. Byggitilfar, sum var keypt, var keypt úr Kgl. handlinum í Havn.

Húsini vóru soleiðis innrættað: Ein skúlastova, 7 alin long, 7 alin 16 tummar breið. Eitt skáp at goyma bøkur og tilfar í, 1 al. 14 tm. langt, 2 al. 14 tm. breitt. Køkur, 7 al. langur og 5 al. 2 tm. breiður. Stova, 3 al. 23 tm. long og 7 al. 16 tm. breið. Og roykstova av somu stødd.

Provisorisk Reglement

Tá ið "Provisorisk Reglement" tók við í 1845, fekk Jørgen Frans Jacobsen eisini Sandavágs børn at undirvísa í Miðvágs skúla, men nú varð stovan heldur trong, og Frederik Poulsen, ættaður úr Sandavági, ið var byrjaður at undirvísa í 1845, varð 17. februar 1847 av Skúlastjørnini settur sum ferðalærari í Sørvági, Bø og Gásadali. Hann skuldi undirvísa skiftivís tvær vikur í Sørvági, eina í Bø og eina í Gásadali.

Teir vóru báðir sagdir at vera dugnaligir lærarar. Lønin var tann vanliga fyri umgangslærarar eftir "Provisorisk Reglement", tó hevði Jørgen Frans Jacobsen í 1854, í fastari løn 70 rbd., sum tilsamans við fríum húsum, inntøkuni av Steinsmørk, kostarhaldi og brenni, var sett til 142 rbd. Viðv. brenninum, so svaraði hvørt hús í Miðvági og Sandavági 1 dagsarbeiði í staðin fyri torv til læraran; júst hvat tey hava gjørt er ikki nevnt, um tey hava hjálpt til við torvarbeiðinum og hoyggging, ella hvat tað so kann hava verið. Frederik Poulsen hevði sama

ár tilsamans 85 rbd. Av og á fingu teir eisini eina samsýning úr Felags skúlagrunninum.

Skúlaskatturin í Vágum varð ikki latin í peningi (24 sk. á mørkina), men goldin við seyði og ull, soleiðis, at hvørjar 12 merkur í jørð svaraðu 1 lamb og 8 merkur av óvaskaðari ull. Tær fýra bygdirnar, Miðvágur, Sandavágur, Sørvágur og Mykines áttu sostatt at lata 4 lomb og 32 merkur av ull hvør og Bøur og Gásadalur at svara 3 lomb og 24 merkur av ull hvør.

Skúlalógin frá 1845 var ikki "gomul í garði" áðrenn vágamenn, ið frammanundan høvdu sýnt skúlaskapinum miklan ans, fóru at seta seg upp ímóti henni, og tók hetta stríðið at kalla grundarlagið undan tí skúlalagi, sum í 1829 var byrjað og fyriskipað so væl.

Tað var ein viðtøka, at skúlaskatturin bert fyri eitt vist áramál skuldi verða goldin við seyði og ull. Tá ið henda tíð var úti, spurdi Lange prestur seg fyri í øllum bygdunum, um tey ynsktu at gjalda skattin framvegis við seyði og ull ella í peningi (24 sk. á mørkina). Svarið hann fekk í bygdunum var, at tey ynsktu ongan skúla. Miðvingar og sandavágsingar játtaðu tó langt um leingi at lata sum higartil. Men søgdu, at teir ynsktu at Provisorisk Reglement varð avtikið. Sørvingar svarðaðu seinni, at teir vildu lata gjaldið í peningi.

Dahlerup, amtmaður, skrivaði avgjørdur til próvstin, at Provisorisk Reglement mátti avtakast, tí tað gjørdi størri skaða enn gagn. Skúlastjórnin avgjørdi kortini, at skúlaskapurin skuldi halda fram sum áður. Tó sluppu bíggjarfólk frá lærara og skúlaskatti, sum skúlakassin skuldi gjalda, men teir skuldu hava læraran í vistarhaldi, tá hann var har.

Men mótviljin móti skúlaskipanini heldur harðnaði enn linkaði. Noktað varð bæði at lata skattin og hava læraran í kosti.

Um heystið 1851 var at kalla eingin skúlagangur hvørki í Sørvági ella Gásadali, tí foreldrini ikki vildu lata børnini í skúla og Frederik Poulsen noyddist at søkja sær annað arbeiði.

Í Miðvági og Sandavági gekk tó sum heild frægari við skúlaviðurskiftunum.*

[* Kelda: Varðin, bind 27, bls. 41 – 47. Páll J. Nolsøe.]

Í øllum hinum sýslunum í Føroyum var eisini hørð mótstøða móti "Provisorisk Reglement", sum varð avtikið aftur í 1854, tá ið nýggj skúlalóg kom í gildið, sum gav foreldrum á bygd rætt til at skipa barnaundirvísingina, sum tey vildu. Bert varð teimum álagt at ansa eftir, at børnini lærdu at lesa og kristni.

Legat frá Engelsted presti

15. desember 1839 brendi prestagarðurin í Jansagerði niður í grund og at kalla alt, ið inni var, m.a. kirkjubøkurnar fyri Vágar og Norðstreymoy.*

[* Viðvíkjandi kirkjubókunum, sum brendu í 1839, kann viðmerkjast, at tað eydnaðist at bjarga teimum úr Vágum frá 1797 og teimum frá Norðstreymi frá 1816. Hildið verður annars at kirkjubøkur hava í øllum førum verið aftur til 1687, tá tað varð lógarásett at kirkjubøkur skuldu førast.]

Tá var Jens Engelsted prestur í Vágum. Stutta tíð aftaná eldsbrunan, misti hann konuna, og í takksemi fyri ta samkenslu og hjálpsemi, fólk høvdu sýnt honum, stovnaði Engelsted 22. oktober 1846 eitt legat, ið bar navnið "Deeltagelses og Erkjendtligheds Legatet".

Í gávubrævinum skrivar hann m.a., at hann takkar Gudi fyri styrk í neyðini og um hvussu vágafólk og fólk úr øllum landinum og hansara starvsfelagar stuðlaðu honum bæði í orði og í verki. Hetta gav eina trongd til at geva nakað aftur.

Treytirnar vóru í 6 punktum, har stutt kann sigast, at punkt 1 segði, at støddin á legatinum var 800 rbd. silvur, sum dags dato vóru settar í Færøe Amts Sparekasse. Punkt 2 segði, at málið var at stuðla skúlagongd í Føroyum. 3. Støddin á høvuðsupphæddini mátti ongantíð minka og varð stuðul latin av rentuni. Legatið varð umsitið av skúlastjórnini hjá Amtinum. 4. Helvtin av rentunum skulu brúkast til ein ætlaðan realskúla í Tórshavn. Og verða uppsamlaðar til hesin skúli er bygdur at latast honum ella líknandi skúla í Tórshavn. 5. Renturnar av

restini verða brúktar til vanliga skúlagongd í Føroyum. Tó kunnu renturnar av 200 rbd. nýtast til eina verdugt treingjandi læraraeinkju. 6. Renturnar av teim 200 rbd., sum falla til Vága prestagjald, skulu rindast til Jørgen Frans Jacobsen, lærara í Miðvági so leingi hann livir. Og livir einkjan eftir hann, so leingi hon livir. Næst eftir teimum, um tey doyggja áðrenn, falla renturnar til Frederik Poulsen, lærara í Vágum, á sama hátt til hansara deyð ella einkju eftir hann, um so er. Eftir tað fallar, renturnar aftur til legatið at nýta.*
[* Kelda: Varðin, bind 27, bls. 41 – 47. Páll J. Nolsøe.]

Sum hetta, og tað nevnt er frammanfyri um Struer prest, sýnir, so høvdu summir av prestunum í øllum førum, stóran áhuga fyri, at skúlagongd varð framd í sóknunum. Viðvíkjandi rentum av legatinum kann sigast, at rentan tá í tíðini var hampuliga góð.

Í Miðvági og Sandavági er so eingin almenn skúlagongd frá 1854 til 1873, tá lærari verður settur aftur. Tað einasta,ið hevur verið hesi árini, er so nakað av heimaundirvísing. Nevnast kann at Sørvágur og Bø/Gásadalur fingu lærara í 1880, og Mykines ikki fyrr enn í 1896.

Eftirkomarar í "Skúlanum"

Í einum skrivi, dagfest 4. oktober 1891, og ført í pantibókina, váttar Niklas Jørgensen, handilsmaður, at hann hevur arvað eftir foreldur síni, Jørgen Frans Jacobsen og Rachel Niclasdatter: Sethús, fastbygt pakkhús og handil, stórt 35 alin langt og 8 alin breitt. Umframt tveir gyllin jørð uttangarðs í Nýpuni, eitt lítið stykki innangarðs í Leitistrød, ognarlut í Vestmannatrød (sum var trød omanfyri Kirkjar) og tvey bøstykkir í Kirkjabø á 2 sátulendir. Hann viðgongur at skylda til felagið A.W. Skibsted, Tórshavn, 1.500 kr., sum skulu rindast aftur yvir 15 fylgjandi ár, har fyrsta gjald á 100 kr. fellur á nýggjárinum 1893. Skuldin er rentufrí so leingi hann rekur handil í Miðvági fyri felagið. Handilin fær frítt loyvi at nýta kjallara, stovuhædd og loft í bygninginum, tó fyriheldur hann sær rætt til at nýta syðra enda av bygninginum við roykstovu (køki) og stovu.

Vit síggja her, at skúlin er nógv umbygdur og nógv er bygt uppí. Bæði í breidd, 1 alin breiðari enn fyrr uppgivið, og ikki minst er nógv bygt uppí í longd.

Fyrsti skúlabygningurin í Miðvági stóð í øllum førum uppi til 1904. Hin 2. juli 1904 fekk Hans Jørgensen, sonur Niklas, byggiloyvi til at endurreisa sethús á gomlu skúlagrundina.

Í fólkateljingini 1901 stendur Niklas framvegis at vera handilsmaður, men í 1906 stendur hann at vera bøkjari og sonurin at vera timburmaður og er inngiftur hjá foreldrunum í "Gamlaskúla", sum tað stendur. Helst er Niklas givin at handla í 1904, tá gomlu húsini og handilin vórðu tikin niður. Sambært kirkjubókini, doyði Niklas í 1909.



Tekning úr bókini "Hugrák" hjá Heina Haraldsen av húsunum, sum um 1904 vórðu bygd á grundina har fyrsti skúlin stóð. Hesi hús vórðu eisini rópt Skúlin ella "Í Skúlanum". Havi ikki sað mynd av fyrsta skúlanum.

Í einum hefti frá 1916, har øll hús í bygdini eru uppmáld og umrødd stendur um sethúsini hjá Hans Jørgensen: Stødd: 12 x 10 alin. Timbur og flagtak, komfýr og ovn, rúm í kjallaranum og á loftinum. Til húsini hoyrir eisini, hjallur, hoyggjhús og eitt torvhús.

Miðvágs skúli undir Vága prestagjalds kommunu

Í Miðvági og Sandavági er so eingin almenn skúlagongd frá 1854 til 1873, tá lærari verður settur aftur. Tað einasta, ið hevur verið hesi árini, er so nakað av heimaundirvísing.

1. juli 1873 tekur Vága prestagjalds kommuna við, sum fyrsta kommunan í Vágum. Sama ár lærari er settur aftur í Miðvági og Sandavági.

Jákup Jakobsen, lærari

Jákup Jakobsen, ættaður úr Tórshavn, fór bert 17 ára gamal á læraraskúla í 1870 og tók prógv í 1872. Hann varð settur sum lærari hin 1. januar 1873. Eisini eins og fyrsti lærarin, ein sera ungur maður. Var lærari annan hvønn dag í Miðvági og Sandavági.

Jákup Jakobsen er soleiðis settur áðrenn kommunuskipanin tekur við í Vágum, sum var 1. oktober 1873, men eftir at kommunulógin kom í gildið í 1872. Helst eru tað Engelsted prestur, Nielsen sýslumaður og skúlanevndin fyri Miðvág og Sandavág, sum við loyvi frá Amti og Løgtingi, hava sett hann í starv. Felags skúlanevnd var fyri báðar bygdirnar, síggja vit í skjølunum og at prestur var formaður í skúlanevndini tey fyrstu árini.

Jákup Jakobsen

Um skúlanevndirnar undir Vága prestagjalds kommunu hava ført protokollir, so eru tær ikki til skjals og tessvegna vita vit ikki nógv um hesar nevndirnar, hvør sat í teimum o.a. Uttan at prestur var føddur formaður og so okkurt einstakt navn annars nevnt onkuntíð. Og at tær stundum eru nevndar í skrivum har m.a. onkur tilráðing er frá teimum viðhvørt. Í skrivi frá 1876 sæst m.a., at skúlanevndin fyri Miðvág og Sandavág verður nevnd "Den frivillige Skolecommision for Sandevaag og Midvaag Skole". So nevndin skipar seg sjálv, eftir øllum at døma, og stendur t.d. fyri innsavnani av tí sjálvbodna stuðlinum til læraran. Og tað er nærliggjandi at hugsa, at tey, sum lata sjálvbodna stuðulin, eru tey, sum velja nevndarlimirnar, uttan prest, ið sum nevnt er fastur limur.

Lønina til læraran rindaðu Miðvágs- og Sandavágs sókn helvt um helvt. Har helvtin av statsstuðlinum til læraran varð sett á roknskapin hjá Miðvágs sókn og hin helvtin hjá Sandavágs sókn. Somuleiðis við sjálvbodna stuðlinum, varð helvtin goldin av borgarum í Miðvági og hin helvtin av borgarum í Sandavági.

Her er eru samlaðu upphæddirnar úr báðum bygdunum settar:

Úr Statskassanum fekk hann øll árini, 1873 til 1901, 200 kr. fast um árið. Frá 1878 kemur eitt eyka ískoyti frá Statinum, sum árini 1878 til 1889 er um 150 kr. í miðal um árið, og so nógv minni árini 1890-91, bert 72 kr. um árið, so aftur frá 1892 til 1901 um 180 kr. um árið í miðal. T.v.s. at samlaði stuðulin úr Statskassanum er: 1873-77, 200 kr., 1878-89, 350 kr. og 1890-1901, 390 kr. í miðal tølum.

Í sjálvbodnum stuðli frá íbúgvunum fekk hann árini 1873-1875, 200 kr. um árið og 1876-1900, 300 kr. um árið í stuðli. Seinasta árið, 1901, er sjálvbodni stuðulin tó 180 kr., har næsti lærarin helst eigur góðan part av hesum stuðlinum. Hetta vegna at lærarin gavst í ótíð.

Jákup Jakobsen er sum skilst farin av bygdini við endan av februar 1901. Í einum skrivi seinni hetta árið verður nevnt, at læraraloysi var í 4 mánaðir, sum má vera frá fyrst í mars til summarfrítíðina. Næsti lærarin byrjaði eftir summarfrítíðina.

Sjálvbodni stuðulin frá borgarunum var annars latin í bæði pengum og naturalium, sum var torv og hoyggj. Prestagjalds kommunan rindaði einki í læraraløunum fyrstu mongu árini.

Ársløunin hjá Jákup Jakobsen, lærara, var sostatt henda, ta tíðina hann var í Miðvági: 1873-75, 400 kr. 1876-77, 500 kr., 1878-90, 650 kr. og 1891-1900, 690 kr. í miðal tølum.

Til skúli var bygdur í Miðvági í 1882 helt Jákup Jakobsen skúla í einum gomlum húsum Niðri á Toft í Miðvági.

Í Sandavági helt hann skúla í húsunum hjá Jákup Zachariassen, Gamla sýslumanni, men tá hesi hús vóru tikin til handil av Niels Jakku Nielsen, varð skúlin fluttur í húsini hjá Langa Kristiani. Eini rímiliga nýggj hús, smb. skjølunum bygd í 1867 og umbygd til skúla í 1875.

Sambært roknskapinum í 1875 tók Sandavágs sókn 600 kr. í láni til keyp og umbygging av húsunum. Keypið kostaði 479,64 kr. og umbyggingin at gera eina skúlastovu har kostaði 168,28 kr. Ella tilsamans 647,92 kr., og var skúli hildin har til 1896, tá nýggjur skúli varð bygdur í Sandavági.

Tó at kommunan ikki rindaði nakað til lærara, so varð á forstandarskapsfundi longu hin 2. juli 1874 samtykt, at seta skúlaroknskapin á kommunuroknskapin.

Hetta er fyrstu ferð tosað verður um skúlaskap á kommunufundi í Vágum.

Lærarin hevur tó gjørt onkur arbeiði fyri kommununa. Í viðmerkingum til roknskapin 1875/76 sæst, at 5,12 kr. vóru goldnar læraranum, J. Jakobsen, fyri at hava skrivað 15 ½ ørk fyri sóknarnevndina, sum má sigast at vera lutfallsliga góð løn, verður sagt.

Sum skilst vil lærarin í 1878 hava løunina hækkaða upp til 600 kr. Og fær hetta stuðul frá sjálvbodnu skúlanevndini, sum heitir á kommununa um at rinda 100 kr. afturat árliga.

Sum viðmerking kann nevnast, at aðrastaðni verður nevnt, at ein vanlig ársinntøka hjá fiskimanni lá um 500-600 kr., við heimaarbeiði og øðrum íroknað. Tað er helst í hesum ljósi, lærararnir vilja hava løunarhækkan til í minsta lagi eina vanliga ársinntøku.

Ístaðin fyri at rinda fyri at hækka løunina, vil forstandarskapið heldur hjálpa á annan hátt. Tað er við at útvega læraranum frían bústað, sum má merkja, at teir vilja útvega honum eina nýggja íbúð. Og sum nevnt, helt hann skúla í einum gomlum húsum niðri á Toft, har tað segðist vera trongligt og kanska ikki so væl egnað heldur. Helst búði hann har eisini, tað er tó ikki upplýst. Men tað er nú, at hugsanin kemur at byggja ein nýggjan skúla. Sum so verður næsti skúlin bygdur varð í Miðvági.

Tað hevur tó eydnast at fáa Statskassan at hækka stuðulin, tí júst í 1878 kemur eyka stuðul frá Statskassanum á 150 kr. um árið, sum so tilsamans verður 350 kr. um árið frá Statinum. Mest sannlíkt er tað skúlanevndin, sum hevur staðið fyri hesum. Forstandarskapið sæst ikki hava umtalað henda møguleika í hesi tíð.

Jákup giftist í 1879 Annu f. Kjælnæs, ættað úr Tórshavn. Eru ikki skrásett at vera gift í Vágum, so helst eru tey gift í Havn, haðan bæði vóru ættað.

Í fólkateljingini 1880 búgva tey í einum húsum í Miðvági, sum møguliga eru húsini niðri á Toft, har skúlastovan var. Jákup Jakobsen, 26 ár, giftur, húsfaðir, skúlalærari, Tórshavn. Anna f. Kjælnæs, 25 ár, gift, kona hansara. Margreta Súsanna Haraldsen, 14 ár, tænir í húsinum. Tænastugentan var úr Sandavági, fødd 15.3.1865. Fólkateljingin var 1.2.1880.

Í fólkateljingini 1890 búgva Jákup og Anna í ónevndum húsum, sum tó nú er íbúðin í skúlanum. Hann 36 ár, skúlalærari "for Midvaag og Sandavaag", Tórshavn, hon 35 ár, kona hansara, húsmóður, Tórshavn. Nú hava tey eitt "plejebarn", Hanna Elisabeth Jacobsen, 10 ár, Tórshavn. Helst er hetta ættarfólk hjá teimum.

Frá 1. oktober 1885 til 30. september 1888 var Jákup Jakobsen lokalur grannskoðari hjá Vága sóknar kommunu. Hetta var tíðina Godtfred Heinesen sat í forstandarskapinum hjá kommununi, hann hevði verið lokalur grannskoðari áðrenn og tók við aftur aftaná. Høvuðs-

uppgávan hjá lokala grannskoðaranum var at seta roknskapin hjá kommununi upp og at fyribils góðkenna hann. Hann varð síðan góðkendur av forstandarskapinum, so av løgtings grannskoðaranum og so til seinast av Løgtinginum, har Amtið helst eisini hevur gjøgnumgingið roknskapirnar. So tað gekk ígjøgnum hampuliga nógvar hendur. Kommunan fekk eisini stundum viðmerkingar um okkurt smávegis.

Frá 1893 byrjaði lærarin at rinda inn til eftirløn. Fyrsta gjaldið var 3,44 kr., hareftir varð tað fast 2,75 kr. árið tey árini hann var lærari í Vágum. Sóknin skuldi eisini rinda til eftirløn til læraran, og hetta var fyrsta útreiðslan hjá kommununi til lærara. Fyrsta árið var tað 7,92 kr., síðan var tað um 8,30 kr. um árið ta tíðina Jákup Jakobsen var lærari her.

Á fundi í forstandarskapinum hin 3. oktober 1898 var á skrá umsókn frá Jakobsen lærara, har hann hevði sókt um at fáa endurgjald fyri eitt kamar, hann hevði latið gera á loftinum í skúlanum í Miðvági fyri egna rokning. Útreiðslurnar vóru 60 kr. Tað varð einmælt samtykt at veita honum 10 kr. um árið í 6 ár.

24. mai 1901 kemur skriv frá skúlastjórnini, at J. Jakobsen lærari er settur lærari í Frobiar sókn.

Sambært bókini "Lærarafólk í Føroyum 1870-1976" fór hann úr Vágum at vera lærari á Tvøroyri har hann var fyrstilærari. Vegna eygnasjúku varð hann eftir umsókn loystur úr embætinum og flutti til Tórshavnar, har hann bygdi sær hús. Nær hetta var, stendur ikki nevnt, hvørki í hesi bókini ella seinnu bókini, "Føroyskir fólkaskúlalærarar 1870-1997".

Í Dimmalætting, 30. oktober 1915, stendur, at Jakob Jakoben, skúlastjóri, gavst við Tvøroyar skúla í oktober 1915 og flutti til sín føðibý. Hann er ein av veteranunum í føroyska skúlanum og var næmingur í fyrsta flokkinum í Føroya Læraraskúla, har nú bert ein lærari er eftir í tænastu, og er tað Skaalum, lærari í Hvalba. Jakobsen virkaði síni flestu ár við skúlan í Miðvági. Nú hann gevst, sigur Dimmalætting sera vakurt um hann: "Han kan med Glæde og tilfredshed se tilbage paa sin lange Arbejdsdag, da han var enn dygtig og samvittighedsfuld Lærer, som levende interesserede sig for sin Gerning. Han var desuden en udmærket Kollega." Annars verður sagt, at kona hansara var dóttir nú deyða Kjelnæs skómakara, Tórshavn. Í Miðvági gjørdi hann ein vakran urtagarð tætt við skúlan, og í Suðuroy fekk hann eisini høvi til at røkja henda áhuga sín. Jákup Jakobsen, lærari, doyði í desember 1932.

Gamli skúli

Nevni skúlan her, Gamli skúli, og tað er við nútíðar eygum og nútíðar nevning. Tá skúlin varð bygdur var tað sjálvandi Nýggi skúli ella nýggjur skúli.

Á fundi í forstandarskapinum fyri Vága prestagjalds kommunu 24. juni 1878, varð upplýst forstandarskapinum, at skúlanevndin í Miðvági hevði tikið avgerð um at søkja Statskassan um stuðul til at byggja ein nýggjan skúlabygning. Forstandarskapið lovaði at viðmæla umsóknina so skjótt ein kostnaðarmeting varð gjørd.

Henda frásøgn gevur okkum tvær upplýsingar: Sjálvandi tí, at nú er ætlanin at fara undir at byggja skúla, men eisini, at nú er tann sjálvbodna skúlanevndin í Miðvági og Sandavági upploystur, sum umtalað varð í 1873, og nú hava Miðvágur og Sandavágur hvør sína skúlanevnd.

Forstandarskapið tók undir við uppskotinum, og tað var kanska ikki so undarligt, tí Georg Engelsted, prestur, sat sum formaður bæði í forstandarskapinum og var føddur formaður í skúlanevndini, sum prestarnir vóru langt upp í tíðina fyri øllum skúlanevndunum í prestagjaldinum. Engelsted fór annars frá sum formaður í báðum nevndunum, hin 23. september 1878, tá hann fór niður aftur til Danmarkar. Fyri kommununa tók Zacharias Nielsen, sýslu-

maður, Sandavági, við og sat sum formaður til 1882. Í 1879 kemur annars Jákup Jakobsen, lærari, í forstandarskapið, og situr har fyri Hjort prest, smb. skrivi frá 7. november 1879. Hann var næstformaður tíðina, hann sæt har, sum eisini var til 1882. 1. oktober sama ár tekur Søren Hansen Hjort prestur sati í forstandarskapinum og gerst formaður. Og tá gerst hin navnframi Godtfred Heinesen, handilsmaður og reiðari í Miðvági, næstformaður.

Kostnaðarmeting av skúlanum

17. juli 1878 verður ein kostnaðarmeting til nýggjan skúlabygning í Miðvági send Færø Amts Skoledireksjon. Í kostnaðarmetingini, sum er sera sundurgreinað, har næstan hvørt sprek verður nevnt, stendur m.a., at mett verður at taka 144 dagsverk á 2 kr. at laða skúlan. 18 dagsverk á 2 kr. at pussa skúlan uttan við sement. 36 dagsverk á 2 kr. at pussa skúlan uttan við kálki. 144 dagsverk á 1,50 kr. at bróta grót. 96 dagsverk á 1,50 kr. at føra grót. 40 dagsverk á 1,50 at grava út grundina. Í alt 816 kr. Av tilfari verður mett at brúka 6 tunnur sement á 20 kr. stk. 12 tunnur av kálki á 6 kr. 50 tunnur av sandi úr Sandavági á 50 oyru. Krút, fjús, viðlíkahald av steinborðum o.a. 100 kr. Fernis og máling 200 kr. í alt 517 kr.

Syllar, bjálkar, undirsløg, dragbjálkar og viður annars umframt 1 jarnbjálki við skúvugangi í báðum endum í alt 1.441 kr. Harafturat ein rúgva av tingum, so sum seymur, vindeygu, hurðar, lás, hongsul og 3 kakkelovnar.

Samlaði kostnaðurin av skúlanum er mettur at vera 5.473 kr.

Lagt verður afturat, at Miðvágur og Sandavágur eru eitt skúlaøki og at lærarin annanhvønn dag undirvísir í hvørjari bygd. Fyri tveimum árum síðan fekk Sandavágur ein skúlabygning, har øll børnini fáa verið inn í senn (eini umbygd sethús). Í Miðvági verður framvegis skúlastova leigað, og har passa ikki øll børnini inn í senn, og hindrar tað undirvísingini nógv. Umframt skúlastovu er ætlanin at gera íbúð til læraran í skúlabygninginum. Eitt stykki er, sum hoyrir til skúlan, hetta stykki nýtir fyrrverandi lærarin Jørgen Frans Jacobsen. Ætlanin er at byggja skúlan á hesum økinum. Vága prestagjalds kommuna eigur økið og er ætlanin at Miðvágs sókn keypir økið og rindar hinum sóknarbygdunum eina passandi samsýning fyri teirra lut. Av tí at Løgtingið hetta fíggjarárið hevur stuðlað skúlabygging í Vestmanna við tilfari, komfýri og kakkelovnum og øðrum verður heitt á Løgtingið um eisini at stuðla hesi skúlabygging. Umframt kostnaðarmetingina er tekning send við av skúlanum. Undirskrivað umsóknina hevur skúlanevndin í Miðvági, Georg Engelsted, Sámal Jákup Niclasen, Hans Kristian Joensen og Jóhannus Rasmussen.

Viðmælisskriv, dagfest 19. juli 1878, verður eisini sent frá forstandarskapinum. Har verður nevnt, at um Statskassin bert vil stuðla ætlanini partvís, verður tað sera trupult at føra ætlanina út í lívið, tó at arbeiðið er sera neyðugt. Fryktast kann eisini, at hetta arbeiði kann falla saman við arbeiðinum at byggja nýggj læknahús, og kemur tað at tyngja sera nógv um hjá sóknarnevndini og má metast, at skattabyrðan verður duppult so stór sum nú. Tí verður søkt um góðan stuðul og vælvilja til nevndu ætlan. Undirskrivað hevur alt forstandarskapið.

25. november 1880 kemur skriv frá skúlastjórnini um at tað úr Statskassanum eru játtaðar 4.000 kr. til skúlabygging í Miðvági. Peningurin kann krevjast útgoldin av "Jordbogskassen".

Við tað at metingin segi, 5.473 kr., so eru 1.473 kr., umframt møguligur meirkostnaður, at fíggja hjá sóknini. Og har kann sigast, at tað bleiv alt gjørt við pliktarbeiði.

Byggilendið

5. apríl 1880 var eyka fundur í forstandarskapinum. Allir møttir uttan forstandarin úr Mykinesi, sum vegna serstøku viðurskiftini sjáldan møtti. Sóknarpresturin, sum var skúlannevndar formaður, var eftir umbøn, eisini við á fundinum. Viðvíkjandi skúlabyggingini í Miðvági bað formaðurin fyri skúlanevndina, Søren Hansen Hjort, prestur, forstandarskapið siga sína

hugsan um at byggja skúlan í Miðvági á Steinsmørk, um so var, at peningur var játtaður til skúlabygging.

Tíggju dagar seinni, hin 15. apríl 1880, verður skriv sent "Færø Amts Skoledirektion" (Skúlastjórnin), sum er sera áhugavert. Skrivið er í samband við at forstandarin í Miðvági, Sámal Jákup Niclasen, hevur spurt, hvussu er við Steinsmørk, sum skúlaverkið skal eiga. Um so er at stuðul fæst til skúla, um hann kann byggjast har, og hvussu ognarstøðan er í smb. við hinar sóknarbygdirnar? Sagt verður, at henda mørk, smb. kallsbókini, hevur hoyrt til prestagarðin. Og at í smb. við kongaliga avgerð frá 16. september 1839, er henda jørð latin til skúlaverkið í oynni og eisini at fyrrverandi lærarin, Jørgen Frans Jacobsen, í síni tíð, í skrivi til hansara frá Skúlastjórnini, 3. mars 1856, fekk valið millum gjald í peningi, pensjón ella skúlabygningin til ogn og brúk av trøðni. Og rímiliga valdi hann tað seinasta, tá hann síðan hevur brúkt jørðina uttan leigu, men hevur eisini seinni bygt á trøðni og partvís steinsett part av trøðni til fiskastykki. Viðmerkt verður, at trøðin er sera breið niðast og er tí væl egnað at byggja skúla á, ikki bara tí at hon liggur miðskeiðis í bygdini, men eisini at sandurin niðanfyri er serstakliga gott spælipláss hjá børnunum.

Nær skúlaverki var byrjað í prestagjaldinum er ilt at siga nakað um, verður sagt, tí prestaarkivið í oynni brendi í 1839. Men í sýsluarkivinum er eitt skriv frá skúlastjórnini frá 4. ella 7. oktober 1830, sum er um at fáa skúlagongd í øllum sóknarbygdunum, har tað sýnist, at skúlagongd longu er í Miðvági.

Partvís tí avgerðin ikki liggur hjá forstandarskapinum og partvís tí, forstandarskapið ikki hevur allar neyðugar upplýsingar, verður málið sent skúlastjórini til víðari kanning. Eisini verður spurt um: 1) Um allar sóknarbygdirnar eiga Steinsmørk? 2) Í Sandavági og Miðvági er longu skúlaundirvísing og um hesir ikki longu eiga rættin til trøðna, tá teir neyvan hava nakað at gera við at rinda pensjón til eldra læraran? 3) Um tað ikki longu uttan ánarans samtykki kann byggjast skúli á trøðni? 4) Hvussu ein skal gera við møguliga ongnarskapin hjá hinum sóknarbygdunum? Viðmerkjast skal eisini, at Jørgen Frans Jacobsen hevur spurt um at keypa trøðna fyri ein bíligan penga.

Skúlastjórnin skrivar hin 21. januar 1881 um "Stensmørk" í Miðvági, har forstandarskapið verður biðið um at gera "den fornøden Overenskomst" viðvíkjandi grundstykki til nýggja skúlan. Skúlastjórnin heldur at fyrrv. lærarin eigur rætt til brúk av trøðni so leingi hann livir, men at hon so eigur at falla aftur til skúlan og sóknina eftir hansara deyð. Men væntað verður ikki at f.v. lærarin, núverandi handilsmaður, fer at seta seg ímóti at bygt verður á ein part av trøðni, um hann fær eitt hóskandi endurgjald fyri tað.

Skrivað verður til Jørgen Frans Jacobsen hin 1. februar 1881, og viðløgd avrit av skrivunum frá 15. apríl 1880 og 20. februar 1881. Viðgingið verður, at hann eigur brúksrættin so leingi hann livir. Víst verður eisini til skriv frá minnisteriinum, 7. desember 1855, tá skúlin skuldu niðurleggjast, at tað útrykkiliga stóð, at nevnda trød skuldi falla aftur til skúlaverkið ella falla aftur til prestakallið eftir hansara deyð. Og at tygara ynski um at keypa trøðna soleiðis illa kann gangast á møti. Kommunan bjóðar tó eina semju, og tað er, at um f.v. lærarin vil lata burtur av stykkinum niðast til at byggja skúla á, so ferð kommunan ikki at seta seg ímóti, at hann kann keypa ein part av trøðni og hevur restina til brúks.

16. februar 1881 er langt skriv endurgivið í kopibókini. Tað er ikki nevnt hvønn tað er sent til, men helst er tað til Skúlastjórnina. Har verður nevnt, at Jørgen Frans Jacobsen f.v. lærari, sum hevur brúkið av Steinsmørkini, 5. februar hevur svarað, at um hann ikki kann keypa alla trøðna, so vil hann hava leigu fyri tað, sum hann missir. Hann ynskir at keypa tað, sum liggur omanfyri húsini hjá sær og vil lata tað av trøðni, sum er vestanfyri ánna og vil hava hoyggj í endurgjaldi fyri tað mista, sum svarar til tað, lendið hevði givið.

Har sigur forstandarskapið seg ikki kunna geva hesa leigu, partvís tí kommunan sum so



Brot úr skeytinum upp á partin av Steinsmørk hjá Jørgen Frans Jacobsen f.v. lærara.

ikki eigur nakra jørð, og tó at forstandarskapið hevur rætt at leggja skatt á, so ivast man í, um man kann leggja skatt á í hoyggi. Harafturat vildu nógvir trupulleikar staðist av slíkum. Góðskuni av hoynum vildi stríð helst staðist av, og so tað altíð at kunna fáa fatur á hoyggi, tá hoyggj ikki var nakað ein bara kann keypa. Harafturat vildi umsitingin av slíkum sáttmála gjøgnum langa tíð verið sera trupul.

Eisini sigur forstandarskapið seg ivast í tí, onkur hevði nevnt, at stykki har skúlin skal liggja, skal vera so stórt, at har skal kunna veltast 3 tunnur av eplum. Tað verður hildið verða temmilga yvirdrivið.

Viðvíkjandi tí, at trøðin kann leggjast aftur til prestagarðin verður sagt, at trøðin fyri tað fyrsta liggur langt frá prestagarðinum, so ivasamt er hvussu stóra nyttu garðurin fær av henni. Víst hevur prestagarðurin mist okkurt afturat, tí ein einkja býr í "anexgaarden" (Kálvalíð). Men við bøin hjá presti liggur ein stikað ódyrkað trø, sum er størri enn bøurin, ið hoyrir til garðin. Og varð henda løgd har fyri at endurrinda missin av nevndu trøðni. Men umleið 50 ára sannroynd hevur víst, at uppsitararnir av garðinum ikki hava megnað at dyrka hesa trød.

Og verður hetta helst sagt í tí týdningi, at teir tessvegna helst ikki hava havt so nógv brúk fyri meira lendi.

Til seinast verður nevnt, at staðið har byggjast skal ikki enn er endaliga ásett, men at grótið, sum skal brúkast helst má brótast niðri við strondina, og at vandi er fyri, at hetta skolar burt, tá einki stað er at bjarga tí upp á. Og kann arbeiðið tí ikki byrja fyrr enn málið um grundstykkið er avgjørt. Og er tað tí av avgjørdum týdningi at fáa eina avgerð skjótast til ber.

2. mai 1881 er aftur skriv sent skúlastjórnini um Steinsmørk, og um hvussu farast skal fram við býtinum av mørkini. Har verður nevnt, at hin 29. apríl var frá skúlanevndini í

Miðvági sent eitt tilboð frá fyrrverandi læraranum, J. Fr. Jacobsen, soleiðis at tað møguliga kann byrjast at byggja skúlan. Sent verður ein avskrift av skrivinum frá skúlanevndini og avskrift av kravinum frá J. Fr. Jacobsen. Tað sýnist sum J. Fr. Jacobsen nú vil lata grundstykki til skúlan fyri ein prís, sum tingast kann um. Kopibókin er annars væl og týðiliga skrivað, men júst hetta skrivið er sera ótýðiliga skrivað og ringt at lesa, men ein skilir, at eisini verður spurt um, hvørt trøðin skal býtast sundur í stykkir og hvussu hetta skal gerast. Nevnt verða nøkur dømi. At stykki A, 2562 ½ kvadrat alin *(uml. 1708 m²)*, verður býtt í 5 stykkir. Stykki B, 1096 kvadrat alin *(uml. 730 m²)*, verður býtt í 2 stykkir og stykki C, 4312 kvadrat alin *(uml. 2875 m²)*, verður býtt í 9 stykkir. Hví hetta skal gerast verður einki nevnt um, men helst er tað ynski frá miðvingum um at fáa traðarstykkir ella grundstykkir. Nøkur skrivlig áheitan á forstandarskapið hesum viðvíkjandi er kortini ikki skjalfest nakrastaðni.

Í mai 1881 eru, smb. skráseting, 3 skriv komin inn. Eitt er tekning av skúlanum í Miðvági. Annað er leiðbeining til útlufting av skúlabygningi, hesi bæði fyrstu eru smb. seinni tilvísing, dagfest 28. apríl 1881. Triðja er "Beskrivelse over de paatænkte nye Skoler paa Færøerne." Hvørjir hesir eru verður einki nevnt um og hesi skjøl eru tíverri ikki longur at finna í skjalagoymsluni.

Skriv dagfest 16. aug. 1881 frá Kirke og Undervisningsminnisteriet er sent frá amtinum hin 4. september viðvíkjandi "Stensmarken" í Miðvági. Eisini er ein tekning "grundrids" av Steinsmørkini komin.

Á fundi í forstandarskapinum 29. september 1881, var samtykt, at sýslumaðurin og Sámal Jákup Niclasen, skuldu finna eitt hóskandi stað at byggja skúlan í Miðvági á og fáa til vega grundstykki til sama. Hesir skuldu eisini, saman við sóknarprestinum, hava umsjón við byggingini av skúlanum.

Sambært skrivi 8. oktober 1881, er stað nú funnið at byggja skúlan á. Nú verður sagt, at staðið á Steinsmørk, har ætlanin var at byggja skúlan, vísti seg at vera sera ójavnt í dýpi og at botnurin var sera ringur. Forstandarskapið hevur nú funnið eina grund, sum liggur uppat Steinsmørk, tað er eitt stykki hjá Godtfred Heinesen, Miðvági, og hevur hann gingið við til at býta um tvey javnstór stykkir, so hann fær burtur av Steinsmørk, tað hann letur afturfyri til skúlan. Hetta stykkið hevur eisini tann fyrimun, at tað liggur nærri spæliplássinum á sandinum Men tað má berast skjótt at, tí Godtfred ætlar sær av landinum við tað fyrsta. Nú verður vónað, at fáa góðkenning til hetta.

22. oktober 1881 kemur svar frá amts skúlastjórnini, við loyvi til "at Mageskifte med G. Hejnesen til Skolegrund."

Við hesum var komið upp á pláss við at fáa grundstykkið til skúlan. Sum eisini sigur, at tað var ikki á Steinsmørk skúlin var bygdur, men á einum stykki beint niðanfyri, hjá Godtfred Heinesen.

Á eykafundi 9. juni 1883 var tosað um jarðarskattin á Steinsmørk. Og var avgjørt at lutfallið skuldi vera hetta:

A. Tað skúlin longu hevur fingið, svarar til 34/100.

B. Tað Jørgen Frans Jacobsen hevur ognað sær, svarar 17/100.

C. Tað stykki Jørgen Frans Jacobsen nýtir, men sum seinni fellir til skúlan, svarar 49/100.

Viðv. stykki "A." kann viðmerkjast, sum longu er nevnt, at hetta er stykkið Godtfred Heinesen hevur yvirtikið smb. makaskifti.

22. apríl 1884 hevur skúlastjórnin sent skriv og skeyti til Jørgen Frans Jacobsen upp á sunnasta partin av Steinsmørk í Miðvági, har Steinsmørk í skrivinum er nevnd at vera hagaleys trød. Nevnt verður, at skeytið er handað J.F. Jacobsen og verður hetta stykkið, smb. viðtøku frá 4.

juli 1881, latið honum sum ogn. Støddin á stykkinum var: Breidd móti norði 38 alin, móti suðuri 52 al, móti vesturi 40 al og móti eysturi 48 al. Í smb. við tinglesingina varð virðið á stykkinum sett til 50 kr. Tinglesing og skráseting kostaði kommununi 2 kr.

Stykkið kommunan fekk og sum var makaskift við Godtfred fyri eitt av somu stødd var: N: 65 al, S: 60 al, V: 42 al og E: 40 al. Hartil skuldi kommunan hava rætt til viðurlagsfrítt at gera ein veg 6 alin breiðan niðanfyri bygningarnar hjá J.F. Jacobsen.

Ósemja um støddina á skúlanum

14. desember 1881 var eykafundur í forstandarskapinum. Grundin var tann, at bygginevndin til skúlan, sum var prestur, sýslumaður og Sámal Jákup Niclasen, ikki kundi semjast. Ósemja var um støddina av bygninginum og um innrættingina. Harafturat hevði Sámal Jákup Niclasen, kommunuforstandari í Miðvági, sagt, at hann hevði uppgivið arbeiðið í nevndini. Allir limir vóru møttir uttan forstandarin, Jákup Jensen, úr Mykinesi. Og vóru teir: Zacharias Nielsen, sýslumaður og formaður, Sandavági, Jákup Jakobsen, lærari og næstformaður, Miðvági, Tummas Sigvald Haraldsen, Sandavági, Sámal Jákup Niclasen, Miðvági, Jóan Dánjal Olsen, Sørvági og Óla Jákup Guttesen, Bø. Harafturat vóru á fundinum: Hjort, prestur, og hinir báðir limirnir í sóknarstýrinum í Miðvági, Hans Kristoffur Joensen og Jóhannes Rasmussen.

Eftir nakrar tingingar var atkvøtt um, hvørt skúlastovan skuldi gerast størri enn tær ætlaðu 8 x 10 alin. Allir atkvøddu "ja" uttan Sámal Jákup Niclasen, sum helt 8 x 10 vera nóg stórt. Síðan var avgjørt at skúlin skuldi vera 2 alin longur enn ásett áður. Sámal Jákup Niclasen vildi atkvøða fyri hesum, um skúlin ikki gjørdist longur enn ætlað, nevniliga 22 alin. – Við teimum 22 alin er so læraraíbúðin eisini.

Síðan setti Sámal Jákup Niclasen fram uppskot um, at hesir 2 alin so skuldu takast frá læraraíbúðini, sum ístaðin fekk eitt rúm eyka á loftinum. Atkvøðugreiðsla fall soleiðis, at bert Sámal Jákup Niclasen atkvøddi fyri, Óla Jákup Guttesen atkvøddi ikki og hinir atkvøddu allir ímóti. Longdin á bygninginum til 24 alin *(uml. 15 metur)* var sostatt samtykt. Har so læraraíbúðin bleiv 8 x 12 alin. Hareftir varð samtykt av byggja skúlan við spóntaki, ótilgjørdum lofti og útlufting millum veggirnar.

Vit síggja, at sóknarpresturin fær atkvøðurætt á fundinum, tó at hann ikki er limur í forstandarskapinum, men ikki hinir báðir limirnir í sóknarnevndini í Miðvági.

Skúlin er tó bygdur breiðari enn ætlað, tí í virðismetingini av skúlanum er sagt, at breiddin innan er 10 alin og ikki 8 alin, sum nevnt er her. Longdirnar innan eru tó sum her nevndar.

Fyrireikingar til byggingina

Í roknskapinum 1880/81 hevur Miðvágs sókn fingið inngoldið 4.000 kr. kontant sum stuðul úr Statskassanum at byggja skúla fyri. Av hesum vóru hetta roknskaparárið brúktar 672,97 kr. at keypa tilfar til skúlan.

Skúlastjórnin hjá Amtinum hevði skrivað til kommununa hin 28. apríl 1881, har tekning av skúlanum í Miðvági var við og leiðbeining um útlufting.

Forstandarskapið, og helst sóknarnevndin í Miðvági og skúlanevndin, hava so tosað um málið. Og eitt lítið ár seinni, hin 23. februar 1882, skrivar forstandarskapið til Skúlastjórnina, og vísir til brævið árið fyri og sigur, at forstandarskapið hevur samtykt at gera ymsar smærri broytingar við skúlanum. Skúlastovan og skúlin eru m.a. longd við tveimum alin.

Lagt verður afturat, at av fíggjarligum ávum verður gjørt spóntak, ótilgjørt loft og útlufting fram við veggjunum innanfyri panelið. Og er avgerð tikin um at broyta innrættingina av rúmunum nakað, sum viðløgd tekning sýnir. Viðvíkjandi dupultum kaminum og útluftingar-ovni, sum viðmælt hevði verið, so halda vit, at hetta ikki er so neyðugt í bygningum við bert einari



Skúlin í Miðvági. Um uniformeraðu menninir eru landmálarar, er myndin helst frá seinast í 1890-unum.

hædd, sjálvt um vit viðgana, at serliga skúlastovan eigur at verða væl luftað út, so vilja vit ikki nýta útluftingarovnar uttan so, at tað er lógarkravt. Har vit ikki halda hesar verða neyðugar í eini skúlastovu, sum bert um veturin verður hitað. Og har kunnu vindeyðu, sum kunnu opnast, eins væl nýtast og partvís luftventilar. Sum hervið virðingarfult verður mælt til.

10. mars kemur loyvi frá Skúlastjórnini til umsóknina frá forstandarsakpinum um nevndu broytingar í skúlanum.

Byggingin av skúlanum

Hans Chr. Joensen, á Ryggi, stóð fyri grótarbeiðinum, og Jens Sigvald Johansen, stóð fyri timburarbeiðinum.

Bygginevndin fyri skúlan skrivar hin 1. mars 1882 til Jens Sigvald Johansen, Miðvági, og sigur, at hann sambært tilboð 450 krónur, fær timburarbeiðið við skúlan at gera og fær hann forút eina ávísing á 50 kr., smb. tilboðnum.

Nakað av arbeiðinum var gjørt við pliktarbeiði, sum vanligt var við almennum byggingum. T.d. kirkjum og skúlum, tó ikki alt arbeiðið, áleggjast kundi vanliga einir 2 til 4 dagar pr. mann, um tað var stórarbeiði. Onkur hevur ikki verið so fegin fyri tað, og eitt dømi um hetta er við skúlabyggingini í Miðvági. Hin 22. juni 1882 er skrivað í journalina: "Poul Ole Jacobsen Midvaag erklærer sig nu villig til at udføre Pliktarbejdet til Skolebygningen i Midvaag." Hann hevur helst noktað og, kann ein ætlað, fingið rímuliga harða ávarðing um avleiðingar av at nokta slíkum boðum.

Viðvíkjandi bygginevndini til skúlan, so varð á fundi í forstandarskapinum, 1. juli 1882, samtykt, at í smb. við at sýslumaðurin kom at vera burturstaddur eina tíð, at velja Hans Kristoffur Joensen, á Ryggi í Miðvági, í nevndina. Hetta er júst meðan byggingin fer fram.

Annars stendur í roknskapinum fyri Miðvágs sókn 1881/82, at til byggingina av skúlanum í Miðvági varð ásett 6 dagar á 10 tímar til hvønn arbeiðsføran mann í bygdini millum 16 og 60 ár. Ella 60 tímar til hvønn mann. So her verður rímuliga nógv pliktarbeiði álagt.

Í Miðvági í hesi tíð vóru 76 menn millum 16 og 60 ár. Um vit siga at 70 av teimum hava verið førir fyri at arbeitt teir kravdu tímarnar, so hevur tað givið 4200 tímar og við 8 tíma dagsarbeiði, 525 dagsarbeiðir. Í hesi tíð verður í einum skrivi nevnt, at ein tímaløn varð mett til 50 oyru. Hetta vildið so givið virði av 2.100 kr.

Í sama roknskapi stendur, at av innistandandi til skúlabyggingina eru vunnar 116,73 kr. í rentum. Sum við statsstuðlinum gevur 4.116,73 kr. Áður vóru brúktar 672,97 kr. at keypa tilfar fyri. Hetta árið vóru brúktar 3.292,17 kr. til skúlabyggingina. Sostatt átti sóknin 151,59 kr. eftir av Statsstuðlinum til skúlabyggingina.

Í roknskapinum 1882/83 fyri Miðvágs sókn er nevnt, at sóknin hevði fingið 156,82 kr. fyri selt tilfar úr gamla skúlabygninginum. Og aðrar inntøkur í smb. við skúlan vóru, 18 kr.

Skúlin hevur sostatt kosta 3.965,14 kr. at byggja. Virði av pliktarbeiðinum var uml. 2.100 kr., sum gevur tilsamans runt roknað 6.000 kr.

Annars kann nevnast, at tað sum vanliga varð goldið til, var tilfar og so fyri formenn og handverkarar. Í hesum førinum timburmenn og vandar grótlaðaðar. Hjálparmenn hjá áðurnevndu og annað til byggingina, so sum at bróta grót og føra tað til skúlan er gjørt sum pliktarbeiði.

Eitt úthús var bygt til skúlan hetta fíggjarárið og kostaði tað 388,28 kr. Í virðismetingini av skúlanum verður annars sagt, at úthúsið varð bygt í 1883, antin er tað rangt ella var úthúsið ikki liðugt fyrr enn tá, sum væl kann vera.

Viðlíkahald tey fyrstu árini

Í roknskapinum 1883/84 eru brúktar 20,40 kr. til viðlíkahald av skúlanum, og 1884/85 eru brúktar 30,39 kr. Komandi árini heilt upp til 1891 sæst einki at verða brúkt til viðlíkahald.

Á fundið 14. juni 1887 verður sagt, at spóntakið á skúlanum í Miðvági var púra rotið, og varð samtykt at leggja takið av nýggjum við flag. Latið varð til sóknarnevndina í Miðvági at syrgja fyri, at arbeiðið varð gjørt á besta hátt og so skjótt til bar.

Í roknskapinum hetta árið sæst einki at vera brúkt til ábøtur ella umvæling av skúlanum. So tað má alt hava verið gjørt við pliktarbeiði.

Í roknskapunum frameftir síggja vit at 1896-1897 eru 55,84 kr. brúktar til umvæling av úthúsinum við skúlan. 1897-1898 eru 20,97 kr. brúktar til umvæling av skúlanum, næsta árið, 16,97 kr. og 1899-1900, 13,90 kr. til tað sama. Árini frá 1901 til 1915 eru eisini bara smáar upphæddir brúktar til viðlíkahald.

Á fundi í forstandarskapinum 25. juli 1908 varð samtykt, at áleggja øllum sóknarnevndunum at syrgja fyri, at fáa gólvini í skúlunum ferniseraði, seinast innan nýggjár og at syrgja fyri, at skúlarnir vóru reinir innan, og at hiti var í skúlastovunum.

17. mai 1910 samtykti forstandarskapið eitt uppskot um reingerð av skúlunum í Vága Prestagjalds Kommunu.

Á fundinum varð eisini samtykt, at Elias Joensen, lærari, fyri egna rokning letur gera ein kvist á skúlan í Miðvági, 5 alin langur og 8 alin breiður *(3,33 x 5,33 metur)* við teirri treyt, at kommunan endurrrindar Joensen lærara kostnaðin 10 fylgjandi ár eftir, at hann er farin frá sum lærari.

Elias Joensen fór frá sum lærari fyri aldur í 1928. Frá 1915 hevði Miðvágs kommuna tikið við. Á fundi í forstandarskapinum fyri Miðvágs kommunu, 2. desember 1930, varð samtykt at bjóða fyrrverandi læraranum, J.E. Joensen, 500 kr. til fulla avgerð fyri tað, hann eigur tilgóðar fyri kvistin á skúlabygninginum.

8. desember 1930 verður skrivað til J. Elias Joensen, pensioneraður lærari, Bøur, har nevnda avgerð verður sagt og lagt afturat: Smb. tínari uppgerð, sum verður send aftur, hevur tú goldið 391,37 kr. fyri kvistrúmið, hartil kemur gólv og tak, sum vit ikki kunnu meta til meira enn 100 kr. Bylgjutakið er so at siga fullkomuliga oyðilagt av rusti, og hevur soleiðis nærmast einki virði. Vit loyva okkum tí at spyrja, um tú góðtekur uppskotið hjá okkum. Gerast skal vart við, at tað, tú hevur lagt út fyri vatnleiðingsrør, er við í tilboðnum. Nevndu 500 kr. verða so at gjalda við 50 kr. um árið yvir 10 ár. Vit síggja fram ímóti tínum svari.

Smb. semju skuldu tær 500 kr., sum lærarin hevði lagt út fyri at gera kvistin, endurgjaldast honum yvir 10 ár, tá hann var farin frá sum lærari. Smb. roknskaparbókunum hjá kommuni var hendan skuldin tó niðurgoldin yvir 6 ár. Goldið soleiðis:

Ár	**1930**	**1931**	**1932**	**1933**	**1934**	**1935**	**Í alt**
Kr.	100	50	50	0	50	250	500

29. januar 1915 er eitt vask og tilhoyrandi sinkrør keypt til skúlan frá Ludvig Poulsen, Tórshavn, fyri 8,10 kr. Fyri at hava sett vaskið upp og sett vatn og avlop til fekk Sørin Danielsen, timburmaður, 3 kr.

Sambært øðrum rokningum vórðu hurðar og vindeygu málað hetta árið, og ein komfýrur í læraraíbúðini umvældur o.a.m.

Albert Poulsen og Hans Jørgensen senda hin 6. mars 1915 rokning fyri at hava umbygt og málað borð í Miðvágs skúla, 188 tímar á 25 oyru = 47 kr. – Út frá tíðini, teir hava brúkt eru helst øll borðini høvuðsumvæld og málað.

Í hefti um allar bygningar í Miðvági 1916 stendur um skúlan: Skúlabygningur við læraraíbúð, 24 x 12 alin. Laðaður upp av gróti og klæddur innan við panel, flagtak og kvistur. 4 rúm á loftinum, 2 kaminir, 1 komfýrur og 4 ovnar. Til skúlan hoyrir: Hjallur og hoyggjhús við torvgoymslu í kjallaranum 10 x 7 alin, timbur og flagtak. Stendur við skúlan.

Trygging av skúlanum

14. juni 1887 kemur skriv frá forstandarskapinum í Eysturoy, har forstandarskapið í Vágum verður biðið um at senda umboð á fund í Havn hin 28. juli, at tosa um, at gera eina "gensidig Forsikringsforening for Skolebygninger faa Færøerne."

Á fundi í forstandarskapinum 25. juni 1887 varð samtykt, at geva formanninum fulltrú at møta á fundi hin 28. juli 1887 í Tórshavn, at samráðast við umboð frá hinum forstandarskapunum um ein tryggingargrunn til teir nýbygdu skúlarnar og til skúlastovurnar kring landið.

Skriv verður sent skúlastjórnini hin 31. desember 1887, har sagt verður, at Vága prestagjalds kommuna ynskir at verða við í felags tryggingini av skúlunum í Føroyum. Og loyvir ein sær tí hervið at senda virðismetingina av byggningunum. Men tá tað enn ikki er vist, hvussu nógvar kommunur taka undir við tiltakinum, verður bíðað við at tekna nakra trygging. Og verður biðið um, at fáa nærri at vita um hetta. Og eisini, hvussu høgt hinir skúlarnir, sum hava fingið Statsstuðul, eru settir í virði. Tað varð sagt, at passandi er at meta virði av skúlum, sum hava fingið 4.000 kr. í Statsstuðuli, til 3.000 kr., við at draga frá 1.000 kr. fyri grundina og grótveggirnar. Um aðrir hava mett hægri, eru vit tilreiðar at leggja 500 kr. omaná teir báðar skúlarnar (í Miðvági og Sørvági), tá tað helst er best, um allir skúlar eru mettir nøkulunda javnt.

Her fáa vit helst at vita, at grundin til at metingin er gjørd væl lægri enn veruligi kostnaðurin at byggja skúlarnar, liggur í einari avtalu. Umframt, at tað helst verður hildið ov dýrt at tryggja teir fyri fult virði. Harafturat verður væl hildið, at um so er, at eldur kemur í og skúlin brennur niður, so stendur grótgrundin kortini eftir. Tað er so innrættningur, vindeygu, hurðar og tak, sum skulu gerast av nýggjum. Um ein trygging á 3.000 kr. hevði verið nokk til tað er kortini ivasamt.

Tvey skriv eru komin frá skúlastjórnini, hin 16. februar 1888, viðvíkjandi "den gjensidige Forsikringsforening for Skolebygninger paa Færøerne." Og 28. juli 1888 kemur skriv um, at ministeriið hevur góðtikið tryggingina.

Miðvágur um aldarskiftið 1900. Hvíta húsið t.h. á myndini er skúlin.
Postkort. - Myndin er rættað nakað upp og litløgd, s.j. 2022.

11. august 1888 kemur kvittan frá forstandarskapinum í Eysuroy, sum eyðsýniliga hevur umsitið "den gjensidige Forsikrings Forening ..." Miðvágur hevur goldið 6 kr. Sørvágur 5,60 kr. og Sandavágur 1,20 kr.

Við hesum eru skúlarnir í hvørt fall partvís tryggjaðir.

Árini heilt fram til 1932 er tryggingin fast 6 kr. um árið. Í 1932 hækkað til 29 kr. um árið, sum hon er upp til 1947.

Tað er so eitt av árunum millum 1948 og 1950 at kommunan skifti trygging yvir til Føroya Brunatrygging, sum møguliga hevur yvirtikið gomlu felags tryggingina. Upp til 1954 er gjaldið um 60 kr. um árið og hækkar frá 1955 upp til 132 kr. um árið, har tað heldur seg til 1959, sum vit hava tøl fyri. Næstu ferð, ein sær tøl fyri tryggingargjaldið, er í 1984, tá tað er 670 kr. um árið, sum tað so heldur seg á í nøkur ár.

Virðismeting av skúlanum

15. november 1887 kemur skriv frá "Formanden i Østerø Kommune" har sagt verður, at allir teir verandi skúlarnir og skúlastovurnar í Føroyum eru virðismettir, og er hetta sent inn til skjúlastjórnina, so hesir kunnu takast upp í "den gjensidige Forsikrings Forening."

17. desember 1887 er framd virðismeting av skúlanum í Miðvági:
"Dags dato have vi undertegnede Johan Rasmus Godtfred Hejnesen og Michel Danielsen af Midvaag ifølge Kommunalforstanderskabets Anmodning foretaget en Syn og Vurderingsforetning af Skolebygningen og en dertil hørende Udhusebygning her i Bygden.
1. En Skolebygning 24 Alen lang 12 Alen bred *(16 x 8 metur uttan)* opført i 1882, Veggene ere af Kampesten indvendig Kalkede og udvendig berappede (tunt lag) med Cement samt indvendig panelede med Tømmer. Bygningen har kun en Etage med en Højde mellem Gulv og Loft af 4 Alen 4 Tommer. Tag af Næver og Grønsvær.

Indvendig Indretning er 1 Skolestue 10 Alen Lang 10 Alen bred *(uml. 6,7 x 6,7 metrar)* forsynet med Vindovn samt behørige Skolebord og Bænke. Beboelseslejligheden er 12 Alen lang 10 Alen bred *(uml. 8 x 6,7 metrar)*, hvis Indretning er 2 Stuer med Magasinovene. 1 Soveværelse. 1 Spisestue. 1 Kjøkken med Komfur. 1 Forstue hvor fra der er Indgang til Skolestuen samt til Beboelseslejligheden og 1 Forstue med Indgang til Kjøkkenet hvorfra der er Opgang til Loftet.

Bygningen der har to fra Grunden opmurede Skorstene har en Verdi af 2800 Kr.

2. En Udbygning 10 Alen lang 7 Alen bred, opført i 1883 paa en med Cement berapped Kampestens grund der danner (gjølder) under hele Bygningen hvis Mellemhøjde er 3 Alen og afdelt i tre Rum 1 Faarhus 1 Kostald og 1 Latrineindretning. Tag af Træspaan. Etagen er afdelt til Kjæld og Hølade hvis Højde er 3 Alen 4 Tommer. Bygningen har en Verdi af 200 kr. Í alt 3000 kr.

Den lige Afstand mellem de her beskrevne Bygninger og den nermeste Nabobygning er c. *(viðm. einki nevnt)* Alen.

Det bemærkes at der hverken i de her beskrevne Bygninger ej heller i de nærmest beliggende Huse for Tiden drives noget brandfarligt Haandværk, bekreftes herved. Dato 17 Decbr 1887."

Hetta seinasta er nevnt vegna brunalógina.

Lítil inntøka smb. grundlógina

Í roknskapinum hjá Miðvágs sókn 1895-96 kemur ein lítil inntøka á 66 oyru um árið til skúlan, sum í roknskapinum verður nevnd, at verða goldin smb. grundlógini § 77. Og heldur hetta fram til roknskapin 1904-05.

§ 77 í Grundlógini frá 1849 segði: *"Domstolene ere berettigede til at paakjende ethvert Spørgsmaal om Øvrighedsmyndighedens Grændser. Dog kan den, der vil reise saadant Spørgsmaal, ikke ved at bringe Sagen for Domstolene unddrage sig fra foreløbigen at efterkomme Øvrighedens Befaling."*

Her fáa vit at vita, at hetta upprunaliga er samtykt á grannastevnu. Hví, hvør og hvussu er annars einki nevnt um.

Skarlaksfepur

Í 1893 og aftur í 1901 eru boð komin um at steingja skúlar vegna skarlaksfepur. Skriv er komið frá skúlastjórini hin 23. juni 1893: "Ordrer angaaende Skolens Lukning i Anledning af formentlig Skarlagensfeber eller andre indkommende Sygdomme." Og hin 9. oktober 1901 koma boð frá sýslumanninum um at steingja skúlarnar í Miðvági, Sørvági og Gásadali vegna skarlaksfepur. – Møguliga er feilur í skrivinum, tí sum vit síggja í seinna skrivinum, so var tað Sandavágs skúli og ikki Miðvágs skúli, sum varð stongdur og í Sandavági at sjúkan gekk.

Burtur úr hesi seinnu sjúkuni kom ein eitt sindur undarlig træta. Vit síggja hetta lýst í einum nokkso drúgvum brævi, skúlanevndin í Miðvági sendi Skúlastjórnini hin 28. november 1901, sum her er nógv stytt og har m.a. sæst, at umframt prest, so situr m.a. Dánjal Pauli Michelsen í skúlanevndini í Miðvági. Tí hann skrivar vegna skúlanevndina.

Málið snýr seg um, at fyrst var læraraloysi í Miðvági í 4 mánaðir fyrru helvt av 1901. Tá so annar lærari varð settur eftir summarfrítíðina hendir tað, at skarlaksfepur brýtur út í Sandavági og skúlin har verður stongdur. Tíðina skúlin varð stongdur í Sandavági hevur lærarin so havt skúlagongd í Miðvági hvønn dag. T.v.s. tey í Miðvági hava hesa tíðina havt dupult so nógva skúlatíð enn vanligt, sum væl er fyri at vinna mistu tíðina aftur. Nú vil skúlanevndin í Sandavági hava hetta javnað út, so tey hava læraran líka nógva tíð í Sandavági, t.v.s. hvønn dag í 4 mánaðir, somu tíð sjúkan vardi. Hetta mótmælir skúlanevndin í Miðvági.

Og sigur m.a., at skúlabørnini í Sandavági hava egentliga ikki mist nakað við at skúlagongd var í Miðvági. Og í øllum førum hevði bert verið hildin skúli í Sandavági annan hvønn dag. So talan kann ikki vera um 4 mánaðir. Tí helvtina av tíðini átti Miðvágur. Um hetta ikki bleiv so, vildi skúlanevndin í Sandavági hava endurgjald í peningi, t.v.s. teir vildu ikki rinda fyri lønina hjá læraranum hesa tíðina. Har sigur skúlanevndin í Miðvági, at í pengum vilja teir ikki rinda, so má tað verða við skúladøgum, men at vanliga skúlagongin nú skal halda áfram til summafrítíðina, vegna tað at børnini longu hava mist so nógva skúlatíð í ár. Men eftir summarfrítíðina 1903 kann hetta verða skipað við 4 døgum í Sandavági og 2 Miðvági um so skal vera. Annars verður nevnt, at eftir at skarlaksfepurin steðgaði í Sandavági hevur lærarin óavbrotið havt skúlagongd har í 5 vikur, og halda teir, tað skuldi verið nokk. Teir biðja Skúlastjórnina siga sína hugsan um málið.

Tað sæst so ikki meira til hetta málið, so helst endaði tað her og mátti skúlanevndin í Sandavági góðtaka, at hesar 5 vikurnar rindaðu tað, teir høvdu mist.

Elias Joensen, lærari

Elias Joensen varð føddur hin 14. august 1858, ættaður úr Bø. Hann fór á læraraskúla í Havn í 1876 og tók læraraprógv í 1878. Var heima ein vetur og fór so eitt ár á Testrup Højskole í Aarhus. Var í 1880 settur lærari í Sørvági, Bø og Gásadali, við bústaði í Sørvági. Hetta starv røkti hann til 1901, tá hann søkir starvið sum lærari í Miðvági og Sandavági. Elias Joensen, 32 ár, giftist hin 20. november 1890 í Bíggjar kirkju við Sofíu Malenu Heinesen, 23 ár, ættað úr Bø. Tey búðu so í læraraíbúðini í Sørvági. Men hann misti konuna tíðliga, tí hon andaðist longu í 1893 bert 25 ára gomul. Hon er jarðað í Sørvági "Skolelærers hustru" stendur í kirkjubókini.

13. juni 1901 verður skriv sent skúlastjórini, sum svar upp á skriv 24. mai, har sagt verður, at sóknin ferð at rinda sama sjálvbodna gjald til læraralønina sum higartil til nýggja læraran í Miðvágs – Sandavágs skúla. Nevniliga frían bústað, umframt 300 kr., harav lærarin tó hevur skyldu at móttaka ein part "in natura". 150 leypar av torvi, roknað til 50 kr. og eitt kúfóður av hoyggi, roknað til 50 kr. Restina kann hann fáa í peningi, men um hann heldur vil tað, kann hann fyri 72 kr. av restini fáa 12 slaktilomb fyri 6 kr. stk. Urtagarður hoyrir til læraraíbúðina. Til seinast kann nevnast, at roknað verður við, at hann fer at gera tænastu sum deknur og kann fyri tað rokna við at fáa "et Offer" á umleið 15 krónur.

Elias Joensen

Av tí at sóknirnar innan langa tíð verða býttar sundur, og tað tá verður settur ein lærari fyri hvørja sókn, og ein longu er byrjaður at tekna sjálvbodnan pening til endamálið, verður vinarliga heitt á skúlastjórnina, um at seta læraran fyribils og uttan nakran forrætt til nakra av sóknunum, eftir møguliga býtinum av sóknunum.

27. august 1901 verður skriv sent til skúlastjórnina, har spurt verður, um Elias Joensen kann verða settur sum fyribils lærari í Miðvági og Sandavági. Um hann longu er byrjaður eftir summarfrítíðina sum vikarur, er ikki nevnt, men kundi hugsast. Har var annars ongin lærari. Hin 6. september kemur játtandi svar frá skúlastjórnini. Og nevnast kann, at hin 1. september 1902 varð hann, smb. skriv frá Skúlastjórnini, settur í fast starv sum lærari í skúladøminum.

Á fundi í forstandarskapinum, 25. juli 1902, hildin heima hjá Dánjal Paula Michelsen í Miðvági, var á skrá skriv frá skúlastjórnini hin 4. juli, har forstandarskapið varð biðið um at koma við uppskoti um, hvussu lønin hjá lærarunum hjá kommununi skal verða skipað eftir 1. oktober. Allir limir møttir uttan Niels J. Nielsen í Sandavági og H.N. Niclasen í Miðvági og Jógvan Abrahamsen úr Mykinesi.

Fyri Miðvág og Sandavág kom uppskot um, at lønin vegna ta umhugsaðu sundurbýtingina, skuldi vera óbroytt, nevniliga frá sóknini 300 kr., harav lærarin kortini er skyldigur at taka fyri minst 100 kr. í torvi og hoyggi fyri ein prís á ávíkavist 33 1/3 og 17 oyru fyri leypin, og at lønin verður goldin samtundis sum statsstuðulin.

Tá sóknarpresturin ikki var heima, var ikki høvi at samráðast við skúlanevndina.

23. oktober 1902 kemur skriv um, at læraraløn hjá læraranum í Miðvági – Sandavági er fastsett til 500 kr. Læraraløn frá 1901 til 1915 var annars hendan:

1901: 550 kr., har uml. 150 kr. eru til fyrra læraran hetta árið og restin til seinna læraran.

1902-1908: 500 kr., harav sjálvboðin stuðul er 150 kr.

1909: 525 kr. 1910: 600 kr., 1911: 625 kr., 1912-14: 650 kr. og 1915: 700 kr.

Sjálvbodni stuðulin liggur árini 1910-15 um 175 kr. um árið.

Stattsstuðulin var 300 kr. um árið og er íroknaður nevndu tøl. Har fyrsta kommunan tey allar seinastu árini sýnist at hava "spýtt eitt sindur í kassan" og rindað upp til avtalaða gjaldið, tað sum írestaði frá sjálvbodna stuðlinum.

Frá 1. oktober 1915 kom Elias at arbeiða sum lærari hjá Miðvágs- og Sandavágs kommunum. Lønin hjá honum frá kommununi var 350 kr. upp til 1920. 500 kr. í 1921, 600 kr. í 1922 og síðan 800 kr. um árið, til hann gavst í 1928. Lønin var annars 50% frá kommununi og 50% frá Statinum, sum so her skulu leggjast afturat fyri at fáa fullu lønina hjá Eliasi hesi árini.

Frá fjórða kvartali í 1924 varð húsaendurgjald goldið, og fekk Elias 25 kr. fyri hetta kvartalið og síðan 100 kr. um árið til hann gavst.

Á fundi í forstandarskapinum fyri Miðvágs kommunu 16. juli 1928, var á skrá umsókn frá Elias Joensen lærara um eftirløn, við tað at hann til 30. september 1928 gevst í læraraembætinum í Miðvági. Samtykt varð at viðmæla málið uppá tað besta.

Elias Joensen búði síni síðstu ár í Bø, har hann hevði bygt sær hús. Hann doyði hin 6. januar 1938 og er jarðaður í Bø.

Hans Andrias Djurhuus lærari í skúladøminum

Hans Andrias Djurhuus varð føddur í Áarstovu í Havn í 1883. Í 1901 fór hann á háskúla í Føgrulíð. Her fekk hann á fyrsta sinni undirvísing í føroyskum. Í 1902 byrjaði hann á læraraskúla í Havn, haðan hann tók prógv í 1905. Var fyrst vikarur í Klaksvík, men tók so víðari útbúgving á Danmarks Læraraháskúla í Keypmannahavn veturin 1906/07. Heimafturkomin hevði hann privatskúla í Stinuborg í Havn 1907 – 09. Í 1909 søkti og fekk hann starvið sum lærari í skúladøminum í Miðvági og Sandavági.

Á fundi í forstandarskapinum 25. juli 1908 varð einmælt samtykt at søkja um at fáa settan ein lærara ella lærarinnu við skúlarnar í Miðvági og Sandavági afturat núverandi lærara. Byrjunarlønin skal vera 500 kr. og frí íbúð. Í hesum sambandi skal søkjast um lønarískoyti frá Statskassanum og um 2.600 kr. at byggja eina læraraíbúð fyri í Sandavági. Av teimum 250 kr., sum kommunan má rinda, skal Miðvágur rinda helvtina og Sandavágur helvtina. Nýggi lærarin skal búgva í Sandavági, og skal Sandavágur syrgja fyri, at læraraíbúðin verður bygd.

Hetta seinasta verður sagt, tí at áður hevði lærarin, sum nevnt, búð í Miðvági. Tá ein so verður settur afturat, er mett rímuligt, at hann býr í Sandavági. Og teir koma so at hava hvør sín skúla. Skúlaskipanin er tó framvegis felags.

22. mars 1909 var eykafundur í forstandarskapinum, hildin heima við hús hjá sýslumanninum í Sandavági. Allir limir møttir uttan úr Mykinesi, Sørvági og Miðvági. Umframt sóknarprestin var ein limur møttur fyri skúlanevndina í Miðvági og 4 limir úr skúlanevndini í Sandavági, har tann eini av teimum eisini var limur í forstandarskapinum. Til viðgerðar var málið um hvønn av umsøkjarunum forstandarskapið skuldi innstilla til skúlastjórnina at taka við sum annarlærari ella lærarinna við skúlarnar í Miðvági og Sandavági. Tríggjar umsóknir vóru til starvið. Úrslitið varð, at 4 atkvøddu fyri H.A. Djurhuus, 3 fyri Ejdesgaard og 1 fyri Margrethe Hentze. Og varð Hans Andrias Djurhuus, lærari, Tórshavn, settur í starvið við búðstaði í Sandavági. Hann røkti starvið har í sjey ár.

Hans Andrias Djurhuus

Umframt at vera lærari, so var Hans Andrias Djurhuus helst mest kendur fyri at vera ein av Føroya bestu yrkjarum, og var hann eisini bróður, helst Føroya besta yrkjara nakrantíð, Janus Djurhuus, ella J.H.O. Djurhuus, og vórðu teir nevndir Áarstovubrøðurnir. Árni Dahl skrivar í Bókmentasøguni, at tað er einki at ivast í, at tíðin í Sandavági, hvat skapandi arbeiði viðvíkur, vóru bestu ár Hans Andriasar. "Her verða Hans A. Djurhuus yrkingar til í hópatali, og her skapar hann, í sambandi við frálæru, sínar høgt elskaðu barnarímur."

Sum høvundur læt Hans Andrias úr hondum yrkingasøvn, skúlabøkur, barnarímur, sjómansrímur, søgusøvn, ævintýr, sjónleikir, eitt lítið sálmasavn og eina skaldsøgu.

Í 1909 er eitt heilt serstakt mál fyri í forstandarskapinum, hetta var á fundi 21. juni. Forstandarskapið gav sítt samtykki til, at lærararnir, Elias Joensen og Hans Andrias Djurhuus, fóru eina ferð til "Aarhusudstillingen", soleiðis, at teir fóru úr Tórshavn hin 30. í hesum.

Dimmalætting skrivar hin 25. mars 1909, at føroyska ferðalagið verður 100 fólk, menn og kvinnur, og vegna vælvilja frá det forenede Dampkibsselskab verður kostnaðurin av ferðaseðilinum einans 80 kr. fyri hvønn luttakara, har staturin rindar helvtina. Og skrivar blaðið: "Tænk at kunne rejse frem og tilbage til Danmark for kun 40 kr." Siglt var við dampferðamannaskipinum "Ceres". Føroyingar høvdu eisini sjálvir onkrar framsýningar har. Eftir 4 dagar í Århus, har tey annars vitjaðu allar framsýningarnar, var hin 5. dagin farið við toki til Keypmannahavnar. Og har varð, vegna vælvilja, koyrt frítt við toki allan vegin. Í Keypmannahavn sluppu føroyingarnir so eisini at síggja seg um og vitja serstøk stød, til túrurin so gekk heim úr Keypmannahavn.

Dimmalætting 17. juli 1909 hevur eina dag til dag frágreiðing frá øllum túrinum, nevnd "Aarhusturen", sum er á forsíðuni og á síðu 2 í blaðnum.

Aarhusudstillingen 1909 var ein av teimum heilt stóru tiltøkunum í Danmark í síni tíð. Har var ein heilur býarpartur bygdur í Århus til útstillingina, við stórum hallum og bygningum av øllum handa slag, vegum og torgum. Alt sera vakurt tilevnað. Av tingum, sum høvdu áhuga fyri føroyingar kann nevnast, at í einari høll vóru telefonstøðir framvístar og framkomin posthús- og postavgreiðsla, aðrastaðni var framkomið landbrúk at síggja. Umframt hópin av øðrum tøkniligum og mentanarligum framsýningum. Sikkurt okkurt fyri skúlaverkið eisini. So lærararnir báðir hava upplivað nógv og hava óivað havt nógv spennandi at siga frá, tá teir komu aftur.

Við Varna pavilliongina. Føroyingar á vitjan á heimsfram-sýningini í Århus, 5. – 9. juli 1909.
Lærararnir, Elias Joensen og Hans Andrias Djurhuus, vóru báðir við í ferðalagnum.

Á forstandarskapsfundi 17. mai 1910, hildin í skúlastovuni í Sandavági, har skúlanevndirnar fyri Miðvágs og Sandavágs skúlar eisini møttu, var einmælt samtykt at viðmæla, at H.A. Djurhuus, lærari, verður settur í fast starv í skúladøminum. Fyrsta árið hevur so verið royndartíð.

Umframt forstandararnar hevur ein H. Heinesen undirskrivað gerðabókina til hendan fundin. Møguliga er tað Heine Heinesen í Miðvági, sum undirskrivar vegna skúlanevndina.

Í fólkateljingini 1911 fyri Sandavág, stendur Hans Andrias Djurhuus, f. 1883, ógiftur, lærari, Tórshavn, at búgva einsamallur í læraraíbúðini í Sandavági. Og tað sama stendur fyri FT. 1916.

18. juli 1912 varð samtykt at hækka lønina hjá Djurhuus, lærara í Sandavági, við 50 kr., soleiðis at lønin hjá honum verður 600 kr. inniverandi fíggjarár.

Skrivað verður til skúlastjórnina hin 6. juli 1915 og sagt, at hildið verður, at tað er rímiligt, at Djurhuus lærari fekk loyvi til at halda sunnudagsskúla ein tíma í skúlanum í Sandavági, tá loyvi longu er givið Bernhard Johannesen, at halda andalig møtir í skúlanum sunnudag.

Hetta er samstundis seinasta skrivi hjá Vága prestagjalds kommunu viðv. skúlaskapi.

Í 1916 flutti Hans Andrias Djurhuus suður á Tvøroyri at vera fyrstilærari har, men í 1919 kom hann aftur í starv í heimbýnum, Tórshavn, sum lærari við Realskúlan og Føroya Læraraskúla. Hetta starv røkti hann til 1950. Hann andaðist 6. mai 1951.

Keldur:

Gerðabøkur, roknskaparbøkur og kopibøkur hjá Vága Prestagjalds kommunu.
Gerðabøkur, roknskaparbøkur og kopibøkur hjá Miðvágs kommunu.
Føroya siglingarsøga VI, Páll J. Nolsøe
Varðin, bind 27, bls. 41 - 47. Páll J. Nolsøe.
Skjøl frá Jørgen Frans Jacobsen, lærara - Anna Hansen, Miðvági.
Ymsar fólkateljingar - Tjóðskjalasavnið.
Bókmentasøgan - Árni Dahl.
Bókin um Hans Andrias - Hanus Kamban.
Lærarafólk í Føroyum 1870-1976 - Føroya Lærarafelag.
Føroyskir fólkaskúlalærarar 1870-1997 - Føroya Lærarafelag.
Dimmalætting, 25. mars 1909 og 17. juli 1909.
Vága kirkjubók 1797-1892, avskrift Johan G. Mikkelsen.

Miðvágs skúlasøga 1915 – 2008

Tá Miðvágs kommuna tekur við hin 1. oktober 1915 er nýggja kommunan framvegis partur av skúladømi saman við Sandavági, og er eingin broyting í tí við skiftinum. Somu lærarar halda eisini fram, sum vóru **Elias Joensen**, lærari í Miðvági 1901-28, og **Hans Andrias Djurhuus**, lærari í Sandavági 1909-16. Báðir umrøddir frammanfyri her.

Eftir at Hans Andrias var givin, tók **Hans Marius Jacobsen**, Tórshavn, við sum lærari í Sandavági – tað er framvegis sama skúladømi. Hans Marius varð føddur í Havn í 1869 og var m.a. bróðir Jákup Jakobsen, f. 1853, sum var lærari í Miðvági frá 1873 til 1901. Tók læraraprógv í Føroya læraraskúla 1896. Var lærari á Tvøroyri, Skálavík og Sørvági, áðrenn hann tók við sum lærari í Sandavági í 1916. Um tíð hansara í Sørvági kann lesast um í bókini "Sørvágs kommuna onnur bók". Hans Marius var lærari í Sandavági til 1919, seinni lærari í Havn. Doyði í 1944.

Hesin parturin snýr seg um skúlagongd í Miðvági frá 1915 til 2008, ta tíð Miðvágs kommuna var til. Tó í hesum førinum, bert smávegis um felagsskúlan á Giljanesi.

Innbúgv í skúlastovuni

Tá Miðvágs kommuna tekur við hin 1. oktober 1915 eru skrásettir hesir lutir at vera inni í skúlastovuni í Miðvági: Eitt kadeter, ein lærarastólur, 1 skúlajournal, tólv borð við bonkum, ein veggtalva, tvær smærri veggtalvur "til Anskueliggørelse af Metersystemet" og fimtan blekkhús.

Undirvísingartilfar: 15 *W. Petersens A.B.C.*, 15 *A.C. Evensen Stavingarbók*, 26 danskar lesibøkur, 21 føroyskar lesibøkur, 6 donsk nýggjatestamenti, 36 roknibøkur (við rokniuppgávum), 8 fasittlistar og 1 set fyriskriftir.

Kort: 1 Vágakort, 1 Føroyakort, 1 Danmarkarkort, 1 Europakort, 1 Heimskort, 1 Palestinakort (til kristni) og 1 globus.

Viðmerkjast kann, at slíkir listar eru fyri hvørt ár nógv ár fram, men teir bróta ikki nógv av frá hvørjum øðrum tey mongu fyrstu árini. Tó árið eftir eru 2 Danmarkarkort.

Viðlíkahald av skúlanum 1916-28

8. desember 1915 er, sambært viðløgdum kvittanum til roknskapin, keyptar 2 takplátur fyri 6 kr. og seymur fyri 6 oyru. Í oktober og november 1916 er umvæling framd við úthúsinum við skúlan, timburarbeiði í 6 dagar fyri 12 kr.

Roknskaparárið 1916-17 hevur Hans Jørgensen, timburmaður, gjørt smávegis timburarbeiði í skúlanum og keypt tilfar frá Hans Johansen fyri 13,50 kr.

Annars er lítið nevnt komandi árini til 1919-20, tá Hans Jacob Hansen hevur arbeitt við umvælingum í tilsamans 38 tímar fyri 80 oyru um tíman, m.a. sett tveir rútar í umframt nakað av timburarbeiði. Tummas Jacobsen hevur hvíttað skúlan uttan og málað innan fyri 20 kr. Tilfarið var seymur, skrúvur, 5 brettir, 1 planki og 8 blikk av grønari máling og 4 blikk av hvítari máling, alt keypt frá Hans Niklóa Niclasen fyri tilsamans 41 kr.

Hin 27. juli 1921 hevði Hans Jørgensen, timburmaður, havt sýn av skúlanum og fingið 4 kr. fyri tað. Hans Jacob Hansen hevði ferniserað gólvini í skúlanum í desember 1920, 5 tímar og mars 1921, 5 tímar fyri 80 oyru um tíman. August 1921 hevði Maskinverkstaðið, Miðvági, skift 2 rútar fyri 6 kr.

1922-23 eru 19 kr. brúktar til umvæling í skúlanum.

1923-24 hevur Maskinverkstaðið gjørt arbeiði fyri 110 kr., Hans Jacob Hansen 20 kr. og Heini Joensen, snikkari, 18 kr. Annars hava Harald Joensen, Albert Hansen, Sigmund Frederiksen og Sámal Jákup Thomasen gjørt smáumvælingar fyri í miðal 3 kr. hvør.

Í 1925 hava Hans Jacob Hansen, Harald Fr. Haraldsen og Hans Jørgensen, timburmaður, gjørt umvælingar fyri í miðal 28 kr. hvør. Tilfar er keypt frá Maskinverkstaðnum fyri 132 kr. og frá H.C. Andreasen & Co., Tórshavn, 88 kr.

Á fundi í forstandarskapinum 24. august 1926 varð samtykt at klæða nátthúsið við skúlan við bylgjublikki. Arbeiðið gjørdu Jákup Pauli Johansen og Hans Jacob Hansen og fingu teir ávikavist 20 kr. og 16 kr. fyri tað. Tilfar varð keypt frá Maskinverkstaðnum fyri 106 kr.

Árið eftir høvdu teir somu gjørt umvælingararbeiði fyri 22 kr. í alt, og tilfar varð keypt frá Maskinverkstaðnum fyri 19,30 kr.

Í 1928 høvdu Elias Joensen lærari og Hans Jacob Hansen gjørt umvælingar í skúlanum fyri ávikavist 40 og 39 kr. Tilfar varð keypt frá Valdemar Lützen, Tórshavn, fyri, 143 kr. og okkurt smávegis frá Maskinverkstaðnum.

Brenni til skúlan

Tað er alskyns tilfar varðveitt í skjølunum um skúlan. Alt kann og skal ikki takast við, men eitt av teimum evnum, sum rættuliga nágreiniligar upplýsingar eru um heilt upp til 1959, er brenni til skúlan. Hetta er eisini ein partur, sum sigur, hvussu skúlin varð rikin á ymsan hátt og um livihátt fyrru helvt av 1900-árunum. Ikki minst um veturin, og annars tá kalt var, varð neyðugt at hava hita í skúlanum. Og tað var ein av uppgávunum hjá kommununi at taka sær av.

Frá tí at skúlaskapurin byrjaði og upp til 1917 var tað torv, sum varð brúkt, og tað varð upp til 1917 latið sum partur av sjálvbodna stuðlinum frá foreldrunum til skúlan. Har, sum nevnt aðrastaðni, ein partur var peningur og ein partur sonevndar "naturaliir", sum var hoyggj, torv og kundi eisini vera seyður. Men hoyggj og torv var tað mest vanliga.

Frá 1917 er sjálvbodni stuðulin, sum annars áður varð regluliga latin, minkaður niður í nærum einki, og kommunan má taka meira og meira yvir, til hon at enda stendur fyri øllum.

Fyrsta árið kommunan, smb. roknskapunum, stendur fyri at hava goldið fyri brenni til skúlan, er skúlaárið 1915/16. Keypt er 834 kg. av koli til skúlan frá Jóan Paula Ellefsen, handilsmanni, fyri 50 kr. 1917/18 er kol keypt fyri 37,50 kr.

Næsta árið, 1918/1919, er nágreiniliga upplýst, hvaðan brennið varð keypt. Um annað ikki er nevnt, er talan um handlar og fólk úr Miðvági. Frá Rasmus Niclasen hdl. varð keypt kol fyri 190 kr., og frá H.N. Niclasen hdl. fyri 54 kr. Ein kolskeið varð keypt frá Hans Johansen. Hartil vórðu 5 leypar av torvi keyptir frá Kristin Jacobsen og 3 frá Hans Jacob Hansen fyri 1 kr. leypin.

1919/20 er petroleum keypt frá Hans Niklái Niclasen fyri 18 kr. Kol er keypt frá Valdemar Lützen, Tórshavn, fyri 369 kr. og koks fyri 180 kr.

1920/1921 er petroleum keypt frá H.N. Niclasen fyri 54 kr. Og kol keypt frá sama fyri 581 kr. Kolið er, smb. rokning, komið við rutubátinum "Smiril" og er frá Tinganes Varelager og J.J. Joensen hevði fraktað tað í land. Eingin kai var enn í Miðvági.

Fyri 1922 og 1923 er einki nevnt og frá 1924 er roknskaparárið álmanakkaárið.

1924. Kol keypt frá H.N. Niclasen fyri 183 kr., Valdemar Lützen, Tórshavn, 38 kr. og J.E. Thomsen, Sandavági, 11 kr. Hetta árið er torv eisini keypt frá J.E. Johannesen fyri 38 kr. og minni nøgdir frá, Jógvan Ellefsen, Klæmint Haraldsen, Albert Hansen, Sigmund Frederiksen og Sámal Jákup Thomsen.

1925. Kol keypt frá H.N. Niclasen fyri 124 kr. og torv frá J.E. Johannesen fyri 32 kr.

1926. Kol keypt frá H.N. Niclasen fyri 47 kr. og frá Valdemar Lützen, Tórshavn, fyri 62 kr.

Hetta árið er eisini torv keypt frá Jóan Peter Wang fyri 24 kr. og Hans Jacob Hansen 8 kr.

1927. Kol keypt frá Petur Heinesen fyri 150 kr., H.N. Niclasen 28 kr. og frá Valdemar Lützen, Tórshavn, 30 kr.

Pf. Krúnan, sum átti fyrsta bilin í Vágum, hevði í 1927 fört kolið til skúlan fyri 12,50 kr. og bilførarin hjá teimum, Georg Hansen, ið var fyrsti bilførarin í Vágum, hevði koyrt. Hjálpt til við flutninginum høvdu Albert Hansen og Sámal Jákup Thomasen. Bilførarin og hesir seinast nevndu fyri smærri upphæddir. Torv varð keyp fyri smærri upphæddir frá Ísak Johansen, J.E. Johansen og Henrikku Niclasen.

1928. Kol keypt frá Petur Heinesen fyri 73 kr., Valdemar Lützen, Tórshavn, 29 kr. og H.N. Niclasen 22 kr. Georg Hansen hevði koyrt og Sámal Jákup Thomsen og J.E. Ellefsen høvdu losað fyri smáar upphæddir.

Fyri 1929 er einki nevnt í roknskapinum um kostnað fyri upphitan av skúlanum. Men sum skilst av skrivi frá 1. mars 1930, har Skúlastjórnin spyr um skúlin verður nóg væl upphitaður, svarar forstandarskapið, at skúlin er upphitaður. Hetta árið var tingast um at seta miðstøðuhita upp, og varð skúlin upphitaður við petroleumsovnum, meðan hesar tingingar fóru fram, men tað var altíð nóg heitt, verður sagt, og ovnarnir eru fyri langt síðan settir upp. – Tað man so meinast við ovnar við oljufýring. Seinni er aftur kol brúkt, so um ovnarnir eru læntir ella oljufýringin tikin úr aftur, er einki nevnt um.

Frá 1930 til 1943 er kol oftast keypt frá Andreas Joensen, handilsmanni, og øðrum lokalum handilsmonnum í Miðvági og Sandavági. Í 1938 og 1939 tó mest frá Hans M. Thomsen. Umframt at torv er keypt frá ymsum fólki í bygdini.

Eftir 1943 sær tað út til, at farið er frá at brenna torv.

Árini 1944 til 1959 er eisini kol javnan keypt frá Andrias Joensen handilsmanni í Miðvági og frá Valdemar Lützen, Tórshavn. Umframt smærri nøgdir frá lokalum handilsmonnum í Vágum, tó mest úr Miðvági. Frá 1951 verður eisini byrjað at keypa olju til skúlan. Tað kundi týtt á at oljufýring er sett í onkran av brenniovnunum í skúlanum.

Á fundi í sóknarstýrinum 13. september 1958, var á skrá, at ovnurin í tí gomlu skúlastovuni var nú so vánaligur, at hann mátti kasserast. Stýrið samdist tí um at keypa ein nýggjan oljuovn. Hesi árini er bara uppgivið, hvat er brúkt til kol, og tað er væl minni enn árini undan. So skilligt er, at høvuðsbrenni nú er olja. Men hon er ikki sett undir postin um upphitan av skúlanum og má tí verða sett aðrastaðni, hví tað so er. Upphæddin hevur helst verið eini 500 kr. um árið til tað, út frá kostnaðinum tá og brúkinum frammanundan til brenni.

Í sekstiárunum kunnu vit rokna við, at kol og olja/petroleum er nýtt.

Roknskaparbók hjá kommununi, har allar gjaldingar eru innførdar, gongur upp til 1959 viðvíkjandi útreiðslum til skúlan. Fylgiskjøl til roknskapirnar eru ikki varðveitt, so eftir tað síggja vit ikki nágreiniliga, hvussu nógv varð nýtt til upphiting av skúlanum. Í 1961 varð givist við at nýta gamla skúlan sum skúla, við tað at felagsskúlin á Giljanesi varð tikin í brúk tað árið.

Gamli skúli varð tó aftur tikin í brúk sum skúli fyrst í sjeytiárunum, men tá var miðstøðuhiti lagdur í skúlan, so tað vóru bara útreiðslur til olju, sum ikki var kostnaðarmikið upp til oljukreppuna í 1973. Men eftir tað er vaksið munandi.

Lærarar 1920 - 1961

Upp til 1920 var bert ein lærari í Miðvági, hóast skúlabørnini vóru mong, og væl meira enn ein lærari megnaði, varð viðurkent. Virkandi lærarin hesa tíð var Elias Joensen úr Bø, umrøddur áður.

Á fundi í forstandarskapinum 16. august 1919 var á skrá skriv frá skúlanevndini um at søkja til Løgtingið um loyvi at upprætta eitt annanlærarastarv við Miðvágs skúla. Tað vóru nú 97 børn við skúlan, sum mátti metast at vera eitt óyvirkomiligt tal hjá einum lærara, verður sagt. Allir limir møttu uttan formaðurin, Rasmus Niclasen, vegna forfall. Prestur møtti, sýslumaðurin møtti ikki. Prestur var formaður í skúlanevndini, og var tí boðin til fundar. Og helst var ætlanin at fáa sýslumannin at stuðla málinum eisini. Prestur og sýslumaður høvdu annars rætt til at møta á kommunufundum, tó uttan atkvøðurætt, um teir ikki vóru valdir limir. Forstandarskapið vildi viðmæla umsóknini uppá tað allarbesta og vildi gera, hvat tað kundi fyri, at vit fáa ein lærara/lærarinnu skjótast møguligt, verður sagt í gerðabókini.

Annars kann sigast, at hetta kom eisini at kosta hjá kommununi, sum skuldi rinda helvtina av samsýningini, og tá pengarnir ikki vóru nógvir, so sýnir hetta eisini, at tað var hildið at vera sera umráðandi og neyðugt.

Í brævi frá skúlanevndini 16. september 1919 eru nakrar treytir settar fyri setanina. M.a. at lærarin sjálvur má skaffa sær innivist, men fær 100 kr. frá kommununi sum árligt húsaendurgjald. Og at lærarin skal ganga undir fakbýtið, forstandarskapið og skúlanevndin hava ásett. Byrjunarlønin er 700 kr. um árið, har forstandarskapið rindar helvtina og Staturin helvtina.

Inn kom ein umsókn og var hon til viðgerðar á fundi 13. februar 1920. Í gerðabókini verður sagt, at allir limir møttu, uttan Jóan Pauli Ellefsen; prestur var møttur vegna skúlanevndina. "Formanden er afgaaet ved Døden", stendur – Rasmus Niclasen, formaður, var deyður í góðum árum stutt frammanundan. Forstandarskapið sýnist ikki at vera nøkt við umsøkjaran, sum var úr aðrari bygd og oyggj, vegna okkurt teir skuldu hava hoyrt, og sigur seg ikki kunna viðmæla umsóknina.

Tað hendi so ikki meira í málinum fyribils, men í juli 1920 verður skrivað til Skúlastjórnina um at lýsa annanlærarastavið í Miðvági leyst av nýggjum við somu treytum, sum áður.

Jóan Hendrik Samuelsen

Joen Hendrik Svabo Samuelsen varð føddur í Miðvági 1.2.1898, foreldrini vóru Jógvan Samuelsen og Hansina f. Heinesen, bæði úr Miðvági. Hann var til skips til hann var 19 ára gamal. Fór so á læraraskúla í Tórshavn og tók prógv haðan í 1920. Var giftur við Mariu, dóttir H.N. Niclasen, keypmann í Miðvági. Jóan Hendrik søkti nýútlærdur starvið sum annarlærari í Miðvági, sum í 1920 var lýst leyst at søkja. Tveir aðrir umsøkjarar vóru.

Jóan Hendrik Samuelsen

Umsóknirnar vóru til viðgerðar á fundi í forstandarskapinum í Miðvági hin 5. oktober 1920. Samtykt varð at innstilla Jóan Hendrik Samuelsen sum nr. 1. Bræv við hesi avgerð varð sent Skúlastjórnini í Tórshavn sama dag og hevði Keiding prestur, og formaður í skúlanevndini, undirskrivað brævið saman við øllum limunum í forstandarskapinum. - Jóan Hendrik fekk starvið.

Lønin frá kommununi í 1920 var 362,50 kr., hækkandi líðandi til hon í 1941 var 700 kr.

Frá 1935 og fram til 1940 stóð tað somikið illa til fíggjarliga hjá kommununi, at kommunan megnaði ikki at rinda læraraløninrnar og varð tí avtala gjørd við lærararnar um at rinda løn so hvørt kommunan hevði pening til tað. Lærararnir fingu tó allatíðina ta helvtina, sum staturin rindaði. Í 1941 sær tað út til, at tað er slætt borð við kommununa og øll løn er goldin. Men hetta er so seinasta árið, kommunan rindar lærarunum løn. Um áðurnevnda støða, at kommunurnar høvdu ilt við at fíggja læraraløninrnar, er grund undir tíð, er ikki óhugsandi. Eftir 1942 eru tað so landið og Staturin, sum rinda hesar lønir.

Jóan Hendrik hevði ikki kommunalt lærarahús, sum lærari annars hevði rætt til tá, men búði í egnum húsum, ið sum nevnt eisini var smb. setanartreytunum frá kommununi. Hann fekk so sonevnt húsaendurgjald fyri tað, fyrsta árið 100 kr. men so nøkulunda javnt hækkandi til tað í 1951 var 1.020 kr., sum tað helt seg á fram til 1959, sum vit hava tøl fyri. Smb. skrivi frá 1940 vóru hús hansara 10 x 12 alin til støddar og stoypt upp úr betong.

Á fundi 10. oktober 1939 er til viðgerðar, at J.H. Samuelsen lærari var sjúkur, og samtykt varð at seta Jens Wang, Miðvági, sum vikar fyri hann, bæði í barnaskúlanum og í kvøldskúlanum. Hetta sýnist at hava verið í einar tveir-tríggjar mánaðir.

Á fundi í forstandarskapinum 18. mars 1957 var á skrá setan av fyrstalærara, ella skúlastjóra, sum tað seinni er nevnt, við Miðvágs skúla. Bert ein umsókn var, nevniliga J.H. Samuelsen, annarlærari við sama skúla. Skúlanevndin hevði havt málið til ummælis og hevði einmælt innstillað umsøkjaran. Sóknarstýrið gekk eisini einmælt inn fyri umsøkjaranum.

6. mai 1957 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn og sigur frá, at Joen Hendrik Samuelsen er settur sum fyrstilærari við skúlan. Tað var hann so fram til summarið 1961, tá skúlagongdin í gamla skúlanum í Miðvági helt uppat, og børn og lærarar fóru at ganga í nýbygda felagsskúlan á Giljanesi.

Skúlaárið 1958-59 var Jóan Hendrik á 1 ára skeiðið á Danmarks Lærerhøjskole, Kbh. Loyvi til tess fekk hann á sóknarfundi 1. februar 1958 har tað stendur, at skúlanevndin hevði viðmælt við tí treyt, at ein erfarin lærari varð settur sum vikar. Sóknarstýrið tók undir við tilmælinum og legði afturat, at kommunan ongar útreiðslur skuldi hava av hesum. Tað bleiv loyst á tann hátt, at sonurin, Eyðun Samuelsen, gjørdist vikarur og Petur Jacob Sigvardsen gjørdist fyrstilærari hetta árið.

Hvør skuldi gerast skúlastjóri á Giljanesi var eitt vist stríð um, við tað at báðir skúlastjórarnir, tann í Miðvági og tann í Sandavági vóru í uppskoti. Og á felagsfundum varð javnstøða, tá atkvøtt var 5 – 5. Roynt var eini 3 ferð, men við sama úrsliti, tað endaði so við, at Skúlastjórnin tók avgerðina og setti fyrstalæraran í Sandavági Sigurd Petersen sum skúlastjóra. Hetta var í 1961. Ongin varaskúlastjóri var fyrstu tíðina, men frá 1. januar 1962 gjørdist Jóan Hendrik so varðaskúlastjóri. Tó frá 15. september til 31. desember 1965, meðan skúlastjórin var á skeið á Danmarks Lærerhøjskole, var Jóan Hendrik skúlastjóri á Giljanesi. Jóan Hendrik legði frá sær sum lærari hin 31. desember 1967. Hann andaðist hin 1. november 1972.

Martin Joensen Næs

Samuel Martin Joensen Næs varð føddur 23. mars 1887 í Skúvoy. Áðrenn hann fór á læraraskúla arbeiddi hann m.a. sum báta- og húsasmiður. Fór á læraraskúla í Tórshavn í 1905 og tók prógv haðan í 1908. Var lærari í Skúvoy frá 6. oktober 1908, til hann varð ettur sum lærari og skúlasjóri í Miðvági um miðjan oktober 1928.

Martin hevði konu úr Miðvági og giftist hann hin 13. aug. 1922 við Dagmar Mariu f. Danielsen, dóttir Dánjal Paula Michelsen á Ryggi í Miðvági. Hon varð fødd 31.12.1895 í Miðvági. Dagmar Joensen Næs er kend fyri at hava skrivað skaldsøguna “Rannvá”, sum kom út í 1971 og er lisin í ÚF og filmað eisini.

Á skúlanevndar- og forstandarskapsfundi 4. oktober 1928 var til viðgerðar, setan av skúlastjóra. 4 forstandarskapslimir og Ihme-Jensen prestur og skúlanevndarformaður vóru á fundinum. 9 umsóknir vóru komnar inn. Av hesum vóru tvær innstillaðar sum nr. 1 og 2, annarlærarin, J.H. Samuelsen og Martin Joensen Næs, lærari, Skúvoy. Sagt verður, at hesir fingu 2 atkvøður hvør og 1 atkvøddi ikki.

Tað stendur so ikki meira um málið, men tá støðan var hendan hevur Skúlastjórnin helst tikið avgerðina. Og varð tað Martin Joensen Næs, sum varð settur sum lærari og fekk starvið sum skúlastjóri. Annarlærarin helt so fram sum annarlærari.

Martin Joensen Næs

Fyrstu tveir mánaðirnar hevur Martin helst búð til leigu onkustaðni, kanska meðan læraraíbúðin í skúlanum er sett í stand, og fekk 17 kr. í íbúðarstuðuli. Men árið eftir býr hann so við familju í læraraíbúðini og átti sostatt ikki íbúðarstuðul eisini.

Ársløn hjá honum øll árini fram til og við 1941, har kommunan rindaði helvtina av lønini, var 800 kr. frá kommununi.

Sum nevnt við fyrra læraranum, Jóan Hendrik Samuelsen, fekk kommunan í tríatiárunum trupulleikar við at megna at rinda læraraløninirnar. Hjá Jóan Hendriki byrjaði hetta í 1935, meðan hjá Martini byrjaði tað longu í 1933, har Martin fyri tað árið bert fekk útgoldið helvtina av partinum hjá kommununi og so hina helvtina árið eftir. Og hetta hevði nøkulunda sama mynstur komandi árini, sum frágreitt er viðv. Jóan Hendriki. Grundin var kreppa í fiskivinnuni hetta árið m.a. vegna borgarakríggj í Spaniu, so at munandi verri gekst við at selja saltfisk og klippfisk. So illa, at fiskimenn í 1936 t.d. máttu fáa fíggjarligan styrk úr Statskassanum, sambært lóg um "Hjálp til illa stillaðar fiskimenn". Hetta gjørdi, at tað gekk sera strilti við at fáa skattin inn, og stórar eftirstøður vóru.

18. desember 1940 verður skrivað til skúlastjórnina viðv. spurningi um íbúðarviðurskiftini hjá lærarunum í Miðvági. Vit skulu loyva okkum at upplýsa, at Martin Joensen hevur frían búðstað frá kommununi, sum er fastbygdur í skúlan. Støddin á íbúðini er 12 x 12 alin í stovuhæddini við gongd, køki og stovu og hevur hann eisini loftið omanfyri báðar skúlastovurnar, sum er innrættað til eitt stórt og eitt minni sovikamar, umframt eitt kvistkamar. Loftið omanfyri sjálva íbúðina er innrættað við 2 smáum sovikømurum. Restin er gongd og loftrúm.

Á fundi í sóknarstýrinum 18. desember 1956 er á skrá bræv frá skúlanevndini um at heita á Skúlastjórnina um at lýsa starvið sum fyrstilærari leyst, tá núverandi fyrstilærarin, Martin Joensen Næs, verður 70 ár hin 23. mars 1957. Stýrið varð sinnað at viðmæla áheitanina.

30. mars 1957 skrivar Martin og biður um at leiga skúlahúsini eina tíð enn.

Skrivið er til viðgerðar á fundi 30. mars 1957. Stýrið varð samt um at svara, at hann kann búgva í húsunum til annar lærari er settur, og hesum tørvar hús, ið kommunan skal skaffa. Árliga leigan er 525 kr. við vanligum treytum um viðlíkhald innan og at fara væl um ognina.

Annars kann nevnast ,at Martin, ella "Skúvingurin", sum hann eisini varð nevndur í Miðvági, fór undir at byggja hús á Tungureynstrøðni, tætt við har politistøðin seinni var. Hetta hevur helst verið í 1956, tí hin 22. oktober 1956 skrivar Martin til kommununa og sigur, at hann roynir at byggja eini hús norði á Tungureynstrøðni og biður um loyvi at koma við í ta nýggju vatnleiðingina. Men tað bleiv bert til eina grund.

Martin Joensen Næs gavst sum lærari hin 31. mars 1957. Hann doyði hin 6. november 1967.

Martin og konan búðu í læraraíbúðini í Gamla skúla til hansara deyð í 1967, og einkjan eftir hann búði har til hon fór á ellisheimið at búgva hin 7.8.1972, sama ár heimið var tikið í brúk, og doyði út haðan í 1983. Í óalmennari avskrift av kirkjubók fyri Miðvág er hon nevnd, Skúla Dagmar.

Jens Wang

Jens Johannes Wang var føddur 4. november 1905 í Miðvági, sonur Albert Wang, Miðvági og Annu Elisabeth f. Olsen, Sørvági. Jens var giftur Jenny Marthu Nordendahl úr Vági. Jens tók læraraprógv á Gjedved Seminarium, DK, í 1936. Var lærari á Strondum 3 mánaðir í 1936, og styttri tíðarskeið á ymsum donskum skúlum 1937 – 1939 og nakrar mánaðir í 1939 vikarur í Miðvági fyri J.H. Samuelsen lærara, sum var vorðin sjúkur. Síðan lærari á Norðdepli 1944-49 og Miðvági 1949 – 1970.

Í 1946 var læraramangul í Miðvági tí tað vóru bert tveir lærarar til 98 børn. Roynt varð í 1946 at fáa lærara settan. Men trupulleikin var, at í skúlanum vóru bert tvær skúlastovur, og so tann, at kommunan mátti skaffa einum nýggjum lærara íbúð, sum krøvini vóru tá. Í brævi til Skúlastjórnina 14. november 1946, skrivar Sørin Danielsen: Út frá skrivi frá nevndini hava vit ikki rætt til 3 lærarar, men tað er tó vanliga brúkt við skúlum av hesi stødd. Vit hava 2 skúlastovur og læraraíbúð til fyrstalæraran, og verða vit tí noyddir at byggja eina skúlastovu afturat. Um nýggj skal byggjast er tað væl mest praktiskt at umbyggja læraraíbúðina til skúlastovu, og so býggja nýggja læraraíbúð. Hartil skal sigast at læraraíbúðin er ikki longur hóskandi samsvarandi nútíðar krøvum, hon er bygd í 1883. Men hetta verður dýrt. Fyrst at byggja læraraíbúðina so at innrætta eina skúlastovu. Læraraíbúðin hevur ikki ta hædd, sum kravd er til skúlastovu, so takið má lyftast meira enn ½ metur. Takið er av nævur og flag og tað má gerast nýtt tak. Men tað høvdu vit helst noyðst kortini, tí tað er vist ikki heilt tætt. Men vit høvdu vónað at kunna bíða eitt sindur við tí, til tað bleiv bíligari at fáa tilfar. Vit biða um hugsanina hjá tí høgu Skúlastjórn um hetta mál og biða um tygara svar.

Jens Wang

Hetta seinkar so málinum, tí nú er tað ikki bara ein læraraløn tað snýr seg um, men stórar umbyggingar og nýbygging, og einki hendir.

Í 1947 verður tó roynt aftur. Skrivað verður til Skúlastjórnina hin 24. juni 1947. Vit søkja um loyvi at fáa settan ein lærara afturat í Miðvági, sum kundi nýtt somu lokalir, sum nú verða nýtt, men seinni um dagin ella, at ein skúlastova verður leigað. Og at hann kundi undirvíst í Vatnsoyrum eini tveir dagar um vikuna, har tað skjótt verða 4 skúlapliktig børn. Vit vildu fegin fingið ein ungan lærara, sum kundi undirvíst í fimleiki, sum vit halda núverandi lærarar vera ov gamlar til. Eisini knýpur tað við disiplinini, sum ein ungur energiskur lærari helst kundi fingið skil upp á. Vit vóna soleiðis at hoyra aftur frá Skúlastjórnini.

Einki hendir tó við málinum, og vit skulu so heilt fram til 1949. Tá verður á fundi 6. mai 1949 samtykt at heita á Skúlastjórnina um at lýsa umbætið leyst. Og hesaferð hjálpir. 11. august 1949 skrivar Skúlastjórnin og sigur, at eitt nýtt lærarastarv er lýst leyst til Miðvágs skúla, og inn eru komnar 2 umsóknir.

27. oktober 1949 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, og sigur, at tað verður hervið sagt, at Jens Wang, lærari, er settur sum lærari í Miðvági frá 1. november 1949 at rokna.

Við hesum eru fyri fyrstu ferð 3 lærarar við skúlan í Miðvági. Í hesum sambandi varð nýggj skúlastova gjørd í tí nýgbygda kommunuhúsinum, sum stóð tætt omanfyri skúlan. Og vórðu sostatt 3 lærarar og 3 skúlastovur.

Jens Wang hevur so ikki búð í lærarahúsum frá kommununi, tí hann fekk húsaendurgjald frá kommununi. Tað var 1.020 kr. um árið upp til 1959, sum tøl eru fyri. Frá 1949 til 1961 virkaði Jens Wang við Miðvágs skúla, men flutti við hinum lærarunum og skúlabørnunum yvir til felagsskúlan á Giljanesi at ganga frá 4. apríl 1961. Frá 1.1.1962 var Giljanes skúla "keypstaðarskúli" t.v.s. ikki longur varð roknaður sum bygdarskúli men býarskúli, og við teirri skipanini høvdu lærararnir ikki rætt til húsaendurgjald, sum so fall burtur. Men smb. skrivi frá Skúlastjórnini varð tó avgjørt, at lærararnir, sum høvdu virkað við skúlan í tíðarskeiðinum 1.1.1962 til 31.12.1964 skuldu fáa húsaendurgjald ta tíð teir høvdu virka sum lærarar innan hetta tíðarskeið. Og rindaði Staturin hesa upphædd. Jens Wang var so ein av teimum. Jens Wang andaðist 3. juli 1970, 64 ára gamal.

Petur Jacob Sigvardsen

Petur Jacob Sigvardsen, føddur 13. september 1932, við Gjógv. Giftur Jacobinu f. Petersen, Sandavági. Petur Jacob tók læraraprógv frá Føroya Læraraskúla í 1956. Var lærari í Mykinesi 1956-57 og í Miðvági 1957-58, tá settur sum vikarur. Var eitt stutt bil lærari í Millum- og Realskúlanum í Tórshavn, august – oktober 1958. Var settur skúlastjóri í Miðvági frá 15. september 1958 til 15. juli 1959, meðan skúlastjórin var á skeið í Danmark. Var summarið 1959 á skeið í Danmark, smb. skjølum hjá kommununi. Var frá 1. august 1959 til 2. apríl 1961 lærari við Miðvágs skúla og frá 3. apríl 1961 til summarfrítíðina 1973, lærari á felagsskúlanum á Giljanesi. Virkaði eftir 1973 í nógv ár sum landsskúlaráðgevi og hevur annars verið virkin á mongum økjum. Var m.a. ein av teimum, sum arbeiddi nógv fyri at fáa ellisheim í Vágum og var í fyrireikingarnevndini í fleiri ár. Hevur eisini virkað sum rithøvundur og latið fleiri bøkur úr hondum og týtt bøkur. Hevur m.a. skrivað siðsøguligar bøkur, m.a. bygdarsøguna "Úr Gjáar søgu" 5 bind og verkið "Torvið í Føroyum" sum eisini er 5 bind.

Petur Jacob Sigvardsen

Eyðun Samuelsen

Eyðun Samuelsen, føddur 6. november 1934 í Miðvági. Eyðun tók læraraprógv frá Føroya Læraraskúla í 1958. Hin 15. september 1958 varð Eyðun Samuelsen settur sum vikar fyri faðirin, Jóan Hendrik Samuelsen, sum skuldi á skeið á Læraraháskúlanum í Keypmannahavn. Eyðun var síðan lærari í Skopun 1959 – 1967, harav skúlastjóri 1960-67.

Á felagsfundi, 25. apríl 1967, var til viðgerðar setan av tveimum lærarum við felagsskúlan á Giljanesi. 8 umsóknir vóru komnar inn og fekk Eyðum annað starvið og varð settur í starv frá 1. august 1967 at rokna. Fór úr starvið í 1995.



Eyðun Samuelsen

Vilja hava ein lærara afturat

9. mars 1959 skriva læraranir í Miðvági til skúlanevndina og søkja um at fáa ein fjórða lærara í skúlan. "1. mai 1959 var næmingatalið 100 og komandi skúlaár verður tað væntandi 123, ella 41 børn pr. lærara. Eftir skúlaskipanini komandi ár koma 3., 4. og 5. flokkur at liggja um 30 næmingar hvør og er hetta ov nógv, tí pláss er bert fyri 24-26 næmingum í skúlastovuni, og mugu vit tí stúgva tey saman sum best ber til. Hetta ger at arbeiðsumstøðurnar verða sera vánaligar bæði fyri lærarar og børn. Børnini inniverandi skúlaár eru: 1. flokkur, 15 børn, 2. flokkur, 18 børn, 3. flokkur 28 børn, 4. flokkur 23 børn og 5. flokkur 16 børn. Tils. 100 børn."

Skrivað undir hava, Petur Jacob Sigvardsen, Eyðun Samuelsen og Jens Wang.

11. mars 1959 sendir skúlanevndin avrit av brævinum frá lærarunum við Miðvágs skúla til sóknarstýrið og viðmæla umsóknini frá lærarunum um at fáa ein lærara settan afturat við Miðvágs skúla við tað, at tað er átroðkandi neyðugt.

Umsóknin var til viðgerðar á fundi í sóknarstýrinum 11. mars 1959, og tók sóknarstýrið undir við umsóknini og var samt um, at tørvur var á at fáa ein lærara afturat og samstundis útvega stovu til hansara. Samstundis helt stýrið, at tann lærari, ið verður settur, skal kunna undirvísa á preleminerskeið. Skrivað verður til Skúlastjórnina hin 18. mars 1959.

Tað gongur trekt við at fáa umsóknir inn, men í august 1959 er umsókn komin frá lærara, sum hildin verður skikkaður til preliminerundirvísing, tað er Erik Friis, lærari, Keypmannahavn. Samtykt verður á felagsfundi, Miðvág-Sandavág, at innstilla hann. Men á felagsfundi, 12. oktober 1959, er upplýst, at Erik Friis, lærari, hevur nú telegraferað, at hann ikki kundi koma kortini, tí móður hansara lá á deyðastráð. Men hinvegin so vóru nú nakrar aðrar umsóknir komnar.



Eli Frederiksen
1960. Skúlin og skúlabørn síggjast aftan.

Eli Fredriksen, f. 19. apríl 1939 í Miðvági, sonur Sigmund Frederiksen. Var skrivstovulærdur frá Føroya Fiskasølu í 1958 og hevði gingið í Købmandsskolen í Keypmannahavn. Var vikarur í Miðvági 15.9.1959 til 15.7.1960, fyri P.J. Sigvardsen, lærara, sum var á ársskeið á Danmarkar læraraháskúla.

Eli tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1967. Var lærari á Tórshavnar Kommunuskúla 1967-72, í Vági 1972-74. Og gjørdist lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1.8.1974 - 31.7.76 og í Porkeri 1.8.1976.

Napoleon Nolsøe Petersen 'Poli', varð føddur í Sørvági 15. juli 1906 og var giftur við Annu Dalsgaard av Velbastað. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1929. Lærari í Kaldbak so Gásadali og Bø 1929-30, Mykinesi 1930-31, ferðalærari Slættanesi og Vatnsoyrum 1931-41, og á Slættanesi 1941-45. Velbastað/Kirkjubø 1945-48 og Sørvági 1948-60.



Napoleon Petersen

Í partinum um Vatnsoyra skúla er nevnt eitt sindur um starvið hjá honum har.

Á sóknarstýrisfundi 7. juli 1960 var til viðgerðar setan av lærara. 3 umsóknir vóru komnar inn. Av hesum varð samtykt at viðmæla, at Napoleon N. Petersen verður settur í starvið. Og staðfestir Skúlastjórnin hin 6. september, at Poli er settur sum lærari við Miðvágs skúla frá 1. august 1960 at rokna. Heldur fram í Miðvágs-Sandavágs skúla 4.4.1961 til hann leggur frá sær í juli mánaði 1976.

Elias Karl Petersen, føddur 10. november 1932 í Sandavági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1960. Lærari í Miðági frá 1. august 1960 og í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 4.4.1961 til hann gavst fyri aldur. Var á ársskeiði á Dansk Lærerhøjskole skúlaárið 1963-64.

Hann og Poli, ið eru settir í starv samstundis, eru so seinastu lærarar, sum eru settir í starv við Miðvágs skúla (gamla skúla), áðrenn Miðvágs-Sandavágs skúli var tikin í brúk.

Elias Karl Petersen

Skúlaskapur 1915 – 1961

Á fundi í forstandarskapinum 18. november 1915 verður sagt, at tingast varð um eitt munnligt tilmæli frá Krohn lækna um at steingja skúlan frá í dag til fyrstkomandi mánadag hin 22. í smb. við at tvey fólk við Kirkjar høvdu fingið skarlaksfepur. Samtykt varð at steingja skúlan eftir tilmæli frá læknanum til mánadagin hin 22.

Kjak um gjøld til læraararnar og um skúladømi

Frá apríl og út í september 1916 er nógv skrivan aftur og fram millum kommununa og Amtið, bæði embætismenn og Svenning Rytter amtmann sjálvan, viðv. gjaldinum til pensjónina hjá lærarunum og um, hvussu parturin við naturalium verður goldin. Rasmus Niclasen, formaður, sýnist eitt sindur tvørur við at svara greitt, sum sýnist at øsa Amtið eitt sindur, har tey so blíva við at spyrja og fáa hálv og ógreið svar. Vegna kommununa heldur Rasmus Niclasen, at Miðvágs kommuna eigur at rinda ¼, Sandavágs kommuna ¼ og Amtið ½ av almenna partinum av pensjónsgjaldinum. Men vegna at hann sigur hetta so ógreitt, so má Amtið spyrja einar tvær ferðir bara um hetta. Tað sama er við naturaliunum, t.e. tað læraararnir kundu fáa í løn, sum ikki vóru kontantir pengar, men vanliga torv, ull og kanska seyður, har Rasmus sigur seg ikki vita, hvussu naturaliinið verða goldin, sum ljóðar lítið sannlíkt, og tað heldur Amtið

1927, skúlin, lærarar og skúlabørn.

helst eisini, tí teir svara eitt sindur argir, sýnist tað, at tað átti hann at vita og um ikki annað, megnað at funnið út av. Til hetta svarar Rasmus, at um tað fáa tey helst væl betur upplýsingar við at spyrja lærararnar sjálvar. Eitt svar, sum ikki hóvar Amtinum væl, tí har tey biða kommununa beinanvegin siga frá, um teir einki kenna til hetta og í øðrum lagið at biðja Joensen lærara í Miðvági innan 8 dagar senda inn frásøgn inn um hetta. 10. juli svarar Rasmus Niclasen, at Elias Joensen, fyrstilærari, hevur fingið nakað av síni løn í naturalium úr Miðvági, og Hans Andrias Djurhuus, annarlærari fyri Miðvág og Sandavág, hevur fingið allan partin hjá Miðvágs kommunu kontant.

Í tí seinasta brævinum um hetta mál, 28. september 1916, skrivar kommunan m.a., at ynskiligt er, at skipanin við felags lærarum fyri Miðvágs og Sandavágs sóknir verður endað, og at sóknirnar hereftir fara at hava sínar egnu lærarar. Hetta er sambært avgerð í forstandarskapinum á fundi dagin fyri. Har eisini varð samtykt, at Miðvágs kommuna bara rindar stuðul til pensjónina hjá tí læraranum, sum virkar við Miðvágs skúla.

Um pensjónina hjá lærarunum kann annars sigast, at gjaldið til pensjónsgrunnin árini 1915-49, var 58 kr. um árið upp til 1921, síðan 150 kr. upp til 1923, so 200 kr. fram til 1930 og 256 kr. til 1949. Eftir tað er henda upphædd ikki í roknskapunum hjá kommununi, og er kommunan helst loyst frá hesum gjaldi tá, og landið hevur tikið yvir. Av hesum upphæddum fekk kommunan umleið 1/3 endurgoldnan frá lærarunum.

Skúlamulkt

Skúlamulkt var sambært lóg áløgd foreldrum at børnum, sum forsømdu skúlagond uttan lógliga grund ella uttan at hava fingið loyvi til tess frá lærara ella skúlanevnd. Lærararnir førdu skúlaprotokoll og forsømilsislista. Forsømilsislistin varð sendur inn til kommunustýrið hvørt kvartal, um nakað forsømilsi var ella ikki. Og kommunustýrið sendi avrit til Amtið. Vóru forsømilsir tók kommunustýrið avgerð um hvørt skúlamult, sum tað var nevnt, varð løgd á ella ikki. Har kundi so vera ymiskt, sum talaði fyri ella ímóti. Fíggjarlig trongstøða hjá foreldrum ella sjúka í familjuni kundi t.d. í førum tala fyri at minka ella strika mulktina, meðan líkasæla ella illgruni um neista til uppreistrarhug gjørdi, at full upphædd varð kravd.

Árini 1915 til 1921 er eingin skúlamulkt, uttan fyri árið 1918, tá upphæddin er 17 kr.

Árið 1922 er upphæddin óvanliga høg, 71 kr. Liggur so rættuliga lágt til 1928, í miðal 13 kr. um árið.

Í 1929, 26 kr. og 1930, 18 kr. Minkar so árini 1931 til 1934 til 6 kr. í miðal um árið.

Í 1934 var tað faktiskt bara 50 oyru. 9. mai 1935 verður skrivað til Skúlastjórnina viðv. forsømilsislistunum og sagt, at mulkt ikki er løgd á foreldur í 1934 vegna fráveru í skúlanum. Grundin er meslingar, sum gingu tá, og at summi ikki vildu lata børnini í skúla vegna smittuvandan. Ikki vegna børnini, men vegna fleiri vaksin, sum ikki hava havt sjúkuna. Og um

1927, Elias Joensen og Jóan Hendrik Samuelsen, lærarar, og skúlabørn.

sjúkan kom í hesi hús so høvdu fleiri fiskimenn ikki kunna drivið sítt yrki og nógvar gentur høvdu verið hindraðar í at sleppa til Suðuroyar í fiskaarbeiði. Vegna at málið liggur soleiðis hevur forstandarskapið ikki dømt bøtur.

Fyri 1935 eru annars dømdar 56 kr., í 1936, 16 kr., 1937, 43 kr. og 1938, 6 kr.

So eksploderar tað, og í 1939 eru dømdar heilar 221 kr. Hetta fær forstandarskapið at reagera og verður skrivað til skúlanevndina í Miðvági hin 26. januar 1940 um forsømilsislistarnar í Miðvágs skúla og serliga tann seinasta. Vit hava viðgjørt forsømilsislistan við átekning um, at tað verða givnar bøtur og ávarðingar. Tað má vera skúlanevndini kunnugt, at forstandarskapið dømur bøtur fyri øll forsømilsir frá skúlanum. Hvat viðvíkur ávaringum, so má tað hoyra undir skúlanevndina og vit mæla til at tað ikki bert verða givnar ávarðingar, men at tit gera alt fyri at bøta um viðurskiftini, sum nú eru við skúlaforsømilsum. Vit vænta tí, at skúlanevndin fer at gera okkurt effektivt við skúlaforsømilsini, so at næsti forsømilsislisti ikki kemur at síggja út sum hesin núverandi.

Tó kom tað ikki at verða so. Í 1940 vóru skúlamulktirnar 327 kr., tað hægsta tær nakrantíð høvdu verið, sum ber boð um, at tað hevur verið serliga nógv frávera og skulking frá skúlanum hetta árið. Og hetta fær so eisini Skúlastjórnina í Tórshavn at ressast við. Teir skriva til kommununa hin 6. desember 1940 og spyrja um støðuna og vilja hava vita nøvnini á børnum og foreldrum at teimum, sum hava forsømt skúlan hetta árið. Til hetta svarar forstandarskapið longu dagin eftir og sigur, at teir bert kunnu upplýsa nøvnini fyri trý tey fyrstu kvartalini, tí teir hava ikki fingið nøvnini fyri tað seinasta kvartalið enn. Teir upplýsa annars fyri Skúlastjórnini, at allar hesar upphæddir verða settar á skattarokningina, sum verða sendar hvørt hálvár.

Sagt verður víðari: Summar upphæddir eru ikki møguligar at fáa inn. Nevnd verða tvey dømi, ein einkja, sum hevur tað smátt, sum sagt verður, og er illa fyri. Hevur ein son, sum hon ikki maktar, har burdi formaðurin í skúlanevndini, Johansen prestur, gjørt okkurt. Annað dømi er ein kona við átta børnum undir 14 ár, sjey dreingir og ein genta. Maðurin liggur á sjúkrahúsinum, helst ólekiliga sjúkur. Tey skylda 13,70 kr. í skúlamulkt, men hetta kann ein illa krevja, har er eingin inntøka og eingin skattur; tey fáa 10 kr. í hjálp um vikuna. Nú gongur annars betur at fáa pengarnar inn við rættinum, sum kom í 1938, at fáa eftirstøður útgoldnar frá reiðarum og arbeiðsgevarum. Hetta hava vit brúkt so nógv, sum vit hava heimild til, verður sagt at enda.

Árini 1941 og 42 er talið um 14 kr. um árið. Tað er so seinasta árið talið er beinleiðis upplýst í roknskapinum. Seinni verða allar inntøkur vegna skúlan settar sum eitt samlað tal og fylgiskjølini til roknskapirnar eru ikki varðveitt.

Tó skilst á skrivi frá kommununi í 1947 til Skúlastjórnina, at trupulleikin við forsømilsum og manglandi dissiplin ikki er horvin heilt og verður róð uppundir, at høgi aldurin hjá lærarunum møguliga er ein orsøk til tað.

Í skrivi frá 1946 verður sagt, at tað eru 98 børn í skúlanum og tveir lærarar. Søkt verður í skrivi 24. juni 1947 um at fáa ein lærara settan afturat í skúlanum. "Vit vildu fegin fingið ein ungan lærara. Tað knýpur við dissiplinini, sum ein ungur energiskur lærari helst kundi fingið skil upp á."

Seinni er helst betri skil komið á í somáta. Tað finnast so ikki skriv hjá kommunustýrinum seinni, sum umtala stórvegis fráveru frá skúlanum. So helst hava yngri kreftir, sum sagt verður, hjálpt upp á støðuna.

Tilfar til skúlabrúks

Í roknskapunum kann ein finna ymiskt um, hvat tilfar til undirvísing og reingerð, kommunan keypti til skúlan gjøgnum árini. Er ikki uppgivið nágreiniliga øll árini, men summi, sum tó gevur eina góða hilling av hesum.

Roknskaparárið 1916-17 vórðu skúlabøkur keyptar frá H.N. Jacobsens bókhandli, Tórshavn, fyri 139 kr. og blekk frá Rasmus Niclasens handli fyri 6,25 kr.

Vit fáa annars vanliga at vita, at børnini tá í tíðini høvdu hvør sær eina lítla talvu og griffil at skriva á. Men roknskapirnir sýna, at blekk varð eisini rímuliga nógv brúkt og hevur tað helst verið til skriving og stílar m.a. Um griffil sigur Sprotin: *"Skriviamboð úr bleytum fløgugróti til at skriva á steintalvu við."*

1918-19 er bara tilfar til reingerð keypt. Frá Rasmus Niclasen, 1 feiikustur, 5 kr., ½ kg grønsápa 1,20 kr. og ½ kg soda 30 oyru. Frá Hans Niklláa Niclasen, 1 galvaniserað spann til nátthúsið, 3,75 kr. og 2 blikk Zebra* , 60 oyru. [* Zebra" ovnsverta, sæst m.a. í lýsing í Dimmalætting, 26.4.1919, frá Hans Joensen, Tórshavn..]

1919-20 er næstan bara keypt frá Hans Niklláa Niclasen, 15 stk. roknibøkur á 1 kr., 14 stk. rokninbøkur á 75 oyru, 1 fasittlisti 80 oyru. og blekk fyri 12 kr. So er keypt til reingerð: Sunlight sápa og soda 2,15 kr., 1 kustur 2,75 kr. og 2 eskjur Zebra 85 oyru. Hartil 1 kg sápa frá Jóan Paula Ellefsen.

1920-21. Frá Hans Niklláa Niclasen blekk fyri 20 kr. Rasmus Niclasen, 1 glas blekk, 5 kr., 2 feiikustar 3 kr. og 1 gólvskrubba 2 kr. H.N. Jacobsens bókhandil, Tórshavn, 20 stk. Føringasøga 66,50 kr., 1 heimskort 26 kr., 1 Danmarkskort (sum tó, smb. viðmerking í roknskapinum,

Grindadráp í Miðvági, uml. 1919. Brotmynd úr postkorti, sum Rasmus Niclasens handil í Miðvági gav út. Hvíta húsið til vinstru er skúlin og svarta húsið mitt fyri, stendur har, fyrsti skúlin í Miðvági frá 1829 stóð. Økið nakað niðan frá nevndu bygningum og millum teir, er sonevnda Steinsmørk.

varð sent aftur – møguliga skatt ella ikki rætt kort, seinni sama ár kemur eitt nýtt Danmarkskort fyri 32 kr.), 1 journal 8,50 kr. og 20 skúlablekkgløs 15 kr. Jóan Pauli Ellefsen, 1 kolskeið 1,25 kr. og J.E. Thomasen, Sandavági, blekk 8,80 kr.

Hetta árið varð annars nógv annað keypt eisini, sum ikki er upplýst hvat, men samlaða upphæddin var 489 kr., sum er tað mesta, brúkt varð í einum skúlaárið tey fyrstu áratíggjuni.

Fyri árini upp til 1935 finnast ikki upplýsingar um nágreiniliga hvat varð keyp av tilfari til skúlan, men samlað upphædd, hvat keypt var fyri. Hon svingar frá 52 kr. upp til 248 kr. um árið, tá tað var mest, men liggur í miðal um 137 kr. um árið.

1929 var einki keypt, men tað var eisini eitt tiltikið ringt ár í fíggjarheiminum og er møguliga tekin um tað.

Árini 1936 til 1958 er sjáldan upplýst hvat, ið er keypt, men hvaðan tað er keypt. Handlar ið ganga nógv aftur hesi árini, eru Hjalmar Jacobsen, bókhandil og H.N. Jacobsen bókhandil, Tórshavn, umframt lokalir handlar, Andreas Joensen og Elias Ellefsen.

1936 er tilfar keypt frá Taage Kofoeds Boghandel, Danmark, fyri 60,30 kr.

1946 síggja vit í skrivi, at 12 stk. bók um svimjing vóru keyptar frá Pól Petersen, ítróttarráðgeva, fyri 24 kr.

1947 eru 25 stk. "Lesibók III" keyptar frá H.N. Jacobsen bókhandli fyri 167 kr.

4. juli 1950 skrivar Buch & Holm, Keypmannahavn, og senda príslita yvir fysikktól. Men tað var helst ikki nógv uppi júst tá í smáu bygdarskúlunum, men gjørdist aktuelt tá felagsskúlin varð tikin í brúk gott áratíggju seinni.

1951 er eitt evropakort keypt frá Lohmans Boghandel, Kbh. fyri 58,70 kr.

1952 er ymiskt tilfar keypt frá H.N. Jacobsen bókhandil fyri 109 kr. umframt eintøk av bókini, Føroya Natúra, fyri 24 kr. Hartil er eitt skúlastempul keypt frá Johs. Ravnsfjall fyri 4 kr. og ein bóltur frá Gotfred Joensen fyri 8,15 kr.

12. januar 1956 skrivar Føroya Landsstýri, at Mentunargrunnurin hevur givið út Fuglabókina eftir Mikkjal á Ryggi og Sangbók nr. II eftir J. Waagstein. Meginparturin av hesum prentaðu bókum er ætlað til skúlabrúks. Útsøluprísurin av Fuglabókini er 14 kr., men kommunan fær tær fyri 9 kr. stk. Útsøluprísurin av sangbókini er 3,65 kr., men kommunan fær tær fyri 2 kr. stk. Mælt verður til, at kommunan keypir 25 eintøk av Fuglabókini og 60 eintøk av sangbókini og hevur bøkurnar í skúlanum.

Málið var viðgjørt á fundi 3. mars 1956 har samtykt varð at keypa 25 stk. av hvørjari.

Í 1957 er skúlatilfar keypt frá H.N. Jacobsen bókhandli fyri 56,65 kr., Kragbos Skolehåndbog er keypt úr Danmark fyri 77 kr. og frá P. Haase & Søn, Danmark, eru skúlabøkur keyptar fyri 264 kr.

2. januar 1959 verður skrivað til Geografisk Forlag, Keypmannahavn, og biðið um skúlakort. - Eftir tað finnist ikki nógv upplýst um, hvat er keypt til skúlan.

10. september 1965 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, og sendir eina amerikanska bók til brúk í undirvísingini á felagsskúlanum. Bókin er tøkk fyri ta vinarligu móttøkuna amerikanski ambasadørurin, mrs. Elkus White, fekk í Vágum. Hvørja bók talan er um, er tó ikki upplýst.

Roynd í skúlanum 1918

Til fund 2. mars 1918 var komið rundskriv frá Amtinum til forstandarskapið um eina roynd, sum ætlanin var at halda í skúlanum hin 13. og 14. mars sama ár, og at velja minst ein lim at halda eyga við nevndu roynd. Valdir vórðu Mikkjal D. á Ryggi og Rasmus Niclasen, formaður, at vera hjástaddir undir nevndu royndum.



Skitsa av hvussu skúlin í Miðvági var innrættaður í 1920, s.j. 2022.

Skúlastova bygd 1920

Summarið og veturin 1920 var ein stova og ein gongd av læraraíbúðini umbygd til eina skúlastovu, hetta vegna at lærarin kortini ikki nýtti hesa stovuna og helst hevur sett uppskot fram um at gera hetta, vegna at plássið í skúlanum var ov lítið.

Grundin til hesa bygging er, at ein lærari verður settur afturat við skúlan, áður var bert ein lærari og ein skúlastova.

Vit síggja nakað til hesa bygging í roknskapinum fyri 1920: Hetta summarið varð eitt lás og 10 kg. Blackfernis keypt frá Rasmus Niclasen handli. Og heystið 1920 vóru 18 blikk av máling, 6 blikk av Fernis, 7 brettir, 1 planki 3 fót, seymur, skrúvir, lás til skrýn og 4 ark linierað tapet keypt frá Hans Niklaa Niclasen fyri 132,42 kr.

Í desember 1920 sendir Hans Jacob Hansen, timburmaður, rokning fyri at hava gjørt innbúgv til skúlastovuna. 10 dupult skúlaborð fyri 280 kr. Hann hevði eisini gjørt eitt kadeter við stóli til læraran, skúlatalvu, hillar og kolkassa til nýggju skúlastovuna og umvælt kaminina. Hartil hevði hann tikið ein skilavegg niður, fyri at gera tvey rúm til eitt, og flutt eitt skáp. Samsýning fyri hetta arbeiði og tilfar var 72 kr. Ella tilsamans 370 kr. Frá gingu 11 kr. fyri 44 fót av brúktum timbri, sum hann keypti frá kommununi, sum helst er niðurtikni skilaveggurin.

Útlán av Gamla skúla

Hin 24. november 1916 var til viðgerðar á fundi umsókn frá Ungmannafelagnum v/ J.P. Vang, Josef Hansen og Louise Niclasen, um at læna skúlastovuna at hava fundirnar hjá felagnum í. Samtykt varð, at fyribils hevði man ikki nakað ímóti at geva hetta loyvi. Men tó við teimum útrykkjiligu treytum, at eftir hvønn fund so skulu skúlaborð og gólv vaskast og turkast.

Hvussu leingi hetta vardi er ikki nevnt. Hin 4. mars 1927 verður skrivað til Skúlastjórnina og spurt um tað er loyvt at læna skúlan út til grannastevnu, til fundir í einum ungmannafelag og aðalfundir í partafeløgum og til aðrar ópolitiskar samkomur. Svar er helst komið, men tað er so ikki varðveitt, men hevur helst verið positivt, tí líkt er til, at skúlin stundum var læntur út.

Annars nýtti kommunustýrið sjálvt skúlan regluliga uttanfyri skúlatíð til fundir og m.a. til val.

Í tríatiárunum eru viðhvørt fyrispurningar um at læna skúlan til kristiligar fundir. Tað var andalig "veking" í tríatiárunum og einki missiónshús, og er tað helst í smb. við hetta.

M.a. er fyri á fundi í forstandarskapinum 22. januar 1931 mál hjá skúlanevndini: Umsókn frá frú Joensen, lærara*, um loyvi til at brúka tí einu skúlastovuna eina ferð um vikuna til kirkjulig møtir til upplestur og hondarbeiði. Skúlanevndin mælir til at loyvi verður givið fyri restina av vetrinum móti at frú Joensen sjálv syrgir fyri ljósi, hita, útlufting og reingerð av skúlastovuni eftir hvørt møti. Fýra limir í forstandarskapinum vóru møttir og Poul Johansen prestur. Av hondskriftini frá teksti og undirskrift sæst, at hetta punktið á skránni hevur prestur sjálvur skrivað inn í protokollina. So tað hevur havt hansara áhuga og er sikkurt grundin til, at hann er møttur upp. [* Dagmar Joensen Næs, kona Martin Joensen Næs, lærara.]

Skrivað verður til Skúlastjórnina, Tórshavn, hin 28. november 1931 um lán av skúlanum. "Meinigheitin í Miðvági hevur sent inn umsókn um at hava møtir í skúlastovuni sunnukvøld, vegna at hølið, tey brúktu áðrenn, er teimum noktað. Umsóknin gongur út uppá at fáa loyvi at halda møtir har í óbestemta tíð, til eitt samkomuhús er bygt. Forstandarskapið heldur ikki, at vit kunnu nokta teimum hetta, um tey hava mist tað fyrra hølið. Men vit halda ikki, at loyvi kann gevast upp á óbestemta tíð, men fyri eitt ár í senn. Viðmerkjast kann, at loyvi frá læraranum er fingið. Vit loyva okkum tí at spyrja, hvat Skúlastjórnin heldur um málið."

Aftur hesaferð er svarið frá Skúlastjórnini ikki varðveitt, men ein viðgerð árið eftir sýnir, at loyvið varð givið.

Árið eftir, hin 9. desember 1932 verður skrivað til Skúlastjórnina. Aftur í ár hava vit fingið umsókn frá teimum, sum reka missiónsarbeiði her í bygdini, um at læna skúlastovuna til møtir sunnukvøld fyri árið 1933. Somuleiðis sum biðið verður um loyvi at halda sokallað kvinnumøtir eitt kvøld um vikuna, tá tað ikki er kvøldskúli. Vit lata spurningin fara víðari til Skúlastjórnina við viðmerking um, at forstandarskapið hevur einki ímóti, at loyvi verður givið.

23. desember 1933 verður skrivað til Amtið um lán av skúlanum til missiónsmøtir og kvinnumøtir, á sama hátt sum í fjør og fyrrárið. "Men bert eina stutta tíð, vegna at teir eru í ferð við at byggja meinigheitshús, sum eftir hvat teir siga, skal verða liðugt um 3-4 mánaðir. Vit hava viðgjørt málið á fundi í forstandarskapinum, har eg legði fram skrivið frá Skúlastjórnini frá 12. januar í ár og vísti til hesa viðmerking: "Viðmerkjast skal, at loyvi ikki verður longt oftari." Forstandarskapið helt seg ikki hava nakra grund at nokta umsøkjarunum hesa stuttu tíðina, sum tað allarhelst verður. Vit hava eisini spurt lærararnar, og teir hava einki ímóti hesum. Vit senda tí málið til Skúlastjórnina at taka avgerð um."

Heldur ikki her er svarið varðveitt, men gangast kann helst út frá, at tað varð játtað, tá tað snúði seg um stutta tíð.

Í 1950 eru føroyingar so smátt farnir at hugsa um ferðavinnu, tó at tað var sera lítið av tí enn. Helst hevur nýstovnað, Føroya Ferðamannafelag, tosað væl við Skúlastjórnina um t.d. at brúka teir tómu skúlarnar um summarið til hetta. Í øllum førum er tað Skúlastjórnin sjálv, sum hin 12. juni 1950 skrivar til kommununa, og hin 15. juni 1950 skrivar Føroya Ferðamannafelag, at biðja um skúlan til ferðafólk í summarfrítíðini. Skúlastjórnin sigur seg einki hava ímóti hesum.

19. juni 1950 verður skrivað til Føroya Ferðamannafelag og sagt, at sóknarstýrið á fundi 17. juni 1950 hevur avgjørt, at gangast kann við til at læna skúlan út til ferðafólk at gista í, tá eingin undirvísing er um summarið, fyri 50 oyru pr. nátt pr. gest. Kommunan vil eisini tekna seg sum lim í felagnum við 100 kr.

Ferðamannafelagið mælti annars til 1 kr. pr. nátt pr. gest. – Nevndi fundur 17. juni er ikki førdur í gerðabókina og hevur helst verið leyst tos millum limirnar.

Á fundi 18. desember 1956 var til viðgerðar bræv frá skúlanevndini um at nýta skúlastovurnar til annað enn til skúlabrúks. Stýrið varð sinnað at senda málið til lærararnar til ummælis.

Í journal hjá kommununi yvir innkomin brøv er hin 15. mars 1957 upplýsing um skriv frá Skúlastjórnini viðvíkjandi nýtslu av skúlanum til annað enn undirvísing. Hetta sýnir so, at málið er sent til Skúlastjórnina eisini. Annað er so ikki nevnt um hesi skriv, sum ikki eru varðveitt.

29. oktober 1958 skrivar skúlanevndin í Miðvági og heitir á sóknarstýrið um at útvega høli til ungdómin. Í skrivinum, sum er eitt sindur drúgt, heita tey á sóknarstýrið um at gera nakað fyri ungdómin við at skaffa teimum høli til tey ungu tey longu vetrarkvøldini til lestur og upplýsandi fyrilestrar o.a. Sum er hava tey bert dansistovuna, og ikki kann sigast, at hetta er upplýsandi. Vegna at einki er at fara til heldur tað unga fólki mest til í bilum og á gøtunum. Hetta er skaðligt, og øll fólk, ið hava ábyrgd mega viðganga, at her má okkurt gerast. Mælt verður til at ovara hæddin á kommunuhúsinum verður gjørd til ungdómshús, og hóast hetta ikki kann brúkast enn, við tað at tað er lænt út til vevskeið, so kundi verið byrjað at fyrireika hetta.

Skrivið var til viðgerðar á fundi 22. november 1958. Allir limirnir, uttan Jóan Hendrik Samuelsen, lærari, ið var staddur í Danmark, vóru møttir. Stýrið ásannaði, at kommunan einki høli hevði til slíkt endamál í løtuni og kundi tí ikki gera nakað við hetta mál enn. Ásannað varð tó, at hetta var eitt gott mál, ið mátti fáa eina loysn so skjótt sum atstøður vóru.

Á fundi 22. desember 1959 var á skrá bræv frá Bláa Krossi um innivist í gamla skúla, tá hin nýggi skúlin er liðugur. Stýrið helt ikki vera orsøk til at taka støðu til hetta enn.

- Skúlin var ikki liðugur fyrr enn í 1961.

Nevnast kann, at á Vágastevnum og seinni Vestanstevnum er skúlin allarhelst læntur út til bátsmanningar at sova í um náttina. Tað var heilt vanligt tá í tíðini, og hesum stóð kommunan sjálv fyri. Og í onkrum førum er tað beinleiðis nevnt. Eisini vóru vanliga tiltøk í skúlanum á stevnum. Sum t.d. bazarur, eydnuhjól og framsýningar av ymsum slag. Hetta hevur so verið ár, har skúlin ikki var brúktur av ítróttarfólki at sova í.

Annars varð skúlin eisini brúktur til kvøldskúlaundirvísing. Um tað er nevnt í brotinum um Kvøldskúlan.

14. mars 1968 skrivar S.E. Johansen, klædna- & matvørubúð, Miðvági og spyr, um tað er møguligt at fáa gamla skúla til leigu í 3 dagar. Við stórari útsølu saman við Gunnar Stokkholm og okkum, sum fólkið fær stóra gleði av. Vónandi frætta vit aftur nakað skjótt.

Um loyvið varð givið kunnu vit ikki siga, tí tað er ikki varðveitt skrivliga. Men hetta er so ein eitt sindur serstakur fyrispurningur.

1. september 1984 skrivar Miðvágs Talvfelag, og søkja um at leiga eitt rúm á loftinum í Gamla skúla, antin tann stóra kvistin ella í øðrum lagið innara enda. Teir vilja fegnir læna hetta eftir skúlatíð til kl. 24, umframt alt vikuskiftið til kl. 24. Teir lova at gera reint eftir sær og skjóta upp at leigan verður symbolsk, 100 kr. um árið. Harumframt søkja teir um stuðul til felagið, 15.000 kr. í 1984 og so 5.000 kr. um árið næstu 3 árini fyri at gera hølini í góðan stand so áhugin fyri talvi kann vaksa í bygdini. Við ítróttarkvøðu, Eyðun Samuelsen, Johs. E. D.

Málið er fyri á bygdaráðsfundi, 5. september 1984. Samtykt varð at lata Miðvágs Talvfelag innara loftsenda til nýtslu fyribils til 1. juni 1985 ókeypis. Og lata 5.000 kr. í fíggjarstuðli.

Frá fundafrásøgn, 25. apríl 1990, sæst, at skótarnir eru komnir í Gamla skúla. Nær tað er hent sæst annars einki um. Skótarnir hava annars søkt um stuðul til tilfar fyri ábøtur, teir hava gjørt á loftinum í Gamla skúla. Smb. skrivinum hava teir brúkt 10.250 kr. Samtykt varð at stuðla teimum við 4.000 kr.

Tað seinasta, sum sæst í fundarfrágreiðingum hjá bygdaráðnum um útlán av Gamla skúla til ymiskt er frá fundi, 6. oktober 1994. Har er til viðgerðar umsóknir um pláss í Gamla Skúla fyri veturin 1994-95. Samtykt at ganga umsóknunum á møti, treytað av, at øll fara væl um hølini. Møguliga snýr hetta seg um kvøldskúla.

Seinni er skúlin nýttur til barnaansing og tá hevur ikki ligið so væl fyri at lænt skúlan út til tiltøk. Tó at framsýningar o.a. viðhvørt hava verið á Vestanstevnum í Miðvági.

Skúlastova bygd uppí skúlan

29. november 1927 var fundur í forstandarskapinum hildin heima hjá formanninum. Í gerðabókini stendur, at allir limir møttu, og presturin var, sum formaður í skúlanevndini, boðin og møtti. Til viðgerðar var bygging av skúlastovu til bygdina, vegna tað, at man varð noyddur at taka ta núverandi vestaru skúlastovuna til læraraíbúð, soleiðis sum hon hevur verið innrættað fyrr.

Samtykt varð at senda umsókn til Skúlastjórnina um Statsstuðul til sama. Harumframt at lata gera eina fíggjarætlan yvir eina skúlastovu, stoypt upp við betong, við gjøgnumgangandi gongd millum stovurnar.

Á fundi í forstandarskapinum, 28. mai 1928, var gjørd ætlan, frágreiðing og fíggjarætlan til tilbygning til skúlan. Sagt verður, at ætlanin varð góðkend og verður send Skúlastjórnini.

Í 1928-roknskapinum sæst, at 75 kr. eru nýttar til prosjektering og støðuætlan. Sambært skrivi seinni, er tað Havning arkitektur, ið hevur prosjekterað nýggja skúlastovu í skúlanum í Miðvági.

Á fundi í forstandarskapinum 5. januar 1929 var á skrá at skipa arbeiðið av nýggjari skúlastovu. Samtykt varð at seta Sørin Danielsen, timburmann og formann í forstandarskapinum, sum umsjónarmann við arbeiðinum.

Skrivað verður til Amtið 24. januar 1929 og sagt, at vit eru í ferð við at byggja eina skúlastovu í Miðvági. Havning arkitektur hevur víst til eitt umfarsskriv frá 14.2.1910, har vit loyva okkum at spyrja, um vit kunnu fáa tað sent frá Amtinum. Tað er ikki at finna í Færøsk Lovsamling, men er helst trykt í Lovtidende og skuldi soleiðis verið í arkivinum hjá kommununi. Men tá sóknirnar í Vágum vórðu býttar sundur í 1915, varð samtykt, at arkivið skuldi goymast í Sørvági. Men har er tað goymt á ein slíkan hátt, at ein ikki sleppur fram at tí. So haðan fáa vit ongar upplýsingar.

25. august 1929 er eitt nokkso upplýsandi skriv sent til Skúlastjórnina. Vit hava bygt eina nýggja skúlastovu og eru samstundis í ferð við at umbyggja læraraíbúðina í Miðvági. Og vit verða noyddir at fáa til vega ein nýggjan kakkelovn og haril hoyrandi kamin. Men vit hava viðgjørt spurningin at fáa til vega hitaleiðing í staðin. Vit hava spurt hjá veitaranum og hava fingið at vita at anlegg við komfýr til køkina og hita til trý rúm í læraraíbúðini og til tær báðar skúlastovurnar kann veitast fyri 1.600 kr. við frakt og uppseting. Um vit meta teir báðar ovnarnar vit skulu skaffa til 400 kr. og teir 3 ovnarnar og komfýrin, vit kundu selt til 250 kr., so er ein munur á 850 kr., sum eru nógvir pengar hjá kommununi at átaka sær at gjalda. Og tað vildi eisini verið behagiligari hiti enn at fýra við koli inni í skúlastovuni. Tað er garanteraður hiti til 20 stig celsius, sum vanligt. Kanska kemur hetta eisini at spara nakað av koli, men tað kenna vit tó ov lítið til hesi anlegg til at kunna siga. Vit vilja tí spyrja Skúlastjórnina

um vit møguliga kunnu vænta stuðul til eitt slíkt anlegg. Og um stjórnin heldur tað verða neyðugt, so at leggja málið fyri Løgtingið. Tá tað fleiri staðni í Føroyum eru bygdir nýggir nútímans skúlar, er spurningurin kanska longu viðgjørdur, og stjórnin soleiðis kennir støðuna hjá jattanarmyndugleikunum til hetta. So kann stjórnin kanska senda málið víðari. Tá vit innanfyri 2 mánaðir kunnu rokna við at fáa brúk fyri hita í skúlahølunum høvdu vit verið takksamir fyri svar skjótast tilber.

Á fundi 9. september 1929 er til viðgerðar, uppskot um broytingar í læraraíbúðini, so sum broytan av køkini og gongini, sum var neyðugt vegna broytingar av skúlabygninginum. Hetta varð samtykt og at broyta útveggin, sum varð gjørdur av stórum gróti til betongvegg, vegna at lærarin hevði boðið sær at gjalda helvtina, ella upp til 150 kr. av tí tað kom at kosta.

19. september 1929 verður skrivað til Amtið og sagt, at vit loyva okkum hervið at boða frá, at vit nú fyri so vítt eru lidnir at gera nýggju skúlastovuna í Miðvági, og at vit vænta at fáa Statsstuðulin útgoldnan.

Og 21. november 1929 verður skrivað til Skúlastjórnina og svarað upp á nakrar viðmerkingar frá somu.

Tá Skúlastjórnin hevur sent okkum sýnið av skúlastovuni í Miðvági og biðið um okkara viðmerkingar, skulu vit loyva okkum at siga: Tað er rætt, at bygningurin er nakað breiðari enn á tekningini ásett, og tað hava vit býtt millum bæði rúmini, eins og bygningurin er eitt sindur longri. Tá ein byggur fast í eitt annað hús, so er tað ikki altíð so lætt at fáa ta nágreiniligu støddina, og vit vildu tryggja okkum, at tað ikki bleiv ov lítið. Við tað at vit gingu út frá, at tað ikki kann vera skaði í, at tað er nakrar cm. størri. Men tá sagt verður, at tað er 5 cm. ov lágt, so passar tað avgjørt ikki. Eg havi nú aftur verið har saman við byggimeistaranum, Jóhan Elias Johannesen, og tað er mált nágreiniliga, sum tað stendur í tekningini. Hæddin nevniliga 3,25 m. Eg rokni við, at sýnsmenninir hava mált upp til loftgesimsina – kappan, múrringin – men tað er ikki rætti máti at mála.

At ovnur ikki er settur upp, kemur sjálvandi av, at vit eru í tingingum við stjórnina um at nýta miðstøðulhita, og soleiðis ikki brúka ovnar.

At tað eru settar 2 hurðar til úthurðar í gongina, ístaðin fyri eina, sum á tekningini víst, so er tað hent av praktiskum grundum. So kann ein altíð brúka aðra hurðina í leð fyri vindi og regni.

Tað er rætt, at tað mangla geriktir um eina hurð. Men tað verður gjørt beinanvegin.

Pussing og fuging uttandura er útsett til komandi summar. Tað hevur verið ómøguligt at fáa tað gjørt í vánaliga veðrinum, vit hava havt í heyst. Dekklistar og takrennur verða samstundis settar upp.

Tað sum verður viðmerkt um ventilatión, hava vit sagt, at vit ikki ætla at fylgja uppskotinum hjá sýnsmonnunum um at seta ventilar í endaveggirnar. Hinvegin hava vit gjørt eina kamin í skilavegginum millum skúlastovurnar, og skulu vit seta tveir ventilar í hana til hvørja stovu. Ein niðri við gólvið og ein undir loftinum. Verða teir rætt brúktir, rigga teir nógv betur enn uppskotið hjá sýnsmonnunum.

Sambært roknskapinum 1929 fekk kommunan 1.800 kr. í stuðli til byggingina, sum snúði seg um nýbygging og umbygging. Bygging av nýggjari skúlastovu uppí skúlan, t.v.s. at skúlin varð longdur við einari skúlastovu afturat. Og at umbyggja aðra av teim gomlu skúlastovunum til aftur at verða partur av læraraíbúðini. So talanin varð framvegis um at hava bert tvær skúlastovur í skúlanum.

Árið 1929 arbeiddu hesi fólk við uppíbygging og umbygging av skúlanum: Sørin Danielsen, eftirlit og arbeiði, 112 kr., Jóhan Elias Johannesen, arbeiðsformaður, 329 kr., Sámal Jákup



Skitsa av hvussu skúlin í Miðvági var innrættaður í 1929, eftir at nýggj skúlastova varð bygd uppí skúlan. s.j. 2022.

Johansen 308 kr., Albert Poulsen 253 kr., Jóhannus Niclasen 162 kr., Jóan Pauli Poulsen 129 kr., Jógvan Napoleon Hansen 89 kr., Rasmus Heinesen 74 kr., Jóan Hans Jacobsen 61 kr., Niclas S. Haraldsen 54 kr., Jóhannus N. Haraldsen 50 kr.

Millum 40 og 30 kr.: Hans Jákup Poulsen, Kristian Poulsen, Kristin Rasmusen, Hans Hansen Erikstoft og Hans Jacob Poulsen.

Millum 30 og 20 kr.: Hans V. Hansen, J.E. Johansen og Heini Rasmusen.

Millum 20 og 16 kr.: Kristin Jacobsen og Marius Næs.

Undir 10 kr.: Jóhan Poulsen, Hansine Hansen, Hans Jørgensen, Lisebeth Hansen, Sámal Jákup Thomasen, Jóan Pauli Ellefsen og Jóan Pauli Jørgensen.

Árið 1929 varð tilfar keypt frá hesum: Maskinverkstaðið 4.116 kr., Havnar Timburhandil 863 kr., Poul Isaksen 332 kr., Klæmint M. Haraldsen 183 kr., Jákup Karl Joensen 79 kr., Ludvig Poulsen 35 kr., Niclas Rasmusen, Sørv. 26 kr., Petur Heinesen, Sndv. 26 kr., Sámal Jákup Thomsen 23 kr., Hjalmar Nielsen, Sandavági. 23 kr., Niclas Niclasen, Sørvági 18 kr., Søren Olsen Eftf. 12 kr. og Elias Ellefsen 2 kr.

Koyring: Pf. Krúnan, bil 209 kr., Georg Hansen, 44 kr. og Elias Rasmusen, Sørv. 2,75 kr.

Hildið var fram við arbeiðinum í 1930

7. juli 1930 verður skrivað til Undervisningsminniseriet, Keypmannahavn (á donskum, sum stórt sæð alt var tá). Vit senda hervið uppgerð yvir útreiðslurnar við bygging av eini skúlastovu og umbygging av læraraíbúðini í Miðvági. Og vit loyva okkum at søkja um ískoyti til tann fyrr játtaða stuðulin á 1.800 kr. til bygging av nýggjum skúlabygningi. Vit stuðla hesa umsóknina við, at ein stórur partur av upphæddini er farin til umbygging av læraraíbúðini. Húsið er umleið 45 ára gamalt. Fyri 10 árum síðan gjørdist neyðugt at gera eina nýggja skúlastovu. Við tað at lærarin ikki brúkti rúmið varð tað umbygt til skúlastovu.

Tá vit nú skuldu hava ein nýggjan lærara, gjørdist neyðugt at fáa til vega eina íbúð. Vit hildu tað vera bíligast at byggja eina nýggja skúlastovu, og so gera læraraíbúðina soleiðis, sum hon hevði verið áðrenn. Tá vit skuldu gera hetta, var tað ómøguligt at fáa hana tíðarhóskandi, uttan at tað kom at kosta so nógv, sum nú er brúkt. Stovurnar vóru ov smáar, bert 5 alin og vindeyguni alt ov smá til at fáa nóg gott ljós. Og tá bæði vindeygu og rammur vóru rotin, mátti hetta gerast av nýggjum og vit hildu tá, at tað var rætt at gera tey í tíðarhóskandi stødd. Stovurnar fingu vit gjørt 1 ½ alin longri, við at leggja ta fyrr brúktu gongina afturat,

sum nú varð óneyðug. Kaminin mátti takast burtur og nýggj trappa gerast upp á loft, við tað at hon var so trong, at ein maður ikki kundi ganga uppreistur gjøgnum hana. Gólvini vóru uppslitin og máttu leggjast nýggj, somuleiðis fleiri hurðar skiftast. Nýggjur komfýrur mátti keypast, tá tann gamli fyri langt síðan varð kasseraður sum óbrúkiligur, somuleiðis tann eini ovnurin. Og so skuldi alt málast og tepetiserast. Sum ministeriið sær, so var tað ómøguligt at fáa hetta gjørt fyri minni pening enn brúkt er. Um tað bert skuldi vera nøkulunda tíðarhóskandi og vit kundu loyva okkum at bjóða hetta út sum læraraíbúð.

Tað er sjálvandi keðiligt, at tað í kostnaðarmetingini bert vórðu settar 500 kr. av til arbeiðið. Tí tað vísti seg beinanvegin at gerast dýrari. Og tíð var ikki til at senda nýggja umsókn, tí lærarin var longu settur í starv og hevði krav uppá at fáa eina íbúð. Tá tað nú hevur eydnast okkum at fáa eina nøktandi læraraíbúð, so vóna vit, at ministeriið ferð at veita stuðul eftir kostnaðinum, sum stuðlað verður við aðrastaðni, um so ikki í mun til nýggjar íbúðir. At enda skal viðmerkjast, at tað hevði verið nógv dýrari at brúkt somu skúlastovuna aftur og so bygt eini nýggj lærarahús. Tí skúlastovan hevði kortini eisini verið noydd at verið umvæld, tí hon var ikki brúkilig uttan umbygging.

Á fundi í forstandarskapinum 25. november 1930 var samtykt at byggja ein køst til skúlan við nátthúsi bygt fast í. Hetta er helst við í samlaðu útreiðslunum fyri 1930 til útbygging av skúlanum.

Viðvíkjandi útbyggingini av skúlanum so komu hesar útreiðslur afturat í 1930:
Andrias Joensen hdl. 152 kr., Maskinverkstaðið 122 kr., Klæmint Haraldsen hdl. 54 kr., Sámal Jákup Johannesen 27 kr., Jóan Pauli Hansen 22 kr., S.J. Wejhe & E. Rasmuss, 16 kr., Ludvig Poulsen, Tórshavn, 10 kr., Jóan Pauli Ellefsen 10 kr. og Pf. Krúnan fyri bil 6 kr. Í alt 419 kr.

Uppgerð er yvir samlaða kostnaðin í 1929 og 1930, har okkurt ikki er nevnt áður, m.a. at partur av arbeiðinum eisini var gjørt við pliktarbeiði 1929:

1929	
Arbeiðsløn	3.268 kr.
Pliktarbeiði 1250 tímar	625 -. (á 50 oyru pr. tíma).
Tilfar	5.133-.
Frakt av tilfari	256 -.
Takrennur	100 -.
Yvirlitstekning	75 -.
Ymiskt	66 -.
Útreiðsla	9.523 -.
Stuðul frá Statinum	÷1.800 -.
Fyribils úrslit	7.723 kr.
1930	
Útreiðsla	419 -.
Samlað úrslit	8.142 -.
Stuðul frá Statinum	÷1.600 -.
Endaligt úrslit	**6.542 kr.**

Pliktarbeiðir er helst mest við at føra tilfar til staðið. Grót, áareyr og sand, umframt møguliga at grava út fyri og at byggja grundina, út frá tí vanliga sæst um skúlabygging í hesi tíð. At pliktarbeiðið er nevnt, er tí, at virðið av tí var eisini stuðulsgevandi.

Skúlastovan og umbyggingin av læraraíbúðini kostaði soleiðis 9.942 kr. hjá kommununi,

meðan stuðulin var 3.400 kr. frá Statinum, so endaliga útslitið hjá kommununi varð sum nevnt 6.542 kr.

Hin 3. juli 1921 var á skrá skriv frá Skúlastjórnini hjá Amtinum, har heitt varð á forstandarskapið um at fáa gjørda eina nýggja meting av skúlabygningunum í kommununi av 2 byggikønum monnum. Til hetta starv vórðu valdir Hans Jørgensen, timburmaður, og Jóannes Rasmusen úr Miðvági.

Umsókn var komin frá Niclas Haraldsen til fund 14. mars 1924 um at keypa tann gamla skúlakomfýrin fyri 60 kr. Hetta varð samtykt.

Eingi rygglen á benkrunum

Skriv var komið frá Skúlastjórnini hin 11. januar 1930, har sagt varð, at fráboðan var komin frá kanningarmonnum um, at skúlin ongan hita hevði, at skúlabenkurnir ongan ryggstuðul høvdu og at ov fáir knagar vóru at heingja yvirklæðini á hjá børnunum. Í svarskivi sigur forstandarskapið, at hetta er ikki rætt, og at skúlin í Miðvági er hitaður. Bert í tí tíðarbilinum, tá vit tingaðust um miðstøðuhita, varð skúlin hitaður við petroleumsovnum, men tað var altíð nóg heitt, og tað eru fyri langt síðan settir ovnar upp. Viðvíkjandi bonkunum í skúlanum verður svarað, at tað ongantíð hevur verið ryggstuðul á skúlabeinkjunum, og vit kenna einki til, at tað hevur verið álagt. Men vit hava ætlað okkum at fáa hetta gjørt, men tað kann ikki gerast fyrr enn í summarfrítíðini. Og viðvíkjandi manglandi knagum so eru tað meira enn nokk av knagum í gongini.

Grundstykkir latin av Steinsmørk

Í fyrra partinum er nakað skrivað um Steinsmørk í brotinum "Byggilendi", sum í síni tíð varð latið av prestagóðsinum til skúlan at byggja á og at brúka. Henda trøð, sum var rímuliga stór, verður so ogn hjá Miðvágs kommunu í 1915, tá kommunan tekur við. Hon er tó ikki stórvegis nevnd í skjølunum hjá Miðvágs kommunu fyrr enn hin 2. januar 1928, tá ein nevnd fyri meinigheitshúsið v/ Hans Jørgensen og fleiri søkir kommununa um at fáa eitt grundstykki av Steinsmørk niðanfyri Statsvegin og eystanfyri gilið til at byggja eitt meinigheitshús á. Annars varð trøðin latin til brúks sum partur av samsýning fyri reingerð av skúlanum upp til umleið 1930.

Forstandarskapið samtykkir at lata eitt hóskandi grundstykki fyri 45 oyru m^2. Við tað at grundstykkið er 182 m^2, gevur tað 81,90 kr.

Um hetta varð hildið vera ov nógv, ella hvør grundin hevur verið, so sæst einki svar at vera komið til hesa avgerð, og í 1930 søkja tey somu, har avrit av umsóknunum tó tíverrið ikki er varðveitt, aftur um at fáa grundstykki, men hesaferð søkja tey, eftir øllum at døma, um at fáa stykkið ókeypis.

Á fundi í fostandarskapinum 25. november 1930 er nevniliga ein slík umsókn frá stýrinum til byggjan av meinigheitshúsi til viðgerðar.

Samtykt verður at játta økið eystanfyri gilið, niðanfyri vegin, ókeypis.

Og á fundi 31. desember 1930 verður samtykt at leiga restina av Steinsmørk út fyri 18 kr. um árið. Á sama fundi verður samtykt at senda eitt skriv til Amtið um, at forstandarskapið hevði givið meinigheitini í Miðvági eitt grundstykki av Steinsmørk til meinigheitshús.

Nevnda skriv verður sent hin 2. januar 1932, har so søgan um Steinsmørk verður í stuttum endurgivin, og lagt afturat, at semja var um, at økið er so stórt, at tað aldrin verður brúkt alt til skúlan. Og tí vóru vit sinnaðir at ganga umsóknini á møti. Vit loyva okkum tí við hesum at biðja Amtið um loyvi til hetta. Viðmerkjast skal, at vit samtyktu at lata grundstykkið

ókeypis. Men um Amtið ikki heldur at tað ber til, so ganga vit eisini við til tað. Ætlaða økið, sum vit hava gjørt eina skitsu av, kemur bara móti vestri í samband við restina av ognini og er ikki breiðari enn so, at tað júst er stórt nokk til tann ætlaða bygningin. Tá umsøkjarin ætlar at byrja byggingina beinanvegin, hevði tað verið ynskiligt, at svarið frá Amtinum kemur so skjótt sum til ber.

8. mars 1932 verður skrivað til Amtið. Fyri umleið einum ári síðan framdu vit makaskifti við Jóan Hendrik Samuelsen lærara, her. Hann hevði ognað sær eitt grundstykki av ognini hjá kommununi við skúlan, í tí sonevndu "Steinsmørk". Kommuna átti eitt líknandi øki, sum var býtt frá restini av ognini. Leggi við eina skitsu av økinum, so ein skilur betur. Her sæst, at tað var betri fyri skúlan at fáa jørðina meira samlaða kring skúlan. Vit hugsaðu tí, at hetta bara var til gagns fyri skúlan og hugsaðu ikki um, at til hetta kravdist loyvi frá Amtinum, tí hetta var bert ein samanlegging. Tá nú lærarin hevur søkt Sparikassan um lán, hevur Sparikassin sett sum treyt, at loyvi frá Amtinum má fyriliggja, áðrenn lán verður givið. Vit loyva okkum tí at søkja um nevnda loyvi.

Vit síggja so her, at talan er um somu tíð at lata tvey stykkir burtur av Steinsmørk, eitt til meinigheitshús og makaskifta eitt við fyrstalæraran. Tað seinna síggja vit ikki meira til, so tað er helst gingið í ordan.

Tað fyrra gongur ikki heilt, sum forstandarskapið ætlaði, tí Amtið krevur, at stykki skal seljast og ikki gevast. Og at til hetta skal umrødda grundstykki kostnaðarmetast.

Málið er fyri á fundi 23. apríl 1932. At kostnaðarmeta stykkið vóru valdir Heini Joensen og Niclas Joensen úr Miðvági. Avrit av metingini sæst ikki varðveitt og tessvegna ikki endaligi keypsprísurin. Men hann hevur neyvan ligið langt frá fyrsta uppskotinum frá kommununi um gott 81 kr.

Annars varð húsið seinni nevnt, "Missiónshúsið". Í Kortal.fo sæst, at matrikkulstøddin á grundstykknium hjá Missiónshúsinum er 182 m^2, men kortstøddin er 191 m^2, sum má merkja, at upprunaliga uppmálingin allarhelst ikki hevur verið heilt neyv. Men tað er so henni gingið hevur verður eftir.

Ætla broyting í skúlaætlan og meting av skúlanum

23. apríl 1932 er til viðgerðar skriv frá Skúlastjórnini um at gera broytingar í skúlaætlanini, at ein tími verður tikin frá religión og lagdur til rokning. Samtykt varð at svara, at man helt onga grund vera fyri tí uppskotnu skipanini, men ynskti ætlanina óbroytta. Útsagnir frá prestinum og skúlanevndini gingu sama veg, verður sagt.

Á fundi 8. november 1932 er aftur fyri at fáa skúlan mettan av nýggjum, sum helst hevur verið umleið 10. hvørt ár vegna tryggingarvirði. Tað var Amtið, sum hevði sent fyrispurning um málið. Samtykt varð at seta Heina Joensen og Harald Rasmusen til metingarmenn. Um bara Heini hevur gjørt sýnið er ógreitt, men bert Heini Joensen er nevndur í roknskapinum hetta árið at hava fingið samsýning fyri sýn av skúlanum, og var tað 5 kr.

Filmur í skúlanum

Sjálvt um uppfinningin var eldri, so er tað í 1920-unum og 30-unum, at filmur veruliga vinnur seg fram sum miðil og gerst kendur og sera væl umtøktur um allan heim, har nógvar heimsstjørnur verða bornar.

Á fundi í forstandarskapinum 8. mai 1932 er til viðgerðar eitt, eftir tátíðar metan, modernað

mál, nevniliga ein umsókn um loyvi at sýna film í skúlanum. Umsóknin var frá tí tá í Føroyum kenda filmsframvísaranum Richard Bugatsch um loyvi at sýna film í skúlanum fyri børnunum 4 ferð um árið fyri 20 kr. árliga.

Tingast varð við prestin sum formanni í skúlanevndini. Hann viðmælti málinum upp á tað besta. Síðan var málið sett undir atkvøðugreiðslu í forstandarskapinum. Fyri uppskotinum atkvøddu Harald Rasmusen, Sørin Danielsen og Andrias Joensen. Ímóti atkvøddu Rasmus Heinesen og Heini Haraldsen. Tað skuldi sostatt verið samtykt, men verður tikið uppaftur á fundi 19. august 1932 sum kanska sýnir, at summir vóru sera ivasamir við hesum nýggja. Í gerðabókini stendur, at tosað varð nú við lærararnar, sum eisini viðmæltu málinum. Men at ósemja var í forstandarskapinum um nyttuna av hesum, verður sagt. Málið varð tí enn einaferð sett undir atkvøðugreiðslu. Úrslitið var tað sama, 3 fyri og 2 ímóti. Málið var sostatt endaliga samtykt.

Nevnast kann, at Bugatsch fekk sama ár eisini loyvi at sýna film í skúlanum í Sørvági, helst Sandavági eisini. Í roknskapinum fyri 1932 sæst, at goldnar vórðu Bugatsch 5 kr. fyri filmsframvísan.

Herálvur Geyti í Kollafirði var eisini kendur fyri at ferðast kring landið at sýna film. Og gjørdi tað eisini í skúlunum. Í 1939 sæst í roknskapinum hjá kommununi, at 20 kr. vóru goldnar honum hetta árið fyri filmsframvísan. Hann kemur so fyri aftur í roknskapinum 1954, har goldnar eru honum 150 kr. fyri tað sama,. Annars hevur hann helst verið regluliga í bygdini, tí hann vísti film alment um alt landið í nógv ár. Har so tey, sum eru møtt upp, hava rindað atgongugjald.

4. november 1950 skrivar Jens Wang, sum tá er nýggjur lærari í Miðvági, og søkir um stuðul til keyp av einum ljósmyndatóli til skúlan. Hann hevur heitt á politimeistaran í Havn og biðið um loyvi at samla inn pening í bygdini til endamálið.

Málið er fyri á fundi 13. november 1950. Í gerðabókini verður sagt, at stýrið tók ta støðu, at bíða við at taka avgerð í málinum, til tað sæst, hvussu nógv fekst inn við tí í umsóknini nevndu peningainnsavnan. Annars helt stýrið, sum var sinnað til at fáa eitt sovorið apparat, at lærararnir sjálvir máttu leggja alla orku í at savna pening saman til hetta endamál. Stýrið vildi veita teim allan moralskan stuðul til hetta.



Varðveittar lýsingar frá 1950, í skjølunum hjá Miðvágs kommunu, av filmsframvísarum, sum allarhelst snýr seg um nevnda mál.

Martin Joensen Næs og Jóan Hendrik Samulelsen, lærarar, skriva hin 26. februar 1955 til kommununa og siga, at skúlanevndin og kommunan hava í huga at keypa eitt filmstól til skúlan og eru vit spurdir um hetta. Og skulu vit hervið geva málinum okkara besta viðmæli.

Tað er tó eftir hetta, at skúlanevndin skrivar til kommununa, so um "kommunan" hevur verið við upp á tað áðrenn, so kann tað bert hava verið munnliga.

16. mars 1955 skrivar skúlanevndin í Miðvági v/ Sigmund Frederiksen og heita á kommununa um at keypa eitt filmstól til skúlabrúks og siga, at 2 lærarar við skúlan viðmæla hetta. Skúlanevndin viðmælir "Siemens Projektor 2000", ið eisini kann nýtast til talufilm, kostnaður 1.930 kr. Filmstól verða meira og meira nýtt til skúlabrúks, verður sagt.

Málið er fyri á fundi 26. mars 1955. Í gerðabókini verður sagt, at stýrið viðgjørdi málið og kom til tað úrslit, at uppskotið var gott. Hildið varð tó, at rættast var at upptaka samráðingar við Sandavágs kommunu um møguliga at keypa eitt tílíkt tól í felag.

Hvat ið kom burtur úr hesum er óvist, men helst einki í fyrstu atløgu, tí hin 16. mai 1956 skrivar skúlanevndin í Miðvági og sendir aftur inn umsókn um at keypa eitt filmstól til skúlan og um at søkja Skúlastjórnina um stuðul.

Umsóknin er til viðgerðar á fundi 23. mai 1956, har tað kemur fram, at kostnaðurin er helst høvuðstrupulleikin. Tí 1.930 kr. vóru rímuliga nógv tá í tíðini og hevði svarað til umleið 46.000 kr. í dag. Tupulleikin var bara, at kommunurnar vóru munandi verri fyri fíggjarliga tá enn seinni. Stýrið varð samt um at útseta hetta mál, tá kommunan hevur so stórar útreiðslur í løtuni.

Annars sæst ikki í skjølunum hjá kommununi um og nær filmstól varð keypt til skúlan.

El til skúlan

Í einum broti í partinum "Elveiting í Miðvági" er sagt okkurt um, hvussu tað gekst við at fáa el í skúlanum í Miðvági. Her skal nakað vera lagt afturat. Tað byrjaði við eini ætlan í 1932 frá privatum elanleggi, sum tó ikki bleiv til nakað.

7. november 1947 skriva Martin Joensen Næs og J.H. Samuelsen, lærarar í Miðvági, og biðja um el-ljós í skúlan. "Tess vegna ljósvirkið hjá Jákup Joensen o.f.l. er komið so væl ávegis nú, at ljós væntandi fæst haðani um stutta tíð, og tess vegna at einki røkist fyri at innlagt verður í skúlanum, loyva vit undirskrivaðu okkum enn einaferð at minna á, at vit hava

Gamli skúli og Tormansbakki, 1977. Myrki bygningurin við strondina sigst vera vakstrarhús hjá einum av eldru lærarunum fyrr. Mynd: Jógvan Ravnsfjall.

biðið um at fáa innlagt elektriskt ljós í skúlan her, nú ljós kann útvegast, tí neyvan nakrar staðir er meira tørvur á ljósi enn nettup í skúlanum, hvar ið børn úr nærmast hvørjum húsi í bygdini sita og arbeiða í hálvmyrkri allan veturin."

Hetta førdi í fyrstu atløgu til eina roynd í 1950 við elinnlegging í skúlanum til eini 3 ljós. Sum var gjørt av kønum fólki við ljósi frá einum lítlum privatum elverki. Hvør, ið átti hetta elverk er ikki upplýst, men tað hevur verið í grannalagnum.

Á fundi í sóknarstýrinum 13. september 1952 varð samtykt at gera rættuliga elinnlegging í skúlan.

26. november 1952 er sáttmáli skrivaður við Jógvan Svabo Samuelsen, elinnleggjara, og Miðvágs kommunu. Í sáttmálanum er nógv tekniskt nevnt viðv. innleggingini, men sum skilst verður ljós lagt inn í niðaru hædd og á loftinum og ein útilykt sett upp. M.a. er nevnt, sum var brúkt tá, at leiðingarnar eru vardar av tunnum jarnrørum. Kostnaður: Málarainnlegging 330 kr., ljósinnlegging 2.110 kr. og teknisk innlegging 150 kr. Tils. 2.590 kr.

19. desember 1952 hevur Henning Ellefsen, Miðvági, hildið brandsýn í læraraíbúðini í skúlanum og hevur nakrar viðmerkingar, ein um eitt elrør, sum er burtur, má setast nýtt beinanvegin. Her er helst hugsað um manlandi jarnrør uttan á elleiðingini. Grundin er helst, at elleiðingar tá, vóru ikki klæddir við plast, sum seinni, men við toylíknandi tilfari, sum ikki var brunatrygt í sær sjálvum.

Í roknskapunum hjá kommununi 1952 og 1953 síggja vit, at í 1952 eru goldnar 2.134 kr. til Jógvan Samuelsen fyri elinnlegging og 273 kr. fyri elmegi til Elverkið í Miðvági v/ J.K. Joensen.

Og í 1953 eru goldnar 306 kr. til Jógvan Samuelsen fyri innlegging og 662 kr. til Albin Wang fyri eltilfar. Umframt 389 kr. til Elverkið í Miðvági.

So tað sýnist sum, at elinnleggingin er ikki heilt liðug fyrr enn í 1953, men er tikin í brúk í 1952.

El frá elfelagnum S.E.V. fekk skúlin í 1954. Fyri 1954 er tó einki nevnt í roknskapinum um kostnað fyri el, so møguliga er einki kravt fyrsta árið. Men í 1955 rindar kommunan 360 kr. til S.E.V. fyri elveiting, sum hækkar skjótt og í 1956 er 862 kr. og í 1957, 1.020 kr. 1958, 1.135 kr. og 1959 1.749 kr., sum er seinasta árið, vit hava nágreinilig tøl fyri hetta.

Í 1957 hevði Albin Wang, elektrikari í Miðvági, skift perur og annað fyri 54 kr. Í 1958 hevur hann arbeitt upp á el í skúlanum fyri 297 kr. og í 1959 fyri 218 kr.

Leigað fimleikarhøll

Fyrstu ferð fimleikur er nevndur sum fak í skúlanum í Miðvági er fyri árið 1935, har helst er goldið fyri skúlaárið 1934/35. T.v.s. at fimleikaundirvísingin er helst byrjað í 1934. Sum nevnt aðrastaðni varð ferðalærari settur í Vágum til undirvísing í fimleiki og hondarbeiði hjá gentum.

Fimleikarhøll varð leigað frá Jóan Petur Wang í Miðvági. Og er leigað frá honum skúlaárini frá 1934 til 1940. Fyri 1939 eru eisini goldnar 30 kr. fyri reingerð av fimleikarhøllini.

Flestu árini er leigan 50 kr., men er helst brúkt nakað meira nøkur ár, tí 1937 er gjaldið 118 kr., í 1938, 68 kr. og í 1940, 71 kr.

Helst hevur stórur áhugi verið fyri fimleiki fyrstu árini, bæði millum næmingar og lærarar, tí í skrivi 2. desember 1936 til Skúlastjórnina, verður greitt frá, eftir fyrispurning, at umleið 1/3 av samlaðu tímunum hjá skúlanum vórðu brúktir til fimleik og tað vóru fleiri bólkar. Har krevur Skúlastjórnin, at 2/3 av fimleikatímunum skulu broytast til tímar til onnur fak. Hartil svarað verður, at so mugu bólkarnir fækkast.

Hin 10. oktober 1939 verður skrivað til Pól Petersen, lærara í Mykinesi. Elisabet Olsen, lærarinna her, hevur sagt, at tygum kunnu skaffa fimleikaútgerð, sum tygum halda kann fáast bíliga úr Danmark. Hon sigur, at henni manglar ein "plink" og ein "hest" og biði eg tygum at at gera eina roynd at fáa hetta til vega fyri rokning hjá Miðvágs sóknar kommunu, um so er at hetta fæst bíliga.

So má sigast, at tað sæst einki til fimleik aftur fyrr enn í 1947. Um fimleikur hevur verið, so hevur hann ikki verið í hesum hølunum, tí gjaldið fyri leiguna steðgar í 1940. Tað er um hesa tíðina, at fimleikalærarin gevst.

Hin 24. juni 1947 verður skrivað til Skúlastjórnina um loyvi at fáa settan ein lærara afturat í Miðvági. Lagt verður afturat: Vit vildu fegin fingið ein ungan lærara, sum kundi undirvíst í fimleiki, sum vit halda núverandi lærarar vera ov gamlar til. Vit vóna soleiðis at hoyra aftur frá Skúlastjórnini.

At fáa fimleikin á føtur aftur tekur nakað av tíð og á fundi 16. desember 1949 er málið aftur frammi. Nú verður skrivað til Skúlastjórnina og sagt, at stjórnin fyri dansistovuni "Gleimur" hevur bjóðað sóknarstýrinum dansistovuna til fimleikarhøll til skúlabrúks fyri 15 kr. um vikuna í tí tíðini, stovan verður nýtt. Avgjørt varð at taka av hesum tilboðnum. Viðmerkt verður, at Jens Jacob Niclasen var ímóti og mælti til at nýta ovastu hædd í nýggja kommunuhúsinum til fimleikarhøll.

Men tað verður so Gleimur, sum verður fimleikarhøll í nøkur ár. Kommunan hevur goldið leigu til Pf. Gleimur fyri árini 1950 til 1952. Sum skilst er leigan 600 kr. um árið. Í 1950 eru 175 kr. brúktar afturat til amboð og í 1951 eru 355 kr. brúktar afturat til sama. Men helst verður Gleimur bert nýttur part av árinum 1952, tí hetta árið hevur kommunan bert rinda 250 kr. í leigu. Og leigumálið endar tá.

Meira sæst so ikki til fimleik í Miðvágs skúla í heila tikið.

Tó verður fimleikur regluliga framdur frá apríl 1961, tá nýggj og stásilig fimleikarhøll er bygd afturat spildurnýggja Giljanes skúla. So tá fingu børn og lærarar eina rættuliga fimleikarhøll.

Royndir í skúlanum

Skriv var komið frá skúlanevndini, sum sendi úrslitið frá skúlastjórnini av royndunum við skúlan í 1939, har tað gekk fram, at úrslitið var ov vánaligt, samstundis vísti Skúlastjórnin á ymsar manglar við skúlan, sum vórðu settir í samband við úrslitið. Skrivið var til viðgerðar hin 9. november 1940. Samtykt varð at orða eitt svarskriv, sum er innført í kopibókina. Sagt verður, at svarskrivið varð sent bæði skúlanevndini og skúlastjórnini.

Skrivið er dagfest 15. november 1940, og er á donskum og er nokkso áhugavert og skal tí verða endurgivið, her tó á føroyskum:

Vit hava viðgjørt málið um royndirnar við skúlan á fundi í forstandarskapinum og skulu loyva okkum at siga, at úrslitið var vánaligt. Men undrast tó yvir orðingina, at "Børnene i Midvaag staar tilbage i Kundskab". Vit vildu fegin fingið at vita, hvussu hetta skal skiljast? Um hetta er galdandi fyri øll børnini í Miðvági, ella tað bara er galdandi fyri miðaltalið? Um talan er um øll børnini, so er feilurin ikki at finna hjá børnunum ella teimum manglum, sum peika verður á í skrivinum. Tí øll børnini í eini so stórari bygd kunnu ikki vera óbegávaði ella ómótakilig fyri undirvísing.

Tá sagt verður, at arbeitt verður undir ringum umstøðum, so hava vit ikki so lætt við at ganga við uppá tað. Í øllum førum ikki so ring, at tað skuldi nervað úrslitið av royndini.

Teir nevndu manglarnir eru hesir:

Skúlaflokkur í Miðvági 1960. Myndina tók Martha Danielsen, vikarur 1959-60. Myndaánari: Anna og Ólavur Hansen.

Har er einki spælpláss. Hetta mugu vit mótmæla, sum vit hava gjørt fyrr, vit hava besta spæliplass, sum nakar skúli kann hava, nevniliga sandurin, sum liggur beint niðanfyri skúlan. Og hann verður skolaður 2 ferðir um dagin av sjónum, og er tí altíð reinur, og er somikið turrur, at børnini ikki dálka seg og kunnu spæla øll sløg av spølum har. Einasti "mangul" hann hevur er, at hann ikki er gjørdur av mannahondum og tískil ikki hevur kostað kommununi ella játtanarmyndugleikunum nakað.

Eisini verður sagt, at einki vatn er lagt inn í skúlan og einki hondvask. Viðgangast skal, at hetta er ein mangul, men bøtast kann ikki uppá hetta fyribils. Vit mugu fyrst hava eina almennan vatnleiðing, við tað at teir privatu vatnleiðingarnir, sum eru í økinum, ikki hava nokk av vatni til at lata til skúlan eisini. Vit kunnu ikki trúgva, at hetta skal hava nakra ávirkan á skúlaundirvísingina, tí uml. 30 metrar frá skúlanum er eitt reint gil, sum børnini kunnu vaska sær í.

Viðvíkjandi at einki nátthús er, so skal sigast, at tað nú er gjørt liðugt, sum hervið verður boðað frá. Tað er í góðsku á somu hædd, sum við flest aðrar skúlar, so hetta skuldi verið avgreitt.

At enda koma vit til tey mongu skúlaforsømilsini, sum vit hava givið okkum far um og hava vit heitt á skúlanevndina um at gera okkurt fyri at bøta um hetta. Vit fingu eitt avvísandi svar um, at tað hvødu tey einki við at gera. Har tey siga: Vit fáa hvørt kvartal skrivligt krav frá kommununi um at ídøma bøtur, og má kommunan væl vera vitandi um, at vit í hvørjum einstøkum føri nágreiniliga gera tað, sum lógin sigur. At tað ikki altíð verður góðvilliga goldið, er ein onnur søk.

Síðan skúlanevndin varð vald á núverandi hátt, hevur forstandarskapið einki at gera við skúlaundirvísingina og kann soleiðis ikki fylgja við, hvussu tað verður undirvíst. Tað má so liggja á skúlanevndini at fylgja við, sum jú hevur rætt til at møta upp, tá roynd er, sum forstandarskapið ikki hevur. Í øllum førum verður tað ikki innkallað.

- Hetta seinasta er nevnt, tí áður var forstandarskapið skúlanevnd saman við prestinum, sum var føddur formaður.

Á fundi í forstandarskapinum 16. september 1941 er sama mál á skrá. Komið var skriv frá Amtinum, og somuleiðis eitt frá skúlanevndini um viðurskiftini í skúlanum. Samtykt varð at svara, at smb. tí nýggju lógini um skúlanevnd halda vit ikki, at forstandarskapið hevur nakað við undir-vísingina at gera. Og vit hava ikki fylgt so nógv við, at vit kunnu úttala okkum um skúlaundirvísingina. Hinvegin vilja vit siga, at vit ikki eru óáhugaðir í hvussu skúlaviðurskiftini eru í bygdini. Skúlaútreiðslurnar eru ein somikið stórur postur í roknskapinum, at vit helst vildu, at tað skuldi verið givin so nógv undirvísing til ungdómin sum møguligt.

Prestur ætlar sær úr skúlanevndini

Skrivað verður til Skúlastjórnina hin 8. mars 1943 og sagt, at presturin, Poul Johannesen, hevur sagt seg frá sum formaður og limur í skúlanevndini, og at hann hevur sagt Skúlastjórnini frá hesum. Hinir báðir limirnir eru Jóan Hendrik Samuelsen, lærari og Jógvan J.A. Joensen, kongsbøndi. Samuelsen virkar sum fyribils formaður. Vegna at eingin eyka var á listanum hjá presti so vita vit ikki hvussu vit skulu gera. Men vit halda, at tað er eitt ov stórt apparat at seta í verk at skipa fyri vali av einum limi. Vit halda, at teir báðir klára tað saktans, um teir ikki hava nakað ímóti tí.

12. mai 1943 skrivar Skúlastjórnin svar upp á skrivið frá 8.3.43 og sigur, at sambært lóg frá 20.5.1933 um skúlanevndir § 3 stk. 5, skal val fara fram fyri manglandi limin. Um eingin listi kemur inn skal forstandarskapið velja ein lim.

Endin av hesum var so, at prestur varð sitandi og sat til hann andaðist hin 7. september 1946. Tá vóru tó bert knapt 3 mánaðir eftir av skeiðinum, so eingin varð valdur fyri hann tá.

Tos um skúlaviðurskiftini og flokksbýti

Elias Ellefsen og Meinhard Hansen skriva hin 31. januar 1944 og siga, at teir átala, at onnur skúlastovan stendur tóm, og at tann dagliga undirvísingin er ov stutt, sum kanska kemur av, at vit ikki hava eina virkandi skúlanevnd. Í heila tikið vilja vit heita á sóknarstýrið, at okkara skúli fær eina gjølla eftirkannan, bæði viðvíkjandi undirvísingini og presisión.

Teir hava gingið høgt upp í hetta, tí í mars 1944 (ódagfest) skriva somu menn, umframt Jens Rasmussen og Sigmund Frederiksen og bjóða skúlanevndini, verjuráðnum og lærarunum í bygdini til fundar at tosa um skúlaviðurskiftini her. Fundurin verður hildin í skúlanum 18. mars 1944 kl. 8, siga teir. – Helst var fundurin hildin, men hvat úrslitið bleiv av tí er einki skrivligt um.

13. januar 1947 var fundur í forstandarskapinum á skrivstovuni hjá formanninum. Til viðgerðar var skriv um skúlaviðurskiftini í Miðvági. Samtykt varð at senda málið til ta nýggju skúlanevndina til ummælis, áðrenn meira verður gjørt við málið. Tað gekk tó long tíð til nakað svar kom frá skúlanevndini, men í desember var tað so komið, og gekk tað út uppá, at hava ein fund um málið hin 29. desember 1947 kl. 7 seinnapart. Sum forstandarskapið gekk við til.

Fundurin varð hildin nevnda dag. Tríggir limir í forstandarskapinum møttu og tveir úr skúla-nevndini. Í gerðabókini hjá kommunustýrinum stendur, at tingast varð um skúlaviðurskiftini. Eisini um lærararnar, sum hildið var vóru forsømiligir og óuppmerksamir. Samtykt varð at skriva til skúlastjórnina, og spyrja eftir skrivinum, vit sendu um, at fáa settan ein triðja lærara við skúlan.

Annars kann sigast til verju fyri lærararnar, at teir vóru sterkt undirmannaðir. Tað vóru bert tveir lærarar til yvir hundrað børn, sum tá gingu í 4 flokkum, og í skúlanum vóru tvær skúlastovur, og skuldu teir so fáa hetta at ganga upp. Triðja lærarastarvið fekk skúlin ikki fyrr enn í 1949, tá børnini vórðu býtt í 5 flokkar og fjórða lærarastarvið 10 ár seinni, í 1959, tá børnini vórðu býtt í 6 flokkar. Skipanin við 7 flokkum í barnaskúlanum, kom ikki í Miðvági fyrr enn í felagsskúlanum í 1961.

Fyri at hava alt við kann eisini nevnast, at upp til 1920, tá bert ein lærari var, vóru skúlabørnini í Miðvági býtt upp í 3 flokkar, sum Mikkjal á Ryggi í skrivi 13.8.1917 sigur vórðu nevndir, Yngsti-, Mittasti- og Elsti klassi.

Heðin Haraldsen, Sólberg Olsen, Jóhannes Jørgensen, Asbjørn Poulsen, Finnleif Frederiksen, Heine Heinesen, Olivar á Ryggi. Berghild Johannesen, Katrin Joensen, Eyð Eirikstein, Paula Nattestad, Marjun Nattestad, Jórun Johannesen, Anna Elisa Rasmussen, Dagmar Svabo, Sigrun Olsen, Kirstin Rasmussen.

Elsa Maria Rasmussen, Sunneva Wang, Oydis Joensen, Annfríð Thomassen, Sólrun Rasmussen, Ingrid Johannesen, Marianna Joensen, Signa Frederiksen, Ása Heinesen, Anna Jørgensen, Fríðbjørg Winther Hentze, Gunnhild Davidsen, David Johannesen, Karl Johan Joensen, Jóhannes Johannesen, Asbjørn Niclasen, Árni Frederiksen, Eigil Fagraberg, Rasmus Niclasen, Suni á Ryggi.

Hans Eli Hansen, Mogens Heinesen, Sámal Jákup Jørgensen, Arnfinn Joensen, Rudolf Jørgensen, Jens Erik Magnussen, Eirikur Joensen, Neinbjørn Nattestad, Harald Joensen, Dánial Jákup Jørgensen, Torfinn Jacobsen, Regin Frederiksen, Thomas Juul Thomasen.
Arndis Svabo, Pola Poulsen, Fríðbjørg Niclasen, Jóna Niclasen, Halgerð Eirikstein, Kitty Thomsen, Jastrid Joensen, Hansina Hansen.

Martha Danielsen, vikarur, sum tók myndirnar í 1960. Stendur her á høvuðsvegnum í Miðvági, omanfyri kommunuhúsið. Missiónshúsið sæst t.h.
Myndaánari: Anna og Ólavur Hansen.

Skúlastova í kommunuhúsinum

Á skrá fyri fund í forstandarskapinum 5. mars 1948 var bygging av skrivstovuhølum til kommununa. Samtykt varð at byrja upp á byggingina. Bygningurin skuldi vera stoyptur upp úr betong og standa í flukt við missiónshúsið, og hava kjallara og eina hædd omaná. Útgravingin av grundini skuldi bjóðast út í arbeiðstøku.

Samtykt varð at hava skúlastovu í bygninginum, inntil ein nýggj læraraíbúð er bygd. Og síðan innrætta tann núverandi skúlabygningin til tríggjar skúlastovur.

Samtykt varð at bjóða útgravingina av kommunuhúsinum út í arbeiðstøku beinanvegin.

Hvussu tað annars gekk fyri seg við at byggja sonevnda kommunuhúsið er umrøtt í partinum "Kommunuskrivstova og skrivarar".

Húsið stóð í gerð í 1949 og varð innilokað hetta árið. Í skrivi til Skúlastjórnina 23. mai 1949 verður søkt um at fáa ein lærara settan afturat, tí at skúlabørnini eru vorðin so nógv, har lagt verður afturat: "Vit byggja nú nýtt hús og vænta vit, at vit hava skúlastovu tilreiðar, tá summarfrítíðin er liðug 15. september. Á fundi 5. august 1949 samtykti sóknarstýrið at keypa kadeter og skúlaborð úr Danmark til nýggju skúlastovuna, sum var í miðhæddini í húsinum.

Um hetta keypið gjørdist ein minni ósemja millum kommununa og Henning Ellefsen. Sum skilst, hevur sóknarstýrið biðið Henning Ellefsen um at bíleggja skúlainnbúgvið fyri kommununa. Men tað vísir seg, at fakturaðir og rokningar koma bæði til kommuna og til Henning Ellefsen.

2. desember 1949 verður skrivað til Hennig Ellefsen, Miðvági, sum hevur sent rokning fyri skúlainnbúgv, sum kommunan sigur seg longu hava goldið danska felagnum, har innbúgvið varð keypt frá. Takkað verður tó fyri, at hann skrivaði eftir innbúgvinum og kundi fingið eina minni samsýning fyri tað. Hann hevur eisini gjørt krav um flutning á 200 kr., sum A. Joensen, kommunuskrivari hevur staðið fyri. Har verður sagt, at A. Joensen hevur sent kommununi rokning fyri hetta, og var hon á 285,20 kr. Ger so væl og sig okkum, hvussu er við hesum. Annars skulu vit siga, at vit altíð eru tilreiðar at samráðast um samsýningina.

10. desember 1949 skrivar Hennig Ellefsen aftur upp á skrivið frá kommununi og sigur, at sum hann skilti, so skuldi hann standa fyri keypinum av innbúgvinum við gjalding og øllum, og skuldi kommunan so endurrinda honum upphæddina. Í staðin hevur kommunan blandað seg inn í málið og er farin sjálv at rinda fyri partar av keypinum. Um kommunan ynskir hendan framganshattin, so skuldi hon staðið fyri øllum sjálv. Hann heldur eisini, at skriv kommunurnar er óhøviskt. Hann hevur rindað fyri partar av keypinum og eigur endurgjald fyri tað. Hann nevnir eisini, at hann hevur sett kadeter, borð og stólar saman, sum eru lætnir fyri lægri kostnað enn fyrst ásett. Tá nú møblarnir eru leveraði til lægri prís enn tann, ið bleiv góðtikin, kann eg ikki fata at misskiljing kann koma í. Gerið so væl og gjaldi í hvussu er tað, tit halda, vit hava rætt til, vit hava ikki ráð til langan kreditt, sigur hann m.a. í skrivinum, sum er 3 síður langt.

Sum skilst byggir hetta alt á misskiljing og verður loyst í sátt og semju.

Í juli 1950 kemur tilboð upp á skúlatilfarið, umbiðið frá Lohmans boghandel, Valby. M.a. danskar lesibøkur. Tað er 25 stk. av hvørjari bók "Børnenes danske læsebog for de mindste", "Børnenes danske læsebog" I, II, III og IV. Og til skúlastovuna í kommunuhúsinum er umbiðið Europarkort 175 x 215 cm. og ein "Philips Globus" á 35 cm. diametur. Heimskort kunnu tey tíverri ikki útvega í løtuni, siga tey.

Á fundi í sóknarstýrinum 9. september 1950 varð samtykt,ð at keypa tað neyðturviliga á bíligasta hátt, lesibøkur, kort og globus.

Gamli skúli uml. 1970.

Hin 31. desember 1950 er staðfestur ein listi yvir innbúgvið í skúlastovuni í kommunuhúsinum. 1 nýtt kadeter, 1 nýggjur lærarastólur, 1 nýggj talva, 1 nýggj bókahill og 15 nýggj skúlaborð. - Við tað at eingir stólar eru nevndir, hava borðini helst fastbygdar benkur. - Tilsamans er virðið á innbúgvinum 4.953 kr. Út frá hesum kunnu 30 børn vera í skúlastovuni.

Vegna at skúli var í kommunuhúsinum, sum lá beint við høvuðsvegin í Miðvági, greiddi formaðurin frá á fundi 30. august 1952 at hann hevði keypt skilti merkt "Skúli" og trýkant við útrópstekni at seta upp við kommunuhúsið. Stýrið góðtók hetta, og at tað varð uppsett við høvuðsvegin.

Føðingardagur hjá drotningini

18. mars 1949 skrivar Skúlastjórnin, at avgerð er tikin um, at føðingardagurin hjá h.h. Ingrid droting 28. marts framyvir verður frídagur í skúlanum í staðin fyri Valdemarsdag 15. juni, sum samstundis fellur burtur sum skúlafrídagur, smb. rundskrivi 6.1.1949 frá Undervisningsministeriet.

Skúlainnbúgv í 1950-51

Dagfest 31. desember 1950 er listi yvir skúlainnbúgv. Tá vóru tvær skúlastovur í skúlanum og ein í kommunuskrivstovuni – tikin í brúk í 1949, tá triði lærarin varð settur í starv. Her er so talan um innbúgvið í skúlanum:

25 gomul skúlaborð, 2 gomul kadeter, 2 nýggir stólar, 2 gamlar bókahillar, 2 nýggjar talvur, ymiskar skúlabøkur, 1 Evropakort, 1 Globus, ymisk ítróttaramboð og 1 krakkur.

22. apríl 1951 skrivar Martin Joensen-Næs lærari og uppgevur leyst innbúgv í Miðvágs skúla (ein skúlastova): 13 gomul skúlaborð, 1 pultur, 1 stólur, 1 kolaspann við skeið. Danskar lesibøkur, Børnenes danske læsebog: I 25 stk., II 25 stk., III 25 stk. og IV 25 stk., allar nýggjar og Børnenes danske læsebog V, 16 stk. gamlar.

Orgul til skúlan

Jóan Hendrik Samuelsen, lærari, skrivar hin 16. oktober 1952, og biður kommunustýrið veita studning til eitt orgul til skúlan. "Sum sanglærari skúlans kenni eg tað sum ein stóran sakn, at einki orgul ella klaver er á skúlanum", sigur hann m.a. og metir, at væl meira fekst burtur úr hesi frálíku lærugrein og størri áhugi, um so var. Hann kundi hugsað sær, at Miðvágs sangfelag skal at vera við í keypinum, móti at tað sum t.d. í Sandavági tá fekk høvi til at brúka orglið til venjingar. Prísurin á brúktum ístandsettum orgli frá fabrikkini liggur um 600 kr. Um nú sangfelagið t.d rindaði 1/3 kundi kommunan so hjálpt til við 400 kr.

Málið er fyri á fundi 3. november 1952. Sum avgerð er sagt, at stýrið er sinnað til at stuðla keyp av einum orgli til skúlabrúks, men vildi steðga við at taka avgerð um hetta til umsøkjarin hevur fingið eitt tilboð, hann hevur biðið um.

Í roknskapinum hetta árið sæst tó, at orglið varð keypt frá Haslev Orgel Fabrik, kostnaðurin var 973,15 kr., Vága Sýsla tollur, 160,20 kr., flutningur Johan Magnusen, 10,26 kr. Í alt 1.143,61 kr.

400 kr. vórðu goldnar inn frá J.H. Samuelsen, so kostnaðurin hjá kommununi gjørdist, 743,61 kr. Út frá kostnaðinum sýnist tað sum at nýtt orgul er keypt.

Danskt lærarakór vitjar

Skrivað verður til Sørvágs og Sandavágs kommunur hin 2. august 1952 í samband við, at Københavns lærerkor var á vitjan. Yvirlit yvir kostnaðin er komið frá frú Margrethu Danielsen, Miðvági, og eru tað 673,51 kr. Eftir avtalu skuldi hesin peningur lutast javn millum kommunurnar.

Børn fødd í Miðvági í 1953, sum skuldu í skúla í Miðvági í 1960.
Dreingir: Thomas Juul Thomassen, Jens Erik Magnussen, Jógvan Johansen, Rudolf Müller Jørgensen, Hans Eli Hansen, Harald Elias Frimodt Joensen, Jón Eirikur Joensen, Torfinn Jacobsen, Martin Jóhan Hendrik Davidsen, Bjarni Olsen, Neinbjørn Nattestad, Jón Svabo Jørgensen, Mikkjal Hansen og Mogens Heinesen.
Gentur: Jóna Niclasen, Arndis Svabo, Hansina Jóna Hansen, Kristensa Jørgina Ellingsgaard Jacobsen, Kirstin Jórun Jacobsen, Kitty Jóna Tórsteinsdóttir Thomsen, Jastrid Joensen, Súsanna Fanny Hansen, Jonna Elisa Haraldsen og Henrid Napola Johansen.

Børn fødd í Miðvági í 1954, sum skuldu í skúla í 1961, fyrsti árgangur á Giljanesi:
Dreingir: Dánjal Jákup Jørgensen, Pól Poulsen, Joen Jacob Næs, Henrik Danielsen, Ólavur Joensen, Jógvan Jóhannus Niels Joensen, Hans Jacob Joensen, Dan Pauli Niclasen, Sámal Ravnsfjall, Harry Ellefsen, Andreas Svabo og Harald Martin Nattestad.
Gentur: Gunnhild Vang, Hanna Joensen, Brynhild Marita Sunneva Joensen, Alma Sigrun Beata Jacobsen, Trygvør Herfríð Nattestad, Henrikka Fríðborg Magnussen og Hanna Jørgensen.

Hátíðardagar

23. mars 1955 skrivar Skúlastjórnin um hátíðarhald av 150 ára føðingardegi H.C. Andersens og 15 ára degi fyri frælsi Danmarkar aftaná bardagan, og hin 19. apríl 1955 um flaggdagin sum skúlafrídag, 25. apríl.

Ársroyndir 1955

26. september skrivar Miðvágs skúlanevnd til Skúlastjórnina, Tórshavn, um ársoyndir við Miðvágs skúla frá 1. flokki til 5. flokk, 1955. Royndin varð hildin fríggjadagin 15. og leygardagin 16. apríl og varð miðalúrslitið mg, sum er miðalgott. 3 børn, ið áttu at møtt upp til ársroyndina, møttu ikki, verður sagt.

Eitt annað ark er yvir roynd, sum man vera tikin eftir hetta. Ársroynd 1955, I flokkur. Rokning, í miðal ug÷, sum er næsthægsta stig, sum var sera gott.

Børn fødd í Miðvági í 1955, sum skuldu í skúla í 1962.
Dreingir: Johannes Haraldsen, Harald Marner Johansen, Trygvi Elias Fagraberg, Jógvan Elias Johannesen, Zacharias Reynagarð Olsen, Hentze Poulsen og Jóhan Frederik Olsen.
Gentur: Dania Jastrid Joensen, Jenny Hansen, Dagmar Andrea Svabo, Annika Niclasen, Annelisa Poulsen, Rachel Joensen, Jóna Marita Nattestad, Borghild Kristina Fagraberg og Gunna Marita Bergitta Johannesen.

19. oktober 1956 skrivar Føroya Skúlastjórn viðv. hátíðarhaldi av ST degnum 24. oktober.

Børn fødd í Miðvági í 1956, sum skuldu í skúla í 1963.
Dreingir: Oddmar Ravnsfjall, Sámal á Vágalið, Georg Heðin Hansen, Eyðfinn Rólant Johannesen, Marni Jacobsen, Vatnsoyrar, Eyðun Ellingsgaard Jacobsen, Georg Magnussen, Jógvan Jákup Haraldsen, Tommy Jacobsen, Vatnsoyrar, Jógvan Joensen, Danial Joensen, Jón Hans Eirikstein, Hans Anton Jacobsen, Torfinn Johansen og Hjalmar Johansen.
Gentur: Marjun Sofía Niclasen, Elsebeth Hansa Hansen, Thurid Hansen, Hallgerð Marjun Danielsen, Villborg Sofia Nattestad, Kristina Svabo, Jútta Svabo Jørgensen, Jóhanna Sunngerð Johannesen, Hallgerð Thomina Hansen, Carla Joensen, Durita Rasmussen og Jonli Johannesen.

Børn fødd í Miðvági í 1957, sum skuldu í skúla í 1964.
Dreingir: Hans Marius Næs, Erling Jacobsen, Vatnsoyrar (f. 18.7.1957, doyði av ferðsluvanlukku 20.9.1960), Johannes Sundal Ellefsen, Magni Fróði Niclasen, Martin Vágoy, Vatnsoyrar, Jógvan Gudmund Johannesen, Terje Hansen og Kári á Presttrøðni.

Skúlaætlan fyri Miðvágs skúla 1958/59

Kl.	Mánadagur	Týsdagur	Mikud.	Hósdagur	Fríggjad.	Leygard.
			5. flokkur			
8 – 9	Matematikk	Rokning	Rokning	Rokning	Rokning	Danskt
9 – 10	Týskt	Føroyskt	Týskt	Bibliusøga	Lærubók	Rokning
10 – 11	Danskt	Enskt	Danskt	Føroyskt	Danskt	Føroyskt
11 – 12	Føroyskt	Danskt	Søga	Enskt	Tekning	
12 – 1	Søga	Landalæra	Læribók	Matematikk	Týskt	
1 – 2	Bibliusøga	Sangur	Enskt	Landalæra	Føroyskt	
			4. flokkur			
8 – 9	Rokning	Danskt	Rokning	Rokning	Rokning	
9 – 10	Enskt	Føroyskt	Enskt	Danskt	Enskt	
10 – 11	Føroyskt	Søga	Føroyskt	Danskt	Føroyskt	
11 – 12	Danskt	Bibliusøga	Skriving	Føroyskt	Landalæra	Rokning
12 – 1		Sang	Danskt	Søga		Bibliusøga
1 – 2		Skriving	Bibliusøga	Tekninig		Landalæra

Tað vóru bert 5 flokkar í skúlanum, so 5. flokkur her svarar nøkulunda til tað vanliga er nevnt 6. og 7. flokkur.

			3. flokkur			
8 – 9	Danskt	Rokning		Danskt	Danskt	Føroyskt
9 – 10	Søga	Danskt		Rokning	Landalæra	Danskt
10 – 11	Rokning	Føroyskt		Skriving	Bíbliusøga	Søga
11 – 12	Læribók	Bíbilsøga		Landalæra	Føroyskt	Skriving
12 – 1						Rokning
1 – 2						Sang
			2. flokkur			
8 – 9			Danskt			Føroysktq
9 – 10			Skriving			Bíbliusøga
10 – 11			Føroyskt			Rokning
11 – 12			Bíbliusøga			Danskt
12 – 1	Rokning	Rokning			Danskt	
1 – 2	Føroyskt	Danskt			Skriving	
			1. flokkur			
12 – 1	Føroyskt		Føroyskt	Føroyskt	Føroyskt	Skriving
1 – 2	Skriving		Skriving	Rokning	Rokning	Rokning

Gentur: Nicolina Joan Elida Johannesen, Ansy Fríðgerð Nattestad, Susanna Hansy Jacobsen, Hannvør Thomina Johansen, Hanna Sofía Jørgensen, Emma Dagmar Sandberg Joensen, Eyð Nattestad, Anna Elisabeth Joensen og Nicolina Randi Hansia Johannesen.

Frí at hoyggja

6. september 1958 skrivar Skúlastjórnin, at børn í ár kunnu fáa frí frá skúlanum at hjálpa við hoygging, og hin 8. desember 1958 skrivar Skúlastjórnin viðv. hátíðarhaldi og annað av degnum fyri viðtøkuna um menniskjarættindini.

Skúlastova á loftinum í kommunuhúsinum

18. september 1959 verður í skrivi hjá kommununi sagt, at hølið á loftinum í kommunuhúsinum, sum áður varð nýtt til kvøldskúla í veving, skal nýtast til skúlastovu. Grundin var, at skúlin nú hevði fingið ein fjórða lærara. So tað nú vóru tvær skúlastovur í skúlanum og tvær í kommunuhúsinum. Onnur í miðhæddini og henda á loftinum. Hetta varð gjørt sambært tilmæli frá skúlanevndini hin 11. mars 1959. Í roknskapinum hjá kommununni sæst einki til, at nakað er brúkt til nýgerð ella umbygging, so hølið hevur verið klárt til skúlabrúks. Tað skuldi bara innbúgv keypast.

14. august 1959 varð skrivað til Maskinfabrikken Labofa, Skælskør, og bestilt skúlaborð o.a. við "Tjaldur" frá Keypmannahavn, 15 stk. plastikkborðplátur til tveir næmingar hvør. 2 kateder í mahogni v/2 stórum skuffum. 2 katederskáp í maghogni við jalousi og skuffum. 2 stk. lærarastólar, mahogni v/ armlen og pútu, til nevndu skúlastovu.

Út frá hesum skilst at innbúgv í hvussu er partvís er keypt til báðar skúlastovurnar í kommunuhúsinum. Við tað at bara borðplátur vórðu keyptar, má hugsast, at borðbein skuldu gerast til pláturnar, sum snikkari í bygdini helst hevur fingið til uppgávu, og benkur. Tað er tó ikki beinleiðis nevnt.

Gingið varð í skúla í kommunuhúsinum fram til at felagsskúlin á Giljanesi varð tikin í brúk í 1961. Ein persónur úr Miðvági, undirritaði hevur tosað við, og sum er føddur í 1950, og sum soleiðis er farin í skúla í 1957, sigur seg minnast, at hann gekk fyrstu tíðina í skúla í kommunuhúsinum í Miðvági. Og, sum nevnt er áður, var skúlagongd eisini framvegis í Gamla skúli fram til 1961.

Skúlin skipaður við 6 flokkum

15. august 1959 skrivar J.H. Samuelsen, fyrstilærari, Miðvági til Skúlastjórnina, Tórshavn. Nú vit aftan á summarfrítíðina verða 4 lærarar við skúlan í Miðvági, loyva vit okkum at biðja um heimild til at skipa skúlan við 6 flokkum. Higartil hava verið 5 flokkar.

16. november 1959 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, sum svar upp á umsókn 15.8.59, um at broyta flokstalið frá 5 til 6 flokkar við Miðvágs skúla. Skúlastjórnin hevur á fundi samtykt at góðtaka hetta.

Tekning sum fak

Á fundi 22. desember 1959 var til viðgerðar nýggjur skúlaplanur, sum var komin frá lærarunum. Stýrið helt, at tekning átti at koma inn í planin við 2 tímum um vikuna. Hesir tímar kunnu takast t.d. av føroyskum og donskum.

Úrslitini batnað

Við ársroynd, sum var í skúlanum 30. til 31. mai 1960 við øllum 6 flokkum, sum nú vóru í skipanini í Miðvágs skúla, var úrslitið í øllum lærugreinum rættuliga gott og nakað yvir miðal. So at økja talið av lærarum og skúlastovum, hevði givið úrslit.

Í frágreiðing verður m.a. sagt, at í landsroynd í føroyskum, donskum og rokning, sum var tann 21. mars 1960, var úrslitið, at skúlin í Miðvági hevði o.u. 3 villur í føroyskum og donskum færri í miðal enn miðaltalið fyri allar skúlar. Í rokning var miðalkarakterurin eisini nakað omanfyri miðalin fyri allar skúlar.

Summarfrítíð frá 1. juli

1. februar 1961 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, viðv. at skúlanevndirnar í Miðvági og Sandavági hava biðið um góðkenning um, at summarfrítíðin við Miðvágs-Sandavágs skúla verður løgd somu tíð sum aðrir skúlar í landinum við framhaldsdeild. Við hesum verður sagt, at samtykt var á fundi at góðkenna at summarfrítíðin byrjar 1. juli.

4. apríl hetta árið varð Gamli skúli fyribils niðurlagdur sum skúli, og byrjað varð at ganga í Miðvágs-Sandavágs skúla, eisini nevndur, Felagsskúlin á Giljanesi.

Reingerðarfólk við skúlan 1915 - 1961

Í skúlanum í Miðvági var í fyrstuni ein skúlastova og ein læraraíbúð. Tað var skúlastovuna og nátthúsið hjá skúlanum, ið var leyst frá skúlanum, sum reingerðafólkini skuldu halda reint.

Í 1920 var ein skúlastova bygd afturat, burtur av læraraíbúðini. Og vórðu tað nú tvær skúlastovur. Í 1929 varð læraraíbúðin umbygd og nútímansgjørd, og kom tann skúlastovan, sum varð tikin av læraraíbúðini, uppí læraraíbúðina aftur, og ein nýggj skúlastova varð bygd uppí skúlan og gamla skúlastovan nútímansgjørd. So tað vóru framvegis 2 skúlastovur. Í 1949 verður tann triðja skúlastovan gjørd í tí tá nýggja kommunuhúsinum, ið stendur tætt við skúlan og í 1959 fjórða skúlastovan, so tað eru fýra skúlastovur í alt. Hetta er so tað, reingerðarfólkini skuldu halda reint heilt upp til, at Giljanes skúli stóð liðugur í 1961. Eftir tað broytist alt rímuliga nógv, sum vent verður til aftur.

Viðvíkjandi talinum av reingerðarfólkum, ið arbeiddu í senn, kann vera eitt sindur ringt at síggja út frá frásøgnunum um reingerðarfólkini og verður hetta tí stutt upplýst her. Arbeiðið er uppbýtt soleiðis tey mongu fyrstu árini, at ein hevur reingjørt hvørja skúlastovuna og hava

so havt onkran avloysara viðhvørt. Hetta hevur so alt verið parttíðarstørv.

Frá 1915 til 1924 eru tvey fólk. Frá 1925 til 1929 trý, við undantaki av 1928, tá tað eru tvey.

Í trýatiárunum svingar tað rímuliga nógv, 1930-31, tvey reingerðafólk, 1932-33, trý, 1934 fýra, 1935-37 trý, 1938 tvey og 1939 trý. 1940 eru tey tvey og 1941-42 fýra (eitt fast starv restin hjálparfólk), 1943 tvey, eitt fast starv hitt hjálparfólk. Tey árini, tá meira enn tvey vóru, var tað triða og fjórða avloysari ella hjálparfólk í styttri ella longri tíð.

Frá 1944 og restina av tíðini, sum er upp til 1961 og so frá 1970 til 1985, er bara eitt reingerðarfólk, sum so hevur alt arbeiðið, hóast at talið av stovum er hækkað. Men tað gjørdi so at tann, sum hevði starvið, fekk eina betri útrøku.

Elias Joensen, lærari, sum er umrøddur frammanfyri, hevði avtalu við kommununa um, at hann hevði brúki av Steinsmørk, sum kommunan átti, og sum upprunaliga hoyrdi til skúlan. Í staðin fyri at rinda leigu fyri trøðna, sum var beint omanfyri skúlan har, hann búði, helt hann skúlastovuna reina. Fyrstu mongu árini var bert ein skúlastova og ein lærari.

Roknskaparárið 1915/16 fær Klæmint M. Haraldsen, handilsmaður, 8,36 kr. fyri sápu og løn fyri partvís at reingerða skúlastovuna. So hann hevur helst avloyst læraran við hesum í nakrar dagar.

Nær Elias er byrjaður við reingerðini er ikki nakað beinleiðis nevnt um, so tað kann vera heilt frá 1901, tá hann tók við sum lærari. Í 1917 ynskir hann tó at vera leysur av yrkinum og sigur bæði reingerðararbeiðið og trøðna frá sær. Tað verður játtað og annað reingerðarfólk sett ístaðin.

Marianna Hansen f. 1867, g.v. Hans Hansen f. 1843; búgva við Eirikstoft í Miðvági og soleiðis tætt við skúlan. Við fólkateljingina (ft.) 1916 eru 6 børn teirra í húsinum, fødd millum 1894 og 1911.

Fyrstu árini reinger Marianna nátthúsið við skúlan. Um hon er byrjað við tí longu undir gomlu kommununi eru ongar upplýsingar um, men tá Miðvágs kommuna tekur við eru upplýsingarnar greiðar, og reinger hon nátthúsið frá 01.10.1915. Lønin fyrstu tvey árini er 24 kr. um árið og næstu trý árini 30 kr. um árið.

Í oktober 1917 hevur hon tó eisini avloyst við at reingera skúlastovuna og fingið 5 kr. fyri tað og hin 26.4.1918 fær hon 2,50 kr. fyri reingerð av skúlanum eftir val.

Roknskaparárið 1920/21 hevur hon fingið 60 kr. fyri reinger og fyri at kynda upp í tí einu skúlastovuni og 50 kr. fyri reingerð av nátthúsinum.

Frá 1922 er lønin 60 kr. um árið, hækkað til 70 kr. frá 4. august 1926, sambært umsókn frá Mariannu. Og aftur 21. januar 1930, smb. umsókn, til 80 kr. um árið. Nú var ein skúlastova meir at halda rein.

Í 1931 stendur hon smb. roknskapinum, bert at hava fingið 4 kr., og hevur tí verið burtur frá tað árið, tá stendur Karin Johannesen at hava reingjørt og eisini 1932, tá avloysti Fridu Poulsen.

Marianna er aftur í starvi frá 1932 og fær nú 85 kr. um árið, hækkað til 87 kr. fyri 1935. Í 1934 fekk hon annars 5,90 kr. fyri eyka reingerð, helst eftir fundir. Frá 1938 er samsýningin 89 kr. um árið, so tað vóru ikki stórar lønarhækkingar. Hon røkir so starvið til endan av 1940.

Á sóknarstýrisfundi 14. desember 1940 er á skrá boð frá Marianne Hansen um, at hon sigur upp starvið at reingera skúlastovuna til nýggjár. Hon hevði tá reingjørt í skúlanum í 25 ár undir Miðvágs kommunu og møguliga nøkur ár frammanundan eisini, men tað fáa vit, sum nevnt, ikki sagt nakað um, tá skjøl ikki eru, sum siga nakað um tað.

Wensel Nattestad. Sum nevnt vaskaði lærarin sjálvur skúlastovuna upp til 1917. Frá 1. oktober 1917 til 30. september 1918 reinger Wensel M. Nattestad skúlastovuna fyri 35 kr. fyri árið, umframt loyvi til brúki av Steinsmørk. Wensel Nattestad var føddur í 1884, smb. ft. 1916, húsfaðir og handilsmaður, giftur Sofíu Nattestad, f. 1893; tey eiga tá eitt barn føtt í 1915. Annars búgva inni ein ung kvinna og ein smágenta "logerende". Hann hevur tó bara yrkið hetta eina árið.

Hans Jacob Hansen f. 1858, g.v. Elisabeth Hansen f. 1860. Smb. ft 1916 eru trý børn teirra í húsinum, fødd millum 1889 og 1902. Um Hans Jacob verður sagt í ft., at hann er illa arbeiðsførur vegna gikt. Møguliga er tað tí, hann hevur fingið hetta starvið. Umframt at hann býr tætt við – partur av starvinum var eisini at kynda upp í skúlastovuni um morgunin áðrenn skúlagongdin byrjaði. Í skrivunum verður eisini sagt, at umframt peningaløninа so hevur hann eisini brúkið av Steinsmørk.

Hann byrjar í starvinum 1. oktober 1918 og fær roknskaparárið 1918/19 50 kr. fyri reingerð av skúlastovuni. Frá 1919 er samsýningin 60 kr. um árið. Og er hetta galdandi til 29. november 1927, tá forstandarskapið samtykkir, smb. umsókn, at hækka peningaligu samsýningina til 70 kr. um árið.

Fyri 1929 stendur, at umframt føstu løninа, fekk hann hetta árið 6 kr. fyri reingerð av skúlastovuni eftir grannastevnu. Hann hevði eisini fingið 15 kr. frá kommununi fyri at hjálpa djóralæknanum, men tað hevði so ikki við skúlan at gera. Hans Jakku hevur starvið til 30. september 1930. Tá hevur hann verið 72 ára gamal.

Frida Poulsen f. 1911, dóttir Pól og Annu Poulsen, á Ryggi í Miðvági. Frida er bert 14 ára gomul, tá hon tekur við starvinum og løninа fyrsta árið, sum er 1925, er 34 kr. Hon hevur so starvið í 4 ár afturat, men ikki fylgjandi, tað er 1926-27, 1929 og 1931, har løninа er 60 kr. um árið.

Karin Johannesen avloysir Mariannu Hansen í 1931 og fær 115 kr. fyri tað. Og 4 kr. eyka fyri 2 ferð at hava vaska eftir grannastevnu hetta árið. Marianna kemur so aftur í starvið í 1932, men Karin heldur eisini áfram í 1932 og fær 115 kr. fyri tað. Hetta árið fær hon eisini 2 kr. fyri reingerð av skúlastovu eftir eina grannastevnu og 2 kr. fyri reingerð av skúlastovu eftir ein almennan fund, sum forstandarskapið skipaði fyri. Karin Johannesen er bert í starvinum hesi bæði árini.

Anna H. Poulsen ger reint í skúlanum í tvey ár, 1932 og 1933 og fær 60 kr. um árið fyri tað. Út frá samsýningini sær tað út til, at hon tekur við eftir Fridu Poulsen.

Elisabeth Johansen verður sett í starvið sum reingerðafólk við skúlan í 1933 og fær 85 kr. fyri tað. Hon heldur tó ikki leingi á, tí á fundi í forstandarskapinum 17. mai 1934 er á skrá, at Elisabeth Johansen hevur uppsagt starvið vegna sjúku. Samtykt varð at lýsa starvið leyst við tilboð um løn. Fyri tíðina hon reingjørdi í 1934 fekk hon 30 kr.

Anna K. Hansen, f. 1894 í Lorvík, g.v. Hans Petur Hansen, f. 1896, Miðvági. Í ft. 1925 eiga tey 3 døtur har tvær av teimum eru føddar í Lorvík og ein í Miðvági. Hans Petur doyði í 1929 á Dronning Alexandrines hospital bert 32 ára gamal. Anna er eisini skrivað at vera einkja og fær á konto hjá kommununi, smb. lógini, stuðul til Børn hjá einkjum. T.d. í 1936, 310 kr. fyri 3 børn.

Anna tekur við starvinum eftir Elisabeth Johansen í 1934 og ger reint í skúlanum restina

av tí árinum fyri 52 kr. Fylgjandi árini er samsýningin eitt sindur ymisk, í 1935 120 kr., hækkað til 130 kr. í 1936 og 1937. Í 1938 100 kr. umframt 2 kr. fyri fernisering av skúlanum. Í 1939 og 1940 er samsýningin 85 kr. Men í 1940 varð samtykt, at seta lønina hjá "enken efter H.P. Hansen" upp til 100 kr. frá nýggjárinum. Men hon fekk tó meira, fekk 125 kr. fyri 1941 og 150 kr. fyri 1942, sum er seinasta árið hon ger reint á skúlanum.

Anna L. Poulsen f. 1879 g.v. Pól Poulsen f. 1879, búgva á Ryggi í Miðvági. Hon ger reint í skúlanum árini 1934 og 1935 og fær 60 kr. um árið fyri tað. Í 1936 hevur hon helst bara verið avloysari og fær 12 kr. fyri reingerð av skúlanum, tað sama er við árunum 1939, tá hon fær 41 kr. og 1941, tá hon fær 20 kr. fyri reingerð av skúlanum.

So eru tað fleiri, sum bara gera reint í 1 ár ella styttri.
1937 Anna Danielsen, 110 kr.
1941 Hanna M. Samuelsen, 52 kr. og Hjørdis Svabo Samuelsen, 25 kr.
1942 Else Marie Johansen, 100 kr., Johanne M. Johannesen, 48 kr. og Alberta Jacobsen, 28 kr.
1943 og **1945**, Hansina Perstein, avloysari hjá Hannu Johansen, 1943, 39 kr. og 1945, 51 kr.

Hanna Johansen f. 1899 g.v. Thomas Jacob Johansen f. 1892. Búðu í húsunum, á Fløtti, uppi í Húsi, Miðvági. Við ft. 1942 hjá bretum eru 7 børn í húsi og ein verdóttir. Hanna byrjaði í 1943 við reinger av skúlanum og fekk 400 kr. fyri tað árið og somuleiðis fyri 1943. Á fundi í forstandarskapinum 7. mars 1944 varð samtykt, smb. umsókn, at løna Hannu við 700 kr. um árið fyri reinger av báðum skúlastovunum. Helst hevur hon haft okkurt eyka, tí hetta árið fær hon 732 kr., í 1945, 818 kr. og í 1946, 715 kr. Sum er seinasta árið Hanna ger reint í skúlanum.

Thopona Johansen. Í 1947 tekur Thopona Johansen, dóttir Hannu, við starvinum at gera reint í skúlanum. Og fær 708 kr. fyri hetta. Men við ársendað hevur hon sagt starvið frá sær, og á fundi í sóknarnevndini 22. desember 1947 er sagt at reingerðarkonan við skúlan hevur sagt starvið frá sær, og varð tí samtykt at lýsa starvið leyst at søkja, og seta lønina til 60 kr. um mánaðin.

Thomina Poulsen f. 1896 g.v. Hans Jacob Poulsen f. 1886. Í ft. 1942 eru 8 børn teirra hjá teimum, fødd millum 1922 og 1940.

Thomina byrjaði at gera reint í skúlanum í 1948 og fekk 740 kr. fyri tað árið, og fyri 1949, 600 kr., so tá helst arbeitt hálva tíð og í 1950, 1.230 kr. Við endan av 1950 sigur hon starvið frá sær, tí á fundi í sóknarnevndini 18. januar 1951 er til viðgerðar, at reingerðarkonan, Thomina Poulsen, hevur sagt starvið frá sær til hin 1. í hesum mánaðinum. Men sigur seg nú vilja halda áfram, um hon kann fáa lønina hækkaða nakað. Avgjørt varð at bjóða henni 100 kr. um mánaðin og 240 kr. fyri árliga høvuðsreingerð og fyri at fernisera gólvini. Fyri henda pening skal hon halda allar 3 skúlastovurnar og kommunuskrivstovuna reina, eisini gongirnar. Tað vísir seg tó, at tað verður ikki hon, sum heldur fram í starvinum, men ein dóttur hennara.

Ragnhild Poulsen er dóttur fyrru reingerðingarkonuna og var fødd íð 1922. Fyri 1951 fær hon 1.400 kr. og tað er helst hon, ið heldur áfram í 1952, nú gift og nevnd Ragnhild Thomasen. Hetta árið er inntøkan 1.240 kr.

Í februar hetta árið hevur Henrikka Niclasen avloyst Ragnhild og fingið 68 kr. fyri tað.

Frida Jørgensen f. 1911, Glyvrum, g.v. Jørgen Frans Jørgensen, f. 1912, málari. Búðu við Eirikstoft.

Frida hevði starvið við reingerð av skúlanum árini 1953 til og við mars 1956. Samsýningin lá um 1.450 kr. um árið og fyri 1. kvartal av 1956 fekk hon 375 kr.

Veturin 1958/59 hevði Frida Jørgensen kvøldskúla í seyming í Miðvági og hevði tað nógv ár fram og er nevnt nærri um tað í brotinum "Kvøldskúlin".

Martina 'Tinna' Johannesen f. 1911. Fyrra gifta var við Hjalmar Reynstind, sum gekk burtur við "Nýggjaberg" í 1942. Seinna gifta við Ingvald Elias Berg Johannesen f. 1897.

12. mars 1956 fær Miðvágs kommuna 3 umsóknir til starvið, sum var lýst leyst, at gera reint í skúlanum í Miðvági. Umsóknirnar eru til viðgerðar á fundi, 22. mars 1956. Starvið snýr seg nú um at gera reint í skúlanum og á kommunuskrivstovuni. Sagt verður: "Sóknarstýrið samdist um, at Tinna Johannesen skuldi fáa starvið."

Samsýningin, hon fekk fyri bæði størvini frá 1. apríl 1956 og árið út, var 1.365 kr.

15. januar 1957 var fundur. Tinna Johannesen bað um samsýning fyri reingerð aftaná kvøldskúla og meira løn fyri reingerðina. Hon fær 125 kr. um mánaðin fyri at halda 3 skúlastovur og kommunuskrivstovuna reina, harumframt 240 kr. fyri høvuðsreingerð einaferð um árið. Stýrið samdist um at lata 25 kr. um mánaðin afturat tað tíðina, kvøldskúlin og vevskúlin fer fram. Í mai 1957 varð annars samtykt at seta løn hennara til 175 kr. um mánaðin + 240 kr. um árið til høvuðsreingerð.

Fyri 1957 var samsýningin 2.290 kr. og fyri 1958, 3.105 kr. Í juni 1958 hevði Esther Ellefsen avloyst hana og fingið 175 kr. fyri tað frá kommununi.

5. november 1959 skrivar Tinna Johannesen og søkir um lønarhækkan vegna at ein skúlastova var komin afturat og tað nú vóru 4 skúlastovur. Samsýningin hetta árið var tó 2.415 kr. Sum kundi týtt uppá, at eitt reingerðarfólk er sett afturat. Annars fekk Kristina Samuelsen 175 kr. frá kommununi fyri at avloysa Tinnu í november 1959.

Frá 1960 eru ikki so góðar upplýsingar vegna, at roknskaparbók, sum gjølla greiddi frá ár til ár ikki gongur longur upp enn til og við 1959 viðv. reingerð. Og fylgiskjøl til roknskapirnar eru ikki varðveitt.

Við endan av mars 1961 varð givist við at nýta Gamla skúla sum skúla og var allur skúlaskapur fram til 1970 á Giljanesi. Hetta var galdandi fyri bæði Miðvág og Sandavág.

Hin 4. apríl 1961 var skúlin á Giljanesi, smb. skrivum tikin í brúk, vígdur 2. apríl.

Tinna Johannesen er flutt frá Gamla skúla og til at gera reint á Giljanes skúla.

Starvið við reingerð av Giljanes skúla segði hon frá sær til 1. februar 1964. Men hon helt tó afram við reingerðini av kommunuhúsinum, sum hon røkti fram til 1. desember 1970.

Miðvágs kvøldskúli

Fyrstu mongu árini sæst einki til kvøldskúla í skjølunum hjá kommununi, og tað hevur heldur ikki verið uppi í tíðini tá.

Fyrstu ferð kvøldskúli er nevndur er á fundi í forstandarskapinum 14. november 1918. Til viðgerðar var umsókn frá H.N. Niclasen vegna Ungmannafelagið um at fáa loyvi at halda kvøldskúla í skúlanum í Miðvági. Samtykt varð at geva tað umbidna loyvi. Tó soleiðis, at leiðslan fyri Ungmannafelagið hevur ábyrgd fyri at stova, stólar og borð verða feiað og vaskað beinanvegin, hvørja ferð lokalið er brúkt.

Vit kunnu soleiðis staðfesta, at kvøldskúli fyri ung helst er hildin veturin 1918/19. Hans Niklái Niclasen var júst komin í forstandarskapi, limur frá 1. oktober 1918. Tað stendur, at hann søkir vegna ungmannafelagið, so tað er ikki vist, at hann hevur staðið fyri hesum sjálvur. Men er millummaður. Hans Niklái var føddur í 1857 og sostatt 61 ára gamal og var handilsmaður í bygdini.

Hvat lært var á hesum kvøldskúlanum er tíverri einki nevnt um. So tað er ikki nógv meira, ein fær sagt um tað.

Hin 19. mars 1930 var lóg um ungdóms- og kvøldskúlar sett í gildi fyri Føroyar, har Staturin, eftir nærri ásetingum í lógini, kundi veita stuðul til kvøldskúlar. Treytirnar vóru m.a., at næmingarnir vóru farnir um vanlingan skúlaaldur, og at kommunurnar veittu minst 50 oyru pr. undirvísingartíma í stuðuli. Sambært lógini kundi undirvísast í lærugreinunum: *danskt, føroyskt, rokning, skriving, tekning, religión, søga, landalæra, natúrukunnleiki, støddfrøði, fremmand mál, bókhald, stenografi, maskinskriving, heilsulæra, samfelagslæra, landbrúk, urtagarðsbrúk, kvinnuligur húsgerningur, hondarbeiði, træsmíð, jarnsmíð, fimleik og sang.* Fyrilestur og upplestur kundi hægst vera 1½ tíma tilsamans av samlaðu undirvísingini. Annars skuldi leggjast dentur á at hava bæði handaligt, bókligt og skrivligt við í undirvísingini, stendur m.a. í lógini, sum hevur 9 paragrafir.

Henda lóg fekk ávirkan beinanvegin, og sambært m.a. Skúlablaðnum fingu fyrstu kvøldskúlarnir stuðul longu veturin 1930/31. Í Miðvági byrjaði kvøldskúlaundirvísing eftir hesi lóg veturin 1931/32. Mannagongdi bleiv, at stuðulin varð: Staturin 46,7%, Løgtingið 23,3% og kommunan 30%. Í roknskapunum síggja vit oftast bert stuðulin frá kommununi, ið sum nevnt, var 30% av samlaðu upphæddini.

Martin Joensen Næs, lærari og skúlastjóri við Miðvágs skúla. Hevði kvøldskúla í skúlanum veturin 1931/32 og stendur í roknskapinum 1932, at hava fingið 75 kr. frá kommununi fyri tað. Hvat ið var undirvíst í er ikki nevnt, men helst í onkrum av teim fyrst nevndu lærugreinunum omanfyri.

Hann hevur havt kvøldskúla í 1932/33 eisini, men hevur ikki fingið goldið fyri tað fyrr enn í 1934, tá hann fekk 90 kr. fyri veturin 1932/33 og 1933/34, har samsýningin eisini er lækkað.

At kvøldskúli var veturin 1933/34 síggja vit eisini av, at eitt sjáldsamt skriv er sent frá kommununi hin 8. november 1933 til Chr. Larsen, sýslumann, Sørvági. Sørin Danielsen, formaður í forstandarskapinum skrivar, at nakrir dreingir her í bygdini høvdu gjørt so nógvar ónáðir við kvøldskúlan, at hann sá seg noyddan at melda hetta til sýslumannin, fyri at fáa gjørt tað, sum neyðugt var. Tá lærarin klagaði um viðurskiftini, fór hann eitt kvøldið oman har meðan kvøldskúli var. Tá vóru rættuliga nógvir dreingir uttanfyri, sum runnu burtur, tá

hann kom, uttan at hann sá hvørjir teir vóru. Men inni í gongini fekk hann fatur á trimum. Har lá nakað av mold og bøkkum inni í gongini. Hann segði teimum, at hann mátti melda hetta til sýslumannin. Og tá hetta, eftir øllum at døma, hjálpti, gjørdi hann ikki meira við tað. Nú hevði ein av teimum blakað bøkkar inn gjøgnum vindeygað í vanligari skúlatíð. So tað var ikki annað at gera enn at melda hetta til sýslumannin, sum hann hervið gjørdi, sigur Sørin Danielsen í skrivinum og leggur afturat: at tað høvdu helst verið nógv fleiri dreingir, enn teir hann sá. Men tað kann lærarin helst greiða betur frá við eini møguligari avhoyring. Hesir og aðrir við mugu ikki sleppa undan eini álvarsamari ávarðing og kanska verri. *"Eg vænti at tygum innan alt ov leingi fremur okkurt í málinum."*

20. november 1934, verður skrivað til skúlanevndina í Miðvági um kvøldskúlan. Har sagt verður, at tað verður ringt at fáa nóg nógvar næmingar í mun til tímatalið, um næmingar ikki eisini skulu koma úr øðrum bygdum, sum ikki viðkoma hesi kommununi. Veturin 1934/35 var annars als ikki ráð at hava kvøldskúla, verður sagt.

Veturin 1935/36 var aftur kvøldskúli og fekk Martin Joensen-Næs 88 kr. frá kommununi fyri ómakin. Frá 1932 til 1936 er Martin Joensen einsamallur at halda kvøldskúla, men veturin 1936/37 fær hann kapping, um ein so kann siga, tí tá koma trý afturat, Jóan Hendrik Samuelsen, annarlærari og tvær kvinnur í bygdini. Samsýningin hjá Martin Joensen fyri veturin 1936/37 er 13 kr., so tá hevur hann ikki havt so nógv, men fyri 1937/38, er tað 82,50 kr. frá kommununi.

Síðan er ein langur steðgur har einki er nevnt um kvøldskúla, til veturin 1949/50, tá samsýningin er 138,60 kr.

7. juni 1951 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, at Martin Joensen, hevur hildið kvøldskúla veturin 1950/51 í 15 tímar á 7,15 kr. Í alt 107,25 kr.

Jóan Hendrik Samuelsen, annarlærari, fær 30 kr. fyri kvøldskúla veturin 1936/37. Fyri veturin 1938/39, 28 kr. Vit skulu síðan 10 ár fram til veturin 1949/50, tá hann aftur er nevndur at hava kvøldskúla og fær 139 kr. fyri tað. Fyri veturin 1950/51, fær hann 322 kr. í alt frá landi og kommunu. Fyri veturin 1956/57 fekk hann 268 kr. fyri kvøldskúlan.

Veturin 1957/58 eru fakini upplýst: Rokning, hóskvøld 7 - 8 og leygarkvøld 7 - 8.30. Føroyskt, hóskvøld 8 - 9 og leygarkvøld 7 - 8.

Henrikka Niclasen fær 30 kr. fyri kvøldskúla veturin 1936/37 og 30 kr. fyri veturin 1938/39. Um fyrispurningur hevur verið er ikki greitt, men forstandarskapið skrivar til skúlanevndina í Miðvági hin 10. oktober 1939 og sigur, at Henrikka Niclasen er mett at vera fult út kvalifiserað at átaka sær alla undirvísing í seyming og í øðrum damuhondarbeiði. Veturin 1939/40 fekk hon 31 kr. frá kommununi fyri kvøldskúlan.

Elisabeth Olsen fær 15 kr. fyri kvøldskúla veturin 1936/37 og 8 kr. fyri veturin 1939/40. So tað er helst stutt skeið hon hevur havt. Hon var annars hondarbeiðs- og fimleikalærarinda við skúlan.

Á fundi í forstandarskapinum 10. oktober 1939 er samtykt at halda kvøldskúla og at forstandarskapið fer, eins og áður, at rinda ljós, hita og reingerð. Viðmerkt verður, at tað liggur 1 tons av koli í skúlanum, sum lærararnir frítt kunnu brúka.

Poul Johan Johansen, prestur í Vágum 1929 – 1946, fekk 33 kr. fyri kvøldskúla veturin 1939/40.

Jens Wang, lærari, fekk 30 kr. fyri kvøldskúla veturin 1939/40, var avloysari fyri Jóan Hendrik Samuelsen hendan veturin. Fekk 277,20 kr. fyri veturin 1949/50 og 108,44 kr. fyri veturin 1950/51, har tímalønin var 7,15 kr.

So er aftur einki nevnt um kvøldskúla heilt upp til 1949. Undir krígnum hevur av góðum grundum eingin kvøldskúli verið, við tað at partur av skúlanum var brúktur til sonevnt lasarett, t.e. skaðastova, og at bretar eisini eina tíð vóru har.

Valborg Joensen seinni **Valborg Svaðabú**, vevskeið.
1. mars 1951 verður skrivað til Landsstýrið. Átekning á umsókn um løgtingsstudning frá Valborg Joensen, Miðvági, nú Keypmannahavn, stuðul til mánaðarskeið á vevskúla í Svøríki, eftir átekning frá landsstýrisskrivstovuni. Verður aftursent landsstýrisskrivstovuni við viðmerking, at sóknarstýrið vil geva sítt besta viðmæli til studning. Valborg Joensen hevur verið íðin at søkt sær kunnleika í veving.

Valborg stendur nevnd fyrstu ferð at hava vevskeið í Miðvági veturin 1955/56 og var tað í Gamla skúla. Fekk 954 kr. fyri hetta og fyri veturin 1956/57 fekk hon 1.173 kr. Hevði eisini skeið veturin 1957/58.

1. oktober 1958 skrivar Valborg á skema frá Skúlastjórnini til umsókn um kvøldskúla, har ymsir spurningar skulu svarast. Hølið er á loftinum í kommunuhúsinum og verður hildið við stuðli frá kommununi. Lutakaragjaldið er 30 kr. Skeiðið er hvørt kvøld frá mánakvøldi til fríggjakvøld, í tíðini frá 1. oktober 1958 til 1. mai 1959. Samlaða tímatalið er uml. 455 tímar. Endamálið við skúlanum er at læra ungar kvinnur upp til veving. Undirvíst verður nágreiniliga í teknikkunum og útrokning av tørvi av garni og í litsamansetingum.

Valborg Svaðabú, veturin 1970-71. Mynd Anna Hansen.

Valborg Joensen sigur um seg sjálva, at hon er 35 ár, er vevilærarinna og býr fast í Miðvági. Hevur tikið sveinaroynd í veving frá Vævebo-den, Ringsted, Danmark. Og er lærd frá hesum støðum: Vakre Hjem, Oslo. Statens Kvindelige Industriskole, Oslo. Foreningen Svensk Hemsløjds Vävskole, Dalarne, Svøríki og J. Brünssons Vävskole, Stokkholm, Svøríki. Hevur undirvíst í veving í 5 vetrar. Teir 3 fyrstu vetrarnar í Tórshavn, har tann seinasti var undir kvøldskúlanum. Síðan 2 vetrar í Miðvági undir kvøldskúlanum.

4. desember 1958 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, og sigur, at kvøldskúlaætlanin veturin 1958/58 er góðkend við tímatali á 455. Viðmerkjast skal, at frameftir verður ikki so høgt tímatal góðkent, og víst verður til, at líknandi skeið í Tórshavn hava 210 tímar.

25. mai 1959 hevur Valborg Joensen uppgivið nakrar upplýsingar um vevskeið frá 3.11.1958 til 30.4.1959. Um næmingarnar er sagt, at tað var ein tannáringur, 8 næmingar upp til 25 ár og 4 næmingar yvir 25 ár. 13 í alt. Í læruni var praktisk og skrivlig undirvísing, 424 undirvísingartímar tilsamans.

Umsókn frá Valborg Joensen um loyvi at halda vevskeið hendan veturin var fyri á sóknar-

Skeið í veving 1970-71 við Valborg Svaðabú.
Næmingar: Dagmar Andrea Svabo, Helga Dam, Anna Hansen, Herdis Hentze, Ása Nattestad, Gunnvør Hansen, Elin Maria Jørgensen, Jóhanna Sørensen, Elin Davidsen.
Mynd: Anna Hansen.

stýrisfundi 18. september 1959. Sagt verður, at kommunan hevur einki høli at lata, tá hølið á loftinum í kommunuhúsinum, sum í fjør varð nýtt, skal nýtast til skúlastovu. Valborg Joensen, vevkona, hevur upplýst, at hølið kann fáast til leigu frá Jørgen Frans Jørgensen. Hann skjýtur upp, at leigan skal vera 80 kr. um mánaðin.

Tað er so helst brúkt og fyri veturin, 1958/59, fekk Valborg Joensen, 1.662 kr. fyri kvøldskúlan.

Til veturin 1959/60 verður skrivað til Skúlastjórnina, Tórshavn, og søkt um stuðul til vevskeið vegna Valborg Joensen fyri 348 tímar. Svar kemur aftur frá Skúlastjórnini, sum sigur, at stjórnin góðtekur bert 210 tímar, sum er tað sama, vevingin fær í Tórshavnar kvøldskúla. Og at stuðul ikki kann latast so leingi fast verður hildið um, at skeiðið skal vera í 348 tímar.

Um hetta er so nakað av togan, sum endar við, at Valborg Joensen skrivar grein í bløðunum.

18. mars 1960 er ein hampuliga long grein á forsíðuni á Dagblaðnum við heitinum *"Føroya Skúlastjórn nýtir løgnan atburð móti Miðvágs Vevskúla!"* Valborg Joensen, vevskúlalærarinna hevur skrivað. Í greinini verður m.a. spurt:

"Er ætlanin at køva ein skúla, hvørs mál og mið er at læra ta føroysku kvinnuna at veva, sær sjálvum til gleði og gagns, landinum mentunarliga og vinnuliga til frama? Tað eru 4 ár síðan Miðvágs Vevskúli byjaði virki sítt. Øll hesi árini hevur vevskúlin verið undir kvøldskúlanum. Miðvágs sóknarstýri hevur, hóast sóknin er lítil og fáment, altíð verið beinasamt og veitt skúlanum stuðul. – Sama hevur Skúlastjórnin gjørt í undanfarnum árum. Men í ár er Skúlastjórnin vorðin tvørlig." – Víðari í greinini verður greitt frá málinum, at vevskúlin hevði søkt um at fáa góðkent 424 undirvísingartímar, men Skúlastjórnin vildi bara ganga við til 210 tímar. Miðvágs sóknarstýri hevði so skrivað til Skúlastjórnina og mælt til 348 tímar, so at næmingarnir fingu somikið av undirvísing at teir aftaná kundu standa á egnum beinumhesum viðvíkjandi og helt tað var harmuligt, um henda undirvísing datt niðurfyri. Men, verður sagt, tað rein ikki við Skúlastjórnina heldur enn at sletta vatn á gás. Hon sýtir aftur triðju ferð. Valborg Joensen vísir á, at hon hevur nomið sær holla útbúgving uttanlands á hesum økinum og metir seg ikki fáa viðurkenning hesum viðvíkjandi og fær tvørliga viðgerð frá Skúlastjórnini, samstundis sum hon samsýnir amatørum kring landið. Hon vísir á, at meðan sviar, norðmen og danir royna at styðja teirra vevskúlum, so royna føroyingar at køva teir í føðingini. Skúlastjórnin hevur eisini roynt at belært hana um veving í Tórshavnar kvøldskúla, men vísir Valborg á, at tað var hon sjálv, sum byrjaði og legði lunnar undir vevskúlaundirvísingina hjá Tórshavnar kvøldskúla. Hon hevur so at enda eitt langt brot úr frásøgn- unum hjá J.C. Svabo í Indberetninger fra en Rejse i Færø 1781 – 1782, har Svabo

skrivar um veving í Føroyum 1700 árunum. Har hann m.a. nevnir, at tey hava vanliga ikki rættuligar vevar í Føroyum, men hondveving og tað eru ikki nógv, sum duga góða veving, men nøkur eru. Og at m.a. segl og ymisk pløgg verða framleidd. Hann mælir til, at vevskúli verður settur á stovn í Føroyum, og at tey, sum standa fyri undirvísingini, fáa samsýning, og at næmingarnir sjálvir fáa eina peningaliga premiu. "Hvor var det ikke at ønske: at Færøe forlod de usle brugelige Spinde- og Væve-Redskaber, og anskaffede sig fuldkomnere Væve Stole og Fod-Rokke." Hann sigur, at hann veit um eina gentu í Kirkjubø, sum frú Djurhuus hevur lært upp og sum dugir til fulnar at veva. Hann kundi ynskt, at tað vóru minst 20 slíkar gentur í Føroyum.

19. mars 1960 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn, at hon hevur góðkent 210 skúlatímar.

Valborg Joensen skrivar aftur í mai og sendir upplýsingar um skeiðið veturin 1959/60. Skeiðið vardi frá 2.11.59 til 5.2.60, tað vóru 212 undirvísingartímar og tað vóru 10 næmingar og vóru teir: Jutta Joensen, Marita Nielsen, Vígdis Thomasen, Erla Thomsen, Johild Hansen, Asla Andreassen, Alith Poulsen, Hervør Jørgensen og Ninna Nielsen.

16. juli 1960 skrivar Skúlastjórnin, at stuðulin til Valborg Joensen, Miðvági, fyri kvøldskúla í veving veturin 1960/61 er 1.314 kr.

3. juni 1961 verður skrivað til Skúlastjórnina, Tórshavn, og send við tvær umsóknir frá vevilærarinnu, Valborg Joensen, Miðvági, fyri kvøldskúla í veving veturin 1960/61, ein umsókn fyri hvørt skeiðið.

Síðan sæst ikki nakað til hetta í nøkur ár, um tað er hildið ella ikki, er tí óvist. Men í 1965 søkir hon aftur um loyvi at hava vevskeið í Gamla skúla veturin 1965/66. Hetta verður játtað henni á sóknarstýrisfundi 20.9.1965.

Og hevur hon aftur vevskeið vetrarnar 1966/67, 1967/68, 1968/69 og 1969/70 í Gamla skúla, við stuðli frá kommununi og landinum.

Hon søkir so aftur um at hava vevskeið veturin 1970/71, men nú er skúlagongd aftur byrjað í Gamla skúla, so nú kunnu hesi hølini ikki nýtast til vevskeið.

Tað endar tó við at hon fær loyvi at halda skeiðið og fær 300 kr. um mánaðin fyri hita, høli, ljós og reingerðing, tað tíð ið skeiðið varar. Tað sama var fyri veturin 1971/72, men tá fekk hon 550 kr. fyri hvønn mánaðin. Hesi seinnu árini mátti hon so sjálv seta hølir til fyri at hava skeiðið. Hetta er so eisini seinasta árið hon stendur at hava vevskeið undir hesi skipanini og við stuðli frá kommununi.

Elsebeth 'Ebba' Jacobsen, hondarbeiði.

Á fundi í sóknarstýrinum, 17. desember 1953 var til viðgerðar umsókn frá Ebbu Jacobsen, Miðvági, um starvið sum hondarbeiðslærarinna við Miðvágs skúla. Skúlastjórnin hevði sent umsóknina til sóknarstýrið, sum hevði sent málið víðari til skúlanevndina, ið hevði givið sítt viðmæli. Sóknarstýrið var einmælt í at geva viðmæli til teirra umsókn.

Stuðulin frá kommununi fyrsta veturin hjá henni, 1953/54, var 410 kr., samlaða samsýningin var sostatt 1.366 kr. Skrivað verður so til Skúlastjórnina, Tórshavn, hin 24. apríl 1954 og sagt frá hesi avgerð, har lagt verður afturat, at av tí at lønin er ógvuliga lá, loyva vit okkum at spyrja, um ikki er møguligt at hækka hana. Fólk eru væl nøgd við frú Jacobsen, og vil tað vera torført at fáa væl kvalifiserað fólk til eitt tílíkt starv, tá lønin er so lá, sum hon er nú.

4. juni 1954 svarar Skúlastjórnin og sigur, at hon einki hevur ímóti, um kommunan hækkar samsýningina, men frá Amtinum verður lønin óbroytt, 40 kr. um mánaðin, sum undirvíst verður + 80% dýrtíðarviðbót. Málið er so aftur fyri á sóknarstýrisfundi, 22. juli 1954, har sagt verður, at hondarbeiðslærarinnan fær um 700 kr. um árið frá Amtinum, men heldur hon hetta er ov lítið.

Avgjørt varð at lata hana fáa 100 kr. um mánaðin, 1200 kr. um árið, soleiðis, at kommunan

letur munnin millum tað, stjórnin letur, og tær 1.200 kr., um 500 kr. um árið.

Veturin 1954/56 var stuðulin frá kommununi 700 kr. og 1955/56, 465 kr., undirvíst varð í 150 tímar. Veturin 1956/57 er sagt, at hon fekk 1.300 kr. í alt í stuðli frá kommunu, stati og landi fyri 6 tímar um vikuna til kvøldskúla.

Í 1956 byrjaði hon eisini at undirvísa eldru skúlagentum í hondarbeiði í skúlatíðini. Og gjørdi hetta í nógv ár. Sum er umrøtt í partinum um faklærararnar.

Fyri veturin 1957/58 er til skjals tímaætlan fyri kvøldskúlan hjá Ebbu. Týsdag, mikudag, hósdag og leygardag øll kvøld kl. 7 – 10. Luttakaragjald, 15 kr., umframt stuðul frá kommunu og landi.

22. september 1959 skrivar Ebba til sóknarstýrið og sigur, at tað nú er so trongligt og ringt at fáa pláss í skúlanum til kvøldskúla í hondarbeiði, sum hon hevur havt í nøkur ár, og hugsar hon um at innrætta eitt høli hjá sær sjálvari, 6 x 13 alin til støddar. Og spyr um tað hevði verið møguligt at fingið goldið leigu fyri brúk av hesum høli. Umsóknin er fyri á fundi, 29.9.1959, har umsóknin ikki varð gingin á møti, tí sagt verður, at tá nú ein nýggj stova verður tikin í nýtslu, verður høvi hjá henni at nýta hesa. – Har helst er hugsað um nýggja skúlastovu á loftinum í kommunuhúsinum.

Elsbethh 'Ebba' Jacobsen

Um hesa tíð var nógvur Grønlandsútróður og 30. september 1959 skrivar Elsebeth Jacobsen, hondarbeiðslærarinna, at hon skal flyta til Grønlands og sigur starvið sum hondarbeiðslærarinna frá sær til 8. oktober 1959. – Helst hevur maður hennara, Oyra Luddi, nevndur, ætlað sær til Grønlands og hon skuldi við, helst sum kokkur, sum ikki var óvanligt. Um Luddi er farin til Grønlands fæst ikki sagt her, men Ebba er so ikki farin, tí 11. desember 1959 verður skrivað til Skúlastjórnina, og send inn umsókn um kvøldskúla fyri Elsebeth Jacobsen hondarbeiðslærarinnu.

Hon hevði so kvøldskúla í hondarbeiði veturin 1959/60, 240 tímar tilsamans. Um skeiðið verður annars sagt í umsókn til Skúlastjórnina, at undirvíst verður í øllum møguligum hondarbeiði, so sum brodering, seyming og annað hondarbeiði. Um seg sjálva sigur Elsebeth Dagny Jacobsen, sum er hennara fulla navn, at hon er 37 ár og býr í Miðvági. Hevur verið sett sum hondarbeiðslærarinna við skúlan í Miðvági í uml. 8 ár og nú eisini við skúlan í Sandavági í 1 ár. Eins og hon hevur undirvíst við kvøldskúlan í Miðvági í 5 ár. Upplýsingarnar eru váttaðar av Miðvágs skúlanevnd.

Hon hevði so aftur kvøldskúla í sama faki veturin 1960/61 og allarhelst fram til 1964, tá tó ikki so nógv er nevnt um tað.

Á sóknarstýrisfundi 11. desember 1964 verður sagt, at Frida Jørgensen og Ebba Jacobsen, 1964/65, nýta sama høli til kvøldskúla, tó ikki í senn, og sum er í tilgjørdum hølum heima hjá Fridu. Stuðulin Ebba fær hendan veturin er 3.047 kr., harav kommunan rindar 1.014 kr.

1965/66 verður sagt, at hon nú heldur skeiðið heima hjá sær sjálvari og fær hon 65 kr. um mánaðin frá kommununi fyri hølið, hita og ljós og reingerðing, ta tíð, ið skeiðið varar. Í einum skrivi verður sagt, at tað er ein stova burtur av sethúsunum og liggja húsini við vegin í Miðvági.

Veturin 1966/67 fekk hon loyvi at halda kvøldskúla í hondarbeiði undir somu treytum sum seinasta vetur. Sama var veturin 1967/68 og 1968/69. Stuðulin henda seinasta vetur er nevndur og var hann 3.840 kr. sum hevur helst verið á nøkulunda tí støðinum hini árini. Sama er veturin 1969/70.

Veturin 1970/71 er tó tann treyt, at skeiðið verður í Gamla skúla, og at tey gera reint aftaná hvørt kvøld, tá skeiðið verður hildið. Veturin 1971/72 og 1972/73 var á sama hátt. Og var hetta samstundis seinasti veturin, hon er skrásett í skjølunum at hava kvøldskúla í hondarbeiði undir skipanini hjá kommununi.

Petur Jacob Sigvardsen, lærari, hevði kvøldskúla fyrstu ferð í Miðvági veturin1957/58. Í skjølunum frá 1957 er sagt, at hann er 25 ára gamal og er vikarur við skúlan í Miðvági *(fekk síðan fast starv sum lærari),* og at hann hevur tveir bólkar. Og undirvísingin var í skúlastovu í kommunuhúsinum. Luttakaragjaldið var ókeypis, og verður sagt, at hann hevði áður verið lærari í Mykinesi og hevði hildið kvøldskúla har veturin 1956/57. Undirvísingarætlan er viðløgd:

Bólkur 1, Miðvági, 1957/58, enskt mánakvøld kl. 7 – 8 og mikukvøld kl. 7 – 8.30.

Bólkur 2 samfelagslæra mánakvøld kl. 8 – 9 og mikukvøld kl. 8.30 – 9.30.

Petur Jacob hevði aftur kvøldskúla 1957/58 og 1958/59. Men er so ikki nevndur aftur við kvøldskúla fyrr enn veturin 1962/63. Er ikki nevndur seinni í skjølunum hjá kommununi viðv. kvøldskúla.

Frida Jørgensen. 29. oktober 1958 sendir Frida Jørgensen, Miðvági, inn umsókn um loyvi at halda seymiskeið. Umsóknin varð góðkend á kommunustýrisfundi og send víðari til Skúlastjórnina, sum góðtók, at Frida Jørgensen hevði kvøldskúla í seyming veturin 1958/59.

9. juni 1959 hevur Frida Jørgensen sent inn nakrar upplýsingar um skeiðið. Hon hevði havt tveir flokkar í seyming, og luttakaragjaldið var 10 kr. Flokkur I hevði 25 næmingar, ið fingu undirvísing í 123 tímar. Flokkur II hevði 26 næmingar, ið fingu undirvísing í 126 tímar. Almenni stuðulin fyri kvøldskúlan var 932 kr.

Veturin 1959/60 var stuðulin frá kommununi 1.543,80 kr., veturin 1960/61, 3.440 kr., harav kommunan rindaði 1.032 kr. Veturin 1961/62 hevði hon kvøldskúla, smb. játtan, har tó einki tal er upplýst um samsýningina, sum helst hevur verið á sama stigi. Veturin 1962/63 er als einki nevnt, men sagt er á fundi árið eftir, at Frida hevði kvøldskúla hendan veturin.

Frida Jørgensen

Umsókn um kvøldskúlaskeið í seyming hjá Fridu Jørgensen fyri veturin 1963/64 var til viðgerðar á sóknarstýrisfundi 11. oktober 1963 har upplýst var, at Frida hevði havt kvøldskúla í seyming í Gamla skúla seinasta vetur. Hon helt ikki gl. skúla vera egnaðan, og bjóðaði hølir hjá sær sjálvari fyri 75 kr. um mánaðin ístaðin so leingi skeiðið varaði, samtykt varð at taka við hesum.

Veturin 1963/64 helt hon sostatt kvøldskúla í egnum hølum og fekk 80 kr. um mánaðin frá kommununi fyri tað meðan undirvísingin fór fram. Sama var veturin 1964/65 og sama endurgjald, har nevnt er, at Ebba Jacobsen nýtti eisini sama høli hendan veturin, tó ikki somu tíð. Almenni stuðulin fyri kvøldskúlan hjá Fridu henda veturin var 5.874 kr., harav kommunan rindaði 1.762,56 kr. Veturin 1965/66 var latið henni 100 kr. um mánaðin fyri høli, hita og ljós og reingerðing, ta tíð, ið skeiðið vardi, umframt samsýning fyri skeiðið sjálvt, sum ikki er nevnt, men helst á sama støði, sum árið fyri og eftir. Veturin 1966/67 var samsýningin fyri høli frá kommununi 150 kr. um mánaðin fyri ljós, hita. Tó veturin 1967/68 lækkað til 125 kr. um mánaðin og er tað sama fyri veturin 1968/69 og 1969/70. Veturin 1970/71 var samsýningin fyri høli, ljós, hita og reingerð tó aftur sett til 150 kr. um mánaðin, tað tíð skeiðið vardi. Hækkað til 175 kr. um mánaðin veturin 1973/74 og til 200 kr. um mánðaðin veturin 1974/75. Sum var seinasti veturin hon, er nevnd at hava kvøldskúla í seyming undir almennu skúlaskipanini.

Vikarar og faklærarar

Amalia Wang, f. Berentsen 13.1.1879, Sund, Kaldbaks sókn. Flutt úr Tórshavn til Miðvágs í 1913. Gift Berinti Wang, f. 1884, Miðvági, skómakari. Í FT. 1921 eiga tey 3 børn, tveir dreingir og eina gentu, fødd millum 1914 og 1917.

Sambært skjølunum vanliga nevnd Malla og er har fleiri ferð nevnd Malla Wang. Skúlastjórnin játtar hin 3.4.1917, smb. skrivi frá forstandarskapinum 30.3.1917, at frú Malla Wang verður fyribils sett sum hjálparlærarinna og vikar frá 1. apríl 1917 at rokna og til vanligu skúlafrítíðina í juli sama ár. Lønin verður 40 kr. um mánaðin.

Hóast nevndu avgerð, so heldur Malla Wang tó fram eftir summarfrítíðina. Á tveimum fundum í forstandarskapinum verður hølistrupulleikin í skúlanum havdur á lofti á fundi 31. august, har sagt verður, at ynskiligt hevði verið at havt ein fast settan annanlærara, um ein skúlastova kann skaffast, men hesum síggja vit ongan útveg fyri beint nú. 30. oktober 1917 er málið aftur fyri, men framvegis hevur ikki eydnast at fáa eina hóskandi skúlastovu. Í hesum sambandi varð samtykt at uppsiga frú Mallu Wang til 1. november sama ár. Í brævi til Skúlastjórnina 2. oktober, verður sagt, at tað hevur verið ómøguligt at skaffa nakað høli, og í brævi til Mallu sama dag, verður m.a. sagt, at hon verður søgd upp til 1. november, og at teir eru sera harmir um at verða noyddir at taka góðar kreftir frá skúlanum vegna mangul av hølum.

Sambært roknskapinum 1916/17 var løn hennara 280 kr., sum sigur, at hon hevur verið vikarur í 7 mánaðir í 1917.

Júst um hetta mundið er brævaskifti millum Gudmund Brun, prest á Nesi, sum vegna prestloysi í Vágum hesa tíð, eisini er virkandi sóknarprestur í Vágum 1917-18, og sostatt tá í tíðini føddur formaður í øllum skúlanevndunum í sóknini. Hann hevur sent nakrar spurningar til kommununa um skúlaviðurskiftini í bygdini, og svarar Mikkjal á Ryggi honum vegna kommuna.

Í brævinum, dagfest 13.8.1917, sigur Mikkjal á Ryggi m.a. at miðal barnatalið í Miðvágs skúla tvey tey seinastu árini hevur verið 83 børn. Skúlin er býttur upp í 3 flokkar og miðaltalið í flokkum seinastu tvey árini eru hesi: 1. flokkur 24 børn, 2. flokkur 28 børn og 3 flokkur 31 børn, eisini, smb. skrivinum, nevndir "Yngsti-, Mittasti- og Elsti klassi". Umframt fastsetta læraran er sett ein hjálparlærarinna. Vegna at tað bara er ein skúlastova hevur undirvísingartíðin í ymsu flokkunum verið skerd. 1. flokkur hevur 11 tímar um vikuna, 2 flokkur hevur 20 tímar um vikuna og 3 flokkur hevur 28 tímar um vikuna.

Jóhan Petur Joensen, vikarur. Í roknskapinum fyri 1927 stendur, at goldnar eru Johan P. Joensen 150 kr. fyri at hava virkað sum vikarur við skúlan hetta árið. Hvønn hann vikarieraði fyri er ikki upplýst, men tað hevur so verið antin Elias ella Jóan Hendrik. Jóhan Petur var føddur hin 20.1.1906 í Hesti. Í 1927 er hann nýútbúgvin lærari frá Silkeborg Seminarum. Í bókini "Lærarafólk í Føroyum" stendur eisini nevnt, at hann var vikarur í Miðvági í 1927, og annars m.a., at hann var lærari í Ålborg frá 1928-52, skúlastjóri í Klaksvík frá 1952-56 og landsskúlaráðgevi frá 1956. Jóhan Petur Joensen andaðist í 1965.

Maren Elisabeth Olsen s. Waag, varð fødd 1. februar 1908 og ættað av Válinum, Vestmanna. Elisabeth giftist Einari Waag, bryggjara, Klaksvík, og er í bók um føroyskar lærarar skrivað við eftirnavninum Waag, men tíðina, hon var her, frá 1935 til 1940, er hon skrivað Olsen. Nær tey eru gift er ikki upplýst, men Elisabeth andaðist longu 12. desember 1941, bert 33

ára gomul. Einar giftist seinni uppaftur við Annu Lenu f. Joensen, úr Nýggjustovu í Sørvági.

Elisabeth tók læraraprógv í Tórshavn í 1932, var lærari á Tvøroyri apríl – juli 1934 og á Dímun november 1934 til juni 1935. Gjørdist ferðalærari í Vágum í hondarbeiði og fimleiki frá 15. september 1935 til 15. juli 1940. – Í bók um føroysku lærararnar stendur annars at hon var lærari í Klaksvík frá 1939 til 1941, hetta samsvarar ikki við skjølini í Vágum og skal helst vera frá 1940-41, um hon ikki hevur virkað á báðum støðum, sum virkar illa hugsandi við ferðasambandinum tá.

13. september 1939 verður skrivað til frk. Elisabeth Olsen, f.t. Vestmanna. Skúlastjórnin hevur skrivað til forstandarskapið og sagt, at tygum eru sett sum ferðalærari fyri Sørvág, Miðvág og Sandavág í tíðini 15. sept. 1939 til 15. juli 1940. Tað er álagt forstandarskapunum, at tygum kunnu fáa frítt uppihald beinanvegin, sum tygum koma higar. Vit heita tí á tygum um at skaffa tygum eitt logi, møguliga í samráð við forstandarskapið um gjald av hesum. Samstundis verða tygum biðin um at gera eina skúla- og undirvísingarætlan beinanvegin eftir 15. sept., soleiðis at henda kann sendast Skúlastjórnini til góðkenningar.

Hin 10. oktober 1939 verður skrivað til Pól Petersen lærara í Mykinesi. Elisabet Olsen, lærarinna her, hevur sagt, at tygum kunnu skaffa fimleikaútgerð, sum tygum halda kann fáast bíliga úr Danmark. Hon sigur, at hon manglar ein "plink" og ein "hest", og biði eg tygum at at gera eina roynd at fáa hetta til vega fyri rokning hjá Miðvágs sóknar kommunu, um so er, at hetta fæst bíliga.

Høli í Miðvági at íðka fimleik í var, sum nevnt á øðrum stað, leigað frá Jóan Petur Wang í Miðvági. Hinar bygdirnar máttu so skaffa síni hølir.

Meðan Elisabeth var í Miðvági, gisti hon fyrst hjá Jákup K. Joensen smiði árini 1936 og til fyrsta kvartal av 1938. Frá tíðliga í 1938 og til 1940 gisti hon hjá Jóan Petur Wang. Kostnaðurin fyri gistingina var um 50 kr. um árið, sum kommunan rindaði. Hevur so bert verið 3. hvørja viku í Miðvági.

Henrikka Elisabeth Niclasen f. Danielsen 23. november 1883, deyð 18. desember 1973, 90 ára gomul, vanliga nevnd Dikka á Bakkanum. Hevði ikki læraraútbúgving, men góðan kunnleika í hondarbeiði, og varð tískil sett í vikarlíknandi starv sum hondarbeiðslærarinna. Var 57 ára gomul, tá hon tók við starvinum í 1940 og 69 ár tá, hon gavst í 1952. Hon hevði annars havt kvøldskúla í hondarbeiði fyri kvinnur vetrarnar frá 1936 til 1940.

Umsókn frá henni til starvið sum hondarbeiðslærarinna við Miðvágs skúla at læra genturnar hondarbeiði, er fyri á fundi 9. november 1940. Skriv frá Skúlastjórnini við viðmæli frá skúlanevndini var við í málinum. Samtykt varð fyrst at spyrja seg fyri hjá hinum kommununum í sýsluni, hvussu tær hava hugsað sær at skipa seg, við tað at allar tríggjar kommunurnar fyrr høvdu havt lærarinnu saman.

Endin er so tann, at hon varð sett bara fyri Miðvág og bara til hondarbeiði, tann fyrra hevði havt fimleik eisini, men sum nú datt burtur. Og vórðu tað kommunan og Amtsgrunnurin, sum rindaðu lønina. Lønin frá kommununi fyrsta árið var 300 kr. hækkað hampuliga javnt uppeftir har tað so í 1952 var um 800 kr., sum var seinasta árið, hon hevði hetta starvið.

Elsebeth Dagny Jacobsen, vanliga nevnd Ebba, f. 1. juni 1923 í Vági. Gift Ludvig Jacobsen, Miðvági, vanliga nevndur Oyra Luddi.

Ebba tók við sum hondarbeiðslærarinna við Miðvágs skúla í 1955 eftir Dikku, sum gavst í 1952. So har sýnist at hava verið eitt tómrúm við ongari hondarbeiðslærarinnu. Samsýningin frá kommununi fyrsta árið var 590 kr.

Í mai 1955 fekk Ebba loyvi at fara á skeið í Vági í 2 mánaðir. Málið er fyri aftur á fundi í august. Fram kemur, at skeiðið kostaði 483 kr. og bøkur til skeiðið 34 kr. Stýrið varð samt

um at gjalda henda pening. Lønin frá kommununi hetta árið var annars 700 kr. og fyri 1956 1.200 kr., sum lønin var fram til 1959. Smb. upplýsing í 1960 undirvísti hon í 6 tímar um vikuna í skúlatíðini, og at tímalønin var 33 kr. Í 1960 var samsýningin 1.500 kr. frá kommununi. Aftaná at felagsskúlin Miðvág-Sandavág, hin 4. apríl 1961, varð tikin í nýtslu, hevði omanfyri nevnda undirvíst 8 tímar um vikuna í skúlatíðini.

Tað sær ikki út til at Ebba hevur undirvíst í hondarbeiði í skúlanum á Giljanesi árini 1962 til 1972, tað eru so eingi skjøl, sum sýna tað, so tá hava helst lærarinnur, sum vóru settar við skúlan tá, tikið sær av tí. Men hon hevði kvøldskúla í hondarbeiði øll hesi árini, sum nevnt er framanfyri.

Byrjaði tó aftur sum faklærari í hondarbeiði í skúlatíðini í 1973, har hon aftur undirvísti gentunum í hondarbeiði við 8 tímum um vikuna, sum í 1977 varð hækkað til 10 tímar um vikuna. Og tað helt hon fram við til 1979, sum er seinasta árið, hon er nevnd við tí yrkinum. Ebba andaðist 29. mai 2006, 82 ára gomul.

Poul Edvard Petersen f. 29. august 1901, Sørvági. Giftur og búsettur í Tórshavn. Pól tók læraraprógv í 1923 frá Føroya Læraraskúla og hevði annars fleiri útbúgvinar innan ítrótt og var ítróttarráðgevi í Føroyum í mong ár. Pól hevur í 1950 fingið 390 kr. í samsýning frá kommununi sum vikarur við Miðvágs skúla hetta árið. Um hann hevur avloyst ein av lærarunum ella hevur havt serfak, ísofall helst ítrótt, er ikki upplýst. Tað er faktiskt einki annað upplýst í málinum uttan talið í roknskapinum, og hvat tað varð latið fyri. 390 kr. frá kommununi umframt gjald frá statinum, sum tað helst hevur verið eisini, kundi týtt uppá at hann hevur verið ein ella tveir mánaðir í 1950.

Absalon Djurhuus, føddur 15. desember 1930, Tórshavn. Læraraprógv frá Føroya Læraraskúla 1956. Var lærari í Miðvági várið 1957. Var síðan lærari við Tórshavnar Kommunuskúla til 1996.

Á fundi í sóknarstýrinum 31. august 1957 er sagt, at Absalon Djurhuus hevur verið vikar eina tíð, men er nú farin. So hann hevur helst verið frá 1. mai til summarfrítíðina.

Martha Danielsen, f. 1941, Tvøroyri, preliminerprógv. Sett sum vikarur við felagsskúlan frá 21. oktober 1959 og er í starvinum fram til summafrítíðina 1960. Smb. skjølunum rindaði statskassin 50% og landskassin 50% av lønini hjá henni.

Jóannes Dalsgaard, Tórshavn, føddur 26. juli 1940 í Skálavík. Røkti sum nýmálsligur studentur vikarstarv við Miðvágs skúla skúlaárið 1960-61.

Giftist annars í 1967 við Eyðnu Højgaard Ellefsen úr Miðvági. Gjørdist cand.mag. í søgu og fronskum frá Lærda háskúlanum í Keypmannahavn í 1973 og dr.phil. í søgu í 1996. Var løgtingsmaður 1980-88, Landsantikvarur 1980-92 og 1993-98, rektari í Hoydølum 1992-93 og deildarstjóri í Mentamálaráðnum 1998-2007.

André Niclasen, f. 1938, Klaksvík. Vikarur við felagsskúlan Miðvági-Sandavági frá 21. august 1961 til 30. juni 1962, smb. skrivi frá Skúlastjórnini 10. august 1961.

Tók seinni hægri lestur og vann sær heitið, magistari; var lærari á Studentaskúlanum frá 1976 og síðan á Læraraskúlanum frá 1994. Skrivaði m.a. bøkur um mállæru í týskum og føroyskum. Deyður í 2013.

Victor Joensen, Miðvági, f. 17.9.1928, d. 2.10.2004. Uttan læraraútbúgving, settur sum faklærari í metalsmíð við Miðvágs-Sandavágs skúla árini 1972 til 1979, 13 tímar um vikuna.

Paula Nattestad, f. 17. mai 1946, Miðvági, Uttan læraraútbúgving, sett sum faklærari í húsarhaldi við Miðvágs-Sandavágs skúla árini 1972 til 1979 13 tímar um vikuna og frá 1977 16 tímar um vikuna.

Guðrið Johannesen, Sandavági, faklærari uttan læraraútbúgving er sett sum lærarinna í fimleiki við Miðvágs-Sandavágs skúla skúlárið 1972/73 í 12 tímar um vikuna.

Svend Aage Ellefsen, Sandavági, f. 13. september 1941 í Miðvági. Prógv sum studentur frá 1964. Vikarur við Miðvágs-Sandavágs skúla 1971 til 1974.

Torkil Haraldsen, f. 28. juni 1941 í Sandavági. Búsettur í Sørvági. Tók læraraprógv frá Føroya Læraraskúla í 1964 og var lærari í Sørvági frá 1964 til 2001, tá hann fór frá. Settur sum leiðari av serundirvísing og sum hoyri- og tali lærari í Vágum og Norðstreymi frá 1. august 1973 at rokna. Har hann so hevði sertímar á Giljanesi eisini. Røkti hetta starv fram til 2001.

Ruth Johannesen, Sandavági faklærari uttan læraraútbúgving er sett sum faklærarinna í hondarbeiði við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. oktober 1973 til 1976 við 12 tímum um vikuna.

Ann Nielsen, Sandavági. 17. januar 1977 skrivar Skúlastjórnin og sigur, at skúlanevndin hevur sett frk. Ann Nielsen, Sandavági sum vikar í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 01.01. til 30.06.1977, við 18 tímum um vikuna.

David Johannesen, prestur, Miðvági. Settur sum faklærari í latín í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. oktober 1977 og nøkur ár fram við 3 tímum um vikuna.

Marin Heinesen, Sandavágur. Faklærari í húsarhaldi við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 01.11.77 til 31.07.79, og møguliga longur.

Í skjølunum hjá Miðvágs kommunu eru ikki upplýsingar um setanir av lærarum og vikarum longur fram enn til 1979. Við tað, at hesin parturin skuldi snúgva seg um Miðvágs skúla, og ætlanin er at skriva um felagsskúlan á Giljanesi í øðrum verki, so verður ikki mett neyðugt at fara longur enn hetta hesaferð. Her hava vit so fingið teir eldru lærararnar við. Sum helst allir eru farnir úr starvið nú vegna aldur. Viðvíkjandi vikarum, sum nógv var brúkt fyrr, kann vera, at onkrir mangla, men so er tað vegna manglandi upplýsingar í skjølunum um tað.

Vatnsoyra skúli

Bygt varð í Vatnsoyrum í 1921, har 3 niðursetumenn úr Sørvági við familjum settu búgv í Miðvágs haga, og sostatt komu í Miðvágs kommunu. Teir vóru: Martin Nielsen - Stóri Martin, flutti í 1921, Martin Jacobsen - Lítli Martin, flutti í 1923 og Dánjal Poulsen - Suðuroyar Dánjal, flutti í 1924. Seinni er bygdin vaksin nakað, og nakað av tilflyting hevur verið gjøgnum árini. Húskini, sum upprunaliga fluttu til Vatnsoyrar, høvdu øll børn í skúlaaldri, sum smb. lógini høvdu rætt til skúlaundirvísing, og var tað krav. Heimaundirvísing var tó eisini loyvd.

Fyrstu ferð ein sær um skúlaskap í Vatnsoyrum er í roknskapinum hjá Miðvágs kommunu 1923/1924. Hetta árið rindar Miðvágs kommuna Martini Jacobsen, 125 kr. fyri leigu av skúlastovu í Vatnsoyrum. Tað var onnur av tveimum stovum í húsunum hjá honum. Tað sær ikki út til, at kommunan hevur nýtt nakað av peningi til at innrætta stovuna til skúlastovu, so stovan er helst bara nýtt soleiðis, sum hon var. Einasta útreiðslan hjá kommununi hølunum viðvíkjandi, er leigan fyri stovuna. Og so ein talva, okkurt kort og skúlabøkur, tað er tó ikki útgreinað í roknskapunum í hesi tíð, men at ein lítil talva var er nevnt í skrivi seinni. Í skjølunum verður hendan leigaða stovan stundum nevnd Vatnsoyra skúli.

Roknskaparárið gekk frá 1. oktober til 30. september árið eftir. Tað vil siga, at skúlaskapurin í Vatnsoyrum er byrjaður eitt av hesum árunum, júst nær er ikki greitt, men eftir upphæddini kundi tað verið eftir summarfrítíðina 1923, tí seinni varð gjaldið 100 kr. um árið fyri leigu av skúlastovuni. Eftir hesum er fyrsta gjaldið fyri 1 ¼ ár.

Lærari er so komin úr Miðvági, og varð bert undirvíst í Vatnsoyrum ein dag um vikuna. Sum hesa fyrstu tíðina kanska hevur verið minni enn tað.

Fyrstu tíðina var Jóan Hendrik Samuelsen lærari í Vatnsoyrum, um hesa tíðina annarlærari í Miðvági. Vatnsoyrafólk gramdu seg um, at lærarin eftir teirra hugsan ikki tók undirvísingina í Vatnsoyrum í nóg stórum álvara. Tí onkra viku møtti hann als ikki, og tá kannað varð eftir, var hann heldur farin í torv ella hoyna, um tað var góður terri, søgdu tey. So skúlaskapurin var lítil og óstøðugur tey fyrstu árini.

Í 1923 áttu Martin Jacobsen og konan Morensa, har skúlastovan var, 3 børn í skúlaaldri, Alma f. 1912, Amanda f. 1914 og Isabella f. 1916.

Tey fingu 8 børn afturat. Margreta f. 1917, Martina f. 1918, Petur f. 1920, Maria 'Mia' f. 1922, John f. 1922, Karl f. 1923, Arni f. 1926 og Albin f. 1928.

Í 1923 áttu Dánjal Poulsen og konan Bina tvey børn í skúlaaldri, Emma f. 1913 og Amanda f. 1915.

Og áttu 3 børn undir skúlaaldri, John f. 1918, Esther f. 1921 og Lina f. juli 1923.

Martin Nielsen hevði 4 børn í skúlaaldri í 1923. Hans f. 1909, Frida f. 1911, Dánjal f. 1913 og William f. 1916.

Og tey áttu so eitt barn afturat seinni, sonin Karl f. 1918. (Og kann nevnast, áttu tey eisini 3 børn, sum vóru farin um skúlaaldur í 1923, Zakaris, Olga og Jenny.)

Tað vil siga, at summarið 1923 eru 9 børn í skúlaaldri í Vatnsoyrum. Tá skúlin eftir øllum at døma so smátt er byrjaður.

Hesi og hini seinnu nevndu eru skúlabørnini í Vatnsoyrum tey fyrstu árini.

Sambært roknskapunum fekk Martin Jacobsen 100 kr. um árið fyri leigu av einari stovu í

setuhúsum hansara til skúlastovu øll árini frá 1923 til 1940. Fyri 1941 og til summarið 1942 var samsýningin 50 kr. um árið. Men tað var ikki fyri skúlastovuna, men fyri eina súkklu til sonin Albin, sum var farin at ganga í skúla í Sørvági, tí hann var einasta skúlabarnið, sum var eftir í Vatnsoyrum tá. Ferðalærarin gerst so lærari burturav á Slættanesi, hóast hann fyri skúlaárið 1940/41 av Skúlastjórnini var settur ferðalærari í Vatnsoyrum eisini.

Tíðliga í 1925 hava íbúgvar í Vatnsoyrum skrivað til Miðvágs kommunu um at fáa skúla í bygdini. Skrivið er ikki varðveitt, men bert nevnt í gerðabókini. Helst hevur hugsan teirra verið, at fingið meiri støðuga undirvísing og fleiri skúladagar enn higartil.

Umsóknin er til viðgerðar á fundi í forstandarskapinum í Miðvági hin 26. februar 1925. Samtykt varð at skipa viðurskiftini soleiðis, at tann eini lærarin úr Miðvágs skúla fremur ta neyðugu skúlagongdina á tann hátt, at hann heldur skúla har ein dag um vikuna, og tímaætlanin í Miðvágs skúla verður broytt soleiðis, at tey fáa ein frídag um vikuna. Tá gingu tey 6 dagar um vikuna í skúla, sum so er broytt til 5 dagar í Miðvági og 1 í Vatnsoyrum hesi árini.

Lærararnir høvdu gjørt eina skúlaætlan, sum varð samtykt av forstandarskapinum. Samstundis varð samtykt at hækka húsaendurgjaldið hjá øðrumlæraranum, Jóan Hendrik Samuelsen við 100 kr. – Í skrivi seinni sama ár verður sagt, at hetta er í veruleikanum eyka samsýning fyri at undirvísa í Vatnsoyrum. – Samtykt varð eisini at velja Sørin Danielsen at tingast við íbúgvararnar í Vatnsoyrum um at orðna viðurskiftini við skúlastovuni v.m. og so seinni at leggja hetta fyri forstandarskapið til góðkenningar.

3. mars 1925 verður skrivað til pastor Grøn í Kvívík viðv. skúlaviðurskiftunum í Vatnsoyrum. Ihme Jensen skuldi verið byrjaður sum prestur í Vágum 9.2.1925, men er helst ikki komin hin 3. mars. Grøn er so virkandi prestur í Vágum til setti presturin tekur við.

Sørin Danielsen skrivar (á donskum): "Sum eg pr. telefon havi sagt tær, hava forstandarskapið og skúlanevndin samtykt at skipa viðurskiftini í nýbygdini Vatnsoyrar soleiðis, at vit lata annan av lærarunum í Miðvági fara hagar einaferð um vikuna, sum vit halda má vera nokk, tí har eru í løtuni bert 8 børn. Í Miðvági fáa tey so frí ein dag um vikuna. Eg leggi við tímaætlanina fyri Vatnsoyrar. Sum tygum síggja, er eingin kristniundirvísing. Hetta er eftir úttrykkiligum ynski frá øllum húsfedrunum. Eg vóni, tygum skjótast vilja taka avgerð sum formaður í skúlanevndini og senda tímaætlanina víðari til Skúlastjórnina."

1. mars 1930 verður skrivað til Skúlastjórnina sum svar upp á skriv frá 11. januar 1930. Viðvíkjandi skúlanum í Vatnsoyrum so skulu vit gjarna viðganga, at har er ov lítil skúlagongd, men har eru bert 8 skúlabørn, og tey gerast skjótt færri, við tað at tað koma ikki so nógv til. Og tað er ikki sannlíkt, at tað koma nýggjar familjur har, so um nøkur ár heldur tann skúlagongdin uppat. Vit kundu kanska fingið til vega eina størri talvu og kanska eini tvey kort, men fleiri lesiheftir halda vit okkum ikki kunna lata úr Miðvági. Tað hevði kanska verið møguligt at børnini kundu fari einar tvær ferðir um vikuna til Miðvágs ella Sørvágs. Men um veturin verður tað vist ómøguligt. Tað verður ov trupult.

4. august 1930 verður aftur skrivað til Skúlastjórnina, vegna skriv frá Skúlastjórnini 11. juni h.á. um betran av skúlaviðurskiftunum í Vatnsoyrum. Vit hava tingast við foreldrini, sum øll søgdu, at tað ikki er møguligt at lata børnini ganga í skúla í Sørvági. Tey hava roynt hetta eina tíð, men tað bleiv ikki til nakað veruligt við tí. Og fyri nøkur av foreldrunum kann ein ikki siga, at tað hevur skortað upp á vilja, við tað at tey sjálvi hava goldið fyri privatlærara* í Sørvági. Men eftir sum tey siga, so varð hetta ógjørligt, serliga vegna veðrið. [* Tað man so hava verið Martin Berg, sum var privatlærari í Sørvági 1928-30.)

Vit hava eisini tosað við okkara lærarar, um hvat er at gera, og teir halda ikki, at teir kunnu

seta meira tíð av til Vatnsoyrar, um tað ikki skal ganga útyvir børnini í Miðvági. Vit hava eisini skotið upp fyri foreldrunum, at lata børnini búgva í Sørvági ella Miðvági t.d. nakrar dagar um vikuna. Men tí vildu tey ikki stuðla, so vit eru ikki førir fyri at koma við nøkrum uppskoti.

Napoleon Nolsøe Petersen ferðalærari

Napeleon Nolsøe Petersen 'Poli' f. 1906 í Sørvági g.v. Annu Dalsgaard f. 1908. Poli tók læraraprógv í 1929. Var fyrstu árini vikarur í Kaldbak, Gásadali og Bø. 1930-31 lærari við skúlan í Mykinesi.

Eftir summarfrítíðina í 1931 er tað so, at Poli verður settur at vera lærari fyri smáu bygdirnar, Vatnsoyrar, í Miðvágs kommunu og Slættanes í Sandavágs kommunu. So her byrjar so smátt eitt samstarv millum bygdirnar á skúlaøkinum. Og kann ein siga, at hetta er loysnin hjá Miðvágs kommunu upp á skúlatrupulleikan í Vatnsoyrum. Starvið í Vatnsoyrum røkir hann til summarið 1940.

Naspoleon Nolsøe Petersen

16. september 1931 skrivar Napoleon Petersen, lærari, til Poul Johannesen, prest og formann í skúlanevndini og sigur: *Tygum biðast siga forstandarskapinum frá, at skúlin byrjar í Vatnsoyrum hin 16. september. Og at har manglar brenni.*

Johannesen hevur sent brævið víðari til kommununa helst sama dag. Tað serstaka er, at brævið er framvegis í brævbjálvanum, sum Poli hevur frankerað við tveimum 5 oyra frímerkjum.

Skrivað verður til Skúlastjórnina hin 17. september 1931, sum svar upp á skriv frá 4.9. 1931 viðv. setan av einum ferðalærara fyri Vatnsoyrar og Slættanes. Vit loyva okkum at takka fyri hesa skipan, sum Skúlastjórnin skjýtur upp, og kunnu vit frá dato skaffa hóskandi innivist til læraran.

Fyri 1931 fær Napoleon 56,25 kr. frá kommununi sum íbúðarstuðul, hetta fær hann upp til 1935, tá stuðulin verður hækkaður til 60 kr. um árið, sum verður fasti stuðulin fram til 1940, tá givist verður við skúlahaldinum í Vatnsoyrum. Og er hetta endurgjald fyri kostnaðin av hansara innivist í Vatnsoyrum.

Í 1932 hevur Napoleon eisini havt kvøldskúla í Vatnsoyrum, og fær hann 46,50 kr. frá kommununi í stuðli til tað. Og aftur í 1934.

9. juli 1932 verður skrivað til Amtið, sum svar upp á skriv 24.6.1931 um ferðalærara-skipanina í Vatnsoyrum. Vit loyva okkum at svara, at eftir okkara metan hevur hetta riggað sera væl, og eru vit væl nøgdir og ynskja skipanina at halda áfram næsta ár á sama hátt.

Skrivað verður til Skúlastjórnina hin 2. juli 1934 smb. bræv frá somu 25.04.1934 viðv. manglum við skúlarnar í Miðvági og Vatnsoyrum. Tað skrivið er ikki varðveitt, men svarið, har sagt verður viðv. skúlanum í Vatnsoyrum, at alt tað, sum nevnt er, er longu fingið til vega. Vit hava lagt skrivið hjá Skúlastjórnini fyri læraran, sum sigur, at hann er fult nøgdur við tað, sum er fingið til vega. Hann kundi bert ynskt sær eina lítla globus.

Skúlaætlan fyri Vatnsoyra skúla skúlaárið 1938/39.

Kl.	Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hosdag	Fríggjard	Leygardag
$8\text{-}8^{50}$	Skriving	Rokning	Rokning	Rokning	Skriving	Rokning
$9\text{-}9^{45}$	Søga	Landalæra	Kristni	Søga	Landalæra	Kristni
$10^{15}\text{-}11$	Danskt	Føroyskt	Danskt	Føroyskt	Danskt	Føroyskt
$12^{10}\text{-}1$	Danskt	Føroyskt	Danskt	Føroyskt	Danskt	Føroyskt
$1^{10}\text{-}2$	Ítrótt	Svimjing	Ítrótt	Svimjing	Ítrótt	Svimjing

Viðmerkt er, at vetrarmánaðirnar verður undirvíst frá kl. 9 við somu tímaætlan. Svimjing byrjar 1. mai og endar 15. juli. Undirvíst verður aðruhvørja viku. Við skúlan í Vatnsoyrum eru í 1938 tvey børn og í Slættanes skúla ganga sekstan børn.

Her sæst, at Poli hevði kristni, sum fyrra læraranum ikki varð loyvt; helst hevur hann tingað seg fram til at hava tað á uttanveltaðan hátt.

18. oktober 1939 verður skrivað til Skúlastjórnina og sagt, at ósemja er millum læraran og Sandavágs kommunu við tað, at fyrstnevndi vil hava, at sama tíð verður brúkt í Vatnsoyrum sum á Slættanesi. Meðan Sandavágur ynskir, at undirvíst verður 3 vikur á Slættanesi og 1 viku í Vatnsoyrum. Skúlanevndin hevur viðmælt tí skipanini við notati á tímaætlanina. Vit taka eisini undir við skipanini við tað, at bert tvey skúlabørn eru í Vatnsoyrum, har tað eina fer úr skúlanum eftir nýggjár, og um 2 ár eru ikki fleiri børn í Vatnsoyrum, so tann skúlin má niðurleggjast.

Vatnsoyra skúli niðurlagdur

Stutt fyri jól 1939 er mál fyri á fundi um at niðurleggja skúlaundirvísingina í Vatnsoyrum, vegna at eftir nýggjár verður bara eitt skúlabarn eftir, Albin sonur Martin Jacobsen. Og um at tingast við Martin um, hvønn skúla hann vil senda sonin, í Miðvágs- ella Sørvágs skúla. Og hareftir senda eitt uppskot til Skúlastjórnina.

5. januar 1940 verður skrivað til Skúlastjórnina og sagt frá hesi avgerð, har lagt verður afturat, at tosa er við pápan at dreinginum, og hann gongur við til uppskotið, um ein hóskandi samsýning verður latin fyri innivist hjá dreinginum. Hetta gongur forstandarskapið við til. Vit skjóta tí upp fyri Skúlastjórnini, at ein slík skipan verður sett í verk til komandi skúlaár. Vit hava skrivað til skúlanevndina um málið, sum tekur undir við okkum og okkara innstillan. Teirra svarskriv er lagt við.

At einasta skúlabarnið, sum er eftir, skal ganga í annan skúla skúlárið 1940/41 hevur Skúlastjørnin helst ikki tikið til eftirtektar ella fingið við. Tí 27. august 1940 skrivar Sørin Danielsen, formaður, til Skúlastjórnina og sigur, at hann hevur fingið skriv um, at Napoleon Nolsøe Petersen úr Sørvági er settur lærari í Vatnsoyrum eftir summarfrítíðina. “Sum áður nevnt, er tað so, at tað ikki er nakað skúlabarn í Vatnsoyrum, og er soleiðis ikki brúk fyri einum lærara. Har er ein 13 ára gamal drongur, sum skal gista í Sørvági og søkja skúla har. Vit vænta soleiðis, at lærarastarvið í Vatnsoyrum fellur burtur í øllum førum í nøkur ár, við tað at tað tey fyrstu árini ikki verður nakað barn har í skúlaaldri.

Sum skilst á skrivi seinni, hevur drongurin helst ikki gist í Sørvági kortini, ella bert undantaksvís, tí sagt verður í skrivunum, at hann súkklaði ímillum.

Árini 1942 til 1945 var eingin skúlaundirvísing í Vatnsoyrum vegna, at bretar høvdu gjørt eina RAF hernaðarstøð við og í Vatnsoyrum, nevnd “Lakeside”, har so alt bygdarfólkið varð flutt av bygdini. Sum var eindømi í Føroyum undir krígnum. Eftir kríggið fluttu tey so líðandi aftur til bygdina.

Vatnsoyrar. Mynd frá 1960-árunum. Tað var í hvítu húsinum longst til vinstru á myndini, at ein stova varð leigað til skúlastovu.

14. november 1946 verður skrivað til Skúlastjórnina, Tórshavn. Bygdin Vatnsoyrar hoyrir til Miðvágs kommunu, og tey hava vent sær til kommununa um, hvussu tað kann skipast, so teirra børn fáa skúlandirvísing. Har eru nú 2 børn, sum bæði eru 7 ár og so eru 3 yngri børn í bygdini. Seinast var bert 1 barn eftir í Vatnsoyrum, og tað orðnaðu vit soleiðis, at vit rindaðu 50 kr. pr. ár, so hann kundi hava eina súkklu at súkkla til Sørvágs við, sum er nærmasta bygd. Tá tað nú eru 2 børn og 3 koma afturat, kann tað ikki skipast á henda hátt, vit vilja tí spyrja stjórnina hvør loysn er frægast í málinum. Vit vita frá bløðunum, at tað er ikki lætt at fáa lærarar.

28. juni 1947 verður skrivað til Skúlastjórnina í smb. við skriv, sum ikki eru til skjals longur. Men tað snýr seg um børn í Vatnsoyrum, og hvussu skúlagongdin skal skipast har. Eftir øllum at døma er uppskot um, at børnini skulu ganga í skúla í Miðvági og koyra við postrutuni um morgunin kl. 7 og aftur s.p. kl. 1. Sum skilst er skúlagongdin frá kl. 8 til 12 fyri hesi børnini og heldur sóknarstýrið ikki at hetta riggar, tí børnini, sum eru 7 ára gomul koma at bíða eini 3 kvarter um morgunin og aftur tað sama áðrenn tey sleppa til hús, og tað er ov leingi til so smá børn, og harafturat kunnu tey vera gjøgnumbloytt av regni, áðrenn tey sleppa inn í skúlan. So hildið verður best at seta ein lærara afturat í Miðvági, sum kann røkja Vatnsoyrar eisini.

Sum nevnt vóru bygdarfólkini í Vatnsoyrum rikin av bygdini undir Krígnum, men eftir at kríggið var liðugt í 1945, komu tey so við og við aftur til bygdina. Tað sýnist ikki sum nøkur skipað skúlagongd hevur verið árini 1945 til 1947 smb. skrivunum, sum endurgivin eru omanfyri. Og hetta hevur hildið á heilt til byrjanina av mars 1948. Tá semja at enda er um, at børnini í Vatnsoyrum skulu ganga í skúla í Sørvági.

Vit kunnu soleiðis staðfesta, at skúlagongdin í Vatnsoyrum var frá sumrinum 1923 til summarið 1940.

Í skúla í Sørvági

Grundin til, at foreldrini í Vatnsoyrum valdu at lata børnini fara í skúla í Sørvági heldur enn í Miðvági, var tann, at Dánjal Nielsen í Vatnsoyrum, sum var bátabyggjari, umvældi skip í sonevnda Pierholinum í Sørvági, umframt at hann nýtti kjallaran í Kedron í Sørvági sum verkstað. Hann hevði arbeiðsbil og skuldi hvønn dag til Sørvágs kortini, og tók so skúla-børnini við. Til hús aftur vórðu tey koyrd av Doru, konu Dánjals. So tað var av praktiskum

orsøkum, at Sørvágs skúli var valdur. Hetta hevur sonur teirra, Karl Jóhan Nielsen, greitt frá.

Einar Petersen, sáli, sigur annars í síni bilasøgu fyri Vágar, at Dora Nielsen í Vatnsoyrum var fyrsta kvinnan í Føroyum, ið tók koyrikort. Hon tók koyrikort í 1947.

18. mars 1948 skrivar Amtið, sum svar upp á skriv frá forstandarskapinum 11. mars 1948, at tað hevur tikið undur við skipanini, sum Løgtingið hevur skotið upp, at vatnsoyrabørn fyribils skulu ganga í skúla í Sørvági. Vegna hetta rindar amtsgrunnurin og eisini kommunan 1 kr. hvør um dagin fyri skúlagongdina hjá nevndu børnum í grannabygdini. Peningurin verður goldin foreldrunum.

17. juni 1948 verður skrivað til Skúlastjórnina, Tórshavn, og sama skriv til Willian Nielsen í Vatnsoyrum og send uppgerð yvir skúladagar í Sørvági hjá vatnsoyrabørnum frá mars mánaði 1948. Skúlabørnini eru, Martin Nielsen, sonur William Nielsen og Kirstin Nielsen, dóttir Dánjal Nielsen. Fyri 1948 hevur kommunan rindað foreldrunum 223 kr. í flutningsendurgjaldi og Amtið skuldi rinda somu upphædd. Og svaraði hetta til 2 kr. pr. dag frá kommunu og Amti.

Fram til summarfrítíðina 1949 ganga somu børn í skúla í Sørvági. Frá apríl 1949 ganga afturat, Karl Nielsen, sonur William og Karl Jóhan Nielsen, sonur Dánjal. Hesi 4 ganga so eisini í 1950 og 1951.

Frá 1950 fáa Dánjal og William Nielsen í Vatnsoyrum stuðul fyri flutning av skúlabørnum. Og tað er framvegis 1 kr. frá kommununi og 1 kr. frá statinum. Nágreinilig uppgerð er fyri hvønn skúladag hjá hvørjum barni øll hesi árini, og er tað vegna gjaldið fyri koyringina. Uppgerðina gjørdi D. Danielsen, skúlastjóri í Sørvági.

Í 1952 og 1953 ganga hesi børn úr Vatnoyrum í skúla í Sørvági: Martin Nielsen, Karl Nielsen og Nicolina Nielsen, børn hjá Williami. Og Karl Jóhan Nielsen og Jórun Nielsen, børn hjá Dánjali.

10. juni 1956 skrivar D. Danielsen, skúlastjóri í Sørvági, og sendir við lista yvir skúladagar hjá børnunum í Vatnsoyrum árið 1955. Samstundis spyr hann, um tað ikki hevði verið hóskandi, at hann fekk eina samsýning fyri at skriva hesar listar, tá Vatnsoyrar ikki hoyra undir hansara skúladømi. Støddina á samsyningini letur hann yvir til sóknarstýrið at meta um.

17. august skrivar Skúlastjórnin til Miðvágs kommunu svar upp á skriv 27.06.56, um samsýning til D. Danielsen fyri at gera listar yvir skúlagongd hjá vatnsoyrabørnum í Sørvági. Sagt verður, at Skúlastjórnin sær seg ikki føra fyri at veita samsýning fyri hetta, men tað er einki til hindurs fyri, at kommunan kann lata eina minni samsýning.

Sóknarstýrið í Miðvági tekur málið upp á fundi 24. oktober 1956. Stýrið samdist um at biðja D. Danielsen sjálvan koma við uppskoti um, hvat hann helt vera hóskandi.

Bræv er sent honum við hesi avgerð 26.10.1956, har hann eisini verður biðin um at senda lista yvir skúladagar í Sørvági hjá Vatnsoyrabørnum til 1. oktober í ár.

D. Danielsen svarðar aftur hin 28. desember 1956 og skjýtur upp, at hann fær 100 kr. fyri farnu tíðina og so 50 kr. um árið. Sóknarstýrið samtykti hetta á fundi 4. februar 1957.

Sum skilst, var skipanin tann, at øll vatnsoyrabørnini vórðu koyrd í skúla í senn og heim aftur í senn. Ein trupulleiki sýnist tó at vera, at tey ikki øll høvdu somu tíðir. Um hetta hava vatnsoyrafólk skrivað til kommununa á várið 1957. Málið er fyri á fundi 15. mars 1957. Áheitan úr Vatnsoyrum um, at bilur verður sendur við børnunum og eftir teimum so hvørt,

tey skulu til og frá skúla. Stýrið samdist um at senda áheitanina til Skúlastjórnina til ummælis.

Málið er fyri aftur á fundi, 18. juni 1957. Svar var komið frá Skúlastjórnini, sum avvísti málinum. Samtykt varð, at halda seg til avgerðina hjá Skúlastjórnini, og at koyringin verður sum áður.

Frá 1957 til 1959 fáa William Nielsen, Petur Jacobsen, John Poulsen, Dánial Nielsen og Albin Jacobsen stuðul fyri flutning av skúlabørnum.

Á fundi í sóknarstýrinum 22. november 1958 var á skrá bræv frá skúlanevndini, sum heitti á sóknarstýrið at fyrireika, at vatnsoyrabørn komu at ganga í skúla í Miðvági. Stýrið ásannaði, at sum er, var ikki húsarúm fyri vatnsoyrabørnunum, men at nýggjur felagsskúli var í gerð og at bíða við hesum til hann var liðugur, heldur enn at fara at gera ella útvega fyribils hølir.

Í Vatnsoyrum vóru tá 9 skúlabørn.

Skúlabørnini frá 1957 til 1959 vóru: Jórun Nielsen, Marjun Nielsen, Nicolina Nielsen, Berit Nielsen, Virgar Jacobsen, Majken Jacobsen, Ruth Poulsen, Dánjal Poulsen og Sonja Jacobsen.

Í 1960 eru Martin Jacobsen og Marita Jacobsen, komin afturat.

Í 1961 er Ólavur Poulsen komin afturat.

Sum skilst, hevur skipanin verið tann, at foreldrini fáa útgoldið kvartalsvís ella pr. hálvár 2 kr. pr. skúladag pr. barn, sum tey so rinda teimum, sum koyra børn teirra til og frá skúla. Í 1950 vóru tað Dánjal og William Nielsen, sum koyrdu børnini. Í 1960 verður upplýst, at nú eru tað hesir og John Poulsen, sum skiftast um at koyra. 22. januar 1960 skriva hesir tríggir til kommununa og siga, at eftir samrøðu við kommunustjóran, Hans Martin Thomasen, eru teir komnir ásamt um at teir átaka sær flutningin av skúlabørnunum í Vatnsoyrum til Sørvágs skúla fyri 2 kr. pr. barn pr. dag, sum er almenni stuðulin fyri flutningin og at hetta verður goldið teimum við einum triðingi í part.

Á fundi í sóknarstýrinum 3. februar 1960 er málið til viðgerðar, har fram kemur, at sum er flyta teir børnini við bilum sínum, men fáa ikki pening frá øllum foreldrum barnanna. Teir biðja nú um, at teir fáa peningin beinleiðis útgoldnan frá kommunu og gjaldstovu. Sóknarstýrið varð samt um at ganga hesum á møti, og samstundis at fáa eina líknandi skipan við Gjaldstovuna, at peningurin verður býttur javn millum teirra.

Hetta skal vísa seg ikki at verða so einfalt, sum hildið var. Tí hin 14. juni 1960 skrivar Skúlastjórnin og sigur, at tað eru foreldrini, sum eiga stuðulin, sum goldin verður. Og skal ein slík skipan gerast, sum skotin er upp, so skulu øll foreldrini ganga við til hana og skriva undir váttan, at so er.

17. august 1960 verður skrivað til Skúlastjórnina, og sagt, at øll foreldrini at skúlabørnum í Vatnsoyrum hava váttað útgjald av peningi og verður váttanin send við, uttan ein, sum ikki hevur skrivað undir eina slíka váttan. Í skrivi, 25.08.1960 verður váttað, at peningurin verður fyribils goldin til Dánjal Nielsen, sum so býtur peningin millum teir, sum koyra skúlabørnini. Tann, sum ikki hevði skrivað undir, fekk sín part útgoldnan.

Í november verður tó skrivað til Skúlastjórnina og sagt, at nú hava allir skrivað undir.

Fara í skúla á Giljanesi

Eftir summarfrítíðina í 1961 fóru skúlabørnini í Vatnsoyrum at ganga í skúla á Giljanesi. Har skúlagongdin annars varð byrjað 4. apríl 1961. Men avgjørt varð, at tey endaðu skúlaárið 1960/61 í Sørvági áðrenn tey fóru í skúla á Giljanesi, har tey so byrjaðu til skúlaárið 1961/62.

Nú verður so talan um at koyra skúlabørnini úr Vatnsoyrum til Giljanes í staðin. Á fundi í sóknarstýrinum 10. november 1961 er til viðgerðar skriv frá Dánjal Nielsen, Vatnsoyrum, sum hevur vent sær til Føroya Skúlastjórn um fluttning av skúlabørnunum til felagsskúlan úr Vatnsoyrum. Hann spyr, um kommununan vil gjalda eina samsýning fyri hendan fluttning. Skúlastjórnin hevur við skrivi, dagfest 13. september sama ár, boðað frá, at statskassin og landskassin rinda aftur helvtina av hesum útreiðslum til kommunurnar. Sóknarstýrið varð samt um at lata 2 kr. pr. barn fyri hvønn skúladag.

Málið um flutningin av skúlabørnum úr Vatnsoyrum til skúlan á Giljanesi er aftur fyri á fundi 12. februar 1962. William Nielsen og John Poulsen, Vatnsoyrar, vóru eisini møttir. Sagt verður, at hesi børn hava gingið í skúla í Sørvági fyrr, men aftaná summarfrítíðina 1961 hava børnini verið koyrd úr Vatnsoyrum við bili til og frá skúla á Giljanesi. Skúlastjórnin hevur við skrivi, dagfest 20. nov. 1961, sagt frá, at teir mæla til at fáa eina fasta skipan í lag viðvíkjandi fluttninginum av børnunum hvønn skúladag.

Avgjørt varð at samsýna bileigarunum fyri fluttningin av børnum við 30 kr. pr. skúladag fyri 3 túrar til og frá skúla, men um neyðugt verður at koyra 4 ferðir um dagin, tá verður gjaldið 10 kr. fyri tann túrin eyka, og vórðu báðir partar samdir um hetta.

Tað seinasta, sum sæst nevnt í skjølunum um flutning av skúlabørnum úr Vatnsoyrum er, at Palli Mikkelsen, Sørvági, hevði sent rokning fyri at hava koyrt Dánjal Poulsen, skúlanæming, Vatnsoyrum, frá skúla tíðina 21.9.1963 til 30.4.1964 fyri 3 kr. pr. túr.

Eftir tað er føst skipan gjørd um skúlabarnaflutningin, har tó ikki nakað serstakt er nevnt ella funnið, við tað at fylgiskjøl til roknskapin ikki eru varðveitt eftir hesa tíð. Og einki brævaskifti sæst um málið seinni, so líkt er til, at tað hevur gingið væl, tá so er.

Viðlíkahald av skúlanum 1931 til 1944

Árini 1929 og 1930 varð bygt uppí skúlan í Miðvági, og eldri parturin var rættuliga nógv umbygdur innan.

Vanligt viðlíkahald av skúlanum heldur so fram í 1931. Teir, sum gjørdu umvælingararbeiði hetta árið vóru: Niclas Haraldsen 65 kr., Niclas Hansen 43 kr., Hans Jacob Hansen 28 kr., Sámal Jákup Johansen 26 kr., Jógvan Hansen 25 kr. og Hans Jakku Poulsen 7 kr.

Tilfar varð keypt frá: Maskinverkstaðið 228 kr., Niclas Hansen 27 kr. og smærri upphæddir Jákup K. Joensen, Nyholm Debes, Tórsh., Andreas Joensen og Sámal Ellefsen. Umvælingar í alt 475 kr.

Í 1932 gjørdi Hans Jacob Hansen umvælingar fyri 28 kr. og Sámal Jákup Hansen, Niclas Hansen og Jógvan Joensen fyri smærri upphæddir. Tilfar varð keypt frá Maskinverkstaðnum fyri 139 kr. og Sámal Ellefsen fyri 96. kr. Umvælingar í alt fyri 280 kr.

Á fundi 15. september 1933 var fyri at leggja nýtt bylgjutak á kvistin í skúlanum. Samtykt varð at fáa tað framt. Sámal Ellefsen gjørdi arbeiðið fyri 146 kr. og Maskinverkstaðið lat tilfar fyri 21 kr.

2. juli 1934 verður skrivað til Skúlastjórnina, sum svar upp á bræv frá somu, 25.04.1934, viðvíkjandi manglum við skúlanum í Miðvági. Svara verður: Hvat viðvíkur at nýggj skúlaborð skulu fáast til vega, so eru vit ikki nøgdir við hetta. Fyri nøkrum árum síðan søktu lærararnir um at fáa tey bøtt við at seta nýggj rygglen á. Og hetta varð gjørt, og nú siga lærararnir, at beinkirnir eru, um ikki heilt nýmótans, so væl brúkiligir. So vit duga ikki at síggja, hví teir skulu kasserast. Tað verður alt ov dýrt, um tað ikki er neyðugt. Viðv. spæliplássi við skúlan, so hevur tað verið uppi fyrr. Til skúlan hoyrir allarbesta spæliplássið, sum finnast

kann, og sum er beint niðanfyri, nevniliga sandurin. Og tað kann ikki byggjast nakað betur, um ein so betalir nokkso nógv hartil. Og vit rokna við, at børnini framyvir fara at taka tað frammum nakað annað spælipláss.

Fundur var í forstandarskapinum heima hjá formanninum hin 6. juli 1934. Samtykt varð at seta í stand kvistkamarið á skúlanum og klæða kvistin uttan við bylgjuplátum ella specialplátum.

Hetta sýnist ikki at verða framt, men umvælingar vóru tó gjørdar á skúlan hetta árið fyri 136 kr.

18. februar 1935 skrivar Dagmar Joensen Næs, kona Martin Joensen Næs, lærara, og sigur, at í fjør bleiv tað lovað okkum, at kvisturin skuldi setast í stand, og tað er ikki gjørt enn, tó at vit fleiri ferðir hava verið hjá snikkaranum. Hann svarar bara aftur, at hann kemur fyrsta dagin. Høvdu tygum ikki vilja gjørt so væl, antin at fáa tað so, at kvisturin verður gjørdur nú, ella eisini biðja onkran annan gera tað. Har lekur so illa, at við skriviborð vit fingu í heyst, sum stendur í stovuni niðri undir, flýtur fult av vatni hvønn morgun, tá regn hevur verið um náttina, og harav er plátan blivin hvít. Og so vildi eg eisini spurt um tað ikki var møguligt at vit kundu fingið rekkverk um trappuna upp til hjallin. Sjálv havi eg ikki kunnað komið í hjallin, síðan eg bleiv lamin. Trappan liggur avísað, tá kavi er og einki er at halda sær í. Genturnar her eru dottnar illa har. Vónandi hetta treffur tygum í góðum hýri, vóni eg at hesi tingini verða gjørd við tað fyrsta.

Um hetta hjálpti ella ikki sæst einki til, men Sámal Ellefsen gjørdi umvælingar í skúlanum hetta árið fyri 247 kr. og Maskinverkstaðið lat tilfar fyri 54 kr.

1936 hevði Sámal Ellefsen gjørt umvælingar í skúlanum fyri 265 kr., Niclas Hansen fyri 37 kr. og Maskinverkstaðið latið tilfar fyri 280 kr.

1937 gjørdu Hans Jakku Hansen og Niclas Hansen umvælingar fyri 6 kr. hvør og tilfar varð keypt frá Havnar Timburhandli fyri 80 kr. og frá Maskinverkstaðnum fyri 35 kr.

Sámal Ellefsen gjørdi í 1938 umvælingar fyri 90 kr., og tilfar varð keypt frá Maskinverkstaðnum fyri 32 kr. Anna Nattestad og Elin Ellefsen høvdu gjørt umvælingar fyri 7 kr. hvør, helst tapetisering. Til hetta var tilfar keypt fyri 5 kr.

16. august 1939 var fundur í forstandarskapinum heima hjá formanninum. Komið var skriv frá Skúlastjórnini um at seta steyragirðingina um skúlan í forsvarligan stand. Samtykt varð gera eina girðing afturat, soleiðis, at tað varð eitt stað til gentur og eitt til dreingir.

11. oktober 1939 verður skrivað til Skúlastjórnina um sýn. Tað mesta av arbeiðinum er gjørt, og einum parti verður framvegis arbeitt við. Men vit hava gjørt okkurt útyvir, hvat sýnið krevur. Vit hava latið bylgjutakið mynja, tí tað hildu vit vera neyðugt. Ovnarnar er framvegis einki gjørt við, men vit hava samtykt at keypa ein ovn til ta eystaru skúlastovuna, men hava framvegis ikki pening nokk til tað. Men tað verður væntandi innan nýggjár.

Skrivað verður aftur til Skúlastjórnina 30. november 1939 sum svar upp á skriv 7 h.m. um toilettviðurskiftini við skúlan. Sigast skal, at vit hava ætlað at byggja eitt nýtt nátthús við 2 rúmum, men vegna at kostnaðurin á tilfar er hækkaður so nógv, fara vit at síggja tíðina ann. Og fara at umvæla tað gamla, soleiðis, at tað kann brúkast. Tosað hevur eisini verið um at seta w.c. í, men vatnviðurskiftini eru so vánalig, at tað ikki so væl letur seg gera, fyrr enn tað er fingið í betri stand.

Hetta árið eru annars ikki nógvir pengar nýttir til viðlíkahald, bert 6 kr., har Stoffa Hansen, bátasmiður, og Niklas Hansen, høvdu arbeitt fyri ávikavist 4 kr. og 2 kr.

Í 1940 var tó endurbøtt, tí tá vórðu nýttar 1.150 kr. til umvælingar av skúlanum. Teir, sum arbeiddu vóru, Hans V. Hansen 107 kr., Meinhard Hansen 70 kr., Niklas Haraldsen 35 kr., Kristin Jacobsen 25 kr. og so Heini Haraldsen, Sámal Ellefsen og Sigmund Frederiksen, uml. 14 kr. hvør. Hampuliga nógv tilfar varð keypt. Havnar Timburhandil 402 kr., Balslev & Co.

108 kr., Valdemar Lützen 143 kr. og J.E. Thomsen, Sandavági, 104 kr. Umframt Maskinverkstaðið og J.K. Joensen um 30 kr. hvør og onnur minni. Og Hansias Hansen hevði koyrt fyri 7 kr.

Júst hvat var gjørt er ikki nevnt, nýtt nátthús er møguliga eitt av tingunum. Í gerðabókini hjá heilsunevndini fyri fund 1. desember 1940 er nevnt, at kommunan fær loyvi til at byggja eitt nátthús inni við ánna innanfyri skúlan. Treyt er, at tað verður gjørdur ein vatnbrunnur ovari við ánna at hava til at taka at reingera nátthúsið, tá lítið vatn er. Húsið er helst gjørt í desember ella januar árið eftir.

Í 1941 eru umvælingar gjørdar uttan fyri 243 kr. Teir, sum arbeiddu mest vóru, Martin Johansen, 76 kr., Niklas Hansen, 39 kr. og Hans Jakku Hansen, 33 kr. Annars arbeiddu, Niklas S. Haraldsen, Paulus Johansen, David Hansen, Hans V. Hansen, Sigmund Frederiksen, Kjartan Hansen, Albert Hansen, Harald Rasmusen og Jógvan Haraldsen fyri í miðal 10 kr. hvør.

Umvælingar vóru eisini gjørdar innan og tær gjørdu Maskinverkstaðið, 492 kr. og Jákup K. Joensen, jarnsmiður, 62 kr. Ella umvælingar fyri tilsamans 797 kr. í 1941.

Í 1942 brúkti kommunan 533 kr. til viðlíkahald, í 1943, 706 kr., harav Sámal Ellefsen arbeiddi fyri 473 kr. og 1944, 524 kr., harav Albert Hansen arbeiddi fyri 328 kr. Nógv annað gekk aftur frá árunum undan, tilfar keypt frá Havnar Timburhandli og øðrum og arbeiði gjørt av Maskinverkstaðnum í Miðvági.

Í mai 1944 skrivar Amtið og minnir á manglar viðv. umvæling av skúlanum í Miðvági. Mint verður á góðskuna av skúlatilfarinum, um spælipláss, vask og w.c. Svarað verður 14. juli 1944, og er svarið stórt sæð tað sama, sum svarað varð áður um sama mál. Viðvíkjandi skúlatilfari verður viðløgd frágreiðing frá læraranum. Til spælipláss verður sandurin brúktur. Vegna tað at bert ein privat vatnleiðing er, sum er til læraraíbúðina, og at hon er sera vánalig, so hava vit ikki kunnað brúkt hana. Ætlan er at fara undir kommunala vatnleiðing til alla bygdina, og tá verður vask sett upp í skúlanum og vatn lagt inn.

Svimjing og svimjihylur

Hvussu tað var við svimjing í gomlum døgum kann bara sigast, at tað hevur helst verið rættuliga tilvildarligt. Sum ein skilir, vóru tað fá, sum dugdu at svimja, men summi dugdu. Vit hoyra m.a. ofta um sjóvanlukkur í eldri tíð, at fleiri dugdu ikki at svimja, men so var tað onkur ímillum, ið var góður svimjari, og sum kanska bjargaði einum ella fleiri. Tá hevur so bara verið svomið í natúrliga djúpum hylum og á sjónum. Í Miðvági skilir ein út frá skrivunum, at Lambá var vanliga brúkt hjá børnunum at svimja í. Hon var ikki matará.

Í 1900 árunum sær tað út til at hava verið betri við svimjingini. Mynd er m.a. úr Miðvági frá seinnu helvt av tjúgunum, har einir 20 ungir mans standa í tátíðar svimjibúnum umborð á einum deksbáti, ið liggur á vánni. Møguliga er tað eitt svimjifelag; eitt slíkt var t.d. í Sørvági í hesi tíð.

At tað stóð hampuliga til við svimjingini hjá ungum monnum gevur eitt skriv frá Amtinum dagfest 16. november 1920, møguliga boð um. Í skrivinum verður spurt, um forstandarskapið ynskti, at genturnar, sum ganga í skúla, skulu læra at svimja, tá hugsað varð um at fáa eina lærarinnu úr Danmark at undirvísa í svimjing. Spurt varð, um hvussu nógv forstandarskapið vildi gjalda fyri eina slíka undirvísing. Málið var fyri á fundi 1. desember 1920. Samtykt varð at svara, at tá eingin svimjihylur ella lærarinna er her, heldur man ikki, at man kann taka við einum slíkum tilboð.

Svarið var sent í skrivi dagin eftir.

Kundi verið líkt til, at eitt svimjifelag hevur verið í Miðvági seinnu helvt av tjúgunum, har henda myndin er frá.

Á fundi í forstandarskapinum 22. juni 1922 hildin á skrivstovuni hjá H.N. Niclasen, var fyri innkomin umsókn frá fleiri ungum monnum í Miðvági um at fáa fáa ókeypis tað neyðuga sementið, sum krevst til at byggja ein svimjihyl, umframt at kommunan lønir einum formanni at standa fyri arbeiðinum.

Samtykt varð at biðja umsøkjararnar upplýsa, hvussu stórur hylurin skuldi vera og hvar ein hevði hugsað sær, at hann skuldi liggja, umframt hvussu nógv sement, mann hevur hugsað sær, verður neyðugt fyri at gera hylin.

Skriv varð sent við líknandi orðaljóði 24. juni 1922 "Til flere unge Mænd i Midvaag".

Tað sæst so ikki meira til hetta málið á hesum sinni. Helst er grundin, at hvørki kommunan ella hesir ungu menn hava átt nakað øki at gera svimjihyl á. Og um til bar at ognartaka til svimjihyl, tá tað ikki var fak í skúlanum, var helst eisini ivasamt.

30. juni 1933 skriva Martin Joensen og Jóan Hendrik Samuelsen, lærarar, Jákup Joensen, Jógvan Elias Ellefsen og Meinhard Hansen til kommunua (á føroyskum): "Undirskrivaðu loyva okkum hervið at senda bønarbrævv til tað háttvirda kommunustýri um at veita okkum hjálp við at fáa í lag ein svimjihyl í Miðvági. Vit hava sent biddarabrævlista runt bygdina og fingið saman 85 krónur. Avskrift av listanum fylgir við. Vit hava tað álit á tykkum, at tit vilja og útvega okkum grundstykki ókeypis og eisini veita okkum peningahjálp møguliga við umsókn til løgtingið. Við hávirðing."

Við liggur ein listi, teir hava gingið við um bygdina at savna inn pening og undirskriftir:

"Undirskrivaðu loyva okkum hervið at biðja eina lítla gávu til ein svimjingarhyl í Miðvági. Vit taka við tøkk ímóti hvørjari nokk so lítlari gávu frá 25 oyrum og uppeftir. Men vit biðja um at fáa peningin í hondina, tí hann skal brúkast alt í einum. Hylurin er ætlaður at vera felagshylur fyri bygdina. Miðvág t. 7-12-1932. Við hávirðing. Martin Joensen, J.H. Samuelsen, Jacob Joensen, Joen Elias Ellefsen, Meinhard Hansen."

Á listanum standa 50 nøvn og peningaupphæddir, fólk hava bundið seg til. Upphæddirnar eru frá 5 kr. niður til 25 oyru, teir flestu tó nakrar krónur hvør: Joen H. Samuelsen, Alfred Jørgensen, Jacob Joensen, Richard Jørgensen, Joen E. Ellefsen, Niclas Jørgensen, Meinhard Hansen, Martin Joensen, Sverri Nattestad, Jacob P. Hansen, Hans M. Hansen, E. Mathiassen, Poul Johannesen, Emil Olsen, Georg Hansen, Elias Poulsen, J.N. Niclasen, Joen Pauli Haraldsen, Joen Jac. Thomasen, Gudmund Heinesen, Torstein Niclasen, H.M. Thomasen, Hans P. Johannesen, Hansias Hansen, Kristoffur Svabo, Sørin Danielsen, N. Hansen, Bernhard, Hans J. Hansen, Jógvan P. Joensen, Hans Ellefsen, Joannis Rasmussen, E. Poulsen,

Heine Niclasen, Anton Haraldsen, Eivind Rasmussen, Haldur Rasmussen, D.P. Niclasen, K.A. Nattestad, P.J. Haraldsen, Hans A. Joensen, Hans Arne Ellefsen, M. Poulsen, Gotfred Joensen, Hjalgrim Tormansbakka, Samuel Joensen, Hans Jørgensen, Johan Joensen, Joen Pauli Jørgensen og Sundal Ellefsen.

Skrivið er til viðgerðar í forstandarskapinum og hin 14. juli 1933 verður skrivað til løgtingið: "Umsókn. Forstandarskapið loyvir sær hervið at søkja um stuðul til ein svimjihyl fyri bygdina Miðvágur. Hylurin ætlast lagdur í Lambá, sum er eitt lætt atkomuligt stað í bygdini. Privat hevur verið samlað nakað inn í bygdini til endamálið. Higartil eru innkomnar 85 kr. og vænta vit at fáa eina líknandi upphædd, tá fiskimenninir koma heim. Um vit so fáa stuðul frá Løgtinginum, vóna vit, at tað ikki verður so nógv at gjalda hjá kommununi, sum er illa stilla frammanundan, so at vit ikki kunnu átaka okkum alt ov stórar útreiðslur. Hylurin væntast at kosta um 500 kr. Harafturat kemur so alt arbeiði, sum vit vænta at fáa tað mesta gjørt sjálvboðið. Men har má verða ein løntur formaður."

27. juli 1933 skriva Martin Joensen, Jákup Joensen, Jógvan Elias Ellefsen, Meinhard Hansen og Jóan Hendrik Samuelsen til kommunua (hesaferð á donskum) og uppgeva støddir o.a. til ætlaða svimjihylin. Svimjihylurin skal vera í Lambá og støddin er ætlað 35 x 12 x 2½ m. Betongveggur skal stoypast 2 ½ m. høgur við slúsuportri í neðra og av hóskandi tjúgd á endanum fyri at klára vatntrýstið. Á aðrari síðuna má gerast ein betongveggur nakað tynnri í allari longdini av hylinum fyri at verja bøin uttanfyri. Á hinari síðuni má gravast og spreingjast nakað. Vit hava samlað 85 kr. her í bygdini, men vænta at fáa 150 kr. Graving av sandi, at høgga og fáa til vega skerv og flutningur til staðið, umframt annað arbeiði og formar til stoypingina ætla vit at fáa til vega ókeypis. Hinvegin mugu vit hava ein betaltan formann, sum altíð kann vera á staðnum og hava eftirlit við arbeiðinum. Somuleiðis mugu vit rinda fyri koyring av sandi og sementi. Sementið verður tað dýrasta. Vit vænta samlaða kostnaðin til einar 500 kr.

Onkur klaga kom inn um hylin. 17. august 1933 verður skrivað til Helenu Poulsen, Miðvági. Forstandarskapið hevur viðgjørt tygara klagu um at loyvi verður givið at gera ein svimjihyl í Lambá. Vit loyva okkum at siga, at nevnda á ongantíð hevur verið egnað til drekkivatn, við tað at tað altíð hevur verið svimjihylur í henni. Og neytini verða rikin um ánna bæði morgun og kvøld, so tað kann ikki vera talan um, at áin kann haldast so rein, at tað vildi verið forsvarligt at brúk hana at tikið drekkivatn úr.

Helst er byrjað at gera svimjihylin fyrru helvt í 1934. Í roknskapinum hjá kommununi sæst, at goldnar eru 50 kr. til J.E. Johansen til formansløn. Og at goldnar eru 14,18 kr. til Lars Joensen fyri grundstykki til hylin og rundanum.

31. juli 1934 verður skrivað til Løgtingið. Vegna at vit ikki vórðu lidnir við svimjihylin, sum vit í tingsetuni 1933 fingu 100 kr. í stuðli til, loyva vit okkum at biðja um, at stuðul verður veittur næsta ár eisini við møguliga at gjalda helvtina fyrst, við tað at vit hava keypt um helvtina av tilfarinum.

Meira sæst so ikki til svimjihylin í skjølunum hjá kommununi so kommunan hevur neyvan rindað meira enn nevnda á hesum sinni. Sjálvt um tað bleiv til meira seinni. So arbeiðið er í høvðusheitum gjørt sjálvboðið og tilfarið keypt við peningastuðlinum hjá teimum lokalu og løgtinginum.

Hús til svimjihylin

17. februar 1937 skrivar Amtið viðv. umsókn frá forstandarskapinum um ein svimjihyl. Smb. viðtøku hjá Løgtinginum í 1933 verður biðið um at fáa sendan inn roknskap fyri útreiðslur fyri tilfar yvir 100 kr.

Sum skilst var svimjihylurin longu bygdur, so hetta snýr seg um eitt ætlað umklæðingarhús til svimjihylin.

Uppslag varð sett upp har biðið varð um tilboð at gera eitt hús til svimjihylin. Inn komu trý tilboð. Tilboðini vóru til viðgerðar á forstandarskapsfundi 22. mai 1937, og vóru tey frá Sigmund Frederiksen, 345 kr., Kristin Jacobsen, 325 kr. og Niclas Hansen, 260 kr. Hvar eftir Sørin Danielsen bjóðaði sær at gera húsið fyri 200 kr., sum varð góðkent av forstandarskapinum.

Í roknskapinum fyri 1937 sæst kostnaðurin av húsinum til svimjihylin og hvør arbeiddi har við løn frá kommununi. Jógvan J.A. Joensen, bóndi, fekk 9 kr. fyri grundstykkið til húsið og goldnar vóru Sørin Danielsen 200 kr. smb. tilboð fyri at gera húsið.

Annars vóru aðrir, sum hava gjørt okkurt arbeiði, møguliga við sjálvum hylinum, ella latið tilfar til húsið: Andrias S. Johansen, 40 kr., Heini Heinesen, 36 kr. og Kristoffur Svabo, 24 kr. Umframt smærri upphæddir til S.J. Thomasen, Sámal Ellefsen, Jógvan Erland Joensen og Niklas Haraldsen. Í alt hevði kommunan rindað 340 kr. fyri hús og svimjihyl hetta árið.

Viðlíkahald av svimjihylinum

Annars sæst ymiskt til svimjihylin komandi árini, tí kommunan hevði fasta konto á roknskapinum fyri svimjihylin í nøkur ár fram. Arbeiðið framt er, er umvæling, hampað um økið og møguliga máling ella kálking av garði og húsi.

1938. Maskinverkstaðið, 37 kr. Hans C. Jensen, 7,50 kr. Hans Poulsen, 7,50 kr. Í alt 52 kr.

1939. Lars C. Joensen, 9 kr., Johannes N. Danielsen, 9 kr., Albert Hansen, 9 kr., Ísak Johansen, 8 kr. og Richard á Ryggi, 6 kr. Í alt 41 kr.

1940. Andreas Johansen, 8 kr.

1944. Sigurd J. Hansen, 19 kr. Sofus Poulsen, Gregorius Poulsen, og Kristin Poulsen, 8 kr. hvør. Í alt 43 kr.

1946. Hans V. Hansen, 25 kr. Albert Hansen, 25 kr. Torvald Olsen, 8 kr. Í alt 58 kr.

So sæst ikki nakað til svimjihylin í roknskapinum í fleiri ár, og viðlíkahaldið er møguliga forsømt. Í 1958 er so nakað aftur brúkt.

1958. Balslev & Co., tilfar, 90 kr. Harald Eirkstein, arbeiði, 160 kr.

Hetta er so seinasta árið beinleiðis konto er fyri svimjihylin, so tað gjørt er seinni er helst farið undir vanligt viðlíkhald hjá kommununi.

Svimjiroyndir

27. oktober 1943 skrivar Skúlastjórnin og sendir umfarsskriv um, at fyri at fremja áhugan fyri svimjing hevur Skúlastjórnin góðkent, at tað verða hildnar svimjiroyndir, og at prógv verður latið til tey, sum standa royndina. Ítróttarráðgevin, Pól Petersen, skal standa fyri royndunum og lata prógvini smb. reglugerð um sama.

18. mai 1946 skrivar ítróttarráðgevin, Pól Petersen, og sigur, at vegna tað at bókin "Svimjing" er við at vera útseld og ikki verður prentað aftur, sendir hann í pakka 12 eintøk av bókini til skúlan í Miðvági, við tað at bókin er ógvuliga hent í skúlanum til leiðbeining hjá skúlabørnunum. Hann biður senda 24 kr. fyri bøkurnar, so skjótt tað ber til.

Keyp av lendi til svimjihylin

Í fýratiárunum er nakað av lendi keypt afturat rundan um svimjihylin í Miðvági. Í 1941 vóru smb. roknskapinum keyptir 70 m^2 av jørð til svimjihylin frá Olivar á Ryggi fyri 50 kr. Hetta er fyri at víðka um lendið kommunan eigur um svimjihylin.

17. september 1947 verður skrivað til Føroya skiftirætt og søkt um loyvi at keypa eitt stykki av ognini hjá Lars Chr. Joensen, sum fyri tíðina er undir almennum skifti.

- Lars Joensen átti eitt stykki, sum lá beint uppat stykkinum, kommunan hevði keypt til svimjihyl, og var tað neyðugt, at kommunan átti økið kring svimjihylin. Tað var eisini frá Lars Joensen, kommunan hevði keypt stykkið til svimjihylin, sum nevnt er frammanfyri.

Líka síðan svimjihylurin varð bygdur ,hava vit havt avtalu við Lars Joensen soleiðis, at hann afturfyri fekk grasrætt á Steinsmørk, sum kommunan eigur við skúlan. Men hetta var bert fyribils. Nevnda stykki hoyrir ikki til nakra serstaka jørð og er ikki matrikulerað. Tað er allarhelst bert ognað við at seta eitt stik rundan um tað, sum so nógv annað her í bygdini. Vit halda tí at tað kann seljast uttan at ávirka aðra jørð hann eigur. Stykkið er 65 m^2 og bjóða vit okkum at keypa tað fyri 65 kr. 1 kr. pr. m^2. Tað vildi verið gott, um vit fingu at vita, um vit kunnu keypa tað undirhonds ella vit mugu bjóða upp á tað við uppboð.

Hetta gekk so, tí smb. roknskapinum sama ár hevur kommunan rinda 65 kr. til deyðsbúgvið eftir Lars Chr. Joensen, Miðvági. Í fylgiskjali 125, sum er til henda post og sum er varðveitt, stendur:

"Færøernes Skifteret, Thorshavn den 9. Oktober 1947. Det meddeles herved, at det paa en i Dødsboet efter ugift Lars Christoffer Joensen af Midvaag, død 14. Maj 1947, i Dag afholdt Skiftesamling er vedtaget at overdrage til Kommunen det Boet tilhørende Jordstykke, der grænser op til Kommunens Svømmebassin, for 65 kr."

Á sóknarstýrisfundi 9. apríl 1956 er á skrá, at Jógvan á Ryggi bað um at fáa hegn um svimjihylin. Stýrið varð samt um at lata hegn seta upp eystanfyri hylin.

Sambært journalini skrivar skúlanevndin í Miðvági kommununi bræv hin 30. mai 1958 um svimjihylin. Hvat stóð í brævinum er ikki upplýst og tað er ikki varðveitt. Tað er tó helst hetta bræv, sum fær kommunustýrið at biðja Harald Eirkstein um at umvæla svimjihylin hetta árið, sum nevnt er frammanfyri, og sum við tilfari og løn kostaði 250 kr.

Tað sæst annars einki um svimjihylin gjøgnum øll sekstiárini, tó at hann helst hevur verið í brúki. Móti endanum av hesi tíð er hann tó helst farin í órøkt, tí á sóknarstýrsfundi 3. juni 1971 var til viðgerðar, at 21 skúlanæmingar høvdu við skrivi vent sær til sóknarstýrið um at fáa ábøtur gjørdar á gamla svimjihylin í Lambá, soleiðis at hann kundi nýtast. Sóknarstýrið samtykti at gera tær neyðugu ábøtur soleiðis, at hylurin kundi nýtast.

Tann gyring, sum var sett upp áður, er helst farin tá, tí hin 8. august 1971 skriva Ingibjørg á Ryggi, Arna á Ryggi, Johannes N. Johannesen og Hentza Hansen og mótmæla, at opni svimjihylurin verður tikin í brúk, áðrenn girðing er sett um hylin. Børnini ganga um allan bøin at skifta klæðir og traðka grasið niður. Um økið ikki verður innihegnað, krevja tey endurgjald.

Skrivið sýnir eisini, at umklæðingarhúsið, sum á sinni var gjørt við hylin, ikki er brúkiligt.

Her hevur Dánjal A. Hansen, f.v. bygdaráðslimur í Miðvágs kommunu, fylt vatn í gamla svimjihylin í Miðvági og er farin at svimja. Mynd frá 2013.
Mynd: D.A. Hansen, lænt av FB.

Einki er hent við málinum og á fundi 6. juni 1972 er til viðgerðar áheitan frá Hans Jacob Olsen, sum hevði verið á kommunuskrivstovuni við áheitan um at fáa gamla svimjihyl innihegnaðan vegna vanda hjá smábørnum. Samtykt varð at fáa loyvi frá eigarunum av økinum til at innihegna hylin.

Ætlan um ítróttar- og svimjihøll

Á felagsfundi 24. mars 1972 var frammi áheitan frá Sigurd Petersen, skúlstjóra, um at fáa gjørt eina ítróttar- og svimjihøll, og verður heitt á sóknarstýrini um at seta eina nevnd at arbeiða við málinum nú beinanvegin. Hann legði afturat, at tað óivað hevði borið til at bygt núverandi fimleikarhøll á Giljanesi eitt sindur um til svimjihøll og so havt fimleikin í tí ætlaðu ítróttarhøllini, sum hevði gjørt alt munandi bíligari. Sóknarstýrini vóru í prinsippinum samd um, at bygd verður møguliga ítróttar- og svimjihøll á Giljanesi í samband við skúlan og á skúlaøkinum. Samtykt varð at seta eina nevnd at arbeiða við málinum á næsta fundi.

Tekning finnist eisini av hesi ætlan, sum í stuttum kann sigast varð ikki framd kortini. Ítróttarhøllin var gjørd eftir hondini, sjálvt um langur stíður kom í vegna ósemju av ymsum slag í sjeytiárunum, m.a. at ítróttarhøllin varð tengd saman við brimgarðinum, sum umrøtt er nærri í partinum um Miðvágs-Sandavágs havn.

Svimja í Sørvági

Um hesa tíð fyrst í sjeytiárunum eru sørvingar farnir undir at byggja innandura svimjihyl við Sørvágs skúla. Hetta er møguliga eisini ein av grundunum til, at eingin svimjihylur verður gjørdur kortini í Miðvági ella Sandavági. Svimjihøllin í Sørvági varð tikin í brúk í 1974.

22. juli 1975 var felagsfundur. Skriv var komið frá skúlanevndini, har mælt varð til at fingin var í lag svimjifrálæring í samráð við svimjihøllina í Sørvági. Hetta verður viðmælt fyri 5., 6. og 7. flokk, treytað av at Skúlastjórnin gevur loyvi.

13. august 1975 skrivar Skúlastjórnin, í smb. við umsókn frá lærararáðnum á Giljanesi 24.9.74, at játtað verður at svimjiundirvísing verður framd fyri 5. til 7. flokk skúlaárið 1975/76 í Sørvágs skúla. Upplýst verður, at vanligur stuðul til koyring verður latin fyri eyka koyring í hesum sambandi.

Uppgerð frá Sørvágs kommunu er yvir svimjing hjá børnum í Giljanes skúla í svimjihylinum í Sørvágs skúla í skúlaárinum 1975/76, 214 tímar, kostnaður 10.700 kr. 1976/77, 240 tímar, fyri 12.000 kr. Hetta var so fyri fyrstu tíðina.

Samstarvið á hesum økinum hevur verið til dagin í dag.

Ætlan um innandura svimjihyl í Miðvági

Farið varð undir at byggja bygdarhúsið í Miðvági í 1978 og varð niðasta hædd innilokað í 1981. Í bygdarhúsinum stendur eitt stórt rúm tann dag í dag, sum verður kallað "svimjihylurin". Tað løgna er bara, at har er eingin svimjihylur.

Høvuðstrupulleikin við at svimjihylurin ikki varð gjørdur liðugur var óivað fíggingin, at tað er rímuliga dýrt at gera og reka ein almennan innandura svimjihyl við øllum teim krøvum av ymsum slag, ið við fylgja.

Í 1983 keypir Miðvágs kommuna ovaru hædd á bygdarshúsinum ætlað til bygdarskúla. Henda bygging og umbygging byrjaði í 1984 og varð bygdarskúlin vígdur og tikin í brúk hin 21. september 1985.

Á bygdaráðsfundi, 29. januar 1986, er málið um svimjihylin í bygdarhúsinum til viðgerðar. Í gerðabókini fyri fundin stendur, at síðst í november 1985 bað bygdarhúsnevndin um fund við bygdarráðið. Hesin fundur varð hildin 30. november sama ár á bygdarráðsskrivstovuni. Bygdarhúsnevndin upplýsti fyri bygdarráðnum, at teir høvdu fingið tilsøgn um lán fra

“Nykredit” stórt kr. 8,4 mió. kr. til ca. 11% rentu. Avdráttartíðin var 30 ár, treytað av at kommunan veðhelt ímóti at fáa 1. prioritet i húsunum. Teir síggja hettar sum einasta útveg at fáa fullført hesa bygging. Eisini nevndu teir, at ein annar møguleiki var, at kommunan yvirtók svimjihylin, og sjálv stóð fyri liðugtgerð og fígging av hesum. Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hetta mál, og mælti til, at kommunan átók sær at gera svimjihylin lidnan, treytað av, at bygdarhúsið skeytar kommununi hendan partin av húsinum og økið eystanfyri byggningin.

Samtykt varð í prinsippinum at fylgja tilmælinum frá F.N.

Fundur er aftur um málið, 5. mars 1986. Bygdarhúsnevndin hevur sent uppskot um avtalu millum bygdarhúsið og kommununa, har biðið verður um, at kommunan veðheldur fyri figging til liðugtgerð av bygdarhúsinum við fylgjandi treytum:

1. Svimjihøllin og økið eystanfyri hana verða frábytt restini av bygdarhúsinum og skeytað Miðvágs kommunu, og bygdarráðið veðheldur fyri fígging til liðugtgering av Bygdarhúsinum.

2. Kommunan bindir seg til at fara undir at gera svimjihøllina, áðrenn skeiðið hjá sitandi bygdarráð er útið.

3. Bygdarráðið setir húsavør til heilsumiðstøðina og bygdarskúlan. Hesin skal eisini verða húsavørur hjá bygdarhúsinum, um bygdarhúsnevndin ynskir tað. F.N. leggur málið fyri bygdarráðið.

Bygdarráðsformaðurin mælti frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot. Samtykt varð so at leggja tvey uppskot fyri bygdarhúsnevndina. Uppskotini vóru viðløgd í málinum. Hvørji tey vóru, sæst ikki upplýst, men tað stutta av tí er, at meira hendi ikki við hesum. Og seinni hevur hølið verið nýtt til ymiskt. M.a. goymsluhøli og seinni í tíðini høli hjá bogaskjótarum og so seinni aftur sum goymsla.

Í 1988 hevði Sandavágs kommuna ætlanir um at byggja bygdarskúla við skúlastovum til 1. til 7. flokk við m.a. svimjihyli eisini. Mikkjal Olsen, arkitektur, hevði teknað. Men hetta var fyrst minkað til 5 skúlastovur við ongum svimjihyli og síðan slept.

Miðvágs kommuna keypir “svimjihylin” í bygdarhúsinum

Á almennum bygdaráðsfundi 3. februar 2004 er á skrá, at Harald Johansen, vegna móður sína, Henny Johansen, sum nú er eigari av bygdarhúsinum, t.v.s. niðaru hædd og sonevnda svimjihylinum, ið er stórt rúm fyri seg sjálvan. Tey bjóða kommununi at keypa svimjihylin fyri 500.000 kr. F.N. mælir til, at borgarstjórin tosar við Harald um møguleikan at lækka prísin.

Málið er fyri aftur á fundi 2. mars 2004. Henny Johansen vil nú selja kommununi svimjihylin á matr. nr. 233av fyri 450.000 kr. T.N. mælir til at keypa. F.N. leggur málið fyri bygdaráðið til støðutakan. Samtykt var at keypa.

Í roknskapinum hjá kommununi sæst, at keypið av svimjihylinum kostaði kommununi 477.700 kr. í alt hetta árið.

Á almennum bygdaráðsfundi 26. apríl 2005 er til viðgerðar, at MB og Miðvágs Róðrarfelag vilja læna hølið til svimjihylin til tiltøk á Vestanstevnu. T.N. mælir frá at gera nakað við svimjihylin so leingi eingin endalig ætlan er. Mælt var ístaðin til at vísa til onnur hølir hjá kommununi. Og lagt verður afturat: “Svimjihylin verður einki gjørt við enn.”

Á fundi sama ár varð tó samtykt at skifta takið á bygninginum til svimjihylin. Hetta verður í 2006 víðkað til at skifta takið á øllum bygdarhúsinum og svimjihylinum. Tað varð so Bjarni Prior, sum vann útboðið at gera arbeiðið. Sambært roknskapinum í 2006 var kostnaðurin av hesum 186.000 kr.

Tað seinasta, sum sæst til henda ætlaða svimjihyl í skjølunum hjá Miðvágs kommunu, er, at í 2007 vóru 6.000 kr. brúktar til hetta hølið.

Miðskúli í Vágum

Undir krígnum er fyri fyrstu ferð veruligar tingingar um at fáa sonevndan miðskúla í Vágum: preliminer, real ella 8. til 10. flokk, sum tað broytti seg til við tíðini.

At fyrireika ein felags miðskúla í Vágum var á skrá á felagsfundi 28. februar 1943. Avgjørt var, at seta eina nevnd við 4 limum, ein úr hvørjum kommunustýri í Vágum, Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø. Fyri Miðvág var valdur Sørin Danielsen, hvør umboðaði hinar bygdirnar er ikki nevnt. At umboða allar kommunurnar var Kristian Larsen sýslumaður valdur.

Hetta seinasta er so longu broytt á felagsfundi 7. juni 1943. Helst hevur sýslumaðurin borið seg undan, og nú verður so samtykt, at velja Sørin Danielsen, sóknarstýrisformann í Miðvági, í staðin.

13. februar 1944 verður á felagsfundi sagt um málið, at uppskot til ein skúla var komið frá Pól Petersen, ítróttarráðgeva. Kommunurnar lótu málið yvir til nevndina at arbeiða við.

Kommunurnar í Vágum senda so felags skriv um hægri skúla í Vágum til Føroya Løgting hin 16. september 1944. Greitt verður frá málinum higartil, og at avgerð er tikin um at arbeiða víðari við málinum og útvega allar neyðugar upplýsingar. Nevndin, sum sett er at arbeiða við málinum, hevur spurt seg til ráðs hjá Pól Petersen, ítóttarráðgeva, sum hevur vent sær til Tummas Nygaard, studentaskúlastjóra. Seinni fingu vit so tekning av bygninginum, kostnaðarætlan og uppskot um býti av kostnaði millum kommunurnar og millum kommunurnar og statin. Heitt varð á nevndina um at arbeiða víðari við málinum. Nevnda ætlan varð løgd fram á felagsfundi millum kommurnar í Vágum 13. februar 1944, har hildið var, at ætlanin var í so stórsligin og var ivasamt, um kommunurnar orkaðu hana. Síðan kom tilboð um at yvirtaka bretska sjúkrahúsið, og tað steðgaði so hesi ætlan fyribils.

Næsta sum sæst til málið, er frá felagsfundi 18. februar 1945. Hetta var um at hava miðskúla í bretska sjúkrahúsinum í Sandavági. Skotið varð upp at velja ein úr Sandavágs kommunu at tingast við eigararnar og at lata yvir til sóknarstýrið í Sandavági at velja viðkomandi.

Uppskot og tekning varð fingin til vega um, hvussu sjúkrahúsið kundi byggjast um til miðskúla og eisini til studentaskúla. Sjúkrahúsið var fyrrverandi losjan í Sandavági, ein rímuliga stórur bygningur, sum bretar høvdu tikið og umbygt til sjúkrahús.

Málið gjørdist tó sera fløkt, tí í veruleikanum var størri áhugi í Vágum at varðveita bretska sjúkrahúsið sum sjúkrahús fyri Vágar, enn at hava hægri skúla har. Harumframt legði eigarin av bygninginum, J.J. Simonsen, Sandavági, sak móti kommununum við endurgjaldskravi fyri ta umbygging av húsunum, sum bretar høvdu framt. Grundgevingin var, at kommunurnar høvdu átikið sær at veita endurgjald fyri grundøkir, sum bretar tóku til ymiskt, teir gjørdu. Alt hetta gjørdi, at málið viðv. hægri skúla í sjúkrahúsinum í Sandavági dróg út. Hartil var eisini illvilji frá hægru skúlamyndugleikunum at leggja hægri skúlar út á bygd. Upp í málið kemur so eisini eitt triðja uppskot um at nýta bygningin í Sandavági til føðistovu, sjúkrastovur og ellisheim. So nú vóru nógvir møguleikar at nýta húsið til.

At málið um ein hægri skúla fyri alla oynna er komið í drag og einki hendir, sýnir eisini eitt skriv frá 24. juni 1947, har Miðvágs og Sandavágs kommunur einsamallar skriva til Skúlastjórnina í Tórshavn og siga, at sóknarstýrini í Miðvági og Sandavági eru samd um at søkja um at fáa ein felags skúla fyri báðar bygdirnar. Skúlin skal vera fyri teir hægru flokkarnar, og er ynski um at fáa hægri skúlagongd enn tann núverandi, sum bert er 7 ár. Lægru skúlaflokkarnir skulu tó vera í teimum gomlu skúlunum. Higartil hevur vilji ikki verið fyri at leggja hægri skúlar út á bygd, men um hugsanin er broytt í somáta, so vilja vit fegin hava hetta gjøgnumført. Vegna at tilfar er sera dýrt, so síggja vit ikki fyri okkum, at ein nýggjur skúli verður bygdur í bræði, men at tað kundi verið loyst á annan hátt.

Hetta vinnur heldur ikki frama, og í 1950 verður málið um felags miðskúla fyri alla oynna tikið upp aftur.

3. mars 1950 skriva skúlanevndirnar í Vágum og biðja stýrið møta til fundar 18. mars 1950 í Sørvági til samráðingar um at byggja ein felags skúla fyri allar tríggjar bygdirnar.

Samtykt verður á fundi sóknarstýrinum 13. mars 1950 at játta at møta til fundin.

Í juni 1951 skriva Jákup í Jákupsstovu, Sørvági, Sigmund Frederiksen, Miðvági og Petur Heinesen, Sandavági, og siga, at teir sum skúlanevndarformenn í 1950, vóru bidnir um at koma við einum tilmæli um, hvar í Vágum ein umhugsaður miðskúli átti at verið bygdur. Hildið varð at hetta átti at verið komið upp á pláss áðrenn víðari tingingar um skúlan. Teir høvdu tingast um málið og vóru komnir til eina felags avgerð um Vatnsoyrar. "Tað er eitt væl hóskandi pláss, ið hevur frægastu møguleikar at verða samtykt", siga teir í skrivinum.

Annars vóru onnur økir eisini uppi og vendu, har økið við Leitisrætt er nevnt, men sum sørvingar tó ikki tóku undir við. Tí verður helst hildið, at Vatnsoyrar er so nær við Sørvág, sum tilber, uttan at vera í Sørvági. So hetta uppskotið er skilliga gjørt fyri at fáa Sørvág við.

Málið er til viðgerðar á felagsfundi 4. juli 1951. Jákup í Jákupsstovu, formaður í fyrireikingarnevndini, legði uppskotið fram um miðskúla í Vatnsoyrum og legði fram skriv frá Ludvig Petersen, lærara, sum viðmælti málið og segði sína hugsan um, hvussu skúlin kundi skipast.

Eingin avgerð er staðfest at vera tikin á fundinum men helst hava vónirnar verið stórar.

Blaðið "14. September" skrivar um málið hin 9. juli 1951. "Tað hevur áður verið sagt frá tí her í blaðnum, at vágamenn hava í hyggju at byggja miðskúla fyri allar 3 høvuðsbygdirnar: Sandavág, Miðvági og Sørvág. Sett varð serstøk nevnd til at kanna hetta mál, og vóru í henni Sigmundur Frederiksen* fyri Miðvág, Jákup í Jákupsstovu fyri Sørvág og Petur á Lofti fyri Sandavág. Nú hevur henda nevnd lagt frá sær uppskot um, at skúlin verður bygdur í Vatnsoyrum og boðið verður út til kapptekningar fyrsta dagin. Fyrsta virðisløn er 4.000 kr. Sørin Danielsen á Ryggi í Miðvági er formaður fyri tí felagsstýri, sum kommunurnar hava teirra millum." [* Í greinini er Sigmundur Frederiksen annars nevndur Sigmundur Petersen.]

At boða frá, at skrivast skuldi út til tekning av skúlanum, var helst í so tíðliga, tí hin 26. juli 1951 skrivar Sørin Danielsen til Miðvágs kommunu og sigur, at vegna málið um framhaldsskúla hevur hann fingið bræv frá Sørvágs kommunu, sum segði, at best var at kanna staðið har skúlin skal standa, áðrenn bjóðað verður út til kapping um, hvussu skúlin skal síggja út. Um hinar kommunurnar eru samdar, er best at steðga við lýsingini um tekning til fundur hevur verið á staðnum. Hetta kann so gerast, tá allir limirnir eru heima, sum teir ikki eru nú.

Her steðgar málið so heilt fram til 1953. Eingin felagsfundur varð hildin hesa tíðina og einki er annars sagt víðari um hetta mál hesa tíðina. Tveir felagsfundir vóru í 1953, á hvørgum teirra er miðskúlin nevndur. Næsti felagsfundurin var, smb. gerðabókini fyri slíkar fundir, ikki fyrr enn í 1959.

19. februar 1953 skrivar Sørin Danielsen, sum helst er ein seinasta roynd, til Miðvágs- og Sandavágs kommunur og sigur, at heitt varð á hann á felagsfundi um at fáa ein fund í lag um at kanna grundøki til ein felagsskúla fyri oynna. Og spyr um áhugi er fyri einum slíkum fundi og um so er um alt stýrið skal møta ella útsendingar. Fær hann hetta, varð vitað og tað er játtandi, so skal hann skipa fyri fundi skjótast. Einki sæst meira til hetta.

Í 1956 verður støðan broytt, tí nú eru Miðvágs og Sandavágs kommunur gingnar saman um at byggja ein felags skúla á Giljanesi, sum tó í fyrstu atløgu var ætlaður sum barnaskúli, har ætlanin tó seinni varð víðkað til framhaldsdeild eisini. Fyrsti fundurin var hin 3. januar 1956, har sóknarstýrini og skúlanevndirnar úr Miðvági og Sandavági og lærararnir, Sigurd Petersen,

Sandavági og Martin Joensen og Jens Wang, Miðvági, vóru møttir. Til viðgerðar var bygging av felagsskúla inni á Nesi. Ludvig Petersen, lærari, helt røðu og greiddi m.a. frá skúlamálum av hesum slag úr Noregi. Teir møttu vóru samdir um at fara undir at byggja nýggjan felagsskúla og samdust um at fara at kanna staðið saman við útskiftingarnevndini, ið var væntandi til Sandavágs í morgin.

Hetta er fyrsti fundur, skrásettur er í fyrstu gerðabókini fyri Miðvágs-Sandavágs skúla. Har serstakar gerðabøkur eru førdar yvir fundirnar, sum vóru millum kommunustýrini bæði um felagsskúlan.

Í Sørvági vóru teir longu í 1955 byrjaðir so smátt upp á bygging av nýggjum barnaskúla, har fyrsti parturin stóð liðugur í 1957 og tvey byggistig skuldu gerast afturat árini frameftir, fimleikarhøll og framhaldsdeild.

Alt endaði við, at á Giljanesi bleiv 3 ára framhaldsdeild fyri Miðvág og Sandavág og í Sørvági 2 ára framhaldsdeild, har so allar tríggjar bygdirnar høvdu 3. árið í felag á Giljanesi.

Realskúli og 8.-10. flokkur

Fyrstu tíðina verður tosað um preliminerskeið, og við at lesa eitt sindur um tað skilst, at preliminer er ein serstøk roynd við nakað hægri krøvum enn vanligt í smb. við realskúla. Nakað, sum varð fört inn í Danmark longu í 1800-árunum, men gingið frá júst um hesa tíð fyrst í 60-unum og tí eisini í Føroyum. Eftir tað er tað vanliga nevnt realskúli, men sum eisini fall burtur miðskeiðis í sjeytiárunum, har 8. til. 10. flokkur tók yvir, sum var byrjað tíðliga í sjeytiárunum.

Sóknarstýrið fyri Miðvágs kommunu skrivar hin 11. november 1957 til Skúlastjórnina og sendir inn umsókn um góðtøku av preliminerskeiði fyri Miðvágs skúla. Og hin 25. november 1957 skrivað Miðvágs- og Sandavágs sóknarstýrir til Skúlastjórnina og senda felags umsókn um preleminerskeið fyri báðar bygdirnar saman – møguliga eftir áheitan frá Skúlastjórnini.

Tað gongur so nakað av tíð, og hin 19. apríl 1958 hevur Skúlastjórnin sent kommununum skriv við 5 ymiskum spurningum, 1. Hvussu ætlast spurningurin við hølum loyst? 2. Hvat lærutilfar til hægri undirvísing er til taks? 3. Hvussu nógvir lærarar eru og hvørjar førleikar hava teir? 4. Hvussu nógvar næmingar verður væntað at fáa? 5. Nær verður skúlabyggingin liðug?, sum Miðvágs kommuna svararð hin 2. juni 1958. Svarini til spurningarnar vóru: 1. Fyribils høli til skúlastovur og serrúm kunnu fáast í húsum kommununnar í Sandavági. 2. Hægri undirvísingartilfar er einki, men kann keypast. 3. Tríggir lærarar eru í hvørjari bygd, og kunnu teir undirvísa á skeiðum, men neyðugt verður at fáa ein lærara afturat. 4. 25 – 30 næmingar kunnu væntast á skeiðið. 5. Hin nýggi skúlin væntast liðugur um 3 ár.

Svar kemur frá Skúlastjórnini hin 7. august 1958, at fyribils verður góðkend fyrireikandi undirvísing til preliminerskeið við skúlarnar í Miðvági og Sandavági. Hetta merkir, at frá 6. skúlaárið verður undirvíst í enskum og frá 7. skúlaárið í enskum, týskum og støddfrøði. Uttan at geva endaligt loyvi skal viðmerkjast, at fyri at loyvi kann gevast til preliminerskeið 1959/60 má fyrireikandi undirvísing hava verið í nevndu fakum. – Í Miðvági fevnir hetta so í fyrstu atløgum um 5. flokk við tað, at bert 5 flokkar vóru, sum tó skúlaárið 1959/60 varð hækkað til at hava ein 6. flokk eisini.

Sum skilst, so bíða kommunurnar eftir hesum endaliga loyvinum, sum eisini skal gera skúlarnar førar fyri at fara undir fyrireikandi undirvísingina.

Á fundi 13. september 1958 var á skrá tímaætlan fyri Miðvágs skúla til komandi skúlaár. Ætlanin varð gjørd av lærarunum við Miðvágs skúla við tí í hyggju at læra børnini tey fak, ið skuldu til, um preliminerskeið varð sett á stovn. Í ætlanini eru m.a. fakini matematikk, týskt og enskt, umfram hini fakini, ið vóru áðrenn. Sóknarstýrið samtykti ætlanina.

22. november 1958 skrivaði Skúlastjórnin um tímaætlanina hjá lærarunum, har ymsar viðmerkingar vóru. Sóknarstýrið legði viðmerkingarnar fyri lærararnar, ið broyttu ætlanina samsvarandi tí, stjórnin ynskti. Skriv varð sent Skúlastjórnini og sagt frá hesum og at sóknarstýrið viðmælti broytingarnar, læraranir høvdu gjørt. Skúlastjórnin góðtók síðan tímaætlanina.

15. oktober 1958 verður skrivað til Skúlastjórnina og ótolnast eftir at fáa byrjað undirvísingina í Miðvági og Sandavági. Eftir áhuganum at døma verður næmingatalið nóg stórt, og vit kunnu útvega hølir og skaffa neyðugt tilfar. Harumframt er nýggjur skúli í gerð, sum kemur at nøkta allan tørv fyri eina slíka undirvísing frameftir. Tað einasta, okkum tørvar, er góðkenning frá Skúlastjórnini og ein lærara afturat, verður m.a. sagt í brævinum. Og verður hildið áfram:

"Løgið, ja heilt ótrúðligt fellur okkum tí at frætta, at sóknarstýrisformaðurin fyri Sandavágs kommunu í viðtalu við skrivstovu skúlastjórnarinnar um umsókn okkara viðvíkjandi preliminerskúlanum fekk upplýst, at málið hevði verið fyri á fundi, men eingin avgerð tikin, tí talan var eisini um Sørvág. Hetta at Sørvágur skal hava nakran møguleika, duga vit ikki at skilja, tá fólkatalið í hesum báðum bygdum er umleið tað dupulta av Sørvági, og vit um stutta tíð hava ein skúla, sum verður nógv betri hóskandi bæði á ein og annan hátt – tað vil siga fullfíggjaðan skúlabygning til preliminerskúlanýtslu. Umframt hetta kann verða nevnt og vert at hava í huga, at tá talan fyri nøkrum árum síðan var um byggjan av miðskúla fyri allar tríggjar bygdirnar, tá gingu Sandavágur og Miðvágur so langt sum til Vatnsoyrar, men steðgaði málið her, tí Sørvágur heldur ikki vildi ganga við til hetta.

Ætlanin við hesum brævi er tí ynski um eitt játtandi svar viðvíkjandi preliminerskeiðinum, so núsitandi sóknarstýrir kunnu fara undir fyrireikingar til útvegan av náttúrusøgu-, náttúrulæru amboðum og øðrum. Skuldi nýggi skúlin ikki verið nýttur sum preliminerskúli, er lítið væntandi, at sóknarstýrini og fólk yvirhøvur framvegis eru sinnað til at halda áfram við hesari felagsbygging bert til ein barnaskúla, og vildi hetta verið eitt stórt vónbrot, tá felags byggjanin jú skuldi verið framtíðarleiðin. Tað er júst sum preliminerskúli, at skúlin og staðið á Nesinum hóskar framúr væl."

Skúlastjórnin svarar upp á skrivið hin 24. november 1958 og sigur, at Skúlastjórnin sær við vælvilja upp á málið um at seta á stovn preliminerskeið á Giljanesi og at seta eitt lærarastarv afturat. Bíðað verður við endaligari góðkenning at byrja ein I. flokk til preliminerskeið, til ein sær, hvussu tað gongur við skúlabyggingingi til støðutakan fyri einum skeiði skúlaárið 1959/60.

11. mars 1959 skrivar skúlanevndin og sigur, at tað er áhaldandi neyðugt at troðka á at fáa framhaldsdeild á Giljanesi, nú sørvingar eisini troðka á at fáa skeiðið har úti. Har mugu Miðvágs og Sandavágs kommunur fáa fund í lag við myndugleikarnar um hetta mál. Tí verður eingin framhaldsdeild her, er eingin grund til at brúka so nógvar pengar upp á skúla á Giljanesi. Skrivað undir hevur Sigmund Frederiksen.

Skilligt er, at kommunurnar hava tikið skrivið í álvara, tí longu 13. mars var fundur millum sóknarstýrini fyri Miðvágs og Sandavágs kommunur, skúlanevndirnar og lærararnar hjá báðum bygdunum um skjótast tilber, at fáa fund saman við landsskúlaráðgevanum, J.P. Joensen, um tað væntaða preliminerskeiðið.

Á felagsfundi 10. juli 1959 millum Sørvág, Miðvág og Sandavág, var semja um, at í Sørvági skulu vera 8. og 9. flokkur (bleiv tó til 1. og 2. real) og á Giljanesi skuldi vera 1. – 3. real. Soleiðis at Sørvágs børn komu at taka 3. real á Giljanesi.

Hetta var sambært kravi frá Skúlastjórnini, sum hevði ásett, at tað skuldi vera ein høvuðsskúli fyri Vágar har endaliga prógvtøkan hjá framhaldsdeildini varð tikin frá og varð tað sett til at vera felagsskúlin á Giljanesi. Sørvingar mótmæltu at 3. árið ikki eisini kundi verða tikið í Sørvági, tí skúlin hevði væl útbúnar lærarar til tess, men fingu ikki viðhald.

14. juli 1959 skrivar Skúlastjórnin at hon hevur góðtikið, at preliminerskeið verður við Miðvágs/ Sandavágs skúla og kann 1. skeiðsflokkur byrja skúlaárið 1959/60 undir teirri treyt, at hægru fíggjandi myndugleikarnir eisini góðtaka hetta, Staturin og Landsstýrið. Viðv. skúlagongdini skal sigast, at Skúlastjórnin góðkennir fyribils hølini, til skúlin er liðugt bygdur. Tað er at fimleikarhøll verður í Losjuni í Sandavági, og at tvær skúlastovur vera í f.v. hernaðarsjúkrahúsinum* í Sandavági til endan av 1960, treytað av, at rúmini verða innrættað soleiðis, at tey verða góðkend av landsskúlaráðgevaranum. Viðvíkjandi 1. og 2. real í Sørvági verður góðkent, at 1. real byrjar við skúlaársbyrjan 1959/60 og 2. real við skúlaársbyrjan 1960/61. [* Gomlu losjuni.]

Felagsfundur var 8. september 1959. Til viðgerðar var setan av fyristøðufólki til preliminerskeiðið, sum skal byrja hálvan september. Í uppskoti vóru Jóan Hendrik Samuelsen og Sigurd Petersen, skúlaleiðarar í ávikavist Miðvági og Sandavági. Við duldari atkvøðugreiðslu var Sigurd Petersen, Sandavági, valdur. Viðvíkjandi bókum til skeiðið, varð samtykt at keypa tað neyðturviliga.

23. september 1959 kl. 19 var samkoma. Bæði sóknarstýrini, báðar skúlanevndirnar, lærararnir og næmingarnir vóru møtt í fyribils skúlastovuni í gomlu Losjuni í Sandavági til preliminerskeiðið. Sóknarstýrisformaðurin í Miðvági, Hans Martin Thomasen, beyð vælkomin og skeyt upp at syngja sangin eftir Mikkjal á Ryggi "Faðir fylg mær henda dag." Síðan helt hann stutta røðu við góðum ynskjum fyri skeiðinum. Síðan talaði Niels Marius Petersen, sóknarstýrisformaður, Sandavági, Poul Joensen, skúlanevndarformaður, Sandavági og Sigurd Petersen, leiðari fyri skeiðinum. Allir bóru fram góð ynskir fyri skeiðið. Seinast var sungið "Gakk tú fram við góðum treyst." Aftaná bjóðaði Niels Marius, sóknarstýrum, skúlanevndum og lærarum heim til sín til ein kaffimunn.

Flaggdagin 1960 var á felagsfundi fyri at keypa 15 dupult skúlaborð, 1 kadeter og 1 stól til 2. flokk preliminer.

Hin 9. mars 1961 samdust kommunurnar á felagsfundi at seta Sigurd Petersen, lærara, sum higartil hevði verið leiðari av preliminerskeiðnum, sum fyribils leiðara fyri felagsskúlanum, nú felagsskúlin verður tikin í nýtslu.

Á fundi í sóknarstýrinum í Miðvági 15. januar 1963 var til viðgerðar bræv frá Skúlastjórnini viðvíkjandi stuðuli til næmingarnar í realskúlaflokkunum. Skúlastjórnin hevur flíggjað næmingunum í 3. real umsóknir og vóru 5 umsóknir komnar, og hevði lærararáðið og skúlanevndin viðmælt umsóknunum. Næmingarnir úr Miðvági vóru: Hans Jørgensen, Hildur Ravnsfjall, Olivar á Ryggi, Oddvør Hansen og Paula Svabo, í miðal 100 kr. hvør. Sóknarstýrið samtykti tilmælið.

30. desember 1963 var aftur líknandi mál fyri, og tá var talan um 18 umsóknir, sum eftir innstilling vóru góðkendar til í miðal 200 kr. hvør, har tó ein var hækkaður til 400 kr.

Viðlíkahald av skúlanum 1945 til 1970

Viðlíkahald 1945, goldið til Sámal Ellefsen, 122 kr., Jørðgrim Joensen, 85 kr. og Albert Hansen, 82 kr., sum hava arbeitt mest. Minni upphæddir, Meinhard Hansen og J.K. Joensen. Tilfar er keypt frá Zakaris Nielsen 91 kr. og Hjalmar Nielsen 44 kr., báðir Sandavági. Viðlíkahald í alt 489 kr.

Í 1946 kostaði viðlíkahaldið 275 kr. Arbeiði Albert Hansen, 110 kr., J.K. Joensen 52 kr., Sámal Ellefsen 41 kr. og Emil Johansen 18 kr. Tilfar keypt frá Hans Vilhelm Hansen og Sam Olsen, eftf., Tórshavn.

Á fundi 12. september 1947 varð samtykt at gera ein betongkant fram við vegnum eystanfyri skúlan og ein vegg við trappu omanfyri skúlan. Somuleiðis at mála takið á tí nýggju skúlastovuni.

Um veggin kann sigast, at hann varð gjørdur, men gingið var frá at gera trappuna.

Í 1947 hevði Jørðgrim Joensen málað vindeyguni á skúlanum uttan og kálka ein vegg uttan fyri 74 kr. Thopona Johansen, Albert Hansen, Hans Chr. Hansen og Henning Ellefsen høvdu arbeitt fyri í miðal 20 kr. hvør og Maskinverkstaðið hevði latið tilfar fyri 95 kr.

Hin 29. desember 1947 varð á fundi tosað um at umbyggja skúlastovuna, hetta skuldi takast til víðari tinginar í forstandarskapinum, tá fíggjarætlanin fyri 1948 varð løgd.

Sambært roknskapinum 1948 varð hetta neyvan gjørt tað árið. Tá var nevniliga óvanliga lítið brúkt til viðlíkahald, bert 98 kr.

11. apríl 1949 skrivar Dagmar Joensen Næs um at seta upp nýggja flaggstong í skúlagarðinum. Í brævinum sigur hon, at tey tey 21 árini, tey hava búð her, 3 ferðir hava keypt nýggja flaggstong sjálvi. Fóturin er góður. Um tit vilja gera hetta, so vóna vit, at tað verður sum skjótast, tá henda avbrotna stongin ikki kann sigast at taka seg gott út.

Umsóknin er til viðgerðar á fundi 6. mai 1949. Avgjørt varð at kommunan skal seta eina flaggstong í skúlahavanum. Í skrivi til hennara 20. mai 1949 verður sagt, heitt er á Henning Ellefsen um at seta stongina upp um gjørligt til hvítusunnuna.

Skúlanevndin v/ Sigmund Frederiksen skrivar hin 8. juni 1949 og heitir á forstandarskapið um at fáa takið á skúlanum umvælt, so at tað ikki lekur. Takið hevur likið í fleiri ár og ber illa til at halda skúla har, tá regn er. Biðið verður eisini um, at ein betonggarður verður gjørdur við inngongdina til skúlan, so tað verjir børnini frá at blíva skitin av eini rennu, sum gongur tann vegin. Heitt verður eisini á um, at søkt verður til Løgtingið um stuðul at byggja nýggjan skúla, sum tað harðliga treingir til. Og biðið verður um at eitt w.c. verður gjørt til skúlan, tí tað sum børnini nú verða víst til, er ikki brúkbart ella gagnligt.

Skrivið er til viðgerðar á fundi 13. august 1949. Avgjørt varð bert at gera tað mest neyðturviliga við at fáa takið tætt, vindeyguni tøtt og annað.

August 1949. Smb. einari rokning 1949, sum er varðveitt, hevði Hans Chr. Hansen 'Stoffa' í juni arbeitt í 11 tímar upp á eitt gólv og keypt nakað av viði, so gólvið hevur antin verið rotið ella vánaligt á einum stað. Í august hevði hann arbeitt í 16 timar upp á 2 ovnar, sum mugu hava verið í ringum standi. Og í aug. arbeitt í 5½ tíma upp á skúlatakið, har Salamon Poulsen eisini hevði arbeitt í 11 tímar.

Á fundi í sóknarstýrinum 28. apríl 1950 er til viðgerðar, at lærarin, Martin Joensen Næs, hevði biðið um at fáa vask og w.c. á loftinum í læraraíbúðini í skúlanum. Avgjørt varð at lata hetta gera.

6. september 1950 verður skrivað til Skúlastjórnina, í smb. við skrivi frá skúlanevndini í Miðvági og frá Martin Joensen-Næs um læraraíbúðina við Miðvágs skúla. Sagt verður, at w.c. verður lagt inn nú, men tað treingir ivaleyst nógv at gera, m.a. nýtt tak og kamin og aðrar ábøtur.

Í 1951 verður arbeiðið við at skifta takið á Gamla skúla lýst leyst í arbeiðstøku. Arbeiðið snýr seg um at taka gamla flagtakið av og beina tað burtur og leggja nýtt tak á, og umvæling av vindeygum, sum eru rotin. Inn komu trý tilboð. Hans Christoffer Hansen, 'Stoffa', bátasmiður, 975 kr., Maskinverkstaðið, 950 kr. og Perchy Nielsen, øll tilboð úr Miðvági. Seinasta tilboðið hevði eisini við at gera eina nýggja kamin úr betong og at "spekka" ella klæða bygningin við betong. Hetta var eisini hægsta tilboðið, 1.680 kr.

Tilboðini vóru til viðgerðar á fundi 18. juni 1951. Avgjørt varð at taka lægsta boð, Maskinverkstaðið. Skrivað verður til Maskinverkstaðið v/ Heine Joensen, Miðvági, hin 19.6.51 og sagt frá hesi avgerð.

Á fundi 8. november 1951 er umvæling av skúlanum til viðgerðar. Í gerðabókini er sagt: "Skúlin. Aftaná at nýtt tak og nýggj kamin er gjørd, er tørvur á at gera tað vestaru stovuna í stand og nakað av tí sunnaru. Avgjørt varð at mála og tapetisera ta vestaru stovuna og leggja nýtt linoleum á gólvið og mála kaminina og annað smávegis í tí sunnaru stovuni.

Annars gjørdist arbeiðið hetta árið nógv meira umfatandi enn áðurnevndu tilboð og viðgerðir týða uppá. Viðlíkahaldsarbeiði og tilboð kostaðu tilsamans 4.985 kr.

Ymiskt tilfar: Balslev & Co., Tórshavn, takplátur 2.230 kr., timbur 784 kr. Maskin-verkstaðið, tilfar, 1.650 kr., Smiðjuverkstaðurin, w.c. 456 kr., ymiskt annað, 117 kr. Pf. Maria Poulsen, Tórshavn, fajanse, 247 kr., Valdemar Lützen, Tórshavn, tilfar, 237 kr og Miðvágs Cementídnaður, cement, 136 kr. Tilsamans við ymsum smærri 5.915 kr. Tilsamans 10.900 kr. Meðan annað, sum ikki er nevnt nágreiniliga kostaði 7.600 kr., sum tilsamans gevur 18.500 kr. í 1951.

Gamla nátthúsið við skúlan er nevnt nakrar ferðir, men eftir at w.c. var komið í skúlanum varð hetta ikki í brúki longur. Í mai 1952 skrivar Jørgen Frans Jørgensen, málari, og biður um at fáa gamla nátthúsið til keyps. Hann ætlar at nýta tað til hoyggjhús.

Umsóknin er til viðgerðar á fundi 19. mai 1952. Sagt verður, at stýrið gekk við til at lata hann fáa húsið við grundstykki fyri ein hóskandi prís móti, at hann stongir hetta beinanvegin ella ger aðra nýtslu burturúr tí, soleiðis at húsið ikki kemur at standa sum eitt missprýði fyri bygdina.

Um somu tíð í mai 1952 hevur Harald Niclasen biðið um at fáa nakrar asbest takplátur til keyps, sum lupu, av tá takið á skúlanum var skift. Henda umsókn er til viðgerðar á fundi 31. mai 1952. Avgjørt varð at selja honum pláturnar fyri tað, kommunan hevði keypt tær fyri.

Samtykt var á fundi 21. juli 1952 at bjóða arbeiðið at mála træverkið á skúlanum út. Inn kom eitt tilboð frá Edmund Haraldsen at mála træverkið uttan á gamla skúlanum fyri 280 kr. við tilfari, og játtaði stýrið á fundi 30. august 1952 at taka av hesum.

Í september 1952 hevur Martin Joensen Næs, sum býr í læraraíbúðini, biðið um fáa køk og gongd málað. Á fundi 13. september 1952 varð avgjørt at kanna, hvat hetta kemur at kosta, áðrenn støða verður tikin. Teir hava so spurt Jørgen Frans Jørgensen, málarameistara, um hetta, og hin 27. september 1952 skrivar hann og gevur sína meting og tilboð, sum eisini sigur eitt sindur um, hvussu slíkt varð gjørt tá: *Køkurin grundaður, kittaður og málaður 2 ferðir, lakeraður 1 ferð niður til ¾ hædd frá loftinum. Gongolium ¼ frá gólvinum og upp á veggin. Gongin, grundað, kittað og málað 2 ferðir, 1 ferð lakkað.* Prísurin liggur um 800 kr. fyri bæði rúmini, tilfar íroknað. Hann nevnir eisini at tað lekur um kranan, og at tað eigur at verða umvælt og nýtt linoleum lagt á køksborðið. Hetta vildi kosta 100 kr. eyka.

Tilboðið er til viðgerðar á fundi 6. oktober 1952. Tilboðið var góðtikið við eykaarbeiði og at skriva sáttmála við hann um 800 + 100 kr. fyri alt arbeiðið. Í roknskapinum sama ár stendur hann tó at hava fingið 841,20 kr. fyri arbeiðið, so har er okkurt eyka. Eisini hevði kommunan keypt linoleum fyri 133 kr. frá Pf. N. Niclasen til hetta arbeiðið.

Annars var eitt takvindeyga keypt frá Eivind Mouritsen fyri 183 kr., steinflisar frá Valdemar Lützen fyri 41 kr. og timbur frá Balslev & Co. fyri 38 kr. Og Engelbrech Poulsen, hevði gjørt snikkaraarbeiði fyri 957 kr.

Í 1953 hevði Niclas Jørgensen gjørt málingaarbeiði í skúlanum fyri 300 kr. og Jørgen Fr. Jørgensen sama fyri 123 kr. Tilfar varð keypt fyri 782 kr.

Á fundi 1. november 1955 er til viðgerðar, bræv frá skúlanevndini, har nevndin klagar um skúlaborðini í gomlu skúlastovuni og w.c. og rennur. Avgjørt varð at kanna hesi átalaðu brek.

Hetta árið eru annars 1.249 kr. brúktar til umvælingar av skúlanum. Tó ikki nevnt til hvat, men helst hesi nevndu brek.

Í 1956 vóru 2.015 kr. nýttar til umvælingar.

Í 1957 hevur Jørgen Fr. Jørgensen gjørt málaraarbeiði fyri 510 kr., Henning Ellefsen hevur skift eitt lás fyri 92 kr., og tilfar er keypt frá Havnar Timburhandli fyri 110 kr.

Árini 1958 og '59 er einki upplýst um umvælingar.

Í 1960, ódagfest, skrivar Jóan Hendrik Samuelsen, lærari bræv til kommununa og hugleiðir um stødd á skúlaborðum og hædd til ymsu aldrarnar. Hetta er helst mest í sambandi við at nýggjur skúli er í gerð, sum varð tikin í brúk árið eftir.

At fáa tekjuna á Gamla skúla málaða er fyri á fundi 16. juni 1961. Sóknarstýrið samdist um at lata hetta bjóða út, og liturin verða reyður. Lýsing varð hongd upp 19.6.61 har m.a. er sagt, at tilboð skulu vera inni seinast 23. h.m. kl. 18.00.

Sama dag lýsingin er hongd upp skrivar Miðvágs arbeiðsmannafelag kommununi bræv og sendir við lista yvir 51 navngivnar mans í Miðvági, sum sagt verður, ikki kunnu roknast sum limir í Miðvágs arbeiðsmannafelag við tað at teir ikki hava goldið limagjald, summir ikki í fleiri ár. 3 eru tó útstrikaðir aftur, tí teir eru sagdir at hava goldið. – Hugsanin er greið, at góðtikið verður ikki, at kommunan letur arbeiði til nakran av hesum monnum.

Hvussu tað varð við tí er annars ikki upplýst, men tað var so einki eftirspæl, so teir sum bjóðaðu hava helst verið millum teir, sum arbeiðsmannafelagið kundi góðtaka.

Tað komu trý tilboð inn og vórðu tey viðgjørd á fundi 26. juni 1961. Teir bjóðandi vóru: Jóannes Jørgensen 970 kr., Absalon Jacobsen 890 kr. og Mannbjørn Wang og Bergur Jørgensen 660 kr. Avgjørt var at taka lægsta boð, ið er kr. 660 og samstundis varð avgjørt at biðja hesar báðar tjøra takið á hjallinum eisini.

Bræv við nærri frágreiðing er send teimum 28. juni 1961, har m.a. er sagt, at asbestmáling skal nýtast til partin av takinum, sum er asbest, og skal mosi og annað reinsast burtur fyrst, jarntakið skal málast við hóskandi máling. Og skal arbeiðið gerast so skjótt veðurlíkindi eru til tess.

Fyri 1961 er einki nevnt um viðlíkahald ella kostnað av tí. Hetta var eisini seinasta árið Gamli skúli varð nýttur sum skúli í sekstiárunum. Hann kom aftur í brúk sum skúli í 1970, men tað bert fyri tey yngstu børnini frá 1. til 4. flokk.

Um Gamla skúla seinni kann í stuttum sigast, at komandi árini er ikki nógv nevnt um viðlíkahald fyrr enn í 1966, tá verður á fundi 9. juni 1966 samtykt at væla um tey ringastu brekini við skúlan og seta neyðugt hegn um urtagarðin.

Summarið 1970 verður nýggjur septiktangi keyptur og settur til skúlan. Sama summar verður miðstøðuhiti lagdur inn í skúlan. Dagmar Joensen-Næs, ið framvegis búði til leigu í skúlanum, bað um at fáa hita frá skúlastovuni lagdan inn í sethúsini, nú hitaverk varð gjørt til skúlastovurnar.

Bókasavn

Tað fyrsta, sum sæst til nakað líknandi sum bókasavn, er ikki bókasavn, men tilboð til kommununa um at læna bøkur.

Á fundi í forstandarskapinum 13. desember 1919 er til viðgerðar eitt tilboð frá Amtinum um lán av bókum frá Statens Bogsamlingskomite. Amtið skjýtur upp, at forstandarskapið velur ein álítandi mann at skriva til cand. phil Lang eftir bókakassunum og senda teir aftur. Valdur varð H.N. Niclasen at standa fyri láninum av bókum.

Hvussu var víðari við hesum sæst tíverri einki um, og tessvegna heldur ikki hvussu leingi ella stutt hetta samstarvið var.

Vit skulu so næstan hálva øld fram, áðrenn nakað líknandi er at síggja aftur. Hin 28. oktober 1960 skrivar Jóan Hendrik Samuelsen, lærari, til kommunustýrini í Miðvági og Sandavági og heitir á tey um at stovna bókasavn fyri báðar bygdirnar. Hann nevnir m.a. gamla orðatakið, at blindur er bókleysur maður. Sigur at vanliga mannagongdin er, at kommunurnar játta helmingin av stovningarpeninginum o.u. 2-3000 kr., meðan Landsstýrið játtar hin helmingin upp til 2 kr. pr. íbúgva í sóknini til stovnsbókasavn (uppstart). Harumframt letur tað almenna uml. 80% av rakstrinum. Annars er vanligt at kommunurnar seta eina nevnd, sum fær heimild til at upptaka samráðingar við Landsbókasavnið og Landsstýrið. Høli til bøkurnar útvega kommunurnar, men í hesum føri fæst helst hóskandi høli í nýggja felagsskúlanum, og kann so útlánið vera har fyribils.

Nøkur viðgerð ella svar sæst ikki skrivliga til hetta skriv. Men 6 ár seinni hevur Landsbókasavnið sjálvt skrivað til kommunurnar. Hetta skrivið er til viðgerðar á felagsfundi 25. november 1966. Skriv frá Føroya Landsbókasavni dagf. 12. okt. í ár, har spurt verður, um kommunurnar eru sinnaðar at seta upp eitt bókasavn í felagsskúlanum. Samtykt varð einmælt at seta hetta bókasavn á stovn og at biðja Sverra Fon koma vestur at fyrireika stovnsetanina.

Longu dagin eftir henda fundin 26. november 1966 verður skrivað til Føroya Landsbókasavn og sagt, at á fundi í gjár bygdanna millum varð samtykt, at seta á stovn bókasavn fyri báðar bygdirnar í felag við skúlan á Giljanesi. Smb. brævi 12.10.66 bjóða tit tykkum at koma vestur higar og geva okkum vegleiðing til stovnsetanina. Tað vildu vit verið takksamir fyri, og vilja vit steðga við at velja bókasavnsnevnd til eftir at vit hava tosað við tykkum.

10. januar 1967 verður skrivað til Høgna Poulsen, prest, Miðvági, J.H. Samuelsen, varðaskúlastjóra, Miðvági og Sigurd Petersen, skúlastjóra, Sandavági og sagt, at sóknarstýrini fyri Miðvágs- og Sandavágs kommunur hava á felagsfundi 9. h.m. samtykt, smb. lóg fyri Miðvágs- og Sandavágs bókasavn at velja eina bókasavnsnevnd við 3 limum og verður nevndin vald fyri 2 ár. Á sama fundi varð samtykt at velja tygum í hesa bókasavnsnevnd fyri komandi 2 árini.

Skriv um tað sama er sama dag sent Føroya Landsbókasavni, Tórshavn.

Høgni Poulsen, Jóan Hendrik Samuelsen og Sigurd Petersen eru so fyrstu limirnir í bóknasavnmsnevndini fyri Miðvágs- Sandavágs skúla.

Sum bókavørður varð Heini F. Petersen, lærari, settur. Eftir at hann gavst í 1999, varð Oddmar Ravnsfjall, lærari, bókavørður.

Bókasavnið er so á skúlanum á Giljanesi. Men í 1985 er uppskot um at flyta bókasavnið í Gamla skúla í Miðvági. Í fundarbókini hjá mentamálanevndini hjá Miðvágs kommunu stendur fyri fund, 30. september 1985, at mentamálanevndin heitir á bygdaráðið um, at Gamli skúli verður brúktur til bókasavn og til frítiðarítriv.

Málið er fyri á fundi í bygdaráðnum 9. oktober 1985 har bygdaráðið samtykti, at heita á teknisku deild um at gera eina kostnaðarætlan av, hvat ein umvæling av Gamla skúla kemur at kosta og hvat bygningurin kann nýtast til í samráð við mentamálanevndinai. Fýra vóru fyri og ein ímóti.

Um hetta varð framt eina tíð sæst tíverri ikki, men seinni er bóknasavnið so aftur í skúlanum á Giljanesi.

Skúlin á Giljanesi

Sum ofta er við slíkum, so var byrjanin til felagsskúlan á Giljanesi ein nógv minni ætlan, í hvussu so er hjá Miðvágs kommunu. Tí ásanna varð, at Gamli skúli var alt ov lítil, og støðan var so í fyrstu syftu loyst við at gera skúlastovur afturat í kommunuhúsinum. Men nú var tað markið nátt, og meira kundi illa gerast har uttan at byggja uppí gamla skúla. Sum annars hevði verið gjørt áður. Men har var tað so aftur tað, at skúlin var rættuliga gamal og eftir hondini ótíðarhóskandi. Og tað er eisini hugsanin hjá lokalu skúlanevndini.

Miðan januar 1949 skrivar Sigmund Frederiksen vegna skúlanevndina og sigur, at nevndin á fundi 14. januar 1949 í smb. við, at tilsøgn er komin um, at Miðvágur fær ein lærara afturat, er komin til ta niðurstøðu, at neyðugt er at útbyggja skúlan. Vit vita, at hugsanin er at umbyggja læraraíbúðina til skúlastovu og so byggja eina nýggja læraraíbúð til fyrstalæraran. Men hesin gamli skúlin liggur vánaliga fyri, so vánaliga, at vit ikki kunnu forsvara at viðmæla, at blíva við við at umbyggja gamla skúlan. Vit skjóta tí upp at gamli skúlin verður heilt uppgivin sum skúli, og at gamli skúlin við tilhoyrandi øki verður seldur til einhvønn keypara. Og at ein nýggjur skúli við læraraíbúð verður bygdur á einum øðrum stað í bygdini. Vit skjóta upp Tungureynstrøðna millum landavegin og vegin til svimjihylin. Og at nevnda øki verður fingið kommununi undir útskiftingini. Har halda vit, at ein skúla kemur at liggja væl fyri og frítt og hóskandi avsíðis. Vit biða um, at málið verður tikið upp í forstandarskapinum skjótast, og at avrit av úrslitinum av fundinum um hetta mál verður sent skúlanevndini.

Skrivið er til viðgerðar á fundi 24. mars 1949. Avgjørt var at svara, at kommunan hevur sett 15.000 kr. av til skúlamál á fíggjarætlanini í ár, men at enn varð ikki samtykt at byggja nýggjan skúla.

Bræv við hesi avgerð sent skúlanevndini 11. apríl 1949, har m.a. staðfest verður, at upprunabrævið einki dato hevði. Samda dag verður eisini skrivað til Skúlastjórnina og sagt, at vit hava tikið áheitanina frá skúlanevndini til umhugsanar og hava sett 15.000 kr. av á fíggjarætlanini m.a. fyri at royna at byggja nýggjan skúla, tá umstøður verða til tess, har lagt verður afturat: "Í bræði verður hetta tó helst ikki."

At byggja nýggjan skúla bleiv tað so ikki til í Miðvági, tí eftir at málið um miðskúla í Vágum millum allar bygdirnar í oynni, datt niðurfyri, fóru Miðvágs- og Sandavágs kommunur í samstarv um at byggja nýggjan felagsskúla. Í Sandavági var sami trupulleiki, at gamli skúlin var vorðin ov lítil og í Sørvági eisini, har farið varð undir at byggja nýggjan skúla longu tíðliga í fimmtiárunum.

Fyrstu fundirnir viðvíkjandi skúlanum á Giljanesi

3. januar 1956 var felagsfundur, har sóknarstýrini og skúlanevndirnar úr Miðvági og Sandavági og læraranir, Sigurd Petersen, Sandavági og Martin Joensen og Jens Wang, Miðvági, vóru møttir. Á skrá var bygging av felagsskúla inni á Nesi. Ludvig Petersen, lærari, helt røðu og greiddi m.a. frá líknandi skúlamálum úr Noregi. Teir møttu vóru samdir um at fara undir at byggja nýggjan felagsskúla, og teir samdust um at fara at kanna staðið, har skúlin skuldi standa saman við útskiftingarnevndini, ið var væntandi til Sandavágs í morgin.

Hetta er fyrsti fundur, skrásettur er í gerðabók fyri Miðvágs-Sandavágs skúla. Har gerðabók varð førd fyri felags fundirnar skúlanum viðvíkjandi.

Farið varð hin 5. januar 1956 at kanna staðið á Giljanesi har skúlin skuldi standa. Henda dag hittust sóknarstýrini úr Miðvági og Sandavági inni á Nesi, saman við útskiftingarnevndini: Olavus Danielsen, Velbastað, Jens í Dali, Tórshavn, Jóannis Debes, Kollafirði og Tummas Juul Thomsen, Skopun. Menn samdust um at lata verkfrøðing gera tekning á tí stað, ið var best hóskandi.



Giljanes skúli, tá hann er nýggjur. Sum tað sæst, ein flottur og modernaður bygningur tá á døgum. Mynd: Jónberg á Mýrini.

7. januar 1956 samlaðust sóknarstýrini til felagsfund í Miðvági. Semja varð um at senda umsókn um stuðul til Løgtingið í hesi setuni og biðja byggifelagið Lamhauge & Waagstein, Tórshavn, gera fyribils tekning og kostnaðarætlan at leggja við umsóknini.

Sóknarnevndirnar, umboð fyri skúlanevndirnar og umboð fyri lærararnar møttu hin 7. mars 1956 til felagsfund. Við á fundinum var eisini Chr. E. Lamhauge, verkfrøðingur, Tórshavn. Hann gav frágreiðing um fyribils tekning dagfesta 3.2.1956, sum hann hevði sent vestur frammanundan. Sóknarstýrini samdust um at góðtaka fyribilstekningina og biða Lamhauge & Waagstein gera fullfíggjaðar tekningar til at leggja fram fyri avvarandi myndugleikar fyri at fáa stuðul. Chr. Lamhauge lovaði at gera tekningarnar lidnar skjótast gjørligt og ætlaði hann, at tekniarbeiðið skuldi vera liðugt um ólavsøkuleitið*. [* 7. mars 1956 er dagurin fyrsta gerðabókin fyri Miðvágs-Sandavágs skúla er skrásett so fyrru fundirnir eru helst fyrst fördir á kladdu.]

Sóknarnevndirnar, umboð fyri skúlanevndirnar og umboð fyri lærararnar hittust aftur longu hin 9. mars 1956 til felagsfund. Sóknarstýrini høvdu fyrr um dagin verið á staðnum á Nesinum og kanna staðið, har ætlanin var at byggja skúlan, og greiddi Lamhauge frá staðnum og øðrum í tí sambandi, ið hann hevði kannað fyrr um dagin. Samstundis greiddi hann frá hvussu skúlabygningurin skuldi innrættast. Upplýst varð, at barnatalið í Miðvágs skúla í løtuni var 110 og í Sandavágs skúla 117. Menn vóru samdir um, at flokshølini skuldu gerast til 30 og 36 børn. Bygningurin skal í fyrsta umfari gerast til umleið 300 børn. Roknað verður við skúlakøki, smiðjuverkstað, fimleikarhøll og matstovu.

1. desember 1956 var felagsfundur. Tekningarnar til nýggja skúlan vóru nú lidnar og Lamhauge & Waagstein høvdu sent tær til góðkenningar. Allir vóru samdir um at góðkenna tekningarnar og biðja L & W koma vestur til samráðingar um tað, ið víðari skal gerast.

Ellivu dagar seinni, hin 12. desember 1956 var aftur felagsfundur. Til viðgerðar var umsókn til skúlamyndugleikarnar viðløgd tekning av tí nýggja skúlanum. Waagstein, verkfrøðingur greiddi frá vanligu mannagongdini við slíkari bygging viðv. at senda umsóknir til avvarandi myndugleikar og hvussu arbeiðið annars átti at fara fram. Mælti til, at kommunustýrini áttu at gera eina fíggjarætlan fyri tey fyrstu tvey-trý árini hvat kommunustýrini høvdu sett av til byggingina og so um lánimøguleikar.

Giljanes skúli 1976.

Árini 1957 og 1958 eru fleiri skriv um byrjunararbeiðið, sum ætlanin ikki er at taka við her.

6. desember 1958 skrivar Lamhauge & Waagstein, prosjekterings- og byggifelag, Tórshavn, og senda rokning viðv. ymiskum kostnaðum av prosjektering og eftirliti við felagsskúlanum, har fyrsta rokningin er frá 9. januar 1956, so tá er fyrireikingararbeiðið byrjað, og eru líknandi rokningar fram til 20.11.1958, sum mest eru fyri ferðing og uppihald, ljósprent, lýsingar og telfonsamrøður.

Fólk vóru helst spent upp á henda nýggja skúlan og kanska serliga lærarar og børn, sum komu at hava sína dagligu gongd har.

Hin 16. mars 1960 skrivar Petur Jacob Sigvardsen, lærari, sum er á ársskeið í Keypmannahavn, og sigur at hann hevur vitjað ymsar fyritøkur og virki m.a. við tí í hyggju at finna ymisk amboð til skúlabrúks, og hevur hann fingið fatur á fleiri amboðum og bløðum til hetta, m.a. til landalæru, fysik o.a. sum egnar seg til preliminerundirvísing. Og sendir hann við "Tjaldrinum" fyribils 4 pakkar við tilfari. Nakað hevur hann upp við sjálvur, tá tað ikki so lættliga ber til at senda. Hann sigur, at umframt 27 tímar um vikuna á læraraskúlanum hevur hann vitjað o.u. 20 skúlar – mest í Keypmannahavn, har hann hevur lagt seg eftir teimum ymsu undirvísingarhættunum. Hann gleðir seg at byrja skúlan har heima. "Tað verða kanska einstakir trupulleikar í byrjanini inni á Nesi, men við felags hjálp og við hollum samarbeiði millum foreldur, lærarar og teir lokalu myndugleikarnar hava vit allar møguleikar til at fáa ein fyrimyndarligan skúla – og gævi, at tað má eydnast okkum! Heilsan til tykkum allar."

Í oktober 1960 er helst komið heilt væl á leið við skúlabyggingini, so langt, at hin 17. oktober 1960 er á felagsfundi til viðgerðar umsókn frá nevndini fyri ellisheimið í Vágum um loyvi at halda bazar í nýggja skúlanum. Allir uttan Osmund Joensen vóru samdir um at geva loyvi við teirri treyt, at teir, sum arbeiða upp á skúlan, geva sítt loyvi, og at hetta ikki seinkar arbeiðinum upp á skúlan, og álagt verður teimum at rudda væl eftir sær, og koma skaðar á bygningin av hesum, stendur nevndin til svars fyri tí.

Hetta er helst fyrsta tiltakið, sum hildið var í skúlanum á Giljanesi.

Kostnaðurin av skúlanum

Í ársroknskapunum hjá kommununi fyri árini 1957 til 1961 síggja vit kostnaðin av at byggja skúlan á Giljanesi. Her er so helvtin av kostnaðinum, ið var parturin hjá Miðvágs kommunu:

Í 1957 er kostnaðurin 5.000 kr., sum er fyri fyrireikingararbeiði. Við endan av 1958 er kostnaðurin komin upp á 117.400 kr., við endan av 1959, 337.000 kr. við endan av 1960

komin upp á 595.000 kr. og við endan av 1961 komin upp á 722.000 kr., ið var endaligi fyribils kostanaðurin av skúlanum, og stendur hetta virði nevnt fyri ongnarpartin hjá Miðvágs kommunu nógv ár fram. Í øllum førum heilt upp til 1972.

Fyri samlaða kostnaðin skulu hesi tøl so faldast við tvey, so fyribils kostnaðurin av skúlanum tilsamans hevur í 1961 verið 1.444.000 kr.

Fyrireikingar at taka skúlan í brúk

Avgerð var tikin av báðum sóknarstýrunum, við vælsignilsi frá Skúlastjórnini, at tá felagsskúlin á Giljanesi varð tikin í brúk, skuldu gomlu skúlarnir í báðum bygdunum leggjast niður sum skúlar og so møguliga nýtast til annað virksemi. M.a. kvøldskúla og frítíðarítriv sum talv o.a.

Tað vóru tó ikki øll, sum vóru so álvulig um tað. Hin 7. mars 1961 skrivar Miðvágs skúlanevnd til sóknarstýrið í Miðvági og tosar um 1. flokkarnar í Miðvági og Sandavági, har mælt verður til, at teir framvegis skulu ganga í gomlu skúlunum. Hetta tí langur og smalur vegur er til skúlan á Giljanesi, og verður tað ikki hildið ráðiligt at 7 ára gomul børn ganga henda vegin.

Her kann viðmerkjast, at flestu vegir í Vágum vóru framvegis einsporaðir hesa tíðina. Eisini tann millum Miðvág og Sandavág.

Áheitanin varð tó ikki tikin til eftirtektar, og hildið varð fast um, at nú skuldi øll skúlagongd í Miðvági og Sandavági fara fram í felagsskúlanum á Giljanesi.

Á felagsfundi 8. mars 1961 verður sagt, at nú er komið so langt við skúlanum, at hesin kann takast í nýtslu. Avgjørt varð, at vígslan skuldi fara fram 2. páskadag, ið var 3. apríl hetta árið. Somuleiðis varð avgjørt at taka skúlan í brúk aftan á páskahátíðina. Til at taka sær av fyrireikingum til vígsluna og at stíla fyri vóru valdir: Niels Marius Petersen og Osmund Joensen, Sandavági, og Albin Wang og Sámal Ellefsen, Miðvági. Til viðgerðar var m.a. eisini skriv frá skúlanevndunum um at fáa sett eina lærarinnu, sum kundi undirvísa í týskum. At tað helst skuldi vera ein kvinna var vegna, at tað manglaði lærari til fimleik hjá gentum, nú nýggj fimleikarhøll skuldi takast í nýtslu.

At seta ein fyribils leiðara fyri skúlan varð viðgjørt á felagsfundi dagin eftir. Samtykt varð at seta Sigurd Petersen, sum higartil hevði verið leiðari av preliminerskeiðinum.

Seinasti felagsfundurin, sum var áðrenn vígsluna av skúlanum, var 24. mars 1961. Upplýst varð, at skúlaborðini komu ikki við "Tjaldur" hesaferð, og varð tí umrøtt, um vígslan skuldi setast út. Telegram var komið frá leverandørinum, Labofa, at skúlaborðini koma við "Tjaldur" komandi. Og var tá ein møguleiki fyri, at tey kunnu koma til vígsluna. Stýrini samdust tí um, at vígslan skuldi fara fram sum fyrr avgjørt 2. páskadag.

Vígsla av felagsskúlanum mánadag 3. apríl 1961

Lítið innbjóðingarkort er varðveitt í skjølunum:

"Harra ..... verður hervið boðin til vígsluhald 2. páskadag 1961 kl. 14.30, tá nýggi felagsskúlin verður vígdur. Aftaná vígsluna verða tygum boðin til borðhald.
Ger so væl at svara innan ...."
Miðvágs/Sandavágs sóknarstýri.

Felagsskúlin tikin í brúk

Smb. avgerð á felagsfundi 8. mars1961 at taka skúlan í brúk aftan á páskahátíðina varð skúlin tikin í brúk hin 3. apríl 1961.

24. juli 1961 var felagsfundur hildin í nýggja skúlanum. Niels Marius Petersen legði fram

um møguliga at seta ein lærara afturat. Tá nú 2 lærarar koma afturat, verður neyðugt við fleiri skúlastovum, og samtyktu sóknarstýrini at taka skúlakøkin og sloydstovuna (træsmíð) í nýtslu og at seta hesi bæði rúm í hóskandi stand. Samstundis varð samtykt at keypa tað innbúgv, ið tørvar.

Her sæst so at skúlakøkur og smíð ikki varð framt beinanvegin, tí brúk var fyri hølunum til aðra undirvísing.

Sambært lista so vóru 14 skúlaflokkar við børnum úr Sandavági, Miðvági og Vatnsoyrum í skúlanum fyrsta árið. Og vóru flokkarnir hesir:

1a 8 dreingir og 7 gentur. **1b** 9 dreingir, 7 gentur.
2. fl. 20 dreingir, 10 gentur.
3a 10 dreigir, 11 gentur. **3b** 10 dreingir, 12 gentur.
4. fl. 9 dreingir, 12 gentur.
5a 13 dreingir, 8 gentur. **5b** 11 dreingir, 8 gentur.
6. fl. 12 dreingir, 12 gentur.
7a 18 dreingir, 11 gentur. **7b** 13 dreingir, 11 gentur.
1. real 10 dreingir, 12 gentur.
2. real 7 dreingir, 9 gentur.
3. real 8 dreingir, 16 gentur.
Í alt 158 dreingir og 146 gentur.

Skúlastjóri settur

7. apríl 1961 skrivar Skúlastjórnin, at hon hevur boðað Sigurd Petersen, fyrstalærara, Sandavági, frá, at hann fyribils er settur sum leiðari av nýggja felagsskúlanum í Miðvági-Sandavági, eftir innstilling frá sóknarstýrunum.

Sama dag verður starvið sum skúlastjóri við felagsskúlan lýst leyst at søkja. Og er tað Skúlastjórnin, sum lýsir.

Hvussu nógv søktu á hesum sinni sæst ikki upplýst í skjølunum hjá Miðvágs kommunu, men á felagsfundi 5. juli 1961 kemur fram, at tað stendur á jøvnum millum tveir lærarar, ein úr Miðvági og ein úr Sandavági, ávikavist Jóan Hendrik Samuelsen og Sigurd Petersen, sum fingu 5 atkvøður hvør. Møguliga vóru tað bara teir báðir, sum søktu, tí skúlanevndirnar í Miðvági og Sandavági mæltu til í brævi 27. mai, at starvið varð lýst leyst av nýggjum.

Í fyrstu atløgu vil Skúlastjórnin ikki lýsa starvið leyst beinanvegin, men biður um nýggja viðgerð. Endin verður tó tann, at starvið verður lýst leyst aftur. Og grundin er skillig, at hvørgin partur hevur flutt seg.

29. september 1961 skrivar Skúlastjórnin, at 4 umsóknir eru komnar til skúlastjórastarvið við felagsskúlan Miðvág-Sandavág. Yvirlærari Ludvig Petersen, Tórshavn, lærari Napoleon Petersen, Sørvági, fyrstilærari Sigurd Petersen, Sandavági og fyrstilærari Joen Hendrik Samuelsen, Miðvági. Forstandarskapið verður biðið um í felag við forstandarskapið í Sandavági at gera innstilling og at koma við tilsvarandi innstilling frá skúlanevndunum í Miðvági og Sandavági.

Úrslitið varð nágreiniliga tað sama. Skrivað verður til skúlastjórnina 6. november 1961 og sagt, at á felagsfundi 2. november fekk Sigurd Petersen 5 atkvøður og Jóan Hendrik Samuelsen 5 atkvøður. Nr. 2 og 3 vóru innstillaðir Napoleon Petersen og Ludvig Petersen. Skriv frá skúlanevndini í Miðvági og Sandavági, dagf. 11 oktober 1961, var viðlagt.

Endin er so tann, at Undervisningsminnisteriet skar ígjøgnum. Skriv um hetta kom frá Skúlastjórnini hin 27. januar 1962, har sagt varð, at eftir innstilling frá Undervisnings- minnisteriet var við Kgl. avgerð frá 30. desember 1961 fyrstilærarin við Sandavágs skúla, Sigurd Petersen, útnevndur sum skúlastjóri við Miðvágs-Sandavágs kommunala felagsskúla frá 1. januar 1962 at rokna.

Sum nevntt hevði Sigurd Petersen verið fyribils skúlastjóri frá skúlabyrjan 3. apríl 1961.

10. juni 1971 hevði Skúlastjórnin skrivað til Rógva Egilstoft, lærara og sagt, at hann varð settur sum varaskúlastjóri við Miðvágs-Sandavágs skúla. Og var hetta eftir tilmæli frá sóknarstýrunum og skúlanevndini. – Áður var Jóan Hendrik Samuelsen varaskúlastjóri.

Skelti til skúlan

14. mars 1969 skrivar Martin Danielsen, málari, Miðvági, til Miðvágs-Sandavágs kommunur. Eg vil hervið bjóða tykkum eitt skelti, sum hevði verið vælegnað at hongt upp í skúlanum á Giljanesi og tað er soljóðandi:

"Eingin skal hjá
ungum alva
bragdarhugi forða."

Hetta er eitt ørindi úr Sigmundarkvæðnum. Skeltið er í stødd 50 x 100 cm. Kostnaðurin er 200 kr.

13. mai 1969 skrivar Heini F. Petersen vegna lærararáðið á felagsskúlanum, at samtykt varð at viðmæla at keypa skeltið, smb. skriv frá sóknarstýrunum.

Nøkur tøl

Í 1967 eru sambært lista, 16 skúlaflokkar á skúlanum í Giljanesi og árið eftir 15 flokkar.

Í 1967/68 eru 2 flokkar frá 1. til 7. skúlaár uttan 4. flokkur. 312 næmingar.

Í 1968/69 eru 2 flokkar frá 1. til 7. skúlaár uttan 5. flokkur. 299 næmingar.

Umframt 1. til 3. real, 1 flokkur hvør.

Í 1970 er vorðið so trongt í skúlanum, at avgerð verður tikin um at brúka gomlu skúlarnar í Miðvági og Sandavági aftur. 1. til 4. flokkur koma so at ganga í gomlu bygdaskúlunum. Hetta var kanska eisini mett tryggari, tí børnini gingu framvegis til og frá skúla, og ferðslan øktist munandi í sjeytiárunum.

Skúlaárið 1976/77 eru 21 flokkar í skúlaskipanini hjá Miðvágs-Sandavágs skúla.

1. – 7. flokk, 2 flokkar hvør. Har 1. – 4. flokkar ganga í Miðvági og Sandavági.

1. til 3. real 1 flokkur hvør og 8. til 10. flokk 1 flokk hvør.

Í skúlanum ganga 204 dreingir og 210 gentur, ella 414 børn í alt.

Umframt vanligu undirvísingina eru 26 tímar um vikuna til serundirvísing og 3 tímar um vikuna til latín. Sóknarpresturin undirvísti í latín.

Miðvágs – Sandavágs skúli – næmingar 1989-2000:

89/90	Miðv.	Sandv.	Tils	90/91	Miðv.	Sandv.	Tils
-	186	132	318	-	187	129	316
-	58%	42%	100%	-	59%	41%	100%
91/92	Miðv.	Sandv.	Tils	92/93	Miðv.	Sandv.	Tils
-	193	127	320	-	180	122	302
-	60%	40%	100%	-	60%	40%	100%
93/94	Miðv.	Sandv.	Tils	94/95	Miðv.	Sandv.	Tils
-	154	111	265	-	154	109	263
-	58%	42%	100%	-	59%	41%	100%
95/96	Miðv.	Sandv.	Tils	96/97	Miðv.	Sandv.	Tils
-	156	112	268	-	160	108	268
-	58%	42%	100%	-	60%	40%	100%
97/98	Miðv.	Sandv.	Tils	98/99	Miðv.	Sandv.	Tils
-	158	106	264	-	159	96	255
-	60%	40%	100%	-	62%	38%	100%
99/00	Miðv.	Sandv.	Tils	00/01	Miðv.	Sandv.	Tils
-	162	95	257	-	161	92	253
-	63%	37%	100%	-	64%	36%	100%

Skúlin á Giljanesi 60 ár

Hin 3. apríl 2021 fylti felagsskúlin á Giljanesi Miðvágs- Sandavágs Skúli 60 ár. Dagurin varð hátíðarhildin á skúlanum fríggjadagin 26. mars 2021 við tónleiki, har næmingar spældu, og m.a. eisini Tinganest, og við spølum og onkrum til matna. Sjálvur føðingardagurin 3. apríl, var leygardagur, og tá var páskafrí, tí varð dagurin hildin nakrar dagar undan.

Meira um felagsskúlan á Giljanesi er ætlanin at skriva í øðrum verki.

Í 2021, tá skúlin fylti 60, stillaðu skúlabørn á Giljanes skúla seg í eitt 60-tal á vøllinum við skúlan.

Lærarar 1961 og fram

Inger Margrethe Guld, Store-Nystrup, Danmark, sett í starv sum lærarinna við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1961. Hevði lærara-útbúgving úr Danmark.

Smb. skrivi var m.a. lýst í blaðnum "Folkeskolen" eftir lærara, og at hesin skuldi kunna undirvísa í týskum. Tað er so eftir hetta, at Inger Margrethe Guld søkir starvið. Brævaskifti millum hana og kommununa er varðveitt, har hon mest spyr um íbúðina, hon skal fáa, sum sambært skrivunum sýnist at vera á Giljanesi, tí sagt verður, at hon er tætt við skúlan og givist var tá við at brúka Gamla skúla. Og annars, at tað eru eini sethús við el, miðstøðuhita og øllum vanligum nútímans hentleikum. Upplýst er eisini, at ein danskur arbeiðsformaður fyri havnaarbeiðinum við konu búði í løtuni í íbúðini. Men havnaarbeiðið varð liðugt, helst í juli mánaði, og varð íbúðin leys tá.

27. januar 1963 skrivar Inger Guld og søkir kommununa um 200 kr. til at keypa inn tekni- og máliútgerð til fakið tekning í skúlanum. Ein líknandi upphædd varð játtað seinasta ár eisini, sigur hon, har umtalað verður eisini at prenta á toy og stoff. Sigurd Petersen, skúlastjóri viðmælir umsóknini og sigur, at tað verður brúkt til umleið 140 børn í skúlanum. Hetta varð so samtykt.

Sum skilst á skrivi frá 1966 var hon í starvi til hin 31. juli 1963, og fór síðan helst til Havnar at virka sum lærarinna. Smb. skrivinum er hon so í 1966 staðfest av búgva í Tórshavn.

Rógvi Egilstoft, f. 11. desember 1937 í Kvívík. Giftur við Ásu f. Petersen, Sandavági. Rógvi tók læraraprógv á Haslev Seminarium 1961. Í fyrstu skrivunum hjá kommununi í 1961 er hann skrivaður Jacobsen. Í 1963 og seinni er hann skrivaður Egilstoft, so hann hevur helst tikið navnaskiftið um tað mundið.

Rógvi var smb. skrivum settur sum sonevndur læraraaspirantur við felagsskúlan frá 1. august 1961 at rokna. Varð settur í fast starv sum lærari frá 1. mars 1964 við besta viðmæli frá skúlanevndini, stendur skrivað. Hann var ein av lærarunum, sum fekk húsaendurgjald upp til 31.12.1964, tá tað var avtikið. 10. juni 1971 hevði Skúlastjórnin skrivað til Rógva Egilstoft, lærara og sagt, at hann varð settur sum varaskúlastjóri við Miðvágs-Sandavágs skúla. Og var hetta eftir tilmæli frá sóknarstýrunum og skúlanevndini. – Áður var Jóan Hendrik Samuelsen varaskúlastjóri. Í bókini frá 1997 um føroysku fólkaskúlalærararnar, er Rógvi framvegis varaskúlastjóri, og stendur eisini um hann har, at hann hevur verið deknur í Miðvágs kirkju í nógv ár.



Páll Nólsoy Thomsen, føddur 30. november 1929 í Nólsoy. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1956. Var lærari í Sandavági frá 1956 og so í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 3.4.1961 til 31. juli 1963. Í Nólsoy frá 1963 til 1995, tá hann fór úr starvi.

Heini F. Petersen, føddur 28. august 1936 í Sandavági, haðan bæði foreldrini vóru ættað. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1958. Var lærari á Millum- og Realskúlanum í Tórshavn august- oktober 1958, í Æðuvík, Glyvrum og Søldarfirði oktober 1958 til juli 1959. Lærari í Sandavági frá 1. september 1959, og frá 3.4.1961 lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla, til hann fór frá í 1999 við eftirløn. Var bókavørur í Miðvágs-Sandavágs bókasavni og skúlabókavørur í skúlanum. Hevur verið annar rithøvundur til bøkurnar: Mikkjalsbók, Vága Samferðslusøga og Av fjalli at fjørustrond, har henda seinasta er søga um Sandavág, saman við ávikavist: Jákup Reinert Hansen, Dánjali Poulsen og Jóannes Heinesen. (Í Vága Samferðslusøgu hevði undirritaði eisini nakað av tilfari um eldru tíðina, sum tilskilað er nærri í forðorunum í teirri bókini.)

Brynhild Ludvig, Tórshavn, f. 9. mai 1941 í Miðvági, dóttir Johannes Follend prest í Vágum. Er í skjølunum hjá kommununi frá 1962 og 1963 skrivað, Brynhild Trier Follend. Brynhild tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1962. Var lærari á Giljanesi frá 1. august 1962 til endan av juli 1963, Skúlaheiminum Frederikshøj 1968-76, Strandgårdskolen, Ishøj 1976-78, Runavíkar skúlum 1978-92, Dansk Flygtningehjælp, Keypmannahavn 1993-94, PPR, pædagogisk, psykisk rådgivning, í Keypmannahavn 1994-95, Runavíkar skúlum 1995-96 og seinni í Strandskolen Århus 1996.

Anna Sofía Dalsgaard Petersen f. Dalsgaard, fødd 16. oktober 1907 á Velbastað. Gift við Napoleon Nolsøe Petersen, lærara, ættaður úr Sørvági. Anna tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1929, og var lærari í Kaldbak, so við Gjógv og Norðskála 1929-30, í Froðba 1930-31, í privatskúla Tórshavn 1931-32, í Kirkjubø 1933, í Sandavági 1954-55, Sørvági 1958-60 og í Miðvágs-Sandavágs skúla 1962-67. Hon doyði 2. oktober 1994.

Gutti Petersen, føddur 2. februar 1939 í Bø. Gutti tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1962. Læraraaspirantur 1962-63, settur sum lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1963 at rokna og røkti starvið har til hann gavst fyri aldur.

Else Marie Lund, DK. Læraraprógv frá Skaarup Seminarium. Else Marie var sett sum lærarinna við felagsskúlan Miðvági-Sandavági frá 1. august 1964 til 31. juli 1965. *(Eingin mynd funnin)*.

Sigrun Juul Samuelsen, fødd 9. juni 1934 í Klaksvík. Tók læraraprógv á Haslev Seminarium 1962. Var lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla 1964-65. Var áðrenn og eftir við ymsar skúlar, men frá 1973 við skúlan á Ziskatrød í Klaksvík.

Marius Pauli Thomassen, føddur 15. februar 1942 í Sandavági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1964. Lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1964 til 31. oktober 1996.

Hans Eli Hansen, føddur 16. september 1942 í Klaksvík, sonur Jógvan Fróðan Hansen úr Miðvági, búsitandi í Klaksvík. Hans Eli tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1966. Var lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla 1966-71, Bøgballe skúla í Jyllandi 1971-81 og í Skúlanum á Ziskatrød síðan 1981. Sagt verður um Hans Eli, at hann endurstovnaði Miðvágs Bóltfelag í 1966 og var tess formaður 1966-71. Nevnt er nakað um tað í partinum um Miðvágs Bóltfelag.

24. oktober 1969 hevur Skúlastjórnin skrivað til Hans Eli Hansen, lærara, sum er á Goethe Intitut, Iserloh, Týsklandi á skeið í týskum frá 11.8.1969 til 20. desember 1969, og sum hevur søkt um at halda áfram við skeið í enskum í Onglandi frá januar 1970 til 20. juni 1970 og sagt, at hetta verður loyvt honum og at hann fær frían vikar fyri seg í felagsskúlanum.

Osmund Joensen, f. 28. juli 1927 í Sandavági. Tók læraraprógv frá Føroya Læraraskúla og hevur verið lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1966 til 1992, tá hann fór úr starvi. Tók prógv í týskum máli á Goethe Institut í München í 1979. Hevði skiparaprógv frá 1952 og hevði heimaskiparaskeið á Giljanesi 1977-81.

Magna Reid Joensen, fødd 24. apríl 1945 í Klaksvík, gift og búsitandi í Sandavági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1967. Lærari á Giljanesi 1967-68 og 1969-71 og síðan frá 1976. Við setanina í 1967 er hon skrivað frk. Magna Joensen. Er í 1969 skrivað Thomassen, og er smb. skrivi august hetta árið sett í starv við 16 tímum um vikuna, smb. umsókn, sum so er hækkað seinni. Smb. bókini Føroyskir fólkaskúlalærarar er hon framvegis í starvinum í 1997. Varð seinni lærari í Haraldsundi.

Hildur Joensen, fødd 7. juli 1946 í Miðvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1969 og var lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla síðan 1969, til hon gavst fyri aldur.

Herleif Hansen, føddur 6. juni 1945, ættaður úr Sørvági. Tók læraraprógv frá Føroya Læraraskúla í 1969. Lærari í Klaksvík 1969-70 og síðan 1. august 1970 lærari við Miðágs-Sandavágs skúla, til hann gavst fyri aldur.



Allan Heini Gásdal, føddur 6. juli 1948 í Sørvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1971 og hevur verið lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla síðan 1971, til hann gavst fyri aldur.

14. oktober 1976 skrivar Skúlastjórnin at loyvi er givið, smb. umsókn 30.6.76, Allan Heina Gásdal, um orlov til at fara á ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole skúlaárið 1976/77.

Árni Jacobsen, føddur 21. desember 1944 í Sandavági, bús. Miðvági. Tók læraraprógv á Silkeborg Seminarium 1970. Var lærari á Eiði 1970-71 og hevur verið lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla síðan 1971, til hann gavst fyri aldur. Var eisini varaskúlastjóri. Var áður vikarur á Slættanesi 1962-63 og í Mikladali 1966-67.

Marianna Simonsen, f. 15. august 1949 í Miðvági, dóttir Albert Joensen úr Fámjen, kommunuskrivari og kommunalur politistur í Miðvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1972 og hevur starvast við Miðágs-Sandavágs skúla síðan 1. august 1972, til hon gavst fyri aldur. Marianna var bygdaráðsformaður í Miðvági frá 9.9.1993 til 31.12.1996.

Hans Jørgensen, f. 4. juli 1945. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1972, og hevur starvast við Miðágs-Sandavágs skúla síðan 1. august 1972, til hann gavst fyri aldur. Var skúlastjóri árini 2002 til 2012. Hans var bygdaráðs-formaður í Miðvági frá 01.01.1981 til 31.12.1984.



Andrass Heriksen, f. 7. august 1949 í Sørvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1975. Lærari við Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1975 til 1985. Lærari í Sørvági frá 1985-2014, skúlastjóri í Sørvági 2007-2014.

Jákup Jacobsen, f. 22.7.1941 í Mykines, bús. Miðvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1964. Lærari í Mykinesi 1964-76 og í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1976, til hann gavst fyri aldur í 2001.

Hin 6. mai 2008 skrivaði Vágaportalurin: Jákup í Løðu lærari í Mykinesi. Mentamálaráðið søkti herfyri eftir lærara til Mykinesar skúla, men eingin umsókn kom inn. Tí var ikki annað at gera enn at venda sær til Jákup í Løðu, sum er farin frá sum lærari - tað var í 2001 - um at fáa hann at taka hesar báðar mánaðirnar, sum eftir eru av skúlaárinu.

Petur Kruse, f. 4. november 1949 í Sørvági. Búsitandi í Sørvági, giftur Biritu Gunnarsdóttir Kruse f. Petersen. Petur tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1975. Var lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1976 til hann andaðist 4. mai 2001. Petur var bygdaráðs- formaður í Sørvági 1992 til 2000. Hevur skrivað bókina, Sørvágs kirkja 1886-1986.

Birita Gunnarsdóttir Kruse, f. Petersen, 26. september 1952 í Vestmanna. Búsitandi í Sørvági, gift Petur Kruse. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1975. Varið lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla til hon gavst fyri aldur.

Árni Frederiksen, f. 3.4.1948 í Miðvági. Tók læraraprógv á Haslev Seminarium 1972. Var lærari á Ellemarksskolen í Køge 1973-75, Alkestrupskolen í Tureby 1975-78. Í Miðvágs-Sandavágs skúla síðan 1978, til hann gavst fyri aldur.

Sjúrður Jóhan Guttesen, f. 6.9.1954 í Bø. Búð í Sørvági í nógv ár og seinni í Miðvági. Tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1978. Var lærari í Hesti 1978-79 og í Miðvágs-Sandavágs skúla síðan 1979, til hann gavst fyri aldur.

Skúlaskapur 1962 – 1979

Frá apríl 1961 til summarið 1970 var eingin skúlagongd í Gamla skúla í Miðvági, men bara í Miðvágs-Sandavágs skúla á Giljanesi.

Felags tannlækni

Á sóknarstýrisfundi 17. mai 1962 var tannlæknaspurningurin til viðgerðar. Í Sørvági var tannlæknastova gjørd í 1959, men fyrstu tíðina gekk striltið við skúlatannlækna. Ein eldri danskur tannlækni, Kaj Lydersen Kaysfeld, hevði verið frá 1959, men hann var sjúkur og var lítið til arbeiðis og var meginpartin av tíðini í Danmark. Men í 1962 var tað komið hartil, at nýggjur tannlækni var vantandi skjótt.

Á nevnda fundinum greiddi Albin Wang, formaður, frá málinum, og varð upplýst, at hesin spurningur hevur verið viðgjørdur á felags fundi millum øll sóknarstýrini. Ein meiriluti av sóknarstýrunum var fyri, at ganga við til at fáa eina skipan í lag við sóknarstýrið í Sørvági og til at taka lut í útreiðslunum, ið standast av felags tannlæknaskipan frá 1. apríl 1962.

Fyrsti tannlæknin í Sørvági, var danin, Kaj Lydersen Kaysfeld. Mynd: Leif Nolsøe, uml. 1961.

Hetta er treytað av, at tannlæknin er komin at røkja hetta starv innan 1. juli í ár. Hans Martin Thomassen var fyri at fáa eina tannlæknaskipan í lag nú millum kommunurnar í Vágum.

Í skjølunum hjá Sørvágs kommunu er nevnt, at ætlanin var í 1963 eisini at gera tannklinikk í Giljanes skúla, og var ætlanin tá, at hava ein tannlækna í oynni, sum so skifti ímillum báðar klinikkirnar, og sýnist semja at hava verið um tað. Men sum kunnugt bleiv tað ongantíð til nakað við klinikkini á Giljanesi, og tannlæknin bleiv so bara í Sørvági. At tað var rættuliga dýrt at gera tannklinikk var helst ein høvuðsorsøk til tað.

Í fyrstuni gekk tað striltið, tí tað eydnaðist ikki at fáa ein veruliga virkandi tannlækna settan í starv fyrr enn í 1964. Og tástandi kundi ein siga, at tannlæknastovan fór at virka, sum hon átti.

Skipanin við felags tannlækna fyri størru bygdirnar í Vágum byrjaði hin 1. apríl 1962. Í tannlæknaroknskapinum fyri fíggjarárið 1962/63 sæst, at býtið fyrsta árið var eftir fólkatalinum: Sandavágur 704 fólk, Miðvágur, 820 fólk og Sørvágur, 928 fólk.

Hin 1. januar 1963 komu Bøur og Mykines uppí samstarvið. Býtið varð nú fastsett prosentvís: Sørvágs kommuna 38%, Miðvágs kommuna 27%, Sandavágs kommuna 27%, Bíggjar kommuna 4% og Mykines kommuna 4%.

Í 1964 varð tannlækni settur í starv og vóru skiftandi tannlæknar fram til 1969, tá Karl Jóhan Nielsen í Vatnsoyrum varð settur í starv. Og var hann í starvi heilt fram til 2013. Og øll hesi ár var tað stabilt við tannlækna í Vágum.

Sum skilst hevur Karl Jóhan eisini havt tannlæknaviðgerðir í Gamla skúla í Miðvági, har talan kanska mest hevur verið um kanningar av tonnunum. Har var so ikki fult útgjørd tannlæknastova. Á kommunufundi 6. oktober 1977 er til viðgerðar umsókn frá Karl Johan Nielsen, tannlækna, dagfest 2.3.1977, um at fáa eitt fajansu vask og eitt spegl uppsett í gamla skúla í Miðvági. Samtykt varð at fáa hetta gjørt.

Í 1977 varð tannlæknastova opnað í Sandavági og segði Sandavágs kommuna seg úr samstarvinum um felags tannlækna, men varð hetta ikki góðtikið av hinum kommununum, og var stríð um hetta í fleiri ár. Til tað í 1984 at enda varð góðtikið, at Sandavágs kommuna

ikki var í samstarvinum longur. Allar hinar kommunurnar hildu tó fram í samstarvinum við Sørvágs kommunu, eisini Miðvágs kommuna, helst tí at tannlæknin búði í kommununi. Og børn í Miðvági gingu til tannlækna í Sørvági so leingi sum Karl Jóhan Nielsen var tannlækni.

Í apríl 2013, tá Karl Jóhan Nielsen segði seg úr starvi fyri aldur, samtykti kommunustýrið fyri Vága kommunu, at frá 1. mai 2013 skuldu øll børn í kommununi frá 0 ár til og við 9. flokk undir somu tannlæknaskipan. Við tí skuldu børnini í Miðvági og Vatnsoyrum, sum higartil í yvir 50 ár høvdu gingið til tannlækna í Sørvági, framyvir ganga til tannrøkt í tannlæknastovuni í Sandavági.

Nýggj skúlastova í Gamla skúla

Á fundi 6. juni 1972 er til viðgerðar at gera eina skúlastovu afturat í Gamla skúla. Einkjan eftir gamla skúlastjóran Dagmar Joensen Næs býr framvegis til leigu í íbúðini í skúlanum. Neyðugt verður at siga hana upp, tí parturin av íbúðini skal gerast til skúlastovu. Samtykt varð at siga leigumálið upp og gera eina skúlastovu har, báðar stovurnar nú eru, og lata køkina og loftið vera, sum tað er, og kann tann núverandi leigarin fyribils leiga køkin og loftið.

3. juli verður sagt, at leigarin er uppsagdur. Hon fór á ellisheimið at búgva hin 7. august 1972.

13. juni 1972 er arbeiðssetningur skrivaður yvir arbeiðið at gera skúlastovuna: 1. Taka veggin niður millum báðar stovurnar. 2. Leggja upp undir loftið, eins og gjørt er í hinum skúlastovunum. 3. Gera bæði vindeyguni í stovuni eins og tey í verandi skúlastovum. 4. Hurð gerast út í skúlastovuni sum nú er. Møguliga hurðin, sum er millum skúlastovurnar, nýtast til hetta endamál. 5. Hurðin út í gongina lokast, taka geriktina frá og møguliga papp koyrast útyvir hurðina ájavnt við veggin. 6. Leggja linoleum á gólvið og leggja harðar plátur undir linoleumið og festast væl í gólvið. 7. Oljutapet skal á allar veggirnar og papp har tað er neyðugt, áðrenn tapetiserað verður. 8. Fót og loftlistar málast, somuleiðis geriktir og kaminin. 9. Ovnarnir skulu takast burtur, og alt gerast aftur, har teir hava verið.

Arbeiðið uttan: Alt málast einaferð, veggir, tak og træverk. Alt arbeiðið skal vera liðugt innan 12. august 1972.

Arbeiðið at mála skúlan uttan verður boðið út hin 7. juli 1972. Har tilboðini bert skuldu umfata arbeiðsløn og skuldu vera inni innan 11. juni 1972 kl. 18.

10. juni 1972 skrivar Harald Erikstein, Miðvági, og bjóðar sera at gera skúlastovuna fyri 3.400 kr. Sama dag skrivar hann og bjóðar sær at mála skúlan uttan fyri 2.448 kr. Tað er samstundis einasta boð, sum kemur inn.

Tilboðið er til viðgerðar á fundi 13. juli 1972. Samtykt varð at taka við báðum tilboðunum, sambært tær treytir, ið vóru fyri hesi arbeiðir. Skrivað varð til hann hin 14. juli og sagt frá hesi avgerð og at arbeiðini skuldu vera liðug innan hin 12. august. So hann hevði bert ein lítlan mánaða at gera alt hetta í.

Leydardagur avtikin sum skúladagur

Skúlastjórnin skrivar hin 9. februar 1968, sum svar upp á skriv frá Sigurd Petersen, skúlastjóra, dagf. 16.9.67, at vikutímatalið hjá 1., 2., 3. og 5. klassa við Miðvágs-Sandavágs skúla er økt við 1 tíma vegna at tað frá 1. august 1967 at rokna er innført vikuskiftisskipan við skúlan. Og hevur Skúlastjórnin samtykt at góðtaka hetta. Hetta merkti, at skúlavikan varð 5 dagar, mánadag til fríggjadag, ístaðin fyri 6 dagar áðrenn, har so leygardagurin var strikaður sum skúladagur.

Stig tikið til bygging av ítróttarhøll

Á felagsfundi 8. mai 1972 millum Miðvágs og Sandavágs kommunur varð val av nevnd til

fyrireikan til bygging av eini felags ítróttarhøll. Samtykt varð, at hvør kommunan velur hvør 2 limir í nevndina, og at ítróttarfeløgini í Miðvági og Sandavági velja 2 limir hvør frá hvørjari bygdini í nevndina, og at skúlastjórarnir báðir* verða limir í nevndini, sum soleiðis telur 10 limir. [* Sum má vera skúlastjórin og varaskúlastjórin.]

Vegna ósemju og stríð, sum er umtalað aðrastaðni, skuldu tað tó ganga meir enn 10 ár til ítróttarhøllin at enda stóð á Giljanesi. Stórur partur av ósemjuni var júst um, hvar høllin skuldi standa.

Ábøtur á Gamla skúla

Á bygdaráðsfuni hin 1. apríl 1975 var samtykt at gera spælipláss við gamla skúla. Eisini varð samtykt at bróta havagarðin niður, og eisini gera havan til spælipláss.

Urtagarður var rundan um skúlan, sum sigist stava frá, tá Jákup Jacobsen var lærari. Nú varð hann so tikin burtur og spælipláss gjørt á staðnum.

10. februar 1976 skrivar Hans Jørgensen, lærari, og sigur m.a. at áður var ein maður, sum plagdi at halda skúlan og kommunuhúsið. Nú er hesin givin og mælir hann til at heita á Alfred Jørgensen, um hann heldur seg til, at halda áfram við hesum.

- Viðmerkjast kann viðvíkjandi, at ein fastur maður var, so er einki í skjølunum, sum bendir á tað, tí arbeiðið var vanliga boðið út. At onkur kanska ofta hevur havt lægsta boð, ger so ikki, at hesin hevði tað sum fast ella partvís starv.

Skrivið var til viðgerðar á fundi 8. mars 1976. Samtykt varð at svara, at vanligt hevur verið at biðið fólk til at gera tað, sum hevur verið neyðugt, tá lærarin ella onkur annar hevur sagt frá. Samtykt varð at heita á lærararnar um at siga frá, tá okkurt treingir til at verða gjørt.

Á fundi 2. november sama ár varð samtykt at keypa 23 tveymans borð við stólum til gamla skúla.

Í februar 1977 skriva Sigurd Petersen skúlastjóri og Rógvi Egilstoft varaskúlastjóri m.a. um flokkarnar, sum ganga í Gamla skúla. Nevnt verður eisini, at eftir núverandi skipan ganga 1., 2., 3. og 4. flokkur í Gamla skúla. Har er hampuliga rúmligt við trimum stovum – 4. flokkur nýtir ta einu stovuna 21 tímar um viknuna, 3. flokkur eina av stovunum fyrrapart og 1. flokkur seinnapart. Ta triðju stovuna nýtir 2. flokkur 17 tímar um vikuna. Her er sostatt rúm til serundirvísingartímar í tíðini, sum henda og stovan hjá 4. flokki stendur tóm. Tríggjar seinnapartar er 3. og 4. fl. á Giljanesi til fimleik og hondarbeiði.

Gamli skúli málaður

Uml. mai 1986 er lýsing hongd í talvuna. Máling av Gamla skúla. Reinsing og máling av Gamla skúla uttan. Litir skulu vera sum áður. Tekjan skal trykkspulast og málast við oljumáling. Vindeygu og træverk uttan reinsast og málast við “Beckers, utomhus acryl” ella javngóðum. Grót og betongveggir trykkspulast og mosi og skittur reinsast burtur og málast við “Beckers, utomhus acryl”. Arbeiðið skal vera liðugt til vestanstevnuna 1986. Upplýst sæst annars ikki hvør, ið fekk arbeiðið.

Gamli skúli sum ansingarstovnur

Á almennum bygdaráðsfundi, 14. februar 1989 varð til viðgerðar, at dagrøktarleiðarin biður um at fáa eitt øki rundanum Gamla Skúla stikað inni til spælipláss. Tummas Lauritsen, arkitektur hevur gjørt 3 uppskot, hvussu hetta kann gerast. T.N. mælir tó til, at tillaga valda uppskotið soleiðis, at báturin, sum børnini spæla í, kann vera verandi.

Her er Gamli skúli so vorðin ansingarstovnur til børn, sum hann framvegis er. Nærri er sagt frá tí undir evninum, barnaansingin.

Virðisáseting av Gamla skúla 1915 til 1990

Í roknskapunum hjá kommununi er virði á nøkrum av føstu ognunum hjá kommununi ásett, harímillum virði á skúlabygninginum (gamla skúla). Í 1915 er virði á bygninginum sett til 7.000 kr. Hækkað í 1930 til 15.000 kr. So tvífaldað í 1950 til 30.000 kr. Hækkað í 1953 til 32.000 kr. Aftur hækkað í 1965 til 50.000 kr. og frá 1972 og heilt fram til 1990 er virðið sett til 60.000 kr. uttan at verða endurskoðað. Eftir hetta eru hesir postar ikki í roknskapinum.

Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli

Tað er eftir at Miðvágs-Sandavágs skúli ella Skúlin á Giljanesi varð tiki í brúk, at kommunurnar tóku seg saman um kvøldskúlaundirvísingina eisini. Nøkur av teimum, sum eru nevnd frammanfyri her, komu so eisini upp í hesa skipan frá vetrinum 1961/62. Annars eru tað tey, sum eru nevnd herfrá, sum vóru nýggju undirvísararnir. Og tey eru nokkso nógv í talið tilsamans gjøgnum árini.

Gutti Petersen, lærari, Sandavági. 28. mai 1963 skrivar Skúlastjórnin at játtað er Gutta Petersen, Sandavági 179,20 kr. fyri at hava undirvíst 14 tímar í kvøldskúla við Miðvágs-Sandavágs skúla.
Sigurd Petersen, lærari, Sandavági. 28. mai 1963 skrivar Skúlastjórnin at játtað er Sigurd Petersen, Sandavági 179,20 kr. fyri at hava undirvíst 14 tímar í kvøldskúla við Miðvágs-Sandavágs skúla.
Marius Pauli Thomasen, lærari, Sandavági. Fyri veturin 1972/73 varð goldið Marius Paula 1.920 kr. fyri at hava undirvíst í kvøldskúla. Kommunuar partur var 576 kr. Og fyri veturin 1973/74 fek hann goldið 3.672 kr., har kommununar partur var 1.020,60 kr.
Martin Malberg á Mýruni, Sandavági. Fekk goldið 3.402 kr. fyri kvøldskúlaundirvísing veturin 1973/74, kommununar partur var 1.101,60 kr.
Ruth Johannesen. Fyri at hava undirvíst 130 tímar á kvøldskúla veturin 1973/74 fekk Ruth goldið 7.020 kr., kommununar partur var 2.106 kr.

Komandi árini eru sera mong ymisk, sum halda kvøldskúla, so lættast er at taka tað ár fyri ár, heldur enn hvønn undirvísara sær. Frá 1976 sæst hvat tey hava undirvíst í, sum ikki altíð er nevnt áðrenn. Hereftir er eisini bara nevnt undirvísari og fak.

Ein kann siga, at kvøldskúlin gerst meira framsøkin og tað koma fleiri nýggjar og spennandi lærugreinir afturat við árunum. Hetta hevur sjálvandi eisini at gera við, at tað er uppi í tíðini, og at kommunurnar seta meira pening av til kvøldskúlan.

Kvøldskúli á Giljanesi

Veturin 1975/76
Havgerð Niclasen, seyming (gl. skúli)
Marin Heinesen, matgerð
Sonja Frederiksen
Sanna Joensen

Veturin 1976/77
Ásmund Joensen, dugnaskapsroynd í sigling.
Aibritt á Plógv, fimleikur kvinnur.
Sunneva Jacobsen, maskinskriving.
Marin Heinesen, matgerð.

Veturin 1977/78
Ásmund Joensen, dugnaskapsroynd sigling
Aibritt á Plógv, fimleikur
Marin Heinesen, matgerð
Allan Heini Gásdal, enskt
Skúlin, maskinskriving

Veturin 1978/79
Marin Heinesen, matgerð
Herleif Hansen, træsmíð
Símun Thomassen, metalsmíð
Emmy Joensen og Elisabeth Simonsen, fimleik
Magna Thomassen, hondarbeiði
Skúlin, maskinskriving

Veturin 1979/80
Marin Heinesen, klænkiskeið
Magna Thomassen, hondarbeiði
Turid Hattarstein, motiónsfimleik
Turid Hattarstein, klaverspæl
Herleif Hansen, stoffmáling
Herleif Hansen, træsmíð
Árni Jacobsen, matematik
Petur og Birita Kruse, svimjing á byrjunar
Ásmund Joensen, fyrstahjálp
Kjartan Hansen, heimaskiparaskeið
Skúlin, maskinskriving
Richard Jørgensen, trolbøting og sjómansk.

Veturin 1980/81
Herleif Hansen, træsmíð
Herleif Hansen, stoffmáling
Ásmund Joensen, heimaskiparaskeið
Richard Jørgensen, trolbøting, spleising o.a.
Fía Khaliqhey, enskt 1
Fía Khaliqhey, maskinskriving
Eyð Niclasen, Patscwork/seyming og tilskering
Petur og Birita Kruse, svimjing á byrjunar
Árni Jacobsen, rokning og matematik
Marin Heinesen, klænkiskeið
Skúlin, motiónsfimleik
Rógvi Egilstoft, orgul

Veturin 1981/82
Oddmar Ravnsfjall, tilevning
Eyð Niclasen, seyming
Marin Heinesen, matgerð
Richard Jørgensen, heimaskiparaskeið
Petur og Birita Kruse, svimjing á byrjunar
Thurid Olsen, motiónsfimleik
Skúlin, maskinskriving
Inge Dorthe Larsen, guitar, floyta og klaver
Rógvi Egilstoft, orgul

Veturin 1982/83
Guðrið á Lofti, fimleik kvinnur
Petur og Birita Kruse, svimjing, 3 bólkar
Marin Heinesen, matgerð
Jóhannes Hansen, træsmíð
Thurid Olsen, hondarbeiði
Anders H. Jensen, tilevning
Herleif Hansen, stoffmáling
Allan Heini Gásdal, maskinskriving
Peter Grønsgård, klaver/urgul/kórsang
Torkil Haraldsen, teknmál

Veturin 1983/84
Jóhannes Hansen, træsmíð
Anders H. Jensen, postalínsmáling
Inger R. Jensen, voksbatik (stoffmáling)
Thurid Olsen, hondarbeiði v. hond og mask.
Tummas Lauritsen, bygging, húsasmíð o.a.
Petur og Birita Kruse, svimjing, 3 bólkar
Guðrið á Lofti, fimleik kvinnur
Marin Heinesen, matgerð
Skúlin, klaverspæl og maskiskriving, 2 bólkar

Veturin 1984/85
Eyrun Jørgensen, seyming
Marin Heinesen, matgerð, klænkiskeið
Thurid Olsen, hondarbeiði
Oddmar Ravnsfjall, guitarspæl
Hanna Gaardlykke, maskinskriving
Guðrið á Lofti, fimleik, 2 bólkar
Kathrina Hansen, seyming

Veturin 1985/86
Marin Heinesen, matgerð
Símun Thomassen, jarnsmíð
Thurid Olsen, hondarbeiði/orgul 2 hold
Hanna Svabo, maskinskriving
Kathrina Hansen, seyming
Eyðrun Jørgensen, seyming
Oddmar Ravnsfjall, guitar
Guðrið á Lofti, aerobicfimleik
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Sanna Akselsen, myndaveving
Jóhannes Hansen, træsmíð

Veturin 1986/87
Marin Heinesen, matgerð
Thurid Olsen, hondarbeiði
Eyðrun Jørgensen, seyming
Kathrina Hansen, seymimg
Sanna Akselsen, myndaveving
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Hanna Svabo, maskinskriving
Jóhannes Hansen, træsmíð
Mannfred Thomassen, jarnsmíð
Oddmar Ravnsfjall, guitar
Guðrið á Lofti, aerobicfimleik

Veturin 1987/88
Kathrina Heinesen, seyming
Eyðrun Jørgensen, seyming
Thurid Olsen, hondarbeiði
Sanna Akselsen, kvinnufimleik
Guðrið á Lofti, aerobicfimleik
Hanna Svabo, maskinskriving
Jóhannes Hansen, træsmíð
Manfinn Thomassen, jarnsmíð
Kári Thorsteinsson, ferðslulæra
1989/90 Eingir upplýsingar funnir

Veturin 1988/89
Sanna Akselsen, motiónsfimleik kvinnur
Guðrið á Lofti, aerobicfimleik
Pauli Nolsøe, maskinskriving
Pauli Nolsøe, motiónsfimleik menn
Martin Pollard, orgul og klaver
Jóhannes Hansen, træsmíð
Oddmar Ravnsfjall, guitarspæl
Eyðrun Jørgensen, seyming
Kathrina Hansen, seyming
Hildur Joensen, kunstbinding, brodering o.a.

Veturin 1990/91
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Guðri á Lofti, fimleik m/k, 2 hold
Kathrina Hansen, seyming
Eyðrun Jørgensen, seyming
Susan Rummelhoff, knípping
Susan Rummelhoff, leðurseyming
Hildur Joensen, hondarbeiði
Tórhallur Simonsen, mask.skr./telda, 2 sk.
Martin Pollard, orgul og klaver
Lydia Laksafoss, ættargransking
Hans Jørgensen, føroysk rættskriving

Veturin 1991/92
Lydia Laksafoss, ættargransking
Kathrina Hansen, seyming
Janni Gudmundsen, seyming
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Guðri á Lofti, aerobicfimleik
Jónvør Joensen, fólkadans
Rutt Petersen, hondarbeiði
Tummas Lauritsen, træskurð og smíð
Tórhallur Simonsen, maskinskriving
Tórhallur Simonsen, teldulæra

Veturin 1993/94
Lydia Laksafoss, ættargransking
Kathrina Hansen, seyming
Janni Gudmundsen, seyming
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Guðri á Lofti, aerobicfimleik
Jónvør Joensen, fólkadans
Rutt Petersen, hondarbeiði
Tummas Lauritsen, træskurð og smíð
Tórhallur Simonsen, mask.skr./telda, 2 hold

Veturin 1994/95
Lydia Laksafoss, ættargransking
Janni Gudmundsen, seyming
Susan Rummelhoff, seyming
Sanna Akselsen, motiónsfimleik
Guðri á Lofti, aerobicfimleik
Rutt Petersen, hondarbeiði
Tórhallur Simonsen, teldulæra
Jónvør Joensen, fólkadans
Steffan Simonsen, guitar

Veturin 1995/96
Janni Gudmundsen, seyming
Susan Rummelhoff, seyming
Steffan Simonsen, kórsangur
Sanna Akselsen, fimleik
Guðrið á Lofti, styrkivenjing/aerobic
Tórhallur Simonsen, teldulæra
Jónvør Joensen, fólkadans
Rutt Petersen, hondarbeiði
Anna Sofía Nordendal, plantulæra/spinning

Veturin 1996/97
Janni Gudmundsen, seyming
Susan Rummelhoff, seyming
Kevin Holland, kórsang
Sanna Akselsen, fimleik motións/callanetics
Guðri á Lofti, styrkivenjing/aerobic
Jóhannus Hansen, træsmíð
Tórhallur Simonsen, teldulæra
Rutt Myllhamar, hondarbeiði
Anna Sofía Nordendal, plantulæra/spinning

Veturin 1997/98
Susan Rummelhoff, seyming
Susan Rummelhoff, seyming, vikuskiftis sk.
Sanna Akselsen, fimleikur motión
Sanna Akselsen, aerobicsfimleik
Kevin Holland, kórsang
Kevin Holland, klaver
Anna Sofía Nordendal, ullarbeiði
Rutt Myllhamar, hondarbeiði
Hildur Joensen, hondarbeiði
Tórhallur Simonsen, teldulæra
Jógvan Olsen, skeið í fyrstuhjálp

Veturin 1998/99
Jónvør Joensen, kórsangur
Atli Petersen, klaverundirvísing
Ann Mouritsen, maskinbinding
Sanna Akselsen, fimleik
Kirstin Poulsen, kreativ seyming
Tórhallur Simonsen, teldulæra
Marianna Simonsen, telduskeið 10 fingraskipanin
Rutt Myllhamar, hondarbeiði
Hildur Joensen, hondarbeiði
Jógvan Olsen, skeið í fyrstuhjálp
Jóhannus Hansen, træsmíð og umv. av gl. møblum
Ingun Joensen, papírsklipp

Eftir veturin 1998/99 eru frálærulistar ikki funnir. Men kvøldskúlin var so øll árini Miðvágs kommuna var virkin og eftir tað eisini.

Vetrarnar 1978/79 til 2007/08 vóru útreiðslurnar hjá Miðvágs kommunu til kvøldskúla hesar:

Ár	kr.	Ár	kr.	Ár	kr.
-	-	-	-	**1977/78**	8.200
1978/79	1.100	**1979/80**	15.100	**1980/81**	22.400
1981/82	43.500	**1982/83**	42.200	**1983/84**	37.663
1984/85	29.900	**1985/86**	30.000	**1986/87**	128.875
1987/88	96.353	**1988/89**	82.860	**1989/90**	60.572
1990/91	91.732 kr.	**1991/92**	74.926 kr.	**1992/93**	32.300 kr.
1993/94	27.700 -	**1994/95**	22.800 -	**1995/96**	17.600 -
1996/97	41.100 -	**1997/98**	40.000 -	**1998/99**	34.500 -
1999/2000	53.400 -	**2000/01**	67.500 -	**2001/02**	71.100 -
2002/03	59.800 -	**2003/04**	74.700 -	**2004/05**	72.365 -
2005/06	77.459 -	**2006/07**	50.000 -	**2007/08**	39.643 -

Tað seinasta, sum sæst nevnt um kvøldskúla á bygdaráðsfundi í Miðvági er frá fundi, 27. november 2001, har sagt verður, at kvøldskúlin søkir um, at kommunurnar leiga høli til vevskúla. F.N. mælir til at Miðvágs kommuna rindar eftir næmingatalinum úr kommununi. Samtykt at játta.

Reingerðarfólk við skúlan 1970 - 1985

Frá summarfrítíðini 1961 til 1970 var eingin skúlagongd í Gamla skúla í Miðvági. Og vit skulu fram til 1970, tá skúlin aftur verður tikin í brúk til skúlabrúks. Nú tó bert til teir yngstu flokkarnar og helt hetta fram til sonevndi "Bygdarskúlin" varð tikin í brúk í Bygdarhúsinum. Hetta var í 1985.

Í 1972 varð ein skúlastova gjørd afturat, so tað vórðu 3 skúlastovur.

Esther Niclasen hevði reingerðina av Gamla skúla frá eftir summarfrítíðina 1970 til 30. apríl 1971. Tvær skúlastovur vóru at halda reinar.

Elida Niclasen gjørdi reint í Gamlaskúla frá 1. mai 1971 til 15. juni 1972.

Sofía Haraldsen hevði reingerðina frá 16. juni 1972 til 31. oktober 1973. Á fundi 4. september 1972 er sagt, at reingerðingskonan við gamla skúla hevur havt 2 skúlastovur og nú fyri skúlaárið 1972/73 er ein skúlastova komin afturat. Lønin hevur verið 300 kr. um mánaðin og varð nú samtykt at seta lønina fyri reingerðina til 450 kr. um mánaðin, umframt eyka fyri høvuðsreingerð um summarið.

Elin Maria Jørgensen gjørdi reint í Gamla skúla frá 1. november 1973 til 30. apríl 1974. Samsýningin var 450 kr. um mánaðin umframt 300 kr. fyri árliga høvuðsreinger.

Elsa Maria 'Essemi' Fagraberg hevði reingerðina av Gamla skúla frá 1. mai 1974 til 31. desember 1978. Samsýningin var 500 kr. um mánaðin umframt 300 kr. fyri høvuðsreingerðing árliga.

Á fundi 10. januar 1975 var smb. umsókn samtykt at seta lønina til 650 kr. um mánaðin, so hon hóskaði betur til tíðina, tað tók at gera arbeiðið. 15. august 1978 samtykti bygdaráðið at seta arbeiðið til 40 tímar um mánaðin, prístalsviðgjørt eftir konufólkaløn, smb. sáttmála hjá Miðvágs Arbeiðsmannafelag. Lønin pr. mánað er tí frá 1. sept. 1978, 1.159 kr.

Martha Joensen gjørdi reint í Gamla skúla frá 1. januar 1979 til 1985, tá givist varð aftur at nýta Gamla skúla til skúlabrúk. Hetta tí at nýggjur barnaskúli við 5 skúlastovum varð gjørdur í ovaru hædd á bygdarhúsinum. Tað sýnist sum at arbeiðstíðin er stytt, tá hon hevur tikið við, tí á einum skjali í málinum er upplýst, at hon fær 450 kr. um mánaðin fyri 16 tímar arbeiði, umframt at hon vaskar handklæðini hjá skúlanum heima, sum hon einki hevði fingið fyri, men fekk eyka fyri høvuðsreingerð um summarið. Í oktober 1979 er tímatalið hækkað til 20 tímar um mánaðin og samsýningin til 700 kr. um mánaðin.

Eftir øllum at døma hevur Martha Joensen røkt starvið til eftir summarfrítíðina 1985. Hetta er so seinasta árið Gamli skúli er í brúki sum skúli. Seinni er hann brúktur til barnaansing, og er tað umtalað í parti fyri seg sjálvan.

Samarbeiði Vágar og vestara síða Norðstreymoy

Hin 13. februar 1970 var felagsfundur í Vágum. Føroya Skúlastjórn hevði í skrivi dagsett 21. januar 1970 sent sóknarstýrunum í Vágum eina ætlan viðvíkjandi samarbeiði millum skúlarnar í Vágum og vestursíðuna av Norðurstreymoy. Og var álit lagt fram av nevnd sett av Skúlastjórnini í hesum máli, og vórðu sóknarstýrislimirnir gjørdir kunnigir við innihaldið í álitinum við at hava fingið eitt eintak av hesum. Lærararáðið við Miðvágs-Sandavágs skúla hevði gjørt tilmæli í málinum. Teirra tilmæli var framlagt og upplisið. Somuleiðis eisini

tilmæli frá skúlanevndunum, ið góvu skipanini sítt tilmæli. Sóknarstýrini vóru samd um, at ganga við til nevndu skúlaskipan nú til komandi skúlár sum tilskilað í "Tiltrædelseerklæring" frá Skúlastjórnini.

Henda sama dag, 13. februar 1970, undirskrivar Hans J. Hansen vegna Miðvágs kommunu avtalu um samarbeiði millum skúlarnar í Vágum og Norðstreymoy fyri framhaldsdeildina. Sama gjørdu umboð fyri hinar kommunurnar í Vágum. Uttan at fara í smálutir snúði tað seg um at únytta lærarakreftirnar betur í mun til næmingatalið, soleiðis at partur av skúlagongdini við 8. og 9. flokki, sum nú var sett á stovn, umframt real bleiv samstarv um í Vágum. Børn úr Sørvági og Bø-Gásadali úr 8 og 9 flokki gingu í 2 dagar á Giljanesi og Børn úr Miðvági og Sandavági 4 dagar í Sørvágs skúla. Meðan børn úr Vestmanna skúla gingu í real og 8. og 9. 2 dagar um vikuna í Giljanes skúla og á sama hátt børn úr Kvívíkar skúla. Hetta vóru alt til valfrí fak. Hetta varð so frá skúlaárinum 1970/71.

Skrivað verður til Skúlastjórnina 16. februar 1970, sum svar upp á skriv 21. januar 1970 og sagt, at á felagsfundi 13.2.70 varð samtykt og undirskrivað "Tiltrædningserklæring" viðvíkjandi samarbeiði ímillum skúlarnar í Vágum og vestursíðuni av Norðurstreymoy. Hetta saman við tilmæli frá Miðvágs-Sandavágs skúla og frá Miðvágs-Sandavágs skúlanevnd.

9. apríl 1970 skrivar Skúlastjórnin, Tórshavn og sigur, at dags dato er samstarvið millum skúlarnar í Vágoy og Norðstreymoy góðtikið sambært samstarvsavtaluna fyri skúlaárið 1970/71 við teirri treyt at eyka faklokalir, sum umtalað eru í semjuni, verða gjørd í niðastu hædd á Giljanes skúla.

Í skrivi 25.5. kemur fram, at eitt teirra er skúlakøkurin, og í skrivi 25.6. verður nevnt um amboð til smíð í smb. við hetta samstarv.

Sørvágs kommuna skrivar til hinar kommunurnar í Vágum hin 8. juli 1970 og hevur fíggjarætlan fyri samstarvið við skúlunum fyri skúlaárið. Fyri 1969/70 var raksturin av Giljanes skúla viðv. samstarvinum, 67.056,58 kr. Fyri Sørvágs skúla 67.546,59 kr. Tils. 134.605,17.

Væntaðar eyka útreiðslur fyri 1970/71 verða: Sørvágs skúli (skúlatænari) 15.000 kr. Giljanes skúli – gamli skúli 13.000 kr. Tilfar til matgerð og jarnsmíð 13.000 kr. Koyring smb. uppskoti frá Sigurd Petersen og Hensar Ellingsgaard, skúlastjórum, 27.200 kr. Koyring eykatúrar 2.000 kr. = 204.800 kr. Studningur fyri koyring ÷ 14.600 kr. Netto rakstur av samstarvinum 1970/71: 190.200 kr.

Tað sæst ikki nágreiniliga, hvussu leingi hetta samstarv vardi, men tað var virkið stóran part av sjeytiárunum.

Bygdarskúlin í Miðvági

Sjálvt um teir yngstu flokkarnir í Miðvági og Sandavági gingu í gomlu skúlum í bygdunum, og bert eldru børnini frá 5. flokki og upp gingu í felagsskúlanum á Giljanesi, so var hølistrot í 1976.

Hin 23. februar 1976 skrivar lærararáðið við skúlan á Giljanesi og gremur seg um, at plássið í skúlanum gerst alt trengri, sum fólkatalið í bygdunum veksur og eisini talið á skúlanæmingum. Harumframt verða fleiri vallærugreinir frameftir, sum gera, at tað er hølistrot, og heita teir á kommunurnar um at gera okkurt við hetta.

24. februar 1976 hevur skúlanevndin v/ Høgna Poulsen, presti, skrivað til Skúlastjórnina, Tórshavn, um brævið frá lærararáðnum á Giljanesi. Hann nevnir m.a., at sum nú er ganga 3 og 4 flokkar í gomlu skúlunum í Miðvági og Sandavági. Mælt verður til, at bygt verður út á



Bygdarhúsið í Miðvági stendur í gerð. Myndablaðið Magn, mai 1978.

Giljanesi. Skúlanevndin heldur annars, at yngru flokkarnir skulu halda fram við at ganga í skúla í bygdunum og so byggja nýggjar skúlar har til tey, tá ráðini einaferð verða til tess.

Ikki langt eftir hetta, hin 10. november 1978, samtykti bygdaráðið at fara undir at byggja nýggjan barnaskúla í Miðvági til næmingar frá 1. til og við 7. flokk. Ein arbeiðsnevnd við 3 limum varð vald til hetta, har minst 1 limur skuldi vera úr bygdaráðnum, og skitsuprosjekt skuldi gerast. Skriv varð sent til lærararáðið um hetta 10.11.1978. Í gerðabókini stendur, at møttir vóru: Jens Eli Ellefsen, Martin Nielsen og Hans Jørgensen. Gudmund Niclasen, bygdaráðsformaður, var staddur í Danmark og Ovi Poulsen var staddur í Noregi.

Ein kann kanska undrast á, at so stór avgerð verður tikin, tá bygdaráðsformaðurin ikki er heima, men kanska var tað avtalað áðrenn.

Áhugavert er eisini, at tveir limir í bygdaráðnum eisini eru limir í bygginevndini til nýtt bygdarhús. Sum helst ikki er uttan ávirkan á framtíðar úrslitið av hesum skúla, og hvussu hann varð bygdur. Men í fyrstu atløgu var, sum skilst, ikki ætlan ella hugsan, at hava bygdarskúlan í bygdarhúsinum.

Á fundi 27. november 1978 eru allir bygdaráðslimirnir møttir, og sýnist ikki nøkur ósemja at vera. Bygginevnd at fyrireika skitsuprosjekt til barnaskúla í Miðvági, sum umtalað varð á seinasta fundinum, varð vald á hesum fundinum og vórðu valdir: Eyðun Samuelsen, lærari, Árni Frederiksen, lærari og Hans Jørgensen, lærari og limur í bygdaráðnum.

Ætlan um at byggja á Tungu

Á fundi í bygdaráðnum 28. mai 1979 var barnaskúlin til viðgerðar. Uppskot var frá skúlabygginevndini, smb. tekning frá Trøndi Fuglø, arkitekti, um at byggja skúlan á Tungu. Formaðurin, Gudmund Niclasen, legði fram skriv frá "Plantagunevndini", har tey søgdu, at tað kann ikki vera bæði skúli og plantaga á Tungu. At gera 'plantagu' ella viðarlund á økinum var nevniliga samtykt fyrr. Hetta gjørdi so, at meiriluti var ikki fyri, at byggja á Tungu. Sagt verður í gerðabókini, at Hans Jørgensen og Jens Eli Ellefsen vóru fyri meðan Gudmund Niclasen, Martin Nielsen og Ovi Poulsen vóru ímóti at byggja á Tungu.

Mynd frá fótbóltsdysti í Miðvági. Handan fleiri av kendu andlitunum sæst bygdarhúsið, sum er í gerð. Mynd frá 19.09.1981, Kristina Aggrimsdóttir Svabo.

Ætlanin broytt til gamla skúlaøkið

Síðan varð á sama umrødda fundi 28. mai 1979 atkvøtt um at byggja skúlan á gamla skúlaøkinum við Eirikstoft, og senda hetta til Trønd Fugløy, arkitekt, og biðja hann um at gera skitsuprosjekt í samráð við nevndina, ið var vald til endamálið. Hetta uppskot varð samtykt av meirilutanum, Gudmund, Martin og Ova.

Á bygdarráðsfundi 7. januar 1980 kemur fram, at natúrfriðingarnevndini fyri Vága sýslu ikki vildi geva loyvi at byggja nýggjan skúla, har Gamli skúli stóð. Henda avgerð varð kærd til yvirfriðingarnevndina, sum staðfesti avgerðina. Á bygdaráðsfundi 20. juni 1980 varð samtykt at taka avgerðina til eftirtektar. Og varð henda ætlan sostatt eisini slept.

Skúli gerast í bygdarhúsinum

At gera skúlan í bygdarhúsinum var, sum sæst, hvørki fyrsti ella næsti møguleikin, men triðji møguleikin, sum royndur varð. Og her kemur tað kanska inn, at bygdaráðið hevði tætt samband við bygdarhúsnevndina. Og at ein slík loynst helst eisini var ein fíggjarlig bjarging hjá bygdarhúsinum, sum bert var partvís gjørt liðugt.

Á tekning av niðaru hædd av húsinum sæst, at ætlanin er at hava eitt rímuliga stórt dansihøli, rímuliga stóra restauratón, venjingarhøli, umframt køk og toilettir. Og so ein svimjihyl, har glasveggur skal vera inn til svimjihylin frá restaurasjónini. Ongar ætlanir vóru um ovaru hæddina, sum møguliga var ætlað til útleiðing e.l., tað er tó einki nevnt um.

Á Bygdaráðsfundi 31. mars 1981 varð samtykt fyrst at taka upp samráðingar við bygdarhúsnevndina um møguleikar fyri at innrætta ovaru hædd í bygninginum til barnaskúla.

Tingast hevur so helst verið heilt til árið eftir. Hvussu nógv, ber ikki til at siga, tá eingi skjøl síggjast um tað, men helst nakað. Málið er so fyri aftur í bygdaráðnum 3. juni 1981 har eitt tilboð er komið frá bygdarhúsnevndini um møguligan bygdarskúla. Samtykt varð at seta seg í samband við avvarðandi myndugleikar og kanna møguleikarnar.

Bygdarhúsið

Byrjað varð uppá Bygdarhúsið í Miðvági í 1973, men tað var ikki heilt liðugt í 1977, tá Miðvágur skuldi hava Vestanstevnuna. Miðvingar vildu fegnir taka bygdarhúsið í brúk á Vestanstevnu og spurdu nú sørvingar um at skifta um stevnu. Tað varð góðtikið og vestanstevnan í Miðvági varð so í 1978. Og varð húsið tikið í brúkt tá, sjálvt um tað ikki var heilt liðugt.

Sambært vestanstevnuskránni 1978, so var dansur í bygdarhúsinum sunnukvøldið hin 9. juli 1978 kl. 21, orkestrið "Fox" spældi, sum var fyrsta stóra tiltak í húsinum. – Kvøldið fyri var enskur dansur í MB-húsinum.

Ein kann staðfesta, við at hyggja ígjøgnum byggiprotokollirnar, at tað helst hevur verið bygt í langa tíð uttan byggiloyvi. Sambært byggiprotokollini hjá Miðvágs bygginevnd er søkt um byggiloyvi til bygdarhúsið hin 5. januar 1977, tá bygdarhúsnevndin søkir kommununa um byggiloyvi fyri einum bygdarhúsi á matr. nr. 233at og matr. nr, 233a. Støddin á húsinum ætlast at vera uml. 30 x 30 m. Byggiloyvið er sent nevndini hin 7. mars 1977. – Eingin umsókn ella viðgerð av byggiloyvi til bygdarhús ella líknandi bygning á hesum stað sæst umtalað áðrenn tað.

Á fundi 10. mars 1978, hildin í Gamla skúla í Miðvági, samtykkir bygdarhúsnevndin at søkja Sjóvinnubankan um byggilán á 500.000 kr., so skjótt Landsstýrið hevði játtað umsøktar 600.000 kr. í studningi.

Smb. undirskriftunum er nevndin mannað við hesum fólkum: Hans Jørgensen, Jens Eli Ellefsen, Elida Niclasen, Hans M. Niclasen, Herleif Hansen, Eigil Magnusen, Árni Jacobsen, Andrias Jørgensen, Eyðun Samuelsen og Mannbjørn Vang, øll úr Miðvági.

Har vóru stórar ætlanir, umframt at hava størt veitsluhøli niðri undir, var ein stór hædd omaná har og ein svimjihøll við síðuna av fast í. Greitt er nakað um svimjihøllina í brotinum um svimjihylar.

Sum skilst, varð arbeiðið at stoypa bygningin upp og annað arbeiði eisini gjørt av sjálvbodnum arbeiðsfólki í bygdini.

Sum nevnt, varð bygdarhúsið tikið í brúk á Vestanstevnu í Miðvági í 1978, meðan byggingin framvegis var í gongd. Við byggingini av bygdarhúsinum var tað komið so langt í desember 1978 smb. avriti kommunan hevði fingið av fundarfrásøgn, at veitsluhølið niðri undir var gjørt liðugt og hevði bygdarhúsnevndin samtykt at møblera tað og gera tað klárt at taka í nýtslu. Og hevði nevndin samtykt at seta Hans Jørgensen, Bergur Jørgensen og Eyðun Samuelsen, limir í bygdarhúsnevdini, at taka sær av hesum. Upplýst varð eisini, at bræv var komið frá nevndini í diskotekklubbanum "Gleimur", har biðið varð um at fáa hølið í bygdarhúsinum at hava dans í. Bygdarhúsnevndin skuldi hava fund við nevndina, at tosa við tey um sáttmála hesum viðvíkjandi. Nevndin hevði eisini samtykt, at hon skuldi skipa fyri sølu av sodavatni, øli o.ø. meðan húsð var opið og syrgja fyri, at húsið varð vaskað og løna fólkið at gera tað.

Veita veðhald

Á bygdaráðsfundi 4. juli 1981 er á skrá, at bygdarhúsnevndin hevði biðið Sjóvinnubankan um lán á 100.000 kr. til at fíggja innilokan av bygdarhúsinum. Sjóvinnubankin var fúsur at veita hesa upphædd treytað av, at kommunan veðhelt. Í gerðabókini stendur, at málið var samtykt við 4 fyri og 1 ímóti.

Skrivað varð til Landsstýrið 8. juli 1981 um loyvi til veðhaldið, sum kommunan fekk frá landsstýrinum við skrivi 30. juli 1981. – Og her snýr tað seg so sjálvandi um at fáa ovaru hæddina innilokaða. Tað var annars betonggólv millum hæddirnar.

Kommunan keypir ovaru hædd

Eykafundur var saman við bygginevndini fyri bygdarhúsið hin 30. november 1981. Allir bygdaráðslimir vóru á fundi. Henda semja var gjørd:

Bygdarhúsið selur bygdaráðnum ovaru hædd av bygdarhúsinum at hava til bygdarskúla fyri 1 mió. kr. Bygdaráðið eftirheldur 100.000 kr. til trygd er fingin fyri, at kommunan fær skúlastudning fyri at klæða alt bygdarhúsið uttan, ið er roknað til 200.000 kr.

Trúgvi Jacobsen, advokatur, hevði fingið til uppgávu at gera keypssáttmála.

Avrit er eisini funnið frá sama fundi úr gerðabók hjá bygdarhúsnevndini. Í teirra gerðabók er okkurt meira at lesa, har stendur m.a., at bygdaráðið hevði vent sær til bygdarhúsnevndina

við fyrispurningi um møguliga at keypa ovaru hædd av bygdarhúsinum til bygdarskúla. Nevndin var sinnað at samráðast við bygdaráðið um møguliga sølu. Aftaná tingingar í fleiri tímar saman við bygdaráð, Trygva Jacobsen, sakførara og Tummas Lauritsen, arkitekti, var semja gjørd. Fyri bygdarhúsnevndina skrivaðu hesi undir: Jens Eli Ellefsen, Hans M. Niclasen, Árni Jacobsen, Elida Niclasen, Andreas Jørgensen, Herleif Hansen, Hans Jørgensen og Eyðun Samuelsen. Og alt bygdaráðið skrivaði eisini undir, Hans Jørgensen, Martin Nielsen, Jens Eli Ellefsen, Inna Nattestad og Frits Witt.

Sum skilst frá fundi í bygdaráðnum 17. desember 1981 var tá farið undir at gera tað av takinum, sum manglaði og verður tosað um bjálving, har Tummas Lauritsen, arkitektur, hevði mælt til betri bjálving, sum var samtykt.

Av beinleiðis útreiðslum til bygdarhúsið fíggjarárið 1981/82 standa tó bert 16.500 kr. í roknskapinum hjá kommununi.

Tað gongur tó nakað av tíð, til kommunan yvirtekur ovaru hæddina við endaligum keypi. Spurningurin viðv. studningi frá landi og stati til keyp og bygging av skúlanum er høvuðsgrundin til seinkanina.

Bygdaráðsfundur har skúlabyggingin var til viðgerðar var 5. apríl 1982. Allir bygdaráðslimir vóru møttir, uttan Jens Eli Ellefsen, sum var uttanlanda. Hann hevði biðið um, at næsti maður á hansara lista, Rasmus Niclasen, møtti fyri seg. Hetta varð góðtikið.

Í gerðabókini stendur, at bygdaráðið hevði fingið skriv uppá, at bygdarskúlaprojektið í Miðvági var góðtikið av landsskúlaráðnum og hevði fingið munnliga at vita frá Eilif Samuelsen, landsstýrismanni, at Landsstýrið fór at senda kommununi skriv um, at vanligur studningur varð latin til projektið. Skrivið skuldi koma um fáar dagar.

Vit skulu so aftur nokkso fitt fram, næstan eitt ár, til bygdaráðsfund 18. februar 1983. Í gerðabókini er sagt, at fígging er nú fingin til byggingina av bygdarskúlanum. Smávegis formalitetir eru enn at loysa, áðrenn endaliga játtanin kann koma um statsstuðul.

28. februar 1983 hevur Grannskoðarvirki Pauli Ellefsen, Tórshavn, skrivað til Landsstýrið vegna kommununa og biðið um loyvi, at kommunan lænir 1,6 mió. kr. til bygdaskúlan. Málið var fyri aftur á fundi 11. mars 1983 og varð endaliga samtykt við 4 atkv. fyri og 1 ímóti. Málið var annars samtykt fyrr. Martin Nielsen viðmerkti, at hann var ímóti at upptaka lán fyrr enn umbidnir studningar vóru játtaðir.

20. apríl fekk kommunan loyvi frá Landsstýrinum at taka 1 mió. kr. í láni frá Sjóvinnubankanum og 650.000 kr. frá Tryggingarsambandinum til keyp og liðugtgerð av bygdarskúlanum.

10. mai 1983 er treytað skeyti skrivað, har bygginevndin fyri Bygdarhúsið í Miðvági selur, skeytar og avhendir til Miðvágs kommunu ovaru hædd av matr. nr. 233av, Miðvági, ið sambært skriv frá Matrikulstovuni, dagfest 11. nov. 1982, hevur fingið heitið "Íbúð nr. 2" og sum er til støddar 569 m^2. Keypspeningurin er 1 mió. kr. Sum seljari undirskriva: Jens Eli Ellefsen, Eyðun Samuelsen, Hans M. Niclasen og Hans Jørgensen. Skjalið er fyribils tinglýst hin 1. juni 1983 við freist til 1. apríl 1984. Og aftur fyribils tinglýst 16.3.1984 við freist til 1. oktober 1984. Endaligt skeyti skrivað 27.08.1984.

Sambært roknskapinum hjá kommununi hevði kommunan í 1983 rindað 996.323 kr. vegna keyp av ovaru hædd av bygdarhúsinum í Miðvági. Og kommunan hevði rindað 121.700 kr. til nýgerð í bygninginum. Hví fyrra talið ikki er full millión skyldast kanska millumrokning.

Hin 3. januar 1984 var hildin ein byggifundur nr. 4 á kommunuskrivstovuni í Miðvági. Avrit av fyrri fundum er ikki funnið, men teir mugu so verða hildnir í 1983 og merkir hetta, at hesin





Tekningar hjá Trøndur Fuglø arkitekti, 29.02. 1984 av umbygging uttan av bygdarhúsinum.

Norður síða og vestur endi.

parturin av arbeiðinum er byrjaður í 1983. Á fundinum vóru møttir Martin Nielsen, næstformaður í kommununi, Kristin Ellefsen kommunuverkfrøðingur, Johnfinn á Plógv, arbeiðstakari og Trøndur Fuglø, arkitektur fyri verkætlanini. Sambært fundinum snýr tað seg um innandura arbeiði, har útveggirnir innan á ovaru hædd eru bjálvaðir og partvís klæddir við plátum. Innveggir í trappurúmi partvís gjørdir og klæddir uml. 70%. Skorsteinur og ketil komin og VVS innleggjari fer undir arbeiðið beinanvegin. Veggur millum skúlastovur og svimjihøll verður fluttur so mikið inn móti skúlastovunum, at klætt verður innanfyri súlurnar. Uppbygging av veggi verður broytt. Byrjaðir við tí innskotnu hæddini omaná, sum inniheldur lærarastovu o.a. Manning: 2 timburmenn, 1 múrari og 4 arbeiðsmenn.

Undervisningsminnisteriet, Keypmannahavn, skrivar hin 6. februar 1984 og sigur m.a. at í skrivi 19.07.1982 hevur Undervisningsdiretoratet mælt til at tað verða veittar Miðvágs kommunu 20% í stuðli til útreiðslurnar at keypa og innrætta skúla í ovastu hædd í bygninginum hjá Miðvágs Ungdóms- og Bygdarhúsi. Útreiðslurnar at innrætta hæddina til skúlabrúks eru mettar til 3.410.000 kr. Út frá hesum hevur Undervisningsdirektoratet mælt til at stuðla við 882.000 kr. til nevnda formál.

30. mars 1984 hevur Arkitekt og verkfrøði Trøndur Fuglø, Klaksvík, skrivað til Vatnsoyra Snikkaravirki og sagt, at vegna arbeiðsánaran, Miðvágs kommunu, verður tikið við tilboð teirra frá 27.03.1984 upp á 167.260 kr. fyri veiting av vindeygum, úthurðum og ventilatiónslistum til bygdarskúlan í Miðvági.

2. apríl 1984 varð hildin lisitatión hjá Miðvágs kommunu í smb. við arbeiðið við bygdaskúla í Miðvági – uttandura arbeiðið. Inn komu 2 tilboð:

Johnfinn á Plógv, snikkarameistari: 2.092.411 kr.

Hoffmann & Sønner A/S upp á í alt 2.091.855 kr.

5 arbeiðstakarar vóru áhugaðir og høvdu fingið tilboðstilfar sendandi.

9. apríl 1984 skrivar Trøndur Fuglø, arkitektur, til Føroya Handverksmeistarafelag um innkomnu tilboðini 02.04.84, har m.a. nevnt verður, at av teimum báðum tilboðunum, sum inn komu eru ber 556 kr. á muni. Tá farið varð at kanna málið, kom fram, at báðir arbeiðs-



Tekningar hjá Trøndur Fuglø arkitekti 29.09. 1984 av umbygging uttan av bygdarhúsinum.

Suður síða og eystur endi.



takaranir hava brúkt somu prísir fyri m.a. jørð og betongarbeiði, sum eru settir alt ov høgt. Og komið er eftir, at Hoffmann & Sønner als ikki skulu gera arbeiðið, men bert lata tilfar, tað er Johnfinn á Plógv og Pf. Á Høgabóli, sum fekk tilfar sendandi, men ikki gav inn tilboð, sum skulu gera arbeiðið. Greitt er annars í smálutum frá ymsum tekniskum í málinum, men endaliga niðurstøðan er tann, at ráðgevin hjá kommununi, Trøndur Fuglø, sigur, at tilboðini og hátturin tey eru latin kann als ikki góðtakast, tí tey hava brúkt sama tilfar og avtalað kostnaðir. Hann kann tí ikki mæla kommununi til at taka við nøkrum av inngivnu tilboðunum, um arbeiðstakarin við lægra tilboðnum ikki kann ganga við til at lækka sítt tilboð. Annars verður mælt til og biðið um loyvi at halda nýggja lisitatisjón upp á sama arbeiði og biðið um undan-taksloyvi til hetta.

Grundin til undataksloyvi var, at smb. reglunum skuldu ganga 3 mánaðir til nýggj lisitatión kundi vera, um øll tilboð vórðu vrakað.

Á Bygdaráðsfundi 7. apríl 1984 var bygginevnd fyri bygdaskúlan vald. Samtykt at velja Innu Svabo og Kristin Ellefsen sum limir og Martin Nielsen sum eykalim.

Samtykt var á bygdaráðsfundi 25. apríl 1984, har ein nýggjur fyribils limur var møttur, Tummas Hans Gaardlykke møtti á fundinum fyri Hans Jørgensen, at søkja um byggikredit á 6,7 mió. kr. Hesin peningur, ella stórur partur av honum, skal verða afturgoldin við studninginum, tá hann fellur.

Trøndur Fuglø, arkitektur, sigur í skrivi 7. mai 1984, at hann var í Vágum 12. og 13. mars 1984 og máldi upp á staðnum. Hann sigur, at í mun til upprunatekningarnar var komið fram til, at bygningurin er rættuliga skeivur.

Hann skrivar aftur hin 9. mai 1984 og sigur, at hann vegna kommununa hevur tikið við tilboð frá H. Hoffmann & Sønner A/S upp á uttandura arbeiðið í smb. við bygdarskúlan. Men vil hava hetta lækkað vegna broytingar, sum gerast skulu. Tilboðið er 2,1 mió. kr. Áðrenn sáttmáli verður undirskrivaður, biðist arbeiðstakarin geva kostnað á broyting av sokkulele-

mentum smb. skitsu frá Trøndi Fuglø, broyting av armering gólvi í truppuhúsinum, um plátu yvir ánna og graving í smb. við fundamentum. Og sum treyt at arbeiðið verður byrjað beinanvegin og skal vera liðugt innan endan av august í ár.

Bygdaráðið samtykti einmælt hin 10. mai 1984, at um lækkingin av kostnaðinum verður um 250.000 kr. so góðtekur bygdaráðið tað.

24. mai 1984 skrivar Trøndur Fuglø, at eftir at nevndu broytingar vóru útroknaðar, hevði H. Hoffmann & Sønner A/S givið nýtt tilboð, sum var 1.783.000 kr., tað var eftir at tey punktini, Trøndur Fuglø hevði ávíst, vóru lækkað í kostnaði. – Lækking á 317.000 kr.

Endaligt skeyti

Miðvágs kommuna hevði fingið avrit úr gerðabókini hjá bygdarhúsnevndini fyri fund, 26. august 1984. Á fundinum vóru til viðgerðar uppskot til viðtøkur fyri Miðvágs Ungdóms- og Bygdarhús. Uppskot til endaligt skeyti til Miðvágs kommunu fyri íbúð nr. 2 á matr. nr. 233 av í Miðvági. Og uppskot um at gera skitsuprosjekt av bygdarhúsinum at leggja fyri nýggjan fund sum skjótast. Øll uppskot vóru einmælt samtykt.

27. august 1984 er endaligt skeyti skrivað, har Bygginevndin fyri Bygdarhúsið í Miðvági selur og skeytar og avhendir við hesum skjali til Miðvágs kommunu ovaru hædd av matr. nr. 233av, Miðvági, ið sambært skriv frá Matrikulstovuni dagfest 11. nov. 1982 hevur fingið heitið "Íbúð nr. 2". og sum er til støddar 569 m^2. Keypspeningurin er 1 mió. kr. – Annars eru tær vanlig treytirnar viðv. slíkari sølu. Tó sigur § 3: *Av tí at ovara hædd av húsinum verður brúkt til skúla, skulu tær reglur fyri nýtslu av húsinum altíð vera galdandi, at restin av húsinum ongantíð má nýtast á ein hátt, sum er í stríð við virki skúlans ella alment umdømi.*

Sum seljari undirskriva: Herleif Hansen, Árni Jacobsen, Andreas Jørgensen, Hans M. Niclasen, Jens Eli Ellefsen, Hans Jørgensen og Eyðun Samuelsen.

Vegna Miðvágs kommunu: Hans Jørgensen, borgarstjóri og Hans Arni Ellefsen, skrivari.

Tinglýst 21. januar 1985.

Uttandura byggiarbeiði

Sjálvt um bygningurin var bygdur, so var nógv eftir at gera rundanum bygningin og við sjálvan bygningin fyri at fáa hann endaliga lidnan. Í smb. við skúlabyggingina skuldu ymsar broytingar eisini gerast, m.a. nýggj ella størri vindeygaop og nýggjur klædningur, og skuldi áin, sum rann beint framvið bygninginum, lokast inni, vegna at skúli skuldi vera í bygninginum, umframt annað.

19. juni 1984 er sáttmáli undirskrivaður millum Miðvágs kommunu, sum arbeiðsánara og H. Hoffmann & Sønner A/S, sum arbeiðstakara. Arbeiðið verður gjørt sambært frágreiðingum og tekningum frá arbeiðsgevaranum. Í sáttmálanum stendur m.a., at arbeiðið umfatar uttandura arbeiði í høvuðsenterprisu. Arbeiðsfrágreiðing og mongdarlisti eru gjørd av arkitekti og verkfrøðingum. Tíðarætlan er gjørd av H. Hoffmann & Sønner. Sáttmálaupphæddin er 1.783.000 kr. Upphæddin verður goldin so hvørt arbeiðið líður. Farið verður undir arbeiðið 1. juni 1984 og skal tað vera lokið, áðrenn august mánaður sama ár er liðugur.

Skrivað undir vegna Miðvágs bygdaráð hava hin 19.06.1984 Hans Jørgensen og Inna Nattestad. Vegna Hoffmann & Sønner 19.06.1984 Herman K. Petersen.

Frágreiðing er hvussu betongið skal blandast o.s.fr. Um timburarbeiðið er m.a. sagt, at arbeiðið umfatar at fáa burtur verandi bygningslutir, uttandura bjálving og klæðing, inndekningar, yvirtrom á trappubygningi og takrennur. Sum so alt skal gerast av nýggjum. Eitt krav er m.a. regluligir byggifundir. Frágreiðing, kort og tekningar fylgja við sáttmálanum.

Sambært sáttmálanum skuldi arbeiðið byrja hin 1. juni 1984, men tá hetta var ein fríggjadagur, er tað møguliga byrja 4. juni. Sum eftirlit við uttandura arbeiðinum var Pf. Byggiráð, Jógvan

D. Jakobsen, verkfrøðingur, Viðareiði. Arbeiðstakari var danska byggifyritøkan, H. Hoffmann & Sønner.

Byggifundirnir

Í uttandura arbeiðinum vóru 11 byggifundir, frá 19. juni til 22. oktober 1984 og 31. oktober var avhendingarskjal undirskrivað við uttanduraarbeiðinum. Pf. Byggiráð var ráðgevandi felag hjá kommununi, skrivaði fyrstu byggifundirnar. Trøndur Fuglø, sum hevði teknað prosjektið var eisini ráðgevi og eitt umboð teirra skrivaði seinnu fundirnar.

Til fyrsta fundin møttu Hans Jørgensen, bygdaráðsformaður, Inna Nattestad, formaður í skúlabygginevndini, Kristin Ellefsen, kommunuverkfrøðingur, Herman K. Petersen, verkfrøðingur hjá Hoffmann & Sønner og Jógvan D. Jakobsen, verkfrøðingur, Pf. Byggiráð.

Arbeiðsformaður hjá Hoffmann & Sønner var Niels Braunschweig.

Hesir byggifundir vóru: **1**) 19. juni, **2**) 26. juni, **3**) 10. juli, **4**) 23. juli, **5**) 7. august, **6**) 15. august, **7**) 22. august, **8**) 29. august, **9**) 11. september, **10**) 9. oktober og **11**) 23. oktober 1984.

Møtt til byggifundirnar:

Inna Nattestad, formaður í skúlabygginevndini, allar fundirnar uttan nr. 2.

Kristin Ellefsen, arkitektur hjá kommununi, allar fundirnar uttan nr. 6.

Hermann K. Petersen, verkfrøðingur hjá H&S, allar fundirnar uttan nr. 5 og 6.

Niels Braunschweig, arbeiðsformaður hjá H&S, allar fundirnar uttan nr. 1 og 4.

Poul Brønum, verkfrøðingur hjá T. Fuglø, fundir 2, 5-8.

Jógvan D. Jacobsen, verkfr. hjá Pf. Byggiráð, Viðareiði, ráðgevi, fundir 1-4 og 8-9.

Trøndur Fuglø, arkitektur, Klaksvík, prosjektering, fundir 3-4 og 9-11.

Annars møttu hesir til einkultar byggifundir: Martin Nielsen tiltakslimur skúlabygginevndin, fund 6, Hans Halskov vegna H&S, fund 6. Ísak B. Jacobsen elektrikari, Sørvági, fund 7, Oddbjørn Vágslíð elektrikari, Klaksvík, ráðgevi, fund 7. Martin Leo vegna T. Fuglø, fund 8. Johnfinn á Plógv vegna H&S, fund 10-11.

Arbeiðsgongdin

Til byggifund 1, 19. juni 1984 var komið hartil, at sokkul um verandi byggning var stoyptur fram við enda vestureftir og fram við síðu suðureftir. Stalasja var uppsett við síðu suðureftir. Arbeiðsætlanin har var uppsetan av listum til klædning, har tríggir timburmenn skuldu byrja í vikuni. Farast skuldi eisini undir grevstur til fundamentir til trappubygning, setan upp av formum og stoyping av fundamentum. Har skuldu tríggir mans byrja við betongarbeiðinum.

26. juni 1984. Grivið er fyri elevatorskakt og formar uppsettir. Uppseting av listum undir klædningi byrja á síðu vestureftir. Høgging í betong fyri vindeygum í 1. hædd byrja, ½ liðugt. Manning: Betong 4 mans. Timbur 3 mans.

10. juli 1984. Betong: Fundamentir undir trappubygning liðugt stoypt. Sokkil um verandi bygning stoypt 85%. Timbur: Uppseting av listum til klædning á síðum vestur- og suðureftir. Vindeygu 1. hædd suðureftir ísett. Høgging fyri vindeygu í stovuhædd, síða suðureftir um at vera liðugt. Arbeitt verður við íseting av vindeygum í millumveggi millum tær forskotnu takflaturnar. Manning: Betong 4 mans. Timbur 5 mans.

23. juli 1984. Betong: Dekk yvir ánna er liðugt stoypt. Suðursíða og 2 m. av eystursíðu í trappubygningi verða stoypt í dag. Í elevartorskakt er verjubetong og membranur liðugt gjørt upp til gólvhædd. Timbur: Uppseting av listum heldur áfram í suður-, vestur- og norðursíðum, gjørt 60%. Vindeygu sum mangla í stovuhædd verða ísett í vikuni. Í 1. hædd eru øll

vindeyguni ísett. Byrjað er upp á úthangið í suðursíðu. Betong 3 mans. Timbur 4 mans.

7. august 1984. Betong: Ein hædd er stoypt móti suðri í trappubygninginum. Ein hædd av øðrum veggi í trappubygninginum er uppstillað og stoypt verður seinni í vikuni. Timbur: Síða móti suðri í bygdarhúsinum er næstan liðug. Eru væl á veg við síðum móti vestri og norði. Eru byrjaðir við uppseting av lektum á síðu móti eystri. Manning: Betong 3 mans. Timbur 7 mans. Viðmerkingar: Skúrur skal setast á arbeiðsplássið at goyma tilfarið í og ein toilettskúrur skal setast uttanfyri. Tilfar skal ikki goymast inni og toilettini inni ikki brúkast.

15. august 1984. Betong: Ein hædd av trappubygninginum er stoypt. Eru næstan lidnir at stoypa fundamentklossar við bygdarhúsið, restar í síðu móti vestri. Eru næstan lidnir at høgga út fyri neyðhurð á 1. hædd. Timbur: Klæðing móti vestri uml. 50% liðug. Byrja upp á klæðing móti norði. Sjónligar betongsúlur í síðu móti suðuri og norði verða klæddar við svørtum plátum ístaðin fyri puss. Súlur móti norði eru næstan lidnar. Eru byrjaðir við uppseting av lektum á síðu móti eystri. Manning: Betong 4 mans. Timbur 5 mans.

22. august 1984. Betong: Dekk í trappuhúsi er stoypt. Fundamentklossi stoyptur rundan um bygningin. Eru farnir undir hurðaop frá trappuhúsinum og inn í bygningin. Kloakk: Trixanlegg er komið upp á pláss, eftir er at íbinda. Kloakk móti suðri er liðug. Verandi septiktangi verður standandi. Timbur: Eru farnir undir at klæða skjøldur móti eystri. Eru um at vera lidnir við klædning omanfyri svimjihøllina. Manning: Betong 4 mans. Timbur 4 mans.

29. august 1984. Betong: Skjøldrartrýkantar og veggir um elevartorin á 1. hædd í trappurúminum verða stoyptir í dag. 50% liðugt við høgging av hurða opi frá trappuhúsi og til verandi bygning. Koakk: Trixanleggið er íbundið. Timbur: Eru farnir undir uppseting av lektum og bjálving í trappubygningi. Hava sett nakað av plátum upp móti eystri á verandi bygningi. Eru farnir undir avslutingar av taki. 2 súlur undir takið á verandi bygningi eru uppsettar. El: Kaðalar og dósir til uttandura ur og ljós eru uppsett. Manning: Betong 4 mans. Timbur 6 mans.

Sambært kostnaðaruppgerð 3. september 1984 er uttandura arbeiðið umleið 50% liðugt

11. september 1984. Dekk yvir skakt stoypt við innstoyptum beriboltum. Betongtrappa verður uppstillað nú. Høgging av hurðaropi frá trappuhúsinum og til verandi bygning er gjørd. Eftir at stoypa er trappan og 50% av gólvinum. Kloakk: Eftir er bert at íbinda gamla anleggið. Timbur: Lidnir við uppseting av lektum og bjálving uttan á trappubygningi í norður og suðursíðum. Hava sett nakað av plátum upp móti eystri á verandi bygningi. Súlur undir taki á verandi bygningi uppsettar. Manning: Betong 4 mans. Timbur 8 mans.

9. oktober 1984. Alt betongarbeiðið, sum hoyrir til útbjóðingina, er liðugt. Teknikaragjøgnumgongd í dag. Samtykt er í bygdaráðnum at inniloka ósan eystanfyri og vestanfyri skúlan og gera betonggarð fram við fótbóltsvøllinum o.a. fyri samlaðan kostna á 162.475 kr. Av tí at trappa møguliga skal gerast fram við fótbóltsvøllinum verður betonggarðurin drigin frá ÷ 27.065 kr. = 135.400 kr. Oljutangin er grivin niður. Timbur: Lidnir við uppseting av lektum uttan og bjálving á øllum veggum í trappubygninginum. Manning: Timbur 6 mans.

23. oktober 1984. Manglarnir verða gjørdir nú. Timbur: Hava sett plátur upp uttan móti eystri á bygninginum. Eftir at seta upp yvir takinum á trappubygnininum. Lidnir við alt á takinum uttan á trappubygningi. Hvítar plátur í skjøldrinum á trappubygninginum er eykaveiting, sum Miðvágs kommuna skal rinda fyri, uml. 13 plátur. Skulu setast niður móti gráu fundamentplátunum. Sperrur og lektir á trappubygningi eru uppsettar. Bíða eftir takplátum, koma til Miðvágs í dag. Øll vindeygu ísett uttan tey til ventilatiónsrúmið, sum verður veitt við ísettum ristum. Hesi eru komin á byggiplássið. Glasið til tey rundu vindeyguni ikki komið. Manning: Betong 3 mans. Timbur 3 mans. Endalig avhending verður mikudagin 31. oktober 1984 kl. 14. Teknikaragjøgnumgongd av arbeiðinum verður fríggjadagin 26. oktober 1984 kl. 9.



Ætlaða innrættingin av 1. hædd, sum bert varð partvís fylgd av bygdarhúsnevndini. Teknað: R.E. 21.10.1985.

31. oktober 1984 er AVHANDINGARSKJAL skrivað vegna Miðvágs skúla, uttandura arbeiði. Avhending av arbeiði gjørt smb. sáttmála undirskrivaður 19.6.1984 ímillum Miðvágs kommunu sum arbeiðsánara og H. Hoffmann & Sønner, sum arbeiðstakara. Til staðar: Inna Nattestad, Kristin Ellefsen, Frits Witt, Hans Jørgensen og Martin Nielsen fyri Miðvágs kommunu. Trøndur Fuglø vegna eftirlitið og Herman K. Petersen og Niels Braunshweig vegna H. Hoffmann & Sønner.

Arbeiðið varð góðtikið við viðmerking um nakrar manglar, sum skuldu verða rættaðir innan 23.11.1984. Til gerð av manglum varð aftirhildið 5%. Við endan av garantitíðini verður framt garantisýn.

8. november 1984 skrivar Johnfinn á Plógv, snikkarameistari, Sandavági viðv., bygdarskúlanum í Miðvági og sigur, at av tí at takið lekur, sum ikki hoyrir undir tilboðið, vil hann hervið sambært tíðarætlan dagf. 01.11.1984 siga frá, at hann ikki hevur fingið tað fólk sum ætlandi var, fyri at halda tíðarætlanina. Sostatt kann hann ikki við vissu siga, nær atbeiðið verður liðugt.

Endaligur kostnaður

Uttandura arbeiði, smb. byggiroknskap, 15. mars 1985.

Prosjektering og eftirlit umframt eykaarbeiðir tilsamans	668.000 kr.
Hoffmann & Sønner, sáttmáli + umbiðin eykaarbeiðir	1.826.000 kr.
Harumframt er arbeiði eftir at gera fyri	144.000 kr.
Tilsamans	2.638.000 kr.

Innanduraarbeiðið

23. juli 1984 skrivar Johnfinn á Plógv, Sandavági, og gevur tilboð upp á innanduraarbeiði við bygdarskúlanum í Miðvági, út frá útflýggjaðum upplýsingum og tekningum.

	Timburarbeiði	1.586.053 kr.
	Snikkaraarbeiði	296.920 –
	Ventilasjónsarbeiði	325.020 –
	Byggipláss	5.000 –
*	Múraraarbeiði	183.580 – Dánjal Jóhan Niclasen, Miðvági
*	Máling- og Gólválegging	333.507 – Karl Mohr Johansen, Miðvági
*	El-arbeiði	349.348 – Hans Arni Nielsen, Sandavági
*	Hita- og Sanitetsarbeiði	389.334 – Svend E. Knudsen, Tórshavn
	Tilsamans	3.468.762 kr.

* Undirarbeiðstakarar.

Tilboðið er til viðgerðar á bygdaráðsfundi, 1. august 1984. Í gerðabókini er sagt, at bert eitt tilboð kom inn til innanduraarbeiðið í bygdaskúlanum. Hetta ljóðar uppá kr. 3.468.762 og er frá Johnfinn á Plógv, Sandavági. Trøndur Fuglø hevði gjøgnumgingið tilboðið og ráddi til, at Johnfinn á Plógv gjørdi arbeiðið. Hetta varð samtykt.

Sáttmáli

13. november 1984 er sáttmáli undirskrivaður millum Miðvágs kommunu, sum arbeiðsánari og Johnfinn á Plógv, Sandavági, sum arbeiðstakara. Arbeiðið verður gjørt sambært frágreiðingum og tekningum frá arbeiðsgevaranum í smb. við bygging av bygdarskúla fyri Miðvágs kommunu. Innanduraarbeiði. Í sáttmálanum stendur m.a., at arbeiðið umfatar, smb. tilboð 23.7.1984, at veita, timbur-, snikkara-, múrara,- málara- og gólváleggingar-, el-, ventilasjón- og hitaverks- og santitetsarbeiði, íroknað innrætting og rakstur av byggiplássi. Arbeiðsfrágreiðing og mongdarlisti eru gjørd av arkitekti og verkfrøðingum og útgreinað tíðarætlan. Sáttmálaupphæddin er 3.468.762 kr. Sáttmálaupphæddin verður goldin so hvørt arbeiðið líður. Skrivað undir vegna Miðvágs bygdaráð hava hin 31.10.1984, Hans Jørgensen. Vegna Johnfinn á Plógv, 13.11.1984, Johnfinn á Plógv.

Ráðgevarar

Arkitektur og byggileiðsla: Trøndur Fuglø, Klaksvík.
Verkfrøðingar: Fyri berandi konstruksjónir: Pf. Byggiráð v/ Jógvan D. Jakobsen, Viðareiði.
Fyri vvs-skipan: Pf. Brimheim & Leo, Tórshavn.
Fyri el-skipan: Oddbjørn Vágslíð, Klaksvík.
Kommunalur ráðgevi, Kristin Ellefsen, verkfrøðingur, Miðvági.

Arbeiðsætlan

Sambært arbeiðsætlanini skuldi timburarbeiðið byrja í viku 36, múraraarbeiðið í viku 38, hita og Sanitet í viku 39, ventilasjón í viku 42, snikkaraarbeiðið í viku 47, málaraarbeiðið í viku 51 og el verða gjørt so hvørt arbeiðið gekk fram hjá hinum. Hetta gekk, sum tað skuldi.

Arbeiðini skuldu vera liðugt í nevndu raðfylgju frá 7. desember 1984 til 1. februar 1985 og avhending skuldi vera leygardagin hin 2. februar 1985. Hetta gekk ikki sum tað skuldi.

Avhendingin var í veruleikanum ikki fyrr enn 1. august 1985 – hálvt ár seinkað. Og tað var tí, at arbeiðini tóku nógv longri tíð enn ætlað vegna ymsar trupulleikar. Um tað hevði hildið, so hevði tað ikki verið til meira enn 6 byggifundir, men tað vórðu 19.

Byggifundirnir

Í innanduraarbeiðinum vóru 19 byggifundir frá 13. november 1984 til 23. juli 1985. Eftir 1.1.1985 er nýtt bygdaráð komið til, har bara ein limur er eftir, tað er Martin Nielsen, sum eisini gerst bygdaráðsformaður og formaður í skúlabygginevndini. Annars vaksur talið av bygdarðáðslimum nú úr 5 upp til 7 limir.

Í bygginevndini fyri bygdarskúlan verða eftir 01.01.85, Martin Nielsen, Herleif Hansen, bygdarráðslimir og Kristin Ellefsen, kommunuverkfrøðingur. Til 31.12.1984 var gamla bygginevndin virkin.

Hesir byggifundir vóru: **1**) 13. november, **2**) 1. desember, **3**) 17. desember 1984.
4) 14. januar 1985, **5**) 18. januar, **6**) 1. februar, **7**) 15. februar, **8**) 1. mars, **9**) 18. mars, **10**) 29. mars, **11**) 18. apríl, **12**) 10. mai, **13**) 25. mai, 14) 7. juni, **15**) 14. juni, **16**) 21. juni, **17**) 28. juni, **18**) 16. juli, **19**) 23. juli 1985.

Møtt til byggifundirnar:
Inna Nattestad, formaður í skúlabygginevndini til 31.12.84, fund 1-3.
Martin Nielsen, formaður í skúlabygginevndini frá 1.1.85, fundirnar 4-19.
Herleif Hansen, limur í skúlabygginevndini frá 1.1.85, fundirnar 4-19.
Kristin Ellefsen, arkitektur hjá kommununi, allar fundir uttan nr. 8.
Johnfinn á Plógv, arbeiðstakari, allar fundir uttan nr. 9.
Trøndur Fuglø, arkitektur, Klaksvík, prosjektering, var til allar 19 fundirnar.
Niels Braunschweig, arbeiðsformaður hjá J. á Plógv, fundirnar nr. 1 og 6.
Jógvan D. Jacobsen, verkfr. hjá Pf. Byggiráð, Viðareiði, ráðgevi, fundir 1 og 6-7.
Oddbjørn Vágslíð, elektrikari, Klaksvík, ráðgevi, fundirnar 4 og 18-19.
Martin Leo, vegna Pf. Brimheim & Leo, fundirnar nr. 4*, 8, 14 og 18-19. *vgn./ T. Fuglø.
Svend Erik Knudsen, vegna J. á Plógv, fund 4. Eyðfinn Eltør, vegna O. Vágslíð, fund 9.
Svenn Brimheim, vegna Pf. Brimheim & Leo, fund 17.

Fyrstu fundirnir vóru í kommunuskrivstovuni, har tó fundur 4, sum var fyrsti fundurin eftir at nýggja bygdaráðið hevði tikið við, var á staðnum. Frá fundi 11 vórðu fundirnir hildnir í hølum hjá Teknisku deild hjá kommununi.

Arbeiðsgongdin

Sambært ætlanini varð arbeiðið byrjað í viku 36 í 1984, sum var millum 3. og 9. september 1984. Fyrsti byggifundurin var ein góðan mánað seinni, 13. november. Um arbeiðsstøðuna verður sagt, at útveggir innan partvís eru bjálvaðir og partvís klæddir við plátum. Arbeitt verður við longdarskilaveggi. Farið verður undir timburarbeiðið í trappubygninginum. Loftbygnaðurin í skúlastovunum verða vanligu gittarrammurnar broyttar til KERTO-sperrur. Johnfinn verður biðin um at koma við prísi upp á hetta.

1. desember 1984. Útveggir innan bjálvaðir. Viðv. brævi frá Johnfinn á Plógv um lekar á



Innrætting av 2. hædd, bygdarskúlin. Trøndur Fuglø 1984.

takinum, sum sinka arbeiðið, so er ein møguleiki, fyribils at tetta takið soleiðis, at tað heldur veturin av. Hetta kann gerast við at klýna asfaltkent tilfar á takið, har skrúvurnar eru, og somuleiðis eftir plátuskoytunum, smb. uppskoti frá Tummas Lauritsen, arkitekti.

17. desember 1984. Farnir undir arbeiðið innan í trappubygninginum. Byrjaðu við tí innskotnu hæddini, sum inniheldur lærarastovu o.a. Manning: 2 handverkarar, 4 arbeiðsmenn.

18. desember 1984 skrivar Landsskúlafyrisitingin, Tórshavn, at Føroya Gjaldstova er biðin at gjalda 621.515 kr. til Miðvágs kommunu, peningurin er ákontugjald fyri ríkisstuðul til skúlabygging í Miðvági. Samlaða stuðulsjáttan frá Statinum er 882.000 kr., sostatt eru 260.485 kr. eftir at gjalda. – Viðmerkjast kann tó, at hetta bleiv væl meir.

8. januar 1985 skriva Kone A/S, Keypmannahavn og senda faktura upp á lyftu (elevator), 96.400 kr.

11. januar 1985 skrivar Johnfinn á Plógv, Sandavági og gevur tilboð upp á loftbygna til bygdarhús/skúla. Kerto bjálkar og gólvplátur 69 x 450 mm tilsamans 122.825 kr.

Fyrsti byggifundurin hetta árið og hjá nýggju bygginevndini var hin 14. januar 1985. Punkt eitt var um at fyrbils hiti verður nýttur í bygninginum við hitablásarum. Avgjørt varð at halda fast við hitablásarar og taka av tilboð frá Svenn Erik Knudsen upp á 10.000 kr., ið umfatar uppseting og leigu av hitablásarum, flyting av hitablásarum eftir tørvi og niðurtøku. Tilboðið er nokkso høgt og tí meta vit, at tað eisini má umfata veiting og uppseting av fyribils roykrøri. Svenn Erik lovaði at fara álvarsliga í gongd við uppseting av skorsteini mánadagin 21. januar. Hann væntar at ventilatiónstilfarið kemur fyrst í februar mánaði.

18. januar 1985. Útveggir innan bjálvaðir og partvís klæddir við plátum. Broyting av longdarveggi móti svimjihøllini er góðkend og kann veggurin gerast liðugur. Skráir frá vindeyum í aulini er gjørdir. Innveggir og klæðing av veggjum inni í trappurúminum 70% gjørdir. Skilaveggir í innskotnu hæddini partvís gjørdir. Múrarin byrjar fyrst í viku 4. VVS arbeiðstakarin byrjar fyrst rættuliga tann 28. januar, tá hann flytur í eini hús í Miðvági. Hevur verið á staðnum og gjørt fyrireikingararbeiði. Manning: 2 handverkarar. Elektrikari ½ tíð. 4 arbreiðsfólk.

1. februar 1985. 60% av verandi takbjálving niðurtikin vegna leka í verandi taki. Kann partvís brúkast aftur. Úthurð til maskinrúm ísett. Múrarin farin til arbeiðis, hevur pussað maskinrúmið. VVS arbeiðarin í fer við at montera í fýrrúmi. El-arbeiðið liðugt í smb. við

lyftina. Uppseting av lyftini verður liðug komandi mánadag tann 04.02.85. Farið verður undir at gera wc-rúmini og goymslurúmið. Ketilin er settur upp á pláss. Tað er av størsta týdningi at hiti kann fáast í bygningin, so at innandura arbeiðið kann halda á.

15. februar 1985. Veggir í toilettum inn frá gongd partvís gjørdir í ovaru hæddini. Gólvið í innskotnu hæddini liðugt lagt. Kerto-bjálkarnir komnir úr Finlandi og settir upp á pláss. Veggjabeinrað frá límtræbjálkum í aulini og upp undir takið gjørt klárt at klæða. Veggirnir í goymslurúmi/ bókasavni klæddir. VVS arbeiðarin lagt hita- og vatnrør í ovaru hæddini. Fara undir at gera skilaveggir millum skúlastovurnar. Fara undir at leggja loftið upp undir. Lyftin er avhendað í dag 15.2.1985. Handverkarar: Timbur 2, múrari 1, el 2 vvs 2. Arbeiðsfólk 4.

28. februar 1985 skrivar Kone A/S viðv. lyftu til bygdaskúla i Miðvági. Tykkara Kone lyfta varð fallroynd og góðkend av Arbeisðeftirlitinum hin 7. februar 1985. Garantitíðin er 1 ár. Lyklar til lyft handaðir Martin Nielsen, bygdaráðsformanni.

Á bygdaráðsfundi, 14. mars 1985, var til viðgerðar støðutakan til nýtt tilboð uppá tak til bygdaskúlan. Samtykt varð at taka av tilboði frá Johnfinn á Plógv, Sandavág, uppá 208.665 kr. frá 25.2.1985.

15. mars 1985 er byggiroknskapur gjørdur pr. 15.03.85. Út frá honum eru gott 2/3 av arbeiðinum gjørt.

1. mars 1985 var stórt sæð einki nýtt. 18. mars 1985. Skilaveggir í innskotnu hæddini gjørdir og skilaveggir millum skúlastovurnar gjørdir. Hiti settur á bygningin í morgin. Hitaveitingin til bygdarhúsið í neðra er avmonterað. Eru tilreiðar at klæða loftini í aulini og í goymsluni, tó má hetta steðga til takið er tætt.

29. mars 1985. Eyka súlur í longdarveggi uppsettar. Loftplátur uppsettar í vetilatiónsrúminum. Tilsetningar í vindeygum í lærarastovuni og viðtaluni lutvís gjørdir. Farnir undir at leggja gólv á miðhæddina, álagt í einari skúlastovu. Aftaná páskir fer múrarin undir flisaarbeiði í wc-unum. Handverkarar: Timbur 2, múrari 1, ½ tíð, el 2, vvs 3. Arbeiðsfólk 4.

18. apríl 1985. Flisaarb. í wc-rúmunum gjørt. Allir radiatorar upphongdir. Ein stova kløddvið glasfipurtapet. Málarin, Karl Mohr Johansen, fer undir at mála stovurnar. Støða má takast til litirnar. Handverkarar: Timbur 3, múrarar 2, el 2, vvs 3, máling 2. Arbeiðsfólk 4.

10. mai 1985. Loftplátur í lærarastovuni uppsettar nú. Bíðað verður við plátunum í aulini, til tær hava fingið eitt umfar av máling afturat. Innveggir í trappurúmi gjørdir og klæddir 90%. Málarin farin undir at seta glasfipurvev í lærarastovuni. Farnir undir at gera tilsetning um vindeyguni í skúlastovunum. Gólvið á miðhæddini lagt 80%. Tak leggjast av nýggjum, 45% gjørt. Rekkverk gjørt í trappuni. Handverkarar: Timbur 4, múrari 2, el 2, vvs 3, máling 2, tak 5. Arbeiðsfólk 4 í timburarbeiðinum.

25. mai 1985. 98% av innveggjum gjørdir, kunnu ikki gerast lidnir fyrr enn vvs hevur roynt wc-rørini. Av timburabeiði í trappubygninginum er eftit at gera loftini. Tak leggjast av nýggjum, 65% gjørt. Klæða framsíðuna av pallinum við timbri. Skúlastovurnar grundviðgjørdar við máling, ein skúlastova liðugt viðgjørd. Handverkarar: Timbur 4, múrari 2, máling 2, tak 5. Arbeiðsf., timbur 3.

7. juni 1985. Í trappubygninginum er eftir at gera loftið í niðaru hædd. Fara í dag undir at klæða loftið í auluni. 100% av gólvunum í miðhæddini áløgd. Nýggja takið liðugt álagt. Eru í ferð við at festa inndekningar. Framsíðan á pallinum liðugt kløddvið. Allar skúlastovur málaðar 2 ferð, mangla 3 ferð. Mánadagin 10. juni verður farið undir at seta upp radiatorarnar í trappubygninginum. Tað eru bara teir, sum hava manglað. Hondverkarar: Timbur 4, múrari 1, el 3, vvs 0, máling 3, tak 5. Arbeiðsfólk, timbur 3.

8. juni 1985 hevur bygdarhúsnevndin undirskrivað og tinglýst eina "Servituttdeklaratión" sum gevur kommununi rætt til at brúka trappubygningin, sum er bygdur í íbúð nr. 1 og sum *førir til íbúð nr. 2,ið er bygdarskúlin. "Miðvágs kommuna ... skal hava fult ræði á hesum*

tilbygningi við neyðugum parti av grundøkinum á íbúð nr. 1 av matr. nr. 233av, so leingi kommunan hevur brúk fyri hesum í sambandi við skúlan." Skrivað undir vegna bygdarhúsið hava Hans Jørgensen, Jens Eli Ellefsen, Eyðun Samuelsen og Hans M. Niclasen. Tað er tinglýst, smb. stempul á arkinum, hin 1. juli 1985. Matrikkulkort hoyrir til skjalið.

14. juni 1985. Allar loftplátur hava fingið ta viðgerð, tær skulu hava og eru uppsettar, burtursæð frá pallrúminum. Loftið í auluni liðugt. Eru í ferð við gólvið á pallinum. Gólvið í goymslurúmi í ovastu hædd liðugt 14.6.85. Múrarin er liðugur við sítt arbeiði. Loftsarmaturini uppsett og lýsa í skúlastovunum. Skjótiveggirnir millum stovurnar 10-11 verða monteraðir í viku 25. Handverkarar: Timbur 4, vvs 1, máling 3, arbeiðsfólk timbur 4.

21. juni 1985. Loftið yvir pallinum klætt við gipsplátum. Loftini í trappubygninginum liðug. Gólvið á pallinum liðugt. Timburtrappan eftir at seta upp, verður sett upp í seinastu løtu juni/juli. Rekkverk um høvuðstrappu eftir at seta upp. Neyðtrappa eftir at seta upp. Annars bert smáting eftir hjá Johnfinn á Plógv at gera. Málarin, Karl Mohr Johansen, verður nú ikki hindraður av øðrum arbeiðum og kann gera seg lidnan. Metir at hann kann vera liðugur komandi viku, tó vera onkrir smærri snøklar eftir + onkur gólválegging. Hurðin móti fótbóltsvøllinum ikki ísett enn. Handverkarar: Timbur 4, el 3, vvs 3, máling 3, arbeiðsfólk timbur 4.

Uttandura arbeiðið, sum Dánial Jóhan Niclasen skal gera, varð undirskrivað av báðum pørtum 21.06.1985.

28. juni 1985. Neyðhurð frá palli ísett. Lúkurnar frammanfyri á pallinum gjørdar. Handverkarar: Timbur 4, el 4, vvs 3, máling 4, arbeiðsfólk timbur 4.

16. juli 1985. Innandura trappa komin á staðið. Neyðtrappa eftir at seta upp, kemur til Miðvágs 28.8.85. Endalig loysn verður tikin á staðnum.

23. juli 1985. Johnfinn á Plógv verður biðin um at leggja plátur uppundir loftið á pallinum. Innandura trappa uppsett. Væntandi verður liðugt í dag við gólvinum á miðhæddini. Neyðtrappan kemur til Miðbvágs 28.8. Handverkarar: Timbur 2, el 2, vvs 2, máling 4.

Avhendingarskjal undirskrivað

1. august 1985 er undirskrivað avhendingarskjal viðv. bygdaskúla til Miðvágs kommunu. Avhandingin av arbeiðum gjørd smb. sáttmála 31.10.1984 og 13.11.1984 ímillum Miðvágs kommunu sum arbeiðsánara og Johnfinn á Plógv, Sandavági, sum arbeiðstakara. Til staðar: Martin Nielsen, Herleif Hansen og Kristin Ellefsen, vegna skúlabygginevdina. Johnfinn á Plógv arbeiðstakari Sandavágur. Oddbjørn Vágslíð, Klaksvík, Martin Leo, Tórshavn og Trøndur Fuglø, Klaksvík.

Aftaná gjøgnumgongd av arbeiðinum eru staðfestir nakrir manglar, sum skulu vera gjørdir áðrenn 09.08.1985. Garantitíðin er 1 ár roknað til 09.08.1986. Við endan av garantitíðini verður framt garantisýn.

Vígsla av bygdarskúlanum

21. september 1985 varð bygdarskúlin við Kirkjar í Miðvági vígdur. Vígsluskrá varð gjørd og er til skjals. Her stendur á permuni: "Skúlin í Miðvági vígsla" og undir: "vígslan 21. september 1985". Í heftinum er skráin fyri vígsluna og allir sangirnir prentaðir, ið sungnir vórðu.

Skráin var henda:

1. Felagssálmur: *Hin signaða dag ...*
2. Eivind Wilhelm, bispur, vígur skúlan
3. Vágakórið syngur
4. Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, flytur fram røðu

5. Petur Jacob Sigvardsen frá landsskúlafyrisitingini flytur fram røðu
6. Felagssálmur: *Gakk tú fram við góðum treyst ...*
7. Niels Bentsen, ríkisumboðsmaður, flytur fram røðu
8. Trøndur Fuglø, arkitektur, flytur fram røðu
9. Felagssálmur: *Í tínum hondum ...*
10. Martin Nielsen, bygdaráðsformaður, flytur fram røðu
11. Sigurd Petersen, skúlastjóri, flytur fram røðu
12. Vágakórið syngur
13. Felagssangur: *Tú alfagra land mítt ...*

Keyp av innbúgvi

Keyp av benkrum og borðum til skúlahøllina í bygdarskúlanum var til viðgerðar á bygdaráðsfundi 13. november 1985. Mentanarnevndin mælti til at keypa 31 stk. frá Monrad Sjelten, Tórshavn. Hetta varð samtykt.

Á sama fundi var til viðgerðar uppskot um reglugerð fyri bygdarskúlan í Miðvági. Mentanarnevndin mælti til at samtykkja reglugerðina í verðandi liki. Reglugerðin varð samtykt við smærri broytingum.

Annars er ikki nógv skrásett um keyp av innbúgvi, sum møguliga er farið inn í byggikostnaðin.

Rekkverk við skúlan

Tilboð var komið frá Pf. Leivur Nattestad, Miðvági, um at gera rekkverk eystanfyri skúlan og vestanfyri skúlan fyri 21.368 kr. Samtykt varð á bygdarádsfundi 30. apríl 1986 at taka av tilboðnum.

Endalig fígging av bygdarskúlanum

Í mai 1986 hevði kommunan fingið upp á pláss endaliga fígging av bygdarskúlanum. Frá danska bankanum Nykredit hevði kommunan fingið tilsøgn um góðar 6,5 mió. kr. í láni við 8% rentu yvir 30 ár. Fíggjarnevndin mælti til at taka hetta lán, og varð tað samtykt av bygdaráðnum.

Í hesum sambandi hevði Trøndur Fuglø arkitektur sett upp høvuðstølini fyri byggikostnaðin av skúlanum. Og varð hin 8. mars 1986 skrivað til Landsstýrið, har uppsetingin hjá Trøndi Fuglø var við. Í skrivinum varð víst á, at skúlin gjørdist væl dýrari enn fyrr mett og dýrari enn tað, landið hevði givið stuðul eftir. Tosað varð eisini í telefon við umsitingina í Landsstýrinum um málið, verður sagt.

Byggikostnaðurin pr. mars 1986 sambært uppseting hjá Trøndi Fuglø, arkitekti.

Byggikostnaður	9.891.874 kr.
Byggirentur 1984/85	150.865 kr.
Byggirentur 1985	981.962 kr.
Byggirentur 1986	644.382 kr.
Tils.	11.669.083 kr.
Byggikostnaðurin verður fíggjaður soleiðis:	
30% studningur frá landsstýrinum	3.500.725 kr.
20% studningur frá Statinum	2.333.817 kr.
50% egin fígging	5.834.541 kr.
Tils.	11.669.083 kr.

8. august 1988 skrivar Landsstýrið, at teir hava skrivað til Landsskúlafyrisitingina, sum hin 23.9.1986 hevur mett, at skúlabyggingin í bygdarskúlanum átti at fáa studning eftir kostnaðarmeting á 6.606.560 kr. Meðan Miðvágs kommuna í skrivi 8.3.1986 hevði ávíst, at kostnaðurin var 11.669.083 kr. Har so Landsstýrið hevði skrivað hin 5.5.1987 til Landsskúlafyrisitingina, at Landsstýrið hevði samtykt at hækka stuðulin til byggingina sambært tí, kommunan hevði upplýst. Og biðið Landsskúlafyrisitingina kanna, um ikki aðrar útreiðslur vóru, sum teir ikki høvdu tikið við. Kommunan hevur í telefonsamrøðu við landsstýrið upplýst, at eingin broyting er gjørd viðv. skúlabyggingini, sum ikki er upplýst fyri Landsskúlafyrisitingini.

Sambært roknskapunum hjá kommununi árini 1985-88 hevði kommunan fingið stuðulin útgoldnan í pørtum hesi árini góðar 3,5 mió. kr. Sambært roknskapunum eftir 1988 sæst ikki meira stuðul at vera komin til skúlabyggingina.

Kjak um byggiloyvi í niðaru hæddini

Bygdarhúsnevndin skrivar hin 10. apríl 1989 og søkir um loyvi at innrætta bygdarhúsið, íbúð 1, á matr. nr. 233av.

Málið var fyri á fundi saman við bygdarhúsnevndini 31. mai 1989. Møttir fyri bygdarhúsnevndina vóru: Hans Jørgensen, Jens Eli Ellefsen, Árni Jacobsen og Georg Magnussen. Hans Jørgensen, form. í bygdarhúsnevndini, legði málið fram.

Eingin beinleiðis avgerð varð tikin á fundinum.

Á bygdaráðsfundi 28. juni 1989 var samtykt, at Tekniska nevnd fær sakkønan at kanna málið.

Umsóknin um byggiloyvi var aftur fyri á fundi 26. september 1989. Tekniska nevnd var komin til ta niðurstøðu, at hon mælti frá at geva byggiloyvi. Grundgevingarnar vóru, at skúli var í erva. Eisini mátti roknast við, at Miðvágs kommuna kom at hanga uppá skuldina, tá liðugt var at byggja. Hetta mátti metast at vera óforsvarligt sum figgjarstøðan var í løtuni. Spurnartekin varð eisini sett við, hvønn myndugleika nevndin hevði at ráða yvir húsinum.

Málið varð útsett. Og á bygdaráðsfundi 29. september 1989 var samtykt at fylgja tilráðingini frá Teknisku nevnd. Tað vil siga ikki at geva byggiloyvi.

12. oktober 1989 skrivar Halgir Winther Poulsen advokatur, Tórshavn, í smb. við, at bygdaráðið hevur noktað bygdarhúsnevndini at byggja ella umbyggja íbúð 1 í bygdarhúsinum, sum bygdarhúsnevndin hevði fingið at vita í brævi frá kommununi 1. oktober 1989. Advokaturin vísir á fleiri punkt sum hann heldur gera, at avgerðin er tikin á skeivum og órímiligum grundarlag. Og vísur í drúgvum skrivi á fleiri punkt. Eitt úr rúgvuni er, at kommunan hevði kravt at bygdarhúsið skuldi gera 50 parkeringspláss. Víst verður á, at í økinum eru 300 parkeringspláss, hví skal bygdarhúsið so gera 50 afturat?

Sakførarin hevur helst talað væl fyri seg, og kanska eru tað onnur viðurskifti eisini, tað fær ein illa sagt, men á bygdarráðsfundi 1. desember 1989 hevði bygdaráðið snara 180 stig, tí nú varð samtykt at geva byggiloyvi, treytað av, at samráðst varð um hitaverkið, og at kloakkgjaldið varð goldið. Um ivamál stungu seg upp, skuldu samráðingar fara fram um hetta. Samtykt var eisini at styrkja súlurnar millum vindeyguni á sunnaru síðu soleiðis, at veggurin kundi bera ovaru hæddina.

Hetta nevnda vóru eisini mál, sum verið høvdu frammi sum ivamál við byggiloyvinum.

Arbeiðið er so liðugt á sumri 1990, og hin 12. juli 1990 kl. 20 varð hátíðarhald í niðaru hædd, har sagt verður, at Bygdarhúsið var endaliga liðugt innrættað og tikið í brúk.

Økið lagt aftuat bygdarhúsinum/bygdarskúlanum

Á bygdaráðsfundi 13. desember 1990 var á skrá, at Matr. nr. 30c skal leggjast afturat matr. nr. 233av, bygdarhúsið/bygdaskúlin. Av tí at hagapartarnir í Miðvági eru eigarar av matr. nr. 30c, er neyðugt at keypa ella ognartaka stykkið.

Samtykt at ognartaka matr. nr. 30c.

21. desember 1990 verður skrivað til Landdstýrið og sagt frá hesi avgerð.

Í skrivi 6. september 1991 – eftir at kærufreiðstin var úti og eingin kæra innkomin - gav Landdstýrið kommununi loyvi til ognartøkuna.

Reingerðarfólk við Bygdarskúlan

Til bygdarskúlan í Miðvági hoyrdi øll miðhæddin við m.a. 5 skúlastovum, aulu, vesum, gongdum, trappum o.a., umframt ein minni hædd ovast við m.a. lærarastovu og øðrum rúmum. So har var hampuliga nógv at fara um.

Seffan Hattarstein. Á bygdaráðsfundi 9. september 1985 var til viðgerðar setan av vaskikonu við bygdarskúlan í Miðvági. Fjúrtan umsóknir vóru innkomnar. Mentanarnevndin hevði innstillað nr. 1, 2 og 3. Nr. 1 var Josepha Hattarstein, nr. 3 hevði tikið umsóknina aftur. Samtykt varð at Josepha 'Seffan' Hattarstein fekk starvið. Hvussu leingi Seffan vaskaði eru eingir upplýsingar um, men hon er deyð 01.04.1992, 57 ára gomul.

Maria Jørgensen er helst byrjað fyrst í nítiárunum og gjørdi reint í bygdarskúlanum til summarfrítíðina 1999. Nær hon byrjaði, og nær fyrra reingerðarkonan gavst, er ikki heilt greitt og tí bert ein meting í hesum førinum. Men Maria gavst í 1999. Á bygdaráðsfundi, 13. apríl 1999 er á skrá, at Maria Jørgensen, sum vaskar í bygdaskúlanum, er vorðin 67 ár. Hon kundi hugsa sær at arbeitt inntil komandi skúlaár byrjar. Samtykt at Maria kann vaska inntil komandi skúlaár byrjar.

Eyðfrí Olsen hevði reingerðina av bygdarskúlanum frá eftir summarfrítíðina 1999 til 31. januar 2001, arbeiðstíð 2,5 tímar um dagin.

Dina Selfoss gjørdi reint í bygdarskúlanum frá eftir summarfrítíðina 1999 til 30. september 2002. Arbeiðstíð 5,5 tímar um dagin til 31. januar 2001 og síðan fulla tíð, 8 tímar um dagin.

Sofía Haraldsen, sum eina tíð fyrst í sjeytiárunum hevði gjørt reint í Gamla skúla, hevði reingerðina av bygdarskúlanum frá 1. september 2002 til 31. desember 2007, 8 tímar um dagin.

Laila Haraldsen byrjaði við reingerðini av bygdarskúlanum 1. januar 2008. Og sýnist at hava starvið í øllum førum 2008 út. 31.12.2008 fór Miðvágs kommuna í søguna og Vága kommuna tók við. Í hesum førinum er ikki kannað viðv. starvsfólkum eftir 2008.

Keldur

Gerðabøkur, kopibøkur, roknskaparbøkur og skjøl hjá Miðvágs kommunu.
Gerðabøkur, kopibøkur, roknskaparbøkur og skjøl hjá Vága prstagjalds kommunu.
Lærarafólki í Føroyum 1870-1976 – Jákup M. Kjeld/Marius Johannesen. Føroya Lærarafelag
Føroyskir fólkaskúlalærarar 1870-1997 – Niels Jákup Thomsen. Føroya Lærarafelag
Blaðið "14. September", dagf. tilskila í søgugongdini.
Bilasøgan í Vágum - Einar Petersen (ikki útgivin í bók)
Karl Jóhan Nielsen, Vatnsoyrar.

Kommunuskrivstovan

Undirevnir:
- *Kommunuskrivstovan*
- *Kommunuskrivarar og skrivstovufólk*
- *Samsýningar til kommunustýrislimir og nevndir*
- *Reingerðafólk á kommunuskrivstovuni*
- *Lokalir grannskoðarar hjá kommununi*

Fyrstu mongu árini var vanligt í øllum smáum og miðalstórum kommunum, at kommunuskrivstovan var heima hjá formanninum, og at formaðurin tók sær av stórt sæð øllum tí skrivliga arbeiðinum hjá kommununi. Í Miðvági var hetta galdandi heilt upp til 1947.

Kommunuskrivstova inni hjá Martin Johansen

Til kommunustýrisfundin 22. august 1947 vóru tríggir limir møttir, Sørin Danielsen, Hans Martin Thomasen og Jákup K. Joensen. Í gerðabókini stendur, at Jens Jakku Niclasen var burturstaddur til fiskiskap og Jóhannes Ravnsfjall var burturstaddur vegna sjúku.
Samtykt varð at opna ta nýinnrættaðu kommunuskrivstovuna hin 1. september 1947, og skrivstovutíðin varð sett til 2 tímar um dagin, tríggjar dagar um vikuna. Soleiðis: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 4 til 6 seinnapart. Somuleiðis varð samtykt, at seta kommunala politistin Albert Joensen hálva tíð sum starvsfólk á skrivstovuni fyri 500 kr. um árið.

23. august 1947 varð lýsing hongd í talvuna, har umframt skrivstovutíð, verður sagt, at kommunuskrivstova opnar í húsunum hjá Martin Johansen. Inngongdin er gjøgnum handilshurðina. “Vit hittast sum áður á telefon nr. 7, øll onnur viðtala má henda innanfyri skrivstovutíðina.”

Sum skilst av roknskapinum hevur kommunan leigað hølið frá Martin Johansen hin 1. juni 1947, og er tíðin frá 1. juni til 31. august 1947 brúkt til at seta skrivstovuhølið í stand og at fáa til vega innbúgv og skrivstovuútgerð.

Í 1947 rindar kommunan leigu fyri 7 mánaðir uppá 50 kr., ella 350 kr. Harumframt er m.a. skrivstovuútgerð keypt frá Martin Johansen fyri 15 kr. Hvat hetta er, er ikki nevnt. Í 1948 eru rindaðar Martin Johansen 600 kr. í leigu og 10 kr. fyri brenni, sum helst er torv. Harumframt eru 75 kr. rindaðar Hannu Johansen fyri skrivstovuhald. So hon hevur hjálpt til á skrivstovuni hetta árið. Í 1949 eru rindaðar 600 kr. í leigu og í 1950, 200 kr., sum er til 30. apríl 1950. Tá er leigumálið endað og flutt verður í tí nýbygdu kommunuskrivstovuna.

Bygging av kommunuskrivstovu

Á skrá fyri fund í forstandarskapinum 5. mars 1948 var bygging av skrivstovuhølum til kommununa. Samtykt varð at byrja upp á byggingina. Bygningurin skuldi vera 10 x 12 alin í vídd og stoyptur upp úr betong. Hann skuldi standa í flukt við missiónshúsið og hava kjallara og eina hædd omaná. Útgravingin av grundini skuldi bjóðast út í arbeiðstøku.

Samtykt var at hava skúlastovu í bygninginum, inntil ein nýggj læraraíbúð var bygd (læraran hevði íbúð í skúlanum.) Og síðan innrætta tann núverandi skúlabygningin til tríggjar skúlastovur.

Og samtykt varð at bjóða útgravingina av kommunuhúsinum í arbeiðstøku beinanvegin.

Sambært frásøgn, so var samtyktin um at hava skúlastovu í bygninginum fylgd, og var skúlastova har í nøkur ár. Ein persónur úr Miðvági, sum er føddur í 1950, og sum soleiðis er farin í skúla í 1957, sigur seg minnast, at hann gekk fyrstu tíðina í skúla í kommunuhúsinum í Miðvági, har skúlastova var. Tá hava so verið tvær skúlastovur í skúlanum eisini.

Í samtyktini 5. mars 1948 stendur annars, at samtykt var at hava kjallara og eina hædd omaná, men tað bleiv so til tvær hæddir omaná, og aðrar broytingar vóru eisini gjørdar.

Á fundi 20. mars 1948 hildin í leiðagu kommunuskrivstovuni hjá Martin Johansen, varð samtykt við trimum atkvøðum at broyta samtyktina við støddini av nýggju kommunuskrivstovuni til 12 x 14 alin.

Útgravingin av grundini varð boðin út í arbeiðstøku. Inn vóru komin tvey tilboð, eitt á 1.100 kr. og eitt á 1.200 kr. Hildið varð at tilboðini vóru alt ov høg, og samtykt varð tí at royna at fáa 4 góðar arbeiðsmenn at gera arbeiði fyri tímaløn.

30. juli 1948 var ætlan gjørd fyri byggina og innrættingina av kommunuskrivstovuni.

Ein roknskaparbók hjá kommununi hevur nokkso gott yvirlit yvir byggingina av kommunuhúsinum. Í 1948 varð grivið út fyri húsunum, og grundin partvís stoypt upp. Hetta árið vórðu arbeiðsløn goldnar til hesar menn fyri útgrevstur og stoyping av grundini:

Sámal Johansen, Árni Samuelsen, Petur Johansen, Hans Ellefsen, Jóan Pauli Jørgensen, Petur Jakku Johansen, Jens Samuelsen, Sigmund Frederiksen, Jóhan Poulsen, Hans Kristoffur Hansen, Albert Hansen og Kr. S. Ellefsen. Í alt 3.959 kr.

Koyring: Kr. S. Ellefsen, 146 kr. og Hansias Hansen, 162 kr.

Serarbeiði og tilfar: Sámal Ellefsen, 124 kr., Jákup K. Joensen, 70 kr., Andrias Joensen, 6 kr. og Cementídnaður, Miðvági, 1.722 kr.

Í alt vóru 6.189 kr. brúktar til byggingina í 1948.

Byggingin 1949

17. mars 1949 setti nývaldi formaðurin Hans Martin Thomasen uppskot fram um at ringja og biðja um telefon til kommunuskrivstovuna og at keypa skrivimaskinu, og varð hetta samtykt við 4 atkvøðum.

Og á fundi 24. mars 1949 varð gjørt av at keypa eina sementblandimaskinu við spæli, og borimaskina varð bestilt frá Thomas Juul Askham, Tórshavn.

Viðmerkjast kann, at ein brúgv um ósan til Kirkjar var eisini í gerð um hetta mundið, so henda útgerð er eisini keypt til tað.

23. juni 1949 er sambært journalini sáttmáli undirskrivaður um "ráðhúsið". Ikki nevnt við hvønn, møguliga við Henning Ellefsen um at tekna húsið.

Sambært skrivi 30. juni 1949 fekk kommunan 50% í stuðli frá Landsstýrinum til keypið av borimaskinuni, helst vegna brúnna. So har man umsókn vera send, sum tó ikki er varðveitt í skjølunum.

Annars er helst biðið um tilboð upp á sementblandimaskinuna eisini, tí kommunan fær hin 8. apríl 1949 tilboð frá Pf. Gotfred Joensen uppá sementblandimaskinu, og hin 19. mai 1949 tilboð frá A.P. Bentsen, Tórshavn, upp á sama. Upplýsingar um stuðulin og um hesi tilboð eru bert at finna í journalini, har málini eru nevnd, men ikki støddin av tilboðunum.

Frá fundi 30. juli 1949 fáa vit upplýst, at hitt "nýggja ráðhúsið" er nú liðugt at stoypa og sperrurnar uppsettar.

Tekning frá Henning Ellefsen varð løgd fram á fundinum, men vóru limirnir ikki væl nøgdir við tekningina. Tí var avgjørt at steðga við hesum til J.K. Joensen, sum var burturstaddur í ørindum, kundi møta.

Fyri fund, 5. august 1949, verður sagt, at allir limirnir møttu, uttan Jens Jakku Niclasen, skipari, sum var undir Noregi við Varðberg. Hann møtti annars til sera fáar fundir í 1948 og 1949, vegna at hann sigldi. Til viðgerðar var tekning av innrættingini av ráðhúsinum. Henning Ellefsen var eisini møttur. Henning hevði broytt tekningina nakað, og varð sóknarstýrið samt um tekningina, sum hon varð broytt.

Samtykt varð at bjóða arbeiðið út at tekja, seta vindeygu í og gera alt bjálvingar- og timburarbeiðið innan.

6. august 1949 er lýsing hongd í talvuna. Útbjóðing. Arbeiði við nýggja húsið verður hervið útboðið. Arbeiðið umfatar: 1. Leggja tak á. 2. Seta vindeygu við rútum í. 3. Seta hurðar í. 4. Timburarbeiði við bjálving innan. Tilboð verða at inngeva seinast leygardagin 13. h.m. til sóknarstýrisformannin. Tekning er til skjals á skrivstovuni, har eisini neyðugar frágreiðingar fáast. Sóknarstýrið tekur sær rætt til at taka av tí tilboð, tað heldur vera best hóskandi, sjálvt um tað ikki er bíligast ella eisini ikki at taka av nøkrum tilboð.

7. august 1949 skrivar Perschy Nielsen snikkari, Miðvági. "Tilboð til Hús til Miðvágs kommunu". Tilboðið er í 6 pørtum:

1. Lektir, leggja tak á, vindskeiðir, dekningslistar og gesimsir.
2. Seta í 9 vindeygu, 1 dupulta kjallarahurð og 1 høvuðshurð.
3. Uppsetan av bjálkalag, útveksling til trappu, leggja 2 gólv, bjálving millum bjálkar við "Arki" bjálving og klæða loftini við panel.
4. Innveggir, miðhædd, at revla upp, bjálva við Arki og klæða við panel.
5. Seta upp dupultar skilaveggir við Arki bjálving ímillum. Uppsetan av trimum hurðum við listum.
6. H.V. og W.C. Enkultur skilaveggur. Avgreiðslulúku, garderobu, bonk og trappu. Uppsetan av neyðugum listum, seta glas í vindeygu.

Alt til samlaðan kostnað á 2.975 kr.

Alt tilfar skal vera á staðnum í slíkum standi, sum vanliga verður kravt.

20. august 1949 skrivar A/S Richard B. Thomsen & Søn, Tvøroyri. Vit vátta telegram-ordra tygara uppá 90 stk. galvaniseraðar takplátur ca. 9 fót, sum verða sendar tygum so skjótt, sum vit hava fingið vøruna heim.

23. august 1949 er semja undirskrivað millum Miðvágs kommunu og Perchy Nielsen snikkara, sum er dani, um at inniloka og gera til innan bygning hjá Miðvágs kommunu.

Semja ("Overenskomst"). Perchy Nielsen átekur sær at gera alt arbeiði við at leggja tak á, seta í vindeygu og annars arbeiði við innrætting av tí nýbygda ráðhúsinum, vísandi til tekningar og beskrivilsir, sum báðir partar hava góðkent, fyri 2.975 kr.

Nielsen skal vera liðugur við alt arbeiðið innan 7. oktober 1949. Henda semja er undirskrivað í tveimum eintøkum, ein til hvønn partin. Um ivamál er um semjuna skal hon avgerðast av rættinum, stendur m.a. í semjuni.

19. september er telegramm sent til Ricardo, Tvøroyri (A/S Richard B. Thomsen & Søn). Nær kunnu vit vænta takpláturnar?

Svar kemur 23. september 1949: Vit hava beint nú fingið at vita um takpláturnar, at tær eru ikki komnar til avskipingar enn vegna innflutningstrupulleikar. Hetta er tó bert ein tíðarspurningur. Vit vóna tó at fáa tær við "Dronning Alexandrine" fyrst í oktober, og skulu geva tygum nærri boð tá.

1. november 1949 er komið so langt við húsinum, at Tryggingarsambandið Føroyar hevur útskrivað Brunatrygging fyri nýggja húsið.

Eitt tað fyrsta keypt varð til nýggju kommunu skrivstovuna var eitt pengaskáp. Lýsing kommunan fekk av skápinum hin 2. februar 1950. Skápið er til framvegis og stendur nú í kjallaranum í gomlu kommunuskrivstovuni.

Tilboð eru eisini biðin uppá skrivstovuinnbúgv og pengaskáp.

15. desember 1949 skriva "Dansk Kontor- møbelfabrik" og "Handelshuset Sandgren", og 28. desember 1949 "Arnor Nielsen" øll trý úr Keypmannahavn, og geva tilboð uppá skrivstovuinnbúgv.

Og 15. desember 1949 skriva "Peter Sørensen's Pengeskabsfabrik", og "N. Brørups Eftf.", báðar fyritøkur úr Keypmannahavn, og geva tilboð uppá peningaskáp.

Í 1949 vórðu 26.808 kr. brúktar upp á byggingina av kommunuhúsinum. Nágreinilig uppgerð yvir byggingina er í roknskaprbók hjá kommununi. Her nøkur brot.

Lønir. Henning Ellefsen, 6.117 kr. Perchy Nielsen, 3.123 kr. Harald Niclasen, 1.690 kr. Niklas Haraldsen, 1.363 kr. Albin Wang, elektrikari, 884 kr. Hentze E. Hansen, 651 kr. Jóhan Poulsen, 392 kr. Niklas Hansen, 391 kr. Albert Hansen, 364 kr. Esmar Johansen, 308 kr. Torstein Niclasen, 274 kr. Jens Samuelsen, 269 kr. Hansias F. Hansen, 199 kr. Sigmund Frederiksen, 129 kr. Arni Samuelsen, 118 kr. Rasmus Poulsen, 103 kr. Kr. S. Ellefsen, 25 kr. Jørgin Fr. Jørgensen, 24 kr. Hans O.M. Joensen, 23 kr. Elias Ellefsen, 15 kr. Sálomon Poulsen, 7 kr. Í alt, 16.469 kr.

Tilfar o.a. 28. mars 1949 er fyrsta tilfarið keypt, smb. roknskaparbók. Havnar Timburhandil, 4.165 kr. Balslev & Co., 2.139 kr. Miðvágs Cementídnaður, 966 kr. Gotfred Joensen, 240 kr. J.K. Joensen, 216 kr. Sápuhúsið, Tórshavn, 7 kr. Ymiskt, 2.339,42 kr.

Fluttningur o.a. Sam Olsen eftf., 31 kr. Demich avgr., 25 kr. Vesturleið avgr., 12 kr.

Í alt, 7.801 kr.

Annars eru hondskrivaðir listar fyri apríl, mai, juni, juli og oktober, har allir, ið arbeiða, standa nevndir við navni. Arbeitt verður allar yrkadagar, leygardagar við.

Harald Niclasen arbeiðir hvønn dag og er helst formaður í arbeiðinum.

Fyrsti arbeiðsdagur er 1. apríl 1949. 1., 2. og 4. apríl arbeiðir Harald Niclasen einsamallur. Hinar dagarnar eru teir millum 6 og 9 mans um dagin, onkuntíð færri. Arbeitt verður hvønn arbeiðsdag frá 1. apríl til 30. juli 1949, sambært hondskrivaðu listunum, har hvør maður og hvør tími er uppskrivaður.

Í høvuðsroknskapinum hjá kommununi yvir ognir, kemur kommunuhúsið við fyrstu ferð hin 31. desember 1949, og er fyribils virðið sett til 35.000 kr.

Byggingin 1950

Keyp av pengaskápi og keyp av innbúgvi til nýggju kommunuskrivstovuna var til viðgerðar á fundi 18. januar 1950. Avgjørt varð einmælt at keypa skápið frá Peter Sørensen's Pengeskabsfabrik, Keypmannahavn fyri 1.350 kr. Og avgjørt varð at keypa eitt skriviborð fyri 254 kr. og 5 stólar fyri 35 kr. stk. Somuleiðis at keypa eitt arbeiðsborð og eina stóra reol.

20. januar 1950 verður skrivað til Peter Sørensen's Pengeskabsfabrik, og bílagt eitt peningaskáp. Sambært faktura, er peningaskápið hin 3. februar 1950 lossað umborð á s/s "Tjaldur", sum lá í Keypmannahavn. Vektin var 300 kg. 1,50 kr. eru goldnar fyri innlossing og 59 kr. fyri frakt til Skipafelagið Føroyar. Smb. fylgiskjali stendur, at skápið var væl pakkað í timburkassa og vórðu 4 lyklar sendir við.

3. februar 1950 verður skrivað til Dansk Kontormøbelfabrik, Keypmannahavn, og biðið um eitt skriviborð. Og 26. mai 1950 verður skrivað til Handelshuset Sandgreen, Keypmannahavn, eftir stólum.

Sambært roknskapinum hjá kommununi sama ár kostaði peningaskápið við frakt og øllum tilsamans, 1.448 kr. Og innbúgvið frá Dansk Kontormøbelfabrik kostaði 322 kr.

Á sóknarstýrisfundi 5. august 1950, har allir eru møttir uttan Jens Jakku Niclasen, er á skrá at pussa kommunuhúsið uttan. Tilboð var komið frá donskum múrarameistara, Erik Lyhne Smith Jørgensen, og vil hann gera arbeiðið uppá akkord fyri 1.700 kr. Hetta varð samtykt og samstundis at fáa hann at mála húsini uttan fyri 100 kr., at smyrja 2 ferðir.

Sóknarstýrið sýnist at vera áhuga í at fáa skattainntøku frá Erik Lyhne Smith Jørgensen. Tí hin 18. desember 1950 verður skrivað til Tórshavnar kommunu og spurt um skattainntøkuna hjá harra Erik Lyhne Smith Jørgensen, ið hevur búð í Finsensgøtu í Tórshavn, men nú er fluttur til Miðvágs at arbeiða seinast í juli í ár, og býr her enn og kemur helst at arbeiða her nakað av komandi árið eisini.

29. desember 1950 verður skrivað til Erik L.S. Jørgensen, sum býr til leigu hjá Martin Johansen, Miðvági, og sagt, at smb. upplýsingum var hansara inntøka 5.300 kr. í fjør og verður hann settur fyri 5 mánaðir í skatt til Miðvágs kommunu, sum gevur, 245 kr. Dagin eftir verður skrivað til Líkningarráðið og sagt frá hesum.

Sambært roknskapinum sama ár var samsýningin hjá Erik L.S. Jørgensen 1.824 kr. Har málaraarbeiðið helst hevur kostað 124 kr.

Aðrar lønir hetta árið í smb. við byggingina av kommunuhúsinum vóru: Henning Ellefsen, formaður, 409 kr. Jørgin Fr. Jørgensen, málari, 942 kr. Sámal Ellefsen, 483 kr. Niklas Haraldsen, 197 kr. Harald Niclasen, 192 kr. Elias Ellefsen, 182 kr. Kristoffur Svabo, 115 kr. Martin Johansen, 77 kr. Pól Isaksen, 43 kr. Sigurd Hansen, 29 kr. Eli Joensen, lastbil, 29 kr. Niklái Haraldsen og 25 kr. Rasmus Poulsen, 10 kr. Í alt 2.735 kr.

Tilfar: Balslev & Co., 830 kr., Pf. Maria Poulsen, 496 kr., J.K. Joensen, 400 kr., N.S. Johannesen eftf., 211 kr., Stoypivirkið Tórshavn, 204 kr., Havnar Timburhandil, 139 kr., Valdemar Lützen, 67 kr.,Ymiskt, 31 kr. og Tjaldurs Apotek, 10 kr. Í alt, 2.357 kr.

Alt í alt verða hetta árið brúktar um, 7.000 kr. til kommunuhúsið.

Í virðisáetingini av húsinum hetta árið er tað tó bert hækkað í virði 5.000 kr., frá 35.000 kr. pr. 1.1.1950 til 40.000 kr. pr. 31.12.1950. Hetta er so virðisásetingin heilt upp til 1.1.1956.

Arbeiðsgongdin

Í januar 1950 arbeiða Harald Niclasen og Kristoffur Svabo fyri tað mesta, umframt at Rasmus Poulsen arbeiðir nakrar fáar tímar.

Í februar arbeiða Henning Ellefsen, snikkari, Niklái Haraldsen og Pól Isaksen.

Í mars, apríl og mai er bara goldið fyri tilfar, so tá sær arbeiðið út til at hava ligið stilt. Onkrar smærri lønir, umframt til Henning Ellefsen, eru goldnar hetta summarið, so várið og summarið 1950 er ikki nógv gjørt í hesum arbeiðinum.

Í august og fyrst í september arbeiðir Erik Jørgensen, múrari, rættuliga nógv, umframt Henning Ellefsen. Seinasta útgjald til teir báðar er 8. september, so tá eru teir lidnir.
Í oktober og november er bert goldið fyri nakað av tilfari.

Í desember arbeiða Elias Ellefsen, Martin Johansen, Niklas Haraldsen og Sigurd Hansen. Umframt tað hevur Jørgin Frans Jørgensen málað inni hendan mánaðin fyri 941 kr., Seinastu útgjaldini eru 30. desember 1950.

Arbeiðið liðugt

Arbeiðið sær so út til fyribils at vera mett liðugt við ársenda 1950. Tí næstu lønirnar og keyp av tilfari í smb. við at gera nakað við kommunuhúsið, eru ikki aftur fyrr enn í 1954. Viðmerkjast skal, at bara miðhæddin var gjørd til, loftið var framvegis ótilgjørt.

Keyp av øki heimanfyri húsið

Á skrá fyri fund 3. mai 1952 var keyp av ogn. Sunneva Haraldsen og Hanna Hansen vilja selja bøstykki teirra, ið liggja heimanfyri kommunuhúsið millum høvuðsvegin og skúlan. Støddin á stykkinum eru ávíkavist 263,5 m^2 og 84 m^2. Avgjørt varð at keypa hesi stykki, tá tey liggja ímillum øki kommununar. Samráðing skal takast upp um ein hóskandi prís. 5. juli 1952 er málið aftur fyri. Avgjørt varð at keypa hesi stykkir fyri 2 kr. m^2.

Loftið gjørt

10. desember 1954 sendir Henning Ellefsen, snikkari, Miðvági, kommununi skitsu og kostnaðarætlan fyri at gera loftið í kommunuskrivstovuni liðugt. Ætlanin fevnir um at innrætta helvtina av loftinum, ovaru síðu, við eini lesistovu. Og niðaru helvt við fundarhøli, sum hevur faldihurð millum lesistovuna og fundarhøli, sum sostatt lættliga kann víðkast. Trappugongd við garderobu og einum køki. Í viðlagdari kostnaðarætlan, sum er í smálutum, er kostnaðurin fyri at gera loftið til við tilfari, arbeiði og øllum innbúgvi tilsamans 31.605 kr.

Tikið verður ikki av hesum tilboðnum, sum kanska verður hildið at vera í so stórsligið.

Í fundarfrásøgn frá fundi 1. november 1955 verður staðfest, at einki er gjørt við loftið síðan húsið varð bygt. Samtykt var nú at fáa veggirnar bjálvaðar og klæddar við panel og at leggja el inn uppi á loftinum.

Í desember 1955 er hetta arbeiðið liðugt, sum sambært roknskaparbók hjá kommununi alt varð gjørt í november og desember 1955.

Lønir vórðu goldnar til Maskinverkstaðið í Miðvági, 1.209 kr. og til Jens Rasmusen, 15 kr.
Timbur varð keypt frá Balslev & Co., Tórshavn, fyri 2.045 kr.

Í desember 1955 verður loftið tikið í nýtslu, tí á fundi 12. desember 1955 verður samtykt, at ovara hædd í kommunuhúsinum skal nú takast í nýtslu til vevskeið.

Hetta árið eru tilsamans 3.307 kr. brúktar til kommunuhúsið at gera loftið fyri.

Í 1956, sum helst er víðari arbeiði við loftinum, hevur Albin Wang, elaktrikari, Miðvági, gjørt elarbeiði í húsinum fyri 457 kr. og Henning Ellefsen, snikkari, hevur gjørt arbeiði fyri 239 kr.

Í roknskapinum hetta árið er virði av bygninginum nú sett til 43.000 kr. Og er hetta galdandi heilt upp til 1. apríl 1964.



Skitsa av loftinum, sum Henning Ellefsen gjørdi hin 10.11.1954. Men hetta varð tó ikki framt.

Keypa málning

Tað var ikki ofta tá í tíðini, at menn gáðaðu um mentan og list. So eitt av málunum á fundi 23. mai 1956 er serstakt í somáta. Til viðgerðar var nevniliga keyp av málningi frá Jørgin Frans Jørgensen, málara, Miðvági. Sagt verður, at málningurin hevur hingið á kommunuskriv-stovuni síðan einaferð í vetur. Myndin sýnir tey gomlu handilshúsini niðri á Bakka. Jørgin Frans vildi selja myndina fyri 250 kr. og menn vórðu samdir um at keypa.

Keypið er aftur fyri á fundi, 15. januar 1957. Nú verður sagt, at Jørgin Frans Jørgensen vildi hava 300 kr. fyri málningin. Stýrið samdist kortini um at keypa.

- - -

Sum skilst var húsið málað fyrstu ferð í 1951, og var tað danski múrarin, Erik Jørgensen, ið gjørdi tað, eftir at hann hevði pussað húsini uttan.

Á fundi 16. apríl 1958 verður samtykt, at fáa húsini málað av nýggjum.

13. august 1958 skrivar Blái Krossur, Hansias Skarðheim, Miðvági, umsókn um at leiga loftið á kommunuhúsunum. Umsóknin er fyri á fundi 28. august 1958. Stýrið varð sinnað at játta hesum um so var, at Valborg Joensen ikki nýtir hølið í vetur til vevskeið, tó við teimum treytum, at Blái Krossur sjálvt heldur ljós, hita og reingerð. Eingin leiga skal gjaldast men hølið verður bert latið fyri komandi vetur.

Leggja miðstøðuhita inn

Tá loftið í kommunuhúsinum var liðugt tilgjørt í 1955 helt sóknarstýrið á fundi 12. desember sama ár, at tað var mest hóskandi at leggja miðstøðuhita í húsið. Men at hetta tó ikki kundi gerast í skundi og varð tí gjørt av at síggja tíðina ann fyribils.

Tað skuldi so ganga 8 ár. Inntil tá hava so brenniovnar hitað húsini, til hetta hevði húsið eisini 2 skorsteinar, ein á hvørjum enda.

8. september 1963 skriva Viggo & Jørgin Johannesen, Maskinverkstaður, Sandavági. Tilboð upp á miðstøðuhita til kommunuskrivstovuna í Miðvági. Comfort stálplátuketil við innbygdum heitvatnsspirali. 11 radiatorar Gold HE typa 11. 1 stk. oljufýr Shell ella Esso ella annað, ið tit ynskja. 1 stk. oljutangi til 1000 ltr. 1 ekspaniónmstangi 30 litur galvaniseraður. 1 sirkulatiónspumpa umframt rør og alt annað tilhoyr, sett upp komplett fyri 8.625 kr.

9. september 1963 skrivar Daniel Tavsen, Smiðja & Maskinverkstað, Sørvági. Tilboð upp á miðstøðuhita til kommunuhúsið. 1 stk. plátujarnsketil við pumpu og innbygdum heittvatns-

Kommunuhúsið 1958.
Mynd: Ólavur Hansen.

tanga og eldrúm sum fýrast kann í. 1 stk. automatisk oljufýr. 1 stk. oljutangi 1000 ltr. 11 stk. radiatorar. Hiti til kjallararúm har sløkkiamboð verða goymd. Heitt vatn við krana lagt til wc rúmið. Umframt alt annað tilhoyr, sett upp fyri 10.750 kr.

Tilboðini eru til viðgerðar á fundi, 9. september 1963. Avgjørt varð, at taka av tilboðnum frá Viggo & Jørgin Johannesen, treytað av, at boðið ikki fer uppum 500 kr. afturat fyri el-arbeiði, ið teir hava gloymt, og hiti til kjallararúm, har eldsløkkiamboð verða goymd.

30. desember 1963 verður í fundarfrágreiðing sagt, at nú er so langt komið við miðstøðuhitanum í kommunuhúsinum, at olja skal keypast í tangan. Avgjørt varð at keypa hana frá pf. Shell.

– Og ein kann siga, tað var kanska ikki so undarligt, tí Shell hevði oljugoymslu í Miðvági.

Miðhæddin ymbygd og sett í stand

Umframt at fáa miðstøðuhita í húsið, so verður í 1963 eisini gjørt av, at umbyggja og seta húsini í stand innan. Tey vóru tikin í brúk sum kommunuskrivstova í januar 1951. Nógv gongd hevur verið inni har hesi árini og nógv slit.

27. september 1963 er lýsing hongd upp. Útbjóðing. Arbeiðið við at klæða veggir, loft, mála og leggja papp og linoleum á gólvini til nýggja kommunuskrivstovu, gongd og w.c. rúm, verður við hesum útboðið. Upplýsingar um arbeiðið fæst á kommunuskrivstovuni. Tilboð skulu vera innkomin í seinasta lagið 9. oktober 1963 kl. 18.00. Tilboð skal vera upp á arbeiði, men ikki tilfar. Sóknarstýrið skilar sær rætt til at velja millum tey innkomnu tilboðini, sjálvt um hesi ikki eru lægst, ella eisini einki at taka.

Trý tilboð komu inn. 8. oktober 1963 skrivar Maskinverkstaðið í Miðvági og bjóðar sær at gera arbeiðið fyri 5.300 kr. 9. oktober skriva Jákup Ellefsen, Miðvági og Jørgin Frans Jørgensen, málarameistari, og bjóða sær at gera arbeiðið fyri ávikavist 3.300 kr. og 3.625 kr.

Sambært teirra tilboðum snýr arbeiðið seg um, at Cellulose-lakera veggplátur og leggja nýggjar plátur á veggir og loft í skrivstovu, gongd , w.c. og mála øll vindeyguni innan, umframt veggir, loft og leggja linoleum á gólvið í skrivstovuni og á w.c.-num.

Tilboðini eru til viðgerðar á fundi, 11. oktober 1963. Samtykt varð at taka av tilboðnum hjá Jákup Ellefsen, 3.300 kr., um hann stendur við boðið.

Í skrivi frá 1964 síggja vit, at loftið var ikki gjørt í 1963, men fyrru helvt av 1964. Og at Jákup Ellefsen, Miðvág, sambært egnum skrivi til kommununa 20. februar 1964, ikki stendur við fyrra boðið, ið helst var ov lágt. Men bjóðar seg nú til at gera arbeiðið fyri 4.000 kr.

Á fundi 24. februar 1964 verður tí samtykt, ístaðin at taka av tilboðnum, dagfest 9. oktober 1963, frá Jørgin Frans Jørgensen, málarameistara, Miðvági, fyri 3.625 kr. og sum hann eisini váttar yvirfyri kommununi í seinni skrivi.

Sambært roknskapinum hjá Miðvágs kommunu 1963/1964 so vórðu 19.624 kr. brúktar til kommunuhúsið hetta fíggjarárið. Ein grund til dagføringina er helst, at ætlanir eru um at leiga partar av húsunum út til ymiskt virksemi.

Í fundarfrágreiðing frá sóknarstýrisfundi 13. desember 1963 er sagt, at tann nýggja kommunuskrivstovan verður nú skjótt liðugt umvæld, og er talan um at havnaskrivstovan og sjúkrakassin koma at hava skrivstovu her eisini.

Sóknarstýrið er samt um at gera eina skrivstovu í ovaru hædd, ið skal leigast út til Miðvágs/Sandavágs havn og Miðvágs sjúkrakassa, og at skrivarin hjá Miðvágs/Sandavágs havn og Miðvágs sjúkrakassa, verður á kommunuskrivstovuni til tann nýggja skrivstovan er liðug. Á fundi 23. mars 1964 verður ásett, at leigan av skrivstovu á loftinum til Miðvágs/Sandavágs havn og til sjúkrakassan verður 225 kr. um mánaðin, íroknað ljós, hita og reingerð.

22. februar 1972 skrivar Vága Sjúkrakassi til kommununa og biður um at fáa skrivstovuhøli frá kommununi til leigu frá 1.4.1972. Tá er havnaskrivstovan flutt í skrivstovuhøli frá Snarfrost. Samtykt verður at leiga sjúkrakassanum skrivstovuhøli fyri 200 kr. um mánðaðin, íroknað ljós, hita og reingerð.

Í roknskapinum hjá kommununi 1963/1964 verður virðið á bygninginum, sum í fleiri ár er sett til 43.000 kr., nú hækkað til 62.600 kr.

Leiga út til politistøð og annað virksemi

Umframt at fáa havnaskrivstovu og sjúkrakassan inn, sum annars var í somu skrivstovu, og har ein skilir, at havnameistarin ger báðar roknskapir, er talan eisini um at leiga høli til politiið.

30. oktober 1963 verður skrivað til fútan, Tórshavn. Við at vísa til tygara áheitan á Hans Frimod Poulsen politist, Miðvági, og telefonsamrøðu við tygum viðv. rúmi til politistøð í Miðvági og varðhald, skulu vit boða frá, at forstandarskapið á fundi hevur samtykt, at leiga tykkum rúm til politistøð og eitt rúm til varðhald fyri 200 kr. um mánaðin við ljós og hita. Ein skitsa yvir hølini verður send tygum frá Poulsen politisti. Vit hoyra fegnir frá tygum um hetta skjótast tilber.

Skrivað verður aftur til fútan hin 28. februar 1964. Vísandi til vitjan tygara her í Miðvági viðvíkjandi høli til politistøð skal verða sagt tygum, at kommunustýrið hevur samtykt at leiga tygum tað lokalið til politistøð, sum áður varð brúkt til kommunuskrivstovu, og sum varð víst tygum, tá tygum vitjaði 24. februar. Nevnda høli hevur kommunan samtykt at leiga fyri 150 kr. um mánaðin, íroknað ljós og hita.

5. mars 1964 skrivar fútin og sigur, at hann tekur við tilboðnum frá kommununi, vegna Justitsministeriið at leiga eitt rúm í miðhæddini í umsitingarbygninginum hjá kommununi í Miðvági til brúk fyri politistin í Vágum.

Svarskriv verður sent fútanum hin 25. mars 1964, og leigusáttmálin smb. umbøn sendur undirskrivaður aftur í 5 eintøkum. Upplýst verður eisini, at húsið verður nú alt tikið í nýtslu, og hevur sóknarstýrið gjørt sáttmála við rengerðingskonuna, soleiðis at hon fær 200 kr. um mánaðin fyri alt húsið, har parturin fyri politistøðina er 60 kr. um mánaðin.

Tað hevur helst gingið rímuliga væl við leiguni og samstarvinum, tí ein sær ikki nakað aftur til málið fyrr enn á fundi 11. november 1971. Tá verður í fundarfrágreiðing nevnt, at kommunan hevur leigað eitt høli til skrivstovu hjá politistinum í Vágum burtur av kommunuhúsinum, smb. leigusáttmála dagf. 23.3.1964 við fútan í Tórshavn. Fútin vil nú hava ein leigusáttmála fyri 3 – 4 ár, ið ikki kann sigast upp hesi ár. Og samstundis biður hann um at fáa leiguna og reingerðina ásetta av sóknarstýrinum. Sagt verður, at sóknarstýrið vil ganga

Mynd frá 70-unum. Húsið er eisini politistød í Vágum, har skeltið stóð á ovaru síðu, sum hómast á myndini. Í hesum førinum er grind deyð og men bíða til seðlarnir koma út.

við til ein slíkan sáttmála, móti at leigan verður 300 kr. um mánaðin fyri høli og 100 kr. um mánaðin fyri reingerð.

Politistød var í bygninginum hjá kommununi fram til 1985, tá nýggj politistød var bygd og tikin í brúk á Tungureynstrød í Miðvági.

Loftið umbygt og sett í stand

Í fundarfrágreiðing frá fundi 23. mars 1964 verður sagt, at eitt høli er í gerð í ovara hædd á kommunuhúsinum, og verður eitt høli eftir í ovaru hædd, ið ikki er tilgjørt.

Sóknarstýrið var samt um at gera hetta hølið til nú eisini og eisini tað lítla rúmið, ið nú er avskildrað. Jørgin Jørgensen, ið ger tað hølið, ið nú er í gerð, hevur givið tilboð uppá arbeiðsløn av tí, ið eftir er at gera á ovaru hædd og at taka aðra kaminuna niður ájavnt við gólvið á ovaru hædd, og metir hann henda kostnað til 1.800 kr. Avgjørt varð at lata Jørgin Jørgensen, Miðvági, gera arbeiðið fyri ta meting, hann hevur gjørt tann 22.3.1964.
Leiga av skrivstovu til Miðvágs/Sandavágs havn og til sjúkrakassan verður 225 kr. um mánaðin íroknað ljós, hita og reingerð.

Hin 31. august 1964 var til viðgerðar rokning frá Jørgin Fr. Jørgensen, akkord arbeiði við innrætting av ovaru hædd á kommunuhúsinum, 1.063,50 kr. fyri eyka arbeiði.

Engelbrect Poulsen, møbulsnikkari, hevði fingið goldnar 6.391,79 kr., harav løn var 3.780 kr. og restin til tilfar. Avgjørt varð at gjalda hesar rokningar.

Á fundi 5. oktober 1964 er á skránnið fundarhøli í ovaru hædd á kommunuskrivstovuni, hetta hølið er nú liðugt og er neyðugt at fáa borð og stólar til hølið. Álagt varð formanninum at kanna málið og koma við uppskoti til hóskandi borð og stólar.

23. oktober 1964 verða 3 einslóðandi brøv skrivað til Maskinsnikkaraverkstaðið, Árni Svínoy, snikkarameistari, Engelbrect Poulsen, snikkarameistari, allir Miðvági. Fundarhøllin er nú ligugt gjørd í ovaru hædd á kommunuskrivstovuni, og er neyðugt at fáa eitt borð til fundarhøllina. Sóknarstýrið hevur samtykt at fáa hetta gjørt nú, og verður við hesum, um tað hevur áhuga tygara, heitt á tygum um at geva tilboð uppá at gera borðið, íroknað arbeiðsløn og tilfar, og samstundis koma við uppskoti, hvussu tygum halda borðið eigur at vera, og úr hvørjum træ tygum halda vera best hóskandi, til dømis teak ella annað træ. Hevur hetta tygara áhuga, biðjast tygum gera so væl, at senda skrivligt tilboð til kommunuskrivstovuna í seinasta lagið innan 6. november 1964. Um tygum vilja hava nærri upplýsingar hesum viðíkjandi,

Einir 10 stólar, sum Engelbrect Poulsen, møbilsnikkari, hevur gjørt fyri kommununa, eru framvegis til. Hetta er ein teirra. Mynd: s.j. 2018.

kunnu tygum fáa teir við at venda tygum til kommunuskrivstovuna. Sóknarstýrið vil taka støðu til tilboð tygara, um sóknarstýrið heldur seg kunna taka av tilboð tygara. Samstundis biðjast tygum tilskila í tilboð tygara, nær tygum kunnu hava borðið liðugt gjørt.

- Her kann leggjast afturat, at Engelbrekt hevði einaferð í tíðini gjørt borð og stólar til fundarhølið hjá kommununi. Tað er helst tað, talan er um her. 10 sera flottir polstraðir stólar úr mahogni við svørtum leðursetri og svørtum leður ryggleni, professionelt gjørt og vakurt fundarborð. Møblarnir vóru í húsinum so leingi, sum tað var brúkt til kommunuskrivstovu.

Sambært roknskapinum 1964/1965 vórðu 24.463 kr. brúktar til kommunuhúsið hetta fíggjarárið. Og virðið á húsinum er samstundis í roknskapinum hækkað frá 62.600 kr. til 86.740 kr. Og tað er virðisásetingin upp til 1971.

- - -

Sagt verður frá fundi 9. juni 1966, at formaðurin setti uppskot fram um at mála húsið uttan í summar. Samtykt varð at mála húsið tvær ferðir og bjóða arbeiðið við tilfari út.

11. juni 1966 er lýsing hongd í talvuna. Í lýsingini stendur m.a., at arbeiðið fevnir um at mála húsið uttan, vindeygu, veggir, tak, hurðar og vindskeiðir, eisini skulu rútarnir kittast, har einki kitt er. Tilboð skulu verða latin inn til kommunuskrivstovuna í seinasta lagið 22. juni 1966 kl. 16.00.

Hvør gjørdi arbeiðið sæst ikki, men í roknskapinum hetta árið sæst, at 5.957 kr. eru brúktar til viðlíkahald av kommunuhúsinum og Gamla skúla, sum kann merkja, at tann sami hevur gjørt bæði arbeiðini.

Í roknskapinum hjá kommununi 1971/1972 er virðið á kommunuhúsinum hækkað frá 86.740 kr. til 90.000 kr. Og er hetta møguliga bert fyri at runda talið av. Og er hetta virðið ásett upp til 1977.

Í 1977 er eitt mistak gjørt í ársroknskapinum hjá kommununi viðv. uppgerð av virðinum av bygningum hjá kommununi. “Kommunuhúsið”, sum hevur verið virðismett øll árini síðan tað var bygt, er hetta árið strikað, og “Bygdarhúsið” kemur at standa ístaðin í sama teigi og við somu upphædd, 90.000 kr. Tann bygningurin var ikki liðugt gjørdur tá. Og virði av kommunuhúsinum fellur út úr roknskapunum tá.

Men tað kemur við aftur í roknskapin 1983/1984, og tá er virðismetingin munandi hækkað. Kommunuhúsið er virðismett til 134.000 kr., og amboð og innbúgv í húsinum eru virðismett til 207.000 kr. Ella tilsamans 341.000 kr.



Hølið á loftinum, sum ár 2000 er skrivstova hjá dagrøktarleiðaranum, var áður havnaskrivstova í nógv ár.

Hølið í miðhæddini, sum her er til ferðaráð, var løgreglustød í nógv ár.

22. juni 1974 er lýsing hongd í talvuna. Útbjóðing. Arbeiðið við at mála alt kommunuhúsið uttan einaferð, verður við hesum útboðið. Tilboðið umfatar arbeiðsløn og tilfar. Møgulig tilboð skulu verða latin skrivliga inn til kommunuskrivstovuna í seinasta lagið 5. juli 1974.

Martin Danielsen, málari, Miðvági, skrivar hin 5. juli 1974 og bjóðar sær at mála húsið uttan einaferð við arbeiðsløn og tilfari fyri 3.000 kr. Tilboðið er til viðgerðar á fundi 19. august 1974. Sagt verður, at eitt tilboð kom inn. Samtykt varð at taka við hesum tilboðnum.

Spurningur um parkeringsplássið millum húsini hjá Manbjørn Wang og kommunuhúsið var til viðgerðar á fundi 23. september 1974. Bygdaráðið varð samt um, at fáa ein múr gjørdan, tá vegskráningur ikki er hóskandi, tá skúlin liggur niðanfyri og trappan, sum talan hevur verið um at gjørt, er bygdaráðið samt um at sloyfa.

Uppskot um ymsar broytingar í innrætting av bygdaráðshúsunum vórðu lagdar fram á fundi 13. november 1981 til at taka støðu til. Uppskotið var samtykt. Hvørjar broytingarnar vóru eru upplýsingar ikki funnar um. Men sambært roknskapinum hetta árið eru 41.772 kr. brúktar upp á húsið.

Í 1982 er, eftir øllum at døma, fyrsta teldan keypt til kommunuskrivstovuna í Miðvági. Á bygdaráðsfundi 8. mai 1982 er til viðgerðar møguligt keyp av "Data maskinu" til skrivstovuna. Fígging fæst frá Føroya Banka. Samtykt var at keypa maskinuna og taka upp lán úr Føroya Banka 175.000 kr. til endamálið. 13. mai verður skrivað til Landsstýrið og biðið um loyvi til lántøkuna har m.a. sagt verður, at lánið hevur 14% rentu p.a., og skal rindast aftur yvir 5 ár. 4. juni 1982 fær kommunan játtandi svar frá Landsstýrinum.

Í 1982 er húsið málað aftur. Hetta varð samtykt á fundi 15. juni 1982. Martin Danielsen hevði givið tilboð uppá at mála bygdarráðshúsið og gamla skúla uttan fyri 23.850 kr. Sagt verður, at hetta var lægsta tilboð, so okkurt annað tilboð hevur verið eisini. Sum tó ikki er skjalfest.

Miðskeiðis ella seint í áttatiárunum gjørdi Niels Pauli Hansen, Miðvági, arkivrúmið, sum er í vestara enda av kjallaranum. Rúmið varð klætt innan við gipsplátum, sum eru brunatryggar. Tað var eitt sindur nýtt tá, verður sagt.

Einaferð seinnu helvt av áttatiárunum verður sagt, at dragbjálkin undir miðhæddini var dragnaður so nógv, at gólvið helti inn móti miðjuni. Hetta gjørdi, at til dømis skrivstovustólar á hjólum rullaðu inn á miðjuna á húsunum. So teir kundu neyvan brúkast tá. Bjálkarnir undir gólvinum vóru gjørdir soleiðis, at teir vóru í tveimum. Frá grundini og yvir á dragbjálkan í miðjuni og hin víðari til hina síðuna. Berturin, nevndur í Miðvági, varð biðin at koma at lyfta gólvið uppaftur. Hann fekk lyft gólvið somikið, at tað batnaði heilt nógv. Men tordi ikki at lyfta so nógv, at tað bleiv heilt slætt, tí hann fryktaði, at bjálkarnir gliðu av. Men tá bleiv tað so brúkbart kortini.

Í 1987 var á fundi 26. januar samtykt at skifta vindeyguni á niðaru síðu. Biðið var um tilboð og tvey tilboð komu inn. Pf. Føroya Gluggi Miðvági 30.500 kr. og Vatnsoyrar Snikkaravirki, 20.830 kr. Tekniska nevnd og Fíggjarnevndin mælti til at keypa frá Vatnsoyra Snikkaravirki. Samtykt varð tó at keypa frá Føroya Glugga treytað av, at avsláttur uppá 15% fæst. Tað skuldi so givið 25.925 kr.

Kommunuskrivstovan hevði áður verið valstaðið fyri Miðvágs kommunu. Samtykt varð á fundi, 2. september 1987, at valstaðið verður verður flutt úr kommunuskrivstovuni til høllina í Bygdarskúlanum.

Máling av bygdaráðsskrivstovuni uttan var til viðgerðar á fundi 26. mai 1994. Samtykt varð, at Martin Danielsen fær bygdaráðsskrivstovuna at mála og trykkspula fyri 19.500 kr. við tilfari og arbeiðsløn.

10 ár eftir at vindeyguni á niðaru síðu vórðu skift, var aftur á skrá fyri fund, at skifta vindeyguni í kommunuskrivstovuni. Hetta var á fundi 24. februar 1997. Sagt verður, at peningur er avsettur á fíggjarætlanini til arbeiðið. Tilboð var komið frá pf. Føroya Glugga at skifta tey gomlu vindeyguni. Samtykt var at taka av tilboð uppá "Dry-kip" vindeygu fyri 55.060 kr.

Á bygdaráðsfundi 16. mai 2000 var til umrøðu at gera eystaru hálvu av kjallaranum í kommunuskrivstovuni til. Fíggjarnevndin mælti til at innrætta eitt rúm har. Kostnaðarætlan varð gjørd. Samtykt varð at biðja Salomon Poulsen gera arbeiðið fyri tímaløn. Har var so eitt skrivstovuhøli gjørt við tilhoyrandi w.c.

Í desember 2000 hevði Pf. Westtec, Sørvági, annars gjørt eitt uppskot um fullkomuliga at umbyggja alla kommunuskrivsovuna innan frá loft til kjallara, har nágreiniligar tekningar vóru viðlagdar, har m.a. trappusamband er millum allar hæddirnar. Í skrivi við uppskotinum verður sagt, at ongin kostnaðarmeting er gjørd. "Hinvegin er tað okkara fatan at projektið kann gerast í eindum soleiðis sum ráðini eru." Skriva undir hava Jákup á Stongum og Poul Arni Jacobsen. Tekningarnar eru imponerandi, og úrslitið hevði verið rættuliga flott, má sigast. Men avgjørt var tó ikki at gera hetta. Kanska manglandi kostnaðarætlanin gjørdi sítt til tað. Við var eisini tekning yvir verandi innrætting av húsunum, har ein sær, at Dagrøktin

hevur skrivstovu á loftinum og ferðaráð í miðhæddini. Hetta eru annars tey hølini, sum hava verið útleigað til ymiskt, sum nevnt er frammanfyri.

Í 2001 verða smærri umvælingar gjørdar innan og veggirnir klæddir við glasvev og málað verður innan

Á bygdaráðsfundi 4. september 2007 er til viðgerðar tilboð frá BGT Spf. v/ Róa Dahl-Jacobsen uppá at skifta takið á kommunuskrivstovuni fyri í mesta lagi 50.000 kr. + tilfarð og Mvg. Fíggjarnevndin og Tekniska nevnd viðmæltu. Samtykt varð at taka av tilboðnum.

Frá 1. januar 2009 var kommunuskrivstovan í Miðvági ikki longur brúkt sum kommunuskrivstova, tó at nakrir kommunustýrisfundir hjá Vága kommunu vórðu hildnir har fyrstu tíðina. Seinni hevur miðhæddin og loftið verið leigað út og/ella brúkt til ymiskt virksemi. Seinast er ungdómshús har.

Kommunuskrivarar og skrivstovufólk

Av tí at kommunan tey mongu fyrstu árini av fíggjarligum ávum ikki hevði nakran skrivara ella skrivstovufólk, so var tað vanliga formaðurin, ið gjørdi roknskapin og tað skrivliga arbeiðið. So valið av formanni fall vanliga av hesi orsøk á ein í forstandarskapinum, sum hevði skil fyri hesum. Og tað síggja vit eisini við formonnunum í Miðvágs kommunu. Í hvussu er upp til, at ein kommunuskrivari varð settur í 1947. Hetta var galdandi fyri stórt sæð øll kommunustýri í smáum og miðalstórum kommunum tey fyrstu nógvu árini.

Høvuðsgrundin fyri hesum var sjálv kommunustýrislógin.

Í kommunulógini frá 28. februar 1872, sum í høvuðsheitum var gildið upp til 1972, stóð í §12 um uppgávurnar hjá formanninum, at hann er fundarstjóri, syrgir fyri at gerðabókin verður førd og syrgir fyri, at avgerðirnar hjá stýrinum verða førdar út í lívið. Hann hevur ábyrgd av brævaskiftinum hjá kommununi og at teir neyðugu roknskapirnir og roknskapar- og aðrar bøkur verða førdar. Útreiðslur til skrivireiðskap, protokollir, brævporto, umframt hjálp til skriviarbeiði verður endurgoldið honum eftir rokning. Hann goymir og varðveitir allar protokollir, brøv og onnur skriv ella dokumentir, sum viðkoma forstandarskapinum.

Við tað at kommunan onga kommunuskrivstovu hevði tey fyrstu mongu árini, komu fólk heim til formannin at røkja øll síni viðurskifti við kommununa, um tað var skattur, skamtanarkort, umsóknir ella annað, tað snúði seg um. So um formaðurin hevði eina skrivstovu, sum teir flestu høvdu, so varð hon soleiðis kommunuskrivstova eisini.

Vanligu skrivstovuútreiðslurnar hjá kommununi upp til kríggið vóru føstu postarnir: Skrivireiðskapur (pappír, protokollir, blekk, pennar, blíantar o.a.t.), telefon (gjald til lokalu telefonstøðina), porto (frímerki ella fraktgjald), prentútreiðslur (prentan av ymsum oyðubløðum, rokningarblokkum, stempul o.a.t.) og aðrar útreiðslur (ymiskt annað, sum kundi koyrast undir skrivstovuarbeiði ella leiðsluna av kommununi, so sum ferðaútreiðslur í smb. við fundir aðrastaðni o.a.t.).

Upp til 1936 lógu hvør av hesum postum undir 100 kr. hvør. Tey fyrstu árini væl undir tað. Í 1936 kom posturin, skrivireiðskapur upp á 100 kr. um árið. Men allir hækkaðu so seinni í tíðini rættuliga nógv.

Í roknskapinum 1918/19 kemur ein nýggjur postur inn undir stjórnarútreiðslur, og er tað: "Hjálparfólk hjá formanninum". 1918/19 er henda upphædd 82 kr. og 1919/20, 97 kr.

Sjálvt um tað stendur "Hjálparfólk hjá formanninum" so skilir ein, at meginparturin í hvussu er, er samsýning til formannin fyri skrivliga arbeiðið, hann ger. Og av hesum pengum kundi hann so eisini biðja onkran hjálpa sær av og á. Og var tað soleiðis, tað gekk fyri seg.

8. oktober 1920 verður skrivað til Amtið og sagt, at forstandarskapið á fundi 4. oktober hevur samtykt at veita formanninum samsýning á 200 kr. til hjálparfólk til kommunala arbeiðið, umframt 1 kr. um vikuna fyri útbýti av breyð- og sukurkortum. Har biðið verður um loyvi til hetta frá Amtinum.

Tað seinna nevnda er so eitt annað arbeiði, formaðurin hevði og hevur sikkurt brúkt væl av tíð upp á, tað er útbýtan av skamtanarkortum, sum vórðu ásett undir bæði 1. heimsbardaga og undir 2. heimsbardaga og vóru í gildið í nógv ár eftir hvørt kríggið. Fólk komu so heim til formannin eftir skamtanarkortum, og skuldi hann halda skil á, at øll fingu tað, tey áttu og ikki meir ella minni enn tað. So 1 kr. um vikuna, sjálvt eftir tátíðar meti, var ein sera beskeðin samsýning.

Formaðurin fekk so 200 kr. um árið fyri skrivligt arbeiði heilt upp til 1934.

12. mars 1935 verður skrivað til Amtið og upplýst, at forstandarskapið á fundi 5. januar samtykti at veita formanninum 300 kr. um árið til hjálparfólk, um Amtið og Løgtingið góðtaka hetta.

300 kr. er so samsýningin árini 1935 til 1940.

Í 1941 hækkar samsýningin hjá formanninum til tað tvífalda til 600 kr. um árið. Og er tað heilt upp til 1947, tá kommunuskrivari verður settur, og heldur áfram nógv ár eftir tað sum formansløn.

Formenn frá 1915 til 1947, tá kommunuskrivari varð settur, vóru:

Mikkjal á Ryggi 1 mánað og 5 dagar í 1915.

Rasmus Niclasen, handilsmaður, 1915 – 1920.

Hans Niklái Niclasen, handilsmaður, 1920 – 1923.

Sørin Danielsen, timburmaður og postavgreiðslumaður, 1924 – 1934.

Andrias Joensen, handilsmaður, 1935 – 1938.

Sørin Danielsen, timburmaður og postavgreiðslumaður, 1939 – 1949.

Albert Joensen kommunuskrivari

Fyrsti kommunuskrivarin hjá Miðvágs kommunu var Albert Joensen, ið hevði starvast sum kommunalur politistur í Miðvági síðan 1. januar 1945 og var framvegis í tí starvinum. Albert var ættaður úr Famjin og var nú búsitandi í Miðvági.

Í samband við, at skrivari varð settur 01.09.1947 varð samtykt at leiga hølir til kommunuskrivstovu. Tí, sum nevnt áður, hevði skrivstovan áðrenn verið heima hjá formanninum.

Í fundarfrásøgn frá fundi 22. august 1947 verður sagt, at samtykt varð at opna tað nýinnrættaðu kommunuskrivstovuna hin 1. september, og skrivstovutíðin varð sett til 2 tímar um dagin í tríggjar dagar um vikuna, soleiðis: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 4 til 6 seinnapart. Hetta varð kunngjørt í kunngerðatalvuni.

Albert Joensen

Somuleiðis var samtykt at seta politistin Albert Joensen sum starvsfólk á skrivstovuni fyri 500 kr. um árið.

Sambært kunngerð frá 23. august 1947 varð kommunuskrivstovan frá 1. september sama ár flutt í húsini hjá Martin Johansen og var, smb. lýsingini, inngongdin gjøgnum handilshurðina. Hetta var so fyrsta veruliga kommunuskrivstovan í Miðvági.

Árið 1947 fær Albert 166 kr. í samsýning fyri arbeiðið á kommunuskrivstovuni, tað er fyri 4 mánaðir. Í 1948 er lønin 500 kr. fyri alt árið.

Á fundi 24. mars 1949 varð samtykt, at Albert Joensen, sum higartil hevur sitið á kommunuskrivstovuni, framvegis skuldi gera tað dagliga arbeiðið á skrivstovuni, og Johannes Ravnsfjall skuldi vera hjálparmaður hansara.

21. september 1949 verður samtykt, í smb. við at Landsstýrið hevur avgjørt, at settur verður ein manntalsskrivari í hvørjari kommunu, at seta Albert Joensen, kommunuskrivara og politist, í starvið.

Fyri 1949 og 1950 er lønin sum kommunuskrivari og manntalsskrivari 1.000 kr. um árið og verður í 1951 hækkað til 1.800 kr.

18. apríl 1951 verður skrivað til Landsstýrið. Umsókn um hækkan av lønini til skrivaran

og kassameistaran. Á fundi 2. mars h.á. avgjørdi sóknarstýrið at hækka lønina til 1.800 kr. hvør. Grundin til umsóknina er, at tað gongur illa at fáa fólk at arbeiða á kommunuskrivstovuni fyri ta lítlu lønina, sum loyvt er at geva. Arbeiðið er vaksandi, og soleiðis kann ein ikki rokna við at fáa nakran at gera arbeiði við tí samsýning, sum nú er.

17. mai 1951 skrivar Landsstýrið og gevur loyvi til lønarhækkingina til skrivaran, sum umbiðin var í skrivi 18.4. h.á. Landsstýrið leggur afturat: "Sjálvt um hetta er 6/700 kr. meir enn galdandi reglur loyva, so vil landsstýrið í hesum førinum ganga við til undantak við teirri treyt, at eingin annar eisini ger hetta arbeiðið."

Árini 1951 til 1955 er árliga samsýningin so 1.800 kr.

Á fundi 3. mars 1956 varð samtykt at hækka lønina til 2.400 kr. um árið. Aftur hesaferð verður skrivað til Landsstýrið og biðið um loyvi til lønarhækkingina galdandi frá 01.01.1956, sum er við skrivi 20. apríl 1956. Játtandi svar kemur frá Landsstýrinum hin 11. desember 1956. Hendan lønarhækkingin er so galdandi fram til og við 1958.

Í 1958 gevst Albert Joensen sum kommunalur politistur og verður nú settur í fulla tíð sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu. Hann var tó statsløntur politistur fram til 31.03. 1962.

Í 1959 er skrivaraløn 5.000 kr. og frá 1960 er lønin 6.000 kr. um árið.

Í 1961 síggja vit m.a. í roknskapunum, at skrivaraløn er 6.200 kr. Hækkað í 1962 til 7.200 kr. og aftur hækkað roknskaparárið 1965/66 til 8.600 kr.

Í 1966 er lønin hjá skrivaranum 800 kr. í 3 mánaðir, sum so er hækkað til tað dupulta, til 1.600 kr. um mánaðin, sum hann so fær restina av árinum. Ella 16.800 kr. fyri árið 1966.

Á fundi 14. mars 1966 verður sagt, at treytin fyri hækkanini er, at skrivarin skal arbeiða á kommunuskrivstovuni alt árið. Men tað hevði hann, sum ein hevur skilt, gjørt áðrenn. Kanska tað merkir at tímatalið er hækkað.

Í 1968 er lønin hækkað til 19.200 kr.

25. august 1969 skrivar kommunala eftirlitið til Miðvágs kommunu og hevur viðmerkingar til roknskapirnar hjá Miðvágs kommunu fyri árini 1965/66, 1966/67 og 1967/68. Í niðurstøðuni hjá eftirlitinum verður sagt:

"Tá kommunan hevur fastan skrivara, eigur formaðurin onga løn at fáa, kortini hava skiftandi formenn í omanfyri nevndu árum fingið samsýning, ávikavist 750 kr., 1.000 kr. og 2.000 kr.

Eisini er ov nógv goldið í skrivaraløn sambært reglunum. Í 1965/66 eru 8.600 kr. goldnar, sum eru 705 kr. ov nógv. Árið 1966/67 hevur skrivarin fingið útgoldið 19.200 kr., sum eftir fólkatalinum er 9.962 kr. ov nógv. Árið 1967/68 eru 19.200 kr. goldnar, sum smb. fólkatalinum eru 9.357 kr. ov nógv. Við tað at kommunan ikki sæst at hava fingið loyvi frá Landsstýrinum at lata omanfyri nevndu lønir, verður kommunan biðin um eina frágreiðing hesum viðvíkjandi."

Frágreiðingin frá kommununi man so vera góðtikin, og var hon helst, at alt hetta var gjørt við loyvi frá Landsstýrinum, so har hevði kommunala eftirlitið ikki nøktandi upplýsingar. Avrit av frágreiðingini hjá kommununi er tó ikki funnin. Frá 1. apríl 1970 var lønin hjá skrivaranum sett til 1.700 kr. um mánaðin, sambært samtykt sama dag.

Í fundarfrágreiðing 30. november 1970 verður sagt, at formaðurin greiddi frá, at kommunuskrivarin er sjúkur og er skorin á Landssjúkrahúsinum. Hann hevur tí heitt á Hans Martin Thomasen, havnafúta, um at taka sær av skrivstovuni, inntil skrivarin kann byrja aftur. Hann hevur játtað hesum við tí treyt, at hann bert hevur opið 3 tímar um vikuna.

Her kann viðmerkjast, at Hans Martin Thomasen hevði havnaskrivstovuna í kommunuhúsinum, so hann arbeiddi har longu frammanundan.

Á fundi 3. juni 1971 er upplýst, at Albert Joensen var sjúkur og burtur frá arbeiðinum í 3 mánaðir, og varð samtykt at veita Hans Martin Thomasen 500 kr. fyri at hava passað kommunuskrivstovuna hesa tíðina.

Sambært roknskapinum 1970/71 var samlaða skrivaralønin hetta árið annars 23.800 kr.

18. oktober 1971 skrivar Albert Joensen, kommunuskrivari, Miðvági. Eg loyvi mær við hesum at søkja um lønarhækking. Sum sóknarstýrinum kunnugt hevur lønin á kommunuskrivstovuni ikki verið í hægra lagi, eg fái nú 1.700 kr. um mánaðin. – Brævið er eitt sindur drúgt, har hann tekur dømir um, hvat vanliga arbeiðsløn er. Hann vísir á, at ein arbeiðsmannaløn við 42½ tíma viku var í mai 1970 um 1.800 kr. og er nú 2.273 kr. Minstaløn hjá fiskimonnum er 2.000 kr. um mánaðin. Hann vísir á, at arbeiðið hjá sær er vaksið munandi, sum sæst av vaksandi inngjaldum og útgjaldum hjá kommununi. At enda nevnir hann, at sum sæst er tað ikki uttan grund, hann søkir um lønarhækking. Og endar brævið við at siga: "Roknskapurin hjá kommununi fyri 1971/72 verður tann 23. roknskapurin eg komi at leggja fram, um heilsan verður.

Á bygdaráðsfundi 11. november 1971 varð samtykt at hækka lønina til 1.900 kr. um mánaðin, frá 1. november 1971 at galda.

29. desember 1972 verður skrivað til Landsstýri, Tórshavn, og sagt frá, at bygdaráðið á fundi 28. desember hevur valt formann og næstformann, sum tilskilað er í útfyllingarskjali frá Landsstýrinum. Vit hava fastan kommunuskrivara, og hevur hann í ár verið skrivari hjá Miðvágs kommunu í 25 ár.

Hin 5. februar 1973 var á bygdaráðsfundi samtykt, at lønin hjá kommunuskrivaranum verður sambært sáttmála millum Landsstýrið og Starvsmannafelagið, og at mánaðarlønin verður smb. 4. lønarstigi í fyrsta flokki og verður prístalsviðgjørd, og verður henda løn roknað frá 1. januar 1973.

25. oktober 1974 er til viðgerðar á bygdaráðsfundi, at skriv var komið frá Albert Joensen har hann sigur arbeiðið sum kommunuskrivari frá sær vegna sjúku. Avgjørt varð at lýsa starvið leyst til tað nýggja bygdaráðið er valt.

12. desember 1974 er lýsing hongd í talvuna. Søkt verður eftir kommunuskrivara til Miðvágs kommunu. Løn smb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri. Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagið 31. desember 1974. Bygdaráðið skilar sær rætt til at velja millum inn komnar umsóknir ella onga at taka.

23. desember 1974 andaðist Johan Albert Joensen, kommunuskrivari og f.v. politistur í Miðvági. Albert starvaðist sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu í 27 ár, frá 1.9. 1947 til 25.10. 1974, tá hann segði seg frá vegna sjúku. Var politistur í Miðvági í gott 17 ár, frá 1.1.1945 til 31.3.1962. Albert var føddur hin 20.12.1922 og var sostatt bert 52 ára gamal, tá hann andaðist.

Jóhannes Ravnsfjall

Frá 1949 til 1959 vóru tveir kommunuskrivarar hjá Miðvágs kommunu, sum arbeiddu hálva tíð hvør. Á fundi 24. mars 1949 varð samtykt, at Jóhannes Ravnsfjall verður settur sum hjálparmaður á kommunuskrivstovuni.

Jóhannes Ravnsfjall og Albert Joensen fingu somu løn, sum nevnd er í partinum um Albert.

Á sóknarstýrisfundi 6. desember 1951 er sagt, at Jóhannes Ravnsfjall, sum hevur starvast á kommunuskrivstovuni, hevði ligið sjúkur á Landssjúkrahúsinum í um hálvt ár. "Nær hann væntast aftur til arbeiðis er ikki upplýst. Hann hevur fingið løn goldnað, 150 kr. um mánaðin, higartil dags. Limirnir vóru samdir um at útseta henda spurning til Ravnsfjall kemur heim –

Jóhannes Ravnsfjall

hann væntast heim til jólar – og tá taka avgerð um, hvørt tað skal haldast fram við at gjalda honum løn."

Sambært roknskapinum 1951 fekk Jóhannes Ravnsfjall 1.700 kr. í løn hetta árið. Umframt feriuløn á 168 kr.

Jóhannes er so komin fyri seg aftur og er í starvið sum hálvtíðar kommunuskrivari fram til 1959.

Á fundi 21. mai 1959 varð samtykt at seta Albert Joensen einsamallan sum kommunuskrivara.

Jóhannes Ravnsfjall starvaðist soleiðis sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu frá 1. apríl 1949 til 31. mai 1959, 10 ár og 2 mánaðir.

Heini Heinesen kommunuskrivari

Á bygdarásfundi hin 10. januar 1975 varð samtykt, at seta Heina Heinesen á Ryggi Miðvági við somu løn sum fyrri kommunuskrivarin, ið var Albert Joensen.

Heini Heinesen

Roknskaparárið 1974/75 er skrivaraløninin 47.000 kr. Hetta árið eru samsýningarnar til starvsfólk á kommunuskrivstovuni og samsýningar til bygdaráðið, settar í sama teig í høvuðsroknskapinum, sum er tað einasta, varðveitt er av roknskaparskjølum hesi árini. So eftir tað sær ein ikki nágreiniligu samsýningarnar til skrivara út frá roknskapunum. Men hon sýnist at vera um 50.000 kr. um árið upp til 1978.

T.v.s. í byrjanini um 47.000 kr. hækkandi til um 50.000 kr. ta tíðina, hann sat.

Heini Heinesen sat annars ikki serliga leingi sum kommunuskrivari, settur frá 1.1.1975 og sat til 30. apríl 1978, 3 ár og 4 mánaðir.

Bygdaráðið samtykti á fundi 28. apríl 1978 at seta Heina Heinesen sum grannskoðara hjá kommununi, nú Hans Arni Ellefsen var settur sum skrivari. Meira um tað í partinum um grannskoðarar hjá kommununi.

Hans Arni Ellefsen kommunuskrivari

Á bygdaráðsfundi 28. apríl 1978 var á skránni, at søkt hevði verið eftir nýggjum kommunuskrivara, og at tvær umsóknir vóru komnar inn. Samtykt varð at seta Hans Arna Ellefsen, Miðvági, frá 1. mai 1978 at rokna.

Samtykt varð hin 27. juni 1984 at seta Hans Arna í 9. lønarflokk frá 1. juli 1984, sum gav 12.777 kr. um mánaðin.

Hin 18. desember 1985 varð samtykt at broyta hetta til 17. lønarflokk frá 1. desember 1985 at rokna, sum gav 14.544 kr. um mánaðin.

Ódagfest, einaferð í 1989, er arbeiðsbýtið á skrivstovuni ásett. Skrivarin hevur hesar uppgávur:

1. *Kontering*. Kontering skulu bæði skrivarin og verkfrøðingurin gera. Øll skjøl, sum hava við teknisku deild at gera, skulu fyrst konterast av verkfrøðinginum til tær ymisku konti, hann

Hans Arni Ellefsen

býtir arbeiðið upp í. Síðan fær skrivarin tað til kontering og útgjaldingar, áðrenn skrivstovumaðurin bókar.
2. *Brævaskifti*. Hetta hevur formaðurin um hendi og skrivarin eisini partvís.
3. *Kassaarbeiði og bankagjaldingar*. Tað tekur skrivarin sær av.
4. *Postupplating og postsendan*. Skrivari hevur ábyrgd av at opna postin og fáa hann á rætta pláss.
5. *Avgreiðsla*. Hetta er vanlig daglig avgreiðsla á skrivstovuni, sum skrivarin hevur um hendi.
6. *Gerðan av roknskapi*. Har er formaðurin við eisini.
7. *Gerðan av fíggjarætlan*. Hetta gera formaðurin og skrivarin í felag.
8. *Lániupptøkur*. Viðv. lántøkum, sum bygdaráðið hevur samtykt at fremja, hava formaðurin og skrivarin heimild at skriva undir hjá lánistovninum vegna kommununa.
9. *Ávísing til útgjaldingar*. Hetta kunnu bæði formaðurin og skrivarin gera.
10. *Fullmakt til bankakonti*. Hetta hava formaðurin og skrivarin, smb. samtykt í bygdarráðnum.

Í sambandi við kreppuna fyrst í nýtiárunum var á fundi 30. apríl 1992 til viðgerðar, lønarlagið hjá teimum kommunalu starvsfólkunum. Samtykt varð, at skrivarin fer niður við 25 % av arbeiðstíðini og løntur samsvarandi.

30. mars 1995 verður skrivað til Hans Arni Ellefsen, skrivstovumaður, Miðvági. Vanligt er, at almennir starvsmenn fara úr tænastu, tá ið teir eru vorðnir sjeyti. Bygdaráðið fylgir hesi siðvenju og loyvir sær hervið at siga tygum upp frá 1. apríl 1995 til at fara úr starvi 1. november 1995. Samstundis fara vit at nýta høvi at takka tygum fyri langa og trúgva tænastu. Við háviðring, Marianna Simonsen, form.

Hans Arni Ellefsen varð føddur 27. juni 1923, og gjørdist sostatt 72 ár summarið 1995.

Hans Arni var kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu frá 1. apríl 1978 til 31. oktober 1995. 17 ár og 7 mánaðir.

Georg Hansen skrivstovumaður

Á skrá fyri bygdaráðsfund 14. desember 1983 er millum annað, at skotið er upp, at søkja eftir einum skrivstovufólki, sum er dugandi í maskinskriving, og sum annars kann átaka sær alt vanligt skrivstovuarbeiði so sum arkivering, bókføring og tílíkt, hálvan dag. Og skal arbeiða eftir ávísing beinleiðis frá bygdaráðsformanninum. Hetta varð samtykt.

30. desember 1983 er lýsing send til Dimmalætting og Sosialin, har m.a. stendur: "Søkt verður eftir skrivstovufólki til bygdaráðsskrivstovuna í Miðvági. Starvið verður sett sum hálvtíðarstarv."

Málið er aftur til viðgerðar hin 3. februar 1984. Upplýst er ikki hvussu nógvar umsóknir vóru, men samtykt varð á fundinum við skrivligari atkvøðugreiðslu at seta Georg Hansen í starvið.

Tað, at atkvøtt var við skrivligari atkvøðugreiðslu sýnir okkum tó, at tað hava verið fleiri enn ein, helst fleiri umsøkjarar.

Í gerðabókini fyri sama fundin stendur eisini, at Georg Hansen hevur sagt, at hann kann

møta hin 12. mars 1984. Um vit hyggja í kallendaran aftur í tíðina, so síggja vit, at 12. mars 1984 var ein mánadagur.

Fyrsti kommunufundurin Georg Hansen, á Kirkjabø, sæst at hava ført gerðabókina til bygdaráðsfund, er til bygdaráðsfund 14. mars 1984. Hetta var annars vanliga arbeiðið hjá kommunuskrivaranum, har skrivstovumaðurin var varamaður.

Á bygdaráðsfundi, 27. juni 1984 er samtykt, at áseta lønina hjá Georg til 9.- lønarflokk, frá 01.06.84 at rokna.

Á fundi árið eftir, hin 18. desember 1985, er hetta broytt og uppstigað til 13. lønarflokk. Løn hálvandag 6.228 kr. Broytingin fær gildi 1. desember 1985.

Smb. skrivi frá Vanlukkutryggingini er hesi starvsfólk á kommunskrivstovuni tryggjað í 1984: Hans Jørgensen, bygdaráðsformaður, Hans Arni Ellefsen, skrivari, Kristin Ellefsen, verkfrøðingur og Georg Hansen, skrivstovumaður.

Georg Hansen, skrivstovumaður, verður á fundi 14. apríl 1988, settur fullan dag á skrivstovuni. Í gerðabókini stendur, at Georg hevur biðið um at vera settur í fulltíðarstarv, og at Fíggjarnevndin viðmælir. Samtykt varð, at seta hann í fulltíðarstarv frá 15. apríl 1988.

Ódagfest, einaferð í 1989, er arbeiðsbýti á skrivstovuni ásett: Arbeiðsøkið hjá skrivstovumanninum var: Bókføring, avstemman, maskinskriving og at hava skjalagoymsluna undir hond.

Í kreppuni fyrst í nítiárunum vóru stórar broytingar gjørdar við arbeiðinum hjá teimum kommunalu starvsfólkunum í Miðvágs kommunu. Á fundi 30. apríl 1992 er samtykt um skrivstovumannin, at hann fer niður við 50 % av arbeiðstiðini á skrivstovutíðini. Restina av tíðini skal hann arbeiða í øðrum kommunalum arbeiði. T.v.s. at hann varðveitti fulla tíð, men bert hálva tíð á skrivstovuni.

Georg Hansen kommunuskrivari

Tilmæli var komið frá fíggjarnevndini til bygdaráðsfund 17. august 1995 um, at søkt verður eftir kommunuskrivara at verða settur í starv frá 15. sept. 1995. Hetta varð samtykt.

Eitt av málunum á skránni fyri bygdaráðsfund 7. september 1995 var setan av kommunuskrivara. Samtykt varð at seta Georg Hansen í starvið sum skrivari í Miðvágs Kommunu frá 15.09.1995. Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt við kr. 18.000.- um mánaðin. Fyrsta árið er royndarár.

Georg Hansen

14. mars 2002 er undirskrivað setanarskriv fyri starvsfólk, ið eru sett eftir reglum í sáttmálanum við Starvsmannafelagið. Setanarskrivið er vegna Georg Hansen, á Kirkjabø, Miðvági, f. 03.11.1955. Setanardagur: 15.09.1995. Lønarflokkur 34, stig 6.

Georg Hansen var skrivstovumaður hjá Miðvágs kommunu frá 12. mars 1984 til 14. september 1995, ella í 11 ár.

Og kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu frá 15. mars 1995 til 31. desember 2008, 13 ár og góðar 9 mánaðir. Og hevur frá 1. januar 2009 hildið fram sum kommunuskrivari hjá Vága kommunu, til hann legði frá sær í juni 2021.

Jónhild Jørgensen skrivstovukvinna

Á bygdaráðsfundi 6. september 2005 varð til viðgerðar møgulig setan av hjálparfólki til kommunuskrivstovuna. Fíggjarnevndin mælti til at søkja eftir fólki til hálvdagsstarv.

Jónhild Jørgensen

Samtykt varð, at søkja eftir skrivstovufólki hálva tíð. Lønin verður sambært 3. lønarflokki í sáttmálanum millum KAF og Starvsmannafelagið.

Og á fundi 17. oktober 2005 varð setanarbólkur settur, smb. gerðabókini, mannaður við, Napoleon, Dánjal og Johannes. Tað eru so Napoleon Magnussen, Dánial A. Hansen og hin triði er so antin Johannes Ellefsen ella Johannes Klein.

Fyri fundinum 16. november 2005 verður upplýst, at 6 umsóknir komu inn. Napoleon, Johannes og Dánial hava havt samrøður við umsøkjararnar. Samtykt varð at seta Jónhild Jørgensen.

Jónhild starvaðist á skrivstovuni ta tíðina, sum eftir var hjá Miðvágs kommunu og helt fram frá 1. januar 2009 í skrivstovustarvi hjá Vága kommunu.

Bergdís Skaalum á Høgabóli skrivstovukvinna

Upplýst verður á fundi 27. november 2007 at arbeiðsbyrðan á kommunuskrivstovuni er vorðin so stór, at starvsfólkið ikki klárar at arbeiða undan. Samtykt at søkja eftir skrivstovu-fólki at arbeiða hálva tíð.

Bergdís Skaalum á Høgabóli

14. januar 2008 varð á fundi setanarbólkur settur. Valdir vórðu Jóan Pauli Frederiksen, Napoleon Magnussen og Georg H. Hansen.

Fyri fund tveir dagar seinni 29. januar er upplýst, at 5 umsóknir eru innkomnar. Setanarbólkurin hevði havt samrøður við allar umsøkjararnar uttan ein, sum hevði boðað frá, at viðkomandi var farin í annað starv. Ein meiriluti av setanarbólkinum innstillaði Bergdís á Høgabóli. Samtykt varð at seta Bergdís á Høgabóli í starvið.

Reingerðafólk á kommunuskrivstovuni

Sum nevnt í brotinum um kommunuskrivstovuna, var fyrsta kommunuskrivstovan í Miðvági í leigagum hølum í húsunum hjá Martin Johansen keypmanni í Miðvági, har handilin eisini var í húsunum. Í fyrstu lýsingini, sum er varðveitt stendur, at skrivstovan lat upp hin 1. september 1947, og at inngongdin var gjøgnum handilshurðina. Skrivstovutíðin var mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 4 til 6 seinnapart. Her var kommunuskrivstova so til endan av 1950.

Nýggja kommunuskrivstovan, sum kommunan lat byggja, stóð liðug í desember 1950.

Thomina Poulsen

Í fundarsamtykt hin 30. desember 1950 sæst, at 'reingerðingskonan', sum sagt verður í fundarfrágreiðingini, frú Thomina Poulsen, hevði røkt starvið at vaska skúlastovurnar og kommunuskrivstovuna í nøkur ár. Samsýningin var 100 kr. um mánaðin. Nú hevði hon sagt seg frá pr. 1. januar 1951. Avgjørt varð at sóknast eftir eini aðrari, tó ikki at lýsa starvið alment leyst.

Hetta hevur so verið kommunuskrivstovan í leigaðum hølum frá Martin Johansen.

Stutt eftir, í fundarfrágreiðing 18. januar 1951 stendur, at Thomina Poulsen sigur seg nú vilja halda fram, um hon kann fáa lønina hækkaða nakað. Avgjørt varð at bjóða henni 100 kr. um mánaðin og 240 kr. fyri árliga høvuðsreingerð og fyri at fernisera gólvini. Fyri henda pening skal hon halda allar 3 skúlastovurnar og kommunuskrivstovuna reina, eisini gongirnar.

Hetta seinna snýr seg um nýbygdu kommunuskrivstovuna hjá Miðvágs kommunu.

Thomina røkti so starvið at vaska skúlan og kommunuskrivstovuna frá 1. september 1947 og fram til 31. mars 1956. Tilsamans 8 ár og 7 mánaðir.

Tinna Johannesen

Starvið at vaska skúlan, sum tá var nú nevndi Gamli skúli og kommunuskrivstovuna, var lýst leyst at søkja innan 20. mars 1956. Tríggjar umsóknir komu inn, áðrenn tíðarfreiðstin var úti, og vórðu umsóknirnar viðgjørdar á sóknarfundi hin 22. mars 1956. Sóknarstýrið samdist um, at Tinna Johannesen skuldi fáa starvið.

Í fundarfrágreiðing 23. mai 1956 verður sagt, at allir sóknarstýrislimir vóru møttir uttan Kristian Olsen, ið var eystanfyri við "Varbergi". Víðari stendur at Tinna Johannesen, reingerðingskona, biður um meira løn. Hon er sett 1. apríl í ár. Stýrið varð samt um at síggja tíðina ann, til hon hevur starvast í ½ ár.

Tinna Johannesen gjørdi reint í skúlanum og kommunuhúsinum frá 1956-1970.

Fyri fund 15. januar 1957 stendur, at Tinna Johannesen biður um samsýning fyri reingerð-ina aftaná kvøldskúla og meira løn fyri reingerðina. Hon fær 125 kr. um mánaðin fyri at halda 3 skúlastovur og kommunuskrivstovuna reina, harumframt 240 kr. fyri høvuðsreingerð einaferð um árið. Stýrið samdist um at lata 25 kr. um mánaðin afturat ta tíðina, kvøldskúlin og vevskúlin fer fram.

Hin 1. mai 1961 verður í fundarfrágreiðing sagt, at Tinna Johannesen hevur vaskað skúlan og kommunuskrivstovuna fyri kr. 225,- um mánaðin, og vil hon, nú felagsskúlin er tikin í brúk, framvegis vaska kommunuskrivstovuna fyri kr. 50,- um mánaðin, og w.c. og gongina íroknað og skal hetta vaskast 2 ferð um vikuna. Sóknarstýrið vil ganga við til hetta.

- Tað vil siga, at vaskingin av kommunuskrivstovuni var minni parturin av arbeiðinum.

Á fundi 23. mars 1964 varð samtykt at hækka lønina hjá Tinnu fyri reingerð av øllum hølunum í kommunuhúsinum til 200 kr. um mánaðin. Fyri reingerð av hølunum til politistød fekk hon 60 kr. um mánaðin, og skuldi hon vaskast 3 ferð um vikuna.

Í sambandi við at politiið nú leigar hølir í kommunuhúsinum, verður hin 25. mars 1964 skrivað til fútan, Tórshavn, sum svar upp á skriv 5. mars 1964 um leigusáttmála. Í skrivinum verður sagt, at húsið verður nú alt tikið í nýtslu, og hevur sóknarstýrið gjørt sáttmála við reingerðingskonuna, soleiðis at hon fær 200 kr. um mánaðin fyri alt húsið. Sostatt hevur sóknarstýrið eftir bestu ætlan samtykt at bjóða tygum reingerð 3 ferðir um vikuna fyri 60 kr. um mánaðin, herí íroknað lut av reingerðing av gongd og w.c. Hesin peningur skal gjaldast kommununi og kann gjaldast saman við leiguni.

Frá sóknarstýrisfundi 12. mai 1966 verður sagt, at Tinna Johannesen, vaskikona í kommunuhúsinum, biður um lønarhækkan sum reingerðingskona. Hon uppgevur ikki nakað ávíst. Samtykt varð at lata hana fáa eina lønarhækking á 50 kr. um mánaðin frá 1. apríl 1966.

21. apríl 1969 samtykti sóknarstýrið at hækka lønina frá 1. mai 1969 at rokna til 275 kr. um mánaðin.

Í oktober 1970 segði Tinna Johannesen starvið við reingerðini upp til 1. desember 1970. Hetta varð á fundi 6. oktober 1970 tikið til eftirtektar og sóknarstýrið varð samt um at lýsa starvið leyst.

Hon hevði soleiðis starvið sum reingerði á skúlanum og kommunuskrivstovuni í 14 ár og 8 mánaðir.

Ingibjørg á Ryggi

Hin 21. oktober 1970 varð starvið at gera reint í kommunuhúsinum lýst leyst við uppslag í talvuni. Dagarnar frá 1. til 5 november komu seks umsóknir inn. Umsóknirnar vóru til viðgerðar á sóknarstýrisfundi 30. november 1970. Tann eini umsøkjarin skrivaði: “Eg hevði verið ógvuliga takksom fyri at fingið hetta starv, tá eg einki arbeiði havi.” Um tað gjørdi útslagið er ilt at siga, men hon fekk starvið. Samtykt varð at seta Ingibjørg á Ryggi í starvið frá 1. desember 1970 við galdandi løn, 275 kr. um mánaðin.

Á fundi 2. august 1971 var samsýningin hækkað til 300 kr. um mánaðin. Í fundarsamtykt 2. oktober 1972 stendur, at reingerðingskonan við kommunuhúsið søkir um at fáa løn fyri høvuðsreingerðina av kommunuhúsinum, sum hon gerð einaferð um árið. Samtykt varð at veita henni 150 kr. fyri hetta.

Ingibjørg var tó ikki leingi í starvinum, tí longu í desember 1972 er starvið lýst leyst aftur. Hon hevði starvið frá 1. desember 1970 til 1. desember 1972, ella í 2 ár.

Sofía Haraldsen

Helst við endan av november er starvið at vaska kommunuhúsið lýst leyst. Tó at dato ikki er nevnt, men tað er nevnt, at starvið var lýst leyst at søkja. Tvær umsóknir komu inn til starvið. Á fundi mánakvøldið 4. desember 1972 varð samtykt, at seta Sofíu Haraldsen úr Miðvági í starvið undir vanligum treytum, sum hava verið fyri at røkja hetta starvið, sum sagt verður í samtyktini. Og er hon so sett í starv frá 1. desember at rokna.

Á fundi 20. august 1973 varð eftir umsókn játtað Sofíu 250 kr. eyka fyri høvuðsreingerð av kommunuhúsinum. Upplýst er annars eisini, at hon eisini vaskaði Gamla skúla. Á fundi 2. apríl 1974 varð samtykt at seta lønina hjá Sofíu til 350 kr. um mánaðin fyri at vaska kommunuhúsið.

Við skrivi dagfest 29. oktober 1974 sigur Sofía Haraldsen starvið upp til 1. desember 1974. Hon hevði soleiðis starvið í 2 ár.

Mary Hansen

Starvið at vaska kommunuhúsið er so aftur lýst leyst og inn komu tvær umsóknir. Onnur var frá Mary Hansen, í Húsi, Miðvági. Og fekk hon starvið.

12. apríl 1976 skrivar Mary Hansen og sigur: Eg vil hervið siga arbeiðið frá mær til 1. mai.

Skrivið er helst tikið til eftirtektar, tí sum skilst er starvið lýst leyst at søkja.

Hon er soleiðis í starvið sum frá 1. desember 1974 til 1. mai 1976, ella 1 ár og 4 mánaðir. So ein kann kanska siga, at tær hildu ikki leingi á, kanska var samsýningin hildin at vera í lægra lagið.

Elly á Løgmansbø

Hin 28. apríl 1976 kemur ein umsókn inn til starvið, sum var lýst leyst nakað frammanundan. Og er hon frá Elly á Løgmansbø, Miðvági. Umsóknin er til viðgerðar á fundi 10. mai 1976 har samtykt varð, at seta Elly í hetta starv. Og hevur tað so verið frá 1. mai 1976.

Sum skilst var mánaðarliga samsýningin hjá fyrru reingerðarkonuni og hjá Elly 350 kr. um mánaðin fyri at vaska trý kvøld um vikuna. Á fundi 8. apríl 1981 verður samtykt, at hækka samsýningina til 550 kr. um mánaðin.

Í skrivi til kommununa, 12. oktober 1982, søkir Elly um at fáa samsýningina prístalsregulerða. Umsóknin er fyri á bygdaráðsfundi sama kvøld, hin 12. oktober 1982, men verður ikki gingin á møti. Tað sæst annars ikki í skjølunum, nær Elly gavst.

Eftir samrøðu við Elly sigur hon, at hon minnist ikki nágreiniliga nær hon gavst, men hon var ikki so leingi í starvinum. So hon er helst givin um hetta mundið, um 1982-83.

Elly á Løgmansbø hevur so havt starvið í umleið 6 ár. Í samrøðu sigur hon, at hon kann ikki minnast hvør kom eftir hana, men sjálv fór hon at arbeiða á flakavirkinum tá.

Essemi Fagraberg

Tað er einki skrivligt funnið um stavssetanir 1984 til 1994 í skjølunum hjá kommununi, so tá sýnist tað at vera gjørt við munnligari avtalu. Frá 1983 og fleiri ár, møguliga heilt fram til 1995, vaskaði Essemi Fagraberg kommunuskrivstovuna. Hon vaskaði á skúlanum eisini, um hetta mundið.

Í roknskapunum hjá kommununi sæst, at samsýningin fyri at vaska kommunuhúsið hækkaði rímuliga nógv komandi árini. Frá 1983 til 1985 lá samsýningin um 7.300 kr. um árið. Í 1986 er samsýningin til reingerð av kommunuskrivstovuni í Miðvági so hækkað til 12.000 kr. og í 1987 til 17.800 kr. um árið. Í 1988 til 28.000 k.r og liggur so frá 1989 og gjøgnum nítiárini um 31.000 kr. um árið. Og liggur á hesum støðinum restina av tíðini hjá kommununi.

Linda Joensen

Á almennum bygdaráðsfundi, 17. august 1995, er til viðgerðar uppskot frá fíggjarnevndini, at seta eitt fólk at vaska kommunuskrivstovuna og Gamla skúla frá 1. november 1995. Samtykt var at fylgja tilráðingini frá fíggjarnevndini og at søkja eftir einum fólki.

18. august 1995 verður telefax sent til Dimmalætting, Tórshavn: Vinarliga set hesa lýsing tvíteigaða í leygardagsblað tykkara.

"Reingerðingsfólk. Søkt verður eftir einum fólki at gera reint á kommunuskrivstovuni og Gamla skúla. Arbeiðið skal byrja 1. november 1995. Nærri upplýsingar um arbeiðið fáast á kommunuskrivstovuni. Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi áðrenn 1. september 1995."

Hvussu nógvar umsóknir, ið komu inn er ikki nevnt, men á fundi 7. september 1995 varð samtykt, at seta Lindu Joensen í starvið.

Á bygdaráðsfundi 22. januar 1997 er til viðgerðar umsókn frá Lindu Joensen um orlov frá 1. mars til 1. juli 1997. Samtykt varð at biðja Dinu Selfoss vaska í hesum tíðarskeiði.

Hin 9. november 1998 er til viðgerðar á bygdarásfundi, at Linda Joensen sigur starvið sum vaskikona frá sær til 15. Januar 1999. Samtykt var at lýsa starvið leyst.

Linda Joensen (seinni Heinadóttir), hevði tá havt starvið í 3 ár og 3 mánaðir.

Oddbjørg Johansen

Hin 8. desember 1998 er til viðgerðar á fundi at seta eitt fólk í starv at gera reint á kommunuskrivstovuni og Gamla skúla. Samtykt var at seta Oddbjørg Johansen í starvið.

1. mai 2004 hevur Miðvágs kommuna, Napoleon Magnussen, bygdaráðsformaður, og Miðvágs Arbeiðarafelag, Georg F. Hansen, formaður, undirskrivað lønarsáttmála viðv. vaskikonu á kommunuskrivstovuni í Miðvági, har mánaðarlønin er ásett til 2.156 kr. Kommunuskrivstovan skal vaskast 2 ferð um vikuna á 2 tímar hvørja ferð ella 4 tímar um vikuna.

Oddbjørg Johansen hevði starvið í 6 ár og 4 ½ mðn. frá 15. januar 1999 til 31. mai 2005.

Margit Svabo Jørgensen

Á almennum bygdaráðsfundi 18. mai 2005 er á skránni setan av reingerðingsfólki til kommunuskrivstovuna. Samtykt varð, at umsjónarmaðurin, saman við formanninum í Trivnaðarnevndini, Malan Helgadóttir, koma við tilmæli til starvssetanina.

Málið er so aftur á skrá á almennum bygdaráðsfundi 31. mai 2005, har samtykt varð, at seta Margit Svabo Jørgensen. Hon er so tann seinasta, sum sæst at vera sett í hetta starvið undir Miðvágs kommunu.

Lokalir grannskoðarar hjá kommununi

Um sjálvt starvsheitið kann sigast, at øll árini heilt upp til rímuliga nýggja tíð var vanliga heitið í skjølunum og á mannamunni, "revisor" ella "lokalrevisor", um enn heitið "grannskoðari" eisini er nýtt av og á gjøgnum árini. Hjá Miðvágs kommunu sæst tað fyrstu ferð á skrift í 1930. So tað var eisini kent. Men vit skulu upp til umleið 1970-ini áðrenn heitið "grannskoðari" vinnur á tí fyrra og gerst vanliga heitið.

Sambært kommunulógini skuldi ein kommuna hava ein lokalan grannskoðara, umframt at løgtingsgrannskoðarin eisini gjøgnumgekk roknskapirnar hjá øllum kommununum í landinum, har kommunurnar eftir stødd rindaðu fyri tað. So hann hevði ivaleyst nokk at gera við tí. Hjá lokala grannskoðaranum var hetta tó bara eitt lítið eykaarbeiði, sum hann fekk eina lítla samýning frá kommununi afturfyri.

Mannagongdin var tann, at lokali grannskoðarin gjøgnumgekk roknskapin fyrst og fann hann onkran feil, so var tað rættað, áðrenn roknskapurin var sendur til løgtingsgrannskoðaran at gjøgnumganga. Og hann skuldi sjálvandi eisini hyggja eftir, at alt hevði gingið rætt fyri seg. Og tað sær tað út til at hava gjørt øll árini hjá Miðvágs kommunu.

Fyrstu mongu árini var tað vanliga formaðurin, sum hevði alt papírarbeiðið hjá kommununi, eisini roknskapirnar, sum nevnt er í partinum um kommunuskrivarar.

Harald Rasmussen

Fyrsti lokali grannskoðarin hjá Miðvágs kommuna var Harald Rasmussen úr Miðvági. Tey fyrstu árini gekk roknskaparárið frá 1. oktober til 30. september árið eftir. So fyrsti roknskapurin Harald Rasmussen hevur grannskoðað er roknskapurin 1915/1916. Og í sjálvum roknskapinum sæst, at hann fekk 7 kr. afturfyri hetta.

Tað verður ikki nágreiniliga nevnt um samsýningina seinni, men vit vita, at hon var ikki stór, so hon hevur neyvan verið meira enn umleið hægst 10 kr. um árið.

Yrki hjá Haraldi var annars at vera bóndi. Hann var kongsbóndi og hevði sína jørð í haganum Nýpan í Miðvági. Hví hann er valdur sum grannskoðari kann ein kanska undrast eitt sindur á. Vanliga vóru tað menn, sum fingust við tøl og roknskap til dagligt, sum vóru settir til slíkt yrki. Tað sýnist tað ikki, at Haraldur hevur gjørt, út frá tí, ein sær í skjølunum hjá kommununi. Kann vera, at hann t.d. hevur verið niðri á háskúla ella líkandi. Tað kundi tá í tíðini saktans gera ein skikkaðan til slíkt. Men eingin ivi er um, at hann hevur havt skil fyri roknskapi. Tá í tíðini varð grannskoðarin valdur fyri eitt ár í senn. So val av grannskoðara var fast á skránni hvørt ár. Og Haraldur varð valdur aftur á hvørjum ári í nógv ár.



Harald Rasmussen

Í einum áhugaverdum lista frá 1916 yvir allar bygningar í Miðvági sæst, at Haraldur búði við Kirkjar í Miðvági í húsunum nevnd, Norði í Stovu. Um húsini og hjábygningar verður m.a. sagt í listanum:

Settús 19 x 10 alin stór, endarnir eru úr timbri og síðurnar laðaðir upp úr gróti, og húsini hava flagtak. Inni er ein komfýrur og ein ovnur. Tvey rúm eru á loftinum og tvey rúm í húsinum eru málað. – At tað er nevnt, er tí, at tað varð tá í tíðini mett at økja um virðið á húsunum. Til ognina hoyrir eisini ein hjallur, eitt hoyggjhús, eitt neyst og eitt torvhús.

Virðið av sethúsunum og tilhoyrandi bygningum er sett til 4.350 kr. Og er hetta, eftir tátíðar meti og út frá tí, ein sær í listanum annars, hampuliga høg virðismeting, sum sigur, at hús og bygningar hava verið í rímuliga góðum standi.

Á fundi í forstandarskapinum 19. oktober 1916 verður sagt, at samtykt varð at velja Mikkjal á Ryggi til grannskoðara fyri roknskaparárið 1916/17. Men helst hevur Mikkjal á Ryggi ikki grannskoðað henda roknskap kortini, tí á fundi 30. september 1917, tá sama roknskaparár er liðugt, verður á fundi sagt, at til grannskoðara varð Harald Rasmussen afturvaldur.

Og tað verður hann á hvørjum ári heilt upp til endan av 1930.

Harald Rasmusen varð valdur í kommunustýrið við val í 1930 og gjørdist limur í forstandarskapinum frá 1. januar 1931 og sat eitt skeið, sum endaði hin 31. desember 1934. Og er tað tí ,at hann mátti gevast sum lokalur grannskoðari hjá Miðvágs kommunu.

Hann hevði tá verið grannskoðari hjá kommununi í 15 ár.

Elias Ellefsen

Á fundi í forstandarskapinum 8. januar 1931 varð Elias Ellefsen, keypmaður, Miðvági, valdur sum nýggjur lokalur grannskoðari hjá kommununi.

Í sambandi við skamtanina undir seinna heimsbardaga verður í einum skrivi frá januar 1943 nevnt, at tað um hetta mundið eru seks handilsmenn í bygdini og ein bakari, sum arbeiðir partvís sum bakari. Eitt áhugavert við hesum skrivi er, at ein sær prosentvísa býti av umsetninginum millum handlarnar í bygdini. Og har hevur handilin hjá Elias Ellefsen størsta umsetningin. Í skrivinum stendur: "Eftir at hava innheintað upplýsingar frá handilsmonnunum um teirra sølu í tíðini undan, var semja um at býta mjølvørurnar soleiðis: Elias Ellefsen 27,2 %, Daniel P. Niclasen 21,3 %, Andrias Joensen 16,4 %, Harald Hansen 11,3 %, Jóan Pauli Ellefsen 12,1 %, Hans Samuelsen 7,2 % og Jóan Petur Wang bakari 4,5 %. Í alt 100 %.

Vit síggja ikki, hvør samsýningin var tey fyrstu árini fyri yrkið sum lokalur grannskoðari, men helst nakað meir enn hjá tí fyrra. Í 1941 fær Elias 40 kr. og frá 1942, 55 kr. um árið fyri

Elias Ellefsen

at grannskoða kommunuroknskapin. Í einum skrivi frá Eliasi til kommununa 31. januar 1944 sæst, at hann grannskoðaði bæði kommunuroknskapin og havnaroknskapin. Og tað hevur fyrri grannskoðarin helst eisini gjørt. Annars var havnaroknskapurin ikki stórur tá í tíðini.

Elias er grannskoðari hjá kommununi til einaferð í 1947. Nágreiniligt dato sæst ikki. Elias fekk 19,29 kr. fyri árið 1947 sum lokalur grannskoðari. Og næsti maðurin fekk sama ár 27,50 kr. Út frá tí kann ein meta, at Elias Ellefsen er givin einaferð á várið 1947.

Kristoffur Svabo

Tað sæst ikki, nær Kristoffur Svabo er valdur, men hann er so settur til hetta yrki einaferð á vári 1947. Tí, sum nevnt, fær hann við ársenda goldnar 27,50 kr. sum lokalur grannskoðari í 1947.

Í skjølunum hjá kommununi sæst t.d., at Kristoffur Svabo hevði lastbil í 1940- og 1950-árunum, møguliga keyptur frá bretum, og at lastbilur hansara ofta koyrdi fyri kommununa í smb. við ymisk arbeiðir hesi árini. Um hann koyrdi sjálvur ella hevði bilførara fyri seg er ikki upplýst. Men at hann starvaðist sum bókhaldari.

Í skrivi til kommununa 14. januar 1949 biður Kristoffur Svabo seg frítiknan fyri starvið sum roknskapargrannskoðari fyri Miðvágs kommunu og Miðvágs havn. Málið er viðgjørt á kommunustýrisfundi 17. mars 1949 Avgjørt var at heita á Kristoffur um at vera hetta árið út.

Hann hevur so verið 1950 út eisini, tí á fundi, 11. januar 1951, verður sagt viðvíkjandi vali av grannskoðara, at hin sami varð afturvaldur, nevniliga, Kristoffur Svabo, bókhaldari.

Í roknskapunum hjá kommununi fyri árini 1952 til 1956 sæst, at samsýningin var 200 kr. um árið fyri at grannskoða kommunuroknskapirnar.

Í skrivi 7. januar 1957 biður Kristoffur Svabo um lønarhækkan. Á kommunustýrisfundi 15. januar 1957 varð samtykt at hækka samsýning hansara til tað dupulta, nevniliga 400 kr. um árið. Hetta tí at stýrið ásannaði, at lønin var ov lág. Hetta er so árliga samsýningin hjá Kristoffuri tey árini, hann seinni røkti hetta starv.

Á sóknarstýrisfundi 29. desember 1961 verður sagt, at Kristoffur Svabo, ið hevur verið lokalur grannskoðari hjá kommununi nú í nógv ár, hevur ynskt at vera frítikin fyri hetta starv vegna tess, at hann ikki hevur tíð at røkja hetta longur.

Kristoffer Svabo røkti so starvið fram til 31. desember 1961, ella gott 14 ár.

Gudmund Niclasen

Á sama fundi hin 29. desember 1961 sum samtykt varð at loysa fyrra grannskoðaran úr starvi, varð avgjørt at velja Gudmund Niclasen, skrivstovumann, Miðvági til hetta starv frá 1. januar 1962 at rokna.

Samsýningin hjá Gudmundi var í fyrstuni 400 kr. um árið. Men hin 7. mai 1963 skrivar hann til kommununa og sigur seg ikki kunna halda fram sum “lokalrevisor” uttan, at hann fær 1.000 kr. um árið fyri hvønn roknskapin, hartil krevur hann at fáa 400 kr. afturat fyri roknskapin 1960, ið hann hevur grannskoðað. Samtykt varð hin 21. mars 1963 at ganga við til hetta og geva honum 1.000 kr. um árið.



Gudmund Niclasen

Í hesum sambandi skrivar kommunan til Landsstýrið hin 4. oktober 1963 og sigur, at hóast lønin eftir vanligu reglunum eigur at vera einar 400-500 kr., so tykist tað ógjørligt at fáa roknskaparkønan mann til at grannskoða roknskapin fyri reglubundnu lønina.

Í skrivi 9. oktober 1963 loyvir Landsstýrið kommununi at seta lønina til 1.000 kr. um árið frá 1. januar 1964 at rokna.

Tað sæst so ikki nógv meira til tað og hetta hevur helst verið lønin heilt fram til endan á 1976. Tá hendir tað, at Gudmund Niclasen er valdur í bygdaráðið, og kann sostatt ikki longur vera grannskoðari hjá kommununi. Nevnast kann eisini, at Gudmund gjørdist bygdaráðs-formaður hesa setuna.

Á bygdaráðsfundi 29. desember 1976 verður tí samtykt, at loysa Gudmund Niclasen úr starvinum sum grannskoðari og at seta annan mann í hansara stað. Gudmund hevði tá røkt starvið í 14 ár, ella nærmast tað sama, sum fyrri grannskoðarin og grannskoðarin undan honum. So í 1976 gevst Gudmund sum grannskoðari viðv, kommunuroknskapinum og roknskapinum hjá Miðvágs havn.

Gudmund Niclasen var eisini grannskoðari hjá Miðvágs/Sandavágs havn, sum var felagsmál millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur. So henda roknskap fekk hann, eftir øllum at døma, loyvi til framhaldandi at grannskoða. Í samband við eitt sakarmál í 1992 um vatngjald til havnin, greiddi Gudmund, smb. avriti hjá kommununi, rættinum frá, at hann hevði verið grannskoðari hjá Miðvágs/Sandavágs havn síðan umleið 1970 og var tað framvegis. Í eini kommunusamtykt frá so seint sum 2007 sæst, at Gudmund Niclasen tá førdi roknskapin hjá Miðvágs/Sandavágs havn.

Hans Arni Ellefsen

Á áðurnevnda fundi 29. desember 1976 verður samtykt at velja Hans Arna Ellefsen, bókhaldara, sum lokalan grannskoðara hjá kommununi frá 1.1.1977 at rokna.

20. mai 1977 verður skrivað til Landsstýrið og sagt, at av tí at grannskoðarin hjá kommununi nú er valdur inn í bygdaráðið, er Hans Arni Ellefsen, Miðvági, valdur sum nýggjur grannskoðari. Hans Arni Ellefsen hevur preliminereksamiu og hevur síðan virkað sum bókhaldari í 28 ár. Bygdaráðið gevur honum tey bestu viðmæli og heitir á Landsstýrið um at góðtaka hann sum grannskoðara fyri Miðvágs kommunu.

Og tað ger Landsstýrið so.

Hans Arni Ellefsen røkir so starvið sum lokalur grannskoðari hjá kommununi til 30. apríl 1978. Grundin til at hann mátti gevast sum grannskoðari hjá kommununi var, at hann um sama mundið varð settur sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu. Hans Arni er sostatt ikki leingi í starvinum sum lokalur grannskoðari, bert 1 ár og 4 mánaðir.

Heini Heinesen

Heini Heinesen á Ryggi í Miðvági var skrivstovulærdur og hevði verið kommunuskrivari í eina tíð, men hevði sagt seg úr starvinum, sum so fyrri grannskoðarin varð settur í. Og verður Heini so ístaðin settur sum grannskoðari hjá kommununi. So teir skifta um starv, um ein so kann siga. Tó at starvið sum lokalur grannskoðari bert var parttíðar starv.

Tað var á bygdaráðsfundi 28. apríl 1978, at samtykt varð at seta Heina Heinesen sum grannskoðara, nú Hans Arni Ellefsen var settur sum skrivari.

Heini Heinesen verður tó heldur ikki leigi í hesum starvi. Og var í starvinum frá 1. apríl 1978 til 31. desember 1979 ella 1 ár og 9 mánaðir.

Pf. Grannskoðaravirki Pauli Ellefsen

Við ársbyrjan januar 1980 verður samtykt á bygdaráðsfundi at seta felagið Pf. Grannskoðaravirki Pauli Ellefsen, Tórshavn, sum grannskoðarar hjá Miðvágs kommunu. Nevnast kann, at Pauli Ellefsen, sum nú var búsitandi í Tórshavn, var miðvingur og vaksin upp í Miðvági. Um tað hevur havt nakað at siga í smb. við tilnevningina ber ikki til at siga við vissu, men kann væl saktans hugsast.

Pauli Ellefsen

Pauli Ellefsen og hansara virkið eru so grannskoðarar hjá Miðvágs kommunu restina av tíðini hjá kommununi heilt upp til 31.12.2008.

Fyrsta árið fær grannskoðaravirkið somu samsýning, sum fyrru grannskoðararnir 1.000 kr. um mánaðin ella 12.000 kr. fyri roknskaparárið 1980/81. Men tað hevur felagið tó neyvan verið nøgt við, og árið eftir hækkar samsýningin nærum fýrafalt til 47.500 kr. Og liggur har á leið upp til 1987. Í 1988 er samsýningin 55.000 kr. og í 1989 75.000 kr. og liggur har um fylgjandi árini. Men er so lækkað í kreppuárunum í 1990-unum til um 50.000 kr. um árið og heldur seg har restina av tíðini hjá kommununi.

Bygdaráðsarbeiði 1915 – 2008

Hesir parturin er ætlaður evnum, sum falla uttanfyri hini stóru evnini, sum umrødd eru í hesum verkið. Sigast skal, at úrvalið her er í størstan mun gjørt útfrá, hvat kann tykjast áhugavert, serstakt ella meira (ella minni) søguliga týdningarmikið, sum tó sjálvandi kann vera ymiskt, hvat ein heldur um tað. Harvið er ikki sagt, at alt slíkt er tikið við, men út frá hesum trimum høvðusreglum er úrveljingin gjørd.

Dýrtíðarhjálp og Hjálparkassi

Eitt tað allarfyrsta, nýggja kommunan fekst at dragast við, kom at vísa seg at vera eitt av stóru málunum í tátíðini, og eftir tátíðar - og nútíðar meti, eitt sera dýrt mál, um peningurin verður umroknaður til nútíðartøl. Talan var um beinleiðis neyðhjálp til borgararnar, sum vóru í svárum hungursváða vegna vinnuloysi, dýrtíð og mangul av vørum av stórt sæð øllum slag. Høvuðsorsøkin til katastrofalu støðuna var Fyrsti heimsbardagi.

Hetta er ein søga, sum er lítið umrødd seinni, kanska skomm hevur verið tengd at. - Fyrr varð tað roknað sum skomm at noyðast at fáa almennan stuðul, ella "at fara á kommununa" sum tey søgdu. Meginreglan var, at ein og hvør átti at klára seg sjálvan. Og tað lá vissur stoltleiki í tí eisini, ið sum so er rætt. - Men tað var ikki nakað at skammast av. Støðan var sum hon var. Tað var ikki nakað, tey sjálvi høvdu ábyrgdina av ella fingu gjørt stórvegis við. Uttan at royna á besta hátt at bjarga støðuni. Og tað var tað, dýrtíðarhjálpin ella "Dyrtidshjælpen" snúði seg um. Og tað var tað, statur, land og kommunur royndu at gera.

Dýrtíðarhjálp varð ásett í lóg nr. 320 frá 22. desember 1915 vegna vørumangul og príshækkan í smb. við Fyrsta heimsbardaga. Skylda, sum varð áløgd øllum kommunum at fremja.

Fundur um, hvussu forstandarskapið skuldi bera seg at í sambandi við lóg um um dýrtíð, varð hildin hin 18. februar 1916 á skrivstovuni hjá Rasmus Niclasen formanni og keypmanni. Møttir vóru: Rasmus Niclasen, Klæmint Haraldsen, Heini Joensen og Mikkjal á Ryggi. Jóan Pauli Ellefsen hevði forfall. Formaðurin skeyt upp, at atkvøtt varð um forstandarskapið sjálvt skuldi umsita Hjálparkassan. Uppskotið varð einmælt samtykt.

Sonevndi "Hjálparkassin" var so tann, sum dýrtíðarhjálpin skuldi fíggjast ígjøgnum, og sum serstakur roknskapur var fyri.

Fundur um málið varð hildin sama stað hin 11. mars 1916. Hesaferð møttu bert, Rasmus, Heini og Mikkjal. Aftur hesaferð varð tosað um, hvussu farast skuldi fram í smb. við dýrtíðarlógina. Sagt varð, at hjálpin skuldi gevast í peningi og at brúka upp til 1.000 kr., sum vórðu settar av til Hjálparkassan. Samtykt varð í hesum sambandi at søkja Amtið um loyvi at taka 1.000 kr. í láni til hetta endamálið.

Her kann skjótast inn, at rættuliga skjótt varð tó farið yvir til hjálp í matvørum og øðrum neyðugum, sum í høvuðsheitum varð gjørt í samstarvi við matvøruhandlarnar í bygdini.

Men tað gekk rímuliga nógv tíð, til nakað víðari hendi. Tí ikki fyrr enn 3. oktober 1916 varð skrivað til Amtið og biðið um loyvi at taka 1.000 kr. í láni í Færø Amts Sparekasse í smb. við dýrtíðina. Og loyvið fekk kommunan longu hin 9. oktober 1916. Men lánið skuldi verða afturgoldið longu innan 1. oktober 1917. Hin 18. oktober 1916 høvdu allir limirnir skrivað undir skuldarbrævið, sum eisini hevði treytirnar, at rentan var 4,5% p.a.

Í roknskapinum 1915-1916 eru 1.000 kr. skrásettar sum lán í Sparikassanum til dýrtíðarhjálp og til fígging av Hjálparkassanum. Av hesum hevði Hjálparkassin útgoldið 766 kr. til treingjandi. Lánið varð afturgoldið longu 22. august 1917 smb. kvittan frá Sparikassanum, umframt 122,81 kr., sum var kostnaðurin av láninum, rentur o.a.

21. oktober 1916 skrivaði Amtið og bað kommununa senda inn skemaðir fyri útreiðslur kommunan hevði havt av dýrtíðarhjálpini og yvirlit yvir persónar í kommununi, sum høvdu móttikið dýrtíðarhjálp og gera hetta innan 31. desember. Lagt varð afturat, at hetta skuldi útfyllast greitt og skilliga, og váttan skuldi vera fyri, at peningurin faktiskt var útgoldin. Stuðulin frá statinum var treytaður av hesum. Skrivað undir hevði Svenning Rytter amtmaður.

Sambært roknskapinum hjá kommununi 1916-17 hevði kommunan hetta árið fingið 928 kr. í stuðli frá statskassanum og hevði goldið út 6.433 kr. til treingjandi, har kommunan so skuldi fíggja 4.500 kr. umframt lánið, tikið var. Tað hevur so ikki verið møguligt, fyrrenn kommunan hevði fingið eitt nýtt og størri lán.

18. januar 1917 var dagfest skriv frá Amtinum til føroysku kommunurnar um dýrtíðarhjálp. Smb. lóg frá 28. desember 1916 kundu kommunustýrini í tíðini frá 1. januar 1917 til 31. mars 1918 veita borgarum, sum vóru illa trongdir av dýrtíðini, hjálp við naturalium, brenni og teim mest neyðugu klæðunum uttan gjald ella nógv niðursett ella sum kontant hjálp. Hesar útreiðslur hjá kommununi máttu tó ikki fara uppum 15 kr. pr. borgara. Roknskapur skuldi førast yvir allar hesar útreiðslur gjøgnum Hjálparkassan via nevndina hjá hesum, um forstandarskapið ikki sjálvt var nevnd í Hjálparkassanum. Kontant hjálp skuldi latast gjøgnum Hjálparkassan við hjálp frá prestinum. Skjótast eftir 1. apríl 1917 og 1. apríl 1918 skuldi avskrift av roknskapinum til hetta vera sendur til Amtið, við váttan frá lokalrevisorinum, um at hann hevði gjøgnumgingið roknskapin.

2/3 av hesum útreiðslunum hjá kommununi vórðu síðan endurrindaðar kommununi úr statskassanum. Seinasta triðing skuldi kommunan sjálv rinda, sum hon kundi útskriva eykaskatt fyri, stendur millum annað í skrivinum, sum er undirskrivað av Svenning Rytter amtmanni.

Á fundi 11. mars 1917 var samtykt at søkja um loyvi at taka eitt lán upp til 25.000 kr. úr Færø Amts Sparekasse og Føroya Banka møguliga við veðhaldi í sjálvari sóknini millum íbúgvarnar, við teirri treyt, at Amtið ella Løgtingið loyvdi hesum. Og at lánið einans skuldi brúkast til neyðsynjarvørður.

16. mars 1917 verður skrivað til Amtið. Vegna støðuna og tað lítlu nøgdina av neyðsynjarvørum, heldur forstandarskapið tað neyðugt, at gera alt tað ein kann, at veita íbúgvunum



DIMMALÆTTING. 14. Februar.

Bekendtgørelse

om

Indskrænkning i Købmændenes Ret til at udlevere Varer.

I Henhold til den Amtet givne Bemyndigelse fastsættes det herved, at Købmænd indtil videre, bortset fra særlige Tilfælde, kun maa udlevere Varer til saadanne Personer, der plejer at handle hos de paagældende.

Til Forretningens faste Kunder maa Varer kun udleveres i en Mængde, der svarer til den paagældende Kundes Forbrug i den allernærmeste Fremtid, og under alle Omstændigheder ikke i større Mængde eller hyppigere end den paagældende Kunde tidligere plejer at faa.

Denne Bekendtgørelse træder i Kraft straks og gælder ogsaa med Hensyn til tidligere købte, men endnu ikke udleverede Varer.

Overtrædelse af Bekendtgørelsen vil medføre Strafansvar.

Færø Amt, den 9. Februar 1917.

C. R. Ege,
kst.

Bekendtgørelse

om

Butikslukning.

I Henhold til midlertidig Lov af 7. August 1914 om Regulering af Priisen paa Levnedsmidler og Varer, jfr. Lov af 16. November 1914 om Straf for Overtrædelse af de ifølge fornævnte Lov trufne Bestemmelser, samt i Henhold til den Amtet fra Ministeriet givne Bemyndigelse, paabydes det herved under Hensyn til, at det paa Grund af den ringe Beholdning af Petroleum her paa Øerne vil være nødvendigt at undgaa al unødvendig Forbrug af denne Vare, **at alle Butikker paa Færøerne fra Mandag den 19. ds. at regne og indtil videre skal lukkes Kl. 6 Eftm.**

Fra nævnte Paabud undtages dog Mælkeudsalg og Bagerier, ligesom Indhandling af Fisk og hvad dermed staar i Forbindelse skal kunne finde Sted efter nævnte Klokkeslæt.

Overtrædelse af Paabudet straffes efter ovennævnte Lov af 16. November 1914.

Denne Bekendtgørelse træder i Kraft den 19. ds.; fra samme Tidspunkt at regne ophæves Amtets Bekendtgørelse af 7. ds. om Butikslukning.

Færø Amt, den 13. Februar 1917.

Í Dimmalætting 14. februar 1917 eru kunngerðir um avmarkan av sølu í handlinum vegna skamtan og vørumangul í landinum, og um lukkitíð hjá handlum, vegna tað sama.

Bekendtgørelse

om

Fastsættelse af Maksimalpris

paa

Mel, Gryn, Ris og Sukker.

I Henhold til § 1 i midlertidig Lov af 7. August 1914 om Regulering af Prisen paa Levnedsmidler og Varer, jfr. Lov af 16. Novbr. 1914 om Straf for Overtrædelse af de ifølge fornævnte Lov trufne Bestemmelser, samt i Henhold til den Amtet af Ministeriet givne Bemyndigelse, fastsættes herved, for saa vidt angaar Salg paa Færøerne, følgende Bestemmelser om Maksima'pris for Mel, Gryn, Ris og Sukker.

§ 1.

Maksimalprisen fastsættes indtil videre til 42 Øre pr. kg af Rugmel, 49 Øre pr. kg af Flormel, 54 Øre pr. kg af Havregryn, 49 Øre pr. kg af Ris, 39 Øre pr. kg af Maismel, 68 Øre pr. kg af tablet Melis, 58 Øre pr. kg af stødt Melis og 54 Øre pr. kg af Farin.

Til Maksimalprisen maa kun lægges virkelig afholdte Omkostninger ved Varens Transport fra den Butik, hvorfra Varen sælges.

14. februar 1917 er eisini lýsing í Dimmalætting um prísloft.

neyðsynjarvørur skjótast tilber. Í hesum smb. hevur forstandarskapið á fundi einmælt samtykt at taka eitt kontant lán upp til 25.000 kr., sum bara skal brúkast til at skaffa íbúgvunum neyðturviligar vørur. Vegna at vit hava tosað við stjóran fyri Sparikassan um eitt kontant lán upp til 25.000 kr., loyva vit okkum virðingarmest at søkja um loyvi til lánið frá Amtinum, á tær treytir, at tað verður goldið aftur innan 1 ár. *Rasmus Niclasen*.

- Hvussu menn hava hugsað sær at rinda lánið aftur innan eitt ár sýnist utopiskt. Kommunan hevði játtan frá statinum um 2/3, sum so góvu 16.666 kr., men har vóru so framvegis 8.334 kr. hjá kommununi at fíggja. Sum svaraði til samlaðu skattainntøkuna í gott 2 ár tá á døgum. Til samanlíkningar kann nevnast, at tað vildi svarað til, at Vága kommuna í 2020 skuldi rinda 204 mió. kr. aftur í einum frá láni í 2019. Tað vildi helst stórt sæð verið ógjørligt, rokni eg við. Uttan meira lán.

23. mars 1917 skrivar Amtið, Svenning Rytter amtmaður, og biður upplýst, í smb. við umsøkta lániheimild, um sum vanliga, hvørji lán kommunan hevði, upprunastødd og núv. stødd og longd av avgjaldstíð. Og ein nærri frágreiðing um hvat lánið skuldi brúkast til.

10. apríl 1917 verður svar skrivað Amtinum og sagt, at lán, kommunan stendur fyri, er felags lán, sum kommunurnar í Vágum og Mykinesi binda fyri frá 1914, har parturin hjá Miðvágs kommunu er 4.000 kr. við 10 ára afturgjaldstíð. Og 1.000 kr. tiknar í láni í 1916 vegna dýrtíðina. Bæði hesi lán eru tikin í Sparikassanum. Nakra nágreiniliga frásøgn um hvat nýggja lánið skuldi brúkast til, var ein ikki førur at siga, men tað skuldi einans brúkast til keyp av kornvarum, sukur, petroleum, salt og fisk til uppheingingar, umframt møguliga aðrar neyðsynjarvørur, sum forstandarskapið helt vóru neyðugar í hesum árinum.

Loyvið til lánið fær kommunan frá Løgtinginum hin 16. apríl 1917, smb. skrivi frá Amtinum við teirri treyt, at lánið verður afturgoldið innan 1. oktober 1918 og at peningurin bert verður nýttur til dýrtíðarhjálp. Og 20. apríl verður skrivað til Sparikassan og sagt frá hesum.

26. apríl 1917 skrivar Sparikassin, Chr. Thygesen, og sigur sum svar upp á skriv frá kommununi 20. í hesum, at einki er til hindurs fyri, at kommunan fær ynskta lánið uppá 25.000 kr. Harímóti ynskir nevndin, at Vága- og Mykinesar kommunur undirskriva eitt serskilt skuldarbræv fyri hvørja einkulta kommunu fyri lánið frá Sparikassanum til kommunurnar í desember 1913. Ella tað verður goldið kontant eventuelt við avtrekki av tí nýggja láninum.

Á fundi í forstandarskapinum 20. apríl 1917 varð til viðgerðar vøra, sum var komin frá Amtinum til íbúgvararnar í sóknini. Samtykt varð at býta út vøruna til allar handilsmenninar í sóknini.

Samtykt varð eisini, í smb. við útreiðslu og sølu av korninum hjá kommununi, at selja tað fyri sama prís, sum Amtið kunngjørdi í Dimmalætting hin 11. apríl í ár og tað verður álagt teimum handlandi, at hendan niðursetanin í prísinum bert geldur fyri borgararnar her í sóknini.

Samtykt varð eisini at selja flormelis "P. Welding" og "Alexander" fyri 55 oyru pr. kilo við ásetan til handilsmenninar ikki at selja hetta dýrari enn hægst 60 oyru kg. til íbúgvararnar her í sóknini. Viðv. íbúgvum uttanfyri sóknina skulu maksimumprísirnir hjá Amtinum galda.

Mjøl- breyð og sukurkort

24. februar 1917 er dagfest kunngerð frá Amtinum um innførilsi av mjøl- og sukurkortum, soleiðis, at eingin kann keypa mjøl, mjølvørur ella sukur uttan mjøl- og sukurkort.

Í skrivi 5. mars 1917 frá Amtinum, Svenning Rytter, verður lagt afturat um mjøl og sukurkort, at fiskimenn, sum eru umborð á fiskiskipum til fiskarí, verða roknaðir sum burturstaddir og skal skiljast soleiðis, at viðkomandi ikki verða tiknir við í teljingina og ikki fáa mjøl- og sukurkort, fyrr enn teir koma aftur frá fiskiskapi.

Her eru bara nevnd mjøl og sukurkort, men sum skilst, vóru eisini innført sonevnd "breyðkort". Men tað kom helst undir "mjølkortið".

Skrivini eru til viðgerðar á fundi á skrivstovuni hjá Rasmus Niclasen formanni hin 11. mars 1917. Formaðurin segði, at hann hevði latið sláa upp í øllum handlunum í Miðvági kunngerð um mjølkort og sukurkort. Og eina áheitan á íbúgvararnar um at venda sær til formannin innan 10. í hesum, um tey ynsktu at fáa hjálp frá forstandarskapinum, at fáa ávíst jørð at dyrka korn, eplir og røtir í. Og um tey ynsktu hjálp frá forstandarskapinum at fáa føroyskt sákorn og seteplir. Til dato varð biðið um hjálp frá forstandarskapinum um at skaffa 25 ½ tunnu av seteplum, 5 tunnur sákorn, og eitt tons av seteplum av merkinum "Rafrø, Dales-hybrid."

Bekendtgørelse

om

Indførelse af Melkort og Sukkerkort.

I Henhold til § 1 i midlertidig Lov af 7. August 1914 om Regulering af Prisen paa Levnedsmidler og Varer, jfr. Lov af 16. Novbr. 1914 om Straf for Overtrædelse af de ifølge fornævnte Lov trufne Bestemmelser, samt i Henhold til den Amtet af Ministeriet givne Bemyndigelse fastsættes herved følgende Bestemmelser **for Salg af Korn, Mel, Brød og Sukker.**

1.

Der foretages Mandag den 19. Marts ved Kommunalbestyrelsernes Foranstaltning en almindelig Optælling af samtlige Personer her paa Øerne. Midlertidig nærværende Personer medtages **ikke,** medens omvendt alle Kommunens Beboere medtages, selv om de i Øjeblikket er fraværende. (Fiskere, der er ombord i Fiskeskibe, regnes som fraværende). Ved Udfyldningen af Mandtalslisterne opgives for hver Husstand paa Tro og Love Størrel-

Kunngerð í Dimmalætting , 28. februar 1917, um skamtanarkort.

Samtykt varð at gera soleiðis í smb. við útbýtingina av breyðkortum, sukurkortum v.m., at brúka læknaíbúðina sum fyribils skrivstovu og at hava eina slíka kunngerð: *"Brødkort og sukkerkort udleveres Mandagen den 19 Marts fra kl. 10 Formidag til kl. 6 Eftermd. for hele Ugen. Udleveringen finder Sted fra Forstanderskabets Kontor (Lægeboligen). Samme Dag og paa samme Sted og Tid skal hver Husmand eller Husmoders samlede Husholdnings % opgives for Forstanderskabet hvor stor Beholdning af Mel og Korn, forvit Korn, Gryn, Brød og sukker de paa den Dag ligger inde med og samtlige oppgive Antal Personer i Husstanden."*

Vegna støðuna og ta lítlu nøgdina av neyðheilsuvørum, sum fyri tíðina vóru í sóknini, vað mett av størsta týdningi, at gera alt, gerast kundi, at skaffa hesar neyðsynjavørður til íbúgvararnar í sóknini.

12. mars 1917 verður skrivað til Amtið og kvittað fyri móttøku av 145x16 breyðkort og 145x16 sukurkort, sum sigur, at tað helst hava verið 145 kort í hvørjum arkinum, sum so sigur, at tað eru 2.320 kort av hvørjum.

Um at tryggja sær matvørur

Skrivað verður til Amtið hin 12. mars 1917 og spurt um tað høga Amt, vegna støðuna ikki kann hjálpa forstandarskapinum við at skaffa 30 tunnur av seteplum og 5 tunnur av sáðkorni. - Tað er Rasmus Niclasen, formaður, sum skrivar brøvini.

At hungursneyð høttir, sýnir bræv 15. mars 1917 har sýslumaðurin fyri Norðurstreymoy og Vágar, Vestmanna, skrivar og sigur, at sambært skrivi frá Amtinum fyrst í hesum mánaðinum verður inniliga heitt á forstandarskapið um á einhvønn hátt at heita á fólk um at tryggja sær torv, og at velta eplir og røtur umframt korn so nógv sum møguligt, umframt at tryggja sær turran fisk fyri allan tann komandi veturin.

Bræv er skrivað til Johanson & Kaaber, Reykjavík hin 16. mars 1917, har brævið tó er útstrikað aftur úr kopibókini, við at eitt stórt X er skrivað útyvir avskriftini, sum sigur, at brævið kortini ikki er sent. Har eru tó nakrir upplýsingar í um trongu støðuna. Í brævinum stendur m.a.: Vegna støðuna við tí stóra vørumanglinum her í landinum, og vit hava skilt, at Ísland, vegna sáttmála við Ongland, frítt kann fáa vørur úr Amerika, uttan at skipini verða tvungin inn í enskar havnir. Og at Føroyar hava fingið boð gjøgnum danska uttanríkirráðið, at skip, sum fáa vøru frá Amerika, skulu fara í enska havnir. Hetta ger tað tí ómøguligt at fáa vørur til Føroyar. Tað var tí, vit tóku okkum tað frælsi at skriva til tykkum, um tit kundu skaffa okkum vøru, sum vit sjálvir vildu avheinta og rinda kontant. Og vit takka fyri tykkara svar, at tað ikki ber til. Vit skilja, at ministarin í løtuni ikki kann lata Føroyum vørur, men vit hava frætt, at í apríl ella mai skuldi tað kunna latið seg gjørt, við at hann tá væntar av hava lager í Íslandi. Vegna hetta biðja vit tygum telegrafiskt um at siga okkum, um nær tit halda, at nakað kann gerast og um vit samstundis kundu komið við eitt sindur av vøru, nevniliga fisk og lýsi. Sjálvandi vilja vit rinda fyri allar útreiðslur hesum viðv.

Listar yvir teljing av fólkatalinum og goymsluni hjá privatfólki av korni, mjøli, grýni, breyð og sukur eru dagfestir 17. mars 1917. Tað eru 7 dupultørk í uml. A3 stødd, har uplýst er navn á húsfaðirinum, tal av persónum í húsinum, nøgd av mjøli og korni (ikki íroknað føroyskt korn). Annars uppgivið í kg.: Føroyskt kort, grýn, breyð, sukur. Alt á eini linju pr. hús og aftast á linjuni, pláss til undirskrift hjá húsfaðirinum. Alt hetta er uppgivið á hesum blokkum fyri tils. 100 hús í Miðvági. Tilsamans 100 hús. 526 fólk. Uppgivið varð m.a. 379 kg. av mjøli og korni, umframt smærri nøgdir av føroyskum korni, grýni, breyði og sukur.

Á forstandarskapsfundi 19. mars 1917 varð upplýst, at goymslan hjá handilsmonnunum dagsdato var uppgivin til 2391 kg. av mjøli (einki korn), 798 kg. grýni, 578 kg. sukur, 32 tunnur og 64 litrar petroleum og 35 kg. margarin.

Hjá privatfólki varð goymslan uppgivin dagsdato at vera 378 kg. mjøl (einki korn), 34 ¼ tunnur føroyskt korn, 36 kg. grýn, 59 kg. breyð og 33 ¼ kg. sukur.

Vegna støðuna og ta lítlu goymsluna, sum uppgivin var í dag at vera í kommununi, varð einmælt samtykt at bíleggja hjá amtskommununi ársnøgd av nevndu vørum at senda skjótast gjørligt og helst við endan av hesum mánaðinum.

20. apríl 1917 verður skrivað til "Vareudvalget for Amtskommunens Vareforsyning". Eitt rættuliga drúgt og detailierað bræv, har víst verður á, at viðv. teimum vørum, kommunan hevur bestilt, so eru nógvir feilir í sendingini, bæði í nøgd og í prísi. Fleiri vørum er tað komið ov lítið av, uppgivin nágreiniligur munur og tí umbidna, og tað sum faktiskt kom, og onkrum var komið ov nógv av, eisini nágreiniliga uppgivið. Harafturat var ein prísmunur uppá heilar 2.466,80 kr. meira, enn hvat prísurin var, smb. prísáseting hjá Amtinum, sum hevur verið kunngjørd í Dimmalætting.

Samlaða rokningin fyri vøruna var 9.642 kr. Munurin var her 2.466 kr.
Rætta rokningin átti tí at ljóða uppá 7.176 kr. "P.F.V. R. Niclasen." Í brævinum kemur eisini fram, at vøran er ætlað at verða seld í handlunum í Miðvági. Kommunan bestilti sostatt fyri handlarnar, og stuðul, sum varð latin til keyp í handlunum av vørunum av vanliga fólkinum, varð latin í samstarvi við handlarnar, at teir samsvarandi stuðlinum lækkaðu kostnaðin á vørunum.

27. juni 1917 skrivar Vareforsyningen hjá Amtinum, Harald Haraldsen, og biður kommununa senda aftur 4 vekslar undirskrivaðar, sum skulu gjaldast hin 19. august: 12.178 kr.

14. juli 1917 verður skrivað aftur til Vareforsyningen hjá Amtinum og sagt, at forstandarskapið bíðar eftir at fáa útgoldið eitt størri lán frá Sparikassanum, sum skal brúkast til tær vørur, sum kommunan hevur bestilt og frameftir kemur at bestilla. So skjótt lánið er komið upp á pláss, sum væntað verður skjótt fara vit at rinda allar vørur umbidnar eru til forfallstíð.

Forstandarskapið heldur ikki, at tað nú kann undirskrivað vekslar, tá kommunan ikki hevur nakra nevndiverdiga peningaupphædd tøka.

Hetta sigur okkum tað, at kommunan enn ikki hevði fingið lánið uppá 25.000 kr. útgoldið, og tí keypti vørur upp á væntan at fáa lánið, sum annars varð játtað av bæði Løgtingið, Amtið og Sparikassanum. So tað skuldi sjálvandi soleiðis verið "sum pengar í bankanum", sum tikið verður til. Og tað er so eisini tí Vareforsyningen og handlarnir góðtaka skipanina.

24. september 1917 sendir Amtið trykta vegleiðing um, hvussu korn og eplir effektivt skulu dyrkast, har dentur verður lagdur á, at jørðin verður nóg væl taðað. Vegleiðingin er annars rættuliga drúgv, har m.a. mælt verður fólki til longu nú at samla neyðugu tøðini.

1. oktober 1917 eru uppgerð gjørd yvir nøgdina av vørum í goymsluni hjá kommununi. 23 sekkir á 100 kg. av rug, 19 sekkir á 90 kg. av bygg, 18 sekkir á 100 kg. av hveiti, 14 sekkir á 50 kg. av Hummel, 20 sekkir á 100 kg. av rugmjøli, 2 sekkir á 63 kg. av flormjøli, 1 sekkur á 109 kg. av rís, 3 kassar á 35 kg. av "hug melis" (sukurmolar), 13 sekkir á 100 kg. av melis (sukur), 4 sekkir á 100 kg. av farin (putursukur). 3 rullur av Manilla (reip), 2 sekkir av Guana (tøð). Virði av øllum er 5.554,62 kr. - Her sýnist tað so, at goymslan er vaksin nakað.

Í roknskapinum hjá kommununi, 1916-1917 sæst at kommunan gjøgnum Hjálparkassan hevði rindað 1.712 kr. í kontantum stuðli til treingjandi borgarar. Nú sæst eisini, at lánið á 25.000 kr. er goldið kommununi, og hevði kommunan pr. 1. oktober 1917, 8.567 kr. innistandandi í Føroya Banka og 8.905 kr. í Sparikassanum. Tilsamans 17.472 kr. Sum segði, at higartil vóru brúktar 7.528 kr. av láninum. Og tað var til dýrtíðarhjálp. Men har vóru so ikki allar rokningar goldnar.

Vareforsyningen hjá Amtinum hevur sent uppgerð og rokning, hin 23. mai 1918 fyri vørur, kommunan hevur keypt frá 5. januar 1917 til 10. september 1917. Langur útførligur listi við vørum, mjølvørur av ymsum slag, sukur, margarin, korn, rís, eplir o.a. fyri 25.194,93 kr., harav goldnar vóru 12.059,80 kr. Eftir vóru so 13.135,13 kr. at gjalda. Har tó træta hevði verið um 2.466 kr., sum komman meinti, at Vareforsyningen hevði kraft ov nógv, men har amtmaðurin í brævi ikki vildi ganga við til hetta, hóast at kommunan við lýstum prísum í Dimmalætting kundi prógva, at rokningin var skeiv, sum teir søgdu. Og har kundi sigast um Rasmus Niclasen, at hann var treiskur og vildi ikki geva seg, um tað so vóru sterkar maktir ímóti.

Skipanin steðgar fyribils

Á fundi í forstandarskapinum 20. august 1918 var á skrá tingingar um uppskot at gevast við at skaffa vøru upp á rokning hjá kommununi. Tað varð einmælt samtykt at gevast hin 1. september sama ár og beinanvegin at kunngerða áðurnevndu samtykt fyri teimum handlandi í Miðvági.

Á fundi 1. september 1918 varð samtykt at skriva til handilsmenninar, at prísniðursetanin hjá kommununi uppá vørur steðgar frá dato. Somuleiðis at lata hjálpina úr Hjálparkassanum fyribils steðga.

Hóast hesa avgerð so síggja vit, at í 1919 er aftur dýrtíðarhjálp goldin. Og skipanin við skamtanarkortum helt fram heilt fram til summarið 1920, tá kreppan at enda var yvirstaðin.

Dýrtíðarhjálpin 1. apríl 1918 til 31. mars 1919

26. apríl 1919 sendi Amtið, Stahlschmidt fulltrúi, rundskriv. Vit skulu hervið biðja tað ærað forstandarskapið um at senda inn roknskapirnar fyri dýrtíðarhjálpina fyri tíðina 1. apríl 1918 til 31. mars 1919. Í nevnda tíðarskeiði hevur kommunan havt rætt til at brúka 14,40 kr. pr. innbúgva. Vegna at listin skal sendast inn til ministerrið, má tað ganga fram av roknskapinum

hjá kommununi, hvør partur er latin til dýrtíðarhjálp og latin til illa stillaðar persónar. Roknskapurin skal váttast av lokalrevisorinum. Parturin, sum kommunan skal gjalda má áleggjast við eykaskatti. Hesin skattur verður lagdur eftir einum skala, sum í hvørjum einstakum falli skal góðkennast av Amtinum.

31. apríl 1919 verður uppgerð í smálutum skrivað um útreiðslur í smb. við dýrtíðina nevnda tíðarskeið.

Vegna prísniðursetan av ymsum vørum í handlunum 1918/19 kr. 7.149,00.

Veitt hjálp í naturalium úr Hjálparkassanum 1918/19 kr. 1.596,00.

Rentur av láni í Sparikassanum pr. 11/12-1918 kr. 851,36. Í alt **kr. 9.596,36.**

Eykaskattur vegna dýrtíðina

Á fundi 1. mai 1919 varð til viðgerðar fylgjandi uppskot frá formanninum: Vegna útreiðslurnar av dýrtíðarstuðlinum í roknskaparárinum 1. apríl 1918 til 30. mars 1919 verður eykaskattur á 2.000 kr. útskrivaður fyri at dekka útreiðslurnar av at lækka prísin á vørum og beinleiðis stuðli til Hjálparkassan, og at álíkningin verður framd í hesum mánaðinum og innheintað í hesum mánaðinum, soleiðis at ein og hvør skattskyldugur, sum hevur undir 500 kr. í ársinntøku ikki verður skattaður. Uppskotið varð einmælt samtykt.

Á fundi,3. mai 1919, har allir limir møttu, var til viðgerðar uppskot frá formanninum um skatting av eyka inntøkum. Hetta varð ikki samtykt, men fyrra samtyktin stóð tó við.

Men hin 23. juni 1919 er málið aftur fyri. Tingast varð um uppskotið frá formanninum hin 3. mai í ár um eykaskatt í smb. við útreiðslur viðv. dýrtíðarhjálpini. Samtykt varð eitt nýtt uppskot um eykaskattin, og varð skattaupphæddin sett til 2.320 kr., sum varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Soleiðis vóru bæði uppskotini samtykt, men tað seinna eitt sindur tillagað.

Sambært roknskapinum 1918/1919 hevði kommunan í roknskaparárinum fingið 5.306 kr. í stuðli úr statskassanum til dýrtíðarhjálp. Men hetta árið hevði kommunan eisini rindað Vareforsyningen 23.190 kr. fyri keyptar vørur. Har nakað av upphæddini var frá roknskaparárinum árið fyri.

17. august 1920 verður skrivað til Amtið. Sum svar upp á spurning frá Amtmanninum skal sigast, at Miðvágs sóknar kommuna ongar útreiðslur hevur havt av dýrtíðaratgerðunum í tíðini 1. apríl 1919 til 31. mars 1920. *H.N. Niclasen*.

Hervið var dýrtíðarkreppan at enda komin.

Ovurstórt lán

Her kann viðmerkjast at skattainntøkan í 1918 var 4.000 kr. Meðan føst lán vóru uppgivin at vera 26.000 kr. ella 6,5 skattaálíkningar fyri 1918.

Sum dømi um upphæddina kann nevnast, at seinasta skattainntøkan hjá Miðvágs kommunu í 2008 var 28,3 mió. kr. So hetta vildi svarað til lutfalsliga, at kommunan í 2008 tók 184 mió. kr. í láni. Hetta bara fyri enn einaferð at undirstrika, at lánið var ovurstórt, og hvussu stórur tørvurin var.

2. desember 1918 verður skrivað til Sparikassan. Vegna skrivið frá stovninum um lánið, hava vit 12.11.1918 biðið Amtið um loyvi til, at lánið stendur til 1. oktober 1919.

28. oktober 1920 skrivar Sparikassin, at statsstuðul til kommununa var innkomin á 3.705,59 kr. Sparikassin hevði brúkt peningin á henda hátt: 3.080 kr. til avdrag av láninum á 25.000 kr. og 625,59 kr. til rentur av sama láni. Restlánið var nú 21.920 kr. Henda upphædd mátti rindast Sparikassanum innan 1. januar 1921.

Í stuttum kann sigast, at hetta varð loyst á tann hátt, at lánið á 21.920 kr. varð umfíggjað

við nýggjum láni av somu stødd. Hetta við loyvi frá Amtinum og Sparikassanum, vegna at kommunan ikki á nakran hátt sá seg føra at rinda alla skuldina í einum, sum amt og sparikassi máttu ásanna, var so. Viðmerkt er á skuldarbrævinum, hvussu tað varð partvís niðurgoldið:

Dato	Avdrag kr.	Rest kr.	Dato	Avdrag kr.	Rest kr.
11/6-21	1.096	20.824	1/3-22	1.096	19.728
13/3-22	1.096	18.632	29/1-23	1.096	17.536
13/6-23	1.096	16.440	17/3-24	349	16.091
18/6-24	747	15.344	19/3-25	210	15.134
16/5-25	1.764	13.390	13/9-25	218	13.152

Hetta skuldarbræv verður hervið kvittað. Stýrið fyri Færø Amts Sparekasse hin 11. januar 1927. (sign). *Danielsen / S. Petersen*.

Í januar 1927 varð so aftur eitt nýtt skuldarbræv skrivað á 13.152 kr., ella skuldin endurfíggjað, sum tey nú siga, sum tó ikki er so greitt frásagt, hvussu tað varð niðurgoldið. Tað sær út til at hava staðið heilt fram til fyrst í fýratiárunum. Tí í tríatiárunum var aftur stór heimsumfatandi fíggjarkreppa, har neyvan stórt meira enn rentur eru goldnar. So tað tók meira enn tvey áratíggju at fáa skuldina frá 1917 í smb. við øgiligu dýrtíðina og vørumangulin tá goldna. Men sjálv kreppan við vørumangli var, sum nevnt, yvirstaðin í 1920.

Ungmannafelagið ynskti opnar kommunufundir

Vit skilja av fundi 25. november 1927 at nøkur av teimum ungu í Miðvági í 1927 vóru áhugað í kommunupolitikki. Til viðgerðar hendan fundin var nevniliga m.a. skriv frá Miðvágs Ungmannafelag um, at forstandarskapið í framtíðini skuldi halda allar fundir almennar. Í gerðabókini stendur, at samtykt varð at svara, at hildið varð ikki, at tað var í áhuganum hjá tí almenna at halda almennar fundir. Og víst varð til kopibókina síðu 356. Í kopibókini er svar (á donskum) til Ungmannafelagið dagfest 28. november 1927 endurgivið, men har stendur ikki nógv meira av áhuga enn nevnda, og einki navn er nevnt. Brævið frá ungmannfelagnum var helst skrivað á føroyskum, tí eitt brot úr brævinum er endurgivið í svarskrivivnum soleiðis: “opin kommunumøtir”.

Ætlan um niðursetubygd

Skrivað er svar til sýslumannin hin 9. juli 1932 sum hevði biðið forstandarskapið siga sína hugsan um eitt øki, sum Sigmund Frederiksen og J.H. Jacobsen høvdu søkt um at fáa á einum avsíðis stað. Júst hvar hetta økið var er ikki nevnt í brævinum, men at tað er avsíðis og eingin vegur var hagar. Sum skilst, ætlaðu teir at búseta seg har, tí forstandarskapið nevndi, at teir vóru noyddir at dyrka upp jørð og stika inni trød og byggja hús á staðnum.

Men forstandarskapið vildi ikki viðmæla, at teir fingu hetta øki, tí mett varð ikki at teir fíggjarliga fóru at megna tað. Teir vóru peningaveikir menn, varð sagt. Og økið lá á einum slíkum stað, at ætlanin kundi ikki metast at vera fíggjarliga haldbar. Og mett varð heldur ikki, at teir fóru at megna at dyrka tað neyðuga lendi á hesum stað at vinna sær livibreyð við. Um peningurin varð fingin við láni, dugdi forstandarskapið eisini illa at síggja, at teir í nærmastu framtíð fóru at megna at forrenta ella gjalda eitt slíkt lán aftur. Men um so var, at teir megnaðu at fáa fígging til tiltakið, fór forstandarskapið tó ikki at seta seg ímóti, at teir fingu nevnda øki.

Men, sum skilst, so bleiv ikki nakað burturúr hesum.

Stuðul til Dronnig Alexandrine Hospital

7. desember 1918 varð samtykt smb. umbøn, at stuðla byggingina av einum hospitali í Tórshavn við 2.100 kr. goldnar yvir 10 ár frá tí árinum hospitalið var liðugt. Tað var annars ikki fyrstu ferð hetta mál var fyri, men áður hevði verið svarað, at kommunan var ikki fíggjarliga før fyri at stuðla slíkum tiltaki. Helst hevur eitt ávíst trýst verið, sum nú hevði fingið forstandarskapið at broyta hugsan. Gjaldið var 210 kr. um árið, sum varð goldið í 6 umførum: 4 x 420 og 2 x 210 kr., árini 1924, '25, '27, '28, '30 og '32. Í roknskaparbókini 1915-1935 er yvirlit yvir hetta.

Traðir til uppdyrking

Johan Weihe, sýslumaður skrivaði hin 1. mars 1934 og sendi kommununi avrit av brævi skrivað 25. januar 1934 frá Landbrugsministriet, Keypmannahavn, til Harald Juul Hansen, Miðvági. Í brævinum varð nevnt, at Amtið hevði skrivað til fýra menn í Miðvági í 1932 viðvíkjandi umsókn frá fiskimonnunum Jørgen Frants Jørgensen, Hans Christoffer Hansen, Harald Juul Hansen og Niels Jacob Nattestad, sum høvdu søkt um at fáa 1 kúfóður hvør av kongsjørðini á Heimara Leiti í Miðvági at brúka til uppdyrking. Amtið hevði mælt til at umsøkjararnir fingu 1 kúfóður hvør til uppdyrkingar, og at keypsprísurin varð 50 kr. hvør, har peningurin fall til statskassan. Harumframt skuldu hesir menn, so leingi núverandi festari hevði kongsfestið, rinda honum 4% árliga sum endurgjald fyri mist lendi, sum gav 2 kr. árliga. Í skjalinum vóru nógv krøv nevnd. Teir høvdu skyldu at stika traðirnar inni. Tær skuldu dyrkast við mist 1/30 part árliga. Traðirnar hvør sær skuldu vera ein heild, og var ikki loyvt at selja ella geva partar av traðunum til onnur. Brot á viðløgdu krøvini førdi við sær, at traðirnar fullu aftur til uppruna festið.

23. oktober 1934 skrivaði Amtið og sendi avrit av sama brævi, har lagt varð afturat, at krøvini vórðu váttað og undirskrivað hin 23. oktober 1934. Umframt keypsprísin, sum varð goldin, skuldu 2,74 kr. rindast fyri umsiting. Við skrivinum var eisini avskrift av sýni framt av teimum 4 traðunum, har Heini Hansen í Sørvági varð valdur av sýslumanninum og Hans Jørgensen, Miðvági, var valdur av umsøkjarunum. Heini og Hans høvdu hin 26. september 1934 verið og sýnt tær 4 traðirnar. Til staðar vóru eisini umsøkjararnir, Harald Juel Hansen og Niels J. Nattestad. Og fyri Hans Christoffer Hansen møtti pápi hansara, Albert Hansen. Harumframt møtti kongsbóndin, nakrir óðalseigarar og sýslumaðurin, sum skrivaði niður. Uppmált varð, hvussu stórar traðirnar vóru í longd og breidd í kvadratmetrum. Í avritinum eru tó bert málini av eini trø nevnd, tað er tann hjá Harald Juel Hansen. Hon varð nevnd trød 1. Móti suðuri lá hon 44 metrar fram við bøgarðinum. Móti eystri um 5 metrar frá Hýsisá og 267 metrar fram við ánni. Støddin á trøðni varð roknað til 11.900 m^2 og varð hon mett til eitt heilárs kúfóður. Sýslumaðurin váttaði ,at sýnismenninir høvdu gjørt metingina eftir bestu sannføring og meting. Handilin endaður. G. Dahl-Olsen (sign.) Sum vitni, J.H. Hansen.

Gjald vegna hospitalsinnleggingar

31. januar 1936 verður skrivað til Føroya Løgting. Sum svar upp á skriv nr. v 14/1935, skal forstandarskapið viðmerkja hetta: Tað er alneyðugt, at trongdu kommunurnar sleppa undan óyvirskoðiligu útreiðslunum av sjúkrahúsverkinum. Kommunur, sum eru hart fyrispentar frammanundan og eisini hava ringt við at fáa skattin inn, missa ein stóran part av tí sindrinum, sum eydnast at fáa inn vegna ofta stórar útreiðslur av hospitalsuppihaldi vegna sjúku. Hetta má og skal enda. Hugsast kann, at nakað av teim inntøkum, Løgtingið higartil hevur fingið inn gjøgnum toll og avgjøld, kann brúkast til tað, kommunurnar higartil hava verið pliktigar at rinda til heilsuverkið. Hinvegin er eingin loysn í, at Løgtingið yvirtekur málið á tann hátt, at kommunurnar skulu endurrinda Løgtinginum.

Hjálp til illa stillaðar fiskimenn

Á fundi í forstandarskapinum 4. mai 1936 var til viðgerðar innkomnar umsóknir í smb. við lóg frá 31. mars 1936 um Hjálp til illa stillaðar fiskimenn í Føroyum. Í fundarfrásøgnini eru nevndir 16 fiskimenn úr Miðvági, har umsóknin var góðkend.

28. mai 1936 skrivar fútin, Tórshavn, at í smb. við nevndu lóg hevði staturin á fíggjarlógini 1936-37 játtað 960 kr. til fiskimenn í Miðvági. Peningurin varð sama dag sendur kommununi við postávísing. Peningur var játtaður til: Pól Andreas Poulsen 50 kr., Hans Vilhelm Hansen 100 kr., Martin Jacobsen, Vatnsoyri 100 kr., Harald Juul Hansen 50 kr., Kristin Jacobsen 70 kr., Jógvan Hendrik Johannesen 100 kr., Andrias Olsen 50 kr., Jógvan Poulsen 50 kr., Niels Jakku Nattestad 50 kr., Marius Næs 100 kr., Tummas Pauli Johannesen 50 kr., Ísak Johannesen 60 kr., Jóhannus M. Nicolajsen 70 kr. og Kristian Jóhan Albert Poulsen 60 kr. Í alt 960 kr. Kvitering varð umbiðin beinanvegin. Viðheft var postkvittan fyri, at upphæddin var útgoldin hin 28.5.1936. - Har einki annað er nevnt, vóru teir allir úr Miðvági.



Kvittan frá kommununi fyri útgjald.

13. juni 1936 skrivaði fútin, Tórshavn, at í smb. við § 3 í lóg frá 31. mars 1936 um stuðul til illa stillaðar fiskimenn vóru sendar kommununi sama dag 1.420 kr. við postávísing. Peningur játtaður til: Niklas Salomon Haraldsen 100 kr., Elias Haraldsen 80 kr., Esmar Ferdinand Johansen 80 kr., Hentze Elias Hansen 80 kr., Jóhan Poulsen 70 kr., Petur Salomon Hansen 50 kr., Jógvan Joensen 50 kr., Hans Jakku Poulsen 100 kr., Ludvig Poulsen 90 kr., Edvard Sigurd Frederiksen 60 kr., Jógvan Hans Sofus Jacobsen 60 kr., Tummas Jakku Johannesen 100 kr., Petur Jakku Johannesen 60 kr., Jóhannes Joensen 90 kr., Hjalgrim Johansen 100 kr., Jóhannus Nicolaj Haraldsen 90 kr., Sámal Jóhannus Fr. Johannesen 60 kr. og Tummas Jakku Johansen 100 kr. Í alt 1.420 kr. Fyri hesa upphædd varð kvittan biðin.

Matvørumangul í smb. við Seinna heimsbardaga

Landsnevnd løgtingsins, Edward Mitens, skrivar, hin 15. juni 1939, at Løgtingið hevði keypt 770 tons av rugmjøli vegna krígsvanda. Ætlanin var at fáa fólk at keypa kornið og neyðugt var, at ein maður fyri hvørja bygd stóð fyri móttøkuni og útflýggjanini. Stýrið varð biðið um at útpeika ein av stýrinum ella annna mann í bygdini, sum nevndin kundi seta seg í samband við um nærri skipan. Nevndin mátti fáa svar sum skjótast.

Skrivið var til viðgerðar á fundi 14. juli 1939. Samtykt varð at svara, at mett varð ikki, at tað var neyðugt í løtuni at gera nakað við málið. Í brævi sent sama dag er lagt afturat, at teir ikki vildu taka ímóti goymslu av korni uppá rokning hjá kommununi, tá vit ikki hava ráð til tess.

5. september 1939 skrivar Amtið. Hjálagt senda vit serprent av kunngerðini hjá Amtinum frá 3. september 1939 um skamtan av sukuri saman við sukurkortum og útbýti av kortum frá 8. september til 15. september 1939. Kort og blankettir til seinni tíðarskeið verða eftirfylgjandi send. Hvør fastbúgvandi persónur í kommununi fær útflýggjað 1 kort fyrstu ferð hin 8. og 15. september 1939 og síðan hvønn hin 1. og 15. í hvørjum mánaði.

Fólk, sum ikki búðu fast í kommununi, máttu fáa kort í bústaðarkommununi. Har eisini sagt varð, at eitt útflýggingarstað mátti vera í hvørjari bygd, og skuldi tað vera væl lýst, hvar

hetta var. Viðlagda kunngerðin frá 3. september 1939 um skamtan av sukuri var í 13 paragrafum. § 1 segði: Søla av sukuri til privat má frá og við 8. september 1939 bara henda móti avhendan av sukurkorti.

Hetta skrivið er á skrá 6. september 1939. Samtykt varð at skipa seg soleiðis, at kortini fyribils vórðu útflýggjað frá skrivstovuni hjá kommununi í tíðini kl. 9 til kl. 12 fyrrapart. Sum skuldi kunngerast í kunngeratalvuni.

15. september 1939 varð ein "Blanket" útfylt, har á stóð, at hin 15. september skuldi kanningin gerast. Tað snúði seg um goymslu av ymsum neyðsynjavørum hjá privatum. Uppgerðin var henda fyri Miðvág: Korn 50 kg. Rugmjøl 2.278 kg. Hveitimjøl 3.784 kg. Annað mjøl 228 ½ kg. Sukur 723 5/8 kg. Kaffi 16 1/8 kg. The 8 5/16 kg. Kol og koks 15.330 kg. Bensin 2 ½ kg. Petroleum 401 litrar. Onnur brenniolja (Solarolja) 150 litrar. Blankettin varð útfylt smb. kunngerð frá Amtinum hin 9. september 1939 og smb. lóg frá 2. september 1939 um júst hesa blankett.

Kunngerð frá Amtinum: "Bekendtgørelse om Foranstaltninger til Sikring af Færøernes Forsyning med Byg til Sædekorn" er dagfest 12. oktober 1939. Kunngerðin er í 9 §-um. § 1. Forboð var fyribils sett fyri at brúka føroyskt korn til fóður, at mala kornið sundur o.l. Alt slíkt korn skal brúkast av jarðarbrúkarum til dyrking av korni. Smb. § 2 skuldi alt hetta korn goymast turt og trygt, og skuldi hin 01.11.1939 upplýsast fyri forstandarskapinum hvussu nógv korn var, o.s.fr.

- Hetta hendir so alt eftir, at Týskland hevði lopið á Pólan, og at Ongland og Frakland síðan høvdu sent krígsboð til Týsklands. Og so vóru myndugleikarnir greiðir um, at vit kundu frykta somu støðu sum undir Fyrra heimsbardaga.

Um skamtanarkort í smb. við Seinna heimsbardaga kann í stuttum sigast, at tey vórðu nýtt heilt upp til 1950. Tástani var somikið ríkiligt av matvørum at fáa, at ein kundi gevast við skamtanarkortunum.

Skuldin hjá kommununi 1939

Sambært roknskapunum hjá Miðvágs kommunu var samlaða skuldin hjá kommununi í 1938 55.500 kr. og í 1939, 69.000 kr. í rundum tølum.

Eitt, sum var ein stórur trupulleiki, var, at skattaeftirstøðurnar vóru ovurstórar. Meira enn ein skattaálíkning var ógoldið. Í1939 vóru eftirstøðurnar 24.929 kr.

Sjey teir størstu kreditorarnir vóru smb. uppgerð 1939: Færø Amts Sparekasse 20.346 kr., sjúkrakassin, fallin skuld 8.401 kr., havnaverkið í Miðvági 6.023 kr., Føroya Banki 5.524 kr., óavgjørd skuld til hospitalið 5.930 kr., Amtslutabýtisgrunnurin 4.255 kr., Dr. Alexandrines Hospital 2.465 kr. og Sanatoiið 1.472 kr.

Hartil høvdu bygdaráðslimirnir J.K. Joensen smiður og Andrias Joensen handilsmaður, tilsamans lagt út 1.718 kr. fyri kommununa. Og kommunan skyldaði pr. 01.01.1939 løn til lærararnar, til Jóan Hendrik Samuelsen 1.460 kr. og til Martin Joensen 1.250 kr., sum avtala var við teir um.

Hartil vóru fleiri smærri kreditorar, so samlaða skuldin í 1939 var smb. uppgerðini 01.01.1939 64.600 kr., sum við ársenda varð staðfest til 69.000 kr.

Skuldin var nú so stór lutfalsliga, at landsmyndugleikarnir byrjaðu at órógvast. Sørin Danielsen, formaður, fekk fundarboð frá Amtinum at møta á Amtsskrivstovuni í Tórshavn 28. og 29. oktober 1939 at viðgerða fíggjarstøðuna hjá kommununi.

Pr. seinastu teljing (1935) vóru 619 borgarar í kommununi.

Samlaða inntøkan hjá skattaborgarunum í Miðvági í 1937 var 122.209 kr., í 1938: 148.637 kr. og 1939: 133.596 kr.

Skattainntøkan hjá kommununi somu ár var ávikavist: 15.771 kr., 18.771 kr. og 17.172 kr.

Tað hevði hvørt ár verið álíknað við 12% í skatti. Av teimum 619 íbúgvunum vóru 299 skattgjaldarar.

Listin við eftirstøðum varð gjøgnumgingin. 1. januar 1939 vóru eftirstøðurnar 22.850 kr. Sum sást av listanum vóru 1.015 kr. frá tíðini áðrenn 1931, og at listin frá 1931 til 1938 var javnt vaksandi. Formaðurin helt, at ein partur kundi fáast við innkrevjing, hóast tað var so gamalt. Tá eftirstøðurnar vóru blivnar so gamlar, skyldaðist tað eftir hansara hugsan, at pantingin ikki hevði verið gjørd við neyðugum ídni. Nakað av eftirstøðunum vóru sendar til Mitens sakførara til inkasso. Gjøgnum árið 1939 vóru 1.134 kr. av gamlari skuld komnar inn. Av skattinum fyri 1939 vóru 1.225 kr. komnar inn.

Formaðurin hevði tikið høvuðsbøkurnar hjá kommununi við og kopibløð fra kassabókini fyri 1939. Sum skilst høvdu roknskaparkøn hjá Amtinum gjøgnumgingið høvuðsbøkurnar og høvdu hesa viðmerking: "Tað sást av kassabókunum, at tær langt frá vóru ordiliga førdar, í nógvum førum var seinasta roknskaparending frá 1937, og tað var tí torført at gera sær eina góða mynd av fíggjarligu støðuni hjá kommununi í løtuni, pr. 1939."

Hetta gjørdi alt, at skuldin var ikki dagførd og tí ikki rætt uppførd.

Í hesum sambandi hevði forstandarskapið gjøgnumgingið roknskapin og gjørt eina nýggja uppgerð pr. september 1939. Uppgerðin vísti, at fallin skuld var 68.791 kr.

Men tað vóru tvær stórar upphæddir, sum ikki vóru tiknar við í roknskapin. Skuld til Amtsgrunnin, 58.285 kr. og skuld til Statskassan, 17.438 kr. Í høvuðsheitum skuld hjá Miðvágs havn. Hetta gjørdi, at samlaða skuldin hjá kommununi var 144.514 kr.

Viðmerkingar frá Amtinum

Amtið hevði hesar viðmerkingar til roknskapin hjá kommununi: Sum sæst, er fíggjarliga støðan hjá kommununi sera vánalig, og tað er ikki møguligt at fáa javnvág í uttan at skera kraftiga niður í skuldarpostunum. Inntøkan hjá kommununi komandi mánaðirnar ferð í høvuðsheitum til at rinda vanligar útreiðslur, og tær mest neyðugu útreiðslurnar sum læraraløn og almennan stuðul.

Formaðurin í forstandarskapinum legði serligan dent á, at myndin av fíggjarstøðuni hjá kommununi gjørdist serliga myrk av tí stóru skuldini hjá Miðvágs havn, sum hann ynskti hildna fyri seg sjálva. Tá havnin ikki sjálv hevði nakað útlit til at megna skuldina í nærmari framtíð, mátti hesin posturin helst takast við í skuldina hjá kommununi.

Roknskapirnir fyri 1936-38 vórðu gjøgnumgingnir. Amtið metti, at roknskapirnir trongdu í hægsta grad til at verða gjøgnumarbeiddir soleiðis, at ein eftir nágreiniliga konstatering av øllum skuldarpostum kundi byrja ein nýggjan og nágreiniligan roknskap 1. januar 1940.

Saman við formanninum varð roynt at seta upp eina normala fíggjarætlan fyri kommununa, soleiðis sum útreiðslur kommununar helst vera eftir 1. januar 1940. Hesin roknskapur sýndi útreiðlur uppá 11.835 kr. fyri allar teir føstu postarnar.

Gjørt varð formanninum greitt, at skattaprosentið hjá kommununi skuldi lækka eftir 1. januar 1939 sum fylgja av sparingunum hjá kommununi av Finansplanslovene.

Viðmerkjast kann, at Miðvágs kommuna var ikki einsamøll við slíkum trupulleikum. Tað vóru trupulleikar hjá flestu kommununum kring landið hesi árini.

Høvuðsgrundin var tvær stórar fíggjarkreppur áðrenn Seinna heimsbardaga, tað var fíggjar-

kreppan í smb. við Fyrra heimsbardaga og mangul av tilfari og matvørum sum skapti stóra trongd.

Og so var tað fíggjarkeppan eftir skræddlið á fíggjarmarknaðinum í 1929, sum ávirkaði stórt sæð øll tríatiárini sera nógv við stórari fíggjarligari trongstøðu.

Seinni Heimsbardagi var heilt annarleiðis. Og grundin var eyðsæð, at bretar komu til Føroya og byrjaðu at byggja alt møguligt. Sjálvt um teir høvdu ovurstóra manning við sær, so var tað ikki nokk, og í Vágum arbeiddu stórt sæð allir arbeiðsførir menn hjá bretum, serliga árini 1942 og 1943. Hetta gav stórar skattainntøkur til kommunurnar, sum byrjaðu at koma fyri seg aftur fíggjarliga. Og eftir tað gekk tað tíbetur framá.

Tað vóru nú ikki bara bretar, sum bjargaðu støðuni uttanífrá. Danski staturin stuðlaði vega- og havnabyggingum við upp til 3/4 og í førum 4/5 av kostnaðinum, og skapti hetta eisini nógv arbeiði og gav eyka pening til slunknu kommunukassarnar.

Minuvandin og minørar í Vágum

Dagfest 4. november 1940 er varðveitt eitt ávarðingaruppslag "Forholdsregler mod Drivminer", har sagt verður, at serliga bretskar minur kunnu finnast rekandi. Tær vóru tó gjørdar so at tá tær slitu seg leysar blivu tær óvirknar. Men tað var ikki garanti fyri, at hetta altíð var so, tí skuldi ein halda seg langt burtur frá teimum, um ein sá eina slíka og boða myndugleikunum frá, um tað var við land ella í fjøru. Rátt varð eisini frá at sigla í myrkri í ymsum økjum m.a. Skopunarfirði og Suðuroyarfirði.



Mina rekur tætt við land við Føroyar undir Seinna Heimsbardaga.

9. november 1940 var fundur í forstandarskapinum heima hjá formanninum. Triðja mál á skránni var skriv frá Amtinum um, hvussu ein hevði hugsað sær at skipa seg vegna minuvandan sum nú var vegna allar rekaminurnar, sum róku runt oyggjarnar.

Samtykt varð at goyma málið, og fáa upplýsingar frá hinum kommununum, um hvussu tær ætlaðu at gera.

Málið var ikki fyri aftur í forstandarskapinum. Men, sum skilst seinni og smb. frásøgnum, so vórðu tveir sonevndir "minørar" settir í Vágum og vóru teir: Thorstein Niclasen, Miðvági og Jens Rasmussen, Sørvági og virkaðu teir í hvør sínum øki. Thorstein á eystaru síðu á oynni og Jens á vestaru síðu. Og hava helst samstarvað onkuntíð eisini. Teir fingu serstaka útgerð at avmontera minurnar við, og var hon úr kopari.



Thorstein Niclasen, Miðvági, var annar av minørunum í Vágum.
Mynd: Myndablaðið Magn, 1973.

Jarn mátti ikki koma at minunum vegna vandan fyri neistum, ið kundi fáa lóguri at spreingjast. Smb. frágreiðing snúði tað seg um at skrúva eitt runt lok av minuni og at fáa spreingievni úr. Hetta var tó ikki vandaleyst arbeiði.

Dømir eru um at minur, sum róku á land í Vágum brustu, og dømi er úr Miðvági, har mina brast í fjøruni og gjørdi skaða á hús.

Krútið, sum var í minunum varð annars brúkt at spreingja við t.d. til vegagerðir og í smb. við húsabygging og varð nevnt "minukrút".

Eitt áhugavert skriv í hesum sambandi er varðveitt frá 21. apríl 1944. Har skrivar "C.B. Kontoret", ið er stytting fyri "Civilbeskyttelseskontoret", Tórshavn, til øll forstandarskap í Føroyum og segði, at bretsku marinumyndugleikarnir høvdu avgjørt, at teir frameftir ikki fóru at taka ímóti tómum mynuhylkjum at senda til Onglands. Avgjørt var í staðin at lata tey tómu minuhylkini, sum lóðu runt umkring í Føroyum til tey lokalu at brúka eftir avgerð frá forstandarskapinum. Viðmerkjast kundi, at eitt minuhylki átti at verið latið til hvønn av teimum lokalu minørunum, um so var, at teir ynsktu tað. Hetta sum serstaka áminning fyri tað arbeiði, teir høvdu framt undir krígnum. Og lagt varð afturat: "Teir báðir minørarnir í Vágum eru: Jens Rasmussen, Sørvági og Thorstein Niclasen, Miðvági."

Fíggjarlig semja við Sjúkrakassan

Løgtingsskrivstovan skrivaði hin 10. desember 1940 og segði, at vísandi til teirra samtalu við formannin fyri kommununi, loyvdu tey sær at senda uppskot til semju við sjúkrakassan og bóðu kommununa samráðast við stýrið fyri sjúkrakassan, og vónandi gingu teir við til uppskotið. Vit biðja tykkum so fáa báðar partar at undirskriva semjuna og senda hana aftur til løgtingsskrivstovuna, sum vit mæla Amtinum til at góðkenna.

Hetta var partur í almennu royndini at fáa roknskapin hjá kommununi á føtur aftur. Onnur átøk vóru eisini framd og skuld niðurskrivað.

14. desember 1940 varð semja undirskrivað millum Miðvágs sjúkrakassa og Miðvágs kommunu. Semja: Miðvágs kommuna skyldar Miðvágs sjúkrakassa uml. 14.300 kr. og sjúkrakassin skyldar Dr. Alexandrines Hospital uml. 11.000 kr. Undir teirri treyt, at sjúkrakassin sleppur undan síni skuld til hospitalið í tíðini áðrenn 1. apríl 1939, gera sjúkrakassin og Miðvágs kommuna hesa semju: Skuldin hjá Miðvágs kommunu verður niðurskrivað til 1.500 kr., sum skulu gjaldast innan 1. desember 1941. Miðvágur hin 14. desember 1940.

Miðvágs Sjúkrakassi D.P. Niclasen, Andreas Joensen, Jens Rasmusen (sign.)

Miðvágs kommuna S. Danielsen, D.P. Niclasen, H. Samuelsen, M. Hansen, J.J. Niclasen (sign.)

Keyp av skrivimaskinu

Áðrenn var alt skrivað við hond. Upp til 1947 var tað formaðurin sjálvur, sum virkaði sum bæði skrivari og roknskaparførari, sum umrøtt er áður.

Í 1940 var komið hartil, at nú var hildið hóskandi, at kommunan fekk eina skrivimaskinu. Hetta var til viðgerðar í kommunustýrinum 30. desember 1940. Samtykt varð at fáa til vega eina skrivimaskinu til kommununa, soleiðis, at formaðurin skuldi rinda helvtina og kommunan helvtina, upp á tær treytir, at tá formaður varð skiftur, skuldi formaðurin antin keypa maskinuna ella fáa sín part afturindaðan. Tilboð var upp á maskinu fyri 250 kr. Samtykt varð at keypa hana fyri tann prísin.

Her snýr tað seg so helst um, at formaðurin, sum eisini var postmeistari í bygdini, allarhelst hevur viljað brúkt maskinuna í tí starvinum eisini. So fyrsta skrivimaskinan var felags millum kommununa og posthúsið í bygdini, ið var heima hjá formanninum, Sørin Danielsen.

Reyðakross innsavnan

Í februar 1941 (ódagfest) var skriv komið frá Reyða Krossi, har ovastu myndugleikarnir fyri Løgtingið, Landsstýrið, amtmaður og bretski ovastin høvdu skrivað undir.

Í skrivinum var sagt, at síðan Reyða Kross-innsamlingin í Føroyum til frama fyri Reyða Kross grunnin hjá Lord Mayor byrjaði í juni mánaði 1940 vóru í alt innkomnar 11.000 kr. Hetta var eitt gott úrslit, men steðgast kann ikki her. Erfaringar við krígnum seinastu mánaðirnar hava víst, at sivilfólki undir tí totalu krígsførsluni eru undir hørðum roynslum og størri vandum enn nakrantíð áður. Reyði Krossur arbeiðir ótroyttiliga við at bøta um tær ólukkur, sum framdar verða, og stórar peninganøgdir verða brúktar hvønn dag. Vit mugu tí halda áfram við at stuðla Reyða Krossi at hjálpa øðrum, sum eru rakt av ólukkuni, og fyri at tryggja okkum sjálvi, um so verður, at kríggið nærkaðist henda vegin. Minst til, at allur stuðul til Reyða Kross innsamlingina í Føroyum, í givnum føri verður brúktur til hjápararbeiði her í oyggjunum. Vit biðja tygum tekna tygum til ein mánaðarligt gjald til Reyða Kross. Stuðulin kann gjaldast, sum nevnt verður niðanfyri, soleiðis, sum tað er lættast hjá tygum. Vit biðja tygum skriva í rútin, har talið skal standa, støddina av stuðlinum, og seta kross við gjaldsháttin, ið ynsktur verður. Tórshavn í februar 1941. P. Dahl, K. Djurhuus, C.A. Hillbert, F.C. Mason.

Útbýtan av gassmaskum og loftverjunevnd

Skriv frá C.B. skrivstovuni um at fáa til vega gassmaskur til íbúgvararnar í bygdini var til viðgerðar á fundi 14. mars 1942. Tað skuldi gerast ein listi yvir allar persónar í bygdunum, Miðvágur og Vatnsoyrar soleiðis í kolonum: 1. Børn undir 18 mánaðir. 2. Børn frá 18 mánaðum til 4½ ár. 3. Børn millum 4½ og 17 ár. 4. Kvinnur. 5. Menn. Samtykt varð at býta bygdina millum limirnar í forstandarskapinum til at skriva upp og senda tað inn týsdagin hin 17. í hesum.

Nakrar dagar seinni, hin 26. mars 1942 var til viðgerðar, umbøn frá loftverjuovastanum um at seta eina loftverjunevnd við 3 limum saman við sýslumanninum og læknanum, at umsita sivila loftverju og trygd í kommununi. Til hetta vórðu valdir: Søren Danielsen, Hans Samuelsen og Jens Jacob Niclasen.

Nevnast kann, at tá Krígssavnið byrjaði í 2008 fekk savnið ein heilan kassa av gassmaskum frá Miðvágs kommunu, sum stavaðu frá Seinna heimsbardaga. Helst avlop av gassmaskum.

Gassmaska og tað, sum fylgdi við eini gassmasku, sum varð útflýggjað undir krígnum til allar borgarar. Hetta er ein til vaksin fólk. Við fylgdi eisini ein vegleiðing í brúki av gassmaskuni. Hendan á myndini er ogn hjá Krígssavninum.

Forholdsregler
ved
Luftangreb.

Søg hurtigt, men roligt Beskyttelse i de med Skilte (Luftvernd Skýli) forsynede Tilflugtsrum ellet i nærmeste Hus.

Er ingen Bolig i Nærheden, læg Dem i en Grøft eller Fordybning, helst med Hovedet nedad og Armene frem over Hovedet.

Hjælpestationer er indrettet i:
Kommunelægeboligen,
Posthuskælderen,
Franciskanersøstrenes Bygning,
Alderdomshjemmet

Her befinder sig Udryknings korps (hvidt Armbind), Samaritter (hvidt Armbind med rødt Kor.) og Politi (grønt Armbind). Hjælpemandskabet paa Brandstationen er forsynet med rødt Armbind.

De af Byraadet udpegede Tillidsmænd (i 54 Distrikter over Thorshavn) vil være kendelige paa gult Armbind.

Undgaa for tæt Sammenstimlen i fri Luft, særlig om Natten.

Undgaa unødig Færdsel i Havnen fra Kongebroen og udefter.

Telefonen maa under Luftalarm kun bruges til Tilkaldelse af Hjælp.

Det er af største Vigtighed og i alles Interesse, at enhver bevarer Ro og Orden og nøje følger de Anmodninger og Anvisninger, Byens Tillidsmænd og Hjælpemandskabet maatte fremkomme med.

Thorshavn, den 27. Juli 1940.
Landfogden (Politimesteren).

Uppslag 27. juli 1940.

Útreiðslur vegna kríggið

Í roknskapinum 1942 er ymsar útreiðslur av krígnum.

Gerð av lasaretti. Sámal Ellefsen, 968 kr. Elsebeth Marie Hansen, 12 kr. Hugo Poulsen, 4 kr.

1000 sandsekkir, 350 kr. Í alt 1.334 kr.

Arbeiði í ávísum stað (ikki lesandi hvar): Henrik Hansen, Emil Johansen, Hans Mohr Hansen, Richard Jørgensen, Kristin Elias Poulsen, Jógvan Petur Thomsen, Niels Jacob Niclasen og Henry Hansen. Í alt 103 kr.

Arbeiði við gassmaskum: Kristoffur Svabo, Jógvan S. Samuelsen, Hans V. Hansen, Christoffur Hansen, Petur Heinesen, Amalia B. Wang, Albert Hansen, Margretha Danielsen, Alberta Jacobsen, Hjalgrim Tormansbakke, Bodil Ellefsen, J.H. Samuelsen, Valborg Joensen, Ragnhild Poulsen, Sunneva Poulsen, Jutta Hansen og Bertina Poulsen. Í alt 295,30 kr.

Lossing: Tilfar til lasaretti, gassmaskur og kol, umframt koyring 14 kr. Í alt 17,75 kr.

Ein ferð til Tórshavn: Sørin Danielsen, 75 kr. Í alt 3.160,51 kr.

Adamson oberstur góðgerandi lutaseðlar

27. mai 1943 skrivar Adamson oberstur, ovasti fyri 30 Group Pioneers. Vælgerðar lutaseðlasøla nr. 3. Fyriskipað av J.E. Adamson obertstloytnanti D.S.O. Commanding 30 Group Pioneers Corps, Faroe Islands Force. Lutaseðlasølan er til frama fyri tey eftirverandi í bretska handilsflotanum og fyri hvíldarheimið "Naina" í Tórshavn. Drigið varð í høvuðskvarterinum í Miðvági hjá 30 Group Pioneers Corps kl. 15 mikudagin 26. mai 1943. Tilstaðar var nevnda sivila nevnd: Chr. Larsen sýslumaður fyri Vágar, Poul Johansen prestur, Miðvági, J.E. Thomsen, Sandavági. - Dánjal Niclasen, Sørvági og Sámal Ellefsen, Miðvági, fingu ikki verið við vegna, at teir vóru staddir í Tórshavn.

J.E. Adamson oberstur, búði hjá presti í prestagarðinum í Miðvági.

Allir seðlarnir vórðu eftirhugdir av eini nevnd og síðan væl blandaðir av Annu Johansen, prestafrúu, sum vinarliga bjóðaði sær at hjálpa til við dráttinum.

Sivilu lutaseðlarnir vórðu væl blandaðir og vórðu drignir fyrst av Hudson majori, Proufoot majori, LeBlond majori og Q.M. Willerton loytnanti. Úrslitið av sivila dráttinum var:

Vinnarar av 250 kr.: J. Nielsen, Sandavági, Arnhold Jacobsen, Sørvági.

Vinnarar av 125 kr.: Alen Viderø, Viðareiði, Elias Simonsen, Norðagøta, Johansen prestur, Miðvági, Johannes J. Jacobsen, Norðragøta, Margrethe Joensen, Sandavágur, Marie Elisabeth Joensen, Kvívík, Eskild Viderø, Viðjareiði.

Eisini vóru 12 vinnarar av 50 og 24 vinnarar av 10 kr.

Úrslitið av seðlunum seldir innan hermegina, sum vórðu drignir av frú Annu Johansen:

Nakrar styttingar: R.E. = Royal Engineers / R.A. = Royal Artillery / Coy. = Company / P.C. = Pioneer Corps / H.A.A.Bty. = Heavy Anti Aircraft Battery / Gnr. = Grenadier / L.A.A.Bty. = Light Anti Aircraft Battery / Bty. = Battery t.e. kanónstillingur / Capt. = Captain / Lt. = Loytnant / Sgt. = Sersjant / Cpl. = Corporal / Pte. = Private t.e. meinigur. A.W. = Artisan Works t.e. handverkari. H.M.S. = His Majestys Ship.

Vinnarar av 250 kr.: Offley, 716 A.W. R.E. / Everett, 228 Coy. P.C. Sørvági.

Vinnarar av 125 kr.: Pte. Cook, H. 35 Coy P.C. / Pte. Heveran, A. 228 Coy, P.C., Sandavágur / Pte. Tamplin, 135 M.E. Coy. R.E. / Mrs. L. Bruce c/o 56 Coy. P.C., Sørvágur / Spr. R. Morris, 856 Coy. R.E., Sørvágur.

Umframt vinnarar av 50 kr. og 10 kr.

Tal av seldum seðlum:

Sivilir: 7169 stk. Hermegin: 6331 stk. Í alt: 13.500 stk. á 1 kr. = 13.500 kr.

Herav fara vinningar: 4 á 250 kr. 12 á 125 kr. 24 á 50 kr. 51 á 10 kr. Í alt: 4.210 kr.

Til hernaðarligar seljarar: 240 kr. Trykking og porto, góðkent av nevndini: 575 kr.

Í alt 5.025 kr.

Yvirskot a býta til tey tvey góðgerandi endamálini: 8.475 kr.

Chr. Larsen sýslumaður var hjástaddur undir dráttinum og hjálpti við hesi váttan:

Hervið vátti eg, at eg var tilstaðar undir vælgerðar drátti nr. 3 og varð alt væl fyriskipað, beint og avgjørt væl útført. Sørvágur 27. mai 1943, K. Larsen, sýslumaður.

27. mai 1943 skrivar Adamson oberstur: Ein nevnd við Johansen presti, Samuel Ellefsen, Miðvági, Daniel Niclasen Sørvági, saman við J.E. Adamson oberstloytnanti, D.S.O., leiðandi heryvirmaður, 30 Group Pioneer Corps, syrgja fyri, at yvirskotið av søluni verður latið beinanvegin til tey bæði vælgerandi endamálini og fyri útbýtinum av nevndu vinningum.

Sivilir vinnarar mugu lata sín lutaseðil inn móti at fáa eitt prógv.

Eg vil serliga nevna arbeiðið, sum prestur og frú Johansen hava gjørt fyri, at eisini henda vælgerðar lutaseðlasølan varð væleydnað og met á hesum oyggjunum. Tað er ómøguligt at nevna øll tey, sum á ymsan hátt hava tikið sítt tørn í smb. við hesa lutaseðlasøluna, men tað verður stórur prísur settur á teirra yrki.

Johansen prestur og J.E. Thomsen lótu sínar vinningar til Pioneer Faroe Orphans Fond (Grunnurin fyri eitt barnaheim í Miðvági). Ein serlig tøkk fyri teirra vinsemi.

Til vinnararnar: Tillukku! J.E. Adamsen oberstloytnantur, Miðvágur.

- Nevnda barnaheim var í ætlan av bretum. M.a. var eitt skelti gjørt til barnaheimið, sum er at síggja í Krígssavninum. Men heimið bleiv tó ikki til nakað.

Timbur til líkkistur

6. juli 1943 verður skrivað til Valutamiðstøðina, Tórshavn. Viðv. tykkara kunngerð um timbur til líkkistur skulu vit loyva okkum at spyrja, um ikki ein skipan kann fáast í lag, so nakað av timbri kann liggja á goymslu í Vágum t.d. til 5 kistur, antin hjá einum persóni ella hjá einari kommunu, har so trygd verður veitt fyri, at timburið ikki verður brúkt til annað endamál. Grundin er, at tað stundum kann vera ringt at fáa gjørt eina kistu. Vit hava onkuntíð spurt, og svarað hevur verið, at tað er ómøguligt, tí einki timbur er. Um t.d. eitt fólk doyr ein mikudag, eftir at Smiril er farin av Havnini, so kunnu vit ikki fáa timbur fyrr enn næsta týsdag. Vit vænta, at Valutamiðstøðin fer at taka henda spurning upp skjótast og geva okkum boð um úrslitið.

20. juli 1943 skrivar Valutamiðstøðin og gevur loyvi til, at timbur til 5 kistur kann goymast í Miðvági og biðist skrivað aftur og siga, hvussu hetta skal skipast. Um kommunan skal

Skamtanarkort.

goyma tað ella onnur skipan skal gerast. Svarað verður aftur 27. juli og sagt, at tilfarið biðist sent til Maskinsnikkaravirkið í Miðvági, sum vanliga gera tær flestu kisturnar her. Vit hava avtalað við teir um at goyma lagerið, meðan kommunan garanterar bæði gjald og goymslu og skulu vit fylgja væl við, at tilfarið ikki verður brúkt til nakað annað. 2. august verður so skrivað til Havnar Timburhandil, Tóshavn og biðið um timbur til 5 líkkistur, har loyvið frá Valutamiðstøðini er lagt við. Viður, 40 stk. 6 fót 3/4 x 9 tumma. 5 stk. 6 fót 5/4 x 9 tumma.

Føroyskt flagg

30. desember 1943 skrivar Føroya Løgting um lóg um føroyskt flagg, løgtingsmál nr. XIII-16/1943. Løgtingið hevur við 16 atkvøðum samtykt: 1) at flaggstongin á tinghúsinum verður tikin niður og at bara stongin á vøllinum verður nýtt, 2) at føroyskt flagg verður nýtt av Føroya Løgtingi og av øllum stovnum, sum hoyra undir Løgtingið. 3) Tingið heitur á kommunurnar um at umhugsa tað sama, at tað er beint bert at nýta tað føroyska flaggið.

Grundin undir hesi áheitan í 3. punkti var, at áður var bert danska flaggið "Dannebrog" brúkt. Men Danmark var hersett av Týsklandi.

Í stuttum kann annars sigast, at føroyska flaggið "Merkið" varð viðurkent sum tjóðarmerki føroyinga av bretska hersetingarvaldinum longu tann tann 25. apríl 1940. Har m.a. øll føroysk skip skuldu bera føroyskt flagg og hava tað málað á síðunum á skipinum. 25. apríl er tí settur sum okkara flaggdagur.

Prip missionerur

17. mars 1945 rindar missionær R.B. Prip skatt til Miðvágs kommunu fyri januar- og juli hálvár 1945. Stendur so "Udgaaet" sum merkir, at hann var farin úr kommununi tá. - Nevndi Prip var annars umtalaður viðhvørt fyrr, og vóru nøkur, sum gingu til møti hjá honum í Miðvági. Tey vórðu á mannamunni nevnd "Prippar", tí tað var serstøk samkoma.

Virkir í Miðvági

Í "fíggjarskjøl" hjá kommununi 1947 liggja 13 ársroknskapir fyri ymsar handlar og fyritøkur:

S.E. Johansen, handil.	Pf. Múlin v/ Heini Joensen.
Elias Ellefsen, handil.	Pf. Miðvágs Trolarafelag v/ H.E. Perstein.
J.P. Ellefsen, handil.	Pf. Barmur v/ R. Mortensen.
Hans Samuelsen, handil.	Pf. Nøvan v/ H.M. Thomassen.

Maskinverkstaðið í Miðvági, við Gjønna.

Hansina E. Perstein, handil.
D.P. Niclasen, handil.
Emil Olsen, handil.

Maskinverkstaðið, v/ Heini Joensen.
E. Rubek-Nielsen, lækni.

Í "fíggjarskjøl" hjá kommununi 1948 liggja ársroknskapir fyri ymsar fyritøkur, har áðurnevndu eru við umframt: Alma Frederiksen, handil.

Viðm. tey vóru helst fleiri enn hesi, men eftir hesi eru ársroknskapir varðveittir hjá kommununi hesi árini.

Vildu keypa gomlu kirkjuna

Müller Petersen, Gásadali og Follend sóknarprestur, Miðvági, høvdu skrivað til Færøernes Kirkeinspektion, Tórshavn hin 11. januar 1949 og søkt um loyvi at keypa ta gomlu kirkjuna við Kirkjar í Miðvági at seta upp aftur í Gásadali. Færøernes Kirkeinspektion hevði áteknað nevnda skriv 27. januar 1949 og sent tað til sóknarstýrið í Miðvági, sum hevði áteknað skrivið 9. mars 1949 og sent tað til kirkjuráðið í Miðvági. Sum so aftur hevði áteknað skrivið 9. mai 1949 og sent aftur til kommununa.

Málið var fyri á sóknarstýrisfundi 27. juni 1949, har sagt varð, at tað snúði seg um umsókn úr Gásadali um at keypa ta gomlu kirkjuna og seta hana upp í Gásadali. Men sóknarstýrið helt seg ikki kunna gera nakað við henda spurning, og vildi tí vísa til avgerð kirkjuráðsins.

Skrivað varð hin 1. juli 1949 til Færøernes Kirkeinspektion og sagt frá avgerð sóknarstýrisins.

Júst hvat kirkjuráðið hevði viðmælt sæst tíverri ikki, við tað at skriv teirra ikki er varðveitt millum skjølini hjá kommununi. Men sigast kann so, at kirkjan varð ikki seld til Gásadals. Annars kann eisini nevnast, at nýggja kirkjan stóð ikki liðug fyrr enn í 1952, so gamla kirkjan kundi ikki seljast ella takast niður fyrr enn í fysta lagi tá. Tað hevur kirkjuráðið allarhelst nevnt. Og er teirra tilmæli tí allarhelst, at eingin søla kann verða fyrr enn í fyrsta lagi, tá nýggja kirkjan er tikin í brúk.

Kongavitjan 1949

Í juni 1949 varð lýsing hongd upp um kongsvitjan. Kongur og drotning ætla at vitja í Føroyum 23. - 27. juli, tey vitja eisini Vágar og koma á land í Sørvági og ætla eisini at koyra yvir um til Miðvágs og Sandavágs. Heitt verður á fólk um at fríðka um í bygdini og rudda upp eftir

besta førimuni. *"Minsta smáttan, ið bert er rein innan og uttanum, sigur betur frá enn orð kunnu greiða,"* verður m.a. sagt í kunngerðini.

Gávuseðil

Einaferð, helst í juli 1949, er listi skrivaður yvir tey í Miðvági, sum fingu skamtanarseðil nevndur "Gávuseðil". Á seðlunum stóð: Móti innflýggjan av hesum seðli til posthús í tíðarskeiðinum 1. - 31. aug. 1949 kann verða sendur ein gávupakki til Danmarkar. Tey, sum gjørdu brúk av hesum vóru: Agatha Geil, Anna K. Hansen, Jonhild Hansen, Thea Hansen, Klæmint Haraldsen, Absalon Jacobsen, Jógvan Joensen, í Húsi, Hildegarð Johansen, Sjúrður Johansen, Andras Johannesen, Elisabeth Johannesen, Jóhanna F. Johannesen, Thorborg Johannesen, Lena Magnusen, Jóan Jakku Olsen, Judith Kirk, Herga Geil, Betsy Hansen og Maria Z. Hansen.

Virði á pakkunum stendur eisini nevnt, bert teir yvir 100 kr. eru nevndir, hinir vóru allir undir, summir væl undir.

Fólkayvirlit

Komið var uppskot úr Løgtinginum við lóg um fólkayvirlit fyri Føroyar, har Løgtingið vildi hava kommunurnar at siga sína hugsan. Málið var fyri í forstandarskapinum í Miðvági hin 17. mai 1934. Forstandarskapið samtykti at svara, at hildið var ikki, at tað var til nakra nyttu fyri tær føroysku bygdirnar, og varð hetta svar sent.

Í brævi til Amtið 19. mai 1934 um lóg um fólkayvirlit fyri Føroyar verður sagt, at vit ikki halda hesa lóg hava nakran áhuga fyri tær føroysku bygda kommunurnar at fáa setta í verk. Í teimum føroysku bygdunum kenna øll hvønn annan, og ein veit vanliga áðrenn, nær og hvar ein persónur ætlar sær at fara, og tí er ikki neyðugt við skráseting um tað. Vit eru eisini sannførdir um, at fólk fara ikki at taka atlit til slíkar avgerðir. Vit hava somu avgerð sum til- og fráflyting í lógini um kommunalu skattaskipanina §35. Men vit kenna lítið til, at hon verður fylgd, sjálvt um hetta stendur trykt á baksíðuni á skattauppgávuni. Alt forstandarskapið hevur undirskrivað brævið.

Helst hava svarini verið nøkulunda tey somu frá hinum kommununum, tí einki fólkayvirlit kom á hesum sinni.

Men lóg um fólkayvirlit í Føroyum kom í gildið 15 ár seinni hin 31. mars 1949. Miðvágs kommuna fekk bræv frá Landsstýrinum um hetta hin 18. august 1949 og viðgjørdi málið á fundi 25. august 1949. Í gerðabókini er sagt, at Landsstýrið í brævinum lýsir atburðin við at føra yvirlitið og mælir til, at settur verður ein manntalsskrivari fyri Miðvágs sókn.

Avgjørt varð at útseta málið við setan av manntalsteljara til seinni. Tað verður tó til, at tað verða starvsfólkini á kommunuskrivstovuni, sum koma at føra fólkayvirlitið. Í roknskapinum 1949 stendur, at Albert Joensen hevði fingið goldið 216,70 kr., Jóannes Ravnsfjall, 189,70 kr., teir starvaðust báðir á kommunuskrivstovuni. Og at Maren Margretha Danielsen hevði fingið goldið 104 kr. fyri fólkayvirlitið. At trý fólk fáast við tað fyrstu tíðina er helst í samband við at skipað fólkayvirlitið og allarhelst gera eina skráseting av íbúgvunum í kommununi tá. Annars var tað seinni ein, sum dagførdi fólkayvirliti, og var tað Albert Joensen, kommunuskrivari, sum gjørdi arbeiðið tey fyrstu mongu árini og fekk eyka samsýning fyri tað.

Nýggj kirkja

2. februar 1950 skrivar kirkjuráðið í Miðvági, J.H. Samuelsen, formaður, og søkir um studning til nýggju kirkjuna. Tey siga, at vegna at Miðvágs nýggja kirkja uttan iva kemur at kosta minst 150.000 kr., meðan uppruna kostnaðurin varð settur til 100.000 kr. So verður tað helst



Kirkjan í Miðvági í gerð.

ógvuliga stríggið at fáa til vega allan hendan pening, hóast fríviligar gávur, burturlutan, "bazarir" og løgtingsstudning. Og loyva tey sær tí at søkja um fíggjarligan stuðul, so at stegur ikki kemur í.

Upplýst varð, at fíggjarstøðan var umleið hendan:

Kirkjan kostar umleið	150.000 kr.
Løgtingsstudningur	70.000 kr.
Í Sparikassa vóru	12.000 -
Peningainnsavnan 1948	6.000 -
Gjørt frívilligt arb.	8.000 -
Tann gamla kirkjan o.u.	10.000 -
Burturlutan, bazarur o.u.	17.000 –
Í alt	123.000 kr.
Írestar	27.000, kr.

Málið var fyrstu ferð á skrá til fund 7. mars 1950, men tá varð avgjørt at útseta "kirkjumálið" til ein seinni fund.

Umsóknin er so fyri aftur á fundi 17. juni 1950. Samtykt varð at veita 4.000 kr. í studningi til nýggju kirkjuna. Har útgreinað var 2.000 kr. til formar, sum helst skuldi rindast beinanvegin, og 2.000 kr. umframt, sum tað sýnist, ætlanin varð at rinda seinni.

- Kirkjan stóð liðug í 1952.

Eftir hvat ein sær, vóru tær seinni 2.000 kr. ikki rindaðar fyrr enn í 1956. Á fundi 22. mars 1956 var til viðgerðar umsókn frá Miðvágs kirkjuráð við Follend presti um studning til pípuurgu til kirkjuna. Sagt varð á fundinum, at sóknarstýrið hevði hin 17.06.1950 játtað studning til kirkjuna og samtykti nú at flyta henda studning til eina pípuurgu. Játtaði studningurin var 2.000 kr.

Innsavnan til einkjurnar í Leynum

Dagblaðið skrivaði fríggjadagin hin 10. apríl 1953 undir yvirskriftini "Samanstoytur í Vestmannasundi kravdi 6 mannalív". Í greinini er m.a. sagt: Týskvøldið hendi ein syndarlig vanlukka í Vestmannasundi, sum kravdi 6 mannalív. Fuglfjarðabáturin Norðheim, ið fór út av Vestmanna rendi saman við útróðrarbátinum Stjørnan, ið leyningar róðu út við. Stjørnan sakk, og av teimum 7 monnunum var bert ein bjargaður.

Í greinini eru fimm nevndir, sum doyðu, so har er ein gloymdur. Nevndir eru 3, sum vóru giftir og 2 ógiftir. Longur niðri í greinini er fornavnið á einum afturat nevnt, men ikki um hann var giftur ella ikki. Og so tann, sum bjargaðist, ið nevndist Mikkjal. Fimm av teim deyðu búðu í Leynum og ein í Hósvík. Hann var giftur, so har var eisini ein einkja úr Hósvík.

Sambært Dagblaðnum 10. apríl og tíðindastubba í blaðnum 25.04.1953 stóð Blaðmannafelagið fyri innsavnan til einkjurnar eftir teir seks menninar, sum sjólótust í Vestmannasundi.

Ein kundi seta seg í samband við øll tey vanligu føroysku bløðini og lata pening inn har. Bløðini nevndu so øll tey, ið høvdu latið pening til innsavnanina.

Sóknarstýrið í Miðvági hevði fund 29. apríl 1953. Fyrsta mál á skránni var innsavnanin til einkjurnar í Leynum. Innsavnanin gav 1.001 kr., og varð avgjørt at senda peningin til Dagblaðið.

30. arpíl 1953 varð skrivað til Dagblaðið. Sambært telefonsamtalu við tykkum í gjárkvøldið, hava vit í dag sent tykkum pr. postávísan, 1.001 kr. Vit viðleggja listarnar yvir innsavnanina. Eftir avtalu við tykkum í gjárkvøldið skal hesin peningur setast í blað tykkara sum innsavnaður í Miðvági.

Við avritinum av skrivinum liggja tvær postkvittanir fyri inngoldnan pening til posthúsið, á 500 kr. og 501 kr. Og upphæddin var nevnd í blaðnum nakrar dagar seinni og at hetta var úr Miðvági.

8. mai skrivaði Dagblaðið, at fundur millum umboð fyri Blaðmannafelagið, fútan, sýslumannin í Vestmanna og Kvívíkar prest verður 9. mai 1953 á Hotel Hafnia.

Og 12. mai skrivaði Dagblaðið, at innsavnanin gav gott 43.000 kr., harav Dagblaðið hevði móttikið 11.691 kr. Eitt umboð fyri blaðmannafelagið, sýslumaðurin í Vestmanna og Kvívíks prestur skuldu nú umsita peningin og fáa hann útbýttan á rætta hátt. Lagt varð afturat, at vantandi komu nakrar krónur inn afturat komandi dagarnar.

Takka fyri leitingararbeiði

3. august 1953 verður skrivað til "Midvaag sogns kommune". *"Vi vil herved gerne bringe deltagerne i det eftersøgningsarbejde, vi i mandags gav anledning til, vor tak for den store hjælpsomhed hvormed de alle så omgående gjorde et anstrengende og hurtigt arbejde for at forhindre at vor fjeldtur skulle få alvorlige følger. Da det er os umuligt personligt at takk alle deltagerne,- fra Sørvåg, fra Bø og Gåsedal, fra Midvåg og fra Sandevåg og Slettenæs, - vil vi bede forstanderskabet om at viderebrinde vor allerbedste tak."* Skrivað undir hava: Finn Landau, Jørgen Lützen, Anton Vinge, Henrik Kemp, Vibeke Elkjær-Hansen og Jørgen Bang.

Dimmalætting skrivar um tilburðin hin 28. juli 1953 undir yvirskriftini *"Dramatiske Nattetimer paa Vaagø."* Týtt úr donskum: Eitt ferðalag úr Tórshavn við m.a. ríkisumboðsmanninum, Elkjær Hansen og frúu, fulltrúunum, Nørager og Kem og Bang lækna, sum er sendur higar av Sundhedsstyrelsen, fóru sunnumorgunin við "Thorshavn" til Vágar á eina dagsferð. Sunnudags útferðin fekk tó eina rættuliga dramatiska vend, tá seks av luttakarunum á einum túri til Fjallavatn í tjúkkari toku viltust, samstundis, sum tey vórðu álopin av leysgangandi tarvum. Tá tey seks ikki vóru afturkomin til Miðvágs við hinum luttakarunum ta ásettu tíðina, varð eitt umfatandi leitingararbeiðið sett í verk. Út við hundrað menn úr Miðvági, Sørvági og Sandavági vóru sendir at leita. Leitað varð alla náttina til í gjár, uttan úrslit. Men, í teim snimmu morguntímunum í gjár vórðu tey øll funnin og høvdu tað gott. Fýra høvdu leitað til nærmastu bygd, sum var Gásadalur. Og tey seinastu tvey vóru funnin av mannskapinum úr Sørvági í einari smáttu við Fjallavatn.

Statsministarin og fíggjarnevnd takka Miðvágs kommunu

31. august 1956 skrivar statsministarin København. *"Sogneforstandarskabet bedes modtage min hjerteligste tak for den meget venlige modtagelse, man gav mig i Midvaag. Med venlig hilsen H.C. Hansen."*

Annars skrivaði Finansudvalget København hin 16. juli 1958 til Miðvágs kommunu, og sendi eina tøkk í smb. við góða og hjartaliga móttøku her, tá ið tey vitjaðu.

Kongsvitjan 1959

10. juni 1959 liggur eitt mál í smb. við kongsvitjanina í 1959 og skjøl hesum viðvíkjandi. Ódagfest bræv frá Vilh. Christiansen a/s, Bredegade, Keypmannahavn, sum siga, at tíverri varð ordrin komin ov seint, so vørurnar kunnu ikki sendast við "Tjaldur" fyrr enn 16. h.m.

10/6-59. Telegram sent til Danmarkar (ólesiligt til hvønn – helst Vilh. Christiansen) har vørur, sum eru bestiltar til Miðvágs kommunu, verða avlýstar.

11/6-59 skrivar Landsstýrið og gevur serloyvi til at bestilla rúsdrekka í smb. við kongsvitjanina 25. juni í ár. – Við liggur umsókn frá kommununi dagf. 04.06.59 har biðið verður um loyvi at innflyta: 6 fl. Akvavit. 6 fl. Gin. 6. fl. Whiskey, ið skulu nýtast til kongsvitjanina í Vágum 25. juni 1959.

11/6-59 skrivar ríkisumboðsmaðurin Tórshavn, viðv. kongsvitjanini. Sagt verður, at innbjóðingar til reseptión umborð á kongaskipinum "Dannebrog" eru sendar út. Klæðing til hesa vitjan er galla ella kjóli, síðustillað við hetta eru føroysk klæðir. Tó verður viðmerkt, at eingin má halda seg aftur vegna klæðir, gestir eru eisini vælkomnir í myrkum klæðum. Vh. N. Elkjær Hansen.

Døgurði fyri teimum kongaligu og innbodnum var í hotellinum í Miðvági hjá Hans Jacob Niclasen. Sum sæst, var nógv fólk samankomið uttanfyri hotellið.

11/6-59 skrivar Ríkisumboðsmaðurin, Tórshavn. Vísandi til samrøðu skal verða sagt, at tann broyting er gjørd við kongsvitjanini í Vágum hin 25. juni h.á., at majestetarnir við fylgi koma í land við chalup í Sandavági. Koman uttanfyri Sandavág er kl. 17.30. Móttøkan endar kl. 18. Á kaiini bjóðar forstandarskapsformaðurin Niels Marius Petersen vælkomin, og verður so vitjað í Sandavágs kirkju. Harfrá koyra bilar til Miðvágs, har teir væntandi koma kl. 18.30, har tað er reception. kl. 19 verður koyrt frá Miðvági til Sørvágs, har tey koma kl. 19.30, har forsandarskapið bjóðar vælkomin. Kl. 21 er reception umborð á "Dannebrog", sum beint eftir siglir av Sandavági og til Sørvágs.

23/6-59 skrivar ríkisumboðsmaðurin og sendur við nágreiniliga ætlan fyri kongavitjanina í Føroyum dagarnar 24.06 til 26.06.1959. Har tey so vitja í Vágum kvøldið 25.06. Við á ferðini úr Danmark eru m.o. Fríðrikkur kongur, Ingrid drotning og prinsessurnar Margretha og Benedika. Harumframt eru statsministarin H.C. Hansen við frú, undervisningsministeren Jørgen Jørgensen við frú, departementschef J. Elkjær Larsen, ministersekretær H. Hjortdal. Umframt starvsfók við hóvið. Við móttøkuna í Sørvági eru m.a. løgmaður og varðaløgmaður og løgtingsmenninir í Vágum, kommunulæknin, sýslumaðurin, D.Danielsen skúlastjóri í Sørvági, umframt forstandarskapslimirnir í Sørvági, Sandavági, Miðvági og Bø. Allir við frúum. Fyrrv. løgingsmaður og sóknarstýrisformaður í Miðvági, Søren Danielsen, er eisini við. Umframt umboð fyri Norðstreymoy: bygdaráð, kommunulæknar, sýslumenn o.s.fr. og umboð fyri S.E.V. m.a. og so ovastarnir fyri donsku myndugleikarnar í Føroyum.

Smb. roknskapinum 1959 hevði H.M. Thomasen fm. sent kommununi rokning á 999 kr. vegna kongsvitjan. Poul Hansen heilsøla, fløgg, 1.915 kr. Gongin, Tórshavn, vegna kongavitj., 75 kr. H.M. Thomasen, Gotfred Joensen, rokn. kongav., 150 kr.

Fólkafundur

Millum skjøl frá 1959 lá eitt ark við skrá og sangum til ein fólkafund. Skráin var henda: 1. GHM spælir eitt lag. 2. Felagssangur "Prúða land". 3. Jóan Hendrik Winther Poulsen flytur fram røðu. 4. Felagssangur, "Sól yvir havið".

Um fundurin varð hildin í Miðvági ella nær, er óvist, men hugsandi.

Uppskot um kristiligt bygdarhús

Kommunan fekk bræv, sent 9. februar 1960, við undirskrift frá fleiri felagsskapum og persónum í kommununi. Vit undirritaðu við fleiri halda tað verða neyðugt at byggja eitt bygdarhús við tí endamáli, at samlast um kvøldarnar við ymsum uppbyggjandi tilfari, so sum samkomur, fyrilestrar og mangt annað, serliga verður hugsað um ungdóm okkara. Vit heita tí á okkara háttvirda sóknarstýri um at fáa eitt grundøki til nevnda endamál onkustaðni heimanfyri kommunuhúsið, millum vegirnar. Húsið er ætlað av vera uml. 14 x 25 alin stórt og verður bygt á kristiliga grund, fær navn og stýri. Vit vóna at sóknarstýrið gevur sítt viðmæli til hesa góðu og týdningarmiklu søk.

Fyri "Heimamissiónina" *Elias Ellefsen*. Fyri "D.M.S." *Dagmar Joensen*.

Fyri "Bláakross" og "Håbet" *Hansias F. Skarðhamar* og *Hilmar Poulsen*.

Fyri "D.M.S." barnaarbeiði, *Sofie Højgaard Ellefsen*.

Vit undirritaðu vilja gera okkara besta fyri hesa søk og geva við hesum okkara besta viðmæli.

J. Niclasen, A. Jørgensen, D.J. Niclasen, M. Joensen-Næs, Elias Poulsen, Ludvig Jacobsen, Johan T. Magnusen, Christian Johannesen.

Málið var fyri á fundi, 24. februar 1960. Samtykt varð at goyma hetta mál til ein seinni fund.

Meira sæst so ikki til hetta mál.

Semja um afturlatingartíð

D.P. Niclasen, keypmaður, skrivar hin 6. mai 1960 til kommununa. Frá og við 15. apríl 1960 eru undirritaðu samdir um, at steingja handlar okkara hvønn mánadag, týsdag, miðvikudag og hósdag kl. 17.00. Hvønn fríggjadag kl. 19.00 og hvønn leygardag kl. 14.00. Latið verður upp kl. 8.00.

Skriva undir hava 6 handilsfólk í Miðvági: D.P. Niclasen, Gotfred Joensen, vegna Andrias Joensen - K. Svabo, Alma Frederiksen, Albin Wang og Elias Ellefsen.

Málið var fyri á fundi, 6. mai 1960. Bræv frá 6 handilsfólkum í bygdini um at fáa broytt afturlatingartíðina. Eftir lóg nr. 16 frá 13. apríl 1955 kann sóknarstýrið við samtyktini frá Landsstýrinum avgera, at stongt verður soleiðis:

Mánadag, týsdag, mikudag og hósdag opið til kl. 17.00.

Fríggjadag opið til kl. 19.00.

Leygardag opið til kl. 14.00, apríl til september, og opið til kl. 16.00, oktober til mars.

Miðvágs sangfelag

Ódagfest og uttan árstal (helst einaferð í 1960) skrivar Miðvágs Sangfelag. Miðvágs Sangfelag keypir orgul til nýtslu hjá felagnum og til skúlabrúks. Hvør vil styðja okkum peningaliga? Felagsins vegna. Nevndin.

Á brævinum er ein listi gjørdur, har fólk kunnu skriva navn sítt á og krónu og oyratal. 16 fólk hava set navn sítt á listan og hava sett seg fyri at stuðla í alt við 517,75 kr. Av teimum hevur Sørin Danielsen stuðla við 275 kr. og Hans Arni Ellefsen við 107 kr. Hini øll við smærri upphæddum.

Sóknarstýrið sæst ikki at hava viðgjørt málið, og tíverri er ikki nevnt, hvør sat í nevndini í felagnum. Sørin Danielsen var ikki longur limur í sóknarstýrinum tá.

Kongaligt brúdleyp

10. juni 1967 kl. 13.30 verður telegramm sent. "Kongelige højheder prinsesse Margrethe og prins Henrik. Hjartaliga tillukku á brúdleypsdegnum. Miðvágs sóknarstýri."

17. juni 1967 kl. 9.45 er telegramm komið. Frederiksborgs hof. Miðvágs sóknarstýri. "Hjertelig tak for serlige lykkeønskninger på bryllupsdagen. Margrethe, Henrik."

Grót úr "Brendugrund" til garð um kirkjuna

Á sóknarstýrisfundi 13. mai 1969 var til viðgerðar skriv frá kirkjuráðnum í Miðvági, Høgni Poulsen prestur, har kirkjuráðið søkir um at fáa grótið úr tí sonevndu "Brendugrund" til garð um kirkjuna framvið landavegnum.

Brendagrund er grund har pakkhús og handil hjá fyrst Godtfred Heinesen, og seinni hjá Rasmus Niclasen stóð, sum brendi tíðliga í fyrru øld. Seinni nevnt Brendagrund.

Sóknarstýrið varð einmalt á einum máli um, at lata grót, tó má tað niðan móti vegnum inn á kaiina ikki takast og heldur ikki báðir endarnir av grundini. So at tað, sum er eftir av grundini, kann verða standandi.

Kongsvitjan 1969

Í sambandi við kongsvitjan í 1969 fekk kommunan rokning frá Gert Joensen Miðvági hin 16. juli 1969, fyri at hava arbeitt við heiðursportri til kongsvitjanina. 9 tímar dagarnar 05.07. til 07.07., tils. 131 kr., sum varð goldið honum.

18. juni 1970 varð felags uppgerð yvir kostnaðin av kongsvitjanini gjørd. Uppgerð yvir útreiðslur hjá Miðvágs kommunu viðv. reseptión á Giljanesi undir kongsvitjanini í juli 1969. Albin Wang handil vín o.a. 600 kr., D.P. Niclasen handil sigarir o.a., 196,50 kr., Asbjørg Weihe servering, Paula Svabo servering, Thordis Hansen servering og Marianna Wang servering, 85 kr. hvør. Pf. Gotfred Joensen ljós o.a., 10,45 kr. Pf. Thomas Dam & Co., lán av gløsum 83 kr., S.E. Johansen sigarettir 8 kr., Einars Prent og forlag, prentlutir 85 kr., Albin Wang koyring 40 kr., Dandastova, Gongin,blómur, 152 kr Andrias Joensen, lossing, vørugjald o.a.,7,50 kr. og Gongin, Tórshavn, vørur 71 kr. Tilsamans 1.593,45 kr.

Sambært avtalu varð henda útreiðsla at býta soleiðis millum Miðvágs-, Sørvágs- og Sandavágs kommunur, 531,15 kr. hvør, 1.593,45 kr. tilsamans.

Vatnsoyrar 50 ár

Skrivað verður hin 20. oktober 1971 til: "Íbúgvararnar í Vatnsoyrum. Til áminningar um 50 ára dagin, hin 20. oktober 1971, fyri búseting av bygdini Vatnsoyrum.

Sørvágs sóknarstýri, Miðvágs sóknarstýri, Sandavágs sóknarstýri, Bíggjar sóknarstýri."

20. oktober 1971 skrivar Miðvágs kommuna til Dánjal Nielsen, Vatnsoyrum. "Sóknarstýrið í Miðvágs sókn ynskir íbúgvunum í Vatnsoyrum hjartaliga tillukku við 50 ára búsetingardegnum. Heilsan Miðvágs sóknarstýri."

- Út frá hesum er Dánjal Nielsen, vanliga nevndur Dollin, helst mettur sum ein høvuðsmaður ella talsmaður í Vatnsoyrum hesa tíðina.

Ídnaðarvirkir í Miðvági 1972

Skrivað verður til Føroya Ídnaðarfelag, Skansavegur 1, Tórshavn hin 2. desember 1972, sum svar uppá skriv 30.11.1972 viðv. fyrispurningin um hvørji ídanaðarvirki vóru komin í Miðvági í 1972. Svarað verður, at:

1. Frysti- og flakavirki hjá Pf. Snarfrost, Miðvági, bleiv tikið í nýtslu umleið 1. januar 1972 *(viðm. varð tikið í brúk 27.12.1971).*
2. Smiðuverkstaðurin hjá J.K. Joensen & Sonur, Miðvági, hevur bygt eina nýggja verksmiðu

uppá 32 x 52 metrar til støddar, og er hetta, ið bygt er, í samband við ta gomlu smiðjuna, og er hetta nú tikið í nýtslu.
3. Johnfinn á Plógv, bygninssnikkari, Miðvági, hevur um 1. januar 1972 fingið sær bygningsverkstað í Miðvági.

Hvat viðvíkur stovningarpeninginum hjá omanfyri nevndu virkjum er at siga, at vit ikki so væl kunnu upplýsa, hvat hvør hevur í stovningarpeningi, men Pf. Snarfrost skuldi partapeningurin liðið um 760.000 kr., men hjá hinum báðum duga vit einki at siga um, men ivaleyst fáa tit at vita um hettar við at venda tykkum til teir teir sjálvar. K.v., *J.A. Joensen*.

Vitjan av danska sosialráðharranum og av flognevndini

29. september 1973 er uppgerð yvir kostnaðin av vitjan av danska sosialráðharranum í 1973, og vitjan av flognevndini í Bø 1972.

Tey, sum hava fingið samsýning vóru:

Samsýning vegna vitjan av flognevnd í 1972. Føroya Flogfelag lagt út 458,50 kr.

Samsýning vegna vitjan av sosialráðharranum í 1973. Gunnvør Hansen 350 kr., Ellis- og Avlamisheimið 293,67 kr., S.E. Johansen 255 kr., Jenny Hansen 213,84 kr., Pf. Vestmanna Fiskavirki 170 kr., Josepha Hattarstein 166,90 kr., Súsanna Hansen 150 kr., Eilif Weihe 93,25 kr., Norðistovuhandilin (Pf. N. Niclasen) 85,50 kr., Pf. Snarfrost 216 kr., Dandastova, Tórshavn, vørur 59 kr., Jens Eli Ellefsen 30,90 kr. og Helgi Øre 15,25 kr.

Hetta varð býtt millum Sørvágs-, Miðágs- og Sandavágs kommunur við 852,60 kr. hvør. Í alt 2.557,81 kr.

- Tað var Jacob Sørensen, Venstre, sum var danskur innanríkis- og sosialráðharri í stjórn 1973-1975.

Uppskot um minnisvarða fyri Mikkjal á Ryggi

Hjalmar Johansen, Miðvági, hevði sent bygdaráðnum skriv har spurt varð, um bygdaráðið hevði umhugsað at reist ein minnisvarða fyri Mikkjal D. á Ryggi, sum varð føddur 17.10. 1879. - Helst við hugsanini at reisa minnisvarða á 100 ára føðingardegnum.

Samtykt varð á fundi 6. oktober 1977 at svara, at bygdaráðið ikki helt, at hetta var eitt mál, sum kommunan átti at vera vera fremst í, men um brævskrivarin sjálvur vildi, so kundi hann samankalla til fund millum bygdafólkið, har so ein nevnd kundi verið vald til at taka sær av málinum.

- Men hetta bleiv so ikki til nakað á hesum sinni.

Økið á Tungu og gamli kirkjugarður friðað

At gera viðarlund á Tungu var ikki nakað nýtt mál í 1980, tað hevði verið frammi fleiri ferðir áður. Fyrstu ferð ein sær ítøkiligar ætlanir um hetta er skriv frá Færøernes Plantagenevn, dagfest 06.10.1966, har málið var fyri á sóknarstýrisfundi, 23.02.1966, har sagt var, sóknarstýrið helt ikki umstøður vera at gera hetta fyribils.

Tað er so 14 ár seinni, hin 16. januar 1980, at Miðvágs kommuna hevur undirskrivað "Friðingarbræv" á lendini matr. nr. 233a, sum er økið hjá kommununi á Tungu og Gamli kirkjugarður við Kirkjar, og martr. nr. 233æ (matr. nr. sum ikki finnist longur) og matr. nr. 80, sum er trýkanturin omanfyri Gamla kirkjugarð við kirkjar. Hetta er friðað undir "Skógfriðing" og her verður helst hugsað serliga um ætlaðu viðarlundina á Tungu. Har kommunan lovaði seg til at stika økið inni og halda stikingina og at planta trø í økinum og halda økið við líka, stendur m.a. í skjalinum. Við fylgir eisini eitt kort yvir økið á Tungu og eitt skriv, har sagt verður, at ætlanin er leygardagin 9. mai 1980 kl. 13.30 at hava ein "gróðurset eitt træ-dag". Har heitt verður á fólk um at koma við at gróðurseta eitt træ hvør. Um børn koma, mugu foreldrini vera við. Niðast er viðmerkt:

Ein viðarlund gróðursett av okkum øllum somlum,
er eitt prýði hjá bæði ungum og gomlum.
Eitt træ planta í dag,
stendur um fimti ár í sama lag."

Nevndur er so ein listi yvir træsortir ætlanin var at planta: Fjallafura, Lerkur, Pílur, Bjørk, Sitkaran og Ahorn.

Maskinskrivað gerðabók

Í 1981 var enn ein nýggj gerðabók tikin í brúk. Hendan var fyri bygdaráðið, 01.01.1981 til 31.12.1984. Nýggja bygdaráðið hevði havt ein fund 29. desember 1980 til at skipa seg, áðrenn teir tóku við.

Hesaferð var tann broyting, at gerðabókin var maskinskrivað, og at fundirnir tí vóru á leysum arkum, og ikki í bókum, sum áður. Fundarfrásagnirnar vóru goymdar í hálvtjúkkum brævmappum, ein fyri hvørt bygdaráð (fýra ár hvør) frameftir, heilt til 2008.

Við nýggju gerðabókini varð farið yvir til ein nýggjan form at føra gerðabók, ein formur, sum varð gjøgnumførdur øll árini, heilt til seinasta fundin í 2008. Tað var at hava 2 kollonir á sama arki til málini. Á vinstru kollonu vóru øll mál skrivað á maskin (ella seinni á teldu), nr. og hvat tað snúði seg um.

Yvirav, á høgru kollonu, væl smalri enn vinstra, var avgerðin til hvørt máli sær skrivað.

Eisini varð numreringin av málunum broytt soleiðis, at fyrsta málið eitt ár var nr. 1 við árstalinum aftanfyri og so helt tann talrøðin fram alt árið. Heldur enn sum áður, bert fyri hvønn einstakan fund.

Gávubræv uppá Beitishúsini

D.P. Danielsen, sakførari, hevði sent bygdaráðnum gávubræv uppá Beitishúsini vegna allar eigararnar. Fyri fund 27. august 1982 stendur í gerðabókini, at bygdaráðið hevði frammanundan samtykt at keypa húsini til bygdarsavn, um sølutreytirnar vóru rímiligar. Støða skuldi sostatt takast til, um bygdaráðið helt treytirnar vera í lagi og harvið vildi taka ímóti gávuni. Samtykt var at taka við hesum gávubrævi.

13. juni 1983 verður skrivað til Pf. Thomas Dam & Co., Tórshavn og bestilt 3 lás og 6 lyklar til húsini "Beiti". Umframt 2 lás og 4 lyklar til somu hús til goymslu.

Á bygdaráðsfundi sama dag er á skrá bræv frá Mogens Birch viðvíkjandi oljufýri í Beitishúsunum, fyri Osvald Hansen. Hann kravdi 20.000 kr. fyri ketilin og oljufýringina, ella at gera semju í málinum. Samtykt ikki at gera nakra semju um hetta.

Hetta endar so við, at viðkomandi leggur sak móti kommununi í hesum máli. 30. mars 1984 skrivað Kári Dalsgaard Petersen advokatur og Turid Debes Hentze advokatur og siga, at dómur var fallin í sakarmálinum millum Osvald Hansen og Miðvágs kommunu. Rætturin kom til tað úrslit, at kommunan skuldi gjalda Osvald Hansen 8.817 kr., men hvør partur skuldi bera sín sakarkostnað. Sakførarin segði: "Eg eri eitt sindur í iva um dómurin er rættur, t.v.s. um tað er rætt, at kommunan skal gjalda nakað, men hinvegin haldi eg ikki, at kommunan skjal leggja málið fyri Landsrættin. Eg vil mæla til, at kommunan rindar Osval Hansen upphæddina, 8.817 kr. Eg loyvi mær at hjáleggja rokning fyri sakarkostnað."

Smb. kvittan á skjalinum hevði kommunan útreiðslufört 8.817 kr., t.v.s. goldið manninum upphæddina.

Bygdaráðið hevði málið til viðgerðar á fundi 7. apríl 1984. Samtykt var, at taka við dóminum.

Í uppgerð fyri rakstur av Beitinum roknskjaparárið 1985 sæst, at kommunan hevði hetta

árið rindað 14.183 kr., til S.E.V., brunatrygging og til Pf. Esso, vegna Beitishúsini. Og í 1986, 20.194 kr., har nakað av viðlíkahaldi var uppi í eisini. Tað er so nøkulunda upphæddin nýtt verður til Beitishúsini árliga.

Á almennum bygdarráðsfundi 30. mai 1988 var á skrá, at Mentamálanevndin legði fram uppskot frá Fornminnissavninum um ístandsetan av Beitishúsunum. Mælt varð til, at arbeiðið byrjaði í summar. Hesum tók fíggjarnevndin undir við. Samtykt varð at arbeiða fyri tann pening, ið var avsettur á figgjarætlanini, 50.000 kr. Herafturat kundu 20.000 kr. flytast av konto fyri fornminni til hetta arbeiði.

Siga húsini frá sær aftur

Á almennum bygdaráðsfundi 1. desember 1989 verður uppskot frá fíggjarnevndnini samtykt. Tað gekk út uppá at lata ognina aftur til fyrrverandi eigararnar. Samstundis varð mælt til, at siga Eyðfinni Christiansen upp sum leigara av húsunum. - Hann hevur so búð har tá.

Bygdaráðið samtykti, at Miðvágs kommuna frásegði sær gávubrævið, vegna tess, at kommunan ikki fíggjarliga sá seg føran fyri at yvirhalda tær treytir, ið vóru álagdar kommununi í nevnda gávubrævi. Sambært roknskapinum sama ár hevði kommunan hetta árið brúkt 40.900 kr. upp á Beitishúsini.

Frá og við 1990 vóru Beitishúsini ikki nevnd í roknskapinum undir ognir hjá kommununi.

Stuðul frameftir

Annars stuðlaði kommunan viðlíkahaldi av húsunum nakað komandi árini. Á bygdaráðsfundi 20. mars 1995 var til viðgerðar, at Vága Dansifelag hevði søkti um stuðul at seta "Beitishúsini" í stand fyri. Bygdaráðið samtykti at stuðla við 20.000 kr. og treytaði sær, at peningurin varð nýttur til ung arbeiðsleys at laða garð fyri.

Í einum skrivi frá kommunun í juli hetta árið vóru húsini í Beiti í Miðvági nevnd sum barnaheim Mikkjals á Ryggi og sum eitt fornminni í bygdini, og at húsini í løtuni vórðu umvæld.

Á fundi 24. februar 1997 var til viðgerðar umsókn frá Vága Dansifelag um fíggjarligan stuðul at seta Beitishúsini í stand fyri at nýta sum felagshús. Fíggjarnevndin mælti til at stuðla við m.a. at laða garð, hampa og fríðka uttanum húsini við upp til 20.000 kr. Hesum tók bygdaráðið undir við.

Og á fundi 7. mai 2002 var fyri umsókn frá Beitisnevndini um stuðul til liðugtgerð av Beitishúsunum. Samtykt varð at stuðla við 40.000 kr.

Vága Dansifelag stendur í Kortal.fo frá 13. juni 2003 sum eigari av Beitishúsunum.

Dagbók um ferð í Ryggskorð 1982

Í skjølum hjá kommununi fyri 1982 liggur eitt skjal nevnt "Dagbók hjá Hans Jørgensen um ferð í Ryggskorð 1982." Dagbókin sum er maskinskrivað og heft, fevnir um 7 A4 síður og er um dagarnar 25. september og 27. september 1982.

Vinarbýarsamband við Keflavík

Støðutakan til vinarbýarsamband við Keflavik í Íslandi var til viðgerðar á bygdaráðsfundi, 12. september 1985. Samtykt at taka upp vinarbýarsamband og at fara í samráðingar um hetta.

Hetta endaði so við vinarbýarsamstarvi við Keflavík.

Frá fundi 1. juni 1987 varð sagt, at bygdarráðið var bjóðað at vitja vinarbýin Keflavík í juli mánaði í ár. Fimm bygdarráðslimir høvdu játtað at vera við, herav 4 høvdu konu við. Kostnaðurin var mettur til 20.000 kr. Hetta varð samtykt.

Búmerkið hjá Miðvágs kommunu.

Búmerki til kommununa

Sámal Jákup Jørgensen setti á bygdaráðsfundi 24. november 1986 framm uppskot um, at Miðvágs kommuna fekk egið búmerki, og at tað varð útskrivað hugskotskapping um hetta. Mentanarnevndin tók undir við uppskotinum og mælti til, at fíggjarnevndin ásetti virðisløn. Tað hevði fíggjarnevndin so longu gjørt, og vórðu ásettar hesar virðisløn: 1) 3.000 kr., 2) 1.500 kr. og 3) 1.000 kr. Bygdaráðið samtykti, at bjóða út kapping.

Kapping til búmerki varð so útboðin og inn komu fleiri uppskot.

Innkomnu uppskotini vóru til viðgerðar á bygdarráðsfundi 4. mai 1987. Val av búmerki fyri Miðvágs kommunu. Innkomnu uppskotini vóru øll í lokaðum brævbjálvum og loynilig, so ein ikki sá, hvør átti uppskotini, fyrr enn endalig avgerð var tikin.

Av innkomnu uppskotunum, sum øll vóru numrerað, var sum nr. 1 valt uppskot uppskot nr. 7. Sum nr. 2 var valt uppskot nr. 29 og sum nr. 3 var valt uppskot nr. 13.

Hereftir vóru so lokaðu brævbjálvarnir, sum vóru saman við uppskotunum, opnaðir og tað vísti seg, at vinnararnir vóru hesi:

Nr. 1 var Jón Ellendersen, Íslandsvegur, 100 Tórshavn.

Nr. 2 var Oddmar Ravnsfjall, 370 Miðvági.

Nr. 3 var Turid Olsen, 360 Sandavági.

Tað varð sostatt Jón Ellendersen, Tórshavn, sum hevði heiðurin av at hava teknað búmerkið hjá Miðvágs kommunu, sum varð nýtt frá 1986 og fram til endan av 2008.

Búmerkið varð so sett á konvoluttar og á brævhøvdið á skrivunum frá kommununi, og nakað seinni, frá 13. september 1991, varð búmerkið eisini sett ovast á ørkunum við fundarfrásagnunum hjá bygdaráðnum.

Seta pening í íognarfelagið Vágatunnilin

Á almennum bygdarráðsfundi 21. desember 1987 var á skrá støðutakan til íognarpening í I.F. Vágatunnilin uppá 188.000 kr. Eftir tilmæli frá fíggjarnevndin varð samtykt at seta hesa upphædd í felagið.

Málið var fyri aftur á fundi 1. februar 1988. Endalig støðutakan um innskot í íognarfelagið "Vágatunnilin".

Bygdaráðið samtykti at gerast íognari í íognarfelagnum Vágatunnulin við innskotspeningi á 188.000 kr., soleiðis sum samtykt varð á stovnandi fundinum 2. december 1987. Avrit varð sent til Kára D. Petersen, sakførara.

Gjøgnum felagskommununa hevði MK smb. roknskapinum rinda 30.000 kr. til felagið Vágatunnilin í 1988. - Annars varð innskotspeningurin rindaður eisini.

Á bygdaráðsfundi 5. juli 2000 var havdur á loftið spurningurin um ÍF-Vágatunnilin skuldi avtakast og innskotspeningurin endurrindast kommununum. Fíggjarnevndin mælti til at avtaka felagið ÍF-Vágatunnilin og fáa okkara part av innskotspeninginum endurrindaðan. Hetta varð samtykt.

Annars kann í stuttum sigast, at Vágatunnilin varð tikin í brúk hin 10. desember 2002 við stórum hátíðarhaldi við tunnilsmunnan Vágamegin.

Gróthúsini við Gróthústanga

4. oktober 1988 skrivar Lions Club, Vágar: "Viðvíkjandi endurreisan av gróthúsum. Tá vit hava biðið kommununa um at stuðla endurreisan av gróthúsum niðri við Vatn, er tað upp á sítt pláss, at geva eina frágreiðing um, hvat ið gjørt er og ætlanin er at gera. Og samstundis upplýsa hvat kostnaðurin hevur verið av húsinum, sum er í gerð. Sum tit hava sæð, er hetta eitt dupulthús, har onnur helvtin var í góðum standi, men hevði jarntekju, og alt timbur var vánaligt. Hin helvtin var so at siga ein vanlig grund, sum mátti takast langt niður, áðrenn laðað varð upp aftur. Nú er so húsið laðað upp aftur, øll yvirtromin er nýggj, og somuleiðis allar hurðar. Eftir er at leggja "dobbaplast" og flag á, og hongsul á nakrar hurðar.



Stóra myndin er úr blaðnum Magn, 1978, har gróthús eru niðurfallin. Minna myndin er frá 1993 av gróthúsið, sum tá er sett í stand aftur.

Kostnaðurin fyri húsið, arbeiðið, ið Regin á Loftið hevur gjørt, er: Grótlaðing, lagt sillar og sperrur á, lagt tróður á, ger av hurðum o.a. 19.000 kr. Tilfarð: Sillar, hurðar, hongsul, sandur, sement og koyring, 8.000 kr. Tilfarð til sperrur og tróður er latið uttan kostnað. Nakað av sjálvbodnari arbeiðsmegi er eisini nýtt, so sum til at taka gamla takið av og henta grót. Eisini hava vit fingið frítt el. Roknast má við, at nýtast skulu um 3.000 kr. afturat, fyri at faa húsið liðugt. Lions Club hevur avsett um 25.000 kr. til endurreisan av gróthúsum."

Lions Club Vágar skrivar 4. oktober 1988 annað bræv til kommununa: "Sum tit kanska eisini hava sæð, eru vit byrjaðir upp á eitt hús afturat. Á hesum húsinum var yvirtromin vánalig og fyri ein part samanfallin, eisini er grundin illa farin í støðum, yvirtromin er tí tikin av, og má ein partur av grundini takast niður, áðrenn byrjað verður at laða uppaftur. Peningurin sum vit hava ásett til endamálið, røkkur ikki til alt hetta, og var tað tí vit settu okkum í samband við kommununa fyri at fáa stuðul til tiltakið. Vit og nógv onnur eru av tí áskoðan, at tað er í tøkum tíma, at stig verður tikið til at varðveita nøkur av gróthúsunum, sum veruliga eru eitt prýði fyri umhvørvið, um tey standa uppi í heilum líki. Viðvikjandi eigaraviðurskiftunum er avtlan at gera sáttmála, har tey, sum nú eiga húsini, átaka sær at halda húsini í góðum standi, annars falla húsini til ein felagsskap, so sum forminnisfelagið. Við heilsan Lions Club, Vágar.

P.S. Væntandi kemur tað húsið, ið vit eru byrjaðir uppá, at kosta umleið tað sama sum tað fyrra ella um 30.000 kr."

Umsóknin er fyri á fundi 17. oktober 1988. Fíggjarnevndin mælti til at stuðla við 20.000 kr. Hatta samtykti bygdaráðið, og at peningurin skuldi gjaldast, tá uppgerð fyrilá.

- Annars eru fleiri gróthús á Gróthústanga, sum staðið er nevnt, sett í stand seinni.

Vága Vinnufelag

Uppskot til viðtøkur fyri felag nevnt "Vága Vinnufelag" varð gjørt 23. februar 1989, har m.a.

kommunurnar ætlaðust at vera limur. Smb. skrivinum vóru onkrar smærri broytingar gjørdar í gein 3 hin 9.6.1990. Viðtøkurnar vóru annars í 20 greinum.

Grein 1 segði, at navn felagsins var Vága Vinnufelag. Grein 2. Limir í felagnum kunnu vera allir persónar, øll feløg og allar fyritøkur í Vágum, sum reka vinnuligt virksemi. Limalisti verður fórdur yvir allar limirnar. Grein 3. Felagið, sum er ein samlaður, sjálvstøðugur og óheftur felagsskapur, verður býtt upp í deildir, umboðandi tær ymsu vinnugreinarnar í oynni. Í fyrsta lagið verður uppbýtt í hesar deildir: 1. Fiskavirkini. 2. Fiskiskipini. 3. Vinnufyritøkur. 4. Virkisfyritøkur. 5. Fakfeløg. 6. Tænastuvinnan. 7. Kommunurnar í Vágum. Grein 4 sigur ymiskt um endamálið hjá felagnum, sum var at virka fyri útbygging av vinnulívinum í Vágum, menna samstarvið millum somu og vera bindilið millum hesi og bygdaráðini o.s.fr. Smb. grein 8 skuldi felagið stýrast av eini nevnd, sum varð vald við limum úr teim ymsu vinnugreinunum, nevndar í Grein 3, og skipaði seg við formanni og næstformanni, stendur m.a. í viðtøkunum.

21. mars 1990 verður skrivað frá kommununi til Tummas Lauritsen, sum svar upp á skriv 5.3.1990 um stovnan av Vága Vinnufelag. Sagt verður, at skrivið er latið til fíggjarnevnina hjá kommununi hin 27.3. til viðgerðar.

Felagið verður nevnt í gerðabókini og í skrivum hjá kommununi frameftir. Fyrsti formaðurin sýnist at hava verið Hugo Fjøroy.

Men felagið dettur so niðurfyri longu fyrst í 1990-unum. 18. juni 1996 skrivar Vága Vinnufelag. "Til allar limirnar og onnur áhugað. Eftir áheitan hevur nevndin í Vága Vinnufelag á nevndarfundi tann 17. juni 1996 gjørt av at royna at endurstovna felagið, sum ikki hevur verið virkið nú í nøkur ár. Vit fara at kalla inn til aðalfund í Vága Vinnufelag hóskvøldið tann 27. juni 1996 kl. 19.00 í kantinuni hjá J.K. Joensen og Soni. Fundarskrá sambart lógum felagsins. Hugo Fjørðoy, form."

Í juni 1996 verður felagið endurstovnað og virkar seinni t.d. í stórmálinum, tá Vágatunnilin varð gjørdur. Felagið var eisini áhugað í m.a. oljuvinnuni, sum hevði stóran áhuga hesa tíðina.

Felagið skrivaði hin 4. oktober 1996 og segði, at á aðalfundi tann 27. juni 1996 var samtykt at endurstovna felagið, og at fyribils nevndin skuldi fara í gongd við at skráseta limir av nýggjum. Nevndin hevði skipað seg við Hugu Fjørðoy sum formanni og Jósup Hendriksen sum næstformanni. Eisini hevði nevndin sett Páll F. Joensen sum fyribils skrivara.

Í skrivi mai 1997 sæst, at Heðin Poulsen, var virkandi formaður, og í skrivi frá 2001 er t.d. nevnt í skjali hjá Føroya Løgtingi, í smb. við Vágatunnilin, at Gunnar K. Nattestad var formaður í Vága Vinnufelag.

Minningartalva í Vatnsoyrum

30. november 1990 var telefax sent til Pf. Faroe Stone, móttakara ID 11077, viðv. Minningartalvu í Vatnsoyrum, sum í tekstinum er dagfest 29.11.90. Við eru mál av talvuni, sum skal vera 72 cm. breið og 50 cm. høg. Teksturin skal vera:

Hin 20. oktober 1921
settu tey fyrstu fólkini,
JACOBINA og MARTIN NIELSEN,
búgv her á staðnum.
Saman við
MORENTZU og MARTINI JACOBSEN
og
JACOBINU og DÁNIALI POULSEN
bygdu tey VATNSOYRAR.

Gáva til "Undirhúsið"

Uppskot um at lata eina gávu til "Undirhúsið" var til viðgerðar á fundi, 27. mars 1991. Fíggjarnevndin mælti til at lata eitt barometur við klokku, kostnaður 790 kr. ella 990 kr. Samtykt var, at Anna Hansen, bygdaráðslimur, keypti barometur og klokku við graveraðari plátu á.

Ætlað ídnaðarvirki hjá Commercial Viking Foundation

Í skrivi, 28. september 1992, søkja allar kommunurnar í Vágum í felag til Føroya Landsstýri um loyvi at taka upp til 6 mió. kr. í láni at seta í felag, sum ætlar at seta á stovn ídnaðarvirki í Miðvági. 8. oktober 1992 svarar Landsstýrið og sigur: "Sum fíggjarviðurskiftini eru, er landsstyrið ikki sinnað at geva kommununum loyvi til lántøku."

Teir, ið stóðu fyri felagnum vóru: Jørleif Thomassen, f. 1940 í Miðvági. Hevði búð í Danmark síðan 1961. Hin stovnsetarin var danin, Henrik Waltoft, f. 1964 í Århus.

6. november 1992 var málið til viðgerðar í Løgtinginum. Niels Pauli Danielsen hevði lagt uppskotið fram. Í viðmerkingunum var m.a. sagt:

"Commercial Viking Foundation hevur gjørt eitt rúgvusmikið og drúgvt arbeiði at kanna møguleikarnar fyri framleiðslu av elektroniskum komponentum í Føroyum. Stovnararnir eru tveir dynamiskir menn. Jørleif Thomassen er útbúgvin radiomekanikari og veikstreymsverkfrøðingur v.m. Henrik Waltoft er útbúgvin elektromekanikari, ídnaðarbúskapi og framleiðslu v.m. Báðir hava teir drúgvar royndir í Danmark. Commercial Viking Foundation byrjar við elektroniskum ídnaði, men annars skal Commercial Viking Foundation skapa íblástur til virkisfús fólk við góðum hugskotum."

Dimmalætting skrivar um málið hin 12. november 1992 undir yvirskriftini "Elektroniskt ídnaðarvirki í Miðvági - Pilotprosjekt", har nógv av áðurnevnda er endurgivið. Í aðrari grein í Dimmalætting 24. november 1992 verður sagt, at ætlaða virki kann skapa arbeiði til 200 fólk. Jógvan Sundstein landsstýrismaður hevði sagt, at hann ætlaði at taka málið upp aftur.

Hin 17. november 1992 kom eitt nýtt skriv frá Landsstýrinum til Miðvágs kommunu v/Hjørleif Joensen. Skrivið var um nevndu lániumsókn: "Í skrivi dagfest 28. september 1992, søkja Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs og Bíggjar kommunur um loyvi at taka 6 mió. kr. í láni at seta í felag, ið skal reka ávíst ídnaðarvirksemi í Miðvági. Sagt skal verða frá, at landsstýrið hevur viðgjørt málið sum eina lániloyvisumsókn, har hvør kommuna sær tekur lán í lutfallinum til skattainntøkurnar í ymisku kommununum. Hugt hevur verið eftir fíggjarstøðu kommunanna, serliga lániskuldini í mun til skattainntøkuna. Landsstýrið hevur ikki viðgjørt verkætlanina hjá Commercial Viking. Landsstýrið er sinnað at viðgera umsóknina um loyvi til lántøku av nýggjum, um:

1. fíggingin av verkætlanini hjá Commercial Viking annars kann fáast uppá pláss,
2. rakstrarútlitini sambært gjørdum ætlanum vísa, at verkætlanin er rentabul og útvegar eitt ávíst tal av arbeiðsplássum,
3. at eyðsýnt er, at privatu stigtakararnir aftanfyri Commercial Viking átaka sær hóskandi fíggjarliga ábyrgd í mun til ávirkan teirra.

Viðgerast kann eisini av nýggjum, um tann møguliga lántøkan hjá kommununum skal hava annað lutfall, so hædd verður tikin fyri fíggjarligu støðuni hjá kommununum. Landsstýrið fer seinni at viðgera spurningin, um verandi játtan til havnir/lendingar kann nýtast alternativt, fyri allar kommunur undir einum eftir ávísum fortreytum. L.v., Hilduberg.

Samstundis sum hetta fór fram, viðgjørdi Løgtingið framvegis málið. Og málið varð av Løgtinginum beint í ídnaðarnevnd løgtingsins hin 24. november 1992. Nevndin tók ikki undir við málinum og vísti til fyrru avgerð landsstýrisins. Og málið vann ikki frama á tingi.

Í stuttum kann sigast, at virkið fekk ikki fígging í Føroyum og varð tí sett á stovn í Danmark, var rættuliga arbeiðsskapandi, og gekk væl, so vítt ein frætti.

Ætlað krígssavn í Vágum

Savnið 1940-45 varð stovnað í 1983 og lat upp framsýning 12. mai 1990 í hølum í Tórshavn og var hetta í sambandi við "Bretska viku" í Føroyum júst um tað mundið. Men hetta var annars kanska ikki besta tíðin at lata upp, tí Føroyar sum land vóru á veg inn í djúpa og svára fíggjarkreppu, sum vardi stórt sæð øll nítiárini. Hetta gjørdi so eisini, at savnið fekk ikki nøktandi fíggjarligan stuðul og mátti at enda snara lykilin um og gevast.

Í oktober 1997 hevur Savnið 1940-45 skrivað til kommunurnar í Vágum, har Miðvágs kommuna fekk bræv frá teimum við umsókn um, at Felagskommunan í Vágum yvirtók savnið. Málið var til viðgerðar á fundi 21. oktober 1997. Samtykt varð at beina málið til Felagskommununa. Annars varð mælt til at vísa Fornminnissavninum á húsið við flogvøllin og mæla teimum at nýta tað til savn.

Felagskommunan setti so ein bólk at arbeiða við málinum. Har hesin bólkur allarhelst er byrjaður við arbeiðinum í 1998. - Øll skjølini eru ikki tøk í hesum málinum.

Men hin 5. desember 2000 eru til viðgerðar frá nevndini fyri Krígssavnið ætlanir og krøv til framtíðar rakstur av krígssavninum. Fíggjarnevndin legði málið fyri bygdaráðið. Og bygdaráðið samtykti at leggja málið fyri komandi bygdaráð.

Viðmerkjast skal her, at hetta er ikki sama nevndin ella verkætlan, sum skipaði Krígssavn í 2008, sum bleiv tað endaliga krígssavnið. Henda nevndin, sum her er umtalað, gavst við virki sínum um hetta mundið, vegna tvørrandi stuðul frá tí almenna. Nevndin virkaði frá uml. 1998-2001.

Næsta bygdaráðið, har limirnir vóru: Jóan Pauli Frederiksen, fm., Jóhannes Ellefsen, Jóannes Klein, Marianna Simonsen, Durita Jacobsen, Malan Helgadóttir og Jónhild Jørgensen, høvdu málið til viðgerðar á fundi 27. februar 2001. Í gerðabókini stendur: "Skriv frá nevndini fyri Krígssavnið um ætlanir og krøv til framtíðar rakstur av krígssavninum. Fíggjarnevndin mælir frá at taka undir við ætlanunum hjá nevndini. Samtykt ikki at taka undir við ætlanunum hjá nevndini."

Uttan at undirritaði skal gera seg ov klókan upp á málið, hóast ein sat í endaligu nevndin fyri Krígssavnið í 8 ár, frá 2008-16, so hevur ein skilt, at setta nevndin í 1998 kanska siktaði ov høgt og hevði ov høg fíggjarkrøv, í staðin fyri at byrja lagaliga. Í øllum førum varð úrslitið tað, at eingin av kommununum tók undir við uppskoti nevndarinnar og tískil varð einki savn í Vágum tá. Lutirnir hjá Savninum 1940-45 endaðu so hjá Føroya Fornminnissavni, smb. reglugerð felagsins í smb. við avtøku av felagnum og smb. lóg um fornminnir í hesi støðu. Og húsið varð verandi ogn hjá landinum.

Nakað, sum gav næstu nevndini, tí núverandi nevndini fyri Krígssavnið, alstórar trupulleikar, tí nú vóru nýggj fólk komin at ráða fyri Føroya Fornminnissavni, og tey vóru hvørki at høgga ella stinga í í smb. við, at landið skuldi lata savninum SOR-bygningin. Bygning, sum Landsverk annars nýtti til bilskúr og hevði partvís oyðilagt innan - út frá søguligum sjónarmiði. Tað var tó ikki Landsverki at trupulleikin var við, men marghattliga nokk Føroya Fornminnissavn og táverandi leiðsla har. Har mátti Landsstýrið skera ígjøgnum langt um leingi, eftir fleiri ára stríð og baks hjá Krígssavninum.

Nr. 2 í tiltakinum Best røkta bygd 2001

Í 2001 varð Miðvágur nr. 2 í tiltakinum "Best røkta bygd 2001" og vann 5.000 kr. Málið var fyri á bygdaráðsfundi 4. desember 2001. Spurningurin var hvat pengarnir skuldu brúkast til. Fíggjarnevndin mælti til at gera beinkir fyri peningin. Hesum tók bygdaráðið undir við.

Setti upp stjørnur á jólum

Hans í Kálvalíð Hansen hevði hongt jólastjørnur upp fram við vegnum í Miðvági í nøkur ár. Á fundi í bygdaránum 26. november 2002 var fyri, at Hans í Kálvalíð heitti á kommununa um at veita 5.000 kr. í stuðuli til stjørnurnar, hann plagdi at seta upp um jólini. Hetta varð samtykt.

Planta trø

Á bydaráðsfundi 26. apríl 2005 var mál fyri, har ein borgari spurdi, hví Miðvágs kommuna ikki lat borgarunum pakkar við trøum. Skógrøkt landsins segði, at aðrar kommunur vanliga lótu pakkar fyri uml. 100 kr. pr. hús. Trivnaðarnevndin mælti til at fólk fingu høvi at tekna seg at fáa trø. Hetta varð samtykt.

Stuðul til kirkjuklokku

Skriv frá kirkjuráðnum um stuðul til nýggja klokku til kirkjuna var fyri á bygdaráðsfundi 27. september 2005. Fíggjarnevndin mælti til at játta teimum upp til 80.000 kr. til kirkjuklokku.

Hetta varð samtykt, til gjald av einari nýggjari klokku, sum tað stendur í gerðabókini.

Kommunan fær heimasíðu

Á bygdaráðsfundi 30. november 2005 var til viðgerðar tilboð frá Sansir uppá heimasíðu. Fíggjarnevndin mælti til, at kommunan skuldi hava heimasíðu. Málið varð samtykt.

Brúgvar í viðarlundini

Uppskot til tvær brúgvar í viðarlundini var til viðgerðar á fundi 6. mars 2007. Kostnaður 40.000 kr. Fíggjarnevndin viðmælti og málið varð samtykt.

Kommunusamanlegging

Skal Miðvágs kommuna vera við í eini fólkaatkvøðugreiðslu um kommunusamanlegging til komandi løgtingsval? var til viðgerðar á almennum bygdaráðsfundi 30. oktober 2007. Hetta varð samtykt.

Minnilutin, Georg F. Hansen, Jóan Pauli Frederiksen og Jóhannes Ellefsen, ynsktu eina atkvøðugreiðslu seinni í 2008.

Á fundi 14. januar 2008 var til viðgerðar ásetan av, hvussu atkvøðuseðilin til vegleiðandi fólkaatkvøðuna um kommunusamanlegging skuldi síggja út. Semja varð um hesa orðing:

"Taka tygum undir við, at bygdaráðini í Miðvági og Sandavági fara undir eina ítøkiliga ætlan um samanlegging av hesum báðum kommununum? (Ja/Nei)."

- Viðmerkjast kann, at løgtingsvalið var fríggjadagin 19. januar 2008.

Greinar á Vágaportalinum v/ Ólavi í Beiti í 2008 geva eina sera góða mynd av málinum og havi eg valt at taka nakrar av hesum við fyri at lýsa málið greiðari. Talan var eisini um at Sørvágs kommuna skuldi vera við í samanleggingini, men har var ikki meiriluti fyri kommunusamanlegging. Tó var nógv kjak í fjølmiðlunum m.a. Vágaportalinum - sosialu miðlarnir vóru ikki komnir so nógv fram tá - har roynt varð at fáa sørvingar við eisini. Men tað eydnaðist ikki. Málið snúði seg tí mest um samanlegging millum Miðvágs- og Sandavágs

kommunur. Og tað komst av teirri einfaldu grund, at vegleiðandi fólkaatkvøður í Miðvági og Sandavági longu í januar 2008 høvdu meiriluta fyri samanlegging í báðum kommununum. Í Sørvági var ongantíð nøkur fólkaatkvøða um kommunusamanlegging, helst tí at meirilutin í bygdaráðnum var ímóti samanlegging. So einasta ítøkiliga, sum kundi síggjast um støðuna har, var sjálvt kommunuvalið 11. november 2008, har tveir listar vóru ímóti samanlegging, teir fingu 58,8% av atkvøðunum, og ein var fyri, og fekk 41,2% av atkvøðunum. - Hetta kundi tó ikki beinleiðis samanberast við eina fólkaatkvøðu, men sum ábending.

Miðvágur sigur ja til samanlegging

Vegleiðandi fólkaatkvøðan. 427 søgdu ja í Miðvági til at leggja saman við Sandavági, 222 vóru ímóti og 9 atkvøður vóru blankar. Borgarstjórin, Napolion Magnussen, er vælnøgdur við úrslitið. Men hann sigur, at uppaftur fleiri høvdu sagt ja, um Sørvágur hevði verið við eisini, tí ivast hann onga løtu í. *Vágaportalurin 21.01.2008*.

Sandavágur vil eisini hava samanlegging

Á vegleiðandi fólkaatkvøðuni í Sandavági var eisini greiður meiriluti fyri at leggja saman við Miðvági. 416 søgdu ja, 70 søgdu nei og 12 atkvøður vóru blankar. Rósa Samuelsen, borgarstjóri sigur, at nú verður arbeitt fram ímóti at leggja kommunurnar saman. *Vágaportalurin 22.01.2008.*

Uppskot til sáttmála

20. mai 2008 skrivar Advokatskrivstovan, Christian Andreasen adokatur, Tórshavn. Brævið er stílað til Miðvágs kommunu, att. Napolion Magnussen og Sandavágs kommunu att. Rósa Samuelsen. "Sáttmáli um samanlegging millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur. Eftir áheitan frá tykkum leggi eg við ráskitsu til tekst í sambandi við sáttmála um samanlegging millum kommunurnar. Eg skjóti upp, at vit møtast her á skrivstovuni onkran dagin fyri at gjøgnumganga tekstin og taka støðu til, um onnur viðurskifti skulu takast við í sáttmálan. Eg vænti at frætta aftur skjótast gjørligt."

Við var lagt eitt fylgiskjal, har gjørdar vóru lýsingar av ymsum kommunalum viðurskiftum, herundir eisini lógir og reglur, sum vóru grundarlag undir samanlegging. Í høvuðsheitum høvdu avtalur um kommunusamanlegging til endamáls at stovnseta kommunueindir, sum góvu størri møguleika fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti, og sum landafrøðiliga og samferðsluliga natúrliga hoyrdu saman, stendur m.a. í fylgiskjalinum og so er skrivað um lógargrundarlagið, nakað um tænastustøði, um umsiting, sum skal vera á einum stað, um bygdaráð og um nevndir, har hesi evni verða gjøgnumgingin.

Støðutakan til uppskotið

Støðutakan til fyriliggjandi uppskot um kommunusamanlegging millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur var fyri á bygdaráðsfundi 11. september 2008. Øll vóru møtt. Jóan Pauli Frederiksen skeyt upp, at málið varð útsett til aftaná kommunuvalið. Hann og Jóhannus Ellefsen atkvøddu fyri hesum og hinir atkvøddu ímóti.

Napoleon Magnussen mælti til at samtykkja sáttmálan við teirri broyting, at §7 varð broytt soleiðis, at orðið, samtykt, verður broytt til, sett ígongd. Orðingin verður soljóðandi:

Kommunalu arbeiði, sum eru sett ígongd, áðrenn undirskrivingina av hesum sáttmála, skulu gerast liðug.

Jóannes, Dánial, Georg F., Napoleon og Elias atkvøddu fyri.

Jóan Pauli og Jóhannus atkvøddu ímóti.

Miðvágs bygdarráð sigur ja til samanlegging

Nú hava bæði Miðvágs bygdarráð og Sandavágs bygdarráð sagt ja til at leggja saman.

Miðvágs bygdarráð hevur í kvøld samtykt at leggja saman við Sandavági og navni á felagskommununi verður Vága kommuna.

Vágaportalurin ringdi júst nú til borgarstjóran í Miðvági, Jóhannes Klein, og sigur hann, at 5 bygdarráðslimir søgdu ja til samanleggingina og tveir søgdu nei.

Ætlanin er, at kommunurnar verða ein kommuna á nýggjaárinum. *Vágaportalurin 11.09.2008.*

Spurningur um hvar sætið skal vera

17. september 2008 er avrit av telduposti frá Advokatskrivstovuni, Eyðbjørn Larsen, advokati, Tórshavn, sum er stílaður til Albert Thomasen og Rósu Samuelsen, Sandavági og til Miðvágs kommunu. Telduposturin var svar upp á spurning frá Albert Thomasen, kommunuskrivara í Sandavági, og vísti til telefonsamrøðu millum nevnda advokatin sama dag. Í svarinum varð m.a. sagt, at sambært løgtingslógini frá 2007 um sjálvbodna samanlegging skuldu kommunurnar gera semju um staðfesting, t.e. hvar og hvussu kommunustýrið í samanløgdu kommununi funnu sær sæti.

Á bygdaráðsfundi í Miðvági 22. september 2008, har allir limir vóru møttir, var uppskotið um kommunusamanlegging, fundarskipan og um kommunustýrsskipan millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur gjøgnumgingið í smálutum.

Bygdarráðsfundurin útsettur til týsdagin klokkan 19

Í kvøld skuldi bygdarráðið í Sandavági staðfesta sáttmálan um samanlegging millum Miðvágs kommunu og Sandavágs kommunu, men fundurin er útsettur til týsdagin tann 23. september klokkan 19.

Og sambært Jógvan Sjúrði Hansen, næstformanni í Sandavágs bygdarráð, so er orsøkin, at onkur orðing og orð eru í sáttmálanum, sum limirnir ikki rættiliga hava skilt.

- Vit vilja hava at vita, hvat summi orð og orðingar týða, áðrenn vit staðfesta og samtykkja sáttmálan, sigur Jógvan Sjúrður.

Spurdur, um ikki kommunurnar hava smíðað sáttmálan sjálvar, sigur næstformaðurin, at tað hava tær ikki, men advokatur hevur gjørt tað fyri kommunurnar.

Eitt orð, sum limirnir í bygdarráðnum vilja hava nærri at vita um, er staðsetingin fyri umsitingina, og tað kann kanska fara og gerast ein ringur spurningur hjá bygdarráðunum báðum at loysa. *Vágaportalurin 18.09.2008.*

Rok í bygdarráðnum í Sandavági

Undir greinini: Lógin heimilar eisini kommunalum samstarvi, skrivar ein viðmerkjari soleiðis:

- Telefoninar ganga heitar, men onki má út. Ongin skal vita, at her er klandur í. Fundurin í næstu viku verður sikkurt eisini útsettur.

Og Vágaportalurin hevur eisini roynt at fritta nakað um støðuna í Sandavági, tí sum Vágaportalurin skilti, og sum eisini bygdaráðslimur váttaði her á Vágaportalinum, so var fyrri fundurin útsettur júst tí bygdarráðslimir vildu vita meira um ymiskar orðingar í sáttmálanum m.a. staðsetingina.

Og ein bygdarráðslimur, sum Vágaportalurin hevur tosað við, váttar eisini, at alt er ikki nakar dansur á rósum í Sandavági.

- Vit fáa einki hendavegin til Sandavágs við hesi samanleggingini, tí tað hevur bygdarráðið í Miðvági sagt óbeinleiðis, og tað eru vit einki serliga fegin um.

- Vit missa snøgt sagt alt við hesi samanleggingini, sigur bygdarráðslimurin.

Vágaportalurin royndi eisini at fáa eina viðmerking frá borgarstjóranum, Rósu Samuelsen,

men hon er við í ABC-samráðingunum í Havn um nýggja samgongu, men kanska fáa vit eina viðmerking frá henni seinni at antin avsanna ella vátta hesi tíðindi.

"Sannleikans tími", verður eitt rópt, og "At vakna við kaldan dreym", eitt annað, og kanska er tað hetta, sum nú er við at gera seg galdandi í bygdarráðnum í Sandavági. *Vágaportalurin 19.09.2008.*

Lýsing um fólkaatkvøðu í Miðvági

24. september 2008 var lýsing hongd upp og eisini koyrd í fjølmiðlarnar.

"Til allar veljarar í Miðvágs kommunu. Um kommunusamanlegging. Nú bygdaráðini í Miðvági og Sandavági eru komin ásamt um ein sáttmála um samanlegging av kommununum báðum, verður hann hervið borðin út til fólkið í kommununi. Kunnandi fundur um sáttmálan verður í Miðvágs Skúla leygardagin 27. septembur kl. 15.

Vegleiðandi fólkaatkvøða um sáttmálan verður í Miðvágs Skúla mánadagin 29. september millum kl. 10 og 20. Almennur bygdaráðsfundur verður mánakvøldið 29. septembur kl. 2100, har bygdaráðið tekur endaliga støðu til sáttmálan.

Miðvágs Kommuna Johannes Klein, borgarstj."

Atkvøðuseðilin

Við í skjølunum liggur ein atkvøðuseðil, ið helst er atkvøðuseðilin, brúktur var til valið í Miðvágs kommunu um samanleggingina. Teksturin er sera einfaldur og greiður:

ATKVØÐUSEÐIL

Taka tygum undir við, at Miðvág- og Sandavágs kommunur verða lagdar saman sambært fyriliggjandi sáttmála.

Ja	Nei
□	□

Undir ja og nei er ein kassi, har ein kann velja at seta sín kross.

Jógvan Sjúrður nýggjur borgarstjóri í Sandavági

Hann var næstformaður áðrenn, men tá Rósa Samuelsen fór í landsstýrið, tók Jógvan Sjúrður Hansen við eftir hana sum borgarstjóri í Sandavági, og hevur hann nú sitið 20 ár í bygdarráðnum.

Vágaportalurin hevur júst ringt at ynskja nýggja borgarstjóranum tillukku við nýggja starvinum, men tá ið Jógvan Sjúrður Hansen verður spurdur, um hann stillar upp aftur til komandi val, ja, so er hann ikki heilt vísur enn.

- Tað fer tíðin at vísa, sigur hann.

Spurdur um vegleiðandi fólkaatkvøðuna, sum verður í Sandavági mánadagin, um hon nú vísur eitt nei, hvat Sandavágs kommuna so ger, sigur Jógvan Sjúrður, at vísur vegleiðandi fólkaatkvøðan eitt nei, ja, so metir hann, at bygdarráðið er somikið at sær komið, at tað verður tikið til eftirtektar.

- Men sjálvandi verður tað eisini avgerandi fyri fólkaatkvøðuna, hvussu høgt luttøku prosentið er, leggur hann afturat, og vísur eisini á, at á seinastu fólkaatkvøðu var luttøkan yvir 90%, men at tá var eisini løgtingsval.

- Hvussu nógv fólk fara at atkvøða nú, vita vit ikki, men luttøkan verður neyvan so stór sum seinast, sigur Jógvan Sjúrður Hansen. *Vágaportalurin 27.09.2008.*

Miðvingar: Fundurin var eitt stórt vónbrot

Vágaportalurin gav viðmerkjarum møguleikan at siga sína hjartans hugsan um kunnandi

fundin í Miðvági og Sandavági í gjár viðvíkjandi samanleggingini, og her eru nakrar viðmerkingar, sum eru komnar higartil um fundin í Miðvági:

Var á fundi í bygdarskúlanum í Miðvági og gleddi meg til at fáa ein frágreiðing um fyrimun og vansar við kommunusamanlegging. Fundurin var eitt stórt vónbrot. Bygdaráðslimirnir vóru als ikki fyrireikaðir og kundu ikki geva fundarfólkinum nakrar upplýsingar um málið. Tá spurt varð, hví teir mettu tað vera so týdningarmikið at leggja saman júst nú, vistu teir ikki at svara, og hóast eg eri fyri samanlegging, fari eg at stemma nei til eitt so óbúgvið mál og vóni at fleiri miðvingar gera tað sama.

Var á fundinum í Miðvági, og har gjørdi eg mær greitt at her má sigast ja. Tí har vóru bara smáligheitir og gamalt jabb, sum segði nei, og tey vil eg tynna út við eini samanlegging, tey eru bara til klandur og fortreð. Og eru tað fyrimunir við eini samanlegging av allari oynni, er tað eisini fyrimunir við samanlegging millum okkum, alt annað er volapykk. Vit hava t.d. brúk fyri tekniskari og sosialari umsiting, tað klára vit ikki einsamøll uttan nógvan kostnað. Tí er at siga JA!!

Var eisini á kunnandi fundi í Miðvági í gjár, eini 100 fólk vóru uppmøtt. Tað gekk týðiliga fram á fundinum, at bygdaráðið ikki hevði ætlað at hava nakra kunning yvirhøvur í Miðvági. Bygdaráðið varð totalt ófyrireikað. Ikki bert til fundin, men so sannuliga eisini til spurningin um samanlegging. Minnilutin segði bart út, at teir onga kunning høvdu fingið og vistu tí hvørki út ella inn. Meirilutin kundi heldur ikki svara bygdafólkinum uppá teir spurningar, ið reistir vórðu. Hóast fleiri áheitanir frá fundarstjóranum um at geva fólkinum svar. Tað einasta, sum kom fram var, at skúlaútbyggingin á Giljanesi er farin í ommu sína. At nýggjur barnaskúli skal byggjast í Sandavági og at nýggja kommunan verður í Sandavági. Tað er ófatuligt, at ein meiriluti av bygdaráðnum skal trumfa eina samanlegging ígjøgnum, uttan at hava gjørt sær tann ómak at kanna, hvat tað inniber. Kom eftir fundin til ta niðurstøðu, at hvørki eg, bygdaráðið ella nakar annar miðvingur hevur ánilsi av, hvat ein ófyrireikað samanlegging inniber. Gud vitið, hvussu skilið er í Sandavági, vónandi er tað betur enn her. Mín áheitan skal tí verða, at man ikki leggur saman nú, men heldur brúkar tíðina sum krevst at fáa eina samanlegging við skili í. Eg stemmi NEI hesaferð, vónandi ger tú tað sama.

Aftaná fundin í Miðvágsskúla í gjár, ætlaði eg at fara niðan til Marjus at fáa ein eydnubolla. Størsti parturin av spyrjarunum vóru so forbanka negativir og ókonstruktivir, at tað var nær við, at hjartað steðgaði. Eg takki Várharra fyri, at eg ikki siti í bygdaráðnum, eftir alt hatta gorið, ið teir fingu yvir seg. Annars vil eg heita á øll í Miðvági og Sandavági um at fara til fólkaatkvøðu og stemma eitt stórt JA. Vit kunnu ikki lata okkum drukna í hesum super pessimistum, svartmálarum og paranoidum. Tað hevði verið líka mikið, hvussu væl bygdaráðið var fyrireikað, so høvdu 90% av áhoyrarunum aldrin stemmað ja. Eitt uppskot til eina aðraferð er at hava tveir fundir, ein jaligan fund og ein neiligan fund. Ein, ið vil framstig og einar sameindar Vágar. Ein, ið sigur JA.

Vágaportalurin 28.09.2008.

Samanleggingin samtykt

Á bygdaráðsfundi í Miðvági 29. september 2008 vóru møtt: Jóannes Klein, Napoleon Magnussen, Dánial A. Hansen, Elias Næs, Georg F. Hansen, Joen Pauli Frederiksen og Johannes Ellefsen. Og skrivari: Georg Hansen. Sagt verður m.a. at vegleiðandi fólkaatkvøða um kommunusamanlegging millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur hevur verið í dag.

Fyri at leggja saman atkvøddu 246 fólk. Móti at leggja saman atkvøddu 183 fólk. 4 vóru blankar.

Samtykt var einmælt, at fylgja fólkaatkvøðuni og samtykkja sáttmálan um kommunusamanlegging við Sandavág.

Sandavágur og Miðvágur leggja saman

Í Miðvági søgdu 246 ja og 183 nei, og 4 atkvøður vóru blankar.

53,5% atkvøddu, og nú klokkan 21 verður sáttmálin so undirskrivaður av Miðvágs Bygdaráð.

Í Sandavági søgdu 205 ja og 116 nei.

52,9% atkvøddu í Sandavági.

Sandavágs bygdarráð undirskrivar sáttmálan í morgin.

Dagføra: Og í tíðindaskrivi frá Miðvágs kommunu verður sagt, at Miðvágs bygdaráð samtykti beint nú einmælt at leggja saman við Sandavágs kommunu. *Vágaportalurin 29.09.2008.*

Borgarstjórin í Sandavági: Vit eru fegin

Um tað verður veitsla í Sandavági í kvøld veit borgarstjórin Jógvan Sjúrður Hansen ikki at siga, men kanska okkurt verður.

Íbúgvarnir í Sandavági hava so talað greitt við vegleiðandi fólkaatkvøðuna í dag, og Vágaportalurin hevði ein fegnan borgarstjóra í telefonini.

- Vit høvdu ikki roknað við so stórari luttøku sum við seinastu vegleiðandi fólkaatkvøðu, men kortini so var ein stórur meiriluti fyri at leggja saman við Miðvágs kommunu.

- Sandavágs bygdarráð er fegið um at íbúgvarnir í Sandavágs kommunu hava talað og rokna vit við, at bygdarráðið tekur hesa støðu til eftirtektar, sigur ein vælnøgdur borgarstjóri við Vágaportalin.

Jógvan Sjúrður Hansen sigur, at á fundi í morgin - fundurin verður klokkan 18 - verður sáttmálin so undirskrivaður.

Fundurin er almennur. *Vágaportalurin 29.09.2008.*

Sandavágs bygdarráð: Kommunusamanleggingin samtykt

Á kommunustýrisfundinum í kvøld kl. 18.00 varð einmælt samtykt at góðkenna sáttmálan millum Miðvágs og Sandavágs kommunur. Sostatt verða Miðvágs og Sandavágs kommuna ein kommuna frá 1. jannuar 2009. *Vágaportalurin 30.09.2008*.

Móttøka á Hotel Vágum

Lýsing til fjølmiðlarnar:

"Í sambandi við at sáttmálin um samanlegging av Miðvágs- og Sandavágs kommunum verður undirskrivaður, verður almenn móttøka á Hotel Vágum í dag 1. oktober 2008 kl. 16.00.
Miðvágs- Sandavágs kommuna."

Kommunusáttmálin undirskrivaður

Sáttmálin, sum staðfestir samanleggingina av Miðvágs- og Sandavágs kommunum, varð undirskrivaður á 62° N Airport Hotel *(Hotel Vágar)* seinnapartin.

Tað vóru borgarstjórarnir báðir Jóannes Klein og Jógvan Sjúrður Hansen, sum skrivaðu undir. Væl av fólki var samankomið á hotellinum til hátíðarhaldið.

Millum teirra, sum umframt borgarstjórarnar báðar hildu røðu, vóru landsstýriskvinnurnar Annika Olsen og Rósa Samuelsen eins og borgarstjórin í Sørvágs kommunu, Jákup Suni Lauritsen.

Og, sum vera man, fekk Annika Olsen sáttmálan við sær suður aftur í Innlendismálaráðið, har hann endaliga skal góðkennast. *Vágaportalurin 01.10.2008*.

Annika Olsen góðkent samanleggingina

Innlendismálaráðið: Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevur góðkent samanleggingarsáttmálan millum Miðvágs- og Sandavágs kommunur.

Henda samanleggingin verður samstundis tann seinasta samanleggingin, sum verður framd, áðrenn kommunuvalið 11. november 2008.

Kommunurnar, sum í dag eru 34 í tali, verða 1. januar 2009 30, t. e. 4 færri enn nú.

Kommunusamanleggingarnar sum eru góðkendar í hesum kommunuvalskeiðinum eru:

Leirvíkar- og Gøtu kommuna, sum leggja saman í Eystur kommunu

Funnings- og Runavíkar kommuna, sum leggja saman í Runavíkar kommuna

Svínoyar- og Klaksvíkar kommuna, sum leggja saman í Klaksvíkar kommuna, og

Miðvágs- og Sandavágs kommuna, sum leggja saman í Vága kommuna.

Vágaportalurin 15.10.2008.

SÁTTMÁLI um samanlegging av Miðvágs kommunu og Sandavágs kommnu.

Galdandi frá 1. januar 2009 hava Miðvágs kommuna og Sandavágs kommuna við hesum sáttmála avgjørt at leggja saman í eina kommunu. Sameinda kommunan verður tá skipað við felagsvaldum kommunustýri úr bygdunum Miðvági, Vatnsoyrum og Sandavági. Grundarlagið er tað samstarv og tilknýtið, borgararnir í bygdunum søguliga hava haft saman og við framtíðarmøguleikum fyri eyga, og verður samanleggingin av økinum hervið avtalað. Grundleggjandi fyri samanleggingina er: At tryggja at borgaramir í samanløgdu kommununi fáa betri tænastu. At fáa meira burtur úr við at samskipa rakstur og íløgur. Allir borgarar, uttan mun til bústað, fáa somu tænastu, hava somu skyldur og rættindi. Serligur dentur verður lagdur á, at tænastu- og kostnaðarstøðið verður eins hjá øllum borgarum í samanløgdu kommununi. Avtalað er - hóast endaliga samanleggingin ikki verður framd fyrr enn 1. januar 2009 - at fara undir at fyrireika og samskipa íløgur, fyrisiting, og fíggjarætlan, soleiðis at kommunurnar frá fyrsta degi eftir avgerð um samanlegging virka sum ein eind. Tær avgerðir, sum sambært galdandi lóg og øðrum ásetingum skulu takast av kommununum hvør sær, verða framvegis til 1. januar 2009 tiknar av ávikavist bygdarráðunum í Miðvágs kommunu og Sandavágs kommunu. Allar avgerðir av felags týdningi verða tó fráboðaðar hinari kommununi.

Sjálvboðin samanlegging § 1

Miðvágs kommuna og Sandavágs kommuna verða lagdar saman til eina kommunu frá l. januar 2009 at rokna.

Navn og leiðsla § 2

Sameinda kommunan, sum fevnir um bygdirnar Miðvág, Vatnsoyrar og Sandavág, fær navnið Vága kommuna, og verður stýrd av einum kommunustýri, sum fyrstu ferð verður valt á kommunuvalinum annan týsdag í novembur 2008. Kommunustýrið fyri samanløgdu kommununa kemur at hava sæti í Miðvági á Jatnavegi 2. Tó verða kommunustýrisfundir, nevndarfundir og umsiting annars at halda til í Sandavági á Hammershaimbsvegi 1. Veljast skulu 11 limir í kommunustýrrið fyri samanløgdu kommununa.

Fyrisiting og samstarv § 3

Eftir avgerð um samanlegging og fram til 31. desembur 2008 verður kommunala fyrisitingin samskipað við samanlegging fyri eyga. Leiðslan verður borgarstjórarnir, sum hava umsitingarligu ábyrgdina hvør í sínari kommunu. Kunnað verður sínámillum um avgerðir, sum metast at hava serligan týdning fyri samanløgdu kommununa. Mannagongdin í sambandi við samanleggingina av fyrisitingunum í kommununum, herundir yvirlit yvir einstøk mál og málsøki, verður avtalað í fyriskipan, sum verður viðløgd hesi avtalu sum Fylgiskjal 1. Í nevndu fyriskipan er eisini ein nærri útgreining yvir samstarvið millum kommunurnar fram

til 31. desember 2008. Fram til 31. desember 2008 umboða kommunumar seg sjálvar eins og higartil í feløgum og felagsskapum, har kommunurnar hava umboð. Eftir samanleggingina verður tað tann sameinda kommunan, sum hevur rættin til hesa umboðan. Partarnir eru samdir um, at sameinda kommunan verður limur í Føroya Kommunufelag.

Felags fíggjarætlan § 4

Kommunurnar gera felags fíggjarætlan fyri fíggjarárið 2009. Fíggjarætlanin verður gjørd av kommunustýrunum í felag, soleiðis at borgarstjórin í Miðvágs kommunu hevur atkomurætt til fíggjarnevndarfundir hjá Sandavágs kommunu, og borgarstjórin í Sandavági hevur atkomurætt til fíggjarnevndarfundir í Miðvágs kommunu. Fíggjarætlanin skal góðkennast av bygdarráðunum í Miðvágs kommunu og Sandavágs kommunu eftir galdandi reglum. Við fíggjarætlanini sum grundarlag verður skattaprosentið í nýggju samanløgdu kommununi ásett.

Ognar- & fíggjarviðurskifti § 5

Við samanleggingardegnum sum skeringsdegi verður uppgerð gjørd yvir alla ogn og alla skuld hjá hvørjari kommunu sær, sum grundarlag fyri byrjunarfíggjarstøðu hjá samanløgdu kommununi pr. l. januar 2009. Byrjunarfíggjarstøðan hjá samanløgdu kommununi skal fevna um allar ognir og alla skuld, sum kommunurnar hava pr. l. januar 2009, burtursæð fra neyðugum reguleringum viðvíkjandi møguligum millumrokningum millum kommunurnar upp til gerðardagin.

Umboðan § 6

Í skiftistíðini - fram til 1. januar 2009 - kann bygdarráðið í Miðvágs kommunu velja eitt umboð fyri hvørja nevnd at møta á øllum nevndarfundum hjá bygdarráðnum í Sandavági. Somuleiðis kann bygdarráðið í Sandavágs kommunu velja eitt umboð fyri hvørja nevnd at møta á øllum nevndarfundum hjá bygdarráðnum í Miðvágs kommunu. Umboðini hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Íløgur § 7

Kommunalu arbeiðini, sum eru sett ígongd áðrenn undirskrivingina av hesum sáttmála, skulu gerast liðug. Onnur anleggsarbeiði kunnu ikki setast íverk uttan avtalu ímillum báðar kommunurnar. Hóast stk. 1, eru partarnir samdir um, at Sandavágs kommuna arbeiðir víðari við fyrireiking av barnaskúla í Sandavági, inntil 31. desember 2008.

Staðbundnar nevndir § 8

Partarnir eru samdir um í sambandi við samanleggingina ikki at hava nakra staðbundna nevnd samsvarandi § 37 í kommunustýrislógini.

Onnur viðurskifti § 9

Nýggj kommunustýrisskipan og fundarskipan fyri samanløgdu kommununa skal vera endaliga samtykt áðrenn 1. januar 2009. Í sambandi við samanleggingina verður grannskoðari valdur fyri samanløgdu kommununa at taka við 1. januar 2009.

Góðkenning § 10

Sáttmálin er treytaður av góðkenning frá landsstýrismanninum í kommunumálum samsvarandi løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv. Sáttmálin er bindandi og kann ikki sigast upp. Sáttmálin verður undirskrivaður í trimum eintøkum, harav hvør kommuna fær sítt eintakið, meðan eitt eintak verður latið landsstýrismanninum.

Góðkent á bygdarráðsfundi í Miðvágs kommunu tann 29/9-2008.

Góðkent á bygdarráðsfundi í Sandavágs kommunu tann 30/9-2008.

Endalig góðkennig og undirskriving:

Miðvágs kommuna *Johannes Klein* borgarstjóri tann 1/10-2008.

Sandavágs kommuna *Jógvan Sjúrður Hansen* borgarstjóri tann 1/10-2008.

Sáttmálin verður við hesum góðkendur:

Innlendismálaráðið, Tórshavn, *Annika Olse*n, landsstýriskvinna tann 15/10-2008.

Við er eisini eitt fylgiskjal í 4 ørkum, sum nærri ásettir smálutir við lógarásetingum, nevndum o.s.fr.

Nýggj roknskaparskipan

Á fundi í Miðvágs bygdaráð 28. oktober 2008 var til viðgerðar tilboð uppá nýggja roknskaparskipan fyri Vága kommunu. Fíggjarnevndin mælti til at taka av tilboðnum og at seta tað á fíggjarætlanina fyri 2009. Hetta varð samtykt.

Vága kommuna: Tvær einmæltar samtyktir

Í kvøld kl. 17 var fyrstu fer at nývalda bygdaráðið kom saman. Boðað varð til fundar at velja borgarstjóra og varaborgarstjóra. Og tað var ikki tann stóri dramatikkurin, fundurin vardi bert 10 minnuttir. Jóannes Klein legði, sum fyrst valdur, út við fyrsta málinum: at velja borgarstjóra. Tað var bara tað eina uppskoti, og Albert Ellefsen varð einmælt valdur.

Síðani tók Albert yvir og skipaði fyri valið av varaborgarstjóra. Og Jógvan Sjúrður Hansen var einasta uppskot og varð einmælt valdur. Einaferð fyrst í desember kemur bygdaráðið saman aftur, og tá skulu nevndirnar mannast. *Vágaportalurin 17.11.2008.*

Seinasti bygdaráðsfundurin

Seinasti bygdaráðsfundurin hjá Miðvágs kommunu var hin 16. desember 2008 kl. 19.00. Møtt: Jóannes Klein fm., Napoleon Magnussen, Georg F. Hansen, Jóan Pauli Frederiksen, Dánial A. Hansen, Elias Næs, Johannes Ellefsen, og skrivarin Georg Hansen.

Fundurin var sum vanligir fundir, har fleiri mál vórðu viðgjørd og samtykt. Seinasta málið var 195/2008, sum segði, at bygdaráðið hevði viðgjørt á bygdarásfundi 195 ymisk mál hetta árið. Seinasta málið var eitt byggimál í Miðvági.

Kommunalt politi

Í gamlari tíð var vanligt, at sýslumaðurin hevði nakrar menn afturat sær. Oftast vóru hetta bónda- ella embætismannasynir, ella menn, sum vóru í metum millum fólk. Hetta sæst t.d. í tingbókunum heilt afturí frá 1600-árunum og fram, har tað sýnist sum um ein ella tveir løgreglumenn hava verið í hvørjari sókn. Tá hava menn helst sæð eina æru í hesum, men tað er so seinni broytt. Í einum skrivi hjá Miðvágs kommunu frá 1930 sæst, at skipan er framvegis, har kommunan kann velja tveir menn til hetta yrki, men tað er ólønt, og tí er hvørki vilji ella áhugi longur fyri at gera hetta, verður sagt. Og er støðan tí tann, at sýslumaðurin er einasti løgreglumaðurin í oynni.

Sjáldsom mynd av tveimum løgreglumonnum eftir gomlu skipanini í Sørvági í 1920 árunum. Skeltini á bringuni eru tekin um, at teir eru virknir sum løgreglumenn. Menninir eru Dunga Zakaris og Petur Jakku Petersen, ið vóru grannar.

Um sýslumansembæti í Vágum og Mykinesi annars kann í stuttum sigast, at frá 1670 hevði sýslumaðurin búðstað í Sandavági, og so eina styttri tíð, 1913 – 1918, í Vestmanna, tá Vágar og Norðurstreymoy eina tíð vóru sýslumansøkið saman, og frá 1918 í Sørvági, tá vent varð aftur til gomlu skipanina. So hann var ikki altíð so lættur at fáa fatur á hjá fólki í teim bygdunum, har sýslumaður ikki var, t.d. um skjótt skuldi berast at.

Í 1920-unum og 30-unum er tos í kommunustýrunum í Vágum um, at fáa sett politistar, t.v.s. menn við politimyndugleika innanfyri kommunumark. Hugsað verður ikki í fyrstu atløgu um útbúnar politistar, men um menn, sum hildið verður egna seg til hetta yrki. Fíggjarliga orkan hjá kommununum tá í tíðini rakk ikki til at rinda løn til útbúgvin fólk ella til fulltíðar starv. Fyrstu politistarnir vórðu settir undir krígnum. Sambært setanarskrivunum hjá kommunalu politistunum, so høvdu teir sýslumannin omanfyri seg, "og skuldu altíð akta boðum frá fútanum, um hann var tilstaðar". Við tað at kommunan rindaði helvtina av lønini, so skuldu teir eisini taka boð frá forstandarskapinum til eftirtektar, um hesi vóru í tráð við teirra skyldur annars.

Politiviðtøkur

Í tingsetuni 1929 viðgjørdi Løgtingið gomlu lógina frá 13. apríl 1894 við politiviðtøkum fyri Føroyar, sum var donsk lóg, gjørd til donsk viðurskifti, men eisini í brúki í Føroyum. Skotið varð upp at broyta lógina soleiðis, at hon varð tilpassað føroysk viðurskifti. Ætlanin var at hava tvey sløg av politiviðtøkum. Eina almenna, sum var galdandi fyri alt landið, og so geva møguleika fyri lokalum politiviðtøkum afturat, sum hvør kommuna sær kundi evna til eftir serligum tørvi. Hesar skuldu tó góðkennast av bæði Løgtingi og justitsminnisterriinum, áðrenn tær kunnu setast í gildi.

Í sambandi við hetta arbeiði fekk kommunan, hin 21. november 1929, sendandi skriv frá Landsnevndini hjá Løgtinginum, har uppskot var við um dagførdar almennar politiviðtøkur. Og aftur í apríl 1930 skriv um, at justitsminnisteriið hevði tikið undir við broytingaruppskoti frá Løgtinginum at broyta straffirammuna, sum í lógini frá 1894 gav upp til 100 kr. í bót fyri

brot á politiviðtøkurnar, men sum nú varð dagført til, upp til 1.000 kr. í bót fyri sama.

Á fundi í forstandarskapinum hjá Miðvágs kommunu 28. juni 1930 eru hesi skriv til viðgerðar. Í gerðabókini stendur, at samtykt varð at svara, at uppskotið um politiviðtøkurnar varð mett at vera gott, og at ikki varð mett neyðugt at gera størri broytingar í tí. Og á fundi í forstandarskapinum 9. desember 1931 varð samtykt at ogna sær umleið 120 eintøk av politiviðtøkunum fyri kommunurnar í Føroyum, sum svarar til eitt eintak til hvørt húski í kommununi.

Hvat politiviðtøkurnar fevndu um kann nevnast, at tær serliga vóru reglur fyri, hvat fólk kundu loyva sær á almennum vegi ella á almennum støðum, eisini privatum støðum, har almeningurin vanliga ferðaðist. Kappitlul 2 í reglugerðini var "Om Iagtagelse af Orden og Velanstendighed." T.d. segði § 3, at "Det er forbudt at lade Husdyr bedække paa eller ved offentlig Vej." § 4 segði, at tað var ikki loyvt at skjóta ella spreingja á almennum veg ella øki, uttan serstakt loyvi. Og § 5, at ikki var loyvt óviðkomandi at sløkkja ella tendra almennar gatulyktir. Ein grein var eisini um baðing ella svimjing tætt almennum veg, og at um nógv fólk svumu á sama stað, so skuldi loyvi fáast frá løgregluni til tað. Hetta seinasta var helst mest í samband við trygd. Kappitul 3 var um at hindra fyri vandum og hindringum í ferðsluni, har nógvar reglur av alskyns slag vóru um hetta. T.d. at tað ikki var loyvt at kasta glas ella skørð á almennan veg, og at arbeiði ikki kundi gerast á almennum veg uttan loyvi frá myndugleikum, og at vegarbeiði skuldi verða væl avmerkt o.s.fr. Kap. 4 var eisini um almenna ferðslu hjá koyrandi og ríðandi. Kap. 5 var um harraleysar hundar, eisini at ikki var loyvt at hava hundar standandi úti um kvøldið ella um náttina, sum goyðu ella forstýraðu grannalagið. Eisini vóru reglur um trygd, t.d. at tryggja móti vandum viðv. bygging o.a., at hetta ikki var til báða ella skaða fyri fólk ella ferðslu, og um lukkitíð fyri handlar, matstovur og onnur útsølustøð. Og viðv. almennum framførslum av ymsum slag, sum kravdu loyvi frá t.d. sýslumanninum ella kommununi og reglur um reinføri á vegum og gøtum, fyri at umganga smittandi sjúkum, bert fyri at nevna okkurt úr rúgvuni. Lógin var annars í 11 kapitlum við nógvum ymsum paragrafum.

Hesar reglur var tað so, at løgreglan skuldi ansa eftir, vórðu hildnar til lýtar.

Kommunan ynskir at fáa politi

30. juni 1930 verður skrivað til Landsnevnd Føroya Løgtings um politiviðtøkurnar, sum svar upp á skriv frá 21. november 1929. Viðv. politiviðtøkunum kunnu vit siga, at vit halda tær vera rættuliga góðar og ynskja ikki nakra broyting í teimum. Men vit halda tað vera avgjørt neyðugt hjá Løgtinginum at taka avgerð um tann, eftir okkra hugsan, nógv meira umráðandi spurningin: Hvussu ein slík viðtøka skal haldast í eini bygd, har eingin løgregla er? Ein kann rætt nokk venda sær til sýslumannin, men sjálvt um sýslumaðurin ger sína skyldu, so er tað ikki lætt hjá honum at klára, tí bygdirnar liggja allar fjart frá har, hann býr. Vit vildu tí mælt til, at tað varð settur ein maður í hvørjari bygd at ansa eftir, at hesar viðtøkur verða hildnar.

Tað vísir seg helst í flestu bygdum, at tað knípur við at halda tær ymsu viðtøkurnar frá grannastevnum. Og er hetta til skaða fyri íbúgvararnar, og hartil virkar hetta demoraliserandi. Ein kundi lagt hetta til sama persón, sum so partvís verður løntur av tí almenna og partvís av jarðareigarunum. Og lønin skuldi verið somikið góð, at hetta bleiv eitt yrki, sum var ynskiligt at hava. Og hevði hetta gjørt, at maðurin kendi ta neyðugu ábyrgdina. Núverandi ásetingar siga, at valdir verða 2 persónar uttan samsýning at taka sær av hesum. Men eingin ynskir hetta yrki, so tað verður valt upp á skift, uttan at nakar veruliga ger nakað við málini. Lønin má sjálvandi ásetast eftir, hvussu stór bygdin er. Vit halda tað hevði verið hóskandi í okkara bygd við 300 kr., sum verða býttar millum løgregluna, kommununa og jarðareigararnar. Maðurin skuldi átikið sær at ansa eftir øllum teimum feilum og manglum, sum verða framdir

og somuleiðis vera fólki hjálpsamur við at leggja mál fyri sýslumannin ella Forligskommissionen, um hetta verður hildið neyðugt.

Vit vóna, at Løgtingið vil taka hetta til eftirtektar til vælvilligari umhugsan og fáa hetta ella eina líknandi skipan í lag við politiviðtøkunum. Royndirnar sýna, at tað gongur illa við at halda ordan og at halda viðtøkur í teim flestu bygdunum í Føroyum. Og tað er serliga neyðugt við øllum tí felags brúki, sum er, og sum ilt er at fáa skil á hjá einum, sum ikki er staðkendur.

2. juni 1933 verður skrivað til sýslumannin fyri Vága- og Norðstreymoyar sýslu, Vestmanna. Viðvíkjandi umbidnari útsøgn um sýslumansembæti í Vágum loyva vit okkum at siga, at tað vildi verið heppið, um vit kundu havt ein sýslumann við juridiskari útbúgving, sum kundi verið til stóra hjálp hjá fólkinum. Men hinvegin halda vit, at tað hevði verið mest praktist at sett tveir politistar fyri oynna, við tað at tað eftir hondini hevur størri týdning at tað verður settur ein maður í hvørjari av teim størru bygdunum við politimyndugleika. Tað hevði kanska verið best skipað við politistum. Henda útsøgn verður viðmælt av niðanfyri nevndu tveimum limum í forstandarskapinum, Sørin Danielsen og Rasmus Heinesen.

Sama dag verður annað bræv skrivað frá kommununi til somu adressu, har tað vísir seg, at tað er ein meirluti og ein minniluti. Hetta er so meirilutin, sum eru, Harald Rasmusen, Andrias Joensen og Heine Haraldsen. Teir hava hetta uppskot um sýslumansembæti í Vágum: Vit loyva okkum at siga, at vit ynskja ikki nakra broyting í núverandi skipan, soleiðis, at vit ynskja at fáa settan ein dugnaligan sýslumann við búðstaði í Miðvági, við tað at vit halda tað vera mest sentralt.

Viðvíkjandi áðurnevnda kann nevnast, at eftir at Johannes Weihe, sýslumaður, var farin úr Vágum og til Christian Larsen, sýslumaður, tók við, virkaði Norðstreymoyar sýslumaður, Gunnar Dahl-Olsen eina tíð frá 1933 til 1934 eisini sum sýslumaður í Vágum. Skrivið er í samband við setan av nýggjum sýslumanni í Vágum.

Men at fáa politist í bygdina er so ikki blivið til nakað á hesum sinni, tí árini 1933 til og við 1939 er, sambært roknskapinum hjá Miðvágs kommunu, einki goldið í løn til politist og eingin er settur heldur.

Skála Harald fyrsti kommunali politisturin

Harald Nicolai Niclasen, í Húsi, Miðvági, nevndur, Skála Harald, f. 1894, d. 1984, 90 ára gamal, var fyrsti kommunali politisturin í Miðvági. Hann var 45 ára gamal, tá hann tók við starvinum 1. januar 1940.

24. november 1939 verður skrivað til fútan. Sum kunnugt knípur tað nógv við at halda skil og ordan her í bygdini. Tí hevur forstandarskapið tosað um at fáa settan ein mann í bygdini at hava umsjón við hesum. Tað er okkara hugsan, at hesin maður skal virka sum politistur, og loyva vit okkum tí at spyrja fútan, um hesin maður kann fáa loyvi frá politinum at virka sum politistur, og um hann kann fáa nakað merkið at sýna fram, soleiðis, at hann kann verða góðkendur sum slíkur. At enda vilja vit loyva okkum at spyrja, um vit kunnu vænta at fáa nakra hjálp við útreiðslunum av hesum. Vit vænta ikki at tað kemur at snúgva seg um nógvar pengar, við tað at vit halda, at hann bert hevur neyðugt at fáa løn um veturin og so við onnur serstøk høvi, og tað verður heldur ikki hvønn dag um veturin. Vit kunnu ikki nevna nakra ávísa upphædd, tá vit ikki hava tingast við nakran enn, men vit vænta at fáa ein mann fyri umleið 300 kr. um árið. Vit loyva okkum fyrst at royna í eitt ár fyri at síggja, hvussu tað riggar, og um tað riggar væl, og vit eru nøgdir, ætla vit at halda áfram við hesum. Vegna at málið ikki tolir at bíða serliga leingi, vóna vit at fáa svar skjótt.

18. desember 1939 fær kommunan svar frá Niels Westerby fúta, sum sigur, at sýslumaðurin hin 7. desember 1939 eisini bað um eina útsøgn um hetta. Eg kann beinanvegin siga, at

Harald Niklái Niclasen

sambært útsøgn frá stjórnini, viðvíkjandi løn til politistar, sum eru settir aðrastaðni í Føroyum, kann ein ikki vænta stuðul frá statinum til lønir. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at tað hiðani kann gevast loyvi til væl egnaðan mann til politist.

23. desember 1939 var fundur í forstandarskapinum heima hjá Sørin Danielsen. Allir limir vóru møttir. Mál nummar tvey á fundinum var uppskot um at seta ein mann sum politist í Miðvági, fyribils sum eina roynd. Og at biðja Harald N. Niclasen um at átaka sær starvið við uppsýni í ein mánað frá dato fyri 50 kr. í løn. Hetta varð samtykt við fýra atkvøðum. Ein atkvøddi ímóti.

Tað er einki skjal, sum staðfestir, at Harald N. Niclasen hevur tikið við starvinum, men tað skilst út frá samtykt á fundi 8. januar 1940, at hann hevur tikið við starvinum hin 1. januar. Tí á fundinum verður samtykt at keypa honum eina lummalykt fyri 7 kr. Sambært roknskapinum hjá kommununi fyri 1940 fær Harald Niclasen 300 kr. hetta árið fyri politiumsjón.

Helst eru menn nøgdir við avrikið hjá Haraldi, tí á fundi í forstandarskapinum 30. desember 1940 varð samtykt at bjóða honum 300 kr. árliga fyri at hava politiuppsýni við bygdini eftir fyriskipan frá forstandarskapinum.

Sama dag verður skrivað til Harald Niclasen, Miðvági. Forstandarskapið hevur í dag einmælt samtykt, at bjóða tygum 300 kr. um árið fyri at gera politiarbeiði í bygdini. Upphæddin verður útgoldin av kommununi og arbeiðið verður gjørt eftir fyriskipan frá kommununi, sum eisini kann vera við munnligar tingingar við forstandarskapið.

Sambært roknskapunum hjá kommununi fær Harald goldnar 300 kr. um árið, árini 1940 til og við 1942 fyri hetta arbeiðið.

Sum skilst er Harald ikki í føstum starvi sum politistur, men er hetta eitt eykaarbeiði, har hann hevur ávísar smærri uppgávur og verður annars tilkallaður eftir tørvi. Og fyri hetta fær hann, eftir tátíðar meti, eina mánaðarløn hvørt árið.

Í 1942 er ein politibúni keyptur til politistin, og hevur kommunan goldið 327 kr. fyri hann. Hetta er helst í sambandi við, at nógvir bretar er komnir í oynna, og at teir skulu síggja, at hann er politistur. So helst hevur hann ikki havt búna áðrenn.

Skála Harald røkti starvið sum parttíðar politistur í Miðvágs sókn í 3 ár frá 1. januar 1940 til 31. desember 1942.

Ætlan um at seta politistar í fast starv

22. mai 1942 var fundur í forstandarskapinum heima hjá formanninum, Sørin Danielsen. Eisini vóru møttir, Dánjal Pauli Niclasen næstfm., Meinhard Hansen og Hans Samuelsen. Til viðgerðar var uppskot frá sýslumanninum, at ein politistur og tríggir hjálparpolitistar verða settir at røkja bygdirnar, Miðvágur og Sandavágur. Har sýslumaðurin hevði biðið um ummæli frá kommununi um eina slíka skipan, og hvat ein helt var hóskandi hjá kommununi at gjalda í lønum.

Samtykt var, at taka undir við uppskotinum, og at hildið varð, at 3.000 kr. var hóskandi løn hjá høvuðspolitistinum og 1.000 kr. hjá hjálparpolitistum. Og at hóskandi var hjá kommununum at rinda 1/5 av lønini.

19. juni 1942 skrivar Niels Westerby, fúti, til sýslumannin í Vágum, og fær kommunan avrit av brævinum. Í smb. við skriving áður um setan av politistum í Vágum, hevur Amtið hin 15. juni 1942 skrivað til fútan. Amtið kann taka undir við, at gjørd verður ein skipan, har ein politistur verður settur í Sørvági og 2-3 hjálparpolitistar og ein politistur og 2-3 hjálparpolitistar í Miðvági-Sandavági. Amtið væntar, at landsnevndin fer at taka undir við hesum, men at landsnevndin ikki vil rinda 80% av kostnaðinum. Um kommunurnar rinda helvtina av kostnaðinum, fer Amtið at heita á landsnevndina um at rinda hina helvtina. Vit vilja heita á fútan um skjótast at fáa eina slíka skipan greiddað í samráði við forstandarskapini og landsnevndina. Biðið verður um, at sýslumaðurin roynir at fáa forstandarskapini at taka undir við einari slíkari skipan.

23. juli 1942 var til viðgerðar uppskotið frá fútanum og Amtinum um politistar í Vágum. Samtykt varð at svara, at hildið verður, at tað er nokk við einum føstum politisti og trimum hjálparum fyri Miðvág og Sandavág. Hvør tann fasti politisturin skal vera, hava vit ikki nakað at siga um. Bara, at hann fremur patruljutænastuna nøkulunda regluliga.

29. oktober 1942 skrivar Føroya Løgting og sendir nevndarálit um politistar í Vágum. Landsnevnd Løgtingsins hevði fingið til viðgerðar bræv dagfest 16. oktober 1942 frá sóknarstýrinum fyri Sørvágs kommunu um, hvussu átrokandi tað var, at politistar vórðu settir í Sørvági, nú allir hesir bretsku hermenninir vóru komnir. Landsnevndin hevði síðan viðgjørt málið og samtykti, at neyðugir politistar verða settir í Vágum, og at amtsgrunnurin rindar helvtina av útreiðslunum, og viðkomandi kommunur rinda hina helvtina av útreiðslunum. Fíggjarnevndin tók undir við støðu landsnevndarinnar, og Løgtingið samtykti málið við 17 atkvøðum.

11. november 1942 skrivar fútin til Miðvágs kommunu viðv. løgtingsmálinum, politistar í Vágum, sum var samtykt á løgtingi 27. oktober 1942. Hildið verður, at eitt politistastarv eigur at verða lýst leyst longu nú vegna umsóknarfreistina.

Sjálvt um her verður tosað um at seta bæði politistar og eykapolitistar í ávikavist Sørvági og Miðvági/Sandavági, so verður endin, at eingir eykapolitistar verða settir, men ein politistur í hvørjari av teim størru bygdunum. Grundin er helst tann, at nú noyðast kommunurnar at rinda helvtina av lønunum ímóti 1/5, sum tær ætlaðu.

Forboð hjá børnum og ungdómi at ganga úti um kvøldið

Í 1942 komu fleiri túsund bretskir hermenn til Vágar at byggja hernaðarflogvøll í Vágum. Og gjørdist Vágar øll eitt hernaðarøki og var avbyrgd frá restini av landi- num á tann hátt, at serligt loyvi frá bretska hervaldinum skuldi til fyri at vitja Vágar. Allir hesir fremmandu hermenn gjørdu eisini, at hugsað varð um trygdina hjá fólki. Tí vórðu politistar settir í starv. Men eisini um trygdina hjá børnum og ungum. Ikki tí at bretar gjørdu seg inn á nakran, men fyri at vera á tí tryggu síðuni. Tað sýnist at vera fútin, sum tekur fyrsta stigið til hetta.

11. september 1942 skrivar fútin og sendir við uppskoti til uppslag um forboð hjá børnum at vera úti um kvøldið í sambandi við, at so nógv fremmandafólk var komið í oynna hetta árið. Hann biðjur forstandarskapið og møguliga verjuráðið siga frá, hvat tey halda um eitt slíkt forboð, og um tað er hóskandi. Slík forboð eru sett í Tórshavn, Tvøroyri, Vági, Porkeri og Klaksvík, sigur hann. Har hevur forboðið virkað væl og er eisini ein stuðul fyri tey foreldur, sum ynskja børnini at vera inni um kvøldið, og hetta kann verða trupult, um onnur børn fáa loyvi at vera úti. Aldurin er settur til 16 ár, og kanska var tað ynskiligt, at aldurin var settur nakað hægri fyri tær ungu genturnar, men tað vildi verið trupult at sett aldurin ymiskt millum gentur og dreingir, og aldurin fyri dreingir kann ikki lætt verða settur hægri enn 16 ár. At fáa eitt slíkt forboð at rigga gerst best í samráð við forstandarskap, verjuráð og skúlanevnd og onnur, og at í smb. við møguliga straff eigur ein fyrst at seta seg í samband við heimið.

Viðmerkjast skal, at børn undir 15 ár ikki sjálvi kunnu straffast, men foreldrini kunnu verða drigin til svars, smb. lógina um politi í Føroyum § 5, 13. apríl 1894. Samstundis við forboðnum verður uppslag sett í dansistovunum, at persónar undir 16 ár ikki hava atgongd til dansihøli.

Viðlagt uppskot um uppslag: Smb. heimild í lóg § 6 frá 13. apríl 1894 um politi verður forboði, sett fyri, at børn undir 16 ár ganga úti eftir kl. 8 um kvøldið, uttan so at tey fylgjast við einum vaksnum fult myndigum persóni. Brot á viðtøkuna verður straffað smb. lógini. Politimeistarin.

Skrivið er til viðgerðar í forstandarskapinum hin 12. oktober 1942. Forstandarskapið var samt um at taka undir við uppskotinum, men hevði hetta ískoyti: Til børn undir 16 ár verður tíðin, tá tey skulu vera inni um kvøldið, frá 15. oktober til 15. mars, sett til kl. 8 um kvøldið. Og frá 15. mars til 15. oktober sett til kl. 10 um kvøldið. Tó við tí fyritreyt, at politistur verður settur. Tí vit halda hetta vera óansvarligt uttan politi, tá sýslumaðurin ella forstandarskapið ikki klára at halda eyga við hesum.

9. februar 1943 skrivar fútin um forboð móti at børn í Sørvági, Miðvági og Sandavági ferðast úti eftir kl. 8 um kvøldið. Biðið verður um, at hetta verður lýst á vanligan hátt. Serlig kort verða send við, sum børn kunnu hava hjá sær og sum kunnu gevast í samráð millum forstandarskap, verjuráð og skúlanevnd, um so er at børn mugu ferðast úti eftir hesa tíð í smb. við skúlagongd. Í summartíðini er hetta forboð sett til kl. 10 um kvøldið.

Ætlan at seta Skála Jens Jakku sum politist

Á fundi í forstandarskapinum 26. november 1942 var til viðgerðar innstillan av politisti fyri Miðvágs sókn. Inn vóru komnar 8 umsóknir til starvið. Harav ein av umsøkjarunum var, Jens Jákup Niclasen, vanliga nevndur Skála Jens Jakku, Bakkanum, Miðvági. Hann var 36 ára gamal og sat í forstandarskapinum í Miðvági. Í gerðabókini stendur, at komið var skriv frá sýslumanninum, har hann vísir á, at um limur av forstandarskapinum er millum umsøkjararnar, so er rættast, at hesin limurin ikki tekur lut í innstillingini. Víðari verður sagt í gerðabókini: "Tá ein av limunum í forstandarskapinum var millum umsøkjararnar, var málið sett undir atkvøðugreiðslu. Tað var einmælt samtykt, at forstandarskapið ikki sá nakra grund til at orsaka ein lim at taka lut í tingingunum, at velja millum 8 menn, hóast hann var millum umsøkjararnar. Tað tóku soleiðis allir limirnir lut í viðgerðini."

Sett varð fram uppskot um at fáa málið útsett, inntil mann kundi fáa upplýsningar gjøgnum privata leið, um umsøkjararnar úr hinum bygdunum. Uppskotið varð samtykt við 4 atkvøðum ímóti 1. Fundurin varð síðan útsettur, og formaðurin skuldi í telefon tosa við fútan um tað var møguleiki fyri at fáa málið útsett.

14. desember 1942 var málið aftur til viðgerðar. Eftir langar tingingar varð málið sett undir atkvøðugreiðslu, sum gav fylgjandi úrslit: Sørin Danielsen, Dánial Pauli Niclasen og Jens Jákup Niclasen atkvøddu fyri Jens Jákup Niclasen. Hans Samuelsen atkvøddi fyri Sigmund Frederiksen. Meinhard Hansen atkvøddi ikki. Úrslitið var sostatt tríggjar atkvøður fyri Jens Jákup Niclasen, ein fyri Sigmund Frederiksen og ein var blonk. Úrslitið skuldi síðan sendast fútanum gjøgnum sýslumannin.

Hvat síðan hendi við málinum er ógreitt, tí einki sæst meira til málið, hóast at meiriluti var fyri Skála Jens Jakku. Men tað at hann ímóti ráðunum frá sýslumanninum sjálvur tók lut í viðgerðini, hevur helst gjørt, at avgerðin ikki er tikin til eftirtektar við tað, at hann varð mettur at vera inhabilur. Men, sum sagt, so verður hetta bert gitingar, tí einki skjalatilfar er funnið um hendan partin. Tó kunnu vit staðfesta, at Jens Jákup Niclasen varð ikki settur sum politistur í Miðvági – hóast undirtøkuna frá forstandarskapinum.

Í gerðabókini eru bert tveir umsøkjarar nevndir við navni, og teir eru áðurnevndu, og báðir

vóru úr Miðvági. Hvørjir hinir seks umsøkjararnir vóru, eru upplýsingar ikki funnar um, men Hilmar Thomsen úr Sumba hevur helst verið ein teirra, og verður tað hann, fútin velur at seta í starvið. Skála Harald, sum var parttíðar politistur áðrenn og til endan av 1942, er ikki nevndur sum umsøkjari, og hevur helst ikki ynskt tað sum fulltíðar starv.

Hilmar Thomsen politistur

12. januar 1943 skrivar Niels Westerby fúti, at Hilmar Thomsen, Sumba, er fyribils settur sum politistur í Miðvágs kommunu frá 15. januar 1943. Fyribilssetanin er eitt ár sum royndartíð, og uppsagnartíðin frá báðum pørtum er 1 mánaður. Lønin er 300 kr. um mánaðin. Hann fær frían uniform annað hvørt ár. Sum politistur má hann nágreiniliga fylgja lóg um politi í Føroyum frá 13. apríl 1894 §§ 9 – 17 og tær viðtøkur, ið har eru, og serliga í tænastuni umganga at vera óhøviskur og at vísa máta og ró í øllum viðurskiftum. Viðvíkjandi búnanum er at siga, at undir krígsstøðuni eru politibúnarnir seymaðir í Havn og í Klaksvík í sama stíli sum gomlu búnarnir. Tá politiknapparnir ikki kunnu fáast, eru vanligir blankir knappar nýttir. Búnin er seymaður sum myrkt jakkasett av sterkum tilfari. Fyri umleið hálvum ári síðan eru politikasjettar bestiltir frá einum felag í London.

Hilmar Thomsen

Sambært roknskapinum 1943 eru 3.600 kr. goldnar í løn til Hilmar Tomsen, politist og 20 kr. fyri eina lumalykt, t.v.s., at hann frá kommununi hevur fingið løn frá 1. januar 1943.

3. februar 1943 skrivar Miðvágs kommuna til Froðbiðar sóknar kommunu og boðar frá, at Hilmar Thomsen, Sumba, hevur tikið fastan bústað her í kommununi, og er hann soleiðis settur í skatt her fyri árið 1943. Vegna kommunuskattin hjá Hilmar Thomsen, politisti, bleiv træta millum Miðvágs kommunu og Sumbiar kommunu, sum í høvuðsheitum snúði seg um, at Hilmar Thomsen ikki hevði boðað fráferð frá Sumbiar kommunu í rættari tíð. Í einum skrivi um hetta málið frá januar 1944 verður nevnt, at Hilmar Thomsen, eina tíð, áðrenn hann kom til Miðvágs, var í Tórshavn. Og fløkir tað eisini málið nakað. Sum tilboð um semju í málinum skjýtur Miðvágs kommuna stórtikin upp, at 1/4 av skattinum hjá Hilmar Thomsen fyri 1943 fellur til Sumbiar kommunu, hóast maðurin longu hevði goldið skattin til Miðvágs kommunu. Málið gekk tó heilt til einaferð í 1945 fleiri mánaðir eftir, at Hilmar Thomsen var givin sum politistur í Miðvágs sókn, tá endalig semja fekst millum kommunurnar. Í brævi til Sumbiar kommunu verður tá sagt, at málið er so gamalt nú, at nú má endalig greiða fáast á hesum. Og tað verður tað so, har Sumbiar kommuna góðtekur uppskotið frá Miðvágs kommunu. Uttan at koma meira inn á hetta gjørdist málið drúgvari enn neyðugt, eisini vegna ymsar misskiljingar frá Sumbiar kommunu, sum blandar uppí málið, at Miðvágs kommuna eisini hevði kravt skatt frá manninum fyri 1942, sum annars ikki framgongur nakrastaðni í skjølunum hjá Miðvágs kommunu.

10. juni 1943 skrivar Vága sýsla og sigur, at fútin hin 29. mai í ár hevur skrivað, at Landsnevndin hevur tikið undir við, at útreiðslurnar til telefon hjá politistunum í Vágum verða býttar soleiðis, at kommunan og amtsgrunnurin býta gjaldið av haldaragjaldinum, meðan politikassin rindar samtalurnar. Telefonir eru bestiltar frá telefonverkinum, verður sagt.

9. september 1944 var fundur í forstandarskapinum heima hjá formanninum. Fýra av limunum vóru møttir, Jens Jákup Niclasen var burturstaddur til fiskiskap. Skriv varð komið frá politistinum Hilmar Thomsen um at verða settur í fast starv hjá kommununi, tí hann helt

at núverandi setanin var ov leys. Um hann ikki kundi fáa eina slíka trygd, bað hann um at fáa eitt ummæli, so hann kundi søkja á øðrum stað.

Samtykt varð at svara, at vit ikki í núverandi løtu kunnu siga nakað um fast arbeiði, serliga vegna, at tað er Løgtingið, sum rindar helvtina av lønini, og teir eru ikki spurdir. Men forstandarskapið vil geva eitt viðmæli, um so skal vera.

Sambært roknskapinum hjá kommununi eru 3.300 kr. goldnar í løn til Hilmar Thomsen fyri 1944, sum svarar til 11 mánaðir. Harumframt er goldið fyri eina lummalykt, 20 kr. og fyri telefonhald 68,64 kr. Tilsamans 3.388,64 kr. Av hesum fekk kommunan 1.800 kr. endurgoldnar frá Løgtinginum.

Hilmar Thomsen røkti starvið sum politistur í Miðvági í knapt 2 ár, frá 1. januar 1943 til 30. november 1944.

Sambært skrivi 6. november 1946, har kommunan verður biðin um váttan fyri tíðina Hilmar Thomsen starvaðist í Miðvági, so starvaðist hann í 1946 sum politistur í Klaksvík.

Krevja lønarhækkan

5. oktober 1943 skrivar Christian Larsen, sýslumaður. Politistarnir í Vágum Petur á Steig, Sandavági, Hilmar Thomsen, Miðvági og Joen Pauli (Palli) Joensen, Sørvági, hava hin 21. september 1943 saman skrivað til fútan, har teir siga, at teir vórðu settir í starv um nýggjárstíð 1943 fyri eitt ár við 300 kr. í løn um mánaðin hvør. Hesa tíðina er prístalið fari nógv upp, men okkara løn er ikki vaksin sum hjá øðrum starvsfólkum. Hetta meta vit vera órættvíst. Lønin hjá einum politisti í Havn er t.d. 527 kr. um mánaðin við byrjunarløn uppá 300 kr. Í Vágum fær tann minst lønti arbeiðsmaðurin 16 kr. um dagin frá bretsku hermegini, hjá sivilum arbeiðsgevarum fáa teir 2,32 kr. um tíman. Hetta eru lægst løntu arbeiðsfólkini. Handverkarar og onnur fáa meira um tíman. Út frá hesum sæst, at vit vinna ikki so frægt sum lægst løntu arbeiðsmenninir. Nú dýrtíðin er, kundu vit vunnið meira við vanligum arbeiði. Harumframt skaðar tað okkara umdømi, at vit eru so lágt løntir. Tá fútin hevur sett okkum í starv, halda vit tað vera natúrligt at venda okkum henda vegin. Vit vóna, at fútin fer at gera tað, hann kann fyri okkum við møguliga at leggja málið fyri Løgtingið.

Sýslumaðurin spyr so forstandarskapið, um kommunan er tilreiðar at rinda meira í løn, og hvussu stóran part av lønini kommunan vil rinda. Tá málið helst verður sent Løgtinginum í inniverandi tingsetu, verður heitt á forstandarskapið um at svara skjótast tilber.

20. oktober 1943 var skrivið frá sýslumanninum og politistunum um lønarhækkan til politistarnar til viðgerðar í forstandarskapinum í Miðvági. Samtykt varð at svara, at vit ikki halda tað vera rætt at geva lønarhækkan í ár, men vit eru tilreiðar at venda aftur til málið seinni. Sum t.d. at lønin hækkar eftir fleiri ár í tænastuni, á sama hátt, sum gjørt verður við tænastumenn, so sum lærarar og onnur, verður sagt í gerðabókini.

1. november 1943 skrivar Vága sýsla, Sørvági, og sigur, at politistarnir í Vágum hava spurt fútan um útreiðslur í smb. við lummalygtir og battaríir. Fútin hevur svarað og sagt, at í Havn rindar kommunan fyri hetta. Farið at spyrja kommununa, um kommunan vil rinda hesar útreiðslur. Skjóti upp við 20 kr. um árið.

9. november 1943 verður svar sent aftur til sýslumannin og sagt, at kommunan góðtekur uppskotið um 20 kr. um árið til endamálið.

Spurningurin er helst í sambandi við, at Sørvágs kommuna hevði noktað politistinum har stuðul til lummalykt í 1943 og hevði svarað heldur harðliga aftur upp á umsóknina um lønarhækkan, sum helst gjørdi, at politisturin nokkso skjótt aftaná segði upp. Annars kann nevnast at eingin av hesum fyrstu fastløntu politistunum í Vágum var leingi í starvi, høvuðsorsøkin var, at teir vóru ónøgdir við lønina.

8. november 1943 skrivar Miðvágs kommuna til Vága sýslu sum svar upp á skriv frá 5.

oktober viðv. løn til politistarnar í Vágum. Forstandarskapið heldur, at tað er ikki hendur stórur munur á prístalinum í ár – (sum er tað mótsatta av, hvat politistarnir hildu). Og siga víðari: Hartil er at siga, at skulu teir lønast saman við prístalinum, fara teir eisini niður í løn saman við prístalinum. Sum sær út til at ganga tann vegin. Tá teir samanlíkna seg við tímalønt arbeiðsfólk, so heldur tað ikki. Tímalønt fáa ongantíð arbeiði hvønn arbeiðsdag alt árið. Vit vilja sjálvandi ikki minka um virðingina hjá politistunum, men vit halda ikki, at lønin er partur av tí. Tað snýr seg meira um, hvussu maðurin førir seg fram og soleiðis vinnur virðing. Og tað vil gera nógv til, at hann kann vinna sær lønarhækkan í framtíðini. Ein ólærdur kann ikki vænta so nógva løn í byrjanini. Tað liggur heldur ikki nakað fyri, at brúk ikki verður fyri politistum eftir kríggið. Tað verður helst altíð brúk fyri politistum, men hetta kann tó ikki sigast nakað um nú.

Politiviðtøkur fyri Vágar

12. januar 1943 skrivar fútin sítt næsta bræv til kommununa og sigur, at sýslumaðurin er biðin um at gera uppskot til eina reglugerð fyri politistin, sum skal leggjast fyri forstandarskapið. Eitt eintak av reglugerð fyri politistin í Klaksvík er viðlagt.

Úr reglugerðini í Klaksvík, sum er viðløgd, kann í stuttum nevnast, at politisturin starvar beinleiðis undir sýslumanninum. Politisturin skal syrgja fyri friði og lóg í bygdini. Hann skal ganga rundu í bygdini frá kl. 7 um kvøldið til kl. 1 um náttina og skal vera tilreiðar, um sýslumaðurin heldur tað vera neyðugt, at traðka til aðrar tíðir á samdøgrinum. Tá fútin er á staðnum, skal politisturin akta hansara boð fram um øll onnur boð. Politisturin má ikki átaka sær annað arbeiði uttan loyvi frá sýslumanninum ella forstandarskapinum.

28. februar 1943 var skrivið frá fútanum til viðgerðar á felags kommunalum fundi í Vágum. Møttir fyri Sandavágs kommunu vóru: Poul Joensen, Hjalmar Nielsen, Thor Nielsen og Peter Elias Petersen. Fyri Miðvágs kommunu: Søren Danielsen og Jens Rasmussen. Fyri Sørvágs kommunu: Thomas Thomasen og Peter Weihe. Fyri Bíggjar kommunu: John Joensen, Gásadali og Edvard Jacobsen, Bø.

Til viðgerðar var m.a. politiviðtøka fyri bygdirnar Sørvág, Miðvág og Sandavág. Sýslumaðurin var tilstaðar, tá hetta málið varð viðgjørt. Samtykt varð at biðja sýslumannin um at evna eina reglugerð eftir grundarlagið frá tí framlagda reglementi fyri Klaksvík. Reglementið, sum sýslumaðurin hevði gjørt, skuldi so leggjast fyri forstandarskapini til ummælið, áðrenn tað varð sent inn til fútan.

Hetta hendi so á fundi 13. februar 1944, har kommunustýrini í Vágum vóru møtt. Í gerðabókini fyri felags kommunalu fundirnar verður sagt, at eitt uppskot til politiviðtøku fyri Vágar varð lagt fram og gjøgnumgingið, og vóru allir á einum máli um at góðtaka hetta. Uppskot varð sett fram um at fáa hetta skrivað á føroyskum, og varð tað samtykt.

Sambært skrivi seinni varð reglugerðin fyri politistar í Klaksvík nærmast orðarætt endurgivin og brúkt í Vágum.

Í 1948 hevur kommunan spurt løgtingsskrivstovuna um reglugerð fyri politi. Hví tað er, er óvist. 3. august 1948 skrivar løgtingsskrivstovan og sigur, at send verður reglugerð fyri politist í Nes sóknar kommunu. Henda reglugerð líkist sera nógv teirri kommunan, í síni tíð fekk fyri politistin í Klaksvík.

Herverk móti Chester Camp og Bø Camp

Í 1944 er herverk og annað framt móti sonevnda Chester Camp, sum var bretskur loftverjuskansi niðri við Vatn stutt sunnanfyri Gróthústanga og eisini við Bø camp, kanónstøð, sum vardi innsiglingina til Sørvágsfjørð. Júst, hvat er hent, er eitt sindur óvist, men ymsu skrivini geva eina ábending um tað. Bretska hervaldið tók hetta ógvuliga álvarsliga, og hevði skrivað

sera álvarsliga til kommunurnar í Vágum og til sýslumannin og fútan um hetta. Hetta endar við, at bæði fútin og sóknarstýrini skriva álvarslig uppsløg, sum verða hongd upp í størru bygdunum í Vágum.

24. apríl 1944 skrivar Niels Westerby fúti til Søren Danielsen formann í forstandarskapinum. Hervið fylgja nøkur eintøk av lýsingini herfrá, sum samstundis er send til sýslumannin, soleiðis, at útbýtingin skjótast kann fara fram saman við áheitanini frá sóknarstýrinum.

Áheitan

Bretska hermaktin hevur ígjøgnum politiið vent sær til sóknarstýrini um tær hendingar, sum í seinastuni eru farnar fram ímóti ognum hjá hermaktini í Vágum.

Tað eru ólógligheitir framfarnar, sum rámt hava hart. Tað hevur verið til okkara rós, at vit hava dugað at skilt ímillum okkara egna og annans, sum hevur verið í friði. Henda rætthugsan eigur hvør rætthugsandi maður at vara um, og ikki lata spillandi kreftir og atburðir koma til, til niðurbrótan av umdømi, spillan av framtíð fyri seg og øll síni.

Hermaktin tekur tað, sum hent er, við ógvuligum álvara og hevur kunngjørt sóknarstýrunum, at reglur kunnu væntast settar í gildi, sum bæði eru vandafullar og strangari enn vit nakrantíð hava kent her á landi.

Sóknarstýrini hava kannað hetta og vilja gera sítt fyri at verja fyri, at slíkar reglur koma í gildi. Vit halda, at einstakir ikki kunnu loyvast atburðir, ið fellur straff á ósekan og hampamann. Sóknarstýrini skulu tí í reinasta álvara heita á allar íbúgvarnar at halda seg burtur frá øllum ognum hjá hermaktini, vísa hampa atburð og gera sína skyldu til, at ikki ósekur maður fellur í straff, og at vit ikki vera hildin sambrotsmenn.

Sóknarstýrini vænta stuðul í hesum strevi sínum, og at tað umdømi, fedrar okkara høvdu, og vit hava havt skal vera sitandi óspilt.

Kunngerð

Við at vísa til áheitan frá forstandarskapunum og sum stuðul til hesa kunnger undirritaði fúti hervið fylgjandi kunngerð frá 21. apríl 1944, sum er móttikin frá tí leiðandi herovastanum fyri teir bretsku hermenninar í Føroyum við umbøn um almannakunngerð:

"Tað er við stórum harmi, eg eri noyddur at siga frá, at tað aftur er gjørt herverk móti Chester Camp og Bø Camp. Sjálvt um hesar hendingar ikki í sær sjálvum eru serliga álvarsamar, eru tær kortini gjørdar, meðan mál framvegis er í rættinum viðvíkjandi teimum fyrstu atgerðunum. Hetta sýnir eina ávísa vanvirðing fyri tí bretsku hermegini frá nøkrum av íbúgvunum í oynni. Vegna hesa hending síggi eg meg tíverri at vera noyddan at taka fylgjandi stig, um slíkar atgerðir ikki fullkomiliga halda uppat:

1) Viðkomandi kommuna verður sett til svars fyri gjaldi av skaða, sum framdur er á hernaðar ogn.
2) Innført verður sperritíð.
3) Øll ferðaloyvi til og úr Vágum verða avtikin.
4) Landminur verða lagdar á hernaðarøki.

Eg vil vera sera takksamur, um tygum vilja siga forstandara formonnunum frá, at tað fer at harma meg almikið, um eg verið noyddur at taka hesi stig, tá eg kenni, at hetta vil gera nógv til at oyðileggja tey góðu viðurskiftini millum hermenninar og sivilfólkið, sum higartil hevur verið ein so dámlig kensla undir okkara uppihaldi á oyggjunum."

Við at boða frá áðurnevnda verður inniliga ávarað móti einum hvørjum broti móti tí bretsku hermaktini, soleiðis: Vanæra av bretskum hermonnum, skaði á ella tøka av bretskari ogn,

ólógligt keyp frá bretskum hermonnum, umframt øll ferðing á bannaðum øki, við tað at slíkar gerðir, umframt brot á vanliga lóg, koma at føra við sær, at tær áðurnevndu atgerðir verða settar í verk.

Inniliga verður heitt á øll um at halda boðini hjá forstandarskapinum og gera sítt ítasta til at hjálpa til, at slík brot ikki verða framd, til óbótaligan skaða fyri tann einkulta, hansara bygd og samfelag. Niels Westerby, fúti.

Miðvingur í uppskoti sum politistur

24. november 1944 var fundur í forstandarskapinum, heima hjá formanninum, Sørin Danielsen. Allir limir vóru møttir. Til viðgerðar var bert eitt mál á hesum fundinum. Gjøgnum sýsluna vóru komnar 5 umsóknir til leysa starvið sum politistur í Miðvági. 4 umsøkjarar úr Miðvági og ein úr Suðuroy, hetta varð Johan Albert Joensen úr Fámjin. Atkvøtt varð um innkomnu umsóknirnar og fekk ein miðvingur 3 atkvøður og Johan Albert Joensen, Fámjin, 2 atkvøður.

Trupulleikin var nú, sum Niels Westerby, fúti skrivar 5. desember 1944, at bretska hermegin vildi ikki góðtaka setanina av miðvinginum, sum vit lata vera ónevndan. Orsøkin var, at hann var ein av teimum, sum var millum teir mongu, sum í apríl hetta árið var við Chester Camp hernaðarlegu, sum var stongt øki, og var hetta helst kent av mongum, sigur fútin. Við kanning av t.d. tí seinasta innbrotinum í Miðvági, kann hann risikera at verða møttur á óhóskandi hátt, og verður tað soleiðis trupult at fáa ta neyðugu verjuna sum politistur t.d. við ein dómstól. Starvið í løtuni er eisini soleiðis, at hann í stóran mun verður millumlið millum borgaran og bretska hervaldið. Tað er bretska hervaldið, sum hevur víst á innstillingina av manninum, har teir fyri mær hava sátt iva um, hann er rætta evni til hetta starv júst nú. Tá júst álit frá hermegini er neyðugt í hesum starvinum, fari eg enn einaferð at leggja málið fyri forstandarskapið og kann nevna, at tað eisini er møguleiki fyri at lýsa starvið leyst enn einaferð.

Málið var fyri í forstandarskapinum 8. desember 1944. Samtykt varð at útseta málið nakrar dagar, tá nakrir úr forstandarskapinum ynsktu umhugsanartíð, áðrenn teir tóku endaliga støðu.

14. desember 1944 var málið um setan av politisti tikið uppaftur. Sett varð fram uppskot um at heita á fútan um at taka endaliga avgerð í málinum. Um fútin helt, at tað í skrivinum nevnda var til hindurs fyri setanina, vildi forstandarskapið ikki seta seg ímóti, at fútin avgjørdi málið soleiðis, sum hann helt tað vera gagnligast. Hetta varð einmælt samtykt.

Albert Joensen politistur

19. januar 1945 skrivar Niels Westerby, fúti, og takkar fyri álitið forstandarskapið hevur sýnt honum við setan av politisti í Miðvági. Skal siga frá, at eftir at eg gjølla havi hugsað meg um síðan bræv tykkara frá 5. desember 1944 og tær nevndu umstøðurnar og eftir míni bestu samvitsku havi funnið tann rætta til starvið. Og er tað Johan Albert Joensen. Havi skrivað til hann um hetta. Eg hugsaði um at lýsa starvið leyst aftur, men tað hevði møguliga bert givið teir somu umsøkjararnar, og tað vildi verið keðiligar umstøður at byrja eitt nýtt starv, at starvið varð lýst leyst aðru ferð. Í staðin helt eg tað rættari, at starvið verður sett sum ein roynd í 3 mánaðir, og at starvið so verður lýst leyst, um hansara viðurskifti og tænasta ikki vísa seg at vera nøktandi. Eri greiður yvir, at Johan Albert Joensen er sera ungur, men ein má royna at geva honum allan stuðul og hjálp, sum gjørligt er. Eg skal syrgja fyri, at hann kann byrja skjótast tilber.

Avrit av brævinum, sum varð sent til Johan Albert Joensen, Famien, fylgir við, bæði vóru upprunaliga á donskum:

Føroya fúti. 19. januar 1945. Eftir tygara umsókn verður sagt, at tygum fyribils er settur

Albert Joensen

sum politistur í Miðvágs kommunu frá 1. februar 1945. Setanin er sum ein roynd í 3 mánaðir, og kann starvið uppsigast frá báðum pørtum við 1 mánaðar varningi. Lønin nú er 300 kr. um mánaðin, sum verður goldin av Miðvágs kommunu við endan av hvørjum mánaði. Útvegaður verður fríur búni annað hvørt ár. Sum politistur mást tú nágreiniliga fylgja reglunum fyri politistar í Føroyum frá 13. apríl 1894 § 9-17 og nevniliga í tygara tænastu umganga óhøvuskan atburð umframt at sýna mátahald og sinniligheit.

Albert varð føddur hin 20.12.1922 og var sostatt bert 22 ára gamal, tá hann varð settur sum politistur í Miðvágs sókn frá 1. februar 1945 at rokna.

Ofta fekk politisturin okkurt eyka arbeiði eisini frá kommununi, sum allarhelst kom undir politistaløninа. T.d. var 23. desember 1945 samtykt í smb. við fólkateljing, at Daniel Pauli Niclasen skuldi skriva upp Húsagarð, Hans Samuelsen, Bakkan og Dalbø, Sørin Danielsen, Eirikstoft og Rygg og Jens Rasmusen, Kirkjar, meðan politisturin varð sendur til Vatnsoyrar at skriva upp nøvnini har. Sýslumaðurin kundi eisini geva politistinum uppgávur, sum annars vóru uttanfyri hansara arbeiðsøki. Í skrivi 9. juni 1947 frá kommununi er nevnt, at sýslumaðurin framdi ikki panting hetta árið (sum annars vanligt var), men sendi harafturímóti politistin runt at krevja skatt inn í Miðvági; tó kom væl av pengum inn, verður lagt afturat.

Sambært roknskapinum 1945 vóru hesar útreiðslur og inntøkur viðv. politistinum, Albert Joensen løn, 3.300 kr., sum svarar til 11 mánaðir, búni 329,55 kr. kasjettur 29,17 kr., regnfrakki 150 kr. og lummalykt 20 kr. Í alt 3.828,72 kr. Av hesum fekk kommunan 1.650 kr. endurgoldnar frá Løgtinginum.

Annars kann nevnast um lønina hjá Albert Joensen sum kommunalum politisti, at hon var tann sama øll árini hann fekk løn frá kommununi, 300 kr. um mánaðin ella 3.600 kr. um árið fyri politistaarbeiði.

19. mai 1947 skrivar fútin, at hann 24. í sama mánaði hevði skrivað til sýslumenninar, at málið var at hava líka búnar fyri allar politistar í Føroyum, og havi eg, eftir brævaskifti við útrustningsskrivstovuna hjá ríkispolitiovastanum, fingið tilsøgn um levering av øllum bununum í samsvar við politiuniformering í danska ríkinum. Soleiðis at útvegan av stoffi og lutum og seymiløn verður goldin av føroysku kommununum. Vegna at ríkispolitiovastin kann keypa inn í stórum, verður kostnaðurin helst ikki so stórur. Um forstandarskapið hevur nakað at innvenda ímóti skipanini vænti eg at hoyra um tað.

Men har sæst so einki at verða sagt um tað.

Helvtina av ársløninі fekk kommunan endugoldna frá Løgtinginum, ella 1.800 kr. um árið.

Árini 1946, 47, 48 og 1950 fær Albert Joensen 20 kr. í endurgjaldið pr. ár fyri lummalykt. Seinni er hetta ikki nevnt, men frá 1952 fær hann endurgjald fyri telefon, um 100 kr. um árið, sum í 1957 og 1958 er hækka upp í 170 kr. um árið.

Í 1947 er nýggjur búni keyptur frá Gotfred Joensen, Miðvági, fyri 239,50 kr., stórir politiknappar frá fútanum fyri 14,70 kr. og kasjettur fyri 30,50 kr. Í 1948 er búni keyptur frá skrivstovuni hjá ríkispolitiovastanum fyri 365,15 kr., og í 1949 er búni keyptur frá fútanum fyri 493,07 kr. So her er nýggjur búni keyptur 3 ár á rað, men so er búni ikki keyptur aftur fyrr enn í 1951, politibúni frá fútanum fyri 582,64 kr. og so aftur í 1956 búni frá Vága sýslu, 1.014,11 kr.

Í fundarfrásøgn frá fundi 22. august 1947 verðu sagt, at samtykt varð, at opna tað nýinnrættaðu kommunuskrivstovuna hin 1. september og skrivstovutíðin varð sett til 2 tímar um dagin tríggjar dagar um vikuna soleiðis: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 4 til 6 seinnapart. Hetta varð kunngjørt í kunngerðatalvuni. Somuleiðis varð samtykt at seta politistin sum hjálparmann á skrivstovuni fyri 500 kr. um árið.

Sambært kunngerð frá 23. august 1947 varð kommunuskrivstovan frá 1. september flutt í húsini hjá Martin Johansen og var smb. lýsingini inngongdin gjøgnum handilshurðina.

Á fundi 24. mars 1949 varð samtykt, at Albert Joensen, sum higartil hevur sitið á kommunuskrivstovuni, framvegis skal gera tað dagliga arbeiði á skrivstovuni, og Johannes Ravnsfjall skal vera hjálparmaður hansara. T.v.s., at Albert nú eisini kemur at starva sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu, og var hetta hálva tíð. Tilsamans starvaðist Albert á kommunuskrivstovuni í Miðvági í 27 ár. Á fundi 21. september 1949 verður samtykt, í smb. við at Landsstýrið hevði avgjørt, at settur varð ein manntalsskrivari í hvørjari kommunu, at seta Albert Joensen, politist í starvið.

Eg sovi mær megi . . .

BØH!

Innan fyri býar- og bygdamark má ikki verða koyrt skjótari enn 15 km. Uttanbygdar er persónvogni loyvt at koyra 30 km og lastvogni 20 km. Markið millum innan- og uttanbygdar verður sett av landfútanum eftir áheitan frá avvarandi bygdar- og býarstýrum.

Rættindi til at nýta hesar ferðir eru tó bert, tá ið vegurin er so vorðin, at roknast kann við tryggari ferðslu. Annars skal ferðin vera eftir sum umstöðurnar loyva. Á serliga vandafullum strekkjum kann politiið við uppslögum boða frá störstu loyvdu ferð.

Tá ið koyrt verður, skal fyrst og fremst verða hugsað um trygdina hjá ferðafólkunum og hinum, sum á vegnum ferðast.

Tekur vognur aftur ella mötir koyrandi, ríðandi, gangandi ella öðrum, skal hornið verða nýtt rættstundis og vognurin koyrast so langt út á vinstra ella högra jaðara, sum tað nú

Úr hondbók frá 1952 um ferðslu.

18. desember 1951 skrivar sorenskrivarin (dómarin) og sigur, at sagt verður frá, at politistarnir Jacob Pauli Nielsen, Sørvági og Johan Albert Joensen, Miðvági, dags dato eru settir sum stevningarmenn fyri ávikavist Sørvág og Miðvág.

Albert fekk eisini onnur arbeiði, sum kanska ikki samsvarðaðu væl við politiarbeiðið, men sum sýnir, at teir høvdu stórt álit á honum. Á fundi 25. juni 1952 í smb. við, at vegurin norðuri í Illulág varð gjørdur í 15 stykkjum á 10 metrar hvørt, har 15 hold høvdu teknað seg, varð avgjørt at seta Albert Joensen, politist, at eftiransa arbeiðinum.

Hesi størvini fekk hann sjálvsagt løn fyri umframt lønina sum politistur. Og hevði hann sostatt tvey føst arbeiðir hjá kommununi umframt eykaarbeiðir av og á. Við tað at politistalønin ikki var stór og ikki var broytt, so hevur hetta bøtt um tað.

19. november 1956 verður skrivað til Telefonverkið, Tórshavn, viðv. uppsetan av eini klokku hjá politistinum. Hetta var í samband við telefonina, um telefonin t.d. stóð í miðhæddini, so kundi man fáa "klokku" innlagda á loftinum, so ein betur hoyrdi, um telefonin ringdi.

Seinasta árið Albert Joensen fekk løn sum politistur hjá Miðvágs kommunu var í 1958, har hann fekk løn fyri 7 mánaðir januar til og við august 1958 2.100 kr. Telefon, 165 kr. Í alt 2.265,00 kr.

Albert Joensen starvaðist soleiðis sum politistur hjá Miðvágs kommunu frá 1. februar 1945 til 31. august 1958, 13 1/2 ár, men helt síðan fram sum politistur í Vágum frá 1. september 1958 til 31. mars 1962, tá undir ríkispolitinum, og starvaðist sostatt tilsamans sum politistur í gott 17 ár.

Annars er sagt um Albert, at hann hevði sagt, at um politisturin í Sørvági søkti stavið sum politistur í Vágum, so ætlaði Albert sær ikki at søkja. Men politisturin í Sørvági søkti ikki. Somuleiðis tá starvið sum tollari í Vágum skuldi setast. Við tað at Palli Joensen, fyrrverandi

politistur í Vágum, søkti, so vildi Albert ikki søkja. So hann var ikki sjálvsøkin, kann ein siga.

Eftir at Albert gavst sum politistur varð hann settur í fulla tíð sum kommunuskrivari hjá Miðvágs kommunu.

Albert var giftur Jyttu, f. Hansen, ættað úr Miðvági (systur m.a. Stoffa, kenda bátasmiðin og Hansias, sum hevði telefonstøðina í Miðvági). Albert og Jytta áttu eitt barn, dóttrina, Mariannu Simonsen, f. Joensen, sum seinni var borgarstjóri í Miðvági í nøkur ár. Marianna er gift Erlingi Simonsen, Sørvági, og tey búgva í barnaheimi hennara í Miðvági, og eiga eitt barn, sonin, Jens Albert.

Johan Albert Joensen andaðist hin 23. desember 1974, bert 52 ára gamal.

Málið um politist eftir kríggið

15. juni 1945 skrivar Løgtingsskrivstovan, Edward Mitens, Tórshavn, og sigur, at eykapolitistur var settur í Miðvági undir heimsbardaganum við samtykt frá løgtinginum og við studningi frá tinginum, sum rindar helvtina av lønini. Henda setan av eykapolitisti er ein bráðfeingis skipan fyri ófriðartíðina, so málið má verða viðgjørt av nýggjum, um sóknarstýrið skuldi ynskt at hava politist í kommununi aftaná, at heimsbardagin er liðugur. Har fútin og Landsnevndin koma at viðgera spurningin, um hann verður aktuellur.

Christian Larsen, sýslumaður, skrivar hin 4. juli 1945, og sigur, at fútin spyr, um kommunan ynskir at halda fram við politisti og at senda svar til sýsluna.

Bæði fyrrnevndu skriv eru til viðgerðar á fundi 17. juli 1945. Samtykt varð at svara, vit halda fram til endan av 1946, og síðan venda vit aftur til málið. Alt undir teirri treyt, at Løgtingið, sum higartil, rindar hevltina av lønini. Vit halda, at viðurskiftini koma at vera soleiðis, at tað kemur at verða neyðugt at hava ein slíkan mann her í bygdini, tí væntandi fer skipaferðslan at økjast støðugt, og verður tað trupult hjá einum sýslumanni, sum býr í Sørvági, at fylgja við og fremja tað dagliga arbeiði, sum neyðturviliga kemur at vera í Miðvági við tí vaksandi ferðsluni.

14. februar 1947 skrivar Føroya Løgting. Hervið verður sent nevndarálit í tingmáli um studning til eykapolitistar, sum varð játtaður undir krígnum vegna serlig viðurskifti, og sum fellur burtur hin 31. desember 1947. Uppskot nevndarinnar varð samtykt við 15-0 atkvøðum 28. januar 1947.

3. november 1947 verður skrivað til Løgtingsskrivstovuna, Tórshavn. Vegna skriv tygara at stuðulin til løn til politistar steðgar, loyva vit okkum at boða frá, at vit ikki kunnu umvera politist í bygdini og verða noyddir at halda fram, sjálvt um vit ongan stuðul fáa. Vit høvdu væntað at stuðulin helt fram, tá vit vita, at politisturin í Miðvági ger eitt stórt arbeiði fyri sýslumannin, og vit kunnu vist nokk siga eitt dagligt arbeiði. Um stuðulin fellur burtur, kemur væl saktans tað arbeiði eisini at fella burtur, sum væl ger, at arbeiðsbyrðan hjá sýslumansskrivstovuni kemur av vaksa við somu nøgd og við nógvum ferðingum til Miðvágs. Tí hava vit hildið, at vit eiga rætt til eina hóskandi samsýning fyri hetta. Men forstandarskapið hevur samtykt at halda fram við politisti, og um eingin stuðul verður veittur, søkja vit um loyvi til at rinda útreiðsluna sjálvir.

17. desember 1947 skrivar fíggjarnevnd løgtingsins og sendir við nevndarálit frá løgtingsmáli, har staðfest verður, at løgtingsstudningurin til lønan av eykapolitistum, settir undir krígnum vegna krígsstøðuna, fellur burtur tann 31. desember 1947.

24. mars 1948 skrivar løgtingsskrivstovan, at umsóknin um stuðul til politistaløn var til viðgerðar í landsnevndini hin 20. í hesum, og at nevndin samtykti at beina málið til viðgerðar í Løgtinginum.

Málið sæst ikki umrøtt í løgtingstíðindum 1948, so tað er helst ikki tikið upp. Tað eydnast

sostatt ikki sóknarstýrinum at fáa Løgtingið at halda fram við stuðlinum, og frá og við 1948 má kommunan so rinda alla lønina til politistin sjálv. Og gerst politisturin sostatt fíggjarliga sæð, kommunalur burturav, men framvegis undir somu skipan og undirlagdur sýslumanninum og fútanum. Ein skipan sum helt fram til 1958.

Ætlan um ger av varðhaldi í Vágum

11. desember 1947 skrivar fútin, at sýslumaðurin hevur biðið um at fáa gjørt eina detentión (varðhald) í sýsluni at hýsa persónum, sum antin vegna ov nógv spiritus, bardaga ella sinnissjúku mugu setast í varðhald. Eitt slíkt varðhald má ongantíð fara yvir 24 tímar, so skal viðkomandi sendast til Havnar, um tað er neyðugt, ella um tað er sinnissjúka so skal læknabáturin koma eftir sjúklinginum innan henda tíð er farin. Tað kann ikki haldast rímiligt, at sýslumaðurin skal hava slíkar persónar í sínum egnu húsum uttan so, at serstakt rúm er gjørt til tað. Tá sýslumaðurin er í Sørvági, verður hildið best, at hetta rúm er har í bygdini. Tað hevði helst eisini verið praktiskt at havt eitt slíkt rúm í Miðvági eisini. Hildið verður, at hóskandi var, um tvey slík rúm vóru gjørd, har ein lág briks var inni við voksdúki og sterkt hegn fyri vindeyguni og sløtt hurð og avlop í gólvinum, so tað kann spulast. Upphiting kann vera við ovni, sum er uttanfyri rúmið. Tá allar bygdirnar í oynni kunnu fáa nyttu av hesum, var helst hóskandi, um Sørvágur, Miðvágur og Sandavágur saman samráddust við sýslumannin um málið. Skrivað er eisini til hini forstandarskapini um málið.

Á fundi í forstandarskapinum 22. desember 1947 varð samtykt at leggja málið fyri ein felags fund millum forstandarskapini í Miðvági, Sørvági og Sandavági.

Hugt er í gerðabókina fyri felags kommunalar fundir í Vágum frá hesi tíð, men har er málið ikki nevnt. Í skrivi til sýslumannin í februar 1949 verður sagt, at svar varð sent beinanvegin í 1947. Avrit ella journalisering av skrivinum er tó ikki funnin.

23. februar 1949 skrivar Vága sýsla og endugevur orðarætt brævið frá fútanum 11. desember 1947 um at byggja varðhald í Sørvági og í Miðvági til fyribils at hýsa persónum, sum eru handtiknir. Eftir upplýsingum frá fútanum, so hava forstandarskapini ikki enn svarað upp á spurningin, og verður tí heitt á at forstandarskapini at hugsa um hetta og svara spurninginum skjótast.

Skrivað verður til sýslumannin 24. februar 1949. Vísandi til skriv tygara frá í gjár um varðhald í Miðvági verður boðað frá, at vit beinanvegin svaraðaðu skrivinum, soleiðis, at vit eru tilreiðar at innrætta eitt slíkt høli. Vit hava eini hús undir bygging, har vit halda, at vit høvdu havt gott pláss til tað. Tó kunnu vit ikki siga nágreiniliga, nær hetta verður liðugt bygt, tá bygingin fyri tíðina er steðgað vegna mangul á bygningstilfar, men vit hava fingið lyfti um timbur í mars. Áðrenn vit gera hølið, skulu vit tingast við tygum um innrættingina.

Her verður hugsað um kommunuskrivstovuna í Miðvági, sum er í gerð.

Sigast kann, at meira sæst ikki til málið á hesum sinni. Annars leigaði løgreglan seg inn í kommunuskrivstovuna í Miðvági seinni. Tað verður vent aftur til.

Uppskot um, at politistarnir eisini verða tollarar

24. juni 1948 kemur bræv, har bæði Landsstýrið og løgtingsskrivstovan standa sum avsendarar. Í brævinum verða kommustýrini fyri Miðvágs og Sandavágs kommunur biðin siga frá, um stýrini kunnu ganga við til, at ein politistur verður settur fyri báðar kommunurnar við tí uppgávu at virka sum politistur og tolleftirlitismaður, soleiðis at kommunurnar fáa afturgoldið frá landsstýrinum helvtina av løn hansara. Ætlandi verður lønin um 5.000 kr. fyri ógiftan mann og um 6.000 kr. fyri giftan mann árliga. Kommunustýrini verða umbiðin at halda felagsfund um spurningin og siga teirra hugsan.

31. august 1948 verður svar sent Landsstýrinum. Sagt verður, at fundur er hildin millum

kommunustýrini, men har var ikki semja um bert at hava ein mann til allar hesar uppgávur. Mest vegna, at tað verður sera trupult hjá einum manni at røkja báðar bygdirnar bæði sum politistur og tollari. Vit kunnu soleiðis bert siga, at vit vilja halda fram við at hava ein politist fyri Miðvág. Um hann so eisini fær tollavgreiðsluna fyri Miðvág um hendi, um hann megnar tað eisini, so hava vit einki ímóti tí. Tó halda vit, at tolleftirlitið eigur at vera nágreiniliga framt, og at nokk av fólki verður sett til ta uppgávuna. Annars hoyra vit fegnir, hvussu henda søk verður skipað.

Her kann so sigast, at hetta ikki bleiv til nakað.

Nýggj politiskipan

Eftir 1958 varð skipanin við politistum sum frá leið broytt, so at teir politistar, sum starvaðust í Vágum eftir 1960, høvdu alla oynna sum ábyrgdarøki. Áðrenn høvdu teir bert havt ábyrgd og myndugleika innan egið kommunumark. Frá at vera kommunalir politistar gjørdust teir nú danskir tænastumenn.

Albert Joensen, Miðvági, sum áður var kommunalur politistur, helt, sum áður nevnt, fram sum politistur frá 1. september 1958 til 31. mars 1962, men nú undir ríkispolitinum og sum danskur tænastumaður.

29. september 1958 skriva Miðvágs- og Sandavágs kommunur til fútan um politiskipan. Vegna at starvið sum politistur er lýst leyst, og tá eg, undirritaði H.M. Thomasen, formaður í forstandarskapinum í Miðvági, í samtalu við fútan havi fingið upplýst, at arbeitt verður við, at politisturin skal vera staðsettur í Sørvági, vil eg átala, at hetta hendir. Til hetta skal sigast, at tað búgva millum 1500 og 1600 fólk í Miðvági og Sandavági, meðan tað í Sørvági búgva millum 800 og 900 fólk. Yvir Miðvág fer allur ferðafólkaflutningurin til og frá oynni, og tey flestu farmaskipini koma á Miðvág. Í Miðvági er einasta hotellið í oynni, sum verður vitjað av nógvum útlendskum ferðafólkum. Um tað kemur at vera flogferðsla við oynna, koma ferðafólkini at ferðast yvir Miðvágs havn, sum er felags ogn hjá Miðvágs- og Sandavágs kommunum. Harafturat er Miðvágur miðdepilin í oynni, meðan Sørvágur er meira uttanfyri miðdepilin. Í Sørvági býr jú eisini sýslumaðurin og skuldi Sørvágur soleiðis verið væl fyri við politi. Vegna hetta loyva vit allir heimaverandi limir í forstandarskapunum fyri Miðvág og Sandavág at heita á rætta viðkomandi, at politisturin verður staðsettur í Miðvági, sum tað er kunngjørt í Dimmalætting.

Um hetta kann sigast, at Albert Joensen, sum fekk starvið aftur, helt áfram við at búgva í Miðvági, og fleiri politistarnir eftir hetta búðu í Miðvági, hvussu nógvir er ikki funnið fram til, men at tað sýnist, sum tað stóð teimum frítt, hvar teir búðu í Vágum. Frá 1962 til 1994 búðu 12 teirra í Sørvági, onkur part av tíðini. Tað einu tíðina vóru tað ofta danir, sum vóru í starvi sum politistar í Vágum, og fleiri teirra vóru bert stutta tíð. Tí vóru teir helst hampuliga nógvir tilsamans.

Politistød í kommunuhúsunum

Byrjað varð at gera kommunuskrivstovuna í Miðvági í 1948, sum varð innilokað í 1949 og tikin í brúk við ársbyrjan 1951.

Gott 12 ár seinni, á fundi 26. apríl 1963, varð sagt, at kommunuskrivstovan, ið nú er, verður hildin vera ov lítil, og hevur sóknarstýrið á fíggjarætlanini avsett pening til hetta endamál, og skal sóknarstýrið taka støðu til, hvussu tann nýggja skrivstovan skal gerast.

Fútin hevur við politistinum í Vágum, Frimodt Poulsen, biðið um at fáa tað kommunuskrivstovuna, ið nú er, til politistød og samstundis fáa eitt høli til brummur, um sóknarstýrið er sinnað til at lata hesi bæði hølini, ið nevnd eru. Politisturin upplýsir, at fútin kemur vestur í næstu viku at samráðast um hetta mál.

Avgjørt varð at leggja miðstøðuhita í alt kommunuhúsið og bjóða hetta arbeiði út í Miðvági, Sandavági og Sørvági. Og avgjørt varð at taka endaliga støðu til kommunuskrivstovuna, aftaná at samráðing er farin fram um hølini til politistøð við fútan.

Fyri fund 11. oktober 1963 stendur í gerðabókini, at sóknarstýrið hevði áður tosað um at leiga høli til politistøð í ovastu hædd av kommunuhúsunum og møguliga eitt rúm afturat, møguliga í kjallaranum. Sóknarstýrið varð samt um at leiga hetta fyri 200 kr. um mánaðin.

30. oktober 1963 verður skrivað til fútan og sagt, at forstandarskapið á fundi hevur samtykt at leiga tykkum rúm til politistøð og eitt rúm til detentión fyri 200 kr. um mánaðin við ljós og hita. Ein skitsa yvir hølini verður send tygum frá Frimodt Poulsen politisti her. Vit hoyra fegnir frá tygum um hetta skótast tilber.

Málið er aftur fyri á fundi 24. februar 1964, har sagt verður í gerðabókini, at fútin hevur verið her í dag og kannað høli til politistøð, og greiddi H.M. Thomasen frá hesum máli, og vil fútin nú fyribils hava ta gomlu kommunuskrivstovuna. Avgjørt varð at leiga ta gomlu kommunuskrivstovuna fyri 150 kr. um mánaðin íroknað ljós og hita, og varð samtykt at leggja nýtt lenoleum á gólvið. Bræv verður sent fútanum við hesi avgerð 28. februar 1964.

5. mars 1964 skrivar fútin og sigur, at hann vegna Justitsministeriið tekur av tilboðnum um at leiga eitt rúm í miðhæddini í umsitingarbygninginum hjá kommununi í Miðvági til brúk fyri politistin í Vágum. Eg viðleggi uppskot til leigusáttmála í 5 eintøkum. Um tit taka undir við uppskotinum til leigusáttmála, verður biðið um at fáa øll 5 eintøkini undirskrivað og send aftur higar. Hvareftir eitt eintak verður sent kommununi aftur, eftir at tað er undirskrivað her. Í smb. við tað, vit tosaðu um hin 24. februar, vildi eg fingið eitt uppskot um reingerð av hølinum frá kommununi.

Á fundi 23. mars 1964 samtykkir sóknarstýrið at góðtaka leigusáttmálan. Og á fundi 23. mars 1964 verður samtykt at seta Tinnu Johannesen at reingera alt kommunuhúsið fyri 200 kr. um mánaðin smb. tilboð. Fyri reingerð av politihølunum tók hon 60 kr. um mánaðin, og skuldi hetta vaskast 3 ferð um vikuna.

Á fundi 23. februar 1966 var til viðgerðar, at fútin hevði vent sær til sóknarstýrið viðv. varðhaldi í kjallaranum á kommunuhúsinum, og var skriv frá Absalon Jacobsen og J.P. Frederiksen viðlagt, har teir mettu kostnaðin av einum slíkum høli at vera um 4.100 kr. Sóknarstýrið var samt um at gera eitt varðhald í kjallaranum og eina trappu oman í kjallaran og taka tað vestaru kaminina niður, ímóti at fáa eina rímuliga árliga leigu.

Kommunuhúsið varð málað uttan hetta summarið, men einki sæst til, at nakað varð gjørt innan í húsunum, og er hetta tískil ikki framt. Møguliga hevur semja ikki verið um eina hóskandi leigu.

Vit skulu so rímuliga nógv ár fram í tíðina, áðrenn nøkur broyting hendir við hesum, og leigar løgreglan høli frá kommununi øll hesi árini. Á fundi í bygdaráðnum 11. november 1971, er til viðgerðar, at kommunan hevur leigað eitt rúm til skrivstovuna hjá politistinum í Vágum burtur av kommunuhúsinum smb. leigusáttmála dagf. 23.3.1964 við fútan. Og er talan um at hækka leiguna og fyri reingerðing av hølunum. Fútin vil nú hava ein leigusáttmála fyri 3 – 4 ár, ið ikki kann sigast upp hesi ár. Og samstundis biður hann um at fáa leiguna og reingerðina ásetta av sóknarstýrinum. Sóknarstýrið vildi ganga við til ein slíkan sáttmála, móti at leigan varð 300 kr. um mánaðin fyri høli og 100 kr. um mánaðin fyri reingerð.

Málið var aftur fyri á fundi 30. desember 1971. Fútin hevði nú svarað aftur við skrivi, dagf. 9.12.1971 frá Vága sýslu, at fútin helt eina rímuliga leigu vera 225 kr. – 250 kr. Kommunustýrið samtykti, at leigan varð 350 kr. um mánaðin fyri hølið, íroknað reingerðing.

Annars kann sigast, at politistøðin í Vágum var í kommunuhúsinum í Miðvági heilt til 1985, tá nýggja politistøðin í Miðvági varð tikin í brúk.

Politistød í Miðvági

Á fundi í sóknarstýrinum hin 13. mars 1968 var til viðgerðar umsókn frá fútanum, sum hevði vent sær til sóknarstýrisformannin um at fáa grundøki á um 1000 – 1200 m² ókeypis til eina politistød og sethús í Miðvági, og bað um uppskot, hvar hetta kundi vera. Avgjørt var at kanna møguleikan fyri eini grund til nevnda endamál.

Málið varr fyri aftur á fundi 14. juni 1968, har sagt varð, at Dagmar Joensen-Næs vildi selja kommununi eitt øki uppá 1100 m² á Tungureynstrøðni burturav matr. nr. 265, og vildi hon selja økið fyri 10 kr. m², ella tilsamans 11.000 kr. Fútin vildi hava at vita, um sóknarstýrið var sinnað at lata økið ókeypis til nevnda endamál. Samtykt varð einmælt at keypa økið og lata økið ókeypis til nevnda endamál.

Viðmerkjast kann, at hetta økið fekk so matr. nr. 265b og varð økið, har politistøðin seinni varð bygd. Men tað skuldi ganga nógv ár, til tað hendi.

Á fundi í bygdaráðnum 9. januar 1976 var til viðgerðar býarplanurin. Bræv var komið frá Skaarup & Jespersen við uppskoti til at byggja "administrationscenter". Samtykt varð, at politistøðin og heilsumiðstøðin vórðu lagdar á Tungureynstrød.

Viðmerkjast kann, at hvørki av hesum uppskotum bleiv so, og í samband við politistøðina, varð seinni hildið fast við fyrru ætlanina, og varð økið, sum upprunaliga varð keypt til politistød í Miðvági, brúkt til politistød, tá tað langt um leingi kom hartil, at politistøðin varð bygd.

3. desember 1985 stongdi sýslumansskrivstovan í Sørvági, og skrivstovan varð sama dag flutt í nýggju politistøðina í Miðvági, og hevði bæði politiið og sýslumaðurin skrivstovur sínar har eftir tað. Sýslumansskrivstovan hevði tá verið í Sørvági í 67 ár.

Í einum skrivi frá kommununi í 1995 til "Gulu síðurnar" er upplýst m.a., at politistøðin í Miðvági hevði telefonnummar 33448, faks 32154, og at skrivstovutíðirnar vóru: Mánadag til fríggjadag kl. 09-12 og 14 - 16.

Nýggj skipan varð sett í verk í 2008, har løgreglan heldur til í Havnini, men hevur eisini stød á flogvøllinum í Vágum.

8. oktober 2015 er politistøðin í Miðvági seld og er nú privat ogn.

Politistøðin í Miðvági 1985 - 2008.

Ruskinnsavnan

Heilt upp í sekstiárini hevði tað verið so, at alt rusk varð blakað í havið. Hetta var galdandi um alt landið. Í bygdum har sandur var sum t.d. í flestu bygdunum í Vágum, varð ruskið vanliga blakað oman á sandin, og so varð tað mesta av tí tikið út á sjógv. Men nógv lá ofta eftir. Ikki minst slíkt, sum ikki fleyt. Men eisini ting sum flutu. Tað kundi stundum ganga long tíð, áðrenn sumt bleiv burtur. Tungir lutir endaðu sikkurt bara niðri í sandinum. Men ikki var hetta vakurt at síggja, so leingi tað lá sjónligt.

Sjónlig ting ein kundi síggja liggja á sandinum í fimmti- og sekstiárunum, kundu vera heil ella hálv súkklustell, boygdar grýtur, brotnar pannur, jarnblikk og annað slíkt; umframt at rúgva av plastíløtum kundu liggja á sandinum og í áarósunum í bygdini. Børnini plagdu ofta at samla nakað av plastíløtum saman og spæla handil við tí. Einaferð um árið plagdu menn frá kommununi at fara og taka tað ringasta upp av sandinum og úr áarósunum. Viðhvørt sluppu skúlabørn at gera hetta í feriuni fyri samsýning. Men tað var so skjótt, so var sandurin og áirnar líka dálkaðar aftur.

Tað, sum gjørdi, at tað ikki var so katastrofalt uttan ruskinnsavnan, sum tað hevði verið í dag, var, at tað var ikki so nógv rusk sum í dag, og at fólk tá ikki blakaðu so nógv burtur, sum í dag. Nógv varð keypt í leysari vekt í handlunum, mjøl, sukur, viðskerði o.s.fr. Og um okkurt var í ílati, varð ílatið sum oftast brúkt aftur. Pappír og papp bleiv brent í komfýrinum. Men nakað av burturkast var kortini.

Dani bjóðar seg fram sum ruskinnsavnara

Fyrstu ferð ein sær í skjølunum hjá kommununi um ruskinnsavnan ella renovatión, er í skrivi 16. januar 1951, har A. Ørnov, Vatnsoyri, skrivar til Miðvágs kommunu og bjóðar sær at koyra "dagrenovation" í kommununi. Svarað verður honum longu tveir dagar eftir, hin 18. januar 1951, og sagt, at skrivið varð viðgjørt á fundi sama dag, og varð har avgjørt at svara, at kommunan ikki fyribils var sinnað til at gjalda fyri renovatión. Málið er annars ikki nevnt í gerðabókini fyri nevnda fund.

Nevnast kann, at Ørnov hevði eisini skrivað til Sørvágs kommunu um hetta sama, og við sama úrslitið.

Um A. Ørnow kann sigast, at hann var dani, nevndist Karl Asker Ørnow, vanliga róptur Asker ella bara Ørnow. Hann var giftur Idu, sum vanliga varð rópt Mussi, hon var hálv donsk og hálv íslendsk, og tey áttu eina dóttur, Lissie. Asker Ørnow við familju var komin úr Køge í Danmark til Føroya beint eftir kríggið at arbeiða hjá Telefonverkinum í Havn. Men eftir einum tveimum árum var hann givin í tí starvinum. Har var hann helst komin at kenna William Nielsen í Vatnsoyrum, sum arbeiddi sum linjumaður hjá telefonverkinum í Vága øki og er so komin vestur til Vatnsoyrar um 1948, har hann leigaði íbúð í kjallaranum hjá Williami. Hann búði so har eina tíð. Tað mesta, hann fekst við, meðan hann búði í Vatnsoyrum, var at smelta blíggj, sum hann so hevur selt. Hetta var beint eftir kríggið, so nógvir blíggjklæddir káplar frá bretum lógu framvegis niðurgrivnir ymsastani um oynna. Blíggið varð smeltað til blíggjformar nakað á stødd við kakuformar. Asker átti ein lítlan persónbil róptur "Lotta", honum koyrdi hann runt við og samlaði tilfar inn við. Virkaði eisini eitt sindur sum ein sonevndur "kloddamaður", tey søgdu fyrr, ella tað tey í sjónvarpssendinum í dag kalla "en skrotjæger". Eftir at hava búð eina tíð í Vatnsoyrum, keypti hann nakað av tí norðastu trøðini í Vatnsoyrum frá Kjølbro, har eitt lítið summarhús í einari hædd stóð á. Tað er stykkið, har Karl Jóhan Nielsen, sum hevur greitt frá um Asker Ørnow, nú hevur hús síni. Asker og familja búðu har eina tíð, men fluttu so einaferð fyrru helvt av 50-unum niður aftur

til Danmarkar. Um 1955, eftir at hann var farin niður, seldi Ørnow stykkið og summarhúsini í Vatnsoyrum.

Áheitan frá borgarum um at rudda

Hin 23. februar 1954 fær Miðvágs kommuna bræv, har 12 borgarar í kommununi heita á sóknarstýrið um at ruddað Oyruna, og so seta forboð fyri, at burturkast verður kastað oman hagar. "Teir lutir, sum liggja og síðan fúka, gera stóran skaða á bæði hús og fólk," verður sagt. Skrivað undir hava: Emil Olsen, Hans P. Johansen, Maria Johannesen, Jens Pauli Joensen, Edward Frederiksen, Pauli Frederiksen, Peter Jacob Haraldsen, Samuel Johansen, Jóannes Rasmussen, Kem Haraldsen, H. Rasmussen og H. Olsen.

Bert tríggjar dagar seinni, hin 26. februar 1954, skrivað 7 borgarar afturat kommununi bræv, har tey heita á sóknarstýrið um at reinsa sandin undir Tormansbakka "fyri órudd, ið hevur ligið har í langar tíðir og sær ikki væl út," siga tey. Tey heita eisini á sóknarstýrið um at seta forboð fyri, at nakað verður koyrt aftur á sandin. Skrivað undir hava: Jacob Haraldsen, Jensia Johansen, Thomas Thomasen, Gunnar Poulsen, Sigga Johansen, Hanna Johansen og Martin Joensen-Næs.

Málið er til viðgerðar á stýrisfundi 2. mars 1954. Møttir vóru, Hans Martin Thomasen formaður, Jóannes Ravnsfjall, Jákup K. Joensen, Jóan Hendrik Samuelsen og Jens Rasmussen. Í gerðabókini stendur, at tvey brøv, við tilsamans 19 undirskriftum, eru komin til kommununa við áheitan um at beina fyri óruddi, ið liggur og sløðist á sandinum.

Sóknarstýrið varð samt um at taka burtur órudd, ið kommunan átti – brúktar asfalttunnur og sláa kunngerð upp um at biðja fólk sjálvi beina fyri sínum óruddi.

Framvegis í sekstiárunum verður tosað um hetta sama. 1. oktober 1963 skrivar Meinhard Hansen, Miðvági, og sigur, at hann vil heita á sóknarstýrið um at orna tað so, at tað avfall, sum verður tveitt í áir, gil, veitir og inn á onnur, kann verða beint burtur, so tað ikki liggur og rekist, sum skomm fyri bygdina. Har hann bjóðar sær at koma við uppskoti. Málið er fyri á fundi 11. oktober 1963, og skrivað verður til hann um hetta 2. desember sama ár, har sagt verður frá niðurstøðuni á fundinum, at sóknarstýrið hevur havt hetta mál í huga, og er áhugað í uppskotum hesum viðvíkjandi. Um hann er komin við uppskoti sæst einki til – um so er, hevur tað ikki verið nóg kollveltandi ella áhugavert til, at teir hava nevnt nakað um tað seinni.

Roynd í fimmtiárunum at fáa ruskpláss

Á fundi 29. desember 1955 er til viðgerðar uppskot um eina heilsusamtykt og at arbeiða við henni og leggja hana aftur fyri sóknarstýrið til góðkenningar. Nevnt verður eisini, í smb. við sama mál, at avgjørt verður, at royna at fáa gjørt eitt renovatiónspláss onkustaðni í kommununi.

Men tað er so í øllum førum broytt, tí stutt eftir, hin 14. januar 1956, verður skrivað til Zacharias Thomsen, Sandavági, sum var formaður fyri hagastýrið Giljar og Slættanes. Í brævinum verður sagt, at ætlanin er at fáa renovatiónspláss har vegurin gongur omanfyri "Hillingartanga" og biða um loyvi at nýta hetta staðið til renovatiónspláss. Lagt verður afturat: "Sum tíðin líður, verður meira og meira átroðkandi at hava eitt pláss til renovatión, og her um leiðir finnist einki annað hóskandi stað. Hagastýrið biðist lata okkum frætta aftur skjótast tilber, tá hagastevnan er hildin." – Hetta er so sandavágsmeðin á Giljanesi.

Um nakað svar er komið kann ikki sigast. Um so er, er tað ikki varðveitt og einki er annars sagt um tað í gerðabók ella aðrastaðni. Og staðfestast kann, at einki hendi meira við málinum á hesum sinni, og vit skulu 10 ár fram í tíðina, áðrenn ruskkoyringin byrjaði.

Kommunurnar í Vágum taka málið uppaftur

Á felags kommunufundi í Vágum 10. juli 1959 legði Frits Jacobsen úr Sørvági fram uppskot um, at kommunurnar í Vágum skuldu skipa felags renovatiónskoyring. Menn hildu hetta uppskot vera gott, men vóru ikki í løtni greiðir yvir, hvussu hetta skuldi gerast í praksis. Avgjørt varð at venda aftur til málið seinni.

Tvey ár seinni, hin 21. august 1961, leggur Frits málið fram aftur á felags fundi. Flestu limir vóru samdir um, at neyðugt var at gera okkurt. Niels Marius Petersen, Sandavági, segði seg vera ímóti málinum sum felags mál, somuleiðis Edvard Jacobsen í Bø. Frits setti so fram uppskot um at seta eina trýmannanevnd við einum limi úr Sandavági, Miðvági og Sørvági at arbeiða við málinum. Sandavágsmenn vóru ímóti hesum uppskoti, og mátti hetta tí haldast at vera fallið, verður sagt í gerðabókini fyri felags fundir, tí full semja ikki var um málið. Málið varð tí enn einaferð útsett.

Á felags kommunalum fundi 5. mai 1964 var renovatiónsmálið aftur til viðgerðar. Úr Sandavági vóru 4 av 5 limum møttir, úr Miðvági 3 av 5 limum, úr Sørvági 2 av 5 limum og sýslumaðurin var eisini møttur. Hesuferð var tað Kristian Larsen, sýslumaður, sum legði fram uppskot um renovatión. Húsmøðrafelagið í Sørvági hevði reist málið. Hann helt, at spurningurin var átroðkandi í øllum trimum bygdunum, og at tað var best hóskandi, at hetta varð loyst felags. Fundur hevði verið í Sørvági millum sýslumannin og umboð fyri sóknarstýrini, heilsunevndirnar og húsmøðrafelagið, og varð samtykt at heita á sóknarstýrini í teimum trimum bygdunum um at fáa skipað hetta økið. Sóknarstýrini vóru sama dag norðuri á Fútakletti og hugdu at plássi sunnanfyri Fútaklett, har hóskandi var at koyra avfall útav, men har mátti gerast ein vegastubbi fyrst. Ætlanin var, at hvørt húski skuldi hava eitt stativ og pappírsposar at fylla í. Sagt varð, at í Vestmanna koyrdi maður renovatiónina fyri 1.350 kr. um mánaðin. Allir teir møttu limirnir vórðu samdir um at loysa hetta mál. Samtykt varð at biðja sýslumannin skriva til hagastýrið fyri Sundshaga um loyvi at gera umrødda vegastubba og nýta plássið til fyrrnevnda endamál. Eisini varð samtykt, at biðja Niels Marius Petersen heita á verkfrøðingin hjá Højgaard & Shultz, ið stendur fyri vegarbeiðinum á Oyragjógvarvegnum, at meta um kostnaðin fyri nevnda vegastubba, ið verður umleið 50 metrar.

Frá felags fundi 6. september 1965 verður sagt, at Solok Mikkelsen, Sørvági, setti fram uppskot um at royna at fáa ein veg út í Nýpu. Hans Martin Thomasen, Miðvági, setti fram uppskot sum fyribils loysn at royna at fáa ein bát ella bátar, at føra avfallið út á streymasjógv. Bæði uppskotini vórðu samtykt. Víðari verður sagt, at ætlanin er, at hvør kommuna fyribils skal royna at loysa málið, hvør sær. Og at samtykt varð at fáa tilboð uppá ruskposar og stativir í felag. At enda varð samtykt at velja nevnd at arbeiða við renovatiónsmálinum. Valdir vórðu, Petur Weihe, Sørvági, Hans Martin Thomasen, Miðvági og Niels Marius Petersen Sandavági.

Helst óneyðugt at nevna, at vegur út í Nýpu, kanska tíbetur í hesum sambandinum, varð ikki gjørdur. Hini málini vórðu framd í fyrstu atløgu í øllum førum.

8. februar 1966 er renovatiónsmálið aftur fyri á felags kommunufundi í Vágum. Um renovatiónsmálið verður sagt, at tann setta renovatiónsnevndin hevur havt samráðing við hagastýrið við Sund og hava teir gingið við til, at kommunurnar fáa eitt øki til hetta endamál sunnanfyri Fútaklett við hesum treytum: a) at alt skal á sjógv. b) Brunnur verður gjørdur til at brenna alt, ið kann flóta. c) Leigan er 500 kr. um árið pr. kommunu. Leigusáttmáli verður gjørdur fyri 5 ár. d) Væl má gangast um, og ábøtur, ið kravdar verða, skulu gerast skjótast gjørligt.

Aftaná orðaskifti varð samtykt, at hvør kommuna roynir at finna ein útveg hvør sær at sleppa av við avfallið.

Um hetta seinasta kann sigast, at sum heild bleiv tað so, at Sørvágs kommuna leigaði øki frá Norðurtriðingi í Sørvági til sonevndan dump, og Sandavágs- og Miðvágs kommunur

leigaðu áðurnevnda øki frá Sunds haga í Sandavági. Tó varð eina tíð í 1966 rusk siglt út við báti og søkt á streymasjógvi, men tað hevur helst verið nakað trupult at fingist við.

Vit skulu so fram til 1971, áðrenn renovatiónsmálið verður tikið uppaftur á felags kommunalum fundi í Vágum. Hetta er á fundi 19. apríl 1971. Úr Sørvági, Miðvági og Sandavági vóru allir limirnir møttir og ein úr Bø. Á fundinum tók Arnhold Jacobsen, Sørvági málið um renovatión upp. Hann vísti á, at soleiðis, sum hetta var gjørt nú, var hetta ikki tíðarhóskandi ella reinført, og at vestmenningar høvdu fingið ein nútímans renovatiónsbil. Og at teir høvdu bjóðað sær til at taka sær av renovatiónini í Vágum fyri umleið 120 kr. pr. húsarhald. Avgjørt varð at hugsa meira um hetta málið til annan fund.

Meira kom tó ikki burtur úr tí hugsanini.

Vrak av deksbátum, tangi og bilur eru á sandinum

Á onkrum myndum frá sekstiárunum av Miðvági sæst vrakið av einum stórum deksbáti liggja mitt á sandinum, umframt at vrak av einum minni deksbáti lá longur uppi. Helst hava fólk verið ónøgd við hetta, tó at einki skrivligt er funnið um tað.

Á fundi 3. mai 1965 er málið til viðgerðar. Í sóknarstýrinum sótu, Hans Martin Thomasen fm., Jóhan Hendrik Samuelsen, Jákup K. Joensen, Jens Jacob Niclasen og Christian Olsen. Í gerðabókini verður sagt: "Gideon liggur sum vrak á sandinum. Sóknarstýrið hevur samtykt at fáa vrakið burtur. Men tá tað er ivasamt, um sóknarstýrið hevur heimild at krevja av eigarunum av bátinum at taka bátin burtur, varð samtykt at senda skriv til hagastýrini í sóknini, um tey ikki saman við sóknarstýrinum vildu vera við til at krevja bátin og tangan burtur."

Her og á einum seinni fundi kemur fram, at umframt tey nevndu vrakini, lá eisini ein stórur tangi á sandinum.

Vrakini av "Gideon" og deksbátinum "Troystin" lógu á sandinum. Í sekstiárunum vildu borgararnir hava sandin ruddaðan.

Á fundi 19. mai 1965 verður sagt um vrakið av "Gideon", at nú er heimild fingin frá øllum hagastýrunum í Miðvági at krevja vrakið og tangan burtur av sandinum.

Avgjørt varð at geva eigarunum av omanfyri nevndu lutum freist uppá 14 dagar at beina lutirnar burtur. Somuleiðis varð avgjørt at biðja Elias Ellefsen fáa vrakið av "Troystini" burturbeint og at biðja Jógvan Hans Joensen fáa vrakið "Gideon" og tangan burtur av sandinum.

Eftir at vrakið varð liggjandi, hevði kommunan reist sakarmál móti Jógvan Hans Joensen. Sambært rættarfrásøgn frá Jógvan Hans 3. desember 1965 hevði hann keypt "Gideon" frá Tórshavnar skipasmiðju í oktober 1961 fyri 12.000 kr. Hann hevði so brúkt bátin nakað. Millum jól og nýggjár 1964 hevði hann lagt bátin upp á sandin í Miðvági fyri at umvæla hann. Men av ymsum orsøkum bleiv báturin liggjandi har. Hann hevði sjálvur roynt at sleipa "Gideon" út við nøkrum smærri bátum fyrr í 1965, men tað misseydnaðist, helst vóru bátarnir ov smáir, helt hann.

Hann upplýsti eisini, at tað var tann 28. mars 1963, hann, sum hann segði, varð noyddur at sleipa tangan inn á sandin og varð tað gjørt við "Gideon".

Viðvíkjandi hinum nevndu bátunum greiddi Jógvan Hans Joensen frá, at vrakið av deksbátinum "Troystin" hevði ligið á sandinum síðan veturin 1936. Hon hevði ligið fyri teym, men sleit í illveðri og rak upp á sandin. Helst drigið niðaníframá, niðan á Oyruna, í síni tíð. Í sama illveðrinum, veturin 1936, rak deksbáturin "Grímur Kamban" eisini á land og lá á sandinum í nógv ár, men hann varð upphøgdur fyri nøkrum árum síðan.

Í juni 1965 tekur kommunan avgerð um at bjóða arbeiði út við at fáa vrakið av "Gideon" av sandinum. Í Dimmalætting 19. juni 1965 er arbeiðið boðið út alment:

"Útbjóðing. Arbeiðið við at beina fyri vrakinum av "Gideon", ið liggur á sandinum í Miðvági, verður við hesum útboðið. Møgulig tilboð verða at senda skrivliga til undirritaða sóknarstýri í seinasta lagi 30. juni 1965. Sóknarstýrið skilar sær rætt at velja millum tey innkomnu tilboðini, ella einki at taka. Miðvágur, tann 16.06.1965. Miðvágs sóknarstýri."

Á fundi 2. juli 1965 er málið aftur til viðgerðar. Um vrakið av m/b "Gideon" verður sagt, at eitt boð var komið inn, og var tað frá Símun P. Poulsen, Fuglafirði, stórt 3.350 kr. Avgjørt varð at taka við tilboðnum. – Hin 20. august 1965, eftir at freistin var úti, bjóðaði Otto Johannesen, Miðvági, sær at taka vrakið av "Gideon" út av sandinum og burturbeina tað fyri 4.000 kr. Hetta varð tó ikki tikið til eftirtektar, og var eisini hægri enn fyrra boðið.

Um vrakið av m/b "Troystin", sum Elias Ellefsen átti, og sum lá á Oyrini, varð sagt, at Elias Ellefsen hevði fingið bræv um at beina fyri vrakinum, men hevði ikki gjørt hetta enn.

Avgjørt varð at senda honum skriv um hetta og geva honum freist at beina fyri hesum.

Sambært viðmerking í skjali hjá Miðvágs kommunu, 10. desember 1965, varð vrakið av "Gideon" sleipað út av Miðvági hin 12. september 1965 og søkt. Rokningin fyri arbeiðið varð goldin hin 17. september 1965.

Á fundi 3. januar 1966 er til viðgerðar vrakið av "Gideon", ið lá á sandinum. Trygvi Samuelsen, sakførari, hevði sent sóknarstýrinum skriv, dagfest 10. desember 1965, og vildi hava sóknarstýrisformannin og havnastýrisformanin at møta í rættinum. Samtykt varð at senda sóknarstýrisformannin til Tórshavn hin 19. januar 1966 at møta í rættinum.

Nevnast kann at í hesum førinum snúði tað seg um sama mann, Hans Martin Thomasen, sum var bæði sóknarstýrisformaður og havnafúti í Miðvági um hetta mundið.

At sandurin varð roknaður sum heilt legalt stað at blakað eitthvørt á skilst á næsta málinum fyri sama fund. Har stendur: Somuleiðis varð samtykt at senda líknandi bræv til (navngivnan persón), sum hevði sett eitt bilvrak á sandin á kommununar øki.

Á fundi 31. mai 1967 varð upplýst, at sakarmálið um "Gideon" við Jógvan Hans Joensen, hevði verið í Landsrættinum 30. mai 1967 í Tórshavn. Og møtti Hans Martin Thomasen fyri sóknarstýrið í Landsrættinum, og geiddi hann frá málinum. Landsrætturin setti uppskot fram um sátt millum partarnar hvareftir Jógvan Hans Joensen skuldi gjalda 2.000 kr. áðrenn 1. oktober í ár, móti saldokvittan. Sakarmálskostnaðurin undir landsrættarviðgerðini verður upphevaður. Sóknarsstýrið varð samt um at avvísa rættaruppskotið.

Í mai 1966 var framvegis einki hent við vrakinum av "Troystini". Á fundi 12. mai 1966 verður sagt, at vrakið framvegis lá har, hóast at ánarin hevur fingið ávarðingarskriv.

Samtykt varð at senda honum nýtt bræv, hvareftir hann skal beina fyri rovunum áðrenn 14. dagar, tá hesi annars verða beind burtur fyri hansara rokning og ábyrgd.

17. juli 1967 er málið um "Gideon" aftur til viðgerðar. Sagt verður, at Jógvan Hans Joensen hevði í fyrstu atløgu kært málið. Men sagt verður eisini, at dómur var fallin í Landsrættinum og at Trúgvi Samuelsen, sakførari, hevði sent útskrift av dóminum, og spurdi hvat hann skuldi gera viðvíkjandi útleggi fyri at fáa peningin goldnan. Samtykt varð, at biðja sakføraran skriva til Jógvan Hans Joensen og spyrja, hvussu hann ætlar at gjalda peningin.

Tað seinasta vit síggja til málini í skjølunum hjá kommununi er frá fundi 13. mars 1968. Har er eitt av málunum, at Jógvan Hans Joensen hevur spurt um at fáa eina skipan við gjaldinum fyri burturtøku av "Gideon", sum hann er dømdur at gjalda. Samtykt varð at ganga við til at hann betalur 250 kr. um mánaðin, roknað frá 01.03.1968, og til øll skuldin er goldin.

Um m/b "Troystin", tangan og bilvrakið sæst einki aftur, so tey eru helst fingin burtur tá eisini. Tangin er helst fingin burtur áðrenn "Gideon", tí hann verður ikki nevndur aftur.

Ruskkoyringin byrjar

Um tað er av egnum áðum, ella hann hevur hoyrt um, at ætlanin er at byrja ruskkoyring í Miðvági, er ilt at siga. Men hin 5. mai 1966 skrivar Niels Pauli Hansen, Miðvági, og gevur tilboð uppá renovatión í Miðvági fyri 30.000 kr. um árið.

Málið er fyri á fundi 12. mai 1966. Allir limir vóru møttir. Í gerðabókini er sagt: "Aftaná drúgvan orðadrátt varð samtykt, at innheintað tilboð um at beina fyri avfallið sjóvegis. Ætlanin er, at hvørt húsarhald skal hava jarnstativ og papírsposar. Samtykt varð at keypa 50 stativ og 500 posar til renovatiónina."

25. mai 1966 var lýsing hongd í talvuna: "Renovatión. Tilboð uppá renovatión í Miðvágs sókn ynskist. Ætlanin er at nýta pappírposar, og posarnir skulu beinast burtur sjóvegin. Tilboð skulu vera sóknarstýrinum í hendi seinast 8. juni 1966. Upplýsingar hesum málið viðvíkjandi fáast á kommunuskrivstovuni. Sóknarstýrið skilar sær rætt til at velja millum tey innkomnu boðini ella einki at taka."

Sum tann fyrsti eftir hetta skrivar Edmund Poulsen hin 31. mai 1966 og bjóðar sær at gera arbeiði fyri 30.000 kr. fyribils í eitt ár. Hann hevur ongan lastbil og vil hava kommununa at hjálpa sær at skaffa ein bil, sum hann tó skal gjalda aftur yvir eitt vist áramál. 4. juni 1966 koma tvey tilboð inn, tey eru frá Johannes F. Joensen, sum vil taka arbeiðið fyri 10.000 kr. og frá Poli Jacobsen, sum vil gera arbeiðið fyri 30.000 kr. Karmal á Presttrøðni bjóðar sær hin 6. juni at gera arbeiðið fyri 40.000 kr. og Jens Eli Ellefsen bjóðar sær hin 8. juni at gera arbeiðið fyri 28.000 kr. Teir eru allir úr Miðvági.

Tilboðini eru til viðgerðar á fundi 9. juni 1966.

Mórus Hannus fyrsti almenni ruskinnsavnarin

Jens Jóhannes Frits Joensen. f. 1914, við Kirkjar, Miðvági, vanliga nevndur Mórus Hannus, bjóðar sær hin 4. juni 1966 at koyra ruskkoyringina hjá Miðágs kommunu fyri 10.000 kr. um árið. Hann eigur lastbil sjálvur. Hetta er so nógv tað lægsta tilboðið, sum kom inn.

Øll tey seks tilboðini, sum komu inn uppá arbeiðið, vóru til viðgerðar á fundi í sóknarstýrinum hin 9. juni 1966. Avgjørt varð at seta Jóhannes Joensen í starvið frá 1. juli 1966, fyribils fyri eitt ár.

Samtykt varð eisini, at húsarhaldini skulu gjalda stativini og posarnar, ið nýttir vórðu til renovatiónina.

14. juni 1966 er sáttmáli undirskrivaður við J. Johannes F. Joensen, arbeiðsmaður, Miðvági, um renovatiónskoyring. Í sáttmálanum stóð: "Á fundi 9. h.m. hevur sóknarstýrið samtykt at

Jóhannus Joensen

seta tygum í starvið sum renovatiónsmaður frá 1. juli 1966. Lønin verður sambært tilboð tygara kr. 10.000,- árliga, og verður lønin goldin afturút við 1/12 hvønn mánað. Starvið kann sigast upp av báðum pørtum til ein fyrsta januar við 3 mánaða ávarðing, tó ikki fyrr enn 1 ár frá 1. juli 1966. Starv tygara sum renovatiónsmaður umfatar: Stativ og sekkir skulu sendast til húsini og setast upp. Tá fullir sekkir verða tiknir av stativinum, skulu tygum seta nýggjan sekk íaftur stativið. Roknskapur yvir sekkir til tey ymisku húsini skal handast kommunuskrivstovuni einaferð um árið. Sekkirnir skulu førast út á streymasjógv soleiðis, at ikki er vandi fyri, at teir reka aftur á land. Hvør sekkur skal kryvjast áðrenn hann verður blakaður út úr bátinum. Størri lutir, sum ikki kunnu vera í sekkunum, eru kommununni óviðkomandi, men hava tygum skyldu til at beina hesar burtur móti gjaldi frá viðkomandi eigara. Tygum biðjast vátta tygara samtykt av omanfyri standandandi, við at skriva undir hjálagda avrit og senda okkum tað aftur skjótast." Skrivað undir hava: H.M. Thomasen fyri kommununa og Jens Johannes F. Joensen sum arbeiðstakari.

Við hesum hevur Miðvágur fingið sín fyrsta ruskinnsavnara ella "skrellimann", sum tað vanliga varð nevnt.

24. juni 1966 er kunngerð hongd í lýsingartalvuna. "Renovatión. Frá 1. juli 1966 er renovatiónsmaður settur í Miðvágs sókn. Stativir og posar til nýtslu fyri hvørt húsarhald fáast á kommunuskrivstovuni. Stativini skulu gjaldast, áðrenn tey verða latin viðkomandi, og er kostnaðurin kr. 70,- pr. stk. Kostnaðurin fyri posarnar, ið hvørt húsarhald nýtir árliga til renovatiónina, verður rokning send fyri eitt ár aftur. Tá stativini eru goldin til kommunuskrivstovuna, kann viðkomandi heinta stativið ella fær hann tað tilsent av renovatiónsmanninum. Aðrar upplýsingar um renovatiónina fáast á kommunuskrivstovuni. Miðvágs sóknarstýri."

Jóhannes Joensen skrivar til kommununa hin 28. januar 1967 og sigur, at soleiðis, sum renovatiónsarbeiðið hevur gingið hettar tíðarskeiðið, vísir tað seg, at tilboð hansara var ov lágt, so við og við, sum fleiri hús hava fingið stativ og arbeiðið krevur meira tíð enn upprunaliga. Orsakað av hesum, gerast útreiðslurnar fyri koyringina so stórar, 22 kr. pr. tíma, at summir mánaðir geva honum so gott sum onga inntøku. Hann loyvir sær tí at heita á kommununa um tessvegna at fáa tilboðið broytt, soleiðis at arbeiðið kann geva eina ársinntøku samsvarandi ársinntøkurnar fyri annað skitið arbeiði.

Skrivið var fyri á sóknarstýrisfundi 3. februar 1967. Sóknarstýrið samtykti, at halda seg til sáttmálan frá 14.06.1966 og var ikki sinnað at broyta lønina. Í skrivi til hansara, 9. februar 1967, verður lagt afturat hesi samtykt, at viðmerkjast skal, at um broytingar annars koma í sjálva renovatiónsskipanina, vil sóknarstýrið taka málið upp til nýggja viðgerð eftir nærri samráðingum.

Í apríl 1967 síggja vit, at avfallið nú verður koyrt á Fútaklett. Á fundi í sóknarstýrinum, 18. apríl 1967 er mál fyri, har sagt verður, at renovatiónsmaðurin hevur vent sær til sóknarstýrið um at fáa eina samsýning fyri koyrðing, nú hann koyrir alt avfallið á Fútaklett. Hann upplýsir, at hann í januar 1966 og februar hevur havt 660 kr. í útreiðslu av koyring, umframt petroleum til at brenna avfallið við. Samtykt varð at gjalda honum 170 kr. um mánaðin eyka fyri koyring, roknað frá 01.01.1967.

Í eini samtykt á sama fundi er samtykt at reinsa eitt ávíst gil. Lagt verður afturat avgerðini: "Nú renovasjón er verður heitt á politiið, um at taka sær av, um nakað verður koyrt í áir og gil í framtíðini." Nevnast kann, at politisturin var eisini skrivari hjá kommununi.

Í skrivi 24. juni 1967 søkir Jóhannes Joensen aftur um lønarhækking. Samtykt verður nú at hækka løn hansara til 1.150 kr. um mánaðin, íroknað olju og koyring roknað frá 1. juli 1967. Bræv um hesa samtykt varð sent honum hin 18/7-1967.

Roknskaparárið 1966/67 eru inntøkurnar hjá kommununi av at selja ruskstativ og ruskposar o.a. í hesum smb. 9.320 kr. Meðan útreiðslurnar til løn, keyp av ruskstativum og posum og annað í smb. við ruskkoyring, eru 21.194 kr.

27. februar 1968 skrivar Jóhannes Joensen, Miðvági. Við hesum skal eg siga frá, at eg sigi meg leysan úr starvinum sum ruskinnsavnari fyri Miðvágs sókn til 1. apríl 1968.

Málið er ikki fyri á fundi, helst vegna, at eingin fundur var um hetta mundið, men hin 1. mars 1968 varð lýsing hongd í talvuna, har søkt verður eftir ruskinnsavnara. Á fyrsta fundinum, sum var aftaná 13. mars 1968 var málið og tær mongu umsóknirnar, sum komu inn – eisini ein frá Jóhannes Joensen – til viðgerðar.

Mórus Hannus hevði sostatt starvið sum fyrsti ruskinnsavnarin í Miðvági, frá 1. juli 1966 til 31. mars 1968 ella 1 og 3/4 ár tilsamans. Mórus Hannus doyði í 1988, 73 ára gamal.

Grundin fyri at hann ikki koyrdi so leingi var helst, at tilboð hansara, sum hann sjálvur í skrivi viðgongur, var ov lágt og at tað tí gav ov lítið av sær. Eisini við seinastu hækkingini, kommunan bjóðaði honum, sum var 13.800 kr. um árið. Seinni útrokningar vístu, at eitt slíkt arbeiði tá skuldi helst samsýnast við um 20.000 kr. um árið fyri mann og bil, fyri at loysa seg hjá arbeiðstakaranum.

Mál um ruskpláss

Á fundi hin 5. mai 1967 var til viðgerðar skriv fra Landslæknanum, dagfest 27.04.1967, har sagt varð frá, at Jørgen Lauridsen, verkfrøðingur frá Sundhedsstyrelsen, ríkisumboðsmaðurin og Johan Djurhus skrivstovustjóri, vórðu í Miðvági fríggjadagin 19.05.1967 og ynsktu at hitta umboð fyri kommunurnar í Vágum og kanna hvussu kommunurnar kundu sleppa av við rusk og burturkast frá húsarhaldunum og øðrum óruddi. Samtykt varð at lata formannin umboða kommununa og fyrireika fundin.

Fundafrásøgn ella avrit av somu er ikki funnið um nevnda fund.

Hin 7. juni 1967 var fundur í bygdaráðnum, har mál nr. 3 á fundinum var, at hagastýrið fyri Sundshaga í Sandavági vil loyva kommununi at koyra renovatiónina til Fútaklett á jarnristina har sunnanfyri Fútaklett, til eina samsýning til 1. januar 1968 á kr. 600,-. Sóknarstýrið var samt um at taka av hesum tilboðnum.

Ruskkoyringin útboðin

1. mars 1968 er lýsing hongd í talvuna: "Útbjóðing. Starvið sum renovatiónsmaður í Miðvágs sókn verður við hesum útboðið. Møgulig tilboð skulu verða latin inn skrivliga til kommunuskrivstovuna í seinasta lagið 13. mars 1968 kl. 16.00. Upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast á kommunuskrivstovuni. Miðvágs sóknarstýri."

Inn komu heilar 20 umsóknir.

12. mars 1968 er ein umsókn og henda er tann einasti, sum hevur eina útrokning yvir hvat arbeiðið kostar út frá táverandi lønum, samsýningum og mettari arbeiðstíð:

Koyring 416 tímar á 26,00 kr.	10.816 kr.
Arbeiðsløn 416 tímar á 14,00	5.824 -
Reinsing av brennirist 102 t. á 26,00	2.652 -
Olja til brenning 2080 l á 0,30	624 -
Tilsamans	19.916 kr.

Við brennirist meinast ein rist, sum var á Fútakletti, har ruskið varð stoytt á og brent. Øskan og tað, sum ikki brendi, skuldi so koyrast í havið.

12. mars 1968 eru fýra umsóknir dagfestar. Tann fyrsta er frá Jóhannes Joensen, sum hevði havt koyringina áður. Í umsóknini skrivar hann m.a., at orsøkin til uppsøgnina var bert lønarspurningur. Og sigur hann, at út frá royndum sínum, nú hann hevur røkt starvið í skjótt 2 ár metir hann, at 25.000 kr. er neyðug samsýning fyri starvið.

13. mars 1968 vóru allar tær innkomnu umsóknirnar til viðgerðar. Í sóknarstýrinum sótu, Albin Wang formaður, Hans Jacob Hansen, Hans Martin Thomasen, Leivur Nattestad og Victor Joensen, sum stóran part av árinum er avloysari fyri Marius Joensen, á Ryggi. Í gerðabókini stendur undir mál 1: Renovatiónsmaðurin, Johs. Joensen, hevur sagt starvið frá sær til 1. apríl 1968 og hevur hetta verið lýst leyst og vóru 20 tilboð innkomin.
Samtykt varð at taka við tilboðnum hjá Thomas Napoleon Hansen fyri kr. 14.400,- árliga.

Tummas í Lon ruskinnsavnari

16. mars 1968 er sáttmáli skrivaður við Tummas Napolion Hansen, bileigari, Miðvágur, f. 1930, vanliga nevndur, Tummas í Lon. Í sáttmálanum standa somu treytir, sum hjá fyrra renovatiónsmanninum. Viðmerkt verður annars, at posarnir skulu koyrast á Fútaklett og skal alt brennast á rist, ið er gjørd til nevnda endamálið og skal ristin reinskast hvørja ferð aftaná brent er og øska og annað koyrast á sjógv, einki má liggja eftir á ristini ella uttanum har ristin stendur. Olja til at brenna við er roknað uppí tilboðið. Roknskapur yvir posar til tey ymisku húsini skal handast kommunuskrivstovuni einaferð um árið.

Inntøkur og útreiðslur 1967 – 1972 hjá kommununi við ruskkoyring:

1967/68, innt. 3.521 kr., útr. 19.789 kr.	1968/69, innt. 4.444 kr., útr. 17.398 kr.
1969/70, innt. 4.954 kr., útr. 28.224 kr.	1970/71, innt. 5.051 kr., útr. 17.864 kr.
1971/72, innt. 8.399 kr., útr. 23.802 kr.	

Inntøkurnar stava í høvuðsheitum frá at selja ruskposar og ruskstativ. Útreiðslurnar eru í høvuðsheitum løn til fasta ruskinnsavnaran og til ruskstativir og ruskposar, umframt aðrar útreiðslur hesum viðvíkjandi sum leiga fyri lendi til ruskpláss og annað.

8. januar 1972 skrivar Tummas Hansen og sigur, at hann hevur nú koyrt í 3 ár, og tímalønin er farin upp við 3 kr. og hann hevur 30 stativ fleiri at tøma nú enn, tá hann byrjaði. Umsóknin er til viðgerðar á fundi 14. januar 1972 har sagt verður, at samsýning hansara nú er 1.200 kr. um mánaðin. Samtykt varð at hækka løn hansara til 1.500 kr. um mánaðin, galdandi frá 1. januar 1972. Frá 1. januar 1974 varð lønin hækkað til 2.000 kr. um mánaðin, smb. umsókn 27.12.1973.

Útreiðslan hjá kommununi av renovatiónini, árini 1972 til 1981 um 40.000 kr. í 1972 og hækkar so støðugt til hon í 1980 er um 60. 000 kr. um árið, men í 1981 hækkað til 88.000 kr. um árið.

7. mai 1975 søkir Tummas Hansen um lønarhækkan, og verður á fundi 4. juni 1975 samtykt, at hækka samsýningina til 2.400 kr. um mánaðin. Men nú verður sagt, at posar ikki skulu verða settir í stativini, sum annars var krav áðrenn, uttan hjá gomlum og øðrum, sum ikki sjálvi kunnu gera tað.

Tummas Hansen greiður í skrivi 6. november 1976 eitt sindur frá arbeiðinum í smb. við umsókn um lønarhækkan. Nú er renovatiónin vaksin frá 6000 posum um árið til 10.000, og má hann nú koyra 2 ferð um vikuna. Málið er til viðgerðar á fundi 3. desember 1976 og

Ruskstativ og ruskposar hjá kommununi.

verður samtykt at ganga umsóknini á møti og hækka samsýningina til 3.000 kr. um mánaðin.

Frá 1. januar 1978 varð samsýningin hækkað til 3.500 kr. um mánaðin og á fundi 2. november 1978 varð samtykt, at lønin skuldi verða prístalsviðgjørd við afturvirkandi virknaði frá 1.1.1978, har verður eisini nevnt, at núverandi lønin verður mett sum hálv løn.

Á fundi 19. februar 1979 varð samtykt, at renovatiónin skal taka sær av at beina fyri avfalli, ið stendst av jarðarferðum. T.e. følnaðum kransum og blómutyssum og annað. Áður hevði tann, sum hevði ábyrgdina av kirkjugarðinum havt skyldu til hetta.

22. oktober 1979 er samtykt, at lønin nú verður sett til 5.700 kr. um mánaðin við tí kravi, at posarnir verða avheintaðir minst eina ferð um vikuna.

28. mai 1982 skrivar Tummas Hansen og setur nøkur tøl upp. Samsýning hansara er nú 7.000 kr. um mánaðin. Men smb. hansara útrokning er hetta 2.000 kr. ov lítið. Hann koyrir 12 tímar um vikuna, og taksturin er 138 kr. um tíman. Tað skuldi givið 6.624 fyri bilin. Tímaløn hansara er 51 kr. og tað skuldi givið 2.448 fyri mann, ella tilsamans 9.072 kr. í alt um mánaðin. Hann leggur afturat, at tað eru 279 hús í Miðvági, og skuldi tað verið um 32 kr. pr. hús um mánaðin. Á bygdaráðásfundi 15. juni 1982 varð samtykt at hækka samsýningina til 7.500 kr. um mánaðin fyri at taka avfall frá øllum húsahaldum einaferð um vikuna.

Á bygdaráðsfundi 12. september 1983 verður sagt, at ávísir trupulleikar hava tikið seg upp í samband við ruskplássið á Fútakletti. Fyribils eru trupulleikarnir loystir á tann hátt, at Tummas Hansen fær endurgoldið fyri mista inntøku í havnakrananum, tá hann nú verður noyddur at beina burturkast burtur tríggjar teir fyrstu dagarnar í vikuni. Spurningurin er so, um bygdaráðið kann góðtaka hesa loysn fyri framtíðina, ella ein onnur skal finnast.

Málið er tikið uppaftur hin 2. november 1983, har sagt verður, at Tummas skal koyra rusk sum fyrr, minst eina ferð um vikuna fram til 25.04.84, tá málið má takast upp aftur.

27. februar 1985 er samtykt at lata Tummas Hansen fáa 9.000 kr. um mánaðin frá 1. januar 1985. Eisini varð samtykt, at reglugerð verður gjørd fyri arbeiðið. 4. mai 1987 verður sagt, at lønin nú er 10.105 kr. um mánaðin. Samtykt verður at hækka lønina við 1.000 kr. um mánaðin treytað av, at hann tekur allar ruskposarnar í bygdini, tá koyrandi er norð á Fútaklett.

Á fundi 24. august 1989 var til viðgerðar, at I.R.F. nú skal yvirtaka ruskkoyringina. Í gerðabókini stendur: Tummas Hansen, hevur smb. sáttmála, havt ruskkoyringina í bygdini. Upp-

søgnartíðin er 3. mánaðar til 1. januar árið eftir. Fíggjarnevndin mælir til at siga honum upp til 1. jannuar 1989. Samtykt varð at siga honum upp.

Tummas í Lon hevði soleiðis ruskkoyringina í Miðvági í 21 ár og 9 mánaðir, frá 1. apríl 1968 til 31. desember 1989. Tummas í Lon andaðist í 2011, 80 ára gamal.

Ruskíløt

Á fundi 8. november 1979 varð samtykt at keypa ruskíløt av plastikk, at heingja runt í bygdini. Tó skuldi fyrst gerast ein metan av, hvussu nógv skuldu til endamálið.

Ætlan um brennistøð í Vágum

Á felags kommunalum fundi í Vágum 21. mars 1972, har flest allir bygdaráðálimirnir í Vágum vóru møttir, var eitt av málunum at fáa eina brennistøð í Vágum. Sagt verður, at tilboð vóru komin frá verkfrøðinginum Sofus M. Jacobsen, Tórshavn, um tvey sløg av brennistøðum: "Plibrico" í alt 465.000 kr. og "Pyros" 365.000 kr. Verkfrøðingurin segði, at viðmælt verður at hugsa um Plibrico støðina, tá hon hevur ymsar fyrimunir, so sum at ein triðingur kann gerast í Føroyum, og at hon lýtir landslagið minni. Raksturin verður mettur at verða 160.000 kr. um árið, og inntøkurnar um 200 kr. pr. hús, t.v.s. um 140.000 kr., og aðrar inntøkur 20.000 kr.

Menn vórðu samdir um, at tørvur er á eini brennistøð, og varð samtykt, at arbeiða víðari við málinum, og at søkja Løgtingið um stuðul.

Um brennistøðina verður sagt á felags kommunalum fundi í Vágum, hildin 24. juli 1972, at menn enn einaferð samdust um, at tørvur var á brennistøð, og at bjóða vestmenningum at vera við til at byggja støðina og reka hana, og at søkja um loyvi at seta hana upp við Fútaklett. Eisini varð samtykt at søkja Løgtingið um studning.

23. november 1972 verður bræv sent landsstýrinum frá Sandavágs-, Miðvágs-, Sørvágs- og Bíggjar kommunum, um at fáa stuðul til ovn at brenna ruskið í. Greitt verður frá, at í 60-unum kom í gongd skipan hjá kommununum í Vágum, at tær hvør sær høvdu ruskinnsavnan, har posar vóru savnaðir og brendir á ávísum stað hjá hvørjari kommunu sær. Hetta var tá eitt stórt framstig, tí áður varð alt rusk bara blakað allastaðni. Seinni er kortini komið eftir, at trupulleiki er við opnu brennistøðunum, tí tey dálka so nógv av sær. Eisini er uml. 3 km. langi vegurin norð á Mýrar til ruskplássið hjá Sørvágs kommunu tungur at halda, tí hann varð í síni tíð gjørdur til hestavognar og heldur ikki undir bilum. S. M. Jacobsen verkfrøðingur er komin við uppskoti um hóskandi ruskovn til Vágar, sum kostar uml. 500.000 kr. Hetta er tíverri meira enn kommunurnar klára, og verður tí biðið um stuðul úr Løgtinginum til henda ovn.

25. november 1972 sendir natúrfriðingarnevndin í Vágum skriv, har teir hava viðgjørt skrivið frá kommununum í Vágum 23/11-1972 til Landsstýrið. Har kommunurnar hava biðið nevndina siga sína hugsan at leggja við til umsóknina. Viðv. Sørvági nevnir nevndin í skrivinum, at Sørvágs kommuna hevði í veruleikanum tvey renovatiónspláss. Eitt við omankoyringina til Flúgvarabedingina. Hetta stað liggur ov nær landsvegi og er til ampa fyri umhvørvið og eisini Vatnsoyra bygd, og hevur nevndin heitt á Sørvágs kommunu um at niðurleggja hetta pláss. Hitt er Norðuri á Mýrum á vegnum Sørvágs meðin í Klovanum. Her koyrir kommunan nú alt ruskið, sum verður brent á opnum báli og eftirfylgjandi tyrvt.

Miðvágs og Sandavágs kommunur eru felags um eitt renovatiónspláss við Fútaklett. Her hevur verið gjørd ein jarnrist at brenna rusk á, men hóast væl verður ansað eftir, er ilt at gera við. Her fer nógv á sjógv, og harvið verður fjøran dálkað. Lendið niðan frá sær eisini út hareftir. Tað er eisini klagað um, at rusk frá Fútakletti rekur upp á Leynarsand.

Sostatt heldur nevndin tað vera tiltrongt, at kommunurnar útvega sær ein ruskovn fyri alla oynna og hon styðjar umsóknina frá kommununum til Føroya Løgting.

25. januar 1973 skrivar Landsstýrið, at tað ikki hevur heimild at veita umsøkta stuðulin til kommunur. Men kommunurnar kunnu søkja til Landsstýrið um veðhald fyri láni, sum so kann leggja málið fyri Løgtingið um at veita veðhald fyri einum láni til hetta endamál.

Á felags kommunufundi í Vágum 5. juli 1973, har teir flestu bygdaráðslimirnir í Vágum vóru møttir, var eitt av málunum, brennistøðin. Støðutakan til bygging, um samtykt at byggja og at fáa avgjørt hvar hon skal standa. John Poulsen borgarstjóri í Miðvági greiddi frá Plibrico brennistød. Frá S.M. Jacobsen ráðgevandi verkfrøðingi varð komin ein nýggj kostnaðarmeting, og eftir hesari meting verður støðin at kosta umleið 700.000 kr. Høvuðsgrundin til hækkaða kostnaðin er, at roknað verður við væl størri bygningi. Samlaða inntøkan til støðina verður mett til um 250.000 kr. árliga. Menn samdust einmælt um at byggja eina brennistød av slagnum Plibrico typa FBB 900, treytað av, at veðhald fæst frá Løgtinginum til lántøku, sum tilmælt frá Landsstýrinum í skrivi dagfest 25. januar 1973.

Um Plibrico brennistøðirnar kann nevnast, at framleiðarin var amerikanska felagið Plibrico, stovnað í 1914 við høvuðsstød í Northbrook, Illinois, USA. Teir vóru serfrøðingar á økinum og gjørdu eisini brennistøðir í Evropa. Nevnast kann at flestu donsku rusk brennistøðirnar tá vóru av merkinum Plibrico. Prinsippið var líkt tí brenistøðirnar framvegis brúka.

Á felags kommunufundi 15. januar 1974 var uppskot um býti av kostnaðinum av brennistøðini. Allar kommunurnar vóru samdar um at brúka fólkatalið sum grundarlag, uttan Sørvágs kommuna, ið ynskti at viðgera málið og geva boð seinni.

30. januar 1974 skrivar Sørvágs kommuna til hinar kommunurnar í Vágum. Í brævinum siga teir, at kommunan hevur trý tey seinastu árini brúkt 49.700 kr. til renovatión um árið, og vilja teir hægst lata hetta + 15 %, ella 57.000 kr. um árið til keyp av brennistøðini, rakstur og koyring av renovatiónini.

Á felags kommunufundi í Vágum 8. mars 1974 er brennistøðin til viðgerðar og skrivið, 30.01.1974 frá Sørvágs kommunu. Sagt verður, at Natúrufriðingarnevndin hevur við skrivi, 28.02.1974 givið loyvi til at byggja brennistøðina við Sundsbakka norðanfyri Fútaklett, við ávísum treytum. Aftaná orðadrátt varð málið útsett smb. uppskoti frá Svend Aage Ellefsen, tó uttan undirtøku frá Miðvágs- og Bíggjar bygdaráðum. Á felags fundi 18. november 1974, var undir "ymiskt" tosað um brennistøðina, men varð málið aftur útsett.

Næstu ferð málið um brennistøðina var fyri á felags kommunufundi í Vágum var hin 17. februar 1975. Í gerðabókini stendur, at Marni av Kák sýslumaður og formaður í natúrufriðingarnevndini, greiddi frá málinum og støðuni hjá natúrufriðingarnevndini. Hann helt, at spurningurin mátti greiðast, tí støðan var út av lagi, sum nú er. John Poulsen greiddi frá gongdini í málinum í seinastuni. Annars vóru menn á einum máli um, at spurningurin mátti fáa eina góða loysn.

Á felags kommunufundi 18. juli 1975 var brennistøðin til umrøðu. Meinhard Jacobsen, Sørvági, sum tó ikki var bygdaráðslimur, gav frágreiðing um vitjan á ymsum Plibrico brennistøðum í Danmark. Hann tyktist at vera nøgdur við úrslitini og helt, at eingin dálking var av teimum. Annars var semja um, at arbeiðast mátti víðari við málinum. Afturat Meinhard Jacobsen vóru Niels Marius Petersen, Hans Hansen, Gotfred Joensen og John Frederiksen og vitjaðu brennistøðirnar.

Brennistøðin var aftur til umrøðu á felags kommunufundi í Vágum 9. oktober 1975. Um hetta málið varð sagt, at samtykt varð at seta eina nevnd til at kanna og gera eina reglugerð fyri brennistøðina. Nevndin fekk loyvi til at fáa sær sakkøna hjálp. Í nevndina vórðu hesir valdir: Dánjal Tavsen, Helgi Hansen og Heini F. Petersen.

Á felagsfundi 6. mai 1976 hevði Marni av Kák sýslumaður orðið eina løtu, millum tað hann segði var, at hann mælti til, at kommunurnar høvdu hvør sær ein ruddingardag um árið.

Hetta sýnast kommunurnar at hava tikið til sín.

15. juni 1976 skrivar Sørvágs kommuna til Bíggjar kommunu, Miðvágs kommunu og Sandavágs kommunu og til Helga Hansen, Miðvági, Heina F. Petersen, Sandavági og John Poulsen, Vatnsoyrar. "Hjálagt verður sent tykkum kostnaðarætlan yvir brennistøð í Vágum og rakstrarætlan fyri støðina frá Sofus M. Jacobsen ráðgevandi verkfrøðingi, Tórshavn."
- Viðmerkjast skal, at niðanfyri er ein stytt útgáva.

Kostnaðarætlan fyri Brennistøðina
1. Ruskovnur 800.000 kr.
2. Tollur og farmagjald 150.000 kr.
3. Byggiarbeiði 350.000 kr.
4. Jørðarbeiði 100.000 kr.
5. El-, olju- og vatninstallatiónir 100.000 kr.
6. Málaraarbeiði 50.000 kr.
7. Ókent 100.000 kr.
8. Uppmáting, prosjekt og eftirlit 150.000 kr.

Tilsamans 1.800.000 kr.

Fígging
Eginpeningur, innskot frá kommununum í Vágum ÷ 400.000 kr.
Eftir: 1.400.000 kr.

Útreiðslur
Árligi rakstarkostnaðurin varð mettur til 375.000 kr.
Renta og avdráttur av 1,4 mill. mett til 275.000 kr.
Samlað 650.000 kr.

Inntøkur
800 húsarhald v.m. á kr. 700 pr. ár, 560.000 kr.
Aðrar inntøkur 90.000 kr.
Samlað 650.000 kr.

Í 1975 tóku nýggj bygdaráð við, og nú sýnist Sørvágs kommuna at hava broytt støðu.

14. juli 1976 hevði Dagblaðið tosað við Dánjal Tavsen, nýggjur bygdaráðsformaður í Sørvági, um ætlaða brennistøð í Vágum. Hann upplýsti, at talan er um at gera brennistøð, antin fyri Vágoynna burturav, ella saman við Eysturoynni og Norðstreymi. Kommunurnar í Vágum hava eitt tilboð inni á 1,8 mió. kr. Sambært avtalu við Sandavágs kommunu, er ætlanin, at gera støðina við Fútaklett. Avgerð verður skjótt tikin um tað á komandi felagsfundi. Tað er Føroya Kommunufelag, sum hevur hina ætlanina um felags brennistøð fyri tær tríggjar oyggjarnar, upplýsti Dánjal Tavsen eisini fyri blaðnum.

Á felags kommunufundi í Vágum 26. oktober 1976 var brennistøðin til viðgerðar. 15 kommunupolitikarar í Vágum vóru møttir, t.v.s. at bert tríggir manglaðu. Kostnaðarætlan av brennistøðini varð framløgd frá nevndini í Vágum. Sofus Jacobsen verkfrøðingur hevði gjørt hesa ætlan og eisini eina rakstrarætlan, sum eisini varð framløgd.

John Poulsen greiddi frá nevndararbeiðinum hjá nevndini fyri renovatiónina, sum Føroya kommunufelag hevði sett fyri Føroyar.

Sum málini lógu fyri kundi eingin avgerð verða tikin.

Á felagsfundi 13. juni 1977 verður m.a. nevnt undir ymiskt, at sýslumaðurin greiddi frá millum annað, at Friðingarnevndin hevði kannað dumparnar, og sýntist standurin bara at versna. Hann heitti á kommunurnar um at bøta um hesi viðurskifti. Samtykt varð at gjalda rokning frá S.M. Jacobsen, verkfrøðingi, fyri hansara kanningararbeiði og prosjektering av brennistøð í Vágum, tilsamans 21.657,80 kr. Býtt verður lufallsliga eftir fókatalinum.

Eftir 1979, tá kommunurnar fóru við í samstarvið um eina felags brennistød fyri landið, var málið um eina brennistød í Vágum slept. Og ruskkoyringin helt áfram áttatiárini uttan stórvegis broyting. Í 1989 yvirtók I.R.F. alla ruskinnsavnanina við brennistød í Lorvík.

Ruskkoyringin í áttatiárunum

Tað er framvegis Tummas í Lon i Miðvági, sum hevur ruskkoyringina í Miðvági um hendi øll áttatiárini eisini. Fyri árini 1981 – 1989 síggja vit, at kostnaðurin fyri russkoyringina hjá kommununi er í miðal 135.000 kr. um árið. Í 1990, eftir at IRF hevur tikið yvir, verða tó 15.000 kr. brúktar til ruskkoyring av kommununi sjálvari og í 1991, 33.000 kr. Sum sýnir, at gamla ruskkoyringin, partvís í hvussu er, hevur hildið áfram til 1991. Tó neyvan við húsarhaldsruski, men helst størri lutir o.a. Men eftir 1991 fer alt gjøgnum IRF, uttan árligu ruddinardagarnir, sum tó arbeiðsfólk hjá kommununi taka sær av.

Inntøkan av at selja ruskposar er í 1981, 20.000 kr. og liggur so hini árini í miðal um 45.000 kr. um árið, men veksur tað seinasta árið 1989 til 65.000 kr. Síðan er hetta við í gjaldinum til IRF.

Sigast skal, at tá IRF tók yvir, bleiv tað betur fyri umhvørvið. Men kostnaðurin fleirfaldaðist, og longu fyrsta árið var kostnaðurin 400.000 kr., næsta árið 900.000 kr. og triða árið var tað farið uppum milliónina. – Ikki so at merkja, tá hetta verður nevnt, at hetta ikki var ein neyðug og skilagóð íløga.

19. februar 1987 verður skrivað til Erlu Jacobsen, Vatnsoyrar og Maritu Frederiksen, Miðvági, sum vóru næmingar á Silkeborg Husholdningsskole í Silkeborg. Tær hava sent Miðvágs kommunu bræv við spurningum um, hvussu umhvørvið og burturkast í kommununi varð handfarið. Svarið frá Tummas Lauritsen, arkitekti hjá kommununi, er upplýsandi fyri hesa tíðina, og skal tí brot úr svarinum endurgevast:

"Vísandi til brøv tykkara dagf. 06.02.1987, skulu vit siga frá, at Miðvágs kommuna hevur einki upplýsandi tilfar at senda borgarunum hesum viðvíkjandi. Sum tit yvaleyst vita, verður húsarhaldsrusk heintað eina ferð um vikuna her í kommununi. Tað verður koyrt norður á Fútaklett og brent í opnum báli. Restirnar verða ruddaðar oman av helluni, á sjógv. Av og á verður skipað fyri ruddingardøgum, har bilvrak, køliskáp o.a. slíkt, sum danir nevna "storskrald", verður fylt í ein sandbát og søkt út fyri Trælanýpuni. Hettar er sjálvandi eingin góð loysn, og er hon heldur ikki ætlað at verða verandi. Tí fóru kommunurnar í síni tíð uppí IRF - interkommunala renovasjóns felagsskapin, sum hevur til endamáls at taka ímóti og beina fyri øllum ruski hjá limakommununum. Higartil hevur hesin felagsskapur arbeitt við ætlanum um at gera eina brennistød."

Bildumpur fyri Vágar

Á felags kommunalum fundi 3. januar 1972, har flestu bygdaráðslimir í oynni vóru møttir, var skriv frá løgregluni til viðgerðar um bilvrak o.a., og varð heitt á kommunurnar um at finna eina loysn, so eitt stað kundi finnast at seta vrakini á. Samtykt varð, at heita á hagastýrið fyri Norðurtriðing í Sørvági um at fáa grótbrotið við flogvøllin til hetta endamál.

Viðmerkjast kann, at nevnda grótbrot, nevnt "grótbrotið við Hellunarvarða", var eitt lítið grótbrot frá bretum stutt omanfyri, har Hotell Vágar var seinni, varð leiga til endamálið og brúkt í nøkur ár.

Á felags fundi 21. mars 1972 verður sagt, at svar var komið frá Norðurtriðingi um leigu av nevnda grótbrotinum, at kommunurnar kundu leiga tað fyri 600. kr. um árið við teirri treyt, at girðing verður gjørd um økið. Samtykt varð at leiga økið, og Sørvágs kommuna tók á seg at gera nevndu girðing.

Mynd av bildumpi av sama slalg, sum tann í Vágum.

Á fundi 25. januar 1973 samdust kommunurnar um at seta gjald á bilvrak, sum vórðu koyrd á bildumpin, ið kommunurnar høvdu leigað frá Norðurtriðingi, til 150 kr. pr. bilvrak.

Á felags kommunufundi í Vágum 26. oktober 1976 kom fram, at gjaldið fyri gamlar bilar sýntist ikki at kunna praktiserast, og tí hevði sýslumaðurin flíggjað kommununum bankabókina har 826,24 kr. stóðu á. T.v.s. at sjálvt um nógv bilvrak vóru har, so varð bert goldið fyri 5,5 bilvrak. Viðtøkan um gjaldið fyri gamlar bilar á dumpinum varð tí sett úr gildi, verður sagt. Samtykt varð at nýta innkomna peningin at rudda køstin fyri, verður lagt afturat.

Á felags kommunufundi 26. oktober 1979 er bildumpurin við Hellunarvarða á Hálsi í Sørvági til viðgerðar. Semja var við hagan Vørufelli, sum er syðri hagaparturin á Norðurtriðingi, at uppsiga leigusáttmálan til 1. januar 1980, og at tað, sum liggur í dumpinum verður tyrvt við gróti, møl og mold nú beinanvegin og síðan sátt við grasi. Samtykt varð í fyrsta lagi at gjalda Vørufelli 5.000 kr. og í øðrum lagi at royna at fáa loftferðslumyndugleikarnar at gjalda hesa upphædd. Fundurin gav nevndini heimild til at samráðast um nýggjan bildump við leigu upp til 4.000 kr. um árið. Samtykt varð eisini at gjalda rokning frá landsverkfrøðinginum fyri tyrving av bildumpinum tilsamans 8.533 kr. Býtt verður millum kommunurnar lufallsliga eftir fólatalinum.

Júst hví loftferðslumyndugleikarnar skuldu væntast at vilja gjalda hesa upphædd, verður ikki nevnt.

Seinast nevnda man so merkja, at landsverkfrøðingurin ikki hevur verið heilt liðugur við tyrvingina, og at tað fyrstnevnda á fundinum um tyrving, snýr seg um at gera arbeiðið liðugt.

Á felagsfundi 7. februar 1981 upplýsti Dánjal Tavsen, at sýslumaðurin hevði skrivað til kommunurnar har hann sigur, at hann hevur tosað við Finnboga Niclasen, flogvallarovasta, um at fáa grótbrotið sunnafyri flogvøllin til bilvrak. Semja varð um, at felagsnevndin tekur sær av hesum málinum.

Hetta var nevnd, sum varð vald á sama fundi. Limirnir í nevndini vóru: Jóannes Nielsen, Sandavági, Inna Nattestad, Miðvági, Jógvan á Ørg, Sørvági og Elias Petersen, Bø. Nevndin varð eisini skipað á sama fundi við Jóannes sum formanni, Innu sum næstformanni og Jógvan sum skrivara. Á fundinum takkaði Jóannes Nielsen fyri álitið og ynskti, at samarbeiðið mátti vera allari sýsluni at gagni. Stutt eftir, sama ár, er Eddie Lauritsen komin nevndina umboðandi Mykinesar kommunu.

Bildumpurin var fyri á fundi á felags kommunufundi 19. januar 1982, har flestu bygdaráðslimirnir í Vágum vóru møttir og Eddie fyri Mykines. Álagt varð nevndini fyri Felagskommununi at arbeiða víðari við málinum. Bildumpurin skal vera í samband við dumpin í Sørvági, verður sagt. Málið skal leggjast fyri næsta fund til støðutakan.

Málið er fyri aftur á fundi í nevndini fyri Felagskommununa 12. februar 1982. Allir limir møttir. Samráðingar høvdu verið við Vørufelli við uppskoti um at brúka dumpin norði á Mýrum. Leigan verður 10.000 kr. um árið. Hetta verður at leggja fyri felags fund.

Málið var fyri á felags fundi 10. september 1982. Har varð sagt, at Sandavágs kommuna tekur seg burtur úr samarbeiðinum um bildump. Málið varð sostatt burturlagt.

Á felags kommunufundi 21. apríl 1983 var bræv frá hagastýrinum fyri Vørufelli viðv. bildumpi til viðgerðar. Sum niðurstøðu varð sagt, at málið varð at greiða millum Vørufelli og einstaku kommunurnar. Innihaldið í brævinum varð tó einki nágreiniligt sagt um. Helst var tað um leigu, sum ikki enn var goldin fyri bildumpin.

I.R.F., Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin

Sum vit síggja í skjølunum hjá Miðvágs kommunu, so byrjaðu nøkur fólk longu í fimmtiárunum at gera vart við, at alt rusk bara varð blakað út í natúruna. Í fyrstu syftu var ónøgdin um, at hetta sá ikki vakurt út. Men sum fráleið kom eisini hugsanin um, at hetta ikki var gott fyri umhvørvið. Serliga í sjeytiárunum varð nógv kjakast um hetta, sæst m.a. í blaðskriving og í tí politiska orðaskiftinum, har funnist verður at, at burturkastið endar í havinum og í náttúruni annars.

Tá tað ikki eydnaðist í sjeytiárunum at fáa eina brennistød í Vágum, og aðara kommunur kring landið høvdu sama trupulleika, so kom tosið upp um, at byggja eina brennistød fyri alt landið. Men har varð trupulleikin, at semja fekst ikki um hvar brennistøðin skuldi vera. Hetta gjørdi, at Tórshavnar kommuna tíðliga tók seg úr ætlaða samstarvinum og gjørdi av at byggja sína egnu brennistød, Kommunalu Brennistøðina í Havn. Men hon hevði nokk við at nøkta tørvin hjá Havnini.

Hinar kommunurnar samdust í 1979 at stovna kommunala renovatiónsfelagsskapin, "Interkommunali Renovatións felagsskapurin", stytt "IRF". Endamálið við felagnum var, smb. grein 2 í viðtøkum felagsins: "At virka fyri, at burturkast og annað órudd varð beint burtur, so dálking av umhvørvinum helt uppat."

Felagið fór tó ikki til verka fyrr enn í 1981, tá eitt stýrið varð sett hin 5. juni 1981. Eftir at IRF var stovnað og farið til verka, stríddust limakommunurnar víðari við, hvar brennistød kundi byggjast. Eina tíð var t.d. ætlanin at byggja brennistød við Áir, men har var mótstøðan øgilig. So varð skift til onnur pláss, men hvørjaferð uppskot var um at byggja brennistød á ávísum stað, so komu mótmælir, friðingarnevndir og annað mangt uppí, og alt datt niðurfyri aftur. Onkustaðni var enntá planerað fyri brennistød, men hon varð ikki bygd har kortini.

Endin á stríðnum um, hvar kommunala brennistøðin skuldi liggja, varð, at hon varð løgd

I.R.F. brennistødin í Lorvík.

á Hagaleiti í Lorvík. Har fekst semja við allar partar, at støðin kundi vera. Brennistøðin liggur um 3 kilometrar frá bygdini og varð vegur gjørdur til Hagaleiti í hesum sambandi. Støðin varð tikin í brúk í 1989.

Í fyrsta stýrinum fyri IRF, sum tók við 5. juni 1981, sótu: Hjalgrím Janusarson, formaður, Vestmanna, Jógvan Isaksen, næstformaður, Klaksvík, Niklas Foldbo, Toftir, Leivur Joensen, Sandavágur, Jákup Birgir Mohr, Sandur og Niclas Jensen, Hvalba.

Sum sæst so vórðu stýrislimirnir valdir úr teim ymsu økjunum í landinum, so at umboðanin skuldi vera so javnt býtt út um landið sum til bar. Vágar, Streymoy, Eysturoy, Norðoyggjar, Sandoy og Suðuroy. Og limirnir vóru politisk umboð hjá oyggjunum, t.v.s. bygdaráðs- ella býráðslimir.

Leivur Joensen, Sandavági, var fyrsti vágamaðurin í stýrinum fyri IRF og sat í stýrinum frá 5. juni 1981 til 19. november 1990. Næsti vágamaðurin, sum fekk sati í stýrinum, var Jógvan á Ørg, Sørvági, sum sat í stýrinum frá 19. november 1990 til 16. apríl 1993. Triði vágamaðurin var Jóannes Klein, Vatnsoyrar, sum sat frá 16. apríl 1993. Jóannes gjørdist næstformaður í stýrinum hin 9. mars 2001 og formaður í stýrinum fyri IRF hin 24. apríl 2009 og sat í stýrinum og sum formaður til hin 19. apríl 2013, t.v.s. í 20 ár. Sum ein sær, hava kommunurnar í Vágum skiftst um hendan stýrislimin. Núverandi umboð fyri Vágar er Jonhard Joensen, Sandavági, sum tók sati í stýrinum hin 19. apríl 2013.

Ársaðalfundurin hjá IRF verður hildin á hvørjum árið fyri 1. mai. Á fundunum hava allar limakommunurnar høvi at møta við hvør sínum umboði.

Í roknskapinum hjá Miðvágs kommunu fyri 1981 síggja vit, smb. fíggjarstøðu pr. 31. mars 1981, at Renovatiónsfelagsskapurin, I.R.F., hevur tikið lán uppá 11,4 mió. kr. Herav ábyrgdast Miðvágs kommuna fyri 1,1 mió. kr. Hetta tal svingar komandi árini millum 1,2 og 1,4 mió. kr.

Komandi árini rindar kommunan, smb. roknskapinum, smáar upphæddir til IRF. 1984/85 3.000 kr., 1986 verða goldnar 6.000 kr. og í 1989 1.600 kr., sum man vera til umsiting.

Í 1989, seinnu helvt av árinum, tá brennistøðin á Hagaleiti í Lorvík byrjaði, hækkar gjaldið til IRF munandi og er 406.467 kr. Hetta árið varð tyrvingarpláss í smb. við brennistøðina eisini tikið í nýtslu.

Í einum yvirliti frá IRF fyri árið 1990 sæst, hvussu nógv allar limakommunurnar í IRF, sum vóru 41 í tali, og umboðaðu 31.114 fólk, skulu gjalda í árligum gjaldi fyri 1990. Árliga gjaldið pr. persón í kommununum var 790 kr. Nevnast kann, at Miðvágs kommuna, 1081 fólk, skuldi gjalda 853.990 kr., Sandavágs kommuna, 754 fólk, 595.660 kr., Sørvágs kommuna, 999 fólk, 789.210 kr. og Bíggjar kommuna, 74 fólk, 58.460 kr. Í samlaðum gjaldi frá teimum 41 kommununum fekk IRF í 1990, 24.580.000 kr. inn.

Virksemið hjá IRF vaks spakuliga gjøgnum árini. Í 1991 varð spillolju reinsiverk á Kambsdali tikið í nýtslu. Í 1996 varð byrjað at tøma rottangar. Í 1998 varð jarn endurnýtslan á Gjánoyri tikin í nýtslu. Í 2001 varð endurnýtsla opnað á Hagaleiti til pappír, papp og plast, og í 2005 varð nýggj roykreinsiskipan sett til á brennistøðini. Hetta eru so ting, sum hendu meðan Miðvágs kommuna var virkin.

Í 1989 hevur kommunan fingið sendandi drúgva reglugerð fyri tyrvingarpláss til burturkast, sum ikki skal brennast. Her stutt brot:

Í samband við, at brennistøðin hjá IRF verður tikin í nýtslu, verður øll innsavning, flutningur og viðgerð av ruski og burturkasti í øllum IRF-økinum samskipað beinleiðis undir

IRF, og verður IRF-økið býtt sundur í 5 meginøkir. Burturkast verður í høvuðsheitinum býtt sundur í trý: Tað, sum kann brennast, og verður brent á brennistøðini, tað, sum ikki kann brennast, og verður tyrvt á tyrvingarplássi, umframt vandamikið og dálkandi burturkast, sum hvørki skal brennast ella tyrvast. Til tann partin av burturkastinum, sum skal tyrvast, skal í hvørjum meginøki vera eitt tyrvingarpláss, sum verður gjørt til reiðar av IRF.

Øki til tyrvingarpláss skulu veljast soleiðis, at tey lýta nátturuna minst møguligt. Tey mega helst ikki siggjast úr bygdum øki og vegum við nógvari ferðslu.

Tyrvingarplássini skulu vera inngird við 2 m høgum hegni, og portri, sum kann læsast.

Á fundi í bygdaráðnum 24. august 1989 var til viðgerðar rusksamlipláss í kommununi. Møttir á fundi vóru, Regin Poulsen formaður, Anna Hansen, Erling Simonsen, Símun Thomasen, Inna Nattestad, Meinhard Johannesen og Hjørleif Joensen.

Uppskot hevði verið um, at nýta grótbrotið á Vatnavegnum, við Einring, til rusksamlipláss. Tekniska nevnd mælti frá hesum og bygdaráðið samtykti einmælt, at mæla Friðingarnevndini í Vágum frá at geva loyvi til at brúka grótbroti við Einring til samlipláss.

Bygdaráðsformaðurin skeyt so upp at bjóða I.R.F. ídnaðarøkið úti á Dal, ímóti at I.R.F. gerð vegin soleiðis, at hann kann taka tunga ferðslu. Hetta uppskotið varð samtykt.

Á fundi 17. januar 1990 verður sagt, at fýra tilboð vóru innkomin uppá at gera bingjupláss til ruskbingjur millum Gomlu smiðju og Snarfrost. Sum avgerð verður sagt, at "málið verður kannað nærri. Møguliga kann IRF bjóðast at nýta sama bingjupláss."

Í august 1991 hevði Kristin Ellefsen verkfrøðingur gjørt eitt fullfíggjað prosjekt at gera bingjupláss vestanfyri Snarfrost, sum er sama øki nevnt er frammanfyri. Sambært tí ætlanini skuldu trý innistikaði økir vera heimanfyri parkerinsplássið hjá Snarfrost, sum øll skuldu hava betonplanering og betonggarð rundan um, kloakkføring, samlibrunn og rørleiðing, elveiting og atgongd til vatn o.a. Tað var eitt bingupláss til IRF og eitt til kommununa, og niðri við sjóarmálan, eitt øki til Oljufelagið Føroyar. Men sum skilst, varð hetta ikki til nakað kortini.

Bingjuplássið bleiv so úti á Prestlandinum í nógv ár, er í nýggjari tíð flutt yvir um vánna og er nú ovarlaga undir berginum á tí uttaru kaiini í Miðvági.

Á bygdaráðsfundi 18. september 1992 var eitt skriv frá IRF til viðgerðar um at leggja gjald á ruskposarnar, ið nýttir verða. Fíggjarnevndin mælti til, gjald verður lagt á posarnar við hesum treytum: Brúkarin skal sjálvur keypa posarnar har høgligast er. Posarnir verða ikki tiknir fyrr enn brúkarin metir, at tørvur er. Samtykt at fylgja tilráðingini frá F.N. Men hetta hevur so heldur ikki verið galdandi seinni og var møguliga bert eina tíð.

Um kostnaðin hjá Miðvágs kommunu at vera í IRF kann nevnast í rundum tølum, at kostnaðurin tað fyrsta árið, sum var 1989, var 400 tús. kr. Árini 1990 – 1992 er kostnaðurin í miðal um árið 925 tús. kr. Árini 1993 – 1995 liggur árligi kostnaðurin um 1,0 mió. kr. og árini 1996 – 1999 um 1,2 mió. kr. um árið. Árini 2000 – 2002 í miðal 1,4 mió. kr. um árið og 2003 – 2005 í miðal 1,7 mió. kr. um árið og fyri 2008, 1,8 mió. kr. Ella umleið 22 milliónir krónur tilsamans tey árini Miðvágs kommuna var í I.R.F.

Barnaansing í Miðvági

Tíðliga í 1979 skipaðu nakrar kvinnur, sum starvaðust á Ellisheiminum í Vágum, fyri innsavnan av undirskriftum í øllum bygdunum í Vágum, har heitt varð á bygdaráðini um at skipa fyri barnaansing í bygdunum. Kvinnurnar vóru: Else Bloch Heinesen, Sandavági, Astrid Lauritsen, Sørvági, Inna Nattestad, Miðvági og Jónvør Petersen, Bø.

2. mai 1979 skrivaði Sosialurin um málið og segði, at í skrivinum heittu tær á kommunurnar í Vágum um at seta á stovn dagrøktarskipan og at gera fleiri spælipláss í bygdunum. Í greinini verður sagt, at tað koma støðugt fleiri arbeiðspláss til kvinnur í oynni. Í løtuni vóru uml. 200 útiarbeiðandi kvinnur í Vágum. Fleiri høvdu hug til at arbeiða úti, men kundu tað ikki, orsaka av tørvandi møguleikum at fáa børnini ansað.

Tosað varð við Else Heinesen í Sandavági, sum m.a. segði, at tað vóru tveir mánaðir síðan tær byrjaðu at ganga hús úr húsi í bygdunum í Vágum at savna inn undirskriftir. Bygdaráðini høvdu nú fingið skrivini. Tær hugsaðu sær at byrja við dagrøkt, og at hava ein felags leiðara fyri alla oynna. Men málið var við tíðini at fáa barnagarðar og vøggustovur. Men tað var mest brúk fyri barnagørðum. Tær hildu, at hóast dagpleygan kom at kosta kommununum nakað, so komu pengarnir inn aftur við tað, at kvinnurnar komu at rinda skatt, og tað komu dagpleygumammurnar eisini. Við endan av blaðsamrøðuni spurdi blaðmaðurin, hvat tær fóru at gera um bygdaráðini einki gjørdu við málið? Til tað svaraði Else: "Tað hava vit ikki enn tikið støðu til. Vit eru í fyrsta umfari noyddar at vera optimistiskar."

14. september 1979 fingu kommunurnar avrit av brævi, dagfest 10. september 1979, sum Else, Inna, Astrid og Jónvør høvdu sent til felagskommununa í Vágum, har Jón Joensen, Bøur, var formaður hesa tíðina: "Vit hava nú søkt allar kommunur í Vágum um eina dagrøktarskipan. Sum gongdin hevur verið og er, er stórur tørvur á at fáa børnini passað, og tað er best um øll oyggin arbeiðir saman um hetta mál við t.d. einum felags eftirlitisfólki. Vit senda hesa umsókn til Felagskommununa við vón um, at dagrøktarskipanin skjótt er veruleiki."

Málið var tikið upp á felags kommunalum fundi í Vágum 26. oktober 1979. Samtykt varð at kanna málið, og varð nevnd sett at fremja hetta. Í nevndina vórðu valdir: Hans Jørgensen, Miðvági, Sune Jacobsen, Sørvági og Gutti Petersen, Sandavági.

Helst hevur Inna Nattestad spurt um málið, tó at skriv um tað ikki er varðveitt, men hin 22. november 1979 skrivar Miðvágs kommuna til Innu og sigur, at málið var viðgjørt á felags oyggjarfundi, har 3 manna nevnd var sett at gera kanningar av tørvi o.ø. hesum viðvíkjandi.

Næstu ferð málið er fyri á felags kommunalum fundi í Vágum er 22. desember 1980. Har sagt er, at samtykt var at lata málið um dagrøkt til komandi bygdarráð at arbeiða víðari við. Har viðmerkjast kann, at nýggj bygdaráð tóku við 01.01.1981.

Í 1981 hava kommunurnar í Vágum latið gjørt eina spurnarkanning um tørvin á barnaansing í Vágum. Í spurnarblaðnum stendur hetta:

> *"Viðvíkjandi útreiðslunum av barnadagrøktini er býtið hetta: Parturin hjá kommununi 30%, parturin hjá statinum 40% og parturin hjá foreldrunum 30%. Í løtuni hevði tygara partur verið 400 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið. Um dagrøktarskipanin varð sett á stovn, høvdu tygum so arbeitt úti?"*

Úrslitið varð, at í 1981 svara 1/3 av teimum spurdu kvinnunum í barnsburum aldri í Vágum, ja til at tær høvu arbeitt úti og 2/3 svara, nei til, at tær høvdu arbeitt úti um dagrøkt kom. Sjálvt um 1/3 av teim spurdu svara, at tær høvdu arbeitt úti, um dagrøkt kom, so verður hetta tal helst ikki mett nóg høgt til, at kommunurnar síggja orsøk til at skipa dagrøkt. Grundin er helst tann, at tað longu vóru tætt við 1/3 av kvinnunum, sum arbeiddu úti, hetta hóast at eingin

dagrøkt var. Og tá tað gongur uttan barnaansing, so hví brúka pengar upp á tað? sýnist hugsanin hjá bygdaráðunum at vera.

Fyribils dagrøkt

Endin varð tó ikki felags dagrøktarskipan fyri alla oynna, men fyri hvørja kommunu sær. Inna Nattestad sýnist at vera tann, sum hevur arbeitt harðast við at fáa barnaansing í Miðvági. Í hvussu er innan politisku skipanina. Hon kom í bygdaráðið í Miðvági hin 1. januar 1981 og var fysta kvinnan, sum varð vald í stýrið fyri Miðvágs kommunu. Ikki er óhugsandi, at málið um barnaansing var ein av grundunum, at hon hevur stillað upp og varð vald. - Ikki so at hon ikki arbeiddi áhugað fyri onnur mál eisini. - Hon varð eisini vald í felags nevnd fyri kommunurnar í Vágum, sum var skipað í 1981, sum fekk heitið Felagskommunan, har hon umboðaði Miðvágs kommunu. Ein málsetningur hjá hesi nevndini fyrstu tíðina var m.a., at kanna málið um dagrøktarskipan.

Tíðliga í 1984 hevur Inna skrivað til Tórshavnar uttanbíggja kommunu, Argir, sum hevði sett dagrøkt á stovn tá, og spurt seg fyri um arbeiðstíð, kostnaðir og lønir o.a. hesum viðvíkjandi. 9. februar 1984 fær hon eitt nokkso upplýsandi svar úr Argjum. Sagt verður at dagrøktarmammurnar har verða løntar fyri hálvan og fullan dag, eftir sum tær arbeiða. Heilur dagur er 9 tímar og hálvur 4 ½ tíma, sum kann vera fyrrapart ella seinnapart. Full tíð er 1.929 kr. um mánaðin. Tær hava frí 4 vikur um árið við fullari løn, har frítíðin helst skal falla somu tíð, sum foreldrini hava frí. Annars verður løn ikki goldin. Nakað av tilfarið verður keypt, blæur, møguliga barnavognar, leikur, skrivstovuútgerð, pappír, tryggingar o.a. Skipanin er fíggjað við, at 40% er statsstuðul, 30% av kommununi og 30% av foreldrunum. Soleiðis at foreldur undir teirra skipan í løtuni rinda 750 kr. um mánaðin fyri fullan dag og 375 kr. fyri hálvan dag.

Sum vit síggja viðvíkjandi dagrøktini í Miðvági, so hava tey nýtt hetta sum arbeiðsskjal og mannagongd við sínari dagrøkt.

Dagrøktin í Miðvági er fyribils byrjað í 1983. Hin 25. apríl 1984 er listi yvir dagrøktarbørn og dagrøktarmammur. Sambært upplýsingum hjá kommununi eru tær tvær:
Sonja Johannesen, Miðvágur. Sonja hevði 5 børn í dagrøkt smb. skrivi 25.4.1984. Gurli Sandberg Joensen, Magni Klein, Jón Falkvard, Eiler Haraldsen og Sarah Khaliqhey. Sambært egnari skrivligari frágreiðing í 1987 er hon byrjað sum dagrøktarmamma í Miðvági í 1983. Og má tað hava verið á privatum støði.
Berghild Thomassen, Miðvágur, pedagoglærd. Berghild hevði 7 børn í dagrøkt smb. skrivi 25.4.1984. Hávardur Enni, Bárur Sandberg Joensen, Bjarni Joensen, Rúni Olsen, Karl Niclasen, Martha Thomassen og Marin Elisabeth á Høgabóli. Nær hon er byrjað er ikki upplýst, men helst eisini í 1983.

Hetta eru fyrstu dagrøktarmammurnar og fyrstu dagrøktarbørnini í Miðvági, sum síggjast skrásett. Nøkur børn vóru fulla tíð, nøkur hálva tíð og onkur minni enn tað. Fíggingin av dagrøktini fyrstu tíðina má hava verið á privatum støði. Hesa tíð sæst kommunan ikki at hava goldið til dagrøkt og tað var heldur ikki samtykt tá at gera tað. Og tá kommunan ikki hevur goldið, hevur staturin neyvan gjørt tað heldur, tí tað var treyt síggja vit seinni. Økið var undir statinum tá.

Kommunal dagrøkt sett á stovn

Dagrøktin hjá Miðvágs kommunu byrjaði 1. desember 1985. Hin 31. juli 1984 hevði kommunan fingið sendandi "Gjaldsreglur fyri dagstovnar" frá Føroya Landsstýri v/ Eilif



Reglugerð fyri dagrøktina í Miðvági 1986.

Samuelsen, landsstýrismanni. Reglugerðin var í 9 §-um og hevði heimild í lóg um barnaforsorg frá 29.3.1977. Ein av relgunum segði, at brúkaragjaldið skuldi vera 30% og skuldi vera líka fyri øll. Umsóknir um fríplass skuldu latast inn til barnaverndirnar við fíggjarligum upplýsingum um familjuna. Barnaverndin kundi játta fríplass fyri 1 ár í senn. Annars snúði reglugerðin seg rímuliga nógv um júst hetta. Í 1985 gjørdi kommunan, saman við dagrøktarleiðaranum, meira fullfíggjaða reglugerð yvir alt arbeiði, ábyrgd, krøv og skyldur hjá dagrøktarmammunum. Har úr rúgvuni kann nevnast, at dagrøktarmamman skuldi ikki geva børnunum góðgæti, skuldi hava tey í dagrøktarheiminum ella á matriklinum og t.d. ikki koyra tey við bili ørindi ella annað.

Á fundi í bygdaráðnum 27. juni 1984 varð samtykt at byrja almenna kommunala dagrøkt hin 1. apríl 1985. Á fundinum var eisini samtykt at hava barnaansingina hálva tíð fyrsta árið. Hetta varð tó broytt á fundi 28. desember 1984 til fulla tíð – og tíðarætlanin helt ikki.

Skráseting yvir dagrøktina í protokoll "Stambog" sum tað er nevnt á donskum, er byrjað í Miðvági hin 1. desember 1985, sambært fyrstu protokollini yvir børn, sum komu í dagrøktina hjá Miðvágs kommunu. Henda dagin vórðu 15 børn skrásett; tey vóru fødd millum 1979 og 1985, t.v.s. millum 0 og 6 ár. Nøkur av teimum, sum høvdu verið í fyribils dagrøktini vóru millum tey fyrstu í almennu dagrøktini. Tey vóru, nevnd í nummarraðfylgju:

Hans Bogi Ellefsen, Katrin á Norði, Bjarni Árnason Joensen, Svanna Johansen, Jonn Arni Johansen, Gurli Sandberg Joensen, Sarah Khaliqhey, Magni Klein, Eiler Haraldsen, Bárður Sandberg Joensen, Hávardur Enni, Hildur Enni, Michael Larsen, Martin Larsen og Marin Elisabeth á Høgabóli.

Nevnast kann, at Michael Larsen og Martin Larsen vóru synir Kirstin Larsen, dagrøktarleiðara.

Roknskapurin fyri desember 1985 er varðveittur. Henda mánaðin er eingin stuðul frá Statinum, men kommunan hevur rindað 27.552 kr. og foreldrini 10.687 kr. Tilsamans 38.239 kr.

Útreiðslurnar vóru: Løn til dagpleyðumammur 25.700 kr., løn til leiðara (hálv tíð) 6.067 kr., tilfar (toyblæur, leika o.a.) og umsiting (skrivstovutilfar, porto o.a.) 6.472 kr.

Kirstin Larsen, dagrøktarleiðari. Fødd í 1955 í Lønne, Jyllandi, Danmark. Kirstin var sett dagrøktarleiðari frá 1. november 1985 har fyrsti mánaðurin var fyrireikingartíð at skipa kommunalu dagrøktina. Kirstin var fyrsti leiðarin fyri kommunalu dagrøktina í Miðvági. Tað er ikki nevnt, men hon hevur helst verið pedagoglærd ella líknandi og er tí sett í starvið. Hon var gift við Svend Erik Larsen f. 1951, Hårslev, Fyn, DK. Um starv hansara stendur, stjóri. Tey áttu tveir synir, ið gingu í dagrøktini í Miðvági, føddir í 1982 og 1985, tann seinni er føddur beint eftir at tey eru flutt til Miðvágs. So hon hevur havt eitt 3 ára gamalt og eitt tveir mánaðir gamalt barn at taka sær av, tá hon tók við starvinum. Smb. fólkayvirlitinum stendur,

at tey høvdu boðað frá, at tey ætlaðu at flyta til Miðvágs úr Sandavági hin 20.8.1985, men á føðibrævinum hjá syni teirra stendur, at hann er føddur 9.8.1985 á L.S. og at bústaður teirra tá er Miðvágur. So tey mugu vera flutt fyrr enn ætlað, helst fyrst í august til Miðvágs, har eisini sagt verður í skrivi, at tey búgva á Vágalið. Samtykt varð á bygdaráðsfundi 22. oktober 1985 at seta Kirstin Larsen í starvið, treytað av, at Almannastovan góðtók hettar. Tað hevur Almannastovan so gjørt.

Á fundi 18. desember 1985 er sagt, at dagrøktarleiðarin og bygdarráðsformaðurin, Martin Nielsen, hava í felag gjørt reglugerð fyri dagrøktina í Miðvági. Heitt varð á bygdarráðið um at góðkenna reglugerðina, sum varð samtykt. Á sama fundi var lønin hjá leiðaranum ásett til 6.067 kr. um mánaðin eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið - 13. lønarflokk - 2. árið. Løn fyri hálvan dag.

Umsókn um lønarhækkan hjá dagrøktarmammunum og at leiðarin skuldi fara upp í ¾ tíð var til viðgerðar á bygdaráðsfundi 4. mai 1987. Lønarhækkanin var ikki samtykt, men samtykt varð at seta leiðaran upp í ¾ tíð.

Kirstin Larsen var í starvinum til hin 31. juli 1987, tá hon og familja fluttu aftur til Danmarkar. Fíggjarnevndin mælti til, at søkt varð eftir nýggjum leiðara skjótast, sum varð samtykt. Sambært skrivi fluttu tey til Fåborg, Fyn, DK.

Víðka dagrøktina

Á bygdaráðsfundi 29. januar 1986 var frammi, at fíggjarnevndin mælti til, at dagrøktin varð víðkað til at umfata upp til 30 børn heilan dag. Í viðmerkingunum er sagt: "1.12.1985 byrjaði dagrøktin í Miðvági at virka. Tørvurin hevur verið størri enn roknað varð við, soleiðis at í dag eru øll 15 plássini upptikin, og 4 børn standa á bíðilista og 2 pláss eru umbiðin til seinni í summar. Mett verður, at meirkostnaðurin fyri roknskaparárið 1986 verður 120.000 kr. Mælt verður til, at hendan upphædd verður tikin av rakstraravlopinum, og at lántøkan verður hækkað lutfallsliga." Samtykt varð at søkja um loyvi frá Landsstýrinum at hava upp til 30 børn.

Dimmalætting skrivar um málið hin 20. mars 1986, har upplýst verður: "Sum tann fyrsta av teimum miðalstóru føroysku kommununum fór Miðvágs kommuna 1. desember í fjør, undir eina kommunala dagrøktarskipan." Har síðan greitt var frá málinum, at talið av børnum nú skuldi hækkast úr 15 til 30 børn, og at játtan var komin úr Landsstýrinum. Martin Nielsen, bygdaráðsformaður, segði við blaðið, at hann helt, at fólk vóru glað fyri skipanina og fyri kommununa var hon ikki tyngjandi. "Skipanin skapar nøkur arbeiðspláss, samstundis sum tey, ið fáa børnini passað, fara út til arbeiðis, og vit hava so nógv arbeiði í kommununi, at tørvur er á arbeiðsmegi."

Samtykt varð á fundi 4. mai 1987 at søkja um at fáa talið av dagrøktarbørnum hækkað úr 30 til 45 børn, vegna at frá 24. apríl sama ár stóðu 11 børn á bíðilista til dagrøktina.

Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, skrivar hin 11. juni 1987, og sigur, at sambært tilmæli frá Almannastovuni og smb. lóg um dagrøkt, loyvir Landsstýrið hervið kommununi at hækka talið av dagrøktarbørnum í Miðvági úr 30 til 45 børn.

Líkningarráðið skrivar hin 12. mars 1987, at ráðið hevur samtykt, at 2/3 av samsýningini til dagrøktarar er skattskyldug inntøka, meðan 1/3 er at rokna sum útreiðslur, ið standast av røktini. A-inntøka skal tí bert roknast av 2/3 av samsýningini.

Spælistova í Gamla skúla

Í 1985 var Gamli skúli endaliga niðurlagdur sum barnaskúli við tað at børnini fóru at ganga í Bygdarskúlanum í bygdarhúsinum. Tosað var síðan um hvat Gamli skúli nú kundi brúkast til, ymisk uppskot vóru. Endin varð, at skúlin var brúktur til barnaansing tveir dagar um

vikuna, umframt sum kvøldskúli og til annað virksemi eisini.

Í gerðabókini hjá kommununi fyri fund 26. januar 1987, er sagt, at Dagrøktin hevur ætlanir um at hava eina spælistovu í gamla skúla, har børn í dagrøkt saman við dagrøktarmammum kunna koma eina ella tvær ferðir um vikuna til spæl og annað handaligt arbeiði. Til hettar er neyðugt við nakað av innbúgvi, stólar og borð til børn og reolir fyri 18.000 kr., og leika o.a. fyri uml. 7.000 kr. Tað eru avsettar 35.000 kr. í fíggjarætlanini. F.N. viðmælti og málið varð samtykt.

Hin 16. november 1987 samtykti bygdaráðið at seta eitt vaskifólk at vaska Gamla skúla 2-4 tímar um vikuna. Samtykt var at fáa eitt av reingerðarfólkunum at gera hetta fyri eyka samsýning.

Paula Nattestad, dagrøktarleiðari. Fødd 17. mai 1946. Sett dagrøktarleiðari frá 1. august 1987, var í starvinum í samfull 17 ár fram til 31. juli 2004. Hevði prógv sum húsarhaldslærari og hevði undirvíst í kvøldskúla í Klaksvík og seinni á Giljanesi og hevði luttikið í skeiði um heimkunnleika á Føroya Læraraskúla. Á almennum bygdaráðsfundi 22. juli 1987 var til viðgerðar setan av dagrøktarleiðara. Inn vóru komnar 5 umsóknir til starvið. Samtykt var við skrivligari avgreiðslu at seta Paulu Nattestad í starvið. Út frá skrivum skilst, at hon fekk skrivstovu í kommunuhúsinum í Miðvági. Um fyrri leiðarin eisini hevði tað er møguligt, men ikki upplýst.

Paula Nattestad

24. august 1989 varð samtykt at seta dagrøktarleiðaran í starv fulla tíð frá 1.9.1989, áður var tað ¾ tíð. Í 1992 er leiðarin farin niður aftur í ¾ tíð og er tað restina av nítiárunum. Høvuðsgrundin til tað var, at talið av dagrøktarmammum og børnum í dagrøktini minkaði munandi hesi árini, men vaks so aftur við endan av nítiárunum.

Paula Nattestad sat eisini í bygdaráðnum tvær setur frá 1. januar 1993 til 31. desember 2000.

Á fundi í bygdaráðnum 22. februar 2000 verður samtykt at seta dagrøktarleiðaran í fulla tíð aftur við virknaði frá 1. januar 2000. 29. februar sama ár skrivar Almannastovan svar upp á fyrispurning frá kommununi um arbeiðsuppgávurnar hjá dagrøktarleiðaranum. Almannastovan hevur hetta svar: "Leiðarin skal stuðla og ráðgeva dagrøktarheiminum á ein fakligan hátt. Hava samband við foreldrini um upptøku av barni teirra og kunna um dagrøktarskipanina. Standa fyri innkeypi, útflýggjan og ráðgeving í nýtslu av ítrivi, leiku og praktiskum hjálpitólum. Vera við til at gera fíggjarætlan, um kommunan metir tað vera neyðugt."

Á almennum bygdaráðsfundi 15. juni 2004 var til viðgerðar, at dagrøktarleiðarin hevði sagt seg úr starvi frá 1. august 2004 at rokna. Samtykt var at søkja eftir nýggjum leiðara.

Vága dagrøktarfelag

Hin 29. september 1987 skipaðu dagrøktarmammurnar í Vágum seg í felag, sum tær nevndu Vága dagrøktarfelag. Stovnandi fundurin var nevnda dag hildin í Gamla skúla í Miðvági. Í gerðabókini 1987-1995, sum er varðveitt í skjalasavninum hjá Miðvágs kommunu, stendur, at flestu dagrøktarmammurnar í Vágum vóru møttar til fundin, og var nevnd vald við tveimum limum úr hvørjari bygd, Sandavági, Miðvági og Sørvági. Eftir fundin skipaði nevndin seg við Sonju Johannesen, Miðvági sum formanni, Marnu Selfoss, Sørvági, sum næstformanni

Dagrøktarbørn í Miðvági 1987. Mynd: Dagrøktin í Miðvági.

og Turid Christiansen, Sandavági sum kassameistara. Hinir nevndarlimirnir vóru, Magny Haraldsen, Sandavági, Signa Joensen, Miðvági og Fríðbjørg Jacobsen, Sørvági.

Á fundi í felagnum 26. oktober 1987 er sagt, at skriv varð sent til bygdaráðsformenninar í oynni, har sagt verður, at felag er stovnað, og at tá tað kemur til arbeiðs- og lønarspurningar hjá limunum, eiga kommunurnar at venda sær til felagið. Tað gongur nakað av tíð, men á fundi hjá Dagrøktarfelagnum 15. juni 1988 er sagt, at felagið nú var góðkent av bygdarráðunum. Og verður í somu fundarfrágreiðing sagt, at sáttmáli var gjørdur við bygdaráðini og lyfti um, at lønin skuldi hækka 300 kr. 1. juli fyri hvørt barnið og 1. januar 1989 aftur 300 kr.

Miðan 1988 vóru samráðingar millum Vága dagrøktarfelag og kommunurnar í Vágum. Nýggj reglugerð var gjørd og lønarsemja, sum var galdandi fyri allar tríggjar kommunurnar. Sum var fingu dagrøktarmammurnar 2.055 kr. pr. barn fulla tíð. Skotið varð upp, at lønin varð hækkað til 2.355 kr. pr. barn fulla tíð frá 1. juli 1988. Bæði reglugerð og løn var samtykt av Miðvágs kommunu. Í reglugerðini stóð, at tíðin var 9 tímar. Hjørleif Joensen viðmerkti, at um 9 tímar er frá kl. 8.00 til 17.00 er hettar ov stutt til tey, ið arbeiða hesa tíð.

Dagrøktararnir uppsagdir og stríð

Í gerðabókini hjá Vága dagrøktarfelag er frágreiðing frá fundi 16. mai 1989 millum nevndina í dagrøktarfelagnum og felagskommununa í Vágum. Fyri dagrøktarfelagið møttu, Sonja Johannesen, Marna Selfoss, Thurid Christiansen, Signa Joensen og Fríðbjørg Jacobsen. Vegna felagskommununa møttu bygdaráðsformenninir, Hjørleif Joensen, Miðvági, Dánjal Tavsen, Sørvági og Jógvan Sjúrður Hansen, Sandavági. Dánjal bjóðaði vælkomin vegna kommunurnar. Í gerðabókini hjá Dagrøktarfelagnum stendur, at í byrjanini var fundurin siðiligur og greitt var frá semjuni um lønarhækkan hjá dagrøktarunum 01.07.1988 og 01.01.1989. Hóast hetta hevði Miðvágs kommuna lækkað gjaldið, uttan avtalu ella samráðingar. Hjørleif Joensen segði, at hetta varð gjørt, tí einki stóð í teirra gerðabók um nakra semju um lønarhækkan 01.01.1989. Nevndin helt fast við, at lønin er hækkað og hevur hetta staðið við í 4 mánaðir. So stendur: *"hereftir vóru fundarluttakararnir nakað harðmæltir. Ongin semja kom burturúr. Eisini varð fórt fram, at Miðvágs kommuna ikki vildi gjalda feriulønina út til 1. mai, soleiðis sum lógin ásetur smb. grein 10 í frítíðarlógini."* Annars stendur einki meira um málið í gerðabókini hjá dagrøktarunum, og næsti fundur í felagnum var smb. gerðabókini ikki fyrr enn 21. februar 1990, har málið ikki er nevnt. Sum kanska er eitt sindur undarligt, tá ein hugsar um gongdina í málinum.

Á bygdaráðsfundi 23. mai 1989 var samtykt smb. skrivi frá Almanastovuni, at hækka lønina hjá dagrøktarunum til 2.546 kr. fyri barnið um mánaðin. Og á bygdaráðsfundi 26. september 1989, er sagt, at sambært skrivi frá Føroya Landsstýri eru greiðar linjur, hvussu fram skal

farast í hesum máli. Fíggjarnevndin mælti til at fylgja tilráðingini frá Almannastovuni og Føroya Landsstýri. Eftir hesum var lønin 2.567 kr. fyri hvørt barnið um mánaðin. - Sum var ein lítil hækking frá mai sama ár.

Samtykt var at hava fund við dagrøktarmammurnar í Miðvági, har gjørt verður greitt, at lønin er 2.567 kr. Tær, ið ikki góðtaka hettar, verða uppsagdar til tann 1.11.1989. Tær eru vælkomnar at søkja aftur.

Sum skilst, hildu tær, at tær áttu 200 kr. meir, ella 2.767 kr. fyri hvørt barnið um mánaðin, smb. avtalu, ið gjørd var. Júst hvørja avtalu hetta bygdi á er ikki greitt og sæst ikki í skjølunum hjá kommununi, og byggir tí helst á okkurt, tær hava skilt sum munnlig lyftir. Sambært avtalu, førd er í gerðabók hjá kommununi í 1989, var avtalað millum bygdaráðsformenninar, sum á fundi millum partarnar, umboðaðu Felagskommununa, og felagið hjá dagrøktarunum, at lønin skuldi upp á 2.655 kr. 1. januar 1989, og tað er bert 58 kr. meir enn tær nú fingu lovað. Men henda avtala var ikki samtykt í bygdaráðnum, sum Hjørleif Joensen, bygdaráðsformaður, vísti á. Og tí hevði kommunan framvegis goldið teimum 2.355 kr. pr. barn í 1989. So hetta var rættuliga fløkjasligt, sum Regin Poulsen, næsti bygdaráðsformaðurin, vísti á. Og tí mátti skil fáast á hesum, segði hann.

Hjørleif Joensen, bygdaráðsformaður, fór frá sum formaður heldur óvæntað hin 1. juni 1989. Um stríðið við dagrøktararnar var ein grund undir tí, er møguligt, men tó ikki nevnt. Regin Poulsen tók so við sum bygdaráðsformaður sama dagin.

Hin 28. september 1989 møta flestu av dagrøktarmammunum í Miðvági til fundar við bygdaráðið: Signa Joensen, Jacobina Petersen, Jóhanna Næss, Berghild Thomassen, Annika Thomassen, Paula Joensen, Brynhild Thomassen, Kamma Thomassen, Hansia Nattestad, Sonja Johannesen og Edith á Løgmansbø. 3 vóru ikki møttar: Bjørg av Kák Olsen, Karin Thomassen og Sanna Johannesen. Av hesum nevndu vóru Edith á Løgmansbø og Bjørg av Kák Olsen nýggjar og ikki nevndar áður. Edith sæst bara nevnd í hesum førinum, so hon hevur helst ikki verið fast í starvi, men avloysari.

Sagt er í gerðabókini hjá kommununi:

"Regin bjóðaði Vælkomin og las samtyktina upp. Sostatt eru dagrøktarmammurnar sagdar úr starvi, pr. 01.11.1989. Samtykt varð at senda skriv til allar dagrøktarmammurnar við hesi fundarsamtykt sum grundarlagi. Skrivið má sendast áðrenn 01.10.1989."

Hetta merkir so, at dagrøktarmammurnar hava ikki góðtikið lønaruppskotið. Og grundin til, at skrivið mátti sendast áðrenn 01.10. var, at tær høvdu ein mánaða uppsagnartíð.

Jólini 1988.
Mynd: Dagrøktin.

Bygdaráðsfundur var 31. oktober 1989, møttir á fundi: Regin Poulsen form., Inna Nattestad, Anna Hansen, Erling Simonsen, Símun Thomassen, Meinhard Johannesen og Hjørleif Joensen. Til viðgerðar var, setan av dagrøktarmammum smb. lýsing í teimum føroysku bløðunum, at seta frá 1. november 1989. Við á fundinum var dagrøktarleiðarin Paula Nattestad.

Aftaná kl. 18.30 var fundur við tær verandi dagrøktarmammurnar. Tær, ið møttu vóru hesar: Paula Joensen, Sanna Johannesen, Sonja Johannesen, Signa Joensen, Hansia Nattestad, Johanna Næss, Jacobina Petersen, Berghild Thomassen, Karin Thomassen og Kamma Thomasen.

Fyribilssáttmáli var uppsettur og undirskrivaður við teirri treyt, at sáttmáli verður undurskrivaður um eina viku. Hesin sáttmáli skal verða galdandi, til sáttmáli verður undirskrivaður við Føroya dagrøktarfelag og kommunurnar, stendur í fundarfrágreiðingini.

Hildu seg illa viðfarnar

Komandi tíðina var nokkso fitt av skriving í bløðunum um málið. Oyggjatíðindi skrivaði hin 4. oktober 1989: "Pleygumammurnar í Miðvági sleptar upp á fjall". Miðvágs kommuna hevði avgjørt at 13 pleygumammur skuldu niður í løn, 1.000 kr. um mánðain. Sama dag, 4.10., skuldu pleygu-mammurnar og kommunan á fund við Landsstýrið um spurningin. Blaðið helt at familjupolitikkurin hjá kommununi var "foreldrafíggindarligur", nú dagpleygumammurnar vóru kroystar at fara niður í løn, har tær komu at fáa 200 kr. minni um mánaðin fyri hvørt barnið, sum spardi kommununi tilsamans um 100.000 kr. um árið. Tær passa í miðal um 5 børn hvør. Pleygumammurnar søgdu, at tær í Miðvági vóru tær einastu, sum skuldu niður í løn og tað hildu tær vera órættvíst. Tær hava mótmælt og sagt, at tær ikki undir nøkrum umstøðum kunnu ganga við til hetta. Men tá seinasta útgjaldið kom, vóru tær trektar í løn.

Við Dimmalætting sama dag 4. november 1989, segði Regin Poulsen, bygdaráðsformaður, at uppsøgnin var neyðug. Upp á spurning um, hví dagrøktarmammurnar vóru sagdar upp segði Regin, at málið var alt ein hurluvasi, og at hann var deyðatroyttur av tí. Nú mátti greiða fáast á málinum, og einasta loysnin var at siga dagpleygumammurnar upp og lýsa størvini leys, har tær eru vælkomnar at søkja aftur.

Í aðrari grein í Dimmalætting sama dag segði sakførarin hjá Vága dagrøktarfelag, Fríða Patursson, at dagrøktarmammurnar kundu ikki gera sáttmála við kommununa, nú Dagrøktarfelag Føroya skuldi gera sáttmála við Landsstýrið. Hon helt, at framferðin hjá Miðvágs kommunu í hesum málinum var ljót og skammilig, fyrst við at trýsta tær niður í løn uttan at varskógva frammanundan, og síðan at siga tær upp, tí tær ikki á standandi fóti kundu góðtaka lønina. Og at enda at noyða tær at skriva undir ein 2 ára sáttmála við kommununa. Í greinini er eisini sagt, at talið av dagpleygumammum í Miðvági er 14. Eitt landsfelag er júst stovnað fyri dagrøktararnar, og tað er tað, sum skal samráðast um sáttmála. Upp á spurning um málið endar í rættinum, segði sakførarin, at tað helst hevði endað við dómi um endurgjald frá kommununi, men hartil kom tað neyvan, nú dagrøktarmammurnar høvdu góðtikið lønina, sum Almannastovan hevur ásett.

Í grein í Oyggjatíðindum mikudagin 1. november 1989 undir yvirskriftini "Børnini bjargaði" kemur fram, at Landsstýrið helt, at kommunan hevði borið seg lógliga at, og at kvinnurnar tí máttu niður í løn. Tá slagið var tapt gingu tær so við til at fara niður í løn, sigur blaðið. Men framvegis vistu kvinnurnar ikki, um tær skuldu aftur til arbeiðis mánadagin. Blaðið hevði so sett seg í samband við bygdaráðsformannin, sum upplýsti blaðnum, at tær skuldu fáa bræv um hetta týsmorgunin. Hví tær ikki kundu fáa tað at vita áðrenn, undraðist blaðið nakað um, sum hevði boðað teimum frá hesum, so tey fingu ikki tíðindini frá kommununi men frá Oyggjatíðindi, sigur blaðstjórin.

Dimmalætting skrivar hin 11. november 1989: "Høvdu einki í at velja". Har sagt verður

at dagpleygumammurnar í Miðvági tí høvdu undirskrivað sáttmála. Og stríðið millum dagrøktararnar og kommununa í Miðvági mátti sigast at vera av – á papírinum í øllum førum – tí mikukvøldið skrivaðu partarnir báðir undir sínámillum sáttmála. Hetta hóast sakførarin hjá teimum ráddi teimum frá og heldur at bíða, til Dagrøktarfelag Føroya hevði gjørt sáttmála við Landsstýrið. Tær søgdu við blaðið, at trýstið var ov stórt, og at tær einki høvdu í at velja. – Skrivaðu vit ikki undir fingu vit sparkið, og hetta hava fleiri av okkum ikki ráð til, segði Sonja Johannesen, ið var ein av teimum 14 dagrøktarunum í Miðvági. Hon helt, at viðferðin hjá kommununi hevði verið mannminkandi mótu dagrøktarunum, og at tað tí ikki var serliga hugaligt at fara aftur til arbeiðis. "Hetta var ein beiskur biti at svølgja, og vit skrivaðu undir, tí vit vóru hóttar," staðfesti hon.

Tað skal tó sigast, at við tíðini gjørdust viðurskiftini góð aftur. Men bylgurnar gingu høgar, meðan stríðið stóð upp á, tað er skilligt úr skjølunum og kanska serliga úr tí bløðini skrivaðu um málið.

Málið skaddi tó ikki undirtøkuna hjá nýggja bygdaráðsformanninum, sum ein kanska kundi hildið, tí við næsta valið, sum var 8. desember 1992, fekk Regin Poulsen 99 atkvøður og so nógv mest persónligar atkvøður hetta valið. Um duppult so nógar, sum nr. 2, og var einmælt afturvaldur av bygdaráðnum sum bygdaráðsformaður frá 1. januar 1993.

Rakstur av kommunalu dagrøktini í Miðvági 1986-1990

Útreiðslur ár	Løn dagrøktarar	Løn leiðari	Umsiting	Tilsamans
1986 kr.	488.400	68.600	73.400	630.400
1987 -	805.895	116.467	125.471	1.047.833
1988 -	1.165.191	128.959	175.828	1.462.978
1989 -	1.414.399	154.258	201.274	1.769.931
1990 -	1.236.906	185.258	348.067	1.770.231
Inntøkur ár	**Staturin**	**Foreldrini**	**Kommunan**	**Tilsamans**
1986 kr.	348.200	191.200	91.000	630.400
1987 -	355.864	287.595	404.374	1.047.833
1988 -	566.572	417.157	479.249	1.462.978
1989 -	663.59	525.241	581.094	1.769.931
1990 -	708.096	435.525	408.823	1.770.231

22. mai 1991 skrivar Almannastovan umfarskriv viðvíkjandi trupulleikanum, tá foreldur ikki rinda foreldrapartin fyri ansingina. Sum nú er, er hetta umsitið ymiskt ymsastaðin, har í nógvum førum børnini verða koyrd úr ansingini. Hetta mælir Almannastovan frá og biður kommununar heldur nýta møguleikan, tær hava í lógini at innkrevja skuldina á sama hátt, onnur ógoldin skuld verður innheintað, nevniliga gjøgnum rættarskipanina. Og helst gera hetta so skjótt, sum tilber.

Føroya Landsstýri skrivar hin 9. september 1991 svar upp á umsókn frá Miðvágs kommunu 27. august 1991 um loyvi til, at 1. floks børn kunnu sleppa inn í dagrøktina aftaná skúlatíð. Sambært viðkomandi lóg, sum er nevnd, loyvir Landsstýrið, Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, kommununi at fremja hetta.

27. mai 1993 skriva bygdaráðsformenninir í størru kommununum í Vágum, Suni Joensen, Regin Poulsen og Petur Kruse í felag til Føroya kommunufelag, Saltangará, og siga, at formenninir á fundi í dag høvdu havt til viðgerðar skriv frá Almannastovuni. Teir heita á kommunufelagið um at gera uppskot um loysn, soleiðis at arbeiðs- og lønartreytir verða eins hjá øllum dagrøktarmammum í landinum.

Í hagtølum yvir dagrøktarbørn sæst, at í 1991 vóru í miðal 36 børn í dagrøktini í Miðvági, í 1992 vóru 31 børn, meðan miðaltalið fyri 1993 var 19 børn og í 1994, 20 børn. So her er skilligt at kreppan ger um seg, fólk hava mist arbeiði og summi eru longu farin av landinum.

Áhugabólkur fyri spæliplássi

Umframt at kommunan skipaði fyri dagrøkt, barnaansing og øki til spæliplass til dagrøktina, so vóru eisini privat átøk. Tað vóru møguliga fleiri, eitt teirra er so nevnt í skjølunum. Áhugabólkur fyri spæliplass v/ Sólfríð Nattestad, Miðvági, hevði skrivað til Gjaldstovuna, 12. desember 1994, og søkt um loyvi at selja 4.000 lutaseðlar til frama fyri at gera spæliplass í Miðvági. Sagt varð, at ætlanin var at byrja at selja fyrst í februar 1995.

11. januar 1995 skrivar Georg Hansen vegna spæliplássið í Miðvági til øll foreldur í Miðvági, sum eiga børn millum 0 og 12 ár og heitur á tey um at standa saman um at fáa gjørt eitt spæliplass til børnini. Lýst verður til fundar um málið 16. januar kl. 20 í bygdarskúlanum, og verður heitt á øll um at møta.

Beint eftir hetta í januar 1995 er avrit av eini plakat, har lýst er til nýggjan fund 24. januar um frítíðarøki og spæliplass. Sagt verður at tíverrið møttu bert 20 fólk til fyrra fundin, har avgerð varð tikin um at skipa eina nevnd og leggja uppskot fyri nýggjan fund. Nevndin hevur avgjørt at gera eitt spæliplass í Miðvági í ár, og næsta ár er ætlanin at arbeiða fram ímóti at gera trý smærri spæliplass, eitt Norðri í Heiðum, eitt inni í Húsi og eitt uppi á Tvørgarði. Kostnaðurin fyri spæliplássið, sum gerast skuldi í 1995, var mettur til uml. 28.000 kr. Við fylgir skitsa av spæliplássi við lítlum húsi, skreiðibana og klatristativi við ymsum møguleikum fyri klatring, í einari hædd.

Søkt verður aftur til Gjaldsstovuna 25. januar 1995 um loyvi at selja lutaseðlar, Georg Hansen stendur undir umsóknini, og verður søkt um loyvi at selja 5.000 lutaseðlar til frama fyri spæliplass í bygdini. Smb. avrit av skrivi til prentsmiðjuna hjá H.N. Jacobsen bókhandli, var høvuðsvinningurin Noregsferð við "Norrønu", og annar vinningur Snarferð til Skottlands við "Smyrli" umframt aðrar vinningar. Loyvi frá Gjaldsstovuni fingu tey hin 30. januar 1995.

Á bygdaráðsfundi 27. apríl 1995 var á skrá, at Áhugabólkurin fyri spæliplass søkti um loyvi at nýta økið við spælistovuna hjá dagrøktini til frítíðarøki og spæliplass. Bygdaráðið mælti til heldur at nýta økið við hondbóltsvøllin.

Áhugabólkurin søkti so tvey ár seinni í 1997 um loyvi at gera spæliplass á økinum uttanfyri gamla hondbóltsvøllin. Málið var fyri á fundi 21. apríl 1997 har samtykt var at geva loyvi við teirri treyt, at loyvi frá eigarunum fyrilá. Á fundi 4. mai 1998 fekk Áhugabólkurin fyri Spæliplássi játtað eru 2.000 kr. í stuðli frá kommununi, smb. umsókn.

Rakstur av kommunalu dagrøktini í 1991-1995

Útreiðslur ár	Løn dagrøktarar	Løn leiðari	Umsiting	Tilsamans
1991 kr.	797.404	132.752	126.788	1.056.944
1992 -	690.431	97.991	66.981	855.403
1993 -	620.924	97.440	70.350	788.714
1994 -	455.406	96.000	280.164	831.570
1995 -	536.120	97.440	340.972	974.532
Inntøkur ár	**Almannastovan**	**Foreldrini**	**Kommunan**	**Tilsamans**
1991 kr.	422.778	317.083	317.268	1.056.944
1992 -	342.161	256.621	256.621	855.403
1993 -	315.485	236.614	236.614	788.714
1994 -	332.628	249.471	249.471	831.570
1995 -	389.812	292.360	292.360	974.532

Í grannskoðaraprotokollini fyri 1994 ávísir grannskoðaravirkið KPMG Pauli Ellefsen pf., at ongar skrivligar mannagongdir eru um fíggjarligt innaneftirlit, og eingi setanarskriv, og avtalur annars fyriliggja fyri dagrøktarskipanina, sum Almannastovan annars hevur givið boð um. Okkum er upplýst, at ætlanin er at fáa hesi viðurskifti í rættlag í 1995.

Men somu atfinningar eru aftur eitt ár seinni í grannskoðaraprotokollini fyri 1995, har roknskapurin annars varð góðkendur. Sambært tí, ein annars sær í skjølunum, komu setanarskriv ikki á skrá fyrr enn fleiri ár seinni. Hví tað var so er ógreitt, og var tað møguliga trýst frá hægri myndugleikum, sum gjørdu, at ein at enda fekk tað framt. Annars eru eisini til skjals skriv frá nøkrum av starvsfólkunum, sum gjørdu vart við hetta, og sum so fingu setanarskriv. Nøkur ár seinni kom hetta tó í fastar rammur.

Smb. skráeting vóru 6 dagrøktarmammur í 1995: Berghild Thomassen, Annika Thomassen, Brynhild Thomassen, Hansea Nattestad, Elsebeth Johannesen og Signa Joensen. Normeringin var nú farin niður aftur á 30 dagpleygubørn, meðan miðaltalið hetta árið var 22 børn um mánaðin.

Ætlað broyting í dagrøktini

Paula Nattestad dagrøktarleiðari skrivar hin 2. november 1995 til foreldrini at dagrøktarbørnunum í Miðvági, at dagrøktarmammurnar ætla í november mánaði 1995 at royna nakað nýtt, soleiðis, at tvær dagrøktarmammur arbeiða saman og hava børnini hjá sær og tí triðju dagrøktarmammuni, sum henda dagin kann avspasera. Tann dagin skulu børnini møta og heintast í spælistovuni.

- Spælistovan var Gamli skúli og sigur Paula í skrivinum, at hon hevur gjørt eitt skema, so foreldrini kundu fylgja við, nær hesir dagar vóru, og at annars var einki broytt og børnini vóru í spælistovuni týsdag seinnapart og mikudag fyrrapart sum vanligt. Um hetta vísir seg at rigga, er ætlanin at halda fram við hesum. November er sostatt ein roynd.

Hin 15. november 1995 skrivar eitt av foreldrunum eitt 2 síður langt bræv sum mótmælir hesi skipan, har m.a. verður funnist at, at hetta verður framt uttan at foreldrini frammanundan eru spurd ella kunnað um ætlanina og hava havt møguleika at siga sína hugsan. At hetta átti at verið frammi á foreldrafundi fyrst. Hildið verður eisini, at børnini eru ov leingi í spælistovuni, har nevnt er 16 tímar um vikuna eftir hesari skipanini, ímóti 8 tímum áðrenn, og at inniluftin ikki er góð; og hvussu gott tað er, at barnið hjá viðkomandi nú skal til fremmandar dagpleygumammur. Viðkomandi skilir, at dagpleygumammurnar kanska ynskja meira frí, teirra dagur er langur frá kl. 7.30 til kl. 17.30, men tað átti at verið loyst á annan hátt, verður m.a. sagt í brævinum, sum sagt verður, eisini er sent til Miðvágs barnavernd og til Almannastovuna.

Meira sæst ikki til hetta málið, so helst var henda skipanin bert henda eina mánaðin.

Gamli skúli góðkendur til barnaansing

Hin 9. mars 1999 var Arbeiðseftirlitið og kannaði Gamla skúla, sum sagt varð, verður nýttur tveir dagar um vikuna sum dagrøktarstovnur til 8 dagrøktarmammur og 50 børn. Til staðar var Georg Hansen, kommunuskrivari, vegna kommununa og Paula Nattestad, leiðari fyri dagrøktina.

Har vóru nakrar viðmerkingar, m.a. at inniluftin var ov vánalig, so har skuldi útlufting gerast, skáp, sum kundu steingjast skuldu vera til starvsfólkini at hanga klæðir í, matarrúm skuldi vera til starvsfólkini og serstakt toilett til starvsfólk við vask við heitum/køldum vatni, hetta var alt smb. reglugerð fyri slíkar stovnar. Báðar úthurðar skuldu kunna latast upp innaníframá uttan at brúka lykil, sum er undirstrikað, og neyðug sløkkiútgerð skuldi setast upp, varð sagt. Nevndu tiltøk skuldu gerast innan 12. apríl 1999.

17. juli 2002 var arbeiðseftirlitið aftur og kannaði bygningin. Hann var nú umbygdur innan sum dagrøktarstovnur. Tilstaðar var Paula Nattestad, dagrøktarleiðari. Víst verður til eftirlitið í 1999 og staðfest verður, at arbeitt verður fram ímóti at stovnurin fer at lúka krøvini hjá Arbeiðseftirlitinum, t.v.s. at arbeiðini í neðra og um umstøðurnar til starvsfólkini á loftinum verða gjørd liðug. Enn restar tó nógv í inntil liðugt er at innrætta, verður sagt. Mælt verður til at gera umtalaðu arbeiðini liðug og kunnu vit tá avtalað endaligt sýn, stendur í stuttu frágreiðingini.

Skjal fyri endaligt sýn er tó ikki funnið, men hevur helst verið kortini, og hevur tað so verið í 2003, tá arbeiðini søgdust at vera liðug.

Kommunan fer upp í Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Til bygdaráðsfund, 1. februar 2000, er á skrá, at dagrøktarmammurnar ynskja hægri løn. Fíggjarnevndin mælti til at taka upp lønarsamráðingar saman við Sandavágs kommunu og at kanna hvat lønin er aðrastaðni. Samtykt var at samráðast saman við Sandavágs kommunu.

Sáttmálaviðurskiftini hjá dagrøktarmammunum var aftur frammi á fundi, 22. juni 2000. Samtykt varð, sambært tilmæli frá fíggjarnevndini, at fara uppí Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

23. juni 2000 verður telefaks sent til Føroya Kommunufelag: "Miðvágs bygdaráð viðgjørdi á fundi, 22.6.2000, spurningin um møguligan limaskap í einum kommunalum arbeiðsgevarafelag. Samtykt varð at tekna Miðvágs kommunu sum lim í Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag. Heitt verður á tykkum um at tekna okkum sum lim í felagnum. Jóannes Klein, form."

22. september 2000 var samtykt, at Marianna Simonsen umboðar kommununa á fyrsta fundinum. Til viðgerðar vóru eisini felagslógir fyri "Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag" (FKA). Og varð lógin samtykt.

Longu sama ár er felagið farið í gongd og hevði m.a. havt lønarsamráðingar við Føroya Arbeiðarafelag (FA). Sáttmálin millum FA og FKA var lagdur fram á bygdaráðsfundi, 5. desember 2000, og varð góðkendur.

Jónhild Jørgensen, avloysari sum dagrøktarleiðari. Á bygdaráðsfundi, 5. september 2000, var á skrá, at dagrøktarleiðarin, Paula Nattestad, søkti um farloyvi í 3 mánaðir. Samtykt at var játta umsøknini og søkja eftir avloysara. Á fundi, 20. september 2000, kemur fram, at dagrøktarleiðarin nú biður um farloyvi í 6 mánaðir. Umsóknin var gingin á møti. Samtykt var at bygdaráðsformaðurin kallar tríggjar umsøkjarar inn til samrøðu. Á fundi, 22. september sama ár, var samtykt, at seta Jónhild Jørgensen sum avloysara. Fyrst í apríl 2001 søkir dagrøktarleiðarin um longt farloyvi, sum er játtað, men er so komin í starvið aftur í oktober 2001. Júst nær sæst ikki upplýst. So Jónhild sær út til at hava verið í starvinum í eitt ár ella harum. Í 2001 heittu annars fleiri av foreldrunum á kommununa um, at núverandi leiðarin, Jónhild Jørgensen, helt áfram í starvinum.

Jónhild Jørgensen

Rósely Reynstind, leiðari fyri dagrøktarskipanina. Samtykt varð á bygfaráðsfundi 24. august 2004 at seta Rósely Reynstind sum leiðara fyri dagrøktarskipanina í Miðvágs kommunu. Starvið var fulltíðarstarv 40 tímar um vikuna. Hetta var eftir at verandi dagrøktarleiðarin Paula Nattestad hevði sagt seg úr starvi frá 1. august 2004 at rokna. Rósely er so sett í starvið frá 1. august 2004. Og er hon í starvi tíðina út hjá Miðvágs kommunu, sum var til 31. desember 2008, og helt áfram hjá Vága kommunu, sum leiðari fyri dagrøktina í Miðvági.

Rósely Reynstind

Rakstur av kommunalu dagrøktini í 1996-2000

Útreiðslur ár	Løn dagrøktarar	Løn leiðari	Umsiting	Tilsamans
1996 kr.	472.093	144.016	301.401	917.510
1997 -	534.089	145.355	345672	1.025.116
1998 -	704.443	145.355	440.637	1.290.435
1999 -	762.406	145.355	529.587	1.437.348
2000 -	823.212	228.021	584.484	1.635.717
Inntøkur ár	**Almannastovan**	**Foreldrini**	**Kommunan**	**Tilsamans**
1996 kr.	391.404	243.253	293.253	917.510
1997 -	410.046	307.535	307.535	1.025.116
1998 -	451.652	387.131	451.652	1.290.435
1999 -	503.072	431.204	503.072	1.437.348
2000 -	327.154	490.715	817.848	1.635.717

Í 1998 er býtið broytt frá, at Almannastovan rindaði 40% og kommunan 30%, til at báðir partar nú skulu rinda 35% hvør. Meðan foreldrini framvegis rinda 30%. Og er 35% galdandi fyri ’98 og ’99.

Fyri ár 2000 var býtið soleiðis, at Almannastovan rindaði 40% av kostnaðinum fyri 1. hálvár, foreldrini 30% fyri alt árið og kommunan 30% fyri 1. hálvár. Meðan kommunan skuldi rinda 70% av kostnaðinum fyri seinna hálvár og Almannastovan 0%. T.v.s. at frá 2001 fellur parturin hjá Almannastovuni burtur og yvir á kommununa at gjalda, sum hereftir skal gjalda 70% av skipanini.

Árini 1997 til 2002 var miðaltalið av børnum í dagrøkt í Miðvági: 1997, 26 børn, 1998, 28 børn, 1999, 33 børn, 2000, 36 børn, 2001, 41 børn og 2002, 55 børn.

Rakstur av kommunalu dagrøktini í 2001-2008

Dagrøkt ár	Kommunan	Foreldur o.a.	Tilsamans
2001 kr.	1.535.306	691.325	2.226.631
2002 -	2.005.863	791.930	2.797.793
2003 -	1.956.523	636.825	2.593.348
2004 -	1.896.239	544.950	2.441.189
2005 -	1.979.015	596.175	2.575.190
2006 -	1.963.391	680.850	2.644.441
2007 -	2.141.349	765.460	2.906.809
2008 -	1.982.001	856.849	2.838.850

Viðv. "Foreldur o.a." so er tað foreldragjald, aðrar kommunur og barsilsskipanin, har foreldragjaldið er í miðal, 4/5 og restin í miðal 1/5.

Børn innskrivað í dagrøkt í Miðvági 1985 - 2008

Ár	Tal	Ár	Tal	Ár	Tal
1985	15	**1993**	15	**2001**	23
1986	25	**1994**	12	**2002**	17
1987	25	**1995**	14	**2003**	17
1988	20	**1996**	10	**2004**	21
1989	9	**1997**	18	**2005**	20
1990	14	**1998**	21	**2006**	14
1991	14	**1999**	13	**2007**	18
1992	12	**2000**	22	**2008**	18

Tilsamans vóru 407 børn innskrivað í dagrøktina tíðarskeiðið frá 1.12.1985 til 31.12.2008, sum var tíðin Miðvágs kommuna stóð fyri dagrøktini í Miðvági. Kelda er sonevnd "stambog" fyri dagrøktina í Miðvági, har øll børn og teirra foreldur ella verjar eru skrásett hesi árini.

Hetta sigur tó ikki, hvussu nógv børn vóru í dagrøktini hvørt árið, tí tey gingu jú tey flestu har í nøkur ár hvør.

Útibarnagarðurin / Barnagarðurin

Gamli skúli verður tey fyrstu árini nevndur "Útibarnagarðurin" í skjølunum hjá kommununi, tá børnini bert vóru ein dag tilsamans í bygninginum um vikuna, t.v.s. ein fyrrapart ein dag og ein seinnapart ein dag, og nøkur ár seinni "Barnagarðurin", tá bygningurin varð brúktur 5 dagar um vikuna til barnaansing.

6. juli 2000 verður skrivað til landslæknan og søkt um loyvi at nýta fyrrverandi bygdaskúlan, Tormansbakki 13, til barnaansing í dagtímunum. Húsið er úr betong við 2 hæddum uttan kjallara. Gólvini stoypt við gólvlegningi omaná. Veggirnir innan timbur klæddir við tapet. Loftini klødd við bleytum puntum. Tað eru 3 stovur, nr. 1 er: Longd 8,20 m., breidd 4,70 m., hædd 3,15 m., nr. 2 er: L 6,30 m., B 6,10 m., H 2,65 m. og nr. 3 er: L 7,50 m., B 3,90 m, H 2,50 m. Á loftinum eru 4 rúm + w.c. og gongd. Loftið kemur at vera brúkt til starvsfólk við umklæðingarrúmi, baðirúmi, køk, stovu og goymslu. Ætlanin er at seta alt húsið í stand, um loyvið verður givið at nýta tey til endamálið frá viðkomandi myndugleikum.

13. juli 2000 skrivar landslæknin svar upp á skriv frá kommununi 6. juli 2000 viðvíkjandi

Gamli skúli í Miðvági hevur virkað sum barnagarður síðan 1987. Fyrstu árini partvís. Myndir: Sonni Jacobsen, 2021.

ætlan um at brúka gamla bygdarskúlan til barnaansing í dagtímunum. Landslæknin sigur, at tað er ikki hann, sum gevur loyvi til slíkt, men hann vegleiðir og kemur við ráðum. Og hann kemur við nógvum góðum ráðum í skrivinum. M.a. stødd á rúmum og hædd til loftið, sum skal vera minst 2,5 m. høgt. Trygd fyri at børnini ikki sleppa út á vegin uttan saman við vaksnum, har hugsað er um girðing og eftirlit, sum starvsfókini hava ábyrgd av. Atgongdin skal vera góð til barnavognar og so at tað ikki er hált at ganga, tá vátt og gler er. Bólkarúm eiga at vera ljóðisolerað og gólvini so, at tey ikki eru hørð og køld at ganga á og tað eigur at vera bjálvað undir gólvunum og hiti skal vera í rúmunum, stendur m.a. í drúgvum skrivi upp á 4 A4 síður. Skrivað undir hevur Høgni Debes Joensen, landslækni.

Á almennum bygdaráðsfundi 19. juni 2001 var samtykt at seta útibarnagarð á stovn. Søkt verður eftir varaleiðara og hjálparfólki. Og fíggjarætlan fyri útibarnagarð frá 1.8. – 31.12.2001 var løgd.

Smb. skrivi 27.09.2001 hevði útibarnagarðurin eina stovu "Ta bláu stovuna" sum sagt verður, og køkin í Gamla skúla, meðan dagrøktin hevði hinar báðar stovurnar. Ein av hinum verður nevnd "Gula stova", smb. øðrum skrivi og ein "Martins stova", sum man vera eftir gamla læraranum, ið búði har. Annars eru onnur nøvn nevnd seinni, so tað hevur kanska ikki verið nakað heilt fast.

Sambært skrivi 21. november 2001 verður ein nýggjur køkur settur upp í neðra í Gamla skúla. Talan var um skáp, borð, vask, køliskáp, komfýr, ketil og kaffimaskinu.

Umvælingar vórðu eisini framdar í bygninginum. 29. januar 2002 er nevnt í skrivi, at mittasta stovan var um at vera liðugt umvæld og vóru teir farnir í gongd uppi á loftinum við umvælingum. Í skrivi 21. august 2002 er sagt at summi starvsfólk høvdu høtt við at siga upp, tí arbeiðsumstøðurnar í Gamla skúla vóru so vánaligar. Stovurnar vóru ikki klárar at fara inn í, og í missiónshúsinum var alt innbúgvi, tey høvdu brúkt, tikið úr kjallaranum har, so har



1. hædd smb. skitsu 2003. s.j. 2022.

fingu tey heldur ikki verið tá. Trivnaðarnevndin segði, at ætlanin var at Útibarnagarðurin skuldi brúka Gulustovu og mittastu stovu, sum tey undrast á ikki var liðug, tí tað manglaði bara at mála mittastu stovu, har leiðarin skuldi áseta litin.

- Tað her er nevnt mittasta stova, man vera tann, áður var nevnd Bláastova. So har átti høvuðsliturin at verið sjálvsagdur uttan kanska hvat slag av bláum.

23. august er aftur sagt, at arbeiðið er ikki liðugt, og at stalasjur standa framvegis uppi uttanfyri, sum kann vera til vanda fyri børnini. Sagt verður, at Trivnaðarnevndin, Marianna Simonsen, Jónhild Jørgensen og Malan Helgadóttir, fóru oman í skúlan fyri at tryggja sær, at stovurnar vóru lidnar til komandi mánadag.

Í skrivi 24. apríl 2003 er sagt, at Elsa Margit hevði nevnt, at heitið "Útibarnagarður" kanska ikki var so heppið, tí tað var komið í ringt orð. Har hildið var, at alt skuldi ganga fyri seg úti.

Á fundi 10. juli 2003 var til viðgerðar, at Elsa Margit Davidsen, varaleiðari, mælti til at gera tríggjar nýggjar køkar í Gamla skúla, ein á loftinum og tveir niðri undir. Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri, ynskti at fáa heimild frá bygdaráðnum til at biðja um tilboð uppá køkar og at taka av tí besta tilboðnum. Fíggjarnevndin viðmælti. Hetta var samtykt.

Tekningar eru av, hvussu hesir køkar sóu út, og sýnist tað, sum teir vóru settir upp fram við einum veggi, so at teir ikki tóku nógv pláss. Talan var um 6 skáp, komfýr, 1 høgt skáp og so 5 yvirskáp omanfyri gólvskápini og komfýrin.

Í skrivi frá kommununi 19. mars 2003 kemur fram, at arbeiðið við Gamla skúla nú var við at koma undir land. Og skuldi Trivnaðarnevndin taka avgerð um, hvussu barnansingin skuldi skipast framyvir.

Á fundi í bygdaráðnum 21. september 2004 var fyri tilmæli um at byggja WC, vaskirúm og goymslurúm uppí Gamla Skúla. Bæði Trivnaðar- og fíggjarnevndin mæltu til at byggja og varð hetta samtykt. – Um henda samtykt varð framd er óvist, tað sær so ikki út til at nakar slíkur bygningur er har í dag.

17. januar 2005 skrivar Napoleon Magnussen borgarstjóri til Rósely Reynstind dagrøktarleiðara, sum svar upp á skriv 11. januar sama ár at barnatalið er ov høgt í dagrøktini í mun til starvsfólkini, meðan tað øvugta var galdandi í Útibarnagarðinum. Rósely skeyt tí upp saman við Elsu Margit Davidsen leiðara fyri Útibarnagarðinum, at børnini kundu fara úr Dagrøktini og í Útibarnagarðin, tá tey fylla 3 ár. Svarað verður, at Trivnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur viðmælt tilmæli teirra. "Eg fari tí sum borgarstjóri at ganga tilmæli tykkara á møti við tí fyrivarni, at bygdaráðið á fundi 25.01.2005 kann broyta avgerð mína."

Bygdaráðið hevði málið frammi á fundi 25. januar 2005, og samtykti at seta uppskotið í gongd beinanvegin fyri at sleppa undan bíðilista í dagrøktarskipanini.



Loftið smb. skitsu 2003. s.j. 2022.

Á fundi 5. desember 2006 var á skrá summarhúsið hjá útibarnagarðinum. Trivnaðarnevndin mælti til, at húsið varð umvælt. Fíggjarnevndin mælti til at arbeiða víðari við málinum, so húsið kundi takast í brúk komandi summar. Júst hvat hús talan er um, er ikki nevnt, og annars er umrødda hús ikki nevnt áður. Í gerðabókini stendur, at málið varð útsett.

20. apríl 2007 skrivar Rósely Reinstind dagrøktarleiðari til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og boðar frá, at tað í løtuni eru 10 dagrøktarar í Miðvági, og at eingin teirra hevur egin børn heima. Hetta er í samband við komandi lønarsamráðingar.

Onkur pussig ella serstøk søga er eisini, her er so talan um barnagarðin í Gamla skúla. Hin 2. august 2008 skrivaði Vágaportalurin:

"*Ætlaðu at seta eld á barnagarðin í Miðvági.* Fríggjakvøldið klokkan 22 royndi onkur at seta eld á spælihúsið í barnagarðinum í Miðvági. Bara tilvildin hevur gjørt, at hetta ikki eydnaðist, tá ið ein pedagogur, sum starvast á barnagarðinum, av tilvild gekk framvið og sá, at okkurt var áfatt. Løgreglan í Vágum sigur, at eldurin kundi havt breitt seg, tí nógvur vindur var og vindurin lá móti barnagarðinum sjálvum."

5. august visti Vágaportalurin at siga, at málið nú var loyst. Tað vísti seg, at tvey børn undir 15 ár høvdu hugnað sær við kertuljósum í spælihúsinum, men tá ið tey fóru avstað aftur, sløktu tey ikki ljósini. Onkur av ljósunum høvdu fest eld í træverkið, sum hevði fingið nakað av eldskaða. Løgreglan hevði tosað við umrøddu børn og teirra foreldur, og metti hetta nú sum eitt óhapp, ið neyvan endurtók seg.

Elsa Margit Davidsen, leiðari fyri Útibarnagarðinum. Setan av varaleiðara til Útibarnagarðin í Miðvági var viðgjørd á fundi 12. juli 2001. Trivnaðarnevndin mælti til at seta Elsu Margit Davidsen úr Sørvági, sum var einasti umsøkjarin við pedagogútbúgving. Samtykt var at seta Elsu Margit í starvið.

Elsa Margit Davidsen

Starvið verður nevnt varaleiðari, tí økið var undir leiðaranum fyri dagrøktini. 18. september 2001 verður samtykt, smb. umsókn frá Elsu Margit at seta hana niður í 30 tíma viku, og at søkt verður eftir tveimum starvsfólkum afturat at arbeiða 20 tíma viku hvørt. Hetta tí at tørvur var á fleiri starvsfólkum. - Tað var ikki full semja um hetta, men 4 atkvøddu tó fyri og varð tað sostatt samtykt. Umrøddu størv vóru tíðaravmarkað til 1 ár í senn, og skuldu tey so søkja aftur.

Á almennum bygdaráðsfundi 1. apríl 2003 var á skrá leiðaraviðurskiftini í kommunalu barnaansingini. Fíggjarnevndin legði málið fyri bygdaráðið. Samtykt varð at søkja eftir

leiðara til Útibarnagarðin at seta 1. juni 2003. Málið var fyri aftur á fundi, har sagt varð, at Trivnaðarnevndin mælti til at seta Elsu Margit Davidsen í starvið frá 1. juni 2003 at rokna. Sum var samtykt. Og sum merkti, at Útibarnagarðurin ikki longur var undir leiðsluni av dagrøktarleiðaranum, og at stovnarnir vóru býttir sundur leiðsluliga.

Hetta er helst eisini hugsanin hjá Paulu Nattestad, sum hin 6. mars 2003 skrivar til kommununa um málið, har hon nevnir spurningin um, hvussu nógv børn og starvsfólk skulu húsast í Gamla skúla, har hon mælir til, at dagrøktarleiðarin og leiðarin fyri Útbarnagarðinum saman við borgarstjóranum seta eitt mál at ganga fram ímóti. Og at viðgera spurningin, um tað skal vera ein stovnur ella tveir. Har hon nevnir, at um dagrøktarskipanin skal takast av, so mugu allar dagrøktarmammurnar sigast upp og fáa hetta at vita í góðari tíð.

Skipanin varð broytt til, at tey smæstu vóru í dagrøkt, meðan í fyrstu atløgu tey 5 til 6 ára gomlu vóru í útibarnagarði. So báðir partar vóru framvegis, tó dagrøktin tað skerd.

Eftir at hava gjørt vart við, at hon einki setanarbræv hevði fingið enn, varð setanarbræv skrivað millum Miðvágs kommunu og Elsu Margit Davidsen sum dagrøktarleiðara hin 1. apríl 2005. Hetta var so reint formelt. Hon var í starvinum frá 12. juli 2001 til 30. apríl 2006, tá hon gavst.

Jens Erik Rasmussen, hjálparfólk í Útibarnagarðinum. Settur í starv 12. juli 2001, sambært tilmæli frá Trivnaðarnevndini. Føddur í 1968, smb. skrivi, búsitandi við Kirkjar.

Mirjam Kjølbro leiðari fyri Barnagarðinum. Sett í starv frá 1. mai 2006 sambært samtykt í bygdaráðnum 25. apríl 2006. Hin 30. november 2006 er fyri í bygdaráðnum, at leiðarin í Barnagarðinum søkir um at sleppa á grundleggjandi leiðara-útbúgving. Skeiðið byrjar í januar 2007. Trivnaðarnevndin og fíggjarnevndin viðmæltu og mælti til, at varaleiðarin í Barnagarðinum Linda Joensen eisini fór á skeiðið og at hækka fíggjarætlanina fyri skeiðvirksemi við 20.000 kr. Sum var samtykt.

Mirjam KJølbro

Á bygdaráðsfundi 20. mars 2007 var samtykt, at Mirjam Kjølbro hevði leiðsluna av allari barnaansing í kommununi frá 3 ár og uppeftir.

Mirjam Kjølbro er framvegis í leiðarastarvinum og er í dag (pr. 2021) leiðari "Miðgarði", barnagarðnium í Miðvági.

L**inda Joensen varaleiðari í Barnagarðinum**. Á fundi 3. juli 2006 er sagt, at í sambandi við farloyvi hjá varaleiðaranum, var avgjørt at søkja eftir nýggjum varaleiðara. Starvið varð so lýst leyst og á fundi 23. august 2006 er sagt, at Linda Joensen* var sett í starv sum varaleiðari í Barnagarðinum. Er í starvinum fram til 20. mars 2007, tá hon varð sett sum deildarleiðari í Frítíðaransingini, sum var MB-húsinum. [* Seinni eftirnavnið, Heinadóttir.]

Rakstur Barnagarðurin 2003 til 2008

Barnagarðurin ár	Foreldur o.a.	Kommunan	Tilsamans
2003 kr.	288.670	704.988	993.658
2004 -	765.100	2.048.477	2.813.577
2005 -	722.685	2.421.252	3.143.937
2006 -	869.000	2.359.111	3.228.111
2007 -	913.412	2.239.008	3.152.420
2008 -	1.011.875	2.410.332	3.422.207

F.v. Útibarnagarðurin, í Gamla skúla. Viðvíkjandi "Foreldur o.a." so var í miðal í hvussu er 4/5 gjald frá foreldrunum. Restin var onnur stuðulsgevandi gjold.

Barnaansing í missiónshúsinum

Frá miðan november 2001 fór Útibarnagarðurin eisini at húsast í kjallaranum í missiónshúsinum, sum var brúktur sum spælistova. Byrjað var at flyta hin 19. november sama ár. Grundin til flytingina var, at farið var undir at umbygga og umvæla Gamla skúla innan. Har so ein partur av børnunum skuldu halda til í áður tilgjørdum hølum í kjallaranum í missiónshúsinum.

Hølini vóru tó framvegis leigað eftir, at arbeiðið við Gamla skúla var liðugt, sum var á várið 2003. Nú var talan um at nýta hølið til spælistovu hjá dagrøktarbørnunum.

Hin 23. september 2005 var Brunaumsjón Landsins og sýnaði spælistovuna hjá dagrøktarmammunum í Miðvági við atliti til brunatrygd. Sagt verður, at spælistovan var í missiónshúsinum í Miðvági. Hjástødd vóru Per Olesen umsjónarmaður hjá kommununi, Dagfinn Petersen, brunaumsjónarmaður fyri Miðvágs sløkkilið og Búgvi Heðinson Johannesen fyri Brunaumsjón landsins.

Hølið var í kjallaranum í missiónshúsinum. Umsjónin hevði nakrar viðmerkingar, m.a. at úthurðin í kjallaranum hevði lás innan við lykili, hurðin var rýmingarleið og skuldi tí kunna latast upp innanífrá uttan lykil ella amboð. Sama var við rýmingarhurðini út til gongina. Rúmið var ætlað til 20 børn og dagrøktarmammur. Tá kravdist eisini eitt bjargingarop. Sagt verður, at bjarginarop skuldu vera í minsta lagi 60 cm. høg og 50 cm. breið og kundi t.d. vera í einum vindeygaopi, sum var sergjørt til tað. Frá gólvi upp til bjargingaropið skuldi ikki vera meira enn 120 cm. Eingin sløkkiútgerð var í bygninginum, sum ikki var nøktandi. Har skuldi í minsta lagið vera ein 5 kg. co2 sløkkjari ella ein 6 kg. pulvursløkkjari. Hesi krøv høvdu heimild í lógtingslóg nr. 78 frá 12.6.1986, stendur í sýns-frágreiðingini.

Foreldraráð

Jónhild Jørgensen, dagrøktarleiðari, skrivar hin 12. desember 2000 og sigur, at á foreldrafundi 4. desember 2000, var eitt foreldraráð valt við trimum foreldraumboðum og við trimum tiltakslimum. Hesi vórðu vald: Lona Johansen, Napoleon Magnussen og Mai Halla Prior og sita tey í foreldra-ránum. Varalimir vóru: Evi Danielsen, Unn Hansen og Una Jacobsen.

16. januar 2001 skrivar Foreldraráðið hjá kommununalu dagrøktini til foreldur og verjar at børnum í dagrøktini, at Mai Prior er formaður, Napoleon Magnussen næstfm. og Lona Johansen er skrivari hjá teimum. Uppgávan er, smb. dagstovnalógini, at ráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið millum foreldrini, stovnin og kommununa. Tey upplýsa m.a., at foreldur eru vælkomin at venda sær til ráðið við møguligum trupulleikum ella uppskotum, og at allir limirnir hava undirskrivað tagnaðarskyldu.

Sambært skrivi 22. november 2001 var Mai Prior farin úr foreldraráðnum, tí hon var farin í starvslæru í Útibarnagarðinum. Ístaðin var Evi Danielsen, varalimur, komin í ráðið.

Á almennum bygdaráðsfundi 29. apríl 2008 var frammi, at foreldraráðið fyri Útibarna-

garðin, mælti til, at limir í foreldraráðnum fingu fundarpening fyri teir 4 ásettu fundirnar umframt foreldrafundin, hetta tí tað var sera torført at fáa foreldur at átaka sær arbeiðið í foreldraráðnum og tí, at tað var bæði orku- og tíðarkrevjandi at verða í einum aktivum ráð. Trivnaðarnevndin og fíggjarnevndin tilmæltu. Umsóknin var samtykt.

Várgleði

Á bygdaráðsfundi í Miðvági 5. mars 2002 var til viðgerðar tilboð frá eigarunum av "Salem" í Miðvági at keypa bygningin fyri 400.000 kr. Fíggjarnevndin viðmælti at keypa og fíggja keypið av likvitum, sum varð samtykt, men at fíggjarætlanin skuldi broytast samsvarandi. Á fundi, 9. apríl

2002, var málið aftur fyri og varð tá endaliga samtykt. Bygningurin er tinglýstur til Miðvágs kommunu hin 30. september 2002.

Tað var brøðrasamkoman í Vágum, sum átti bygningin og hevði brúkt hann í áratíggju sum møtisal í Miðvági. Hugsandi er, at bygningurin er bygdur í 1954. Á bygdaráðsfundi, 17. desember 1953, er til viðgerðar umsókn um byggiloyvi frá J.F. Kjølbro, Klakksvík, til samkomuhús í Miðvági. Nevnast kann, at Kjølbro átti trød og summarhús í Vatnsoyrum. Loyvið varð givið at byggja ein bygning 25 x 14 alin. Hin møtisalurin hjá samkomuni var Kedron í Sørvági, sum var nakað størri bygningur, bygdur áðrenn kríggið. Annars sæst í skjølunum hjá Miðvágs kommunu árini 2007 og 2008, at samkoman Kedron ætlaði at byggja nýggjan møtisal í Miðvági og høvdu gjørt avtalu við eigararnar av matr. nr. 199a og matr. 123a á Heiðatrøðni um keyp av lendi til samkomubygning. Hesi stykki liggja sunnanfyri vegin, Heiðatrød, ið er síðuvegur, um 64 metrar vestanfyri handilin, Bónus. Har eisini ætlan var hjá kommununi, eftir tilmæli frá Landsverki, at breiðka vegin Heiðatrød til trý spor í hesum sambandinum. Men ætlanin um møtisalin varð slept og "Kedron" í Sørvági var ístaðin høvuðsumvælt. So ætlanirnar hjá kommununi í tí sambandinum vóru eisini sleptar.

Formaðurin í trivnaðarnevndini bað til bygdaráðsfund 25. november 2003 um heimild at keypa tilfar fyri uml. 40.000 kr. at gera Salem kláran til spælistovu. Fíggjarnevndin viðmælti.

Hetta varð samtykt, og lagt varð afturat, at bygdaráðið ikki ynskti, at dagrøktararnir nýttu Salem meira enn tveir dagar um vikuna, tí bygningurin var eisini ætlaður til onnur endamál. – Í skrivi 15. mai 2006 verður sagt, at Várgleði varð nýtt sum spælistova ein dag um vikuna.

Á almennum bygdaráðsfundi 19. oktober 2004 var til viðgerðar ásetan av nýggjum navni á bygninginum, ið sum tað stendur, fyrr var nevndur "Salem". Samtykt var at kalla bygningin "Várgleði". Navnið var tikið úr yrking eftir Mikkjal á Ryggi, sum eitur "Várgleði".

28. november 2005 skrivaði Fíggjarnevndin og sendi tilmæli til bygdaráðið í sambandi við útgravan av kjallaranum í Várgleði. Har verður sagt, at arbeiðsformaðurin mælir til aðra loysn. Hann mælir til ístaðin til at stoypa gólvið í svimjihylinum í bygdarhúsinum, ið hann metur verða væl minni arbeiði í. Tá gerst møguligt at fráskildra eitt rúm til tey amboðini, ið hava tað fyri neyðini. Hann metir, at tað kemur at kosta meir at grava út og stoypa uppundir veggirnar í Várgleði, enn tað kostar at stoypa gólvið í svimjihylinum. Tá fæst munandi meira pláss fyri minni pening. – Sum skilst var ætlanin at nýta kjallaran í Várgleði til at hýsa amboðum hjá kommununi. Samtykt var ikki at gera nakað við sonevnda svimjihylin. Meira um hann í partinum um skúlasøguna í Miðvági.

Steðgur kemur so í hesar ætlanirnar í eina tíð. Men á fundi 24. apríl 2007 er málið aftur frammi. Og skuldi nú støða takast til, um Kjallarin í Várgleði skuldi gravast út. Tekniska



Várgleði, 2006.
Skitsa: Miðvágs kommuna.

nevnd mælti til at biðja Spf. Trøðhamar grava kjallaran út. Fíggjarnevndin mælti til, at arbeiðið varð boðið út alment. Samtykt var at bjóða arbeiðið út at grava út kjallaran á Várgleði og at gera alment w.c.

22. mai 2007 er til viðgerðar uppskot til innrættan av kjallarinum í Várgleði. Trivnaðarnevndin og Tekniska nevnd mæltu til at biðja Westtech gera tekning og tilfarslista, sama gjørdi fíggjarnevndin, sum eisini mælti til at fáa kostnaðin mettan. Samtykt var at fáa til vega tekning, tilfarslista og mettan kostnað.

Hvussu gekst víðari við tí sæst ikki, men sum skilst er kjallarin ikki grivin út.

Rósely Reynstind, dagrøktarleiðari, skrivaði hin 16. februr 2006 til kommununa og søkti um at fáa ljóðdoyving í Várgleðið, tí ljóði har var sera vánaligt og tað ekóaði, sum gjørdi tað strævið at vera har við børnum. Per Olesen umsjónarmaður hjá kommununi, hevði verið har og mælti til, at brúktar vóru sama slag plátur undir loftið sum í Gamla skúla. Rósely hevði eisini skaffa tilboð frá spf. Blika, har kostnaðurin á plátunum var 25.000 kr. Í skrivi frá Trivnaðarnevndini, sum hevði viðgjørt málið, varð sagt, at hetta vóru plátur, sum vóru ætlaðar at heingja upp undir loftið og sum líktust bláum skýggjum. Nevnt varð um stovnar í landinum, sum nýtu slíkar plátur, sum vóru brunatryggar.

Á bygdaráðsfundi 1. mars 2006 var umsóknin til viðgerðar og samtykt.

14. mars 2006 skrivar Brunaumsjón Landsins, at tey hava verið og sýnað Várgleði og at viðmerkingar áður vóru nú allar framdar, og var brunatrygdin í bygninginum nú nøktandi. Sagt verður, at skrivið er eisini sent til Familju- og Heilsumálaráðið, Tórshavn.

6. juni 2006 fær bygningurin endaliga góðkenning frá Almanna- og Heilsumálaráðnum sum spælistova, dagstovnur og til dagrøkt.

Hallgerð Olsen. Setan av reingerðingsfólki til frítíðaransingina og dagrøktina var til viðgerðar á almennum bygdaráðsfundi 6. mars 2007. Samtykt varð at seta Hallgerð Olsen í starvið. Starvið umfataði: Frítíðaransingin manadag – fríggjadag kl. 17.30 – 19.30. Dagrøktin: Fríggjakvøld kl. 19.30 – 22. Várgleði, týsdag 2,5 tímar og 1 tíma á skrivstovuni. Hallgerð gavst í starvinum 8. juli 2011 og byrjaði tá at gera reint í "Miðgarði", nýggja barnagarðinum í Miðvági.

Hýsan av Frítíðaransingini

Ynski var komið frá foreldrum í Miðvági um, at kommunan setti á stovn frítíðaransing til tey yngru børnini, sum vóru farin í skúla. Hetta skuldi so vera frá tí tey fóru úr skúlanum og til foreldrini høvdu frí uml. kl. 17.15. Trivnaðarnevndin hevði so í februar 2004 havt fund við umboð fyri MB, sum í november 2003 hevði sent kommununi skriv og bjóða fram MB-húsið

til frítíðaransing og at nýta part av økinum hjá felagnum. Trivnaðarnevndin helt í skrivi 9. februar 2004, at eini 36 børn høvdu kunnað verið har. Fíggjarnevndin kunnaði bygdaráðið, á bygdaráðsfundi 30. mars 2004 um víðari gongdina í málinum. Samtykt varð, at foreldrini verða kunnað um, at gongd er í málinum, og at bygdaráðið var jaligt. Í seinni skrivi er sagt, at hildið var meira hóskandi at hava 27 børn har. Tingingar vóru við MB um leigu, har MB ynskti, at kommunan rindaði fyri el, olju og reingerð av húsinum, har umboð fyri kommununa vóru meira áhugað fyri einum føstum gjaldi. Har tað so bleiv til, at kommunan rindaði fyri el og olju. Umframt at kommunna gjørdi nakrar umvælingar, m.a. skifti inn- og úthurðar og setti nýggj vindeygu í. Hartil hevði MB lagt nýtt gólv á innan.

Hin 24. august 2004 var samtykt setan av leiðara og einum hjálparfólki til frítíðaransingina í Miðvágs kommunu. Tróndur Ravnsfjall, námsfrøðingur, var settur sum leiðari og Maria Frederiksen sum hjálparfólk. Á sama fundi varð samtyktur leigusáttmáli við MB um at leiga MB-Húsið til frítíðaransingina.

Á almennum bygdaráðsfundi 18. mai 2005 kom fram, at Frítíðaransingin hevði havt ávisar trupulleikar í MB-húsinum, m.a. tá fótbóltsdystir vóru, at ov nógv órógv var at vera har tá, og tað riggaði ikki væl. Leiðarin hevði tí í oktober 2004 heitt á trivnaðarnevndina um at kanna møguleikan fyri at fáa onnur hóskandi høli. Trivnaðanevndin hevði kannað møguleikan at leiga husini hjá Filadelfia Vágar við Gjónna, sum var í sama øki við Kirkjar í Miðvági. Tey vóru sinnað at leiga út. Fyri at flyta frítíðaransingina hagar, kravdust íløgur uppá uml. 60.000 kr. Leigan var at gjalda fyri ljós, hita og trygging, uml. kr. 2.500,- um mánaðin. Trivnaðarnevndin mælti til at flyta frítíðaransingina í húsini við Gjónna. Fíggjarnevndin mælti til at finna eina loysn í verandi hølum. Napoleon Magnussen, bygdaráðsformaður, mælti til at fylgja tilráðingini frá trivnaðarnevndini, um viðurskitini ikki komu uppá pláss alt fyri eitt. Samtykt var at flyta frítíðaransingina í húsini við Gjónna.

Sum skilst, so verður MB-húsið tó framhaldandi leigað sum ungdómshús. 26. apríl 2006 er notat skrivað um fyrispurning at vaska MB-húsið. Jórun Haraldsen hevði ringt og spurt um kommunan kundi skipa fyri, at MB-húsið varð vaskað uml. 2 ferðir um vikuna. Svarað verður, at kommunan hevði ongan, ið kundi vaska húsið, tann ið hevði vaskað har áður var givin. Vit gjalda sum er fyri el og olju, fyri at ungdómur kann vera inni har um kvøldarnar, umframt at vit eisini hava keypt onkra útgerð til tey. Avgjørt varð ikki at játta umsóknina.

Á fundi í bygdaráðnum 24. apríl 2007 var til viðgerðar, at leiðslan í Frítíðaransingini mælti til at steingja vegin Kirkjatún fyri gjøgnumkoyrandi ferðslu – hetta er vegur framvið húsunum við Gjónna. Tekniska nevnd mælti til at steingja Kirkjatún, tí tað var koyrandi eftir Kirkjavegi. Samtykt varð at steingja Kirkjatún. Og varð samtykt at kanna møguleikan fyri bert at steingja Kirkjatún, tá børn vóru í ansing. Um hetta bar til er tó ikki nevnt.

Tróndur Ravnsfjall

Tróndur Ravnsfjall, deildarleiðari í Frítíðaransingini. Tróndur varð settur í starv 1. august 2004 smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Hann var útbúgvin námsfrøðingur. Farin úr starvinum 31. mars 2007.

Maria Frederiksen, hjálparfólk. Sett í starv 24. august 2004, 30 tímar um vikuna sum hjálparfólk.

Linda Joensen, deildarleiðari í Frítíðaransingini. Sett í starv 1. apríl 2007. Samtykt á bygdaráðsfundi 20. mars 2007. Var áður varaleiðari í Útibarnagarðinum.

Rakstur Frítíðaransingin 2004 - 2008

Frítíðaransingin ár	Foreldur	Kommunan	Tilsamans
2004 kr.	47.500	214.085	261.585
2005 -	152600	472.536	618.486
2006 -	211.600	738.160	949.760
2007 -	210.103	1.082.648	1.292.751
2008 -	209.504	889.073,22	1.098.577

3. januar 2007 skrivar kommunan til Rósely Reynstind, dagrøktarleiðara, at gjøldini frá 1. apríl 2007 og 12 mánaðir fram vera hesi: Dagrøktin 1.900 kr. um mánaðin, barnagarðurin 1.600 kr. um mánaðin og frítíðaransingin 1.100 kr. um mánaðin, og er hetta alt galdandi fyri hvørt barnið. Systkinnafrádráttur er eisini samtyktur fyri hesa tíðina, fult gjald fyri eitt barn og 25% avtrekt fyri restina av systkjum.

Útibarnagarður í Vatnsoyrum

Loysn á barnaansingartrupuleikunum komandi ansingarár var á skrá til bygdaráðsfund 13. juni 2006. Spurningurin var, um høli skuldi leigast í Vatnsoyrum til útibarnagarð, ella at seta fleiri dagrøktarar? Trivnaðarnevndin mælti til at leiga høli í Vatnsoyrum í eitt ár. Og varð hetta samtykt. Sagt verður, at Jóannes Klein úr Vatnsoyrum mótmælti. Júst hví hann mótmælti, er ikki nevnt, men hann má so hava ynskt eina aðra loysn.

5. desember sama ár er fyri á fundi, hvussu barnaansingin skuldi skipast eftir summarfritíðina í 2007. Trivnaðarnevndin mælti til at kanna møguleikan at keypa eina smáttu frá “Esthus" og seta hana norðanfyri Zarepta í Vatnsoyrum til tey elstu børnini. Tekniska nevnd mælti til at taka undir við uppskotinum hjá Trivnaðarnevndini, meðan Fíggjarnevndin mælti til at kanna málið nærri. Sum avgerð verður sagt, at arbeitt verður við málinum.

Eva Klein, deildarleiðari í Útibarnagarðinum í Vatnsoyrum. Samtykt var á bygdaráðsfundi 20. mars 2007 at seta Evu Klein í starvið. Er tó seinni sama ár skrásett sum leiðari fyri Heiðastovu í Miðvági, sum man merkja, at Vatnsoyrabørnini eru farin hagar at ganga saman við miðvágsbørnum, tá Heiðastova opnaði.

Heiðastova

Á almennum bygdaráðsfundi 31. januar 2007 var til viðgerðar: Hvussu skipa vit barnaansingina eftir summarfrítíðina? Fíggjarnevndin legði málið fyri bygdaráðið. Samtykt var eitt heldur serstakt uppskot, sum var, at byggja eini sethús Norði í Heiðum til barnaansing og síðani selja húsið aftur, tá nýggi stóri barnagarðurin var liðugur.

Val av trimum limum at byggja fyribils barnagarðin var vald á fundi 5. februar 2007. Samtykt var at velja: Maluna Helgadóttir, Jóan Paula Frederiksen og Elias Næs.

Málið var fyri aftur á fundi 6. mars 2007. Sagt verður í gerðabókini, at á bygdaráðsfundi tann 31.1.2007 var samtykt at byggja eini hús á matr. nr. 12bd Norði í Heiðum til barnaansingina. Støða skal takast til uppskot til sáttmála við Sandavágs Timburhandil um bygging av húsinum. Fíggjarnevndin mælti til at taka av tilboðnum frá Sandavágs Timburhandli uppá

Heiðastova, 2008

1.520.000 kr. Hetta varð samtykt. Samstundis varð samtykt at geva byggiloyvi til bygningin.

Tað man hava gingið skjótt við at byggja, tí longu á bygdaráðsfundi 7. juni 2007 er til viðgerðar, at Eva Klein, deildarleiðari í Heiðastovu, hevur kannað prísir til innbúgv til nýggja stovnin, Heiðastova. Samlaður kostnaður uml. 160.000 kr. Fíggjarnevndin mælti til at geva loyvi til at keypa innbúgvið sambært tilmælinum frá Evu Klein. Og varð hetta samtykt.

Á fundi 29. apríl 2008 var sagt, at Eva Klein søkti um loyvi at keypa leikur uttanum fíggjarætlanina hjá Heiðastovu. Trivnaðarnevndin og fíggjarnevndin mæltu til at játta umsóknini og taka peningin av játtanini til nýggja barnagarðin. Og varð hetta samtykt. So samlaði kostnaðurin kom harvið upp á umleið 1,7 mió. kr.

Rakstur Heiðastova 2007 - 2008

Heiðastova ár	Foreldur	Kommunan	Tilsamans
2007 kr.	170.400	366.000	536.400
2008 -	420.150	786.150	1.206.300

Kommunan hevur so seinni selt nevndu hús, sum ætlanin var. Sambært almennu tinglýsingini, so er tað Tórður á Presttrøðni, sum frá 3. februar 2012 er tinglýstur eigari av Matr.nr. 12bd í Miðvági. Støddin á grundstykkinum er 686 m^2, og adressan, Rasmusargøta 6.

Barnaansingin í Miðvági frá 2009

Í Kunningarskrivinum 2009 hjá Vága kommunu stendur m.a. hetta um barnaansingina:
"Miðvágs- og Sandavágs kommunur hava nú i fleiri ár nøktað tørvin á barnaansing.

Barnaansingin í Miðvági er skipað soleiðis: Børn yngri enn 3 ár eru í **dagrøkt**, børn millum 3 og 5 ár eru í **barnagarðinum í Gamla Skúla**. Tey 6 ára gomlu verða ansað í **Heiðastovu**. Frítíðaransingin heldur til **við Gjónna**."

Hetta sigur okkum, at barnaansingin helt áfram eins og hon hevði gjørt áðrenn. Og tað hevur hon gjørt heilt fram til at nýggi barnagarðurin, Miðgarður, byrjaði í august ella september 2011, sjá um tað í brotinum um Miðgarð. Ætlanin er annars ikki í hesum verkinum at viðgera barnaansingina í Vága kommunu og er bert okkurt nevnt her, sum hevur beinleiðis samband við gomlu Miðvágs kommunu, sum er høvuðsevnið í hesum verkinum. Harímillum barnagarðurin, Miðgarður, har byggingin byrjaði undir Miðvágs kommunu.

Miðgarður

Arbeiðsheitið fyri barnagarðin undir byggitíðini var "Barnagarðurin á Stórutrøð". Tað var í 2011, at stovnurin fekk heitið, "Miðgarður".

Í 2004 og fram til várið 2005 hevði Trivnaðarnevndin hjá Miðvágs kommunu, Marianna Simonsen, Malan Helgadóttir og Jónhild Jørgensen viðgjørt barnaansingina í Miðvágs kommunu sum heild. Frá 01.01.2005, eftir at val hevði verið, vóru nevndarlimirnir: Malan Helgadóttir, Jóhannes Ellefsen, Dánial Hansen og Georg F. Hansen. Sagt verður, at í dag reka vit barnaansingina í trimum eindum við trimurn ymsum leiðslum: Dagrøkt, barnagarði og frítíðaransing. Er tað nøktandi, ella skulu vit arbeiða móti eini aðrari loysn? Nevndin mælti til at byggja ein dagstovn, sum kundi rúma øllum børnum í Miðvágs kommunu millum 0 og 8 ár. Sum eina byrjan varð mælt til at biðja fakfólk koma við uppskotum um, hvar í bygdini ein felags barnagarður lá best. Fíggjarnevndin mælti til, at trivnaðarnevndin arbeiddi víðari við málinum, og tók bygdaráðið undir við hesum á fundi, 29. mars 2005.

Bygdaráðið varð kunnað á fundi 6. september 2005 um framhaldandi arbeiðið hjá Trivnaðarnevndini um loysn av málinum um barnaansingina í bygdini. Í kunningini var uppskot um nýggjan barnagarð og tók bygdaráðið undir við, at nevndin arbeiddi víðari við hesi ætlan.

Á bygdaráðsfundi flaggdagin 2006 var spurningurin havdur á lofti, hvar nýggi barnagarðurin skuldi liggja? Trivnaðarnevndin mælti til, at barnagarðurin varð lagdur vestan fyri heilsumiðstøðina, og tók Tekniska nevnd undir við hesum. Og varð uppskotið samtykt. Á fundi 31. mai 2006 er staðsetingin av barnagarðinum endaliga samtykt at vera vestanfyri heilsumiðstøðina, á matr. nr. 220n og 220c, sum er á Stórutrøð í Miðvági.

Tekniska nevnd hevði síðan sett seg í samband við byggiráðgevingarfelagið, WestTech í Sørvági, við Poul Arna Jacobsen, verkfrøðingi og Jákup á Stongum, arkitekti, um at tekna og tilrættaleggja arbeiðið við at byggja ein nýggjan barnagarð í Miðvági.

Framløga av tilfari í sambandi við betongarbeiði til byggingina av nýggja barnagarðinum var á kommunuskrivstovuni í Miðvági hin 21. september 2007. Tilstaðar vóru bygdaráðsformaðurin, Napoleon Magnussen, bygginevndin fyri barnagarðin, sum allir vóru bygdaráðslimir, Jóan Pauli Frederiksen, Jóannes Klein og Jóhannus Ellefsen. Og fyri WestTech Jákup á Stongum og Poul Arni Jacobsen. Jákup legði fram tekningar í sambandi við ætlaðu útbjóðingina av betongarbeiðinum. Talan var um stoyping av út- og partvíst eisini innveggjum, umframt ávíst neyðugt rør/hvs arbeiðið, ið natúrliga var tengt at høvuðsarbeiðinum. Hann greiddi frá, at tekningarnar vóru gjørdar soleiðis, at tað skuldi verða lætt at skilja byggiháttin, hetta m.a við litum, samansettum ásetingum og við 3d-myndum. Endamálið við hesum var serliga at avmarka vavið av tekningum – serliga skurðum, samstundis var mátsetingin gjørd soleiðis, at arbeiðstakarin skuldi hava eina greiða fatan av, hvussu bygningarnir verða gjørdir.

Samsvarandi tekningunum var ætlanin at stoypa veggir og fundament, umframt eisini at ávís innirúm her m.a. trappuuppgongd og wc í høvuðsgongini eisini verða stoypt. Ætlanin var, at stoyptu rúmini skuldu verða liðugt viðgjørd - t.d. pussa ella samsvarandi.

Lagt var upp til at brúka betongelementdekk millum hæddirnar, tó undantikið ovastu hæddina, sum ætlandi varð timbur.

Í ætlanini var at brúka gólvhita í øllum rúmum, tó undantikið ovastu hæddini.

Jóan Pauli gjørdi greitt, at hóast bygginevnd var vald í februar 2007, var hetta fyrsti fundurin hjá nevndini, og at kunningartilfarið higartil ikki var nøktandi, nevnt varð m.a., at útgrevstur og planering var farin fram uttan, at bygginevndin var kunnað, og at einki av undanfarna tilfari var útflýggjað bygginevndini.

Allir limirnir á fundunum tóku undir við, at mannagongdin ikki hevur verið nøktandi, tó

Loftmynd frá 2009 sýnir hvussu langt byggingin kom hjá Miðvágs kommunu.

kortal.fo

soleiðis, at higartil var talan um arbeiðið, sum var gjørt sambært samtykt, grundað á framlagt tilfar, og at byggiarbeiðið enn ikki var bjóðað út. Semja var um, at WestTech sendi áður gjørt tilfar beinleiðis til nevndarlimirnar við avriti til borgarstjóran.

Sama dag, 21. september 2007, skrivaði WestTech smb. avriti, kommunan fekk, til landslæknan í sambandi við ivaspurningin, um gólvhiti elvdi til størri vanda fyri ovurviðkvæmi, enn um annað alternativ varð valt. Í frágreiðingini um barnagarðin verður m.a. sagt, at talan var um barnaansingardepil í fýra eindum við plássi fyri samanlagt uml. 150 børnum, umframt umsitingareind samsvarandi hjáløgdu tekningum.

Á bygdaráðsfundi 12. november 2007 var fíggjarstøðan hjá kommununi eftirkannað. Fíggjarnevndin viðgjørdi fíggjarstøðuna og mælti til bert at taka lán til barnagarðin. Sum var einmælt samtykt.

Gerðbók fyri bygginevndina fyri barnagarðin sýnir, at teirra fyrsti innanhýsis fundur var ikki fyrr enn 28. desember 2007, har Jóan Pauli Frederiksen var valdur nevndarformaður. Allir limir møttir, og Georg Hansen var skrivari. Næsti fundur nevndarinnar var 12. februar 2008 og var fundur saman við WestTech. Fyrstu fundirnar var mest tosað um staðsetingina av barnagarðinum á økinum við Stórutrød.

13. juni 2008 skrivaði spf. WestTech Jákup á Stongum og Poul Arni Jacobsen og søgdu, at mánadagin hin 2. juni 2008 kl. 13 var licitatión á kommunuskrivstovuni í Miðvági í sambandi við útbjóðing av betongarbeiðinum í barnagarðsstovninum. Arbeiðið var boðið út alment í bløðunum við øllum neyðugum upplýsingum. Innlatingarfreiðstin var mánadagin 2. juni 2008 kl. 13. Eftir at hava kannað og samanborið tilboðini, verður mælt til at farið verður undir samráðingar við spf. Dalsbø og í hesum sambandi serliga við atliti til alternativa tilboðið, sum eigur at verða kannað nærri. Talan er um ein sera áhugaverdan byggihátt, sum ikki er royndur í Føroyum, men sum verður brúktur aðrastaðni.

Inn komu hesi tilboð:

Arbeiðstakari	Tilboð v/mvg kr.	Alternativt tilboð v/mvg kr.
Sea Star Contractors	6.248.062	
Spf. Stoyp	6.787.387	
Spf. Dalsbø	6.213.712	6.563.088 (Quad Lock)
Hugin Skaalum	7.367.986	
Eyðin Thomassen/Kristin Ellefsen	8.253.300	6.731.875
Articon	8.931.868	

Hin 4. august 2008 varð sáttmáli skrivaður millum Miðvágs kommunu og spf. Dalsbø v. Hans Magnussen, Sandavági, um betong- og uttandura arbeiði í nýggja ansingarstovninum í Miðvági. Tað var teirra alternativa tilboð, tikið var við, sum var Quad Lock bygging, smb. tilboð 6.563.088 kr. Betongarbeiðið skuldi byrja hin 11. august 2008 og vera liðugt til avhendingar hin 2. februar 2009. Skrivað undir sáttmálan vegna kommununa høvdu, Jóannes Klein, borgarstjóri og Jóan Pauli Frederiksen formaður í bygginevndini. Vegna spf. Dalsbø Hans Magnussen.

Á bygdaráðsfundi 6. august 2008 varð samtykt at taka av tilboð frá Føroya Banka um lán uppá 5,9 mió. kr. til fíggjan av byggingini av barnagarðinum hetta árið.

Á fundi í bygginevndini fyri barnagarðin var hin 1. september 2008 avgjørt at taka við tilboð frá Zacharias Leitisstein upp á tilfar til kloakk og omaná vatnveitingar smb. tilfarslista fyri 182.662 kr. Svend Krosstein og Maria Poulsen høvdu eisini givið tilboð uppá ávikavist 191.689 kr. og 230.312 kr.

Bygginevndin hevði eisini havt uppskot frammi hetta árið um at flyta barnagarðin nakað, millum 15 og 25 metrar fyri at fáa hann at liggja betur í lendinum. Men vann hetta ikki frama.

Stórur barnagarður byggjast í Miðvági

Vágaportalurin Ólavur í Beiti hevði grein um nýggja barnagarðin í Miðvági hin 11. august 2008: "Miðvágs kommuna hevur tikið av alternativum tilboði uppá stoypiarbeiði til nýggja barnagarðin. 5 tilboð komu inn og lógu tey úr 6,1 til 8,2 mió. krónur

Barnagarðurin í Miðvági er ein av størstu barnagørðum í landinum. Fýra vøggustovur og seks barnagarðsstovur undir somu lon. Byggifrøðiliga fevnir byggingin um fimm sambygdar lonir í grønum øki miðskeiðis í bygdini. Ein av lonunum er felags køkur og starvsfólkahølir.

Í farnu viku skrivaðu Miðvágs kommuna og spf. Dalsbø við Hans Magnussen undir sáttmála at byggja barnagarðin. Tilboðið byggir á ein heilt øðrvísi hátt at gera stoypiarbeiði. Heldur enn forskallingar ella formar, sum vit kenna, verða veggirnir bygdir upp av bjálvingarklossum báðumegin við, bundnir við stáli og jarni og fyltir við sementi, har so bjálvingin samstundis er formurin.

Tá ið liðugt er standa betongveggirnir bjálvaðir, klárir at klæða á báðum síðum.

Hetta er nakað, sum ikki áður er roynt í Føroyum, og var ein kanningarnevnd við Jóannes Klein, borgarstjóra, Jóhannus Ellefsen, varaborgarstjóra, saman við ráðgevum í Írlandi og fylgdu arbeiðsgongdini at stoypa á slíkan hátt og sóu tilfarið og hús bygd soleiðis.

- Einamest hevði høga bjálvingarvirðið sína jaligu ávirkan, og við samanhangandi bjálving á báðum síðum, eru ongar kuldabrýr, sigur Jóannes Klein, borgarstjóri, við Vágaportalin.

Jóannes Klein metir, at stoypiarbeiðið verður liðugt um miðjan februar 2009.

Kostnaðurin av teimum íalt 1800 fermetrunum er mettur til samanlagt 26 mió. krónur.

Ráðgevi hjá Miðvágs kommunu hevur verið spf. WestTech."

Hin 25. september 2008 skrivaði Miðvágs Kommuna á heimasíðu síni:
"Gongd komin á byggingina av barnagarðinum í Miðvági. Nú byrjar at síggjast eftir á økinum á Stórutrød, har nýggjur barnagarður verður bygdur. Fundamentið undir umsitingarbygninginum er gjørt, og eru menn farnir undir tað fyrsta av fýra fundamentum undir ansingarlonunum. Fyrst í komandi viku koma teir serligu blokkarnir, sum nýtast skula til formar, men sum eisini eru isolering. Tá farast skal undir at seta hesar blokkar upp, kemur ein íri at leggja lag á hjá stoyparunum. Tað hevur fyritøkan, sum ger arbeiðið, valt, tí hetta er fyrstu ferð, at slík bygging verður framd her á landi."

Barnagarðurin í gerð. Mynd: Byggivirkið KBH

29. september 2008 er í skrivi sagt, at í samband við bygging av nýggjum barnagarði hevði Miðvágs kommuna fingið tilsøgn um lán uppá 27,8 mió. kr. Tá er eitt lán longu tikið uppá 5,9 mió. kr. íroknað. Hvussu nógv av hesum, neyðugt verður at brúka fæst ikki at vita, fyrr enn barnagarðurin er liðugur. Kommunan er byrjað at rinda avdráttir uppá lánið 340.000 kr. um mánaðin.

Innilokan av barnagarðinum

Vága kommuna skrivaði hin 16. september 2009 á síni heimasíðu, at tilboðini upp á innilokan av nýggja dagstovninum á Stórutrøð í Miðvági vóru latin upp. Lisitatiónin var á kommunuskrivstovuni sama dag 6. september 2009 klokkan 13.15.

Sjey fyritøkur høvdu boðið sær til at gera arbeiðið. Lægsta tilboðið átti Búsetur á Argjum, og tað tilboðið lá væl undir tí, ið WestTech, sum projekterar dagstovnin, metti arbeiðið at fara at kosta.

Innkomnu tilboðini vóru hesi:

Búsetur, Argjum	3.404.910 kr.
Byggivirkið KBH, Toftir	3.851.084 -
Torfinn Hansen, Miðvági	3.984.062 -
TMT, Trongisvági	4.081.716 -
MTV, Froðba	4.335.765 -
Trøðhamar, Miðvági	5.402.384 -
Smíðlist, Saltangará	6.103.354 -

Metingin hjá WestTech, ráðgevarafyritøkuni, var 5.520.000 kr.

- Ráðgevarafyritøkan WestTech, sum projekteraði barnagarðin, fór nú at gjøgnumganga tilboðini, og um uml. eina viku skuldi bygginevndin fyri barnagarðin fáa tilmæli frá teimum.

Tað varð so tilboðið frá Byggivirkið KBH á Toftum, tikið var av, upp á gott 3,85 mió. kr.

Eftir innilokingina var tað eisini byggifelagið spf. KBH á Toftum, sum gjørdi timburarbeiðið innan.

Nýggi barnagarðurin í Miðvági vunnið virðisløn í USA

Fjølmiðilin Info skrivaði hin 12. januar 2011, at barnagarðurin á Stórutrøð í Miðvági hevði vunnið altjóða virðisløn í USA. Talan var um altjóða kapping millum bygningar, sum vóru bygdir við serligum byggihátti har Quadlock partvíst varð brúkt sum byggitilfar. Quadlock er eitt byggisystem, har sjálv bjálvingin virkar sum formurin, stoypt verður niður í. Tað var ein felagsskapur fyri framleiðarar, sum síðan 2005 hevði skipað fyri árligari altjóða kapping, har møguleiki var fyri at senda uppskot inn. Uppskotini vórðu millum annað mett út frá arkitekturi, funktionaliteti og byggihátti.

Barnagarðurin í Miðvági er teknaður og projekterður av spf. WestTech í Sørvági, spf.

Barnagarðurin um at vera liðugur. Mynd: Byggivirkið KBH.

Dalsbø í Sandavági hevur staðið fyri betongarbeiðinum, meðan timburarbeiðið er gjørt av spf. KBH á Toftum.

Síðani kappingin byrjaði í 2005 hava allir vinnararnir verið úr ymiskum statum í USA. Hetta er sostatt fyrstu ferð, at ein bygningur uttanfyri samveldið hevur vunnið ein prís, og tað gleðir okkum at kunna umboða Føroyar í hesi altjóða kapping, siga fólkini handan barnagarðin í Miðvági í tíðindaskrivi.

Príshandanin var á byggimessu í Las Vegas 19. januar 2011, har umboð fyri spf. WestTech, Jákup á Stongum og Poul Arni Jacobsen, Sørvági, og spf. Dalsbø, Hans Magnussen, Sandavági, vóru tilstaðar.

Miðgarður tikin í brúk

Oyggjatíðindi skrivaði hin 24. september 2011, at leygardagin 1. oktober 2011 kl. 15.00 verður almenn móttøka í nýggja dagstovninum á Stórutrød í Miðvági. Móttøkan er í sambandi við, at dagstovnurin varð tikin í brúk herfyri, og høvi verður hjá fólki at síggja stovnin.

Eisini verður nýggja navnið á stovninum avdúkað, eins og nýggja heimasíðan hjá stovninum verður latin upp.

- Sum skilst í nevndu grein, er stovnurin tikin í brúk eftir summarfrítíðina í august ella tíðliga í september 2011, júst nær er ikki nevnt.

Um navnið er sagt, at tað er tikið úr norrønari mytologi. Og kann ein hugsa sær eisini, at bygningarnir liggja samanbundir í ein klingur við opnum plássi í miðjuni.

Um Miðgarð verður á heimasíðuni hjá Vága kommunu sagt: *Hann liggur frítt fyri, við sera vakrari náttúru rundanum. Har er er stutt til haga og fjørðu, stutt til Viðarlundina, fótbóltsvøllin, stóra spæliplássið í bygdini og sandin. Eisini er stórt gott spælipláss rundan um Miðgarð við øllum hentleikum, so sum reiggir, skreiðibreyt, sandkassum, spælihús og einum lítlum áarløki, so góðir møguleikar eru fyri rørslu.*

Nevndar eru við navnið 4 vøggustovur, 4 barnagarðsstovur og 1 stova til tey 6 ára gomlu.

Vøggustovur: Kálvalíðstova, Jansastova, Bakkastova og Kumlastova.

Barnagarðsstovur: Kirkjastova, Rygsstova, Húsastova og Eiriksstova.

Tey 6 ára gomlu: Heiðastova.

Leiðari á stovninum er Mirjam Kjølbro og varaleiðari Majbritt Poulsen.

Uppgerð yvir byggikostna av Miðgarði

Miðgarður					
Ár	Kommuna	Smb. tilboð	Eyka	MVG	Í alt
2007-2008	MK	5.720.842			5.720.842
2009	VK	7.350.599	53.870	452.409	7.856.879
2010	VK	8.026.222	825.902	543.913	9.396.037
2011	VK	12.089.600	3.454.620	900.228	16.444.449
2012	VK	195.064	204.947	16.615	416.626
Tilsamans		**33.382.328**	**4.539.339**	**1.913.166**	**39.834.833**

Tey, ið bygdu Miðgarð

Virki	**Arbeiði**
Spf. WestTech	Prosjektering og ráðgeving
Spf. Dalsbø	Betongarbeiði
Byggivirkið KBH	Timburarbeiði/innan og uttan
Byggivirkið KBH	Trappur + arbeiði
Spf. Bygging.fo	HVS-arbeiði
Kongshavnar El-Virki	Elarbeiðstøka
Klima	Ventilatión
John Reid Djurhuus	Máling + arbeiði
Jim S. Gólválegging	Gólvarbeiðstøka
Múrarin Kell E. Jensen	Flisaarbeiði
Systemlyklar	Lyklar og lás
Eikin	Innbúgv
Nema	Leikur/ítriv

Í 2008 varð mett, at kostnaðurin av barnagarðinum fór at liggja um 26 mió. kr. Endaliga úrslitið gjørdist tó nærri 40 mió. kr. Ein munur á 14 mió. kr.

Hátíðarhald á Miðgarði

7. oktober 2016 skrivaði Vágaportalurin at leygardagin tann 1. oktober 2016 var Miðgarður í Miðvági 5 ár, men varð dagurin hildin 7. oktober við samkomu í bygninginum. Trý starvsfólk fingu blómutyssi fyri yvir 25 ára starvstíð innan dagrøktina í Miðvági. Tær vóru Annika Thomasen, Elisabeth Johannesen og Hansia Nattestad.

Á síðu 283:
Tekningar frá framløgu hjá WestTech, 2006.
Innrætting: Kjallari, miðhædd og loft.

- **Planur kjallari:**
- Tvær barna-stovur
- Hitarúm
- Húsavørður
- Vídd uml. 430 kvm



- **Planur miðhædd:**
- Høvuðs-inngongd
- Vátrúmsgongd
- Fýra barna-stovur
- Fýra vøggu-stovur
- Barnavogna-hølir
- Matsalur
- Vídd uml. 1050 kvm

- **Planur loft:**
- Átta verkstaðir
- Skrivstovur
- Starvsfólka-rúm
- Vídd uml. 430 kvm



Dagrøktarar og barnaansarar í Miðvági

Dagfestingarnar eru úr skjølunum hjá Miðvágs kommunu. Tað er gjørt nokkso nógv burtur úr at kanna eftir, nær dagrøktarmammurnar eru byrjaðar, og nær tær eru givnar. Upplýsingarnar eru ikki so góðar allatíðina, við tað at summi ár er einki upplýst um starvsfólk, meðan onnur ár fyriliggja fullfíggjaðir listar. Og so eru viðmælisskjøl o.a. Onkustaðni eru upplýsingar givnar nær ávísir persónar eru byrjaðir, men sum ikki samsvara heilt við fullfíggjaðar varðveittar lønarlistar sama ár. Har verður so hildið seg til lønarlistarnar. So tað er tí við ávísum fyrivarni, at hesi tøl eru nevnd, sum tó skuldu verið rímuliga álítandi.

Navn	Fødd	Byrjað	Givin	Viðm.
Berghild Thomassen	1946	01.11.1985	30.06.1996	Byrj. í privat. dagrøkt **1983**
Sonja Johannesen	1949	01.11.1985	31.01.1991	Byrj. í privat. dagrøkt **1983**
Paula Joensen	1950	01.11.1985	15.07.2011	
Signa Joensen	1948	01.12.1985	30.04.1995	
Sanna Johannesen	1935	01.01.1986	31.05.1991	
Kamma Thomassen		01.01.1986	1991	
Jacobina Petersen	1954	01.10.1986	1991	
Annika Thomassen	1955	01.03.1987	01.12.1988	
sama	-	01.02.1990	2016 +	Helt áfram í Miðgarði 2011
Karin Thomassen	1953	01.07.1987	15.07.2011	Úr starvi 1996 til 2004
Brynhild Thomassen	1954	01.09.1987	24.05.1995	
Jóhanna Næs	1962	01.02.1988	31.03.1990	
sama	-	01.01.1994	11.04.2006	
Bjørg av Kák Olsen		01.12.1988	01.06.1994	
Hansia Nattestad	1954	15.4.1989	31.12.1997	
sama	-	15.1.2004	2016 +	Helt áfram í Miðgarði 2011
Elsebeth Johannesen	1954	01.03.1990	2016 +	Helt áfram í Miðgarði 2011
Anna Rasmussen	1962	1995	1995	
sama	-	01.01.2003	30.06.2003	
Maibritt Poulsen	1970	01.01.1998	01.11.2001	Leiðari frá 2009
Maria Solveig Jacobsen	1974	01.01.1998	31.07.1998	
Conny Christiansen	1969	1999	1999	
Irdi Lið Johansen	1976	01.02.2001	28.02.2005	
Conny Davidsen		06.07.2001	31.01.2002	
Birgit Nattestad	1962	22.10.2001	01.12.2008	
Marin Johansen	1973	03.06.2002		Er í starvi 2005
Liljan Niclasen	1963	01.02.2003	01.02.2004	
Jón Eirikur Joensen	1953	10.07.2003		
Jógvan Hendrik Samuelsen		10.07.2003		
Marna Zackariassen		15.08.2003		
Anna Elisabeth Joensen		15.08.2003	28.02.2005	
Laila Nattestad	1982	01.01.2004	2006	
Súsanna á Stongum		24.08.2004		
Mariann Joensen		24.08.2004		
Siri Davidsen		24.08.2004	28.2.2005	
Kristina Svabo		24.08.2004		
Anna Elisa Jacobsen		24.08.2004		
Brian Antoniesen		24.08.2004		
Eyðfrið Olesen		15.11.2004	01.05.2010	
Gurli Joensen		2004	28.2.2005	
Hildibjørg Hansen		2005	31.08.2008	
Jetta T. Anderson		2005	31.12.2007	
Ann Mari Falkvard	1968	01.05.2008		
Judith Falkvard	1974	01.11.2008		
Dinna Lauritsen		01.12.2008	15.07.2011	
Guðrun Joensen	1984	01.12.2008	15.07.2011	

Í hesum førinum er fyrst og fremst hugsað um tíðina 1.12.1985 til 31.12.2008, sum var tíðin, Miðvágs kommuna hevði barnanasingina í Miðvági. Tey, har einki er nevnt fyri, nær tey eru givin, eru antin ongir upplýsingar ella helst, at tey hava starvast eftir 1.1.2009, sum ikki er tikið við her uttan í einkultum dømi, har upplýsing hevur verið tøk um tað. Tá tað annars er uttanfyri evnið her.

Læknamiðstøðin í Miðvági

Fyrstu ferð ein sær á skrift, at tosað hevur verið álvarsliga um at fáa ein lækna afturat í oynna er tá kommunurnar í Vágum hin 6. oktober 1965 senda felags skriv til Landsstýrið og søkja um at fáa ein lækna afturtat. Eftir at Landsstýrið hevði sent málið til landslæknan og læknafelagið til ummælis er málið komið aftur til kommunurnar. Í skrivinum frá Landsstýrinum er m.a. sagt, at eftir drúgva viðgerð av málinum skjýtur landslæknin upp m.a. at fáa hesar spurningar greiddar: Hús til læknarnar, hægri løn til læknarnar, har kommunurnar skulu rinda ein part av hækkingini og tingingar við sjúkrakassarnar um hægri takstir. Har landslæknin sýnist at halda, at ov lág løn er ein av grundunum til at læknarnir støðast ov illa og at um tveir læknar vóru, so skuldu teir havt eini hús ella støð, har báðir kundu arbeitt út frá.

Málið er til viðgerðar á felagsfundi 5. apríl 1966 í Sandavági. 15 kommunulimir í Vágum møttir. Í gerðabókini fyri fundin stendur m.a., at Hugo Fjørðoy greiddi frá læknamálinum. Samtykt varð at skriva til Landsstýrið og spyrja um tað er sinnað til at taka lut í útreiðslunum við at seta ein lækna afturat í Vágum, og í fall, hvussu stóran lut. Samtykt varð eisini at seta seg í samband við sjúkrakassarnar um hægri takstir og við løgtingsmenninar um at arbeiða fyri málinum.

Tað bleiv tó ikki til nakað við tveimum læknum tá. Helst tí at júst í hesi tíð vóru stórir trupulleikar at fáa ein lækna at støðast í starvinum. Men í hugsanini at fáa tveir læknar var eisini hugsanin hjá summum í øllum førum, at fáa eina læknamiðstøð, har báðir læknarnir kundu arbeiða saman. Har metingin var, at tað vildi fingið læknar at støðast betur. Men sum kunnugt gingu sera nógv ár, til tað kom í lag.

Mál um læknamiðstøð fyri á felags kommunufundum í Vágum

Tað hendir so ikki stórvegis í málinum komandi árini, sum tó er somikið búnað 5 ár seinni, at málið um eina læknamiðstøð beinleiðis er fyri á felags kommunufundi í Vágum.

22. november 1971 var felagsfundur settur í nýggju fundarhølunum á kommunuskrivstovuni í Sørvági. Næstan allir 18 kommunustýrislimirnir í Vágum vóru møttir og tað var rættuliga óvanligt, so vit fara at nevna teir: Úr Sørvági: Arnhold Jacobsen, Malmberg Simonsen, Winther Lauritsen og Andru Simonsen – Petur Weihe manglar. Úr Miðvági: John Poulsen, Ivan Johannesen, Jógvan Hans Joensen, Albin Wang og Hans Jacob Hansen. Úr Sandavági: Jens Erik Nielsen, Niels Marius Petersen, Hans Hansen, Svend Aage Ellefsen og Jóhan Johansen. Úr Bø: Edvard Jacobsen, Jón Joensen og Dávur Joensen.

Í fundarfrásøgnini frá fundinum stendur, at semja var millum kommunurnar um at fara undir nýggj hús, og gongur hetta stórt sæð út uppá, at byggja eina læknamiðstøð og íbúðir til tveir læknar.

Hetta er fyrstu ferð heitið "Læknamiðstøð" er brúkt, sum seinni varð heitið á miðstøðini. Annars verður fyrstu árini eisini heitið "Heilsumiðstøð" nógv brúkt og læknamiðstøð eisini, hvørt um annað. Fyri at halda tað greiðari, havi eg her valt bara at nýta heitið læknamiðstøð.

Í mars 1971 er tað hent, at Vágar loksins fáa ein kommunulækna, sum støðast í oynni. 1. mars 1971 tekur Georg Egholm við sum kommunulækni í Vágum og er í starvinum í 21 ár heilt fram til 4. mai 1992 og var til tá tann, sum hevði sitið so nógv longst í starvinum sum kommunulækni í Vágum. Og 1. januar 1981 hendir so tað, at Vágar loksins fáa tveir læknar í starvið, tá Elisabeth Thorsteinsson eisini er sett í starv. Og varð verandi í starvinum í yvir 33 ár, 12 ár longur enn Egholm, og var í starvinum heilt fram til at hon gavst fyri aldur.



Ódagfest tekning innan av læknamiðstøðini. Trøndur Fuglø, arkitektur. Litlagt: s.j. 2020.

Viðvíkjandi at byggja sethús til læknarnar, so bleiv tað til tað, at Georg Egholm bygdi sær sjálvur hús í Miðvági, og Sørvágs kommuna skaffaði bústað til Elisabeth Thorsteinsson í Sørvági. Meira kann annars lesast um hetta í partinum um kommunulæknarnar í Vágum.

Fundur var aftur í felagsnevndini 22. november 1972. Hesaferð vóru allir 18 sóknarstýrislimirnir í oynni møttir, so málið hevði stóran áhuga. Fundurin var aftur hesaferð settur í kommunuskrivstovuni í Sørvági. Arnhold Jacobsen, bygdaráðsformaður, beyð vælkomin og gav orðið til John Poulsen, bygdaráðsformann í Miðvági. John Poulsen greiddi frá, at uppskot var komið frá landslæknanum at byggja eina læknamiðstøð í Miðvági, at seta ein lækna afturat í oynni, har so báðir læknarnir arbeiða frá læknamiðstøðini, og at læknahús verða bygd læknunum har eisini. Teir skulu so skiftast um at hava viðtalu í Sørvági.

Uppskotið fekk bert 7 atkvøður og fall.

Annað uppskot var frá Arnhold Jacobsen um at seta ein lækna við bústaði í Sørvági og viðtalu, og at viðkomandi arbeiddi saman við læknanum í Miðvági, so at viðtalutíðin ikki var minni enn nú. Hetta uppskot fekk 8 atkvøður og fall eisini.

Uppskot frá Jens Erik Nielsen, Sandavági, um at útseta málið fekk 15 atkvøður fyri og varð samtykt.

Fyrireikingar til læknamiðstøð og setan av einum lækna afturat

Tað ganga so heili trý ár til nakað nevnivert hendir aftur í málinum. Helst hevur verið tosað um málið av og á, men einki av týdningi er at finna á skrift um málið hesi árini.

Í 1975 kemur so vend í. 9. oktober 1975 var felagsfundur hildin í Sørvági. 15 kommunustýrislimir úr Vágum møttir, harumframt vóru eisini Pauli Ellefsen, grannskoðari og Georg Egholm kommunulækni við á fundinum. Pauli Ellefsen greiddi frá lánimøguleikum hjá

kommununum og kostnaði av tí. Viðgjørt varð so kommunulæknaskipanin, setan av einum lækna afturat og at byggja eina læknamiðstøð. John Poulsen, bygdaráðsformaður í Miðvági, las úr álitinum viðv. kommunulæknaskipanini í Føroyum. Síðan gav hann orðið til Georg Egholm, kommunulækna, sum tosaðu um, at ein kommunulækni í Vágum var ov lítið og um hvussu neyðugt tað var at fáa ein settan afturat.

Samtykt varð at søkja um at fáa ein lækna afturat í Vága læknadømi.

Samtykt varð eisini at seta nevnd at kanna møguleikarnar viðvíkjandi bygging av læknamiðstøð í Vágum. Í nevndina vórðu valdir: John Poulsen, Vatnsoyrar, Heri Jensen, Sørvági, Carl Petersen, Sandavági, Jóannes Petersen, Bøur og Marni av Kák, sýslumaður, Sørvági. Árini 1975 og 76 hevði nevndin sjey fundir.

1. fundur í nevndini er hin 9/10-1975, hildin á skrivstovuni hjá John Poulsen í Vatnsoyrum. Ymisk uppskot vóru frammi, hvar læknamiðstøðin kundi liggja.

2. fundur nevndarinnar er 3/11-1975. Semja var um á fundinum, at núv. læknahús í Miðvági ikki eru egnað til endamálið, og at nýggj læknamiðstøð eigur at vera bygd, og at matr. 265c í Miðvági er best egnað. – Tað er við síðuna av f.v. politistøðini í Miðvági á stykkinum har ein hálvliðug grund stóð, har Martin Joensen, lærari, byrjaði at byggja hús.

3. fundur er 19/11-1975. Eigarin av matr. 265a, Dagmar Joensen Næs, vil ikki selja, nýggir møguleikar kannaðir. – Dagmar var einkjan eftir Martin Joensen, Skúvingurin, nevndur.

4. fundur 20/11-1975. Økið við Ellisheimið og við J.K. Joensens smiðju kannað. Hildið varð, at økið omanfyri Ellisheimið var væl egnað og liggur hóskandi millum Sandavág og Miðvág.

5. fundur 27/1-1976. Nevndin hevur spurt fleiri um øki, men eingin er villigur at selja, tí kann nevndin framvegis ikki vísa á eitt byggiøki.

6. fundur 4/5-1976, nú hevur Julia Johansen sagt, at hon er sinnað at selja eitt stykki fyri 15 kr. m^2. Skitsuprosjekt eftir Herluf Simonsen, byggifrøðing, varð lagt fram, har ein læknamiðstøð á 225 m^2 er mett at kosta 562.500 kr. umframt innbúgv til læknayrki við tilboð 156.800 kr., harumframt kemur vanligt innbúgv.

7. fundur 11. oktober 1976 har nevndin skrivar eitt álit.

Stytt: Bygd verður læknamiðstøð til tveir læknar í Miðvági, mælt verður til, at Læknamiðstøðin verður bygd omanfyri Ellisheimið, samlað kostnaðarmeting 999.550 kr. + 10% við príshækkanum.

Umframt at nevndin hevði arbeitt við ymsum møguleikum fyri staðseting av læknamiðstøðini, so hevði bygdaráðið í Miðvági eisini arbeitt við málinum. Á bygdaráðsfundi í Miðvági 9. januar 1976 er til viðgerðar býarplanurin, sum danska felagið Skaarup & Jespersen høvdu gjørt, har m.a. var uppskot um "administrationscenter" í Miðvági. Á fundinum varð samtykt, at politistøðin og læknamiðstøðin verða løgd á Tungureynstrød.

Vit kunnu tó staðfesta, at læknamiðstøðin varð hvørki bygd omanfyri Ellisheimið ella á Tungureynstrød.

Ósemja um læknamiðstøðina

Skriv frá Felagskommununi fyri Vágar um læknamiðstøðina var til viðgerðar á bygdaráðsfundi í Miðvági 4. juli 1979. Avrit av skrivinum er ikki funnið, men sagt verður, at samtykt varð prinsippielt, at ganga við til hetta uppskotið. Annars skuldi tryggjast, at fundur bleiv hildin, áðrenn málið varð endaliga samtykt.

Her sýnist ósemja ikki at vera, men tað er tað, eftir øllum at døma seinni sama ár.

26. oktober 1979 var felagsfundur settur í Sørvági. 16 kommunustýrislimir úr Vágum møttir. Samtykt varð at søkja um setan av hjálparlækna skjótast gjørligt.

Miðvágs bygdaráð ynskti at fáa hetta í gerðabókina: Miðvágs bygdaráð sigur frá, av tí at

semja ikki fæst um at byggja læknamiðstøð í Miðvági, tekur Miðvágs bygdaráð sær rætt til at fara undir byggingina beinanvegin.

So stendur í gerðabókini: "Fundurin varð slitin vegna streymslit."

Framhald av fundinum var ikki fyrr enn 29. desember 1979. Nú verður sagt, at Sørvágs-, Sandavágs og Bíggjar bygdaráð taka ikki undir við tankanum at byggja læknamiðstøð, men ístaðin at byggja egnað viðtaluhøli í teimum trimum stóru bygdunum. Studningurin, sum var ætlaður til bygging av felags læknamiðstøð verður býttur lutfallsliga eftir fólkatalinum í kommununum. Gomlu læknahúsini verða seld og sølupeningurin verður býttur millum kommunurnar. Sørvágs bygdaráð skeyt upp, at læknin, sum verður settur afturat, skal hava fastan bústað í Sørvági.

Hervið fellur hugsanin til jarðar, at allar kommunurnar í Vágum skuldu byggja eina læknamiðstøð saman. Og sum so er hugsanin um eina felags læknamiðstøð eisini fallin til jarðar, við tað at hinar kommunurnar sýnast nøgdar við bert at hava eina viðtalu í hvørjari bygd, Sandavági, Miðvági og Sørvági.

Landsstýrið og Læknafelagið koma upp í málið

Sjálvt um vágamenn ikki kundu semjast um læknamiðstøð, so vildu bæði Føroya Landsstýri og Læknafelag Føroya hava læknamiðstøðina bygda, har í seinna førinum helst Georg Egholm, kommunulækni í Vágum, er ein fyrisprákari. Og kallað varð til felagsfund millum hesar tríggjar partarnar. Felagsfundurin var settur á Ellisheiminum hin 9. januar 1980.

13 kommunustýrislimir úr Vágum vóru møttir. Harumframt vóru møttir Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, Óli Mikkelsen, formaður í Læknafelagnum, Andor Ellefsen, lækni, Kai Kallsberg, lækni, Georg Egholm, lækni og Jóngerð Purkhús, fultrúi í landsstýrinum.

Til viðgerðar var læknamálið í Vágum. Jón Joensen, formaður í felagskommununi beyð vælkomin og nevndi m.a., at hetta var eitt mál, sum var ringt at loysa. Annars las hann bræv, sum kommunurnar í Vágum høvdu sent Landsstýrinum um samtyktirnar frá seinasta felagsfundi. Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, greiddi frá, at hann hevði lisið álitið um læknaskipanina, og har verður mælt til, at bygt verður ein læknamiðstøð her í oynni. Hann gjørdi eisini greitt, at kann semja ikki fáast her vesturi, kann embætið til ein lækna afturat ikki lýsast leyst.

Og her má sigast, at landsstýrismaðurin tekur eitt av tungu vápnunum fram, men hann bleytgerð tó støðuna beint eftir við at siga, at studningur og lán verður veitt bæði til læknamiðstøð og til viðtaluhølir. 50% av byggikostnaðinum sum studningur og 40% sum lán til 4% rentu um árið. Landsstýrismaðurin skeyt upp at byggja læknamiðstøð í Miðvági, læknaviðtaluhøli í Sørvági, og Sandavági og at allar kommunurnar rinda byggikostnaðin av hesum bygningum í felag.

Drúgt orðaskifti var um hetta uppskotið, men fekst tó eingin semja.

Dánjal Tavsen setti so fram uppskot um, at Miðvágs kommuna byggir læknamiðstøðina og ber sjálv rakstrarútreiðslurnar av henni, og Sandavágs kommuna byggir viðtaluhøli og ber raksturin sjálv og somuleiðis í Sørvági. Hetta uppskot var sett vegna tess, at Miðvágs kommuna hevði sent bræv til Landsstýrið um sjálvir at fáa loyvi at byggja læknamiðstøðina í Miðvági.

Semja fekst heldur ikki fyri hesum uppskotinum. Sandavágs bygdaráð og Bíggjar bygdaráð tóku tó undir við hesum uppskotinum.

Nevnd varð sett, og í nevndina vóru vald: Andor Ellefsen, lækni, Georg Egholm, lækni, Jóngerð Purkhús, fultrúi í landsstýrinum, Jón Joensen fm. í Felagskommununi í Vágum, og bygdaráðsformenninir, Dánjal Tavsen, Gudmund Niclasen og Heini F. Petersen.



Tekning av kjallarahæddini á læknamiðstøðini. Trøndur Fuglø, arkitektur. Litlagt: s.j. 2020.

Semja um læknamiðstøð og lækna

14. januar 1980 var felagsfundur settur í Sandavági. 14 kommunustýrislimir úr Vágum møttir. Til viðgerðar var nýtt uppskot frá Dánjal Tavsen. Um ikki Miðvágs bygdaráð stendur við tað skriv, sum sent er Landsstýrinum, har teir biðja um at fáa loyvi til at byggja læknamiðstøð sjálvir. So vil Sørvágs bygdaráð bjóða sær til at byggja hesa og bera raksturin sjálvir. Hetta uppskot fekk ikki sømdir.

Tosað varð nógv aftur og fram um málið, og at enda varð ein semja gjørd: Sandavágs kommuna byggir viðtaluhøli í Sandavági og ber byggikostnaðin.

Miðvágs kommuna byggir læknamiðstøð í Miðvági og ber byggikostnaðin.

Sørvágs kommuna byggir ella umbyggir viðtaluhøli og ber byggikostnaðin.

Hetta er treytað av, at studningur og lán verða latin til bygging av øllum hesum hølum.

Gamla læknahúsið verður selt, og peningurin fellur til læknamiðstøðina, sostatt skulu allir partar hava sama rætt til brúk av læknamiðstøðini. Tey størru amboðini í læknamiðstøðini vera felags. Raksturin av viðtaluhølunum og læknamiðstøðuni verður at býta á sama hátt sum tann kommunali parturin av rakstrinum av ellisheiminum.

Læknin, ið verður settur afturat, skal hava fastan bústað í Sørvági. Hetta verður at seta í lýsingina, tá embætið verður lýst leyst. Viðtalutíðirnar í teim ymsu bygdunum verða hesar: 3 dagar í Sørvági, 2 dagar í Sandavági og annars á læknamiðstøðini. Hetta verður eisini at seta í lýsingina, tá ið embætið verður lýst leyst.

Frameftir bleiv skipanin so tann, at allar kommurnar rindaðu felags til raksturin av læknaviðtalunum og læknamiðstøðini, prosentvís eftir skattainntøkunum hjá kommununum.

Kommunan ognar sær øki til læknamiðstøðina

Á fundi í bygdaráðnum 30. januar 1980 var til viðgerðar staðseting av læknamiðstøðini. Samtykt varð at leggja hana á Stórutrøð í økinum norðanfyri húsini hjá Emil Olsen á matr. nr. 220a. Samstundis varð vald nevnd at arbeiða víðari við læknamiðstøðini.

Hesir vórðu valdir: Kristin Ellefsen, verkfrøðingur, Georg Egholm, kommunulækni, Martin Nielsen og Hans Jøgensen, bygdaráðslimir.

Viðvíkjandi Matr. nr. 220a kann viðmerkjast, at tað er Hagin Nípan, sum var festið, har Emil Olsen, ella Kokka Emil nevndur, var festari, til festið hoyrdi 2 merkur og 11 skinn jørð uttangarðs og 74.006 m² innangarðs. Húsini hjá Emil Olsen stóðu á matr. nr. 220 l, Hornavegur 18, og læknamiðstøðin kom at standa á matr. nr. 220c, Hornavegur 12. Í hesum økinum

við Hornavegin á Stórutrød við Kirkjar í Miðvági eru annars grundstykkini, matr. nr. frá 220b heilt til matr. nr. 220n, sum øll upprunaliga hava hoyrt til festijørðina.

Í sambandi við at læknamiðstød skuldi byggjast á áðurnevnda øki, var á fundi 30. januar 1980 broyting gjørd í byggisamtyktini og býarskipanini. Økið á Stórutrød við Kirkjar, ið áður var lagt sum "B" sethúsaøki, varð broytt til "A", ið er miðstaðarøki, meðan omanfyri har varð til B sethúsaøki.

Harafturímóti var økið omanfyri ellisheimið, ið var lagt til "A" miðstaðarøki, har ætlanin eina tíð hevði verið at byggja læknamiðstøðina, nú broytt soleiðis, ovari partur bleiv "B" sethúsaøki.

Læknamiðstøðin var aftur til viðgerðar á fundi 27. februar 1980. Umframt bygdaráðið vóru á fundi, Georg Egholm, lækni og Kristin Ellefsen, verkfrøðingur. Samtykt varð at ogna sær økið norðanfyri hjá Emil Olsen, bónda, eigari er Føroya Jarðarráð. Uppskot frá arbeiðsnevndini varð góðtikið og varð økið, ið byggjast skuldi á um 517,5 m^2.

Henda stødd verður broytt til umleið 5000 m^2 á fundi 21. apríl sama ár. Á matrikulkortinum er støddin á samlaða grundøkinum hjá læknamiðstøðini nú á døgum, 5982 m^2, harav vegur 1057 m^2.

Samtykt varð eisini, at læknamiðstøðin skal sendast til detailprosjektering, tá semjan millum kommunurnar í Vágum um læknamálið verður góðkend av Føroya Landsstýri.

18. mars 1980 skrivar Føroya Landsstýri til Felagskommununa í Vágum v/Jón Joensen, formanni, Bøur: "Hervið skal vera sagt frá, at Landsstýrið hevur viðgjørt spurningin um læknamiðstød og læknaviðtaluhølir í Vágum. Samtykt varð:
1. At Landsstýrið góðtekur semjuna millum kommunurnar í Vágum.
2. At Landsstýrið kemur at lata 50% í studningi og 40% í láni til tann partin av Læknamiðstøðini í Miðvági, sum umfatar viðtaluhølir til læknar, jarðamøður, heimasjúkrasystur og heilsusystrar.
3. At viðtaluhølini í Sandavági og Sørvági verða avmarkað til: Viðtaluhøli uppá 15 m^2, bíðirúm v.m. uppá 13 m^2 og toilett uppá 4 m^2. Tilsamans 32 m^2. Mett verður, at byggikostnaðurin er 5.000 kr. pr. m^2. Til hesi viðtaluhøli vil Landsstýrið sostatt lata 50% í studningi og 40% í láni av í mesta lagi 160.000 kr. Landsstýrissamtyktin er løgd fyri læknafelagið, sum tekur undir við henni. Sostatt kann nýggja kommunulæknastarvið í Vágum, um kommunurnar í Vágum eisini kunnu góðkenna landsstýrissamtyktina, lýsast leyst beinanvegin. Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður (sign.)."

30. apríl 1980 varð skrivað til jarðaráðið, Tórshavn, har søkt varð um at keypa eitt øki stórt 5883 m^2 fyri 14 kr. m^2. Sama dag varð skrivað til Landsstýrið og søkt um loyvi at keypa nevnda øki. Økið er burtur av festinum hjá Emil Olsen, Miðvági.

Trøndur Fugløo, arkitektur, Geilin, Klaksvík, har Tummas Lauritsen hevur skrivað undir, skrivar hin 1. mai 1980 og sigur, at felagið metir kostnaðin av læknamiðstøðini til 5.500 kr. pr. m^2, og tá læknamiðstøðin er 539,6 m^2 stór, verður kostnaðurin 2,97 mió. kr.

Á fundi 3. juni 1980, har møttir vóru Hans Jørgensen, Ovi Poulsen og Martin Nielsen, var til viðgerðar keyp av øki til vegagerð til læknamiðstøðina frá Hans F. Hansen, á matr. nr. 93a. Samtykt varð at keypa 280 m^2 fyri 25 kr. m^2, tilsamans 7.000 kr. 19. juni 1980 verður sáttmáli undirskrivaður millum Miðvágs kommunu og Hans Frederik Hansen, Miðvági, um nevnda lendi til vegagerð í samband við bygging av læknamiðstød. Kvittan er viðløgd skjalinum fyri,

Mynd úr Sosialinum, 06.03.1982, tá arbeiðið var um at vera liðugt. Myndatekstur sigur: "Eftir er nú at leggja flag á og hampa uttan um."

at tær 7.000 kr. eru goldnar seljaranum. Sambært skrivi frá Matrikulstovuni, 19.2.1981, vórðu 274 m^2 av hesum nýtt til veg og smb. sama skjali hevði kommunan eisini ognað sær smá stykkir frá eigarunum omanfyri vegin, Johan Magnussen og Suna Gaardlykke. Viðmerkjast kann, at hetta er parturin av Hornavegið, sum gongur yvir til læknamiðstøðina.

Viðvíkjandi keypinum av økinum undir læknamiðstøðina so gekk tað ógvuliga seint fyri seg frá jarðaráðnum. Tí kommunan fekk ikki økið til ognar fyrr enn byggingin var næstan liðug. Men tað má so hava verið í samráð og við góðkenning frá jarðaráðnum. Har kann so eisini viðmerkjast, at Landsstýrið hevði góðtikið byggingina og staðsetingina.

Tað er so hin 2. mars 1981, at Føroya Jarðaráð, Tórshavn, loksins skrivar og vísir til umsóknina hjá kommununi frá 30. apríl 1980 um at keypa burtur av festinum hjá Emil Olsen í Miðvági. Boðið var tá 14 kr. m^2, men jarðaráðið hevur sett prísin til 19 kr. m^2, sum gevur 111.777 kr. Harfturat skal kommunan rinda 5.152,70 kr. fyri tinglesing, og samlaði sølukostnaðurin við tinglesing 116.929,70 kr. skulu rindast til Gjaldstovuna.

Hetta góðtók bygdaráðið, og hin 28. september 1981 varð skeytið skrivað. Um treytirnar stendur, at áðrenn 2 ár frá hesum degi skal læknamiðstøð verða bygd, og skal økið verða gyrt inni. Hevur eigarin eftir 2 árum ikki bygt og gyrt, sum her ávíst, fellur økið aftur til festið og jarðargrunnurin hevur onga skyldu at lata peningin aftur. Tað er heldur ikki loyvt keyparanum at selja stykki uttan, at treytirnar í hesum skjali eru loknar, stendur m.a. í skeytinum.

Skeytið er tinglýst hin 30. september 1981.

Prosjekteringsfundir viðvíkjandi læknamiðstøðini

Trøndur Fuglø, arkitektur, skrivar 14. mai 1980 og sigur, at til tess at prosjekteringsarbeiðið skal ganga so regluliga sum tilber, meta vit tað neyðugt at hava 4 regluligar prosjekteringsfundir fram til summarfrítíðina. Her kann tó sigast, at tað blivu bara til tveir.

Fyrsti prosjekteringsfundur varð hildin í Klaksvík hin 22. mai 1980 á teknistovuni hjá Trøndi Fuglø. Til staðar, vegna Miðvágs kommunu vóru, Hans Jørgensen, bygdarásformaður og Kristin Ellefsen, kommunuverkfrøðingur. Aðrir luttakarar vóru, Jógvan D. Jacobsen, verkfrøðingur, Oddbjørn Vágslíð, el-instalatørur, Martin Leo, VVS-verkfrøðingur, Trøndur Fuglø, arkitektur og Tummas Lauritsen, arkitektur.

Um støðuna var sagt, at grundleggjandi prosjekteringsarbeiðið var lokið. Allar funksjónir eru fastlagdar uttan skaðastova, ransóknarstova og fysioterapi. Semja var um, hvat tilfar skuldi nýtast í byggingini, og at gera eini hús, sum vóru bílig í rakstri. Her var serliga hugsað um umsiting, vasking og hita. Útgrevsturin kann byrja miðan juni 1980. Betongtekningar og útboðstilfar og kloakkprosjekt skal vera klárt til 1. august í ár. Prosjektið skal annars vera liðugt 1. september, stendur m.a. í fundarfrágreiðingini, sum annars er rímuliga detalierað.

Næsti prosjekteringsfundurin varð hildin í Tórshavn hin 16. juni 1980 á teknistovuni hjá

Læknamiðstøðin í Miðvági. Mynd: Sonni Jacobsen, 2022.

Brimheim & Leo, Tórshavn. Til staðar vóru allir teir somu, sum á fyrra fundinum, umframt Andor Ellefsen, lækni, sum møtti vegna Georg Egholm, kommunulækna í Vágum, sum var burturstaddur. Nú varð staðfest, at útgrevsturin kundi byrja umleið 23. juni. Gravkúgv til arbeiðið var á veg til Føroya og Jógvan D. Jacobsen upplýsti, at neyðugar tekningar vórðu lidnar til ta tíð. Kristin Ellefsen upplýsti, at ognarviðurskiftini vera greið samstundis. Hans Jørgensen og Martin Nielsen ynsktu almenna útbjóðing av betongarbeiði, stendur m.a. í fundarfrágreiðingini.

Í skrivi 3. juli 1980 er sagt, at kostnaðurin higartil av prosjekteringsarbeiðinum, sum skuldi verið við í fundarfrágreiðingini 16.6., er 276.750 kr.

Fígging av læknamiðstøðini og fleiri arbeiðir í senn

25. juli 1980 verður skrivað til Sjóvinnubankan, Steingrim Niclasen, stjóra, Tórshavn. Sambært avtalu skulu vit siga frá, at vit brúka og koma at brúka 115.000 kr. um vikuna so leingi arbeitt verður uppá bátahyl, veg á Prestlandinum og á Kirkjabø. Haruppí er roknað útgrevstur og planering til læknamiðstøðina, men ikki sjálv byggingin, sum væntandi fer í gongd um 1. september í ár. Fyri prosjektering v.m. til læknamiðstøðina koma vit at gjalda umleið 130.000 kr. – útyvir omanfyri nevndu upphædd áðrenn 1. september 1980. Tað vil siga, at brúkt verður 1.050.000 kr. til 1. september 1980 afturat tí, í dag er brúkt av kassakredittinum. Biðið verður tí um ein arbeiðskreditt uppá 2.000.000 kr., tá vit ikki rokna við at fáa nakran studning útgoldnan fyrr enn aftaná 1.9.1980.

3. september 1980 skrivar Landsstýrið og gevur kommununi loyvi til at taka 3,5 mió. kr. í láni til kassakreditt til fíggjan av ymsum arbeiðum: Bátahylur, vegagerðir, læknamiðstød, brimgarður, ítóttarhøll á Giljanesi, vatnleiðing og amboð.

Ríkisumboðsmaðurin skrivar hin 18. august 1980 og sigur, at fíggingin av Læknamiðstøðini í Miðvági, umframt læknaviðtaluhølum í Sørvági og Sandavági, er so gott sum loyst. Og ynskir ríkisumboðið nú at lýsa nr. 2 læknastarv í Vágum leyst at søkja. Viðlagt er uppskot til lýsing, har m.a. verður nevnt, at fasta kommunulæknalønin er 53.000 kr. um árið, umframt tilægg, sum geva 65.733 kr. í løn samlað um árið. Umframt viðgerð goldin av sjúkrakassa og privat praksis.

Felagsfundur var í Miðvági hin 19. august 1980. 16 kommunustýrislimir úr Vágum vóru møttir. Skriv var komið frá Landsstýrinum, dagfest 13. august 1980, har sagt verður frá, at

spurningurin um læknaviðtaluhølir uttanfyri ætlaðu læknamiðstøðina í Miðvági er viðgjørdur av nýggjum og er samtykt, at umframt verandi læknaviðtaluhøli í Sørvági, vil Landsstýrið eisini góðkenna, at eitt læknaviðtaluhøli verður innrættað í Sandavági.

Samtykt varð at svara, at kommunurnar taka við studningi og láni upp á 40 m² stødd. Tó vilja kommunurnar hava rætt til at byggja viðtaluhølini størri enn umtalaðu stødd. Henda samtykt er eisini treytað av, at Sørvágs kommuna fær studning og lán eftir somu treytum til ný- ella umbygging av læknaviðtaluni í Sørvági.

Arkitektavirkið Trøndur Fuglø, Tummas Lauritsen, arkitektur, skrivar hin 30. januar 1981 og hevur gjørt kostnaðarætlan fyri læknamiðstøðina og er hon 3.164.452 kr. Innbúgv mett til 300.000 kr. Prosjektering 329.103 kr. og eftirlit 79.111 kr. Tilsamans 3.872.666 kr.

Í skrivi 10. februar 1981 stendur viðmerkt, at jørð- og kloakkarbeiði, sum var sett til 444.000 kr. er minkað við 200.000 kr. við tað, at kommunan sjálv tók sær av jørðarbeiðinum. Sum so lækkar fyribils endaprísin til 3.672.666 kr.

20. februar 1981 skrivar Grannskoðaravirkið Pauli Ellefsen, Tórshavn, vegna kommununa, til Sjóvinnubankan og søkir um at fáa eitt lán stórt 3.872.666 kr. smb. viðlagdari kostnaðarætlan frá Trøndi Fuglø, arkitekti viðv. bygging av læknamiðstød í Miðvági. Har lækkingin á 200 tús. kr. ikki er tikin við. Viðlagt er tilsøgn frá landsstýrinum um 50% stuðul og 40% lánveiting til tann partin av læknamiðstøðini, sum umfatar viðtaluhøli til læknar, ljósmóður, heimasjúkrasystur og heilsusystrar.

Á bygdaráðsfundi 7. mai 1981 er til viðgerðar, at bygdaráðið hevur biðið um kassakredit frá Pf. Sjóvinnubankanum uppá 3.872.665 kr. til bygging av læknamiðstød, sum bankin hevur játtað. Samtykt varð at taka við hesi játtan. Bankin fær transport í studningi og játtaðum láni frá Føroya landsstýri.

Útbjóðing av betong og kloakkarbeiðinum

15. august 1980 er lýsing send til Dimmalætting, Dagblaðið, 14. September og Sosialin.

Útbjóðing

Fyri Miðvágs kommunu verða við hesum útboðin arbeiði uppá læknamiðstød. Útbjóðingin umfatar í hesum umfari: 1. Betongarbeiði. 2. Kloakkarbeiði, at bjóða hvør sær ella saman. Tilboðini verða upplatin í fundarhølinum hjá Miðvágs bygdaráð kl. 14 mánadagin 15. september. Tey bjóðandi kunnu vera hjástødd. Tilboð skulu sendast til, Trøndur Fuglø, arkitektur, postboks 1, Klaksvík.

Á fundi í bygdaráðnum 24. september 1980 var samtykt at lata Regin Poulsen, byggimeistara, Miðvági, gera betongarbeiði, og at kommunan sjálv skuldi standa fyri kloakkarbeiðinum.

Tilboð upp á arbeiðir viðv. læknamiðstøðini

12. desember 1980 skrivar arkitektavirkið Trøndur Fuglø Klaksvík, og siga frá, hvørji hava bjóða uppá ymisk arbeiði viðv. læknamiðstøðini í Miðvági.

1. Timbur- og snikkararbeiði.

Valdemar á Løgmansbø, Miðvági, 1.644.327 kr., Pf. Eysturoyarhúsið, Glyvrar, 1.485.879 kr., Martin Garðalíð, Jens Egholm og Sigbjørn G. Skúadal, Vestmanna, 1.359.050 kr., Regin Poulsen, Miðvági, 1.195.524,74 kr. og Johnfinn á Plógv, Miðvági, 949.335 kr.

Ráðgevingin heldur, at tilboðið hjá Johnfinn á Plógv er í so lágt og kann geva trupulleikar og mæla til at taka av tilboðnum hjá Regin Poulsen, sum teir tó halda er roknað nakað høgt, og meta at tað átti at verið 280 kr. m² og sostatt 1.169.803 kr. Sum mælt verður til at samráðast

um. Teir mæla eisini til, at betongarbeiðið og timbur- og snikkaraarbeiði verða gjørd av sama arbeiðstakara fyri at hava betur framdrift í arbeiðinum og at umganga ósemjur millum stóru arbeiðstakrarnar.

2. Múraraarbeiði

Pf. Eysturoyarhúsið, Glyvrar 164.654 kr., D.J. Niclasen, Miðvági 156.596 kr. og Jan E. Andersen, Klaksvík 119.835 kr. – Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum.

3. Málaraarbeiði

Martin Danielsen, Miðvági 327.280 kr., Anton Olsen, Tórshavn 113.250 kr., Arnbjørn Mortensen og Kristian Jensen, Tórshavn 112.787 kr., Andrias Jørgensen, Miðvági 101.903 kr., Mogens Skoradal, Saltnes 83.384 kr. og Jón Nystrøm, Klaksvík 79.082 kr.

Sagt verður at dýrasta tilboðið hevur roknivillu og er torført at samanmeta við hini tilboðini.

Tveir teir lægstu mangla at taka nøkur punkt við, sum máling av veggum og radiatorum, so teirra tilboð skuldu verið: Mogens Skoradal 97.310 kr. Og Jón Nystrøm 95.708 kr.

4. Gólválegging.

Ælabogin, Tórshavn 79.419 kr., Málingahandilin, Tórshavn 59.961 kr. og Andrias Jørgensen, Miðvági 58.358 kr.

Mælt verður til at taka við bíligasta tilboðnum. Og at fyrimunur kann vera av at geva Andrias Jørgensen málaraarbeiði eisini, tá beinast kann fyri ósemjum við at hava sama arbeiðstakara til hesi arbeiðir.

5. Bikksmíð.

Niels J. Arge Blikksmiðja, Klaksvík 97.851 kr., Leivur Nattestad, Miðvági 77.442 kr., Zacharias Leitisstein, Runavík 73.917 kr. og Pf. Wenzel Petersen, Tórshavn 49.883 kr.

Mælt verður til at taka upp samstarv við Zacharias Leitisstein, sum eru serfrøðingar í plátuarbeiðið, verður sagt. Og hildið er, at tað er nakað langt síðan at Pf. Wenzel Petersen hava gjørt slíkt arbeiði. Vegna Trøndur Fuglø, skrivar Tummas Laurisen undir.

16. desember 1980 skrivar Teknistovan Svenn Brimheim & Martin Leo, ráðgevandi verkfrøðingar, Tórshavn og siga frá, hvørji hava bjóðað uppá onnur arbeiði viðvíkjandi læknamiðstøðini í Miðvági.

6. Hitaverks- og sanitetsarbeiði.

Pf. Wenzel Petersen, Tórshavn 382.130 kr., Fa. K. Knudsen, Tórshavn 320.000 kr., Carl Jacobsen og Henry Poulsen, Tórshavn 273.582 kr. og Leivur Nattestad, Miðvági 265.070 kr.

7. Ventilatiónsarbeiði.

Zacharias Leitisstein, Runavík 189.942 kr., Leivur Nattestad, Miðvági 141.332 kr. og Fa. K. Knudsen, Tórshavn 120.000 kr.

Tilboðini eru kannað og mælt verður til at taka av lægstu tilboðunum.

Mótmæli móti broytingum í tilboðunum

Hin 4. februar 1981 skrivar Vága Handverksmeistarafelag, Magni Thomasen, til Miðvágs kommunu og sigur, at tvær klagur eru komnar inn í smb. við tilboð upp á byggiarbeiði við læknamiðstøðini í Miðvági, at broytingar eru gjørdar í tilboðunum. Á fundi sama dag varð samtykt at boða frá: "Sambært felagsins lóg er ikki loyvt at gera reguleringar í tilboðum."

Málið er fyri á bygdaráðsfundi 31. mars 1981, har sagt verður, at samtyktin hjá bygdarráðnum tann 29. desember 1980 um timbur- og snikkaraarbeiði á læknamiðstøðini verður broytt. Tilboðsupphæddin hjá Regin Poulsen, byggimeistara, sum varð lækkað úr 1.195.524,74 kr. niður í 1.169.803,90 kr., smb. tilráðing frá ráðgevingini, verður hækkað aftur til 1.195.524,74 kr., smb. uppruna tilboðnum. Og varð hetta samtykt.

Læknamiðstøðin í Miðvági. Mynd: Sonni Jacobsen, 2022.

Í fundarfrágreiðingini stendur annars, at Inna Nattestad mátti fara av fundi, og bað um at fáa málið útsett og at Frits Witt mótmælti samtyktini.

Á bygdaráðsfundi 6. apríl 1981 skilst, at tað Inna Nattestad vildi hava viðgjørt var, at kommunan í øllum førunum ikki hevði tikið við lægstað tilboð. Í gerðabókini stendur, at Inna Nattestad og Frits Witt vilja hava hetta fört í gerðabókina:

"Vit mótmæla mannagongdini í útbjóðingini av læknamiðstøðini. Vit halda, at øll tey lægstu tilboðini áttu at verið tikin, ella bert tilboð úr Miðvági. Formanninum verður álagt at biðja sakførara geva frágreiðing um, hvussu eitt góðtøkuskriv bindur í eini útbjóðing."

Tað má so snúgva seg um, at tikið var av tilboðnum hjá Regin Poulsen, Miðvági, sum varð 246.000 kr. hægri enn tað hjá Johnfinn á Plógv, Miðvági. Grundgevingin hjá ráðgevarunum var, at tað var fyrimunur at sama felag gjørdi bæði betong- og timburarbeiði. Og at mett varð, at tilboðið hjá Johnfinn á Plógv var í so lágt og kundi tað geva trupulleikar.

Annars var í einum øðrum føri eisini valt at lata Andrias Jørgensen, málarameista, Miðvági, fáa bæði málaraarbeiðið og gólváleggingararbeiðið, hóast at tvey tilboð um málaraarbeiðið vóru lægri enn hansara. Men aftur var hetta gjørt eftir tilráðing frá rágevunum um fyrimun við hesum í sambandi við arbeiðsgongdina, og at eftir útrokningum hjá ráðgevanum snúði tað seg bert um nakrar fáar túsund krónur í prísmuni.

Teir sum gjørdu læknamiðstøðina

Á fundi í bygdaráðnum 24. september 1980 var til viðgerðar tilráðing í smb. við útbjóðing av kloakk og jarnbetongarbeiði fyri læknamiðstød í Miðvági. Og hvør skuldi gera arbeiðini.

Betong og jarnbetongarbeiði
Regin Poulsen, byggimeistari, Miðvági, smb. tilboð 612.000 kr.
Kloakkarbeiði
Samtykt varð av bygdaráðnum, at kommunan sjálvt skuldi standa fyri kloakkarbeiðinum.
Sambært uppgerð, 30.01.1981, kostaði hetta 244.000 kr.

Á fundi á kommunuskrivstovuni í Miðvági, 29. desember 1980, var til viðgerðar at taka avgerð um hvørji tilboð kommunan skuldi taka við í sambandi við víðari byggingina av læknamiðstøðini í Miðvági. Allir bygdaráðslimirnir vóru møttir.

1. Timbur- og snikkaraarbeiði.
Regin Poulsen, byggimeistari, Miðvági, smb. tilboð 1.195.524,74 kr.
2. Múraraarbeiði.
Jan E. Andersen, Klaksvík, smb. tilboð 119.835,30 kr.
3. Málaraarbeiði.
Andrias Jørgensen, málarameistari, smb. tilboð 101.903,70 kr.
4. Gólváleggingararbeiði.
Andrias Jørgensen, málarameistari, smb. tilboð 58.358,90 kr.
5. Blikksmíð.
P/f Wensel Petersen, Tórshavn, smb. tilboð 49.883 kr.
6. Hitaverks- og sanitetsarbeiði.
Leivur Nattestad, rørleggjari, Miðvági, smb. tilboð 265.070 kr.
7. Ventilatiónsarbeiði.
Fa. Knudsen, Tórshavn, smb. tilboð 120.000 kr.
8. El-arbeiði.
Hans Arni Nielsen, el-innleggjari, Sandavági, smb. tilboð 216.870,74 kr.

7. januar 1981 verður skrivað til allar hesar nevndu arbeiðstakarar, at teir hava fingið arbeiðið.

Byggifundir í 1981 og '82 í smb. við bygging av læknamiðstøðini

Á bygdaráðsfundi 15. januar 1981 eftir at byggifundur 2 er hildin, vóru Hans Jørgensen, bygdaráðsformaður og Martin Nielsen, bygdaráðslimur, valdir sum bygginevnd fyri Læknamiðstøðina. Og hava sum soleiðis ábyrgd vegna kommununa fyri byggingini.

Tummas Lauritsen arbeiðir fyrstu tíðina í arbeiðinum fyri arkitektavirki Trøndur Fuglø, sum eftirlit við byggingini. Eftir at betongarbeiðið var liðugt summarið 1981, helt hann fram sum eftirlit við arbeiðinum, men frá egnum arkitektavirki.

Í skjølunum hjá kommununi finna vit avrit av 15 av 18 byggifundum, sum eftir øllum at døma skuldu vera hildnir í samband við byggingina av læknamiðstøðini í Miðvági. Nummar 1, 7 og 13 eru ikki funnir, har ivamál kundi verið um hesir tríggir fundir vóru hildnir í heila tikið.

Teir, sum vanliga luttóku á hesum fundum, um ikki allir hvørjaferð, vóru:
- Hans Jørgensen fm., bygginevndin fyri læknamiðstøðina. **HJ**
- Martin Nielsen, bygginevndin fyri læknamiðstøðina. **MN**
- Kristin Ellefsen, verkfrøðingur hjá kommununi. **KE**
- Tummas Lauritsen, arkitektur. **TL**
- Jógvan D. Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingur. **JDJ**
- Regin Poulsen, byggimeistari. RP
- Eivind Ole Jacobsen, arbeiðsformaður hjá RP. **EOJ**
- Andreas Jørgensen, málarameistari. **AJ**
- Leivur Nattestad, rørsmiður. **LN**
- Jan E. Andersen, múrarameistari. **JEA**

Byggifundur nr. 1. Avrit av byggifundi nr. 1 er ikki funnið.
Byggifundur nr. 2 hin 8. januar 1981. Á fundinum vóru HJ, MN, KE, RP, JDJ og TL.
Í frágreiðingini frá arbeiðinum verður sagt, at manningin var 1 formaður, sum í betongarbeiðinum var Eivind Ole Jacobsen, Sørvági, 2 timburmenn og 1 arbeiðsmaður. Amboðini vóru, 1 blandimaskina, 1 stampari og 1 lessimaskina.

Læknamiðstøðin í Miðvági. Mynd: Sonni Jacobsen, 2022.

Arbeiðsstøða: Súlufundament í linju 1 og 2 eru stoypt. Uppfylling um hesi er liðug. Forskalling av rundfundamentum byrjað.

Byggifundur nr. 3 hin 22. januar 1981. Á fundinum vóru, HJ, KE, RP, JDJ.
Frágreiðing frá arbeiðinum. Manning, 1 formaður, 3 timburmenn og 2 arbeiðsmenn.
Amboð: 1 blandimaskina, 1 stampari og 1 lessimaskina. Arbeiðsstøða: Forskalling av rundfundamentinum er liðug. Uppfylling undir floyi B um at vera liðug (95%).

Byggifundur nr. 4 hin 5. februar 1981. Á fundinum vóru, KE, RP, EOJ og JDJ. Frágreiðing frá arbeiðinum. Manning, 1 formaður, 3 timburmenn og 2 arbeiðsmenn. Amboð: 1 blandimaskina.

Arbeiðsstøða: Stoyping av fundamentum undir kjallara liðug. Forskalling og armering av kjallaraveggum í gerð. Allar stoyptar súlur eru liðugt armeraðar.

Byggifundur nr. 5 hin 20. februar 1981. Á fundinum vóru, HJ, KE, RP, EOJ, JDJ og TL. Frágreiðing frá arbeiðinum. Manning, 1 formaður, 3 timburmenn og 3 arbeiðsmenn. Amboð: 1 blandimaskina.

Arbeiðsstøða: Grovbetong, fundament og súlufundament 90%. Jarnbetong, veggir, galvar 70%.

Byggifundur nr. 6 hin 31. mars 1981. Á fundinum vóru, HJ, KE, RP og JDJ.
Frágreiðing frá arbeiðinum. Manning, 1 formaður, 3 timburmenn og 3 arbeiðsmenn. Amboð: Blandimaskina, kompressari og stoypivognur.

Arbeiðsstøða: Grovbetong, fundament og súlufundament 90%. Jarnbetong, veggir, galvar 100%. Element eru komin á byggiplássið.

Byggifundur nr. 7. Næsti byggifundur skuldi vera 9. apríl, men smb. áskrivt "samb. avtalu seinni". Avrit av hesum fundi, byggifundur nr. 7 er ikki funnið.

Byggifundur nr. 8 hin 4. juni 1981. Á fundinum vóru, HJ, MN, RP, TL og JDJ.
Frágreiðing frá arbeiðinum. Manning, 1 formaður, 4 timburmenn og 1 arbeiðsmaður. Amboð: Eingi størri amboð.

Arbeiðstøða: Betongarbeiðið er liðugt. Arbeiðsætlan: At byrja timburarbeiðið.

Byggifundur nr. 9 hin 15. juni 1981. Á fundinum vóru, HJ, KE, RP, AJ, HAN, LN og TL.
Fundurin viðgjørdi ikki betongarbeiði, men frammanfyri standandi arbeiðir og tíðarætlan fyri teimum. Uppskot um tíðarætlan varð lagt fram av eftirlitinum.

Viðmerkingar frá fundarluttakarunum vóru, at um flag skal koma á til tíðina, má kommunan ávísa øki til grevstur. Hans Jørgensen upplýsti at hetta var avgreitt.

Læknamiðstøðin í Miðvági. Parkeringskjallari. Mynd: Sonni Jacobsen, 2022.

Liðugtgerð av hurðum og listum má leingjast til viku 47. Tíðarætlanin var góðkend av fundinum og send teimum, sum ikki vóru við á fundinum: JEA, Wenzel Petersen og K. Knudsen.

Semja var um ikki at áseta regluligan byggifund men at hava slíkan, tá eftirlitið metir tað neyðugt. Andrias Jørgensen ger greitt, at tá lagt er á gólvið í einum rúmið er tað at rokna sum liðugt. Tann, ið fer inn í rúmið eftir hetta má reinsa upp eftir sær sjálvum. Hetta var góðtikið.

Byggifundur nr. 10 hin 3. august 1981. Á fundinum vóru, HJ, MN, KE, RP og TL.

Manning: 1 meistari, 2 sveinar, 2 lærlingar, 2 arbeiðsmenn.

Arbeiðsstøða: Bindingsverk 95%. Bjálki og súlur komin á byggiplássið. Plátur á útvegg 100%. Útlekting til loddrættan klædning 100%. Útlektir til vatnrættan klædning 100%. Loddrættur klædningur 80%. Vatnrættur klædningur komin á byggiplássi.

Arbeiðsætlan: Tá límbjálki er uppkomin kunnu sperrur reisast lidnar. Verður gjørt í viku 33. Tróðurplátur koma í viku 33.

Sambært tíðarætlan skal húsið verða innilokað seinast í viku 27. Sostatt er hetta seinkað í 4 vikur. Sum orsøk til hetta verður sagt, at sperrur eru seinkaðar vegna feil í útrokning hjá leverandøri. Límtræ umbiðið fyri 8 vikum síðan er ikki komið enn pr. 3. aug.

Avgjørt varð at seta dagbøtur yvirfyri Regin Poulsen fyri 20 arbeiðsdagar á 500 kr., sum er minimumsupphædd. Dagbøturnar verða settar á konto og útloystar um tíðarmunurin verður innvunnin aftur.

Byggifundur nr. 11 hin 7. oktober 1981. Á fundinum vóru, HJ, MN, KE, RP, JEA, LN, HAN, AJ og TL.

Tíðarætlan. Miðað verður ímóti at hava arbeiðið liðugt til jóla, sum ætlað. Tó so at størri dentur verður lagdur á innandurarbeiði enn uttan. Nýggj "samanstúgva" tíðarætlan var framløgd. Smærri justeringar vóru avtalaðar á staðnum. Tað var semja um, at byggningsarbeiði og innstalatiónir fylgjast. Mest gongur samanstúgvaða tíðarætlanin yvir arbeiðstíð málarans. Semja var um at síggja tíðina ann hesum viðvíkjandi.

Arbeiðsstøða: Í suður- og millumfloyi er bygnigsarbeiði, loftsklæðing, gólv og hurðar og goymdar instalatiónir komnar undir land. Gólv í suðurfloyi eru um at vera liðug. Gólv í norðurfloyi liðug hesa vikuna. Fari verður beinanvegin í holt við beinagrind til skilarúm. Tá trappa og veggir eru liðug, verður farið undir gólvpuss. El og hiti verða gjørd so hvørt veggir koma upp. Innandura máling byrjar í viku 43.

Byggifundur nr. 12 hin 21. oktober 1981. Á fundinum vóru, HJ, KE, Georg Egholm, kommunulækni, EOJ, JEA, LN, HAN, AJ og TL.

Arbeiðsstøða: Tilfar til loft og listar mangla, annars er mest listar og liðugtgerð eftir. Gólv verður lagt á, tá tilfar kemur í viku 45. Bjálving verður løgd. Læknin biður um samtaluanlegg. Rør verða løgd í veggirnar til tað.

Byggifundur nr. 13. Skuldi vera 2. november 1981, men fundarfrágreiðingin er ikki funnin.

Byggifundur nr. 14 hin 17. november 1981. Á fundinum vóru, MN, KE, RP, AJ, LN og JEA.

Arbeiðsstøða: Burtursæð frá gólvi í fysioterapideild eru tað mest at kalla liðugtgerð, ið eftir eru, t.d. listar, innhurðar o.t. Tó eru eingi ljósarmatur sett upp enn vegna fraktskaða. Øll ventilatiónsarmatur vænta og flestu kanalirnar eru ikki uppsettar. So hvørt væntandi instalatiónir verða gjørdar verða veggirnir málaðir. Biðið verður um, at ringastu holini í tilkoyringini verða fylt.

Leki hevur verið í bíðirúminum, hesin er afturgjørdur. Til tess at umganga fleiri slíkar skaðar, nú takið skal liggja uttan flag til vár, verður mælt til, at Regin Poulsen smyr asfaltlím fram við yvirkanti á øllum langsgangandi skoytistrimlum og annars har útsett er fyri leka. Hetta er neyðugt at gera, so skjótt ein turrur dagur er.

Byggifundur nr. 15 hin 1. desember 1981. Á fundinum, HJ, MN, KE, RP, AJ, LN og JEA.

Arbeiðsstøða: Av innandura arbeiði er hetta eftir: Montering av ventilasjónsarmaturum, ventilatisjónsagregati og nakað av kanalum. Tað mesta av ljósarmaturum. Innhurðar, nakað av listum, einstakir veggir, loft sum ikki er komið. Gólválegging og máling av teimum veggjum ið enn ikki eru settir upp.

Uttandura manglar at leggja flag á og annað takarbeiði, harundir besløg. Liðugtgerð av lendisarbeiði og kloakk. Og uttanduraljós.

Miðað verður ímóti, at gera alt innandura arbeiði liðugt í viku 50, gólválegging og fótlistar tó í viku 51.

Byggifundur nr. 16 hin 15. desember 1981. Á fundinum, HJ, MN, RP, AJ, LN og HAN.

Arbeiðsstøða: Eftir at gera eru innhurðar at seta í, geriktir um innhurðar, einstakir listar, hillar og smáputl hjá timburmanni. Uml. 50% av ljósarmaturunum og uttanduraljós. Uml. 15% av flisaarbeiði og gólvpussi. Uml. 7% av máling, 15% av gólválegging. Umframt aðrir smálutir at gera liðugt.

Sagt verður, at grundin til, at innhurðarnar ikki vóru settar í, var at tær vóru ikki komnar og væntaðust í viku 52. Og verða tær væntandi settar í til jóla.

Byggifundur nr. 17 hin 12. januar 1982. Á fundinum HJ, MN, KE, RP, AJ, HANog JEA.

Arbeiðsstøða: Eftir at gera var nakað av endaligum timburarbeiði og sýn. Loft har tilfar vantar og nakað av listum har nakað av tilfari ikki er komið enn. Múraraarbeiðið verður liðugt í dag og málaraarbeiðið verður liðugt hesa vikuna.

Viðvíkjandi hita og sanitet manglaði rørbjálving í fýrrúminum. Við ventilasjónini manglaði uppseting av aggregati. Miðað verður ímóti, at allir handverkarar eru úti í viku 3, og at reingerð byrjar tá. Loftið verður bjálvað í vikuni.

Byggifundur nr. 18 hin 2. februar 1982. Á fundinum vóru MN, RP, AJ, LN, HAN og TL.

Arbeiðsstøða: Smávegis snikkaraarbeiði har tilfar framvegis manglar. Tak á duri verður gjørt liðugt so skjótt tilfar er komið. Bíða verður við teppigólvum til seinastu løtu.

Ymiskt: Vask, sum lógu í sjúkrasystrarúmið vóru heil leygardag 30.1. Mánadag seinnapart var eitt teirra brotið. Eingin sigur seg hava brotið.

Út frá skjølunum síggja vit, at byggingin var ikki heilt liðug enn. 18. februar 1982 sendur Oddbjørn Vágslíð, elektrik-instalatørur, Miðvágs kommunu, Kristin Ellefsen, verkfrøðingi, skitsu yvir íbinding av automatikki til ventilatiónsverkið.

24. apríl 1982 hevur Tummas Lauritsen, arkitektur, vegna eftirlitið, 9 viðmerkingar til Regin Poulsen og Andrias Jørgensen, arbeiðstakarar, um nøkur smærri men umráðandi brek,

sum t.d. fótpanel gloppar, pakningur manglar í hurð, hondtak vantar á einari hurð og ein brotin rútur. Greitt er, at alt skal vera perfekt. Í málingini eru onkrir smærri plettir funnir, har ikki dekkar nóg væl, ein hurð skal málast reyð og nøkur vindeygu skulu málast einaferð enn. Hetta og annað skal verða gjørt innan endan av apríl. Uttandura verður sagt, at tetting millum grund og timbur og liðugtgerð av tekju verður gjørt liðugt sum skjótast.

Kostnaðurin av læknamiðstøðini

Sambært roknskapinum hjá Miðvágs kommunu 1980/81 hevði kommunan í fíggjarárinum brúkt 820.818 kr. upp á læknamiðstøðina. Hetta var í høvuðsheitum til útgrevstur, vegagerð og kloakkarbeiði, sum kommunan sjálv stóð fyri, og vegna umbønir um fyribils acontugjald frá arbeiðstakarunum, meðan víðari arbeiðið fór fram.

Og sambært roknskapinum hjá kommununi 1981/82 hevur kommunan í tí roknskaparárinum brúkt 3.100.921 kr. Hetta er í samband við øll byggiarbeiðini við læknamiðstøðini.

16. november 1981 verður skrivað til Føroya Landsstýri, Tórshavn, og søkt um at fáa útgoldið 50% av stuðulsgevandi partinum av útreiðslunum sum lán og 40% av útreiðslunum sum stuðul. Ella eitt fyribils aconto gjald, sum hevði komið væl við hjá kommununi nú. Sagt verður eisini, at kostnaðarætlanin, sum varð send landsstýrinum, tá farið varð undir byggingina, fer at halda so nøkulunda, tá vit taka tær vanligu hækkingarnar við. Ætlandi verður bygningurin liðugur til tann 1. januar 1982. – Sum tó varð ein góðan mánað seinni.

Í tryggingarskjalinum 9. desember 1981 stendur m.a., at bygningurin er í 2 hæddum, gjørdur úr timbur og betong og taktur við flagi, 521 m² til støddar og verður tryggjaður fyri 2,7 mió. kr. Árligt tryggingargjald er 18.900 kr.

Uppgerð pr. 31. desember 1982 yvir byggikostnað av læknamiðstøðini

Tekstur	**Kr.**	**Tilboð**	**Arbeiðstakarar**
Prosjektering	356.311		Fuglø / Brimheim & Leo
Eftirlit	146.123		Tummas Lauritsen / Trøndur Fuglø
Jørð, veg og kloakkarb.	819.569		Miðvágs kommuna
Betongarbeiði	693.339	612.000	Regin Poulsen
Timburarbeiði	1.618.136	1.195.524	Regin Poulsen
Múraraarbeiði	160.712	119.835	Jan E. Andersen
Hiti og sanitet	323.780	265.070	Leivur Nattestad
Ventilasjón	144.863	120.000	K. Knudsen
Blikksmíð	69.699	49.883	Pf. Wenzel Petersen
El-arbeiði	224.161	216.870	Hans Arne Nielsen
Máling og gólv	266.075*	160.263	Andrias Jørgensen (* við eykaarb.)
Innbúgv	515.517		Ymiskir veitarar
Tilsamans	5.338.286		
Grundøki	140.368		Føroya Jarðaráð o.a.
Ymiskar útreiðslur	51.598		
Tilsamans	5.530.252		
Meirkostnaður, eykaarbeiðir o.a.			
El-arbeiði	40.000		Hans Arne Nielsen
Kloakk, vegur, vatn	63.000		Miðvágs kommuna
Alt í alt	**5.633.252**		

25. november 1983 skrivar Føroya Landsstýri, Tórshavn. Landsstýrið hevur nú móttikið meting av læknamiðstøðini í Miðvági, og samsvarar metingin til tær av bygdaráðnum upp-

Læknamiðstøðin í Miðvági. Mynd: Sonni Jacobsen, 2022.

givnu byggiútreiðslur, 5.633.252 kr. Bygningurin er tilsamans 515,7 m² og av hesum eru høli til sosialráðgeva, fysioterapi og frálæru, og w.c. og goymsla í hesum sambandi tilsamans 106,26 m². Bygdaráðið verður biðið um, áðrenn landsstýrið tekur endaliga støðu til umsóknina um lán og studning, at senda landsstýrinum yvirlit yvir hvussu stórur partur av bygninginum er ætlaður til læknar, heilsu- og heimasjúkrasystrar og ljósmøður og hvussu stórur partur av felagshølum skal roknast við stuðulsgevandi partin.

8. desember 1983 verður skrivað til Landsstýrið og sendur við útgreinaður listi yvir útreiðslur, sum kommunan metir eru stuðulsgevandi í byggingini av læknamiðstøðini. Samlaða talið fyri hetta varð roknað saman til 4.090.848 kr.

Landsstýrið, Páll Vang, landsstýrismaður, skrivar aftur hin 10. januar 1984, og sigur, at Landsstýrið hevur samtykt at veita kommununi 4.932.508 kr. í studningi og láni til bygging av læknamiðstøðini í Miðvági á henda hátt: Studningur 50%: 2.466.254 kr. Lán 40% 1.973.003 kr. Tils. 4.439.257 kr.

Áður hevur kommunan fingið a-conto stuðul á 1,5 mió. kr., og sostatt eru 966.254 kr. eftir at gjalda av studninginum. Orsakað av at peningur ikki er tøkur í grunninum til byggjan av læknamiðstøðum, ber ikki til í hesum fíggjarárinum at rinda lánið á 1.973.003 kr.

Sambært skrivum í 1984 og 1985 varð lánið latið á tann hátt, at kommunan fekk 1 mió. kr. í láni í 1984 og restina 973.003 kr. í 1985. Skuldarbrævið fyri seinna lánið er undirskrivað hin 1. mai 1985. Við hesum hevði kommunan loksins fingið alla fíggingina landið hevði lovað kommununi í sambandi við byggingina av læknamiðstøðini í Miðvági.

Ein annar minni partur av fíggingini av læknamiðstøðini var, at læknahúsini í Miðvági, hin 18. februar 1983, vóru seld fyri 350.000 kr. Sambært samtykt á felagsfundi fall hesin peningur til læknamiðstøðina í Miðvági.

Út frá øllum hesum kunnu vit staðfesta, at læknamiðstøðin varð bygd fyri 5.633.252 kr. Beinleiðis studningur frá landinum var 2.466.254 kr. og søla av læknahúsunum 350.000 kr. Inntøka tilsamans 2.816.254 kr. Sostatt var parturin hjá Miðvágs kommunu fyri Læknamiðstøðina 2.816.998 kr. Ella gott 50%.

Innbúgv til læknamiðstøðina

5. desember 1981 skrivar Tummas Lauritsen, arkitektur, vegna kommununa, til ymsar fyritøkur, Sandavágs Timburhandil, Pf. Faroedane & Co., Trórsh., Nýggi bókhandil, Tórsh., K. Hansen, Klaksvík, BSV, Tórsh. Innbjóðing at geva tilboð uppá innbúgv til læknamiðstød í

Miðvági. Við liggur so ein langur listi av innventari, sum samlað tilboð skal gevast upp á. Tað er m.a. skrivstovuinnbúgv av alskyns slag, møblarnir av træ skulu vera ljóst eik, verður sagt. Skrivstovuborð, skuffukassar, vinkulborð, skrivstovustólar, arkivskkáp, heingimappur, reolir, sofabólkar, rund borð, spæliborð, smá borð, stólar, blómukassar, ruskíløt, papírskurvar, reingerðingsvognar, dustsúgvari, køksskáp o.a. Og so eisini ein rúgva av læknatólum, sum helst óneyðugt er at nevna.

Á bygdaráðsfundi 1. februar 1982 eru innkomnu tilboðini til viðgerðar. Viðvíkjandi keypi av innbúgvi var, sambært tilráðing frá arkitekti, samtykt at taka av tilboð frá P/f Farodane & Co. uppá tilsamans 156.105 kr.

Viðvíkjandi keypi av læknaútgerð v.m. var, sambært tilráðing frá arkitekti, samtykt at taka av tilboð frá Nyrop & Måge, og Simonsen & Wells uppá tils. 119.995 kr. Afturat hesum kemur tollur og frakt. Harafturat varð samtykt at bíleggja samtaluannlegg frá Marstein fyri tilsamans 40.475 kr., at taka av tilboð frá Hugna uppá gardinur fyri 25.651 kr., at keypa annað fyri umleið 15.000 kr. og harafturat eitt útrykningssett fyri 5.000 kr. og eitt blóðkanningartól fyri 30.000 kr.

Hetta var so tað fyrsta, sum var keypt inn til læknamiðstøðina. Við frakt, tolli, mvg og øðrum umleið 420.000 kr. tilsamans.

Læknamiðstøðin vígd og tikin í brúk

Sagt verður at læknamiðstøðin var tikin í brúk hin 17. mai 1982. Tað varð tó nakrar dagar seinni, sunnudagin 30. mai 1982, at læknamiðstøðin varð vígd. Henda dag eru dagfestar rokningar fyri veitsluhald í smb. við vígslu. Har vígslan hevur verið á læknamiðstøðini um dagin og veitsla aftaná á Hotel Vágum. Hotel Vágar, matur og høli, 11.905 kr. Annað 5.076,43 kr. Í alt 16.981,45 kr.

Í grein í Sosialinum hósdagin 3. juni 1982 sigur Hans Jørgensen, bygdaráðsformaður, við blaðið, at tey eru væl nøgd við læknamiðstøðina, sum nú er tikin í brúk. Hann nevnir m.a., at báðir kommunulæknarnir hava innivist har og teir eru báðir at hitta har tveir dagar um vikuna. Jarðarmóðurin er um at flyta inn og sjúkrasysturin, sum skal setast í Vágum, skal eisini vera í læknamiðstøðini. Har er eisini pláss fyri sosialráðgeva og fysioterapi. Skaðastova og kanningarstova er eisini.

Garantisýn av læknamiðstøðini

Hin 24. juni 1983 var Garantisýn av læknamiðstøðini. Til staðar fyri byggiharran vóru: Hans Jørgensen, fm., MK, Martin Nielsen, MK, sum báðir eisini vóru bygginevndin hjá kommununi fyri læknamiðstøðina. Kristin Ellefsen, kommunuverkfrøðingur, MK, Tummas Lauritsen, arkitektur, eftirlitið. Fyri arbeiðstakaran: Regin Poulsen. Sýnið góðkendi bygningin við teirri viðmerking, at nakrar fáir smáir manglar vóru ávístir, sum skuldu gerast so veðhaldið, sum stóð á konto í bankanum, kundi verða endurgoldið arbeiðstakaranum.

Raksturin av læknamiðstøðini

Her skal ikki verða viðgjørd í smálutum øll søgan hjá læknamiðstøðini, eftir at hon var liðugt bygd. Tað gekk sína vanligu gong á slíkum stað, um ein so kann siga. Men okkurt skal tó nevnast.

Reingerð

Ein av føstu postunum í roknskapinum hjá læknamiðstøðini er reingerð. Útreiðslurnar fyri vasking av læknamiðstøðini vóru 50.400 fyrsta árið, sum var 1982/83. Hækkar í 1983/84 til 62.000 kr. og í 1984/85 til 71.000 kr. Árini 1986 til 1992 er ein jøvn hækkan frá 75.000 kr. í

1986 til 102.000 kr. í 1992. Árini 1993 til 1998 liggur kostnaðurin um 120.000 kr. um árið, sum í 1999 hækkar til um 140.000 og liggur síðan fram til 2007 um 175.000 kr. um árið og í 2008, 181.000 kr. Øll árini var í miðal 90% lønarútreiðslur og 10% arbeiðstilfar.

Í gerðabókini fyri almennan bygdaráðsfund, 22. juni 2000, stendur, at skrivarin Georg H. Hansen hevur gjørt eitt uppskot um arbeiðstíðir í samráð við umsjónarmannin og starvsfólk á læknamiðstøðini. Fíggjarnevndin viðmælir uppskotinum. Samtykt varð at leggja uppskotið fyri arbeiðsmannafelagið og vaskikonuna.

Martha Joensen. Sambært frásøgn byrjaði Martha Joensen sum vaskikona á Læknamiðstøðini hin 17. mai 1982 fyri tímaløn. Hon hevði áður verið vaskikona á viðtaluni í gomlu læknahúsunum í Miðvági, sum nú varð stongd og helt soleiðis áfram á læknamiðstøðini. Á bygdaráðsfundi 20. desember 1982 varð samtykt at geva Marthu fasta mánaðarløn sambært útgreinaða ætlan, sum fylgir við málinum. Arbeiðstíðin verður normerað til 16 tímar um vikuna býtt yvir mánadag, týsdag, mikudag og fríggjadag. Lønin verður ásett smb. vanliga tímaløn. Lønin verður goldin henni einaferð um mánaðan. Um hon tekur sær hjálp skal hon sjálv løna hesum og annars hava ábyrgd av, at alt fer fram á ein hátt, sum er neyðugt á eini slíkari stød.

Sambært yvirliti yvir reingerð á læknamiðstøðini so høvdu hesi gjørt reint fíggjarárið 1983/83, Martha Joensen og Brynhild Joensen. Umframt Hanna Maria Niclasen, stutta tíð.

Á bygdaráðsfundi 10. januar 1983 varð samtykt, at reingerðin av læknamiðstøðini verður viðgjørt av nýggjum og avgjørt var, at samráðast við Marthu Joensen um hetta.

Sambært frásøgn so hjálpti Brynhild Joensen, Marthu í nøkur ár og seinni hjálpti Petrea Jacobsen Marthu við at vaska miðstøðina.

Martha hevði starvið sum føst vaskikona á læknamiðstøðini fram til 1995.

Hanna Maria Niclasen. Á almennum bygdaráðsfundi 9. november 1995 er til viðgerðar setan av nýggjari vaskikonu á læknamiðstøðini í Miðvági. Samtykt varð at seta Hannu Mariu Niclassen at vaska alla læknamiðstøðina.

Hanna Maria var dóttir fyrru vaskikonuna og sigur í samrøðu, at hon hevði ofta áður hjálpt mammuni at vaska á læknamiðstøðini, so tað var ikki nýtt fyri hana. Tá Hanna Maria byrjaði, hevði Jóhannus, umsjónarmaðurin, sagt við hana, at hon var so ung, og hon hevði gingið her síðan húsið opnaði og kendi hvønn krók og dugdi alt uttanat, so hann helt, at tey skuldu senda eina umsókn inn. Tey fingu so orðað eina umsókn at senda inn, og hon fekk starvið at vaska alla miðstøðina. Arbeiðið at vaska er vaksið nógv gjøgnum árini, sigur Hanna Maria. Fyrstu árini vóru viðhvørt ein ella tveir læknar og ikki hvønn dag og ein sjúkrarøktarfrøðingur. Og tey brúktu ikki øll rúmini. Har eru annars 32 rúm, sum nú altíð eru í brúki. Nú eru fast tveir læknar og stundum tríggir, umframt, at har er psykiatri, fysioterapi, kostráðgevi, jarðamóðir, barnaheilsusjúkrarøktarfrøðingur og læknasjúkrarøktarfrøðingur. So har er nógv at fara um.

Fríggjadagin, 7. november 2020, handaði Eyðdis Harmann Niclasen, borgarstjóri í Vága kommunu, Hannu Mariu blómur og gávubrøv í smb. við 25. ára dagin 9. november.

Hallgerð Olsen. Eftir at virksemið á læknamiðstøðini vaks munandi og síðan at læknaviðtalurnar í Sørvági og í Sandavági stongdu, vaks arbeiðið nógv við at vaska á læknamiðstøðini so tað bleiv ov nógv fyri bert eina vaskinkonu. Tí bleiv ein sett afturat í 2016, og er tað Hallgerð Olsen, Miðvági. Hon byrjaði í starvinum hin 4. september 2016 og var hon framvegis í starvi í 2020.

Viðlíkahald

Á almennum bygdarradsfundi 30. mai 1988 var samtykt at bjóða út málaraarbeiði av Læknamiðstøðini millum málarameistarar í Miðvági. 11. juli 1988 er málið aftur fyri á fundi. Tvey tilboð vóru innkomin. Samtykt var at Martin Danielsen fær arbeiðið fyri 45.435 kr.

Á almennum bygdaráðsfundi 7. september 1995 er tilboð uppá at mála læknamiðstøðina innkomið, eftir at arbeiðið er boðið út. Samtykt varð at taka av tilboðnum frá Tórhalli Johansen uppá 61.250 Kr.

10 ár seinni 6. september 2005 er á almennum bygdaráðsfundi nevnt, at umsjónarmaðurin, Per Olesen, biður um loyvi at mála læknamiðstøðina. Mettur kostnaður uml. 30.000 kr. Tekniska nevnd og fíggjarnevndin viðmæltu, og bygdaráðið samtykti at játtað 30.000 kr. til arbeiðið.

Á almennum bygdaráðsfundi 30. september 2008 stendur, at umsjónarmaðurin søkir um at fáa nýggjan køk til læknamiðstøðina. 3 tilboð fyriliggja. Samtykt varð at taka av tilboðnum frá HTH uppá 56.000 kr.

Posturin "viðlíkahald" er bert nevndur í roknskapinum tey fyrstu árini. Fyrsta árið er tað 17.000 kr., næsta árið einkið og triða árið 14.200. kr. og fjórða árið, 1985, er tað 53.400 kr. og í 1986 einki. Frá 1987 fellur hesin postur burtur við tað, at umsjónarmaður verður settur hetta árið.

Umsjónarmenn

Fyrstu ferð nevnt sæst í skjølunum um at seta ein umsjónarmann við læknamiðstøðina er á fundi í mentanarnevndini hin 30. september 1985. Í gerðbókini hjá nevndini stendur, at Mentanarnevndin heitir á bygdaráðið um, at umsjónarmaður verður settur við skúlan. Samtykt var, at hesin eisini kann hava umsjón við læknamiðstøðini, fornminninum o.s.fr.

4. mars 1987 er dagfest Reglugerð fyri umsjónarmann við kommunalar bygningar v.m. Í reglugerðini, sum er í gott 2 A4 síður, stendur m.a., at umsjónarmaðurin skal vera førur fyri at átaka sær, duga at skipa fyri og leiða alt viðlíkahaldsarbeiði og allan rakstur av teimum virkisøkjum, honum eru litin til. Arbeiðsøkið umfatar: Barnaskúlin, Gamli skúli, Læknamiðstøðin við parkeringsøki, kommunuskrivstovan, viðalundin á Tungu, Kálvalíð, Beitishúsini og gróthús á Ryggi. Viðlíkahald fremur hann sjálvur. Til størri umvælingar kann hann útvega neyðuga hjálp. Hann stendur fyri innkeypi av øllum neyðugum tilfari, stendur m.a. í relugerðini, og at hann er fastløntur eftir sáttmála við Miðvágs kommunu.

Jóhannus Niclasen umsjónarmaður. Umsjónarmaður frá 1987 til 2004. Á almennum bygdarráðsfundi 29. juni 1987 var til viðgerðar 11 innkomnar umsóknir sum umsjónarmaður við kommunalar bygningar o.a. Aftaná skrivliga atkvøðugreiðslu var samtykt, at seta Jóhannus Niclasen í starvið.

30. juni 1987 verður skrivað til Jóhannus Niclasen, Eiriksmørk, Miðvági, og sagt frá áðurnevndu avgerð, og at starvið verður sett frá 1. august 1987. Tygum fáa nærri at vita um lønarspurningin og arbeiðsøki við at seta tygum í samband við bygdaráðsformannin. Vinarliga Miðvágs bygdaráð, Martin Nielsen (sign.)

Frá 1988 verður ein partur av løn hansara goldin av kontoini fyri læknamiðstøðina. Árliga

samsýningin til umsjónarmann vegna læknamiðstøðina árini 1988 til 2000 lá í miðal um 62.000 kr., sum í 2001 hækkar til 70.600 kr. og frá 2002 liggur í miðal um 105.000 kr. um árið.

Á almennum bygdaráðsfundi 24. august 2004 er til viðgerðar, at umsjónarmaðurin hevur sagt seg úr starvi frá 1. oktober 2004. Samtykt var at søkja eftir nýggjum umsjónarmanni.

Per Olesen umsjónarmaður. Á bygdaráðsfundi 21. september 2004 var setan av umsjónarmanni við kommunalar bygningar hjá Miðvágs kommunu til viðgerðar. 23 umsóknir vóru innkomnar. Trivnaðarnevndin mælti til at velja millum teir fimm, sum høvdu fingið flest atkvøður við atkvøðugreiðslu í bygdaráðnum. Samtykt varð at seta ein setanarbólk við trimum bygdaráðslimum, sum skuldi hava setanarsamrøðu við hesar fimm hvør sær.

Málið er fyri aftur á almennum bygdaráðsfundi 30. september 2004, har sagt verður, at setanarnevndin hevði havt samrøðu við seks av umsøkjarunum. Út frá hesum varð samtykt at seta Per Olesen í starvið. Hann var so í starvinum øll árini Miðvágs kommuna var virkin, sum var til 31. desember 2008.

Jon Hansen varumsjónarmaður. Á bygdaráðsfundi 24. apríl 2007 er til viðgerðar, at umsjónarmaðurin mælir til, at søkt verðir eftir einum umsjónarmanni afturat. Samtykt at søkja eftir einum hjálparfólki til umsjónarmannin. Málið er aftur til viðgerðar á fundi 7. juni 2007. Aftur her hevði ein setanarbólkur verið, og hann mælti til at seta Jon Hansen. Hetta varð samtykt av bygdaráðnum.

Hølini í læknamiðstøðini

Á bygdaráðsfundi 3. februar 1984 er lagt fram, at bygdaráðslimirnir eru uttanfyri fund vorðnir samdir um at áseta útleiguprísin í læknamiðstøðini til 500 kr. pr. m^2.

Tey høli, sum vóru felags, var raksturin goldin av øllum kommununum í Vágum í felag. Har fyrsta býti roknskaparárið 1982/83 hevði hetta býtið, býtt eftir fólkatalinum í kommununum. - Fyrsta árið var felags útreiðslan 164.027,49 kr. og varð býtt soleiðis:

Sørvágs kommuna	37,4 %	61.346 kr.	Miðvágs kommuna	33,8 %	55.441 -.
Sandavágs kommuna	25,8 %	42.319 -.	Bíggjar kommuna	2,0 %	3.280 -.
Mykinesar kommuna	1,0 %	1.640 -.			

Hetta hevur verið nøkulunda prosentbýtið øll árini upp til 2006, við smærri broytingum út frá fólkatalinum. Í 2007 fór Miðvágs kommuna frammum við 37,1 % og Sørvágs kommuna 35%. Í 2008 eru somu tøl ávikavist 37,3% mótvegis 35%. Sandavágs kommuna lá um 25% øll árini, men fór í 2007 og 2008 upp á 27,5%. Frá 2004 rindaðu Bíggjar- og Mykinesar kommunur einki, tær løgdu um hetta mundið saman við Sørvágs kommunu.

Aðrar útreiðslur, sum ikki hava verið felags, hevur Miðvágs kommuna so goldið og fingið partvíst endurgoldið við leiguinntøkum. Sum dømi kann nevnast, at felags útreiðslan hjá Miðvágs kommunu fíggjarárið 1982/83 var 55.441 kr., men samlaða útreiðslan av læknamiðstøðini hetta fíggjarárið hjá Miðvágs kommunu var 108.560 kr.

Læknar á læknamiðstøðini

Fyrstu læknarnir vóru **Georg Egholm** og **Elisabeth Thorsteinsson**. Sum vit hava lisið, so setti Landsstýrið tað sum eitt krav, at læknamiðstøð varð bygd í Vágum, um Vágar skuldu fáa ein lækna afturat. Hesin læknin bleiv so Elisabeth Thorsteinsson.

Marius Dam gjørdist kommunulækni í 1992, tá Georg Egolm gavst.

Anders Vedelsbøl byrjaði sum avloysari í 2014, og varð settur kommunulækni í Vágum

í 2015, eftir at Elisabeth gavst í 2014. Anders Vedelsbøl andaðist bráddliga hin 8. apríl 2020, bert 47 ára gamal.

Høli til Heimahjálpina

5. mars 1984 er leigusáttmáli undirskrivaður millum Miðvágs kommunu, sum eigari og Føroya Landsstýri vegna Heimahjálpina sum leigari, um leigu av rúmi stórt 15 m². Leigumálið byrjar 1.2.1984 og kann uppsigast av báðum pørtum við 6 mánaða varningi til tann 1. í einum mánað. Leigan er 750 kr. um mánaðin. Skrivað undir vegna kommununa hevur Hans Jørgensen og vegna Landsstýrið Eilif Samuelsen / Jóngerð Purkhús.

Høli til kiropraktor

5. mars 1984 er leigusáttmáli undirskrivaður millum Miðvágs kommunu sum eigari og Annu Mariu Svabo Jørgensen sum leigari, um leigu av rúmi stórt 15 m². Leigumálið byrjar 1.2.1984 og kann uppsigast av báðum pørtum við 6 mánaða varningi til tann 1. í einum mánað. Leigan er 750 kr. um mánaðin. Skrivað undir vegna kommununa hevur, Hans Jørgensen, bygdaráðsformaður og vegna leigaran Anna Maria Svabo Jørgensen.

Høli til Heimatænastuna

Á almennum bygdaráðsfundi 22. mai 2007 var til viðgerðar leigusáttmáli millum Miðvágs kommunu sum eigara og Almanna- og Heilsumálaráðið vegna Heimatænastuna sum leigara um høli á læknamiðstøðini. Sáttmálin varð samtyktur av bygdaráðnum.

Netto útreiðsla hjá Miðvágs kommunu av Læknamiðstøðini 1982 - 2008

Ár	Kr.	Ár	Kr.	Ár	Kr.
1982/83	108.560	1991	151.003	2000	293.424
1983/84	70.387	1992	123.623	2001	179.600
1984/85	150.874	1993	41.588	2002	294.242
1985 1.4.-31.12.	154.000	1994	143.033	2003	158.710
1986	106.593	1995	203.591	2004	287.265
1987	103.061	1996	138.333	2005	274.303
1988	131.124	1997	127.922	2006	517.725
1989	112.811	1998	248.677	2007	408.767
1990	120.235	1999	142.333	2008	436.411

Leiguinntøka

Fyrsta árið 1984/85 er leiguinntøkan 30.000 kr., fer so í 1986 niður á 24.000 kr. men í 1987 upp aftur á knapt 30.000 kr. liggur so fram til 1990 í miðal um 26.000 kr. um árið. Í 1991 er hon 11.250 kr. og minkar so niður til knapt 10.000 kr. í 1992. Frá 1993 til 2007 er hon um 9.000 kr. um árið. Í 2008 er nýggjur leigari komin inn, og inntøkan hækkar til 47.325 kr.

Endurgjald frá hinum kommununum

Árini 1982/83 til 1987 er upphæddin í miðal 110.000 kr. um árið. Men hækkar so hampuliga nógv árini 1988 til 2002 til í miðal 170.000 kr. um árið. Og frá 2003 til 2008 um 250.000 kr. í miðal um árið.

Heilsudepilin í Vágum

1.1. 2009 tekur Vága kommuna við. Í 2015 hendir tann broytingin, at heitið hjá deplinum skiftir frá læknamiðstøð til Heilsudepil. Á heimasíðuni hjá Vága kommunu stendur:

Tiltak á læknamiðstøðini í 2015 í smb. við at læknamiðstøðin varð góðkend sum sokallað "Heilsumiðstøð" fyri Vágar av Kartin Hansen, landsstýrismanni. Starvsfólk, bygda- og býráðslimir vóru møttir, umframt onnur áhugað. Mitt fyri síggjast Rósa Samuelsen borgarstjóri í Vága kommunu, Sune Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu og Kartin Hansn, landsstýrismaður.

"Tann 22. juli 2015 bleiv Heilsudepilin í Vágum góðkendur av Kartin Hansen, landsstýrismanni í Heilsumálum. Á Heilsudeplinum verður dentur lagdur á at veita og menna heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tilboð, kanningar, veitingar og ráðgeving til borgaran.

Ætlanin er, at stórur partur av heilsuveitingunum til borgarar við varandi sjúkum og eldri, skal kunna fara fram á Heilsudeplinum.

Í Diabetesheildarætlanini fyri Føroyar verður lýst hvussu diabetesviðgerðin hjá hesum sjúklingabólki kann skipast í framtíðini – og hvussu uppgávubýtið kann verða millum sjúkrahús og heilsudeplar.

Á Heilsudeplinum í Vágum starvast kommunulæknar, Heimatænastan, sjúkrarøktarfrøðingar, økispsykiatri, Gigni, kostráðgevi, sálarfrøðingur, fysioterapeutur og ljósmóðir."

Frá høgru: Marius Dam, lækni og Anders Vedelsbøl, lækni. Annars starvsfólk, bygdaráðslimir o.o.

Sune Jacobsen, Rósa Samuelsen og Kartin Hansen, uttanfyri Heilsumiðstøðina, eftir at avtlaan er undirskrivað 22. juli 2015.

Frá 1. januar 2019 vóru læknaviðtalurnar í Sandavági og Sørvági latnar aftur. Og eftir hetta varð bert viðtala á Heilsudeplinum í Vágum. Høvuðsgrundgevingin var, at viðtalurnar í Sandavági og Sørvági vóru ikki tíðarhóskandi og høvdu heldur ikki so nógva vitjan longur.

Sigast skal tó, at í samskifti við depulin, so nevna tey seg framvegis "Læknamiðstøðin". Og tað havi eg so valt at halda meg til.

Keldur

Gerðabøkur, roknskaparbøkur og skjøl hjá Miðvág kommunu.
Gerðabøkur og skjøl hjá Felagskommununi í Vágum.
Sosialurin, 3. juni 1982
Hanna Maria Niclasen
Hallgerð Olsen
Georg H. Hansen

Landbúnaður

Hetta er ikki ætlað sum ein søga um jarðaviðurskiftini í Miðvági sum heild, men ávísan av ymsum skjølum um jarðarviðurskifti í Miðvági, sum eru at finna í arkivinum hjá gomlu Miðvágs kommunu, og endurgevan av onkrum áhugaverdum úr onkrum av teimum, og so ein roynd at greiða eitt sindur frá júst hesum skjølunum.

Í partinum um landbúnað í Miðvági verða umframt onnur mál í høvuðsheitum viðgjørd:

- *Uppgerðir yvir eplavelting 1937 – 1987.*
- *Uppgerðir yvir seyðatal 1941 – 1993 í teim ymsu hagunum í Miðvági.*
- *Uppgerðir yvir neytatal 1954 til 1987.*
- *Jarðaeigarar í Miðvági 1917-18 og um skattamerkur og jarðarskatt*
- *Jarðaeigarar í Miðvági 1987*

Uppgerðirnar eru teljingar, sum kommunan skuldi lata inn til landsmyndugleikarnar á hvørjum ári, smb. lóg og kunngerðir um innsavnan av hagtølum.

Eftir 1987 eru eingir listar yvir eplavelting og neytatal, so tá er helst givist við at uppgeva tað við tað, at lítið og einki varð velt í mun til áður, og neyt vóru ikki so vanlig húsdjór longur.

Ull- og eplateljing í Miðvági í 1918

26. oktober 1918 skrivar Vága sýsla og sigur, at í smb. við kommunulógina frá 1872 verður forstandarskapið biðið um at upplýsa 1) hvussu nógv ull er í Miðvágs sóknar kommunu. 2) Frá hvørjum árgangum henda ull stavar. 3) Hvussu nógva ull verður mett, at ein hevur brúk fyri. Nevndu upplýsingar verða bidnir sendir innan 1. desember 1918.

25. november 1918 verður svarð skrivað til Carl Mortensen, sýslumann, Sørvági. Eftir teimum upplýsingum, vit hava fingið eru 1737 kg. av ull frá hesum árinum og einki frá árinum fyri. Til ber ikki við vissu at siga um ársforbrúkið er størri enn núverandi nøgdin, men um ein gongur út frá, at miðal forbrúkið er 10 kg. pr. individ, skuldi eitt ársforbrúk verið 5300 kg. Ein má ganga út frá, at longu er nógv brúkt av avkastinum í ár. Vegna forstandarskapið, Rasmus Niclasen fm.

Frá 1918 er eisini ein uppgerð yvir nøgdina av eplum í Miðvágs sókn hetta árið. Talið av eplaeigarum er 58. Nøgdin av eplum er 44,5 tunnur + 75,5 sekkir. Hetta sýnist at vera goymslan av eplum í bygdini, tá teljingin varð framd. Er uppgivið í tunnum og sekkjum. Júst hvussu nógv ein sekkur svaraði til í mun til eina tunnu er óvist, tí er samlaða talið av báðum nevnt. Miðalin fyri eplir av hesum 58 uppgivnu persónum var 0,75 tunna og 1,3 sekkur. Har tey flestu lógu um hálva aðru tunnu, eina tunnu ella hálva tunnu og so ein ella tveir sekkir afturat til hvønn triðing. Ein hevði væl meira enn hini, tað var Harald Joensen, sum hevði 4 tunnur av eplum.

Árini undir og eftir fyrra heimsbardaga eru fleiri skjøl at finna um teljingar av ymsum vørum hjá handlunum í bygdini og privatum m.a. smør, mjøl, kjøt og petroleum, í smb. við vørumangul og skamtan hesi árini.

Landbúnaðarteljing í 1924

25. november 1924 var á fundi í forstandarskapinum, heima hjá Sørini Danielsen formanni, til viðgerðar komnar skemaðir til landbúnaðarteljingar. Samtykt var at býta teljingina soleiðis: Hans Niklái Niclasen og Klæmint Haraldsen skuldu gera teljingina fyri Húsagarð. Sámal Ellefsen og Jógvan Pauli Ellefsen, Kirkjar, Jansagerði og Eirikstoft, og Sørin Danielsen, Rygg og Tormansbakka. Teljingin skuldi gerast soleiðis, at man fór inn í hvørt hús fyri at fáa uppgivið frá hvørjum persóni, verður sagt í gerðabókini.

2. desember 1924 verður skrivað til sýslumannin fyri Vága sýslu, Sørvági, og sagt, at vit tænastuliga senda aftur útfyltar skemaðir um landbúnaðarteljing í Føroyum. Viðmerkjast skal at økini í m^2 ikki kunnu sigast við vissu, tá man ikki hevur jørð sína nágreiniliga uppmálda. Vit fingu tey uppgivin í "sátulendir" og roknaðu tað út harfrá. Byrðar av hoyggi, tunnur av eplum, korni og rótum var fyri størsta partin uppgivið eftir meting, við tað at fólk ikki nágreiniliga uppmála ella viga teirra grøði. Mjólk og egg var tað bert eftir hvat fólk kundu gita seg til, við tað at tey allarflestu ikki vistu hvussu nógv tey høvdu fingið, við tað at kanningar av slíkum ikki eru nógv brúktar her.

Avrit av sjálvum listunum eru ikki funnin, men hetta sigur so, at hetta árið vóru slíkar teljingar gjørdar í Miðvági. Um slíkar teljingar eisini vórðu gjørdar í t.d. Sørvági, er óvist, har er so einki skrásett um tað. Men tað má tað helst hava verið kortini, og hinum bygdunum við.

Kunngerðir um hagtøl fyri Føroyar í 1937 og í 1950

26. mai 1937 skrivar Amtið, at smb. kunngerð um hagtøl fyri Føroyar frá 9. januar 1936, skulu uppgerðir yvir eplaveltig og seyðateljing fremjast. Til hetta verða skemaðir sendar, sum forstandarskapið skal fylla út og senda inn til sýslumannin innan endan av november á hvørjum árið. Sýslumaðurin kannar skemaðirnar og rættar møguligar feilir og sendir tilfarið inn til Amtið innan februar komandi ár.

Hóast hesa kunngerð so eru fyri árini 1937 til 1940 ongi avrit av listum ella skemaðum funnar í skjalasavninum hjá kommununi fyri seyðateljingar, men fyri eplavelting er ein listi funnin frá 1937 og so listar frá 1941. Hetta gevur so ábending um, at listar helst eru sendir kortini.

Hin 18. desember 1950 kemur nýggj kunngerð, kunngerð nr. 80 og 81 um hagtøl yvir eplaveltig og seyðateljing, sum kommunurnar innan ávikavist 1. desember og 1. januar skulu senda inn til sýslumannin, førdar á oyðubløð gjørd til endamálið. Tað er so eftir hesari kunngerð tað seinni verður arbeitt eftir.

Prestjørðin í Miðvág útleigað

Hin 21. september 1939 skrivar Landbrugsraadet paa Færøerne (Jarðaráðið) og sigur, at hervið verður sagt frá, at prestagarðsjørðin í Miðvági, 13 ½ mørk, frá 1. januar 1939 at rokna er útleigað til hesar persónar.

Eina mørk hvør:

Bærent Wang, Daniel P. Niclasen, Joen Peter Wang, Ole Hans Poulsen, Joen Samuelsen, Johannes Johannesen, Peter Johannesen, Jens Samuelsen, Thomas Thomassen, Samuel J. Thomsen og Kristen Rasmussen.

Hálvmørk hvør:

Samuel Ellingsgaard, Jacob Oliver G. Thomasen, Joen Pauli Ellefsen, Samuel Ellefsen, Peter Salomon Hansen, Samuel Johansen og Sigmund Frederiksen.

Viðmerkt verður, at tað áliggur leigarunum av prestjørðini, eins og øðrum festarum (kongsbøndur) at rinda allar skattir og gjøld, sum fella á nevndu jørð.

Sundurbýti av jørð

Kommunurnar høvdu eisini ymiskt annað viðv. jørð at fáast við. Eitt, sum helst eigur at verða nevnt er, at kommunurnar skuldu viðmæla øll sundurbýti av jørð í kommununi. Hetta er smb. lóg frá 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., har álagt varð matrikulstovuni at gera fullfíggjaða matrikulering av øllum føstum ognum í Føroyum.

Á fundi í bygdaráðnum 3. februar 1967 viðgerð kommunustýrið í Miðvági fyrstu ferð eina umbøn frá Matrikulstovuni um ummæli av einum sundurbýti í Miðvági. Hetta vórðu eftir tað og eru framvegis mál, sum regluliga verða viðgjørd á kommunustýrisfundum. Í gerðabókini fyri nevnda fundin stendur: "Matrikulstovan, ummæli til sundurbýti av matr. nr. 97a, Meinhard Hansen, Miðvági. Sóknarstýrið hevði einki at viðmerkja."

Grundin til at kommunurnar skulu viðmæla er helst fyri at tryggja, at sundurbýti ella grundirnar til sundurbýti ikki koma í vegin fyri ella eru í stríð við býarætlan ella aðrar ætlanir í kommununi, og annars eru í smb. við lógir og fyriskipanir v.m. Tað kemur eisini fyri, at sundurbýtið verður noktað út frá júst slíkum grundgevingum, sæst í gerðabókunum.

Eplavelting

Tøl yvir eplavelting í Miðvági árini 1937 – 1987 (t = tunnur)

Ár	Veltarar	Sett niður	Velt lendið	Tikið upp	Fold
1937	124	317 t	120.460 m²	1.578,5 t	4,97
1941	127	391 t	137.143 m²	1.643 t	4,20
1942	127	340 t	118.455 m²	970 t	2,62
1943	126	316 t	99.975 m²	1.176 t	3,72
1945	126	336,25 t	101.100 m²	1.160 t	3,44
1948	117	261,75 t	118.561 m²	947 t	3,61
1949	119	258,25 t	128.829 m²	934,5 t	3,61
1950	117	252,25 t	111.514 m²	385 t	1,52
1952	126	279 t	140.000 m²	812 t	2,91
1954	135	274,5 t	137.490 m²	1.266 t	4,61
1956	141	267 t	133.500 m²	1.432 t	5,36
1959	143	244,5 t	121.750 m²	809 t	3,30
1960	145	294 t	147.000 m²	1.523,5 t	5,18
1961	134	257,75 t	128.825 m²	1.084,5 t	4,20
1962	138	241,5 t	120.750 m²	1.253 t	5,18
1963	139	270 t	135.250 m²	1.433,5 t	5,30
1964	143	252 t	127.000 m²	974 t	3,86
1965	135	220,5 t	110.250 m²	1.018,5 t	4,61
1966	123	219 t	109.500 m²	1.259,5 t	5,75
1967	142	236,5 t	118.250 m²	1.134,5 t	4,79
1969	125	194 t	97.000 m²	890 t	4,58
1971	137	194,75 t	97.375 m²	929 t	4,77
1972	123	173,5 t	86.750 m²	723 t	4,16
1973	112	161,5 t	80.750 m²	619 t	3,83
1974	73	106,25 t	53.125 m²	601,5 t	5,66
1975	107	162,75 t	81.375 m²	692 t	4,25
1976	141	205,5 t	102.750 m²	995 t	4,84

1977	127	190,75 t	95.375 m²	1.343 t	7,04
1978	136	164,5 t	- -	861,5 t	5,23
1979	118	157,5 t	- -	477 t	3,02
1980	136	164,5 t	- -	861,5 t	5,23
1981	74	83 t	- -	459 t	5,53
1982	101	120 t	- -	648,5 t	5,40
1983	106	123 t	- -	633 t	5,14
1984	90	98,5 t	- -	697,5 t	7,08
1985	82	86,5 t	10.304 m².	539,25 t	6,23
1986	81	81 t	11.755 m².	530,5 t	6,54
1987	87	73,75 t	- -	370 t	5,01

1987 er seinasta árið tøl fyri eplavelting eru at finna. Har einki er nevnt eru eingir upplýsingar. Foldini eru sett inn afturat til hetta høvið.

Fyri 1941, 1954, 1956, 1961, 1978, 1979, 1980, 1981 og 1984 til 1987 eru listar, har allir eplaveltarar eru nevndir við navni og við viðkomandi tølum.

Seyðateljingar
1941 – 1993

Ár har einki er nevnt, eru eingir listar funnir.

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1941

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	156	130	120	110	164
Heimanhús á Fjøllum	185	242	128	116	195
Kvígandalur	236	250	169	177	228
Tjørndalsegg	157	182	143	116	184
Norðara Leitið	230	312	176	174	230
Heimara Leitið	256	300	190	176	260
Eggin	78	104	73	50	100
Nýpan	200	236	150	148	195
Dalurin "Opgivelse nægtet"	- -	-		-	-

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1942

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	160	106	120	93	160
Heimanhús á Fjøllum	186	160	148	139	195
Kvígandalur	220	224	165	140	232
Tjørndalsegg	171	165	143	124	171
Norðara Leitið	220	284	154	154	220
Heimara Leitið	255	360	207	181	261
Eggin	90	86	80	66	100
Nýpan	190	200	140	130	190
Dalurin	180	190	120	95	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1943

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	156	173	112	102	166
Heimanhús á Fjøllum	183	248	136	113	195
Kvígandalur	218	256	162	150	230
Tjørndalsegg	174	207	126	128	177
Norðara Leitið	214	284	140	150	220
Heimara Leitið	235	250	172	160	247
Eggin	87	180	70	57	100
Nýpan	195	200	130	124	196
Dalurin	180	200	90	95	195

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1944

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	148	100	91	69	170
Heimanhús á Fjøllum	185	192	122	105	195
Kvígandalur	222	260	185	177	230
Tjørndalsegg	173	167	165	153	177
Norðara Leitið	215	250	160	145	223
Heimara Leitið	230	280	210	191	249
Eggin	92	112	84	76	100
Nýpan	180	200	144	124	200
Dalurin	160	168	130	96	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1945

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	136	150	90	76	158
Heimanhús á Fjøllum	186	207	146	130	200
Kvígandalur	222	256	169	161	230
Tjørndalsegg	177	210	142	147	177
Norðara Leitið	214	260	161	152	222
Heimara Leitið	238	336	181	160	259
Eggin	90	100	74	61	100
Nýpan	184	158	135	116	185
Dalurin	170	166	110	90	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1946

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	160	150	130	84	170
Heimanhús á Fjøllum	200	300	180	168	200
Kvígandalur	234	290	195	176	236
Tjørndalsegg	174	168	171	153	177
Norðara Leitið	214	270	165	150	225
Heimara Leitið	245	216	197	178	265
Eggin	90	96	84	65	100
Nýpan	172	175	135	104	185
Dalurin	170	160	130	104	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1947

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	150	50	66	45	171
Heimanhús á Fjøllum	170	70	75	57	180
Kvígandalur	225	70	156	136	225
Tjørndalsegg	150	72	140	87	166
Norðara Leitið	206	140	127	100	216
Heimara Leitið	235	196	155	126	264
Eggin	80	46	72	52	85
Nýpan	165	150	120	92	180
Dalurin	180	168	130	103	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1948

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	160	120	125	88	175
Heimanhús á Fjøllum	175	200	145	121	190
Kvígandalur	220	256	167	152	235
Tjørndalsegg	164	192	110	105	164
Norðara Leitið	208	240	155	122	222
Heimara Leitið	237	272	172	149	260
Eggin	80	96	52	38	90
Nýpan	180	150	110	80	180
Dalurin	170	138	100	78	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1949

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	170	96	100	68	175
Heimanhús á Fjøllum	190	130	114	207	190
Kvígandalur	230	224	153	146	234
Tjørndalsegg	160	120	130	81	170
Norðara Leitið	220	264	160	140	225
Heimara Leitið	230	251	192	161	250
Eggin	85	80	58	46	85
Nýpan	170	144	105	79	175
Dalurin	165	168	100	73	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1952

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	215	133	160	145	223
Heimanhús á Fjøllum	150	90	110	83	160
Kvígandalur	215	131	160	145	223
Tjørndalsegg	160	160	118	80	166
Norðara Leitið	216	210	144	136	224
Heimara Leitið	225	242	170	149	240
Eggin	86	64	56	40	84
Nýpan	150	120	100	79	160
Dalurin	150	110	65	48	160

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1954

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	165	200	125	108	172
Heimanhús á Fjøllum	165		138	116	178
Kvígandalur	212	192	178	158	226
Tjørndalsegg	150		120	15 á m.	162
Norðara Leitið	218	310	180	171	226
Heimara Leitið	250		189	175	256
Eggin	84	66	68	58	94
Nýpan	164	144	122	106	175
Dalurin	160	177	115	87	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1956

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	168	217	130	126	172
Heimanhús á Fjøllum	185	256	155	141	195
Kvígandalur	230		208	204	230
Tjørndalsegg	168	168	164	158	168
Norðara Leitið	225	358	190	188	225
Heimara Leitið	251	448	245	232	270
Eggin	80	96	72	60	91
Nýpan	178	216	142	136	176
Dalurin	160	190	120	108	175

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1959

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	167	190	130	120	175
Heimanhús á Fjøllum	188	189	163	154	197
Kvígandalur	226	200	178	174	220
Tjørndalsegg	142	193	132	115	158
Norðara Leitið	220	288	188	182	224
Heimara Leitið	263	359	228	221	270
Eggin	94	95	84	80	98
Nýpan	170	188	143	137	174
Dalurin	160	144	110	86	160

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1960

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	172	180	170	167	175
Heimanhús á Fjøllum	195	228	167	175	185
Kvígandalur	227	276	208	204	280
Tjørndalsegg	154	220	140	132	162
Norðara Leitið	226	308	186	181	227
Heimara Leitið	273	252	179	175	273
Eggin	95	96	76	81	92
Nýpan	168	212	152	144	175
Dalurin	150	168	120	93	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1961

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	173	190	169	164	177
Heimanhús á Fjøllum	190	200	160	144	190
Kvígandalur	228	270	192	190	226
Tjørndalsegg	152	198	140	128	162
Norðara Leitið	225	359	184	179	226
Heimara Leitið	271	544	243	238	276
Eggin	92	100	94	89	93
Nýpan	175	308	170	168	176
Dalurin	165	280	138	124	175

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1962

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	150	70	110	93	167
Heimanhús á Fjøllum	150	70	100	87	157
Kvígandalur	200	140	140	122	220
Tjørndalsegg	138	126	100	84	154
Norðara Leitið	204	215	140	125	216
Heimara Leitið	250	320	172	144	265
Eggin	92	96	75	64	88
Nýpan	150	116	112	100	160
Dalurin	120	140	90	61	140

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1963

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	160	185	119	105	174
Heimanhús á Fjøllum	155	128	117	90	171
Kvígandalur	215	192	173	158	226
Tjørndalsegg	156	149	122	116	162
Norðara Leitið	210	286	159	147	219
Heimara Leitið	262	320	198	192	266
Eggin	90	96	74	72	90
Nýpan	156	162	112	100	162
Dalurin	138	191	100	75	160

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1964

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	168	250	138	127	178
Heimanhús á Fjøllum	166	256	145	139	172
Kvígandalur	226	300	176	170	230
Tjørndalsegg	158	257	138	130	166
Norðara Leitið	214	308	169	159	222
Heimara Leitið	264	366	212	204	268
Eggin	93	96	74	64	90
Nýpan	155	190	120	114	161
Dalurin	168	236	120	185	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1965

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	169	180	137	134	172
Heimanhús á Fjøllum	170	192	141	135	176
Kvígandalur	225	268	195	184	229
Tjørndalsegg	156	210	130	118	168
Norðara Leitið	216	307	176	166	223
Heimara Leitið	266	390	201	201	265
Eggin	85	96	80	73	92
Nýpan	150	217	120	113	165
Dalurin	164	212	120	97	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1967

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	171	160	105	103	173
Heimanhús á Fjøllum	172	160	124	121	175
Kvígandalur	223	270	175	158	227
Tjørndalsegg	159	120	105	97	166
Norðara Leitið	220	260	171	163	225
Heimara Leitið	269	390	210	208	271
Eggin	90	48	67	65	92
Nýpan	156	167	115	100	170
Dalurin	154	237	108	88	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1968

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	150	152	102	86	166
Heimanhús á Fjøllum	157	152	121	98	180
Kvígandalur	214	170	170	148	222
Tjørndalsegg	145	102	113	98	160
Norðara Leitið	219	239	162	160	225
Heimara Leitið	261	390	228	214	225
Eggin	88	152	75	73	90
Nýpan	152	170	105	88	170
Dalurin	149	190	110	87	165

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1969

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	160	185	117	110	167
Heimanhús á Fjøllum	175	185	120	117	178
Kvígandalur	217	265	173	159	224
Tjørndalsegg	156	116	133	125	164
Norðara Leitið	228	264	127	168	224
Heimara Leitið	264	390	221	221	264
Eggin	88	96	72	65	93
Nýpan	160	164	110	94	172
Dalurin	158	188	110	87	170

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1970

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	156	125	112	96	172
Heimanhús á Fjøllum	170	150	92	92	170
Kvígandalur	212	90	145	130	220
Tjørndalsegg	152	102	98	86	164
Norðara Leitið	216	214	156	145	224
Heimara Leitið	246	380	195	183	258
Eggin	85	100	64	60	89
Nýpan	154	120	93	78	167
Dalurin	155	200	110	86	165

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1971

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	252	380	184	178	258
Heimanhús á Fjøllum	170	220	122	115	177
Kvígandalur	216	320	160	150	220
Tjørndalsegg	152	153	117	105	164
Norðara Leitið	220	264	167	161	224
Heimara Leitið	165	217	113	104	174
Eggin	80	80	72	60	92
Nýpan	154	164	105	195	164
Dalurin	150	222	120	97	168

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1972

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	170	217	125	118	177
Heimanhús á Fjøllum	175	217	128	127	184 *
Kvígandalur	216	320	195	188	216
Tjørndalsegg	163	162	119	120	162
Norðara Leitið	212	334	164	154	219
Heimara Leitið	246	400	202	202	248
Eggin	78	168	64	78	78 **
Nýpan	150	212	106	88	168
Dalurin	164	168	125	78	175

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1973

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	175	200	128	121	182
Heimanhús á Fjøllum	178	200	130	120	188
Kvígandalur	216	330	203	196	216
Tjørndalsegg	161	180	109	106	164
Norðara Leitið	212	308	174	166	219
Heimara Leitið	250	448	196	190	257
Eggin	73	90	65	49	89
Nýpan	160	210	117	103	172
Dalurin	170	255	115	78	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1974

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	178	282	141	138	181
Heimanhús á Fjøllum	179	230	151	140	189
Kvígandalur	214	370	205	196	216
Tjørndalsegg	158	140	141	136	162
Norðara Leitið	212	312	173	161	222
Heimara Leitið	250	448	201	191	260
Eggin	83	136	66	57	91
Nýpan	167	260	130	120	177
Dalurin	170	280	130	126	178

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1975

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	170	300	144	136	178
Heimanhús á Fjøllum	184	290	161	157	186
Kvígandalur	210	360	183	170	216
Tjørndalsegg	161	144	142	140	162
Norðara Leitið	218	362	179	173	222
Heimara Leitið	253	392	219	211	261
Eggin	90	136	72	53	92
Nýpan	170	230	130	122	178
Dalurin	168	260	140	138	180

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1976

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	168	280	150	140	178
Heimanhús á Fjøllum	185	292	168	167	186
Kvígandalur	214	375	184	182	216
Tjørndalsegg	161	134	135	130	166
Norðara Leitið	218	315	178	170	222
Heimara Leitið	254	390	215	207	255
Eggin	83	140	70	61	92
Nýpan	170	220	118	110	178
Dalurin	164	250	130	118	176

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1977

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	171	240	148	140	179
Heimanhús á Fjøllum	184	250	165	165	184
Kvígandalur	216	300	183	183	217
Tjørndalsegg	164	128	141	141	164
Norðara Leitið	217	313	172	165	222
Heimara Leitið	246	410	224	214	254
Eggin	77	140	81	61	98
Nýpan	165	240	124	114	175
Dalurin	166	240	139	122	177

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1978

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	175	265	148	145	178
Heimanhús á Fjøllum	182	230	160	155	185
Kvígandalur	208	112	183	168	216
Tjørndalsegg	158	158	134	127	165
Norðara Leitið	216	268	181	172	222
Heimara Leitið	240	400	204	190	254
Eggin	83	140	81	63	161
Nýpan	140	145	120	100	160
Dalurin	168	240	148	136	176

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1979

Haganavn	Nøgd royting		Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	117	70	60	26	151	
Heimanhús á Fjøllum	152	80	58	28	176	
Kvígandalur	195	180	85	45 *	217 **	
Tjørndalsegg	115	40	40	25	130	
Norðara Leitið	198	152	118	100	215	
Heimara Leitið	235	315	172	149	254	
Eggin	90	100	56	51	95	
Nýpan	142	100	67	46	162	
Dalurin	150	112	95	65	172	

*) Har stendur 45 ÷ 7 (÷ 7 skrivað við blýanti aftaná).
**) Har stendur 217, og aftanfyri 235 ÷ 18 (sum jú gevur 217).
1979 var ringur kavavetur við stórkava, og er skurðurin í fleiri hagum lækkaður meira enn 100 seyðir, fyri at fáa skipanina upp aftur. So hetta árið hevur givið ógvuliga lítið av sær í skurði hjá teim flestu.

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1980

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	147	250	131	102	176
Heimanhús á Fjøllum	167	200	145	126	184
Kvígandalur	210	250	220	210	220
Tjørndalsegg	129	184	109	76	162
Norðara Leitið	209	312	175	158	219
Heimara Leitið	239	380	210	192	254
Eggin	85	140	74	60	99
Nýpan	148	140	118	87	177
Dalurin	161	260	136	104	176

Fyri hagapartin “Dalurin” er í 1983 viðmerkt: Deytt av garnasótt og farið fyri bakka, 27 seyðir.

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1981

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	176	240	142	126	192
Heimanhús á Fjøllum	184	215	154	148	190
Kvígandalur	220	290	225	220	225
Tjørndalsegg	162	210	130	112	180
Norðara Leitið	219	330	182	176	225
Heimara Leitið	254	405	220	210	264
Eggin	99	150	78	72	105
Nýpan	177	170	125	106	196
Dalurin	176	240	132	124	184

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1982

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	167	210	140	127	180
Heimanhús á Fjøllum	170	220	145	131	184
Kvígandalur	225	300	187	182	230
Tjørndalsegg	155	144	129	118	166
Norðara Leitið	217	288	177	170	222
Heimara Leitið	264	288	208	212	260
Eggin	87	150	78	66	99
Nýpan	157	185	118	93	182
Dalurin	161	230	133	105	177

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1983

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	176	216	138	127	183
Heimanhús á Fjøllum	179	215	145	136	185
Kvígandalur	227	311	203	188	232
Tjørndalsegg	160	137	131	127	162
Norðara Leitið	215	244	157	149	223
Heimara Leitið	257	273	191	183	265
Eggin	98	157	81	54	90
Nýpan	155	203	115	72	182
Dalurin	158	211	112	72	177

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1984

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	170	170	144	122	177
Heimanhús á Fjøllum	167	184	142	130	178
Kvígandalur	197	200	180	157	220
Tjørndalsegg	161	180	114	83	160
Norðara Leitið	212	264	174	160	220
Heimara Leitið	230	220	166	120	256
Eggin	87	120	88	71	98
Nýpan	150	170	101	59	175
Dalurin	155	200	112	92	175

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1985

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	176	180	154	143	181
Eggin	88	120	78	68	98
Nýpan	166	180	132	115	180

Hetta árið eru bert 1/3 av tølunum til skjals. Tølini fyri hagapartarnar: Heimanhús á Fjøllum, Kvígandalur, Tjørndalsegg, Norðara Leitið og Heimara Leitið og Dalurin, eru ikki sett inn í varðveitta høvuðslistan fyri 1985.

Smb. onkrum av listunum fyri 1986 sær tað út til at gloymt er í 1985 at samla tølini inn og roynt hevur verið í 1986 at fáa 1985-tølini við eisini, men tað hevur ikki eydnast heilt.

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1986

Haganavn	**Nøgd royting**	**Ull kg.**	**Lomb**	**Skurður**	**Nøgd 1.12.**
Uttanhús á Fjøllum	173	170	149	138	177
Heimanhús á Fjøllum	170		138	127	179
Kvígandalur	220	200	194	190	220
Tjørndalsegg	160	124	125	123	162
Norðara Leitið	208	289	159	145	220
Heimara Leitið	432	350	184	168	252
Eggin	88	120	64	56	96
Nýpan	158	170	114	95	174
Dalurin	150	230	114	92	172

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1988

Haganavn	**Nøgd royting**	**Ull kg.**	**Lomb**	**Skurður**	**Nøgd 1.12.**
Uttanhús á Fjøllum	172	150	154	139	180
Heimanhús á Fjøllum	173		147	134	184
Kvígandalur	214	175	194	190	218
Tjørndalsegg	167		116	113	169
Norðara Leitið	204	296	160	140	220
Heimara Leitið	450	700	210	178	240
Eggin	85	120	81	71	95
Nýpan	171	160	132	123	176
Dalurin	164	250	132	116	178

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1989

Haganavn	**Nøgd royting**	**Ull kg.**	**Lomb**	**Skurður**	**Nøgd 1.12.**
Uttanhús á Fjøllum	175	200	138	128	180
Heimanhús á Fjøllum	177	135	151	140	184
Kvígandalur	206	168	180	170	216
Tjørndalsegg	164	230	126	119	169
Norðara Leitið	208	312	142	128	218
Heimara Leitið	250	260	180	175	260
Eggin	90	140	71	67	92
Nýpan	171	144	130	125	176
Dalurin	161	250	137	122	176

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1990

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	176	130	150	143	180
Heimanhús á Fjøllum	180	135	163	152	152
Kvígandalur	214		197	190	221
Tjørndalsegg			127	115	176
Norðara Leitið	210	296	168	151	222
Heimara Leitið	240	200	170	144	240
Eggin	97	140	71	63	87
Nýpan	172	150	130	123	176
Dalurin	162	250	138	119	176

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1991

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	165	140	159	136	180
Heimanhús á Fjøllum	183	135	161	156	185
Kvígandalur	219	220	212	208	216
Tjørndalsegg	175		141	138	178
Norðara Leitið	212	312	176	161	222
Heimara Leitið	248	400	183	167	248
Eggin	86		84	75	95
Nýpan	168	145	125	114	174
Dalurin	165	250	150	140	175

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1992

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Uttanhús á Fjøllum	178	120	152	147	176
Heimanhús á Fjøllum	183	115	157	155	183
Kvígandalur	216	252	224	222	215
Tjørndalsegg	174	180	145	141	178
Norðara Leitið	216	380	180	165	222
Heimara Leitið	239	400	196	174	248
Eggin	91	140	85	79	91
Nýpan	168	90	132	124	174
Dalurin	161	260	140	119	176

Seyðateljing, uppgjørd 31. desember 1993

Haganavn	Nøgd royting	Ull kg.	Lomb	Skurður	Nøgd 1.12.
Heimanhús á Fjøllum	180		157	142	187
Kvígandalur	215		190	182	214
Eggin	90		64	60	88
Nýpan	173	130	134	129	176
Dalurin	159	260	124	91	177

Fyri hagapartarnar, Uttanhús á Fjøllum, Tjørndalsegg, Norðara Leitið og Heimara Leitið eru eingi tøl uppgivin fyri 1993. 1993 er seinasta árið tølini fyri seyðateljing eru funnin.
Fyri tølini øll árini kann nevnast, at tað eru ábyrgdararnir ella seyðamenninir, sum hava uppgivið tølini til kommununa, smb. umbøn.

Yvirlit frá nýggjari tíð

Miðvágs bygd, 48 MK. 1598 áseyðir í miðal.

Uttanhús á Fjøllum. 6 MK. 177 áseyðir. Ábyrgdari: Jens Gaardlykke.

Heimanhús á Fjøllum. 6 MK. 184 áseyðir. Ábyrgdarar: Gerhard Hølck Hansen, John Olivar Edvardsson. Landsjørð og festari: 7 gl. 18 skn. Joen Pauli Joensen.

Kvígandalur. 6 MK. 216 áseyðir. Ábyrgdarar: Ove Poulsen, Sámal Birgir Johansen, Joen Petur Jacobsen. Landsjørð og festarar: 8 gl. Johannes Sundal Ellefsen. 8 gl. Petur Leivur Davidsen. 1 gl. Joen Peter Jacobsen. 8 gl. Johannes I. Johansen. 2 MK. Ove M. Poulsen. 1 MK. 8 gl. Jógvan Joensen.

Tjørndalsegg. 5 MK. 163 áseyðir. Ábyrgdari: Heri Samuelsen. Landsjørð og festarar: 1 MK. 1 gl. 4 skn., Hans Martin Niclasen. 1 Mk. 1 gl. 4 skn. Finnur Wang.

Norðaraleiti, 5 MK. 222 áseyðir. Ábyrgdarar: Jógvan Joensen, Jógvan Páll Joensen, Ian Joensen.
Landsjørð og festari: 5 MK. Jógvan Joensen.

Heimaraleiti, 6 MK. 230 áseyðir. Ábyrgdari: Jóanes Niclasen.

Eggin, 2 MK. 64 áseyðir. Ábyrgdari: Andreas Svabo.

Nýpan, 6 MK. 168 áseyðir. Ábyrgdari: Jóhannus Nattestad, Gunnar R. Nattestad, Sólberg Olsen. Landsjørð og festarar: 2 MK. 11 skn., Sólberg Olsen. 1 MK. 4 gl., Harald M. Rasmussen Nattestad.

Dalurin, 6 MK. 174 áseyðir. Ábyrgdari: Tórður á Presttrøðni. Landsjørð og festarar: 1 MK. Dagfinn Petersen. 1 MK. Niels Julius Thomassen. 1 MK. Suni Krossá Davidsen. 1 MK. Heri Samuelsen. 1 MK. Kári á Presttrøðni.

("Yvirlit frá nýggjari tíð", keldur: "Heimabeiti", netsíða, Kári Thorsteinsson og "Landsjørðin í Vága sýslu", Føroya Løgting, 2015.)

Hagamenn

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1954

Uttanhús á Fjøllum, Sigurd Hansen. Heimanhús á Fjøllum, Hans á Norði. Kvígandalur, Hans Ellefsen. Tjørndalsegg, Berint. Norðara Leitið, Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen. Heimara Leitið, Hilmar Poulsen. Eggin, Hans á Norði. Nýpan, Jóannes Rasmussen. Dalurin, Joen Jacob Thomasen.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1962

Uttanhús á Fjøllum: Sigurd Hansen, Heimanhús á Fjøllum: Hans á Norði, Kvígandalur: Hans Poulsen, Tjørndalsegg: Albin Wang, Norðara Leitið: Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen, Heimara Leitið: Tórstein Niclasen, Eggin: Hans á Norði, Nýpan: Jóannes Rasmussen, Dalurin: Joen Jacob Thomasen.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1964
Uttanhús á Fjøllum: Sigurd Hansen, Heimanhús á Fjøllum: Hans a Norði, Kvígandalur: Hans Poulsen, Tjørndalsegg: Albin Wang, Norðara Leitið: Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen, Heimara Leitið: Tórstein Niclasen, Eggin: Hans á Norði, Nýpan: Jóannes Rasmussen, Dalurin: Joen Jacob Thomasen.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1968
Uttanhús á Fjøllum: Sigurd Hansen, Heimanhús á Fjøllum: Hans á Norði,
Kvígandalur: Hans Ellefsen, Tjørndalsegg: Albin Wang, Norðara Leitið: Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen, Heimara Leitið: Tórstein Niclasen, Eggin: Hans á Norði, Nýpan: Jóannes Rasmussen, Dalurin: Joen Jacob Thomasen.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1972
Uttanhús á Fjøllum: Sigurd Hattarstein (áður Hansen). Heimanhús á Fjøllum: Gudmund Heinesen. Kvígandalur: Hans Ellefsen. Tjørndalsegg: Albin Wang. Norðara Leitið: Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen. Heimara Leitið: Tórstein Niclasen. Eggin: Hans á Norði. Nýpan: Jóannes Rasmusen. Dalurin: Joen Jacob Thomasen.
*) keypt 8 seyðir **) keypt 14 seyðir.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1984
Uttanhús á Fjøllum: Samson Gaardlykke. Heimanhús á Fjøllum: Ian Joensen.
Kvígandalur: Regin. Tjørndalsegg: Gudmund Niclasen. Norðara Leitið: Hans Christoffer 'Hassi' Joensen og Ian Joensen. Heimara Leitið: Tórstein. Eggin: Hans á Norði. Nýpan: Jóannes. Dalurin: Eigil.

Ábyrgdarmenninir fyri hagapartarnar 1988
Uttanhús á Fjøllum: Samson Gaardlykke. Heimanhús á Fjøllum: Ian Joensen.
Kvígandalur: Jóannes I. Johansen. Tjørndalsegg: Gudmund Niclasen. Norðara Leitið: Hans Christoffer Joensen og Ian Joensen. Heimara Leitið: Páll Hansen. Eggin: Hans á Norði.
Nýpan: Jóannes Rasmussen. Dalurin: Eigil Rasmussen.

Røktingarmenn í 67 og 70 ár

Ian Joensen, vanliga nevndur "Bónda Ian" í Miðvági, hevði í 2016 verið røktingarmaður á hagapartinum Norðaraleiti í 70 ár.

Ian byrjaði at røkta sum 14 ára gamal í 1946, tá eldri bróðurin Hans Christoffer "Hassi" fór til Noregs á Landbúnaðarskúla. Hann passaði tá garðin saman við beiggjanum Marius Joensen, "Bónda Marius", til Hassi kom aftur í 1947. Hassi byrjaði at røkta í 1939, eisini sum 14 ára gamal.

Eftir at Hassi kom aftur til Føroyar í 1947, røktaðu teir báðir brøðurnir, Hassi og Ian saman í næstan 60 ár til Hassi doyði í 2006, eftir at hava verið røktingarmaður í 67 ár. Eftir tað hevur Ian røktað á Nordaraleiti saman við elsta soninum Jógvan Páll Joensen. Teir røkta saman enn.

Fríggjadagin hin 30. desember 2016 var skipað fyri lítlari heiðursløtu, har festarin og bróðursonur Ian, Jógvan Joensen, handaði honum eina heiðurstalvu úr gróti sum tøkk og viðurkenning fyri tey 70 árini, Ian hevur verið røktingarmaður. Nakrir av teimum mongu fjallmonnum, sum hava gingið á fjall á Norðaraleiti hesi mongu árini, Ian hevur røktað, vóru til staðar undir handanini.

Neyt og neytaeigarar
1954 - 1987

Ár	Neytaeigarar	Kýr og kvígur	Onnur neyt
1954	82	95	16
1956	80	71	31
1959	72	73	34
1960	70	75	39
1961	67	76	40
1962	62	70	29
1963	60	66	30
1964	53	67	29
1965	49	66	27
1966	60	23	23
1967	69	69	28
1969	41	74	33
1971	35	74	34
1972	27	68	22
1973	18	50	26
1974	19	47	23
1975	16	46	24
1976	20	55	33
1977	22	63	29
1978	13	38	27
1979	11	33	31
1980	13	38	27
1981	10	35	24
1982	10	34	25
1983	9	32	28
1984	10	27	28
1985	3	20	10
1986	3	18	7
1987	4	15	9

Frá 1954 hevur kommunan skrásett og sent inn til sýslumannin upplýsingar um tal av neytaeigarum og neytum, sum sýslumaðurin so hevur sent víðari til landsmyndugleikarnar. Tey árini einki er nevnt fyri, eru eingi tøl funnin.

Eftir 1987 sær tað út til, at givist er við at senda hesi tøl inn. Orsøkin er helst, at tað eru so fá neyt longur.

Neytaeigarar í Miðvági og Vatnsoyrum 1956

Hetta árið er listi, har allir neytaeigaranir eru nevndir við navnið. Um einki annað er nevnt, hava teir eina kúgv. Teir, sum hava mjølikeyt eru:

Miðvágur 1956

Jacob G. Thomasen, Hans M. Thomasen, Joen Pauli Johannesen, Thomas Napoleon Hansen, Johannes Haraldsen, Jens Wang ½, Hans Daniel Joensen, Thorstein Thomasen, Albin Wang, Ole Hans Poulsen, Hans á Norði, Herluf Niclasen, Joen Jacob Næs, Thomas Jacob Johansen, Steingrim Nattestad, Daniel Pauli Niclasen, Apsalon Jacobsen, Hans Hansen, Harald Hansen, Niclas Jørgensen, Henning Ellefsen, Hans Samuelsen 2, Edvard Johansen, Tórstein Niclasen, Jørgen Frans Jørgensen, Joen Hendrik Samuelsen, Joen Pauli Jørgensen ½, Jacob Haraldsen, Edmund Haraldsen, Elias Ellefsen, Søren Danielsen 2, Heini Joensen, Joen J.A. Joensen 3, Olivar á Ryggi, Sigurd Hansen, Gudmund Heinesen 2, David Hansen, Andreas Johansen, Henriette Heinesen, Hans Jacob Poulsen, Ole Martin Poulsen, Hans Frederik Hansen, Kristin Jacobsen, Andreas Olsen, Jørgen Gaardlykke, Emil Olsen, Einar Kongsbak, Joen Hans Jacobsen, Jóhannes Rasmussen 2, Jens Pauli Johannesen 2, Mikal Johansen, Joen Elias Fr. Joensen, Sigmund Frederiksen, Aksel Rasmussen, Samuel Johansen, Jens Samuelsen 2, Hans Ellefsen, Samuel Ellefsen, Edvard Frederiksen, Jens Rasmussen, Johannes Fr. Joensen, Peter Jacob Johansen.

Vatnsoyrar 1956

Peter Jacobsen ½, Albin Jacobsen og Mourentsa Jacobsen ½, Daniel Nielsen, William Nielsen, John Poulsen.

Neytaeigarar í Vatnsoyrum 1962

Albin Jacobsen. Daniel Nielsen 3. William Nielsen 2. John Poulsen 3.
John Vágoy.
Eingin listi er fyri Miðvág 1962.

Høsnateljing

Fyri trý ár eru teljingar av høsnum í Miðvági uppgivin.
1966: 405 stk. 1967: 361 stk. 1972: 79 stk.

Tøl eru bert at finna fyri hesi árini, men her sýnist tað sum ein fær endan við av tíðini við høsnahaldið. Um teljingar hava verið áður er óvist, tær eru so ikki varðveitar í skjølunum hjá kommununi, um so er. Talið av høsnum áður hevur verið væl hægri, tá vanligt var at hvørt hús hevði helst millum 8 og 10 høsn. Tað vil siga, at talið av høsnum hevur helst ligið millum 900 og 1000 høsn í Miðvági, tá tey vóru mest.

Í 1990, ella har um, byrjaðu summi at fáa sær høsn aftur, kanska mest sum ítriv, og eftir tað hevur verið nakað av høsnum ymsastaðni, men neyvan meira enn hesi nevndu árini.

Helst fyrsti traktorurin í Miðvági

Tað er eisini annað, enn bert teljingar og listar ein kann finna um landbúna í skjølunum hjá kommununi.

14. august 1930 verður skrivað til Landsnevnd Føroya Løgtings viðv. Johannes Hansen, Miðvági, sum søkir um loyvi og stuðul at keypa ein traktor. Vegna fyrispurningar verður upplýst, at maðurin er 45 ár og er giftur. Eigur onga jørð men hevur eina trøð av prestjørðini

til leigu, uml. 3 kúfóður. Ein partur av trøðni er dyrkaður av pápanum hjá leiðaranum fyri uml. 25 árum síðan. Tað hevur umsøkjarin hildið viðlíka og dyrkað nakað afturat. Hann hevur eisini arbeitt nakað av jarðaarbeiði fyri onnur. Tað er hugsandi at umsøkjarin ætlar at brúka traktorin til uppdyrking í bygdini, og soleiðis vinna pening av honum. Og tað kundi verið sera vælkomið hjá bygdini, at ein slíkur varð fingin til vega, um hann vísir seg at verða til nyttu.

Hetta seinasta sýnir helst, at teir hesa tíðina kanska ikki rættuliga vita, hvat ein traktorur megnar ella kann brúkast til. Hetta var eisini fá ár eftir, at fyrsti bilurin var komin til Føroyar.

Svar upp á umsókn um vetrarfriðing í 1934

30. juli 1934 varð skrivað til Amtið í smb. við skriv, sum Amtið hevði sent frá nøkrum monnum úr Miðvági um vetrarfriðing av innmarkini í Miðvági. Vit halda at slík skipan hevði verið til stóran skaða fyri Føroyar í síni heild. Við tað at fyrimununurin verður lítil móti vansanum og tapinum hjá eigarunum av innmarkini í smb. við seyðahald, sum er størsta inntøkan í dag av landbrúki. Vit vænta heldur ikki, at tað verða nógv, sum fara at ynskja at keypa rættindini til vetrarfriðing fyri fult endurgjald. Umsøkjararnir nevna einki um endurgjald, og hava helst heldur ikki hugsað um tað. Og teir kunnu heldur ikki hava stóran áhuga í málinum, tí av umsøkjarunum er tað bara ein, sum eigur eitt sindur av jørð, nevniliga 2 ½ sátulendi = 1440 m^2. Ikki ein einasti av umsøkjarunum eigur uttangarðsjørð. Og tað er tí ivasamt, um teir hava rætt til at koma við einum slíkum uppskoti fyri Løgtingið. Nakrir av teimum eru eisini sera ungir, enntá undir myndigheitsaldur (sum tá var 23 ár). Tveir av undirskrivarunum hava rætt nokk leigutraðir av útmarkini, men ein skuldi ikki hildið, tað var klókt av teimum at koma við hesum málinum. Tí verður bøurin vetrarfriðaður, koma teir allarhelst at missa traðirnar, tí tá vilja hagarnir fara at vilja hava alla jørðina sjálvir, fyri at fáa meira vetrarfóður til seyðirnar. Vit vilja soleiðis avgjørdir mæla frá, at hetta málið verður lagt fyri Løgtingið. At enda kann nevnast, at jarðaeigararnir hava higartil verið sera fyrikomandi, tá talan hevur verið at lata uttangarðsjørð til traðir at dyrka upp. Um alt hetta skal vetrarfriðast so fara jarðaeigararnir at gera alt fyri at hindra, at meira verður latið burtur av hagunum til traðir. Við tað at tað tá kemur at vera til ov stórt tap fyri útmarkina, sum man áður ikki hevur hugsað so nógv um, tá seyður kann ganga í innmarkini um veturin. Og vit kunnu eisini vísa til lóg um skaða á driftina hjá festunum,frá 13.04.1894 í hesum sambandi.

Nøvnini á umsøkjarunum er ikki nevnt, men tað sýnist sum, at forstandarskapið hevur vitað navnið á teimum.

Innangarðsútskifting av markatalsbygdini Miðvágur

Á seinastu síðu í gerðabókini fyri matrikuleringina av markatalsbygdini Miðvágur stendur, at gjørd vórðu 14 kortbløð á 1:1000, ið er úrslit av innangarðsútskifting, lokin 17. nov. 1964. Og eitt kortblað, 1:2000, sambært marknaávísing av Vatnsoyrum 13. okt. 1964.

Hetta hevði verið ein long gongd, fyrsti almenni útskiftingarfundurin var 2. februar 1942, men tað gekk seint fyri seg, tí næsti almenni fundurin var ikki fyrr enn 6. juni 1958, men tá kom meira ferð á og frá 15. januar 1962 eru meira regluligir almennir fundir.

Uttangarðs útskiftingin

Uttangarðsútskiftingin gekk munandi skjótari fyri seg. Fyrsti útskiftingarfundurin varð hildin 30. mai 1972 og endaligi úrskurðurin varð sagdur longu 7. september 1972. Tá høvdu 5 almennir útskiftingarfundir verið í Miðvági í smb. við hesa útskiftingina, og lýst hevði verið í kunngerðartalvuni og í bløðunum við endaligu avgerðini, og hon varð ikki kærd. Og var síðan staðfest endaliga á seinasta útskiftingarfundinum, sum var hin 13. september 1973.

Skattamerkur

Frá heilt gamlari tíð í Føroyum er skattur goldin av jørðini, hetta síggja vit í ymsum fornritum, og so beinleiðis í bóndabókunum frá 1584 og uppeftir, har ein sær hvat hvør bóndi hevur goldið í jarðarskatti. Tá varð bara jarðarskattur goldin, umframt tíggind til kirkjuna.

Jørðin í Miðvági er 48 merkur tilsamans. Mørk, gyllin og skinn eru gomul jarðavirðismát og eru upprunaliga ásett út frá keyps- ella søluvirðinum av jørðini. Sagt verður at uppbýti av jørðini í Føroyum í merkur eru elstu málini, sum stava heilt afturí frá landnáminum, meðan gyllin og skinn eru komin inn í miðøld, út frá peningaliga virðinum og tá neyðugt hevur verið at kunna býta jørðina meira upp. Hesa tíðina vóru vanligu gjaldoyrini, gyllin ella florin. Ein mørk varð sett at vera 16 gyllin í peningi, tí tað var hvat ein mørk av jørð kostaði tá. Og ein gyllin var 20 skinn. So her varð uppbýtið, sum síðan er brúkt.

Metingin av jørðini í merkrum varð ásett út frá, hvussu nógv jørðin kundi geva av sær tilsamans, innangarðs og uttangarðs, heldur enn út frá støddini í hektarum ella øðrum beinleiðis málum. Støddin av eini mørk í hektarum ella kvadratmetrum kann tí svinga nógv frá bygd til bygd og enntá frá haga til haga í somu bygd.

Nevnast kann, at í matrikulbókini 1706 er Miðvágur settur til 50 merkur jørð, men er í 1873 settur til 48 merkur. Hetta er ikki tí, at hektararnir eru fækkaðir í bygdini, men tí ein nýggj virðismeting er gjørd. Eisini sýnist tað, sum um roynt verður at javnseta størru bygdirnar í Vágum í markatali, hóast nøgdin í hektarum er ógvuliga ymisk, sum tað sæst niðanfyri. Millum 1706 og 1873 kann bert ávísast, at markatalið er broytt eitt sindur í 13 føroyskum bygdum. Hin bygdin í Vágum talan er um er Sandavágur, sum í 1706 er sett til 48 1/4 mørk, sum í 1873 er javnað til 48 merkur.

Eftir uppmáling í 1973 er støddin av samlaðu jørðini í Vágum henda: Sandavágur, 48 merkur, 5820 ha. Miðvágur, 48 merkur, 4615 ha, Sørvágur, 48 merkur, 3915 ha. og Bíggjar sókn 36 merkur, 3411 ha.

Hetta sýnir, at metingarnar hava ikki altíð verið sera nágreiniligar ella javnar frá bygd til bygd. Tí lítið er at ivast í, at hektararnir hava rættuliga nógv, um ikki alt at siga, tá talan er um, hvat ein mørk av jørð kann geva av sær í grasi, seyði, ull, torvi og annað. Men har hava so feitilendir í bjørgunum, fuglabjørg, kópalátur o.a. eisini verið við í metingini, sum fyrr hevði rættuliga nógv at siga.

Sambært lóg frá 1926 er ásett, at tað er útskiftingarnevndin, sum ásetur talið av skattamerkrunum í útskiftari jørð. Smb. lógini skal tann, sum leggur jørð inn uppgeva hetta til sýslumannin, sum ásetir skattamarkatalið eftir fastsettum reglum frá Justitsminnisteriinum.

Skattamerkur er ikki merkur, gyllin og skinn, men aftur ein onnur meting av jørðini innangarðs og uttangars, sum varð brúkt til at áseta jarðarskattin. T.v.s. at jarðarskatturin varð ikki goldin út frá, hvussu nógvar merkur, gyllin ella skinn ein átti, men virði av hesum, ásett í skattamerkrum fyri hvønn einstakan skattgjaldara, sum átti jørð.

Samlaða talið av skattamerkrum í Miðvági í 1917-18, var 125,27 skattamerkur. 1 mørk í Miðvági í 1917-18 svaraði sostatt til í miðal 2,6 skattamørk, um ein umroknar tað beinleiðis. Men, sum nevnt omanfyri, ber tað ikki beinleiðis til, við tað at virði á merkrum í somu bygd vóru mett ymiskt út frá nyttuvirðinum av jørðini, hvat hon kundi geva av sær í teim ymsu hagunum, men kann nýtast sum ein lítil ábending av nøgdini av jørð.

E.A. Bjørk nevnir fleiri ferðir í bókunum "Færøsk bygdaret I – III", at tað var ringt hjá kommununum at halda skil á skattamerkrunum og hvør átti alla jørðina í bygini, við tað at allar jarðasølur vórðu langt frá altíð fráboðaðar til sýslu ella kommunu. Hetta kemur eisini onkuntíð fram í skjølunum hjá Miðvágs kommunu.

Ognarjørðin í Miðvági er 25 Mk. 1 gl. 3 skn. og kongsjørðin (kongs- og prestjørð) 22 Mk. 14 gl. 17 skn. Tilsamans 48 MK.

Nógv tann størsti jarðainnihavarin í Miðvági var presturin. Í skrivi frá 1926 er sagt, at presturin av prestjørðini rindar 532,79 kr. í jarðaskatti hetta árið. Samlaði skatturin til kommununa hetta árið hjá prestinum er 1.072,79 kr. av inntøku á 7.590 kr. T.v.s. at hjá honum er meir enn helvtin av skattinum jarðaskattur, sjálvt um jarðaskatturin vanliga tá var 1/10 av samlaðu skattainntøkuni hjá kommununi.

Samlaði jarðaskatturin í Miðvági í 1926 var um 1.770 kr., har presturin sostatt rindar um 31,3% av samlaða jarðarskattinum til Miðvágs kommunu hetta árið.

Viðmerkjast kann, at jarðarskatturin seinni minkaði støðugt, í 1944 var jarðarskatturin 1/25 part og varð hetta sama árið minkaður niður til 1/50 part. Eitt tað seinasta man sær til jarðarskatt, er at Landsstýrið í 1961 ásetur, at jarðarskatturin er 10 kr. pr. skattamørk. T.v.s. at fyri samlaðu skattainntøkuna hjá kommununi í 1961, sum var 193.802 kr., er jarðaskatturin tá umleið 730 kr. og seinni enn minni í mun til aðra inntøku hjá kommununi.

Eftir øllum at døma rindar prestur í 1918 bæði fyri prestjørðina og annexgarðin, ella fyri 37,52 skattamerkur. Men út frá ymsum skrivum sæst, at hann hevði uppsitarar av stórum pørtum av jørðini, leigaði út traðir og torvlendi. Umframt sjálvandi, at hann fekk nógv av jørðini á annan hátt, nógvan seyð og ull, neyt og oksar og væl av jarðarhvali.

Í 1931-32 er nýggj virðismeting gjørd av innmørkini í Miðvági, vegna at kommunan hevði sent inn umsókn um útskifting.

21. januar 1931 verður skrivað til sýslumannin, at boðað verður frá í smb. við §6 i Lov for Færøerne om Udskiftning af 20 april 1926 No 125, at vit hava sett Georg Hansen, bilførara, Miðvági og Thomas Elias Ellefsen, báðir úr Miðvági, til saman við sýslumanninum at gera ta neyðugu taxsatiónina (virðismetingina) av innmørkini í Miðvági.

Á fundi 8. november 1932 verður samtykt at bjóða Elias Ellefsen og Georg Hansen 25 kr. hvør fyri arbeiði teirra við virðismetan av innmarkini í smb. við málið um útskifting av innmarkini. Men smb. roknskapibnum fyri 1932 fingu teir tó 35 kr. hvør.

Út frá einum lista, kommunan sendir sýsluni hin 31. mars 1943, síggja vit, at virðismetingin er ikki so lítið broytt nú í mun til 1917-18. Har samlaða talið av skattamerkrum nú líkist meira tí, sýslumaðurin uppgav í 1918 fyri ognarjørðina.

Keldur

Gerðabøkur, kopibøkur, roknskaparbøkur, skriv o.a. – Miðvágs kommuna.
Gerðabók. Innangarðs útskifting, Miðvágs kommuna, 1965.
Gerðabók. Uttangarðs útskifting, Miðvágs kommuna, 1973.

Bøkur og skjøl o.a. hugt er í annars, eru:
Færøsk lovsamling 1559-1923, bind II 1924-31 – Erik Bonnevie og Edw. Mitens.
Ein føroysk bygd – Poul Petersen.
Færøsk bygderet I - III – E.A. Bjørk.
Marketallet 1973 - Jesper Brandt.
Heimabeiti – Kári Thorsteinsson.
Bygdin – fyrr, nú og í framtíðini - Bergmann Finnsson og Sámal Matras Kristiansen.
Landsjørðin, Vága Sýsla 2015 – Føroya Løgting.

Kálvalíð

Hús og jørð, ið hoyrdi til garðin í Kálvalíð í Miðvági, vórðu í 1632 løgd afturat Jansagerði, prestagarðinum í Miðvági. Í 1673 verður Kálvalíð býtt frá aftur og gjørt til anneksgarð ella "náðinsgarð" til prestaeinkjur at lívbjarga sær við, og búðu nakrar teirra har gjøgnum tíðina.

Kendasta prestaeinkjan, sum sigst hava búð í Kálvalíð, er uttan iva Beinta, ella Benthe Christine Pedersdatter Broberg, sorinskrivaradóttir úr Havn. Hon varð gift tríggjar ferðir og teir vóru allir prestar. Við fyrsta manni sínum búði Beinta í nøkur ár á prestagarðinum í Viðareiði. Eftir at annar maður hennara harra Niels, prestur í Vágum, doyði í 1706, hevði hon eina stutta tíð Kálvalíð sum náðinsgarð, til hon giftist við næsta prestinum í Vágum, Peder Areboe, ella Arabo, sum hann varð nevndur. Tá flutti hon aftur í prestagarðin í Jansagerði og búði so har til 1716, tá Arabo helst vegna sálarliga sjúku, var settur frá sum prestur. Eftir tað búðu tey í Sandavági til teirra ellisár. Beinta doyði í 1752 um 84 ára gomul, og Arabo fýra ár seinni. Tað eru nógvar sagnir varðveittar um Beintu og um Arabo.

Kent fornminni

Føroyski rithøvundurin, Jørgin Frans Jacobsen, skrivaði kendu skaldsøgu sína "Barbara", við sagnunum um Beintu sum fyrimynd. Bókin kom út fyrstu ferð í 1939 á donskum, árið eftir at høvundurin var deyður. Í 1997 gjørdi danski filmsframleiðarin, Niels Malmros, filmin "Barbara" út frá skaldsøguni hjá Jørgin Frans Jacobsen, har stórir partar av filminum vóru upptiknir í Vágum. Sagnirnar, skaldsøgan og seinast filmurin hava gjørt Kálvalíð í Miðvági kent langt út um landoddarnar og til eitt nógv vitjað fornminni, serliga av útlendskum ferðafólki. Og í 2021 hava Lydia Laksáfoss og Magni Laksafoss, skrivað bókina "Beinta fyrra bókin", sum Erling Laksáfoss hevur myndprýtt. Søgulig gjøgnumgongd av tíðini Beinta livdi og um lív hennara út frá skjølum og sagnum. Har, sum tittulin sigur, næsta bók er væntandi.

Ein onnur prestaeinkja í Kálvalíð var nevnd "Móðir í Kálvalíð". Tað var Anna Margreta Samuelsedatter, løgmansdóttir av Steig í Sandavági, einkja eftir Suurland prest í Vágum. Hon flutti í 1733 niðan í Kálvalíð at búgva. Grundin til at hon varð nevnd, Móðir í Kálvalíð, sigur Mikkjal á Ryggi í Miðvingasøgu, var, at hon var so blíð og góð við øll fólk, ráðaklók, vælgerðin og altíð góð at heita á. Sagt varð, at hon skuldi sita 60 ár einkja og doyði elligomul.

Uppsitarar í Kálvalíð

Gjøgnum tíðina hava uppsitarar við familju búð í Kálvalíð, at passa hús og jørð. Sertreyt við hesum garðinum hevur so verið, at tey høvdu skyldu at taka prestaeinkju úr Vágum inn, um hon ynskti tað. Og hava tey tá felags havt rætt til úrtøkuna av garðinum.



Tekning av Kálvalíð. Tjóðsavnið.

Niklas í Kálvalíð

Fyrsti uppsitarin í Kálvalíð, vit finna navnið á, er Niklas Joensen, Niklas í Kálvalíð. Hann var ættaður uttan úr Løðu í Mykinesi og kom í Kálvalíð sum húskallur og giftist Hanusar Maluni, sum hon varð nevnd, og var hon ættað úr Vestmannastovuni í Sandavági. Tey áttu børnini: Jógvan f. 1771, Katrina f. 1777, Jesar f. 1778, Anna Katrina f. 1784 og Jákup f. 1791. Í Miðvingasøgu verður sagt, at elsti sonur Niklasar, Jógvan, var í fostur hjá Móður í Kálvalíð síni ungu ár og varð tí nevndur, Jógvan í Kálvalíð. Í Miðvingasøgu er annars nógv áhugavert skrivað um Niklas og eftirkomarar hansara.

Fólkateljingin 1801, Kálvalíð: Niklas Joensen, f. 1743, óðalsbóndi. Kona hansara er Malena Hansdatter, f. 1851. Hjá teimum búgva á hesi tíð synirnir, Jesar og Jákup, og eisini Kathrina Hansdatter 68 ár einkja, verðmóðir húsbóndans.

Smb. kirkjubókini doyr Niklas í Kálvalíð í 1805, 62 ára gamal "af langvarig Brystsyge".

Hanusar Malan

Í Løbners Tabel frá 1814 stendur Malena Hansdatter, Hanusar Malan, einkjan eftir Niklas í Kálvalíð, at búgva einsamøll í húsi. Hon eigur 8 gyllin í óðals og hevur eina mørk í festi. Eigur eina mjólkikúgv, 13 liviseyðir og 11 til slakt. Malan doyr 14 ár seinni í 1828 76 ára gomul. Helst hevur hon búð í Kálvalíð til tá. Eftir øllum at døma hevur hon sitið við garðinum í 20 ár frá 1805, tá hon gjørdist einkja, og til 1825, tá Hans Petur tekur við sum uppsitari.

Hans Petur í Kálvalíð

Sambært kirkjubókini 1825 og fólkateljing 1826* so er Hans Petur Johannesen, f. 1800, ættaður av Mýrini í Sandavági, uppsitari í Kálvalíð. Hann er giftur við Annu Dionesdattar, f. 1802 og ættað úr Húsbak í Sørvági. Tey eiga børnini: Djóni f. 1825, Jóannes f. 1829 og Kristina Louisa f. 1839. Hans Petur í Kálvalíð doyði í 1862. Smb. kirkjubókini deyður av "Brystsyge og Svindsott", sum møguliga merkir lungnakrabbi.

Tá fyrsti sonur teirra, Djóni, er føddur 24. februar 1825, stendur um pápan, Hans Petur, at hann er "Opsidder Paa Kalvali". So hann er vorðin uppsitari har rættuliga ungur, longu tá hann, smb. tátíðar lógávu, var myndugur. Ikki er óhugsandi, at hann, eins og fyrri uppsitarin, er komin haðar sum ungur húskallur.

* Fólkateljingin 1826 er bara fyri Vágar og er gjørd av Struer presti í Vágum, har bert húsfedrarnir eru nevndir við navni. Har stendur Hans Petur eisini at vera uppsitari á anneksgarðinum.



Tekning av Kálvalíð. Tjóðsavnið.

Jóannes í Kálvalíð

Tað verður sonur Hans Petur Johannesen, Jóannes Hans-Petersen, sum gerst uppsitari í Kálvalíð eftir faðirin, og hevur tað verið einaferð millum 1855 og 1860. Í fólkateljingini 1855 standa bæði faðir og sonur at vera uppsitarar, men faðirin er nevndur sum húsfaðir og er Jóannes inngiftur í Kálvalíð hjá foreldrunum.

Í fólkateljingini (ft.) 1860 er Jóannes í Kálvalíð skrivaður at vera uppsitari av anneksgarðinum og er giftur við Gretu Joensdatter, f. 1824, og tey eiga tvey børn: Anna f. 1851 og Djóni f. 1855. Foreldrini hjá Jóannesi, gamla uppsitaraparið, búgva nú inni hjá teimum. Um Hans Petur stendur tá, at hann livir av jarðarbrúki.

Somu húsfólk ft. 1870, men nú er Anna Djonesdatter einkja – gjørdist einkja í 1862 – og er har framvegis í ft. 1880.

Í ft. 1880 er Jóannes einkjumaður, sonurin Djóni og systurin Kristina Lovisa, ógift, og Margretha Helena Johannesen, 3 ár, í fosturi, búgva har.

Í ft. 1890 eru húsfólkini í Kálvalíð: Jóannes Hans-Petersen, 61 ár, einkjumaður, uppsitari, Kristina Lovisa 57 ár, ógift, systir, Djóni Johannesen, 34 ár, sonur, inngiftur, Maria Johannesen, 35 ár, kona Djóna, Streymnesi, Jóhanna, 2 ár, barn teirra, og Margretha Helena Johannesen, 13 ár, fosturbarn. Jóannes í Kálvalíð doyði í 1899, og verður tá skrivaður "Hansen". Deyður av "Influensa".

Djóni í Kálvalíð

Djóni Johannesen f. 1856, Djóni í Kálvalíð, sonur fyrra uppsitaran, gerst uppsitari av Kálvalíð í 1899, eftir at faðirin er deyður. Í ft. 1901 er hann skrivaður einkjumaður, hagamaður og uppsitari. Í húsinum umframt eru bert dótturin, Jóhanna f. 1887 og Kristina Lovisa Hansen, f. 1839, ógift, fastur hansara.

Í ft. 1911 eru somu húsfólk, umframt Kathrine Sofie Hansen, f. 1899, "logerende".

Í ft. 1921 eru framvegis somu húsfólk, sum í 1901: Djóni í Kálvalíð, f. 1856, einkjumaður, uppsitari, dóttirin, Jóhanna f. 1887 og fasturin, Kristina Lovisa Hansen, f. 1839, "alderdomsunderstøttet", doyði í 1926, 86 ára gomul. Umframt Olevine Poulsen, f. 1877, ógift, Kvívík, húshaldirska, tað sama er nevnt í 1925, men tá er hon skrivað Ole Jacobsen, men er framvegis ógift.

Í ft. 1916, áðrenn hon kom í Kálvalíð, býr Olevina í húsunum á Mýrini í Miðvági og er skrivað at vera ættarfólk og við eftirnavninum Poulsen. Hon var ættað úr Jansagerði og var dóttur uppsitaran har, Poul Ole-Jacobsen, deyður í 1910 80 ára gamal.

Eftir at pápi Olevinu var deyður, slapp hon ikki longur at búgva í Jansagerði. Ein uppíbygning til Jansagerði við nøkrum rúmum og ein hjall, sum pápi hennara hevði gjørt, fekk hon 150 kr. fyri. Sáttmáli er í 1910 skrivaður um tað millum hana og prestin, Carl Johansen, har hon hevur skrivað undir "med paaholden pen". Tvey vitnir hava eisini skrivað undir. Tað er so einaferð eftir 1916, hon kemur niðan í Kálvalíð. Har hon so bleiv húshjálp hjá Djóna.

Í norskum blað 19. oktober 1935 er ein áhugaverd grein um Kálvalíð, sum norski blaðmaðurin Odd Medbøe hevur skrivað. Greinin er lænt frá Miðvágs fornminnisfelag. Odd Medbøe hevur verið og vitjað í Kálvalíð, og greinina nevnir hann "Besøk i vikingenes stenhus". Í húsunum býr Gamli Djóni saman við húshjálpini, Olevinu Poulsen. Hann er 79 ára gamal og hon er 55 ár. Tey taka væl ímóti, eftir at Odd hevur bankað á dyrnar. Tað er dimmligt inni, bert ljós frá glóðunum á grúgvuni og ljós frá ljóðaranum í takinum. Í einum króki situr Djóni við pípu í munnklovanum. Á gólvinum ganga høsn, ein hundur liggur undir beinkinum hjá Djóna og við eldstaðið liggur ein feitur frensur. Olevina bjóðar Odd ein krakk at sita á. Hon má annars júst fara og lova kúnni út. Kúgvin verður leidd úr fjósinum, sum er fast í, og út gjøgnum roykstovuna og so sett á beiti uttanfyri. Komin innaftur fer Olevina

skundisliga at feia moldgólvið við einum kveisturi, gjørdur av tveimum samanbundnum fuglaveingjum. Og setur seg síðan. Djóni sigur ikki nógv, tað er Olevina, sum svarar, tá spurt verður. Hon sigur, at teimum dáma væl at sita í roykstovuni, og at her er frálíkt at búgva, og tað koma ofta fremmandafólk at síggja søguligu húsini. Hon sýnist eitt sindur errin av hesum, heldur Odd. Greinin er annars nokkso drúgv, har hann m.a. greiðir frá, hvussu tað sær út uttan og innan. Hann sleppur eisini at síggja inn í eitt annað rúm, tað er sovikamarið. Har standa tríggjar sengur framm við veggjunum. Ein gomul kona situr inni har og spinnur. Í hesum aldargamla húsinum gongur lívið á sama hátt sum fyri 100 árum síðan, endar hann greinina.

Djóni í Kálvalíð doyði í 1937, 80 ára gamal.

Olevina hevur helst ikki búð har leingi eftir tað, hon er deyð og jarðað í Miðvági í 1954, tá skrivað Jacobsen. Tað sýnist at hava verið ivamál um hennara rætta eftirnavn, har ivamálið var um hon skuldi hava sama eftirnavn sum pápin, ella eftirnavn eftir fornavninum hjá pápanum, sum gamli skikkurin var. Smb. áðurnevndu grein hevur hon sjálv nevnt seg Poulsen.

Jóhanna í Kálvalíð

Eftir at Djóni í Kálvalíð er deyður verður dóttir hansara, Jóhanna Johannesen f. 1887, uppsitari av Kálvalíð, hon var ógift. Sambært skjølunum hjá kommununi er Jóhanna rýmd úr húsunum helst einaferð við endan av 1940-unum, vegna at húsini tá vóru í sera ringum standi, og er hon flutt niðan aftur í 1952 og býr har í hvussu er til 1957, tí tá verður beinleiðis sagt, at hon býr í Kálvalíð. Búði har møguliga til 1960, tá kommunan yvirtók húsini. Tá flutti hon oman til Kirkjar at búgva, men gekk niðan í Kálvalíð at kynda heilt til 1966, og hevði soleiðis umsjón við húsunum fyri kommununa.

27. juli 1960 gjørdist kommunan eigari av Kálvalíð, og eftir tað vóru so ikki uppsitarar í Kálvalíð, og jørðin, sum áður hevði hoyrt til húsið, fylgdi ikki við. Eftir tað hava húsini bert verið nýtt sum bygdasavn.

Jóhanna doyði í 1971. Hon var tann seinasti, sum búði fast í Kálvalíð. Jóhanna var eisini tann seinasti, sum smb. kirkjubókini, varð grivin í Gamla kirkjugarði við Kirkjar í Miðvági. Byrjað var í 1935 at brúka kirkjugarðin Niðri á Tjørn, men komandi árini vóru tó nøkur fá grivin í gamla kirkjugarðinum.

Kálvalíð í skjølunum hjá Vága prestagjalds kommunu

Í skrivi hjá Vága prestagjalds kommunu, virkin árini 1873-1915, stendur Kálvalíð nevnt tvær ferðir. Fyrru ferð í einum brævi frá 1881. Har nevnt er í smb. við eitt mál hjá kommununi, at ein prestaeinkja býr í Kálvalíð um hetta mundið – tað hevur so verið tá Jóannes í Kálvalíð var uppsitari. Aðru ferð er í eini samtykt frá 1899 sagt, at vegur skal gerast úr Sandavági og til grindina í Kálvalíð.

Kálvalíð í skjølunum hjá Miðvágs kommunu

Fyrstu ferð Kálvalíð kemur fyri í skjølunum hjá Miðvágs kommunu, er árið eftir, at kommunan er sett á stovn. Í brævi 20. oktober 1916 verður skrivað til "Representanten" fyri anneksgarðin í Miðvági. Í skrivi 1917 kemur fram, at hetta er Dánjal Pauli Michelsen, óðalsbóndi á Ryggi, sum møguliga umboðar landbúnaðarráðið, sum átti Kálvalíð ella hjálpir Djóna í Kálvalíð. Sagt verður frá, at skattskylduga inntøkan hjá anneksgarðinum er sett til 1.400 kr., og at inntøkuskatturin til Miðvágs sóknar kommunu av hesum er 73,50 kr.

Dánjal Pauli skrivar aftur til kommununa og sigur, at hetta gevur eitt skattaprosent á 5 1/4. Rasmus Niclasen, formaður, skrivar aftur og sigur, at skattaprosentið í Miðvági er ikki 5 1/4, tí tað er ikki lógligt, tí einki fast skattaprosent er.

Grundin fyri svarinum er, at skatturin tá varð ikki roknaður eftir føstum skattaprosenti, men útroknaður frá talvum yvir stigvaksandi og ásetta nettoinntøku.



Tekning av Kálvalíð. Tjóðsavnið.

Kálvalíðhúsini

4. juni 1940 verður skrivað til landbúnaðarráðið sum svar upp á skriv um Kálvalíð. Forstandarskapið helt, at tað hevði verið áhugavert at varðveitt húsini sum tey eru, og helt ikki at tað hevði verið so ómetaliga dýrt at umvælt tey. Tó vil forstandarskapið ikki luttaka í beinleiðis útreiðslunum av viðlíkahaldinum, men er tilreiðar at átaka sær umsjónina av viðlíkhaldi og umvælingum í framtíðini, um ynski var um tað. Men, tá hetta er ogn hjá landbúnaðarráðnum, hevði tað verið rættast, um umsjónin var hjá ráðnum. Skuldi hetta hinvegin verið latið yvir til Føroya Forngripafelag, varð tað kanska mest hóskandi, at kommunan hevði umsjónina við tí, "ein ábyrgd, sum vit ikki vilja skúgva frá okkum", verður sagt.

Tað, sum skrivað er í brævinum 4. juni, er so eftirfylgjandi samtykt og felt í gerðabókina hjá forstandarskapinum hin 7. juni 1940. Annars sæst ikki meira til hetta fyrr enn í 1942, tá Johannes Pauli Johannesen, Miðvági, sambært kommunuroknskapinum hetta árið, hevur arbeitt við umvæling í Kálvalíð fyri 136 kr. So okkurt samskifti hevur verið um hetta við landbúnaðarráðið.

Í 1943 eru størri umvælingar gjørdar í Kálvalíð. Sambært roknskapinum hava hesir menn arbeitt við umvælingum: Albert Hansen, Johannes P. Johansen, Andreas Olsen, Sigurd J. Hansen, Hans Chr. Joensen, Steintor Johannesen, Hansias Fr. Hansen og Jens Rasmusen. Fyri tilsamans 817 kr.

20. juli 1944 er uppgerð yvir tilfar til at umvæla húsið Kálvalíð. Rokningar frá:
Zakaris Heinesen, Tórshavn, Sámal Ellefsen, Elias Ellefsen, Albert Hansen, Sigurd J. Hansen, Johs. P. Johannesen og keyp av takseymi frá Ingvard Jacobsen. Í alt 344 kr.

22. juli 1944 verður skrivað til landbúnaðarráðið, Tórshavn. Sum kunnugt eru tingingar millum kommununa og formannin í landbúnaðarráðnum um at seta húsini við Kálvalíð í stand aftur, eftir at tey vóru um at farast av elli. Semja varð um, at landbúnaðarráðið skal gjalda fyri tilfarið og at kommunan so skal seta bygningin í góðan stand, í sama stíli sum fyrr og gjalda arbeiðsløninа. Húsið er nú sett í stand so gott, sum hetta nú kann lata seg gera við tí tilfari sum fæst í løtuni. Tað verður helst neyðugt at gera okkurt innan, tá timbur fæst aftur. Eftir tykkara ávísing brúktu vit gamalt timbur úr Jansagerði, men máttu keypa takpapp, seym og nakað av timbri afturat. Vit leggja við uppgerð við fylgiskjølum yvir tað brúkta tilfari, sum vit væntað endurgoldið frá landbúnaðarráðnum. Fyri løn hava vit goldið 652 kr.

Friðing av Kálvalíð

3. mai 1949 skrivar fornminnisnevndin, Tórshavn, um friðan av fornminnum og bygningum og sendir við avrit av lóg um friðan av fornminnum, sum Føroya Løgting hevði samtykt 16.9.1948 at koma í gildið beinanvegin. Í brævinum verður kommunustýrið biðið um at gera lista yvir bygningar ella bygningspartar í kommununi, sum kommunustýrið heldur eiga at verða friðað. Hesir bygningar eiga at hava listarligt ella søguligt virði og vanliga vera yvir 100 ár.

Á fundi 27. juni 1949 er skrivið til viðgerðar. Avgjørt var at svara, at einasta fornminni av týdningi eru húsini í Kálvalíð. 1. juli 1949 verður skrivað til fornminnisnevndina, Tórshavn, og sagt frá hesi avgerð, har viðmerkt verður, at húsini harðliga treingja til umvæling.

23. august 1951 skrivar fornminnisnevndin, Edward Mitens, og takkar fyri samrøðu við sóknarstýrisformannin 20. h.m. og fyri sýndan blíðskap. Viðvíkjandi friðan av húsum tosaðu vit um húsini við Eirikstoft, sum formaðurin nevndi sum møguligt evni til friðan. Tey gomlu húsini á Ryggi vóru niðurtikin, og í Beiti vóru ikki longur nøkur gomul hús at friða. Vit vóru samdir um, at húsini í Kálvalíð eiga at verða friðað og umvæld, samsvarandi avtalu í summar. Geri so væl at siga fornminnisnevndini frá, tá hetta er gjørt.

Viðvíkjandi at takka verður fyri blíðskap, so var tað tí, at Edward Mitens beint frammanundan at brævið er skrivað, hevði verið í Miðvági og vitjað, og saman við Sørin Danielsen formanni, hugt at gomlum bygningum og søguligum støðum í Miðvági.

18. august 1955 skrivar Landsstýrið, Edward Miens, landsstýrismaður. Tað verður hervið gjørt kunnugt, at Landsstýrið hevur samtykt at friða húsini í Kálvalíð. – Edward Mitens var blivin landsstýrismaður hin 18. desember 1954, tá nýtt landsstýrið varð skipað eftir, at val hevði verið.

Umvæling av húsunum

15. januar 1951 skrivar jarðaráðið um Kálvalíð. Ráðið hevur samtykt at gjalda tilfarið, um kommunan ger arbeiðið, og einki verður broytt viðv. útsjónd og byggihátti, og arbeiðið verður gjørt eftir tilmæli og undir umsjón av fornminnisnevndini.

Skrivið er til viðgerðar á fundi í sóknarstýrinum 26. januar 1951 har samtykt verður, at sóknarstýrið skal hittast í Kálvalíð komandi sunnudagin seinnapartin.

2. mars 1951 er áðurnevnda skriv aftur til viðgerðar, og verður sagt, at stýrið hevur kannað spurningin og vil ganga við til at gjalda arbeiðið við at leggja nýtt tak á, fyri at húsið ikki skal fella niður. 7. mars 1951 verður skrivað til fornminnisnevndina og sagt frá hesi samtykt, har lagt verður afturat, at hetta er treytað av, at húsið ikki verður flutt úr bygdini, og at kommunan fær loyvi at nýta húsini til forngripagoymslu ella tílíkt, og annars hava eitt orð at siga, tá nakað verður gjørt við húsið.

Himmalsongin í Kálvalíð.

Grúgvan í Kálvalíð.

Komandi mánaðirnar skrivar fornminnisnevndin, Tórshavn, Edward Mitens, fleiri brøv og spyr um arbeiðið er gjørt, og um tað ikki er gjørt, so at fáa hetta gjørt.

6. desember 1951 verður loksins svar skrivað. Bræv nevndarinnar 17/11-51 er okkum í hendi, og skulu vit siga frá, at einki er gjørt við Kálvalíðhúsini. Orsøkin er, at arbeiðið verður nógv meira umfatandi enn væntað. Nærri kanningar hava víst, at ikki bert yvirtromin má endurnýggjast, men at tann eini veggurin má takast niður og laðast upp av nýggjum. Sóknarstýrið samtykti at gjalda arbeiði við nýggjum taki, men tá veggurin eisini skal gerast, so er spurningurin, hvør skal gjalda tað. Nevndin biðist seta uppskot fram av nýggjum, so vit kunnu samráðast um gjaldið av útsíðuni. Upp á fyrispurning, verður eisini sagt, at hvussu festið eitur, vita vit ikki, men festarin eitur Johanne Johannesen.

8. desember 1951 skrivar fornminnisnevndin, Edward Mitens, og skjýtur upp, at kommunan rindar helvtina av arbeiðinum við nevnda vegginum og biðist siga, nær arbeiðið kann byrjast, og hvussu nógv tað kostar umleið.

15. apríl 1952 fær kommunan tilboð frá Absalon Jacobsen og Harald Hansen, Miðvági, um at gera arbeiði við Kálvalíðhúsunum. Tilboðið umfatar, at laða veggirnar upp, taka yvirtromina av og gera hana úr nýggjum, tað sum treingir, so sum sperrur o.a. og síðan tekja øll húsini við nævur og flag. Alt fyri tilsamans 4.500 kr.

Tilboðið er til viðgerðar á fundi í sóknarstýrinum 3. mai 1952, har samtyk varð at skriva til Fornminnisnevndina, og biðja teir senda gjølla leiðbeining um hvussu arbeiðið skal gerast ella helst senda kønan mann vestur at leggja lag á. Stýrið viðtók samstundis at bera helvtina av kostnaðinum við at taka grótveggin niður og laða hann uppaftur, umframt at gjalda arbeiðið við at tekja. Sama dag 3. mai 1952 verður skrivað til fornminnisnevndina, sum svar upp á skriv 8. desember árið fyri um Kálvalíðhúsini. Sagt verður, at teir hava ikki lagt í at skriva fyrr, tí einki kundi gerast í vetur, og sagt verður annars frá avgerð sóknarstýrisins viðv. arbeiðinum. Lagt verður afturat: Vit eru allir klárir at byrja arbeiðið nú, og tann gamla kirkjan er seld og skal helst takast niður í hesum mánaðinum. Her kemur so spurningurin um nævrina á kirkjuni. Her má ein álitismaður taka nævrina av tekjuni og leggja hana undir press á hóskandi stað. Hvør skal fyriskipa hetta?

13. mai 1952 skrivar fornminnisnevndin, Edward Mitens. Undirskrivaði hevur havt samráð við nevndarlimirnar, umframt við Kristian Djurhuus, løgmann og landbrúksskrivstovuna. Sverri Dahl, fornfrøðingur, kemur til Miðvágs at samráðast við tykkum og Petur Heinesen, Sandavági, sum umboðar landbúnaðarráðið, um hvussu arbeiðið eigur at fara fram, harundir, um tað er neyðugt at taka grótveggirnar niður, og hvussu nógv av hesum. Og um hvussu skal gerast við nævrina frá kirkjuni. Ger so væl at skriva ella ringja til Sverra Dahl nakrar dagar

Uml. 1933. Seinastu búfólkini í Kálvalíð: Djóni t.v. og Jóhanna mitti fyri. Hini eru: Anna Johansen f. Heinesen, Heine Johansen barn og Frida Sørensen f. Johansen. Standa uttanfyri Kálvalíð.

áðrenn tit ætla at byrja, so hann kann koma vestur. Tað er av størsta týdningi, at arbeiðið verður gjørt nú.

27. mai 1952 skrivar landbúnaðarráðið, og sigur, at jarðaráðið vil gjalda tilfarið til umvæling av húsunum í Kálvalíð. Fyri nævur av gomlu kirkjuni í Miðvági, tá hendan er tikin av kirkjuni og flutt í góðum standi til húsini í Kálvalíð, 700 kr. Fyri timbur úr gomlu kirkjuni í Miðvági, 400 kr. Goldið verður smb. kvittanum, sum skulu vera váttaðar av Peter Heinesen, Sandavági.

12. juli 1952 skrivar formninnsnevndin og sendur uppskot um umvæling av húsunum í Kálvalíð. Við er lagt skriv, dagfest 11. juli 1952 frá Landsverkfrøðinginum við fyribils yvirliti yvir neyðuga umvæling í summar. Og tað er rættuliga nágreiniligt og fyllir gott 3 maskinskrivaðar síður. Her er vegleiðing um: Grótarbeiði, rennur, timburarbeiði, stovusyllar, bróst, stórvið, borðvið umframt arbeiðir og arbeiðsgongd.

21. juli 1952 var málið um Kálvalíðhúsini til viðgerðar. Allir limir vóru møttir uttan formaðurin, H.M. Thomasen, ið var burturstaddur. Bræv var komið frá Landsverkfrøðinginum við yvirliti yvir umvælingarnar. Kostnaðarætlan er eisini við og meta teir hetta soleiðis: Tilfar 3.180 kr., arbeiðsløn 3.300 kr. Tilsamans 6.480 kr. Stýrið hevur fyrr játtað at gjalda arbeiðslønina, og er nú tilboð komið aftur frá Harald Hansen og Absalon Jacobsen, har teir vilja gera arbeiðið fyri tað, sum tað er mett til, nevniliga 3.300 kr. Avgjørt varð at taka av tilboðnum.

25. november 1952 er frágreiðing skrivað (helst til fornminnisnevndina, Tórshavn) um arbeiðið við at umvæla húsini í Kálvalíð. Gamla tróðurið er tikið av og nýtt sett ístaðin. Nýggjar sperrur eru gjørdar og skottrennur og nýtt tróður lagt á. Takt er so við nævur og flag, men nævurið rakk bert til helvtina, restin er gott takpapp. Umframt mangt annað sum í smálutum verður nevnt at vera gjørt úr nýggjum í húsinum. Fjósið er takt við nævur og flag, nýggjar syllar og ein nýggjur bjálki og nýggjur hornastólpi og nýggj yvirtrom er gjørd. Við undantakið av takpappinum er alt tilfarið, sum nýtt er, fingið tilvega av tí gomlu kirkjuni í Miðvági, ið varð niðurtikin sama ár, nevnda umvæling fór fram.

11. desember 1952 verður skrivað til fornminnisnevndina, Tórshavn, og send uppgerð yvir umvælingararbeiði. Sagt verður at arbeiðið er gjørt í samráð við Landsverkfrøðingin. Nevnd verða so ymsir smálutir um hvat ið er gjørt innan eisini. M.a. umvæling av song, borði, træhonglsum til hurðarnar, uppseting av hvørnini o.a. smávegis. Kommunan hevur goldið lønina. Sjálv húsini eru nú í góðum standi, men tørvast nógv at gera uttanfyri, m.a. laða

hoygarðin upp, laða garðin omanfyri húsini upp, gera gongubreyt og tílíkt. Best hevði eisini verið at stikað alt økið inni, sum hoyrir til húsið? Jóhanna flytir nú niðan at búgva og hevur hon játtað at vaskað væl innan og halda alt í góðum standi. Hetta varð ein dýr umvæling, men halda vit, at allir partar kunnu vera glaðir yvir, at arbeiðið er gjørt. Samlaða arbeiði, sum Harald Hansen og Absalon Jacobsen hava gjørt, umframt tilfar, kostar tilsamans 6.470 kr.

Í roknskapinum frá 1952 sæst, at arbeitt var frá byrjan av august og til endan av desember 1952. Goldið varð: Absalon Jacobsen, 1.100 kr. Harald Hansen, 1.320 kr. Brynjálvur Nattestad, 935 kr. Albin Wang, bilrokning, 38 kr. Hans Jacobsen, bilrokning, 15 kr. Tilfar varð keypt frá Balslev & Co., seymur, 28 kr. Havnar Timburhandil, seymur, 11 kr.
Martin Jacobsen, fyri takplátur, 48 kr. Miðvágs kirkju bygginevnd, nævur av gomlu kirkjuni fyri 600 kr. Hans Cristoffur Hansen, bátasmiður, timbur av gomlu kirkjuni, 250 kr. Í alt, 4.345 kr. Hetta er tað, sum var útgoldið í 1952.

Frá august til oktober 1952 arbeiddi Absalon Jacobsen einsamallur, men bert fyri 200 kr. í løn, so tað hava verið smáarbeiðir og fyrireiking. Í oktober koma Brynjálvur Nattestad og Harald Hansen uppí, og tá verður smb. lønarútgjaldingunum arbeitt rættuliga nógv og tað er hendan mánaðin, meginparturin av arbeiðinum er gjørt hetta árið. Í november og desember arbeiða bara Absalon Jacobsen og Harald Hansen, og tá eru lønútgjaldingarnar smærri aftur.

6. januar 1953 hevur fornminnisnevndin sent uppgerðina yvir umvælingina av Kálvalíðhúsunum til jarðaráðið. Landsverkfrøðingurin hevur kannað uppgerðina og er einki at viðmerkja. Fornminnisnevndin mælir til, at jarðaráðið rindar 3.000 kr. til Miðvágs kommunu.

24. mars 1953 skrivar jarðaráðið, Tórshavn. Jarðaráðið hevur viðgjørt málið á fundi og hevur samtykt, at halda seg til avgerð sína 27/5-1952 at rinda 700 kr. fyri nævur og 400 kr. fyri tilfar, í alt 1.100 kr. Ráðið heldur seg ongar skyldur hava at rinda meir enn hetta og verður hetta sent kommununi til fulla avgerð.

Her byrjar so eitt langt trætumál, har kommunan skrivar til fornminnisnevndina, sum í fleiri førum roynir at skriva til jarðaráðið, fyri at fáa teir at gjalda tað kommunan krevur, men teir vilja ikki boyggja seg. Kommunan sigur m.a., at teir halda tað verða nógv fyri at farið verður soleiðis fram av jarðaráðnum, tí tað er jú teir, sum eiga bygningin.

Endin er, at sóknarstýrið hin 11. desember 1953 skrivar til Per Keller og Leivur Lützen, landsrættarsakførarar, Tórshavn, og senda kravið til innheintingar. Sagt verður, at av uppgerðini 3.000 kr. hevur jarðaráðið goldið 1.100 kr. Íresta 1.900 kr. og biðjast tygum innheinta hetta frá fornminnisnevndini. Vit hava havt brævaskifti við nevndina, harra Edward Mitens, og kravt omanfyri nevnda pening uttan úrslit.

Málið endar hin 3. apríl 1954 við, at Landsstýrið skrivar, at tað ikki hevur havt nakran pening á fíggjarlógini til nýtslu eftir lógini um friðan av húsum v.m., men tingið hevur nú samtykt, eftir fíggjarlógini 1954/55 at játta so mikið, at Landsstýrið fær endurrindað kommununi 1.900 kr., og Gjaldstovan er samstundis biðin um at rinda kommununi peningin.

Í 1953 verður hildið fram við umvælingini av Kálvalíðhúsunum. Tilfar er keypt inn allar mánaðirnar frá februar til juli hetta árið. Smb. lønútgjaldingunum er alt arbeiðið gjørt í oktober. Árið fyri var høvuðsparturin eisini gjørdur júst í oktober. Teir, sum arbeiddu við umvælingini vóru, Absalon Jacobsen og Harald Hansen. Bilrokningar vóru frá Sigvald Hansen og Hansias Hansen.

Hegn varð keypt frá Thomas Dam & Co, timbur frá Rasmus Poulsen og Hans Cristoffur Hansen, bátasmiði, tjørupapp frá Pf. N. Niclasen, ymiskt frá Engelbrecht Poulsen og Henning Ellefsen. Í alt fyri 1.852 kr.

Kálvalíð húsini nú á døgum.

Kommunan fær Kálvalíð sum ogn

15. mars 1957 var til viðgerðar bræv frá Landsstýrinum, har teir bjóða kommununi Kálvalíðhúsini sum ogn móti at halda tey viðlíka. Uppskot frá fornminnisnevndini fylgdi við. Sóknarstýrið helt ikki hetta uppskot vera nóg fullfíggjað, m.a. stóð einki um, hvussu stórt øki fylgir við húsunum. Eisini var tvørligt, at Jóhanna Johannesen, sum nú búði í húsunum, skuldi hava ræðið á húsunum. Stýrið samdist um at skriva til Landsstýrið og fáa greiðari upplýsingar. – Sambært skrivi 11/12-1952 flutti Jóhanna niðan í Kálvalíð um tað mundið.

27. juli 1960 var til viðgerðar bræv frá Landsstýrinum við ognarskjali frá jarðaráðnum uppá húsið og toftir í Kálvalíð, men við tí treyt, at alt verður varðveitt væl og virðiliga. Samtykt varð at taka við gávuni við givnu treytunum.

Á fundi 13. november 1963 varð til viðgerðar bræv frá útskiftingarnevndini dagf. 22/10-1963 viðvíkjandi húsunum í Kálvalíð og økið har uttanum. Sóknarstýrið hevur skilt tað so, at kommunan hevur fingið økið frá jarðaráðnum sambært korti, ið er viðlagt skeyti uppá húsini og økið dagf. 6/5-1960. Avgjørt varð at skriva til jarðarráðið, Landsstýrið og útskiftingarnevndina fyri at fáa greiðu á hesum máli.

3. februar 1964 eru Kálvalíðhúsini til viðgerðar, har sagt verður, at tað er neyðugt at fáa allar teir gomlu lutirnar settar upp á pláss innan í húsunum og fáa gjørt aftur ymisk brek, sum er farið innan. Avgjørt varð at fáa Harald Erikstein at geva tilboð uppá arbeiðið. Eisini var avgjørt at hegna økið og finna útav, hvat hetta kostar.

Roknskaparárið 1964/65 verða 3.725 kr. brúktar upp á Kálvalíðhúsið, 1965/66, 3.200 kr og 1966/67, 864 kr.

Nýggjar umvælingar

Á fundi 7. juni 1967 er til viðgerðar, at Harald Eirikstein, sum hevur umvælt húsini innan, hevur vent sær til kommunuskrivstovuna og upplýst, at neyðugt var at leggja nýtt tak á Kálvalíðhúsini, tá tað mesta av takinum lekur, og heldur hann, at hetta má gerast skjótast gjørligt. Sóknarstýrið samtykti at útseta málið. Hetta árið verða tó 1.780 kr. brúktar upp á húsið, so lekarnir eru helst tettir.

Annars sæst ikki meira til Kálvalíð í skjølunum hjá kommununi í fleiri ár.

Á fundi 3. desember 1976 verður samtykt at keypa eina viftu til Kálvaliðshúsini og leggja el inn til hetta sama.

Í 1978 verða 7.300 kr. brúktar og í 1979, 2.300 kr. upp á Kálvalíð.

22. mai 1979 er til viðgerðar skriv frá Svenn Brimheim & Martin Erik Leo, ráðgevandi

verkfrøðingar, Tórshavn, um upphitan av Kálvalíð. Kostnaðurin er ætlaður at vera 10.000 kr. Hetta varð samtykt. Smb. roknskapunum er hetta arbeiðið helst ikki gjørt fyrr enn árið eftir. Tí roknskaparárið 1979/80 verða bert 3.100 kr. brúktar, meðan tað fyri 1980/81 verða brúktar 22.000 kr. upp á Kálvalíðhúsini.

Komandi árini verða nakað av pengum brúktir upp á húsini, men kommunan fær nú eisini stuðul ella endurgjald fyri góðkendar útreiðslur.

1982/83 eru 31.700 kr. brúktar, men kommunan fær 21.000 kr. engurgoldið í stuðli.

26. mars 1986 skrivar Føroya Fornminnissavn, Tórshavn, og sigur, at kommunan hevur fingið rakstrarstuðul til Miðvágs bygdasavn (Kálvalíð og Beitishúsini) 40% av 20.200 kr. = 8.080 kr. Hetta árið er eisini uppgerð yvir raksturin: Gjald til S.E.V., trygging 675 kr., landsverkfrøðingin 90 kr., Jógvan Ravnsfjall 1.545 kr., Jóhannus Jacobsen 300 kr., arbeiðsløn 6.286 kr., Hans Chr. Joensen 375 kr., Einars Prent 1.650 kr., Alfred Gullfoss 3.985 kr. Í alt 16.504 kr.

Á almennum bygdarrádsfundi 14. apríl 1988 verður sagt, at mentamálanevndin hevur viðgjørt spurningin um fastar upp- og affurlatingartíðir í Kálvalíð. Skotið verður upp at hava opið nakrar tímar hvønn dag, mikudag, fríggjadag og sunnudag summarmánaðirnar. Og at atgongugjaldið, sum var 10 kr., verður hækkað til 20 kr. Um størri bólkar koma, kann avtala gerast um tíð við Niels P. Hansen, sum passar savnið. Pensionistar gjalda hálvt gjald og børn ókeypis.

Árini 1988 til 1992 liggja útreiðslurnar av Kálvalíð í miðal um 20.000 kr. um árið.

Á fundi 14. mai 1997 verða nýggir prísir ásettir: 1 til 10 fólk kr. 30,- fyri hvønn. 10 til 20 fólk kr. 20,- fyri hvønn. 20 fólk og meira kr. 15,- fyri hvønn.

Á fundi 23. mars 1998 verður sagt, at Rigmor Heinesen hevur sagt upp í Kálvalíð og at samtykt varð at lýsa eftir fólki í talvuni. Hvussu leingi hon hevur starvast har er ikki nevnt. Upp til 1988 sæst, at Niels P. Hansen hevði hetta yrki, men ikki nær hann gavst og Rigmor tók við.

Sum skilst av fundi 15. mai 2001, so tók Paula Nattestad við sum framsýnari á savninum eftir Rigmor, tí á tí fundinum verður sagt, at Paula hevur sagt starvið frá sær. Joen Pauli fær heimild at seta egnað fólk.

Tann næsti í yrkinum man so hava verið Thordis Hansen í Miðvági. Tí hin 7. juli 2019 skrivaði Vága kommuna á síni heimasíðu, at Thordis Hansen í Miðvági, nú var givin sum

Kálvalíð húsini nú á døgum.

Gróthúsið á Ryggi, eldri mynd.

ferðaleiðari í Kálvalíð. Hon hevði røkt hetta starvið fyrimyndarliga nú í nógv ár. Nú hevði hon so sagt seg úr starvi sum 83 ára gomul. Eftir hana tók Lydia Laksafoss við. Í sambandi við hetta skipaði kommunan fyri eini lítlari hugnaløtu fyri Thordis.

Kálvalíð og Gróthúsið á Ryggi latin til Miðvágs bygdasavn

Á fundi 30. juni 1999 verður sagt, at Føroya Fornminnissavn heitir á kommununa um at tinglýsa Kálvalíð og Gróthúsið á Ryggi undir navninum Miðvágs bygdasavn v/ Miðvágs kommunu. Matr. nr. 233t og 163f. Samtykt varð at ganga áheitanini á møti.

Matr. nr. 233t er Kálvalíð og økið rundanum 1206 m^2. Matr. nr. 163f eru Gróthúsið á Ryggi og økið rundanum har út til vegin 577 m^2. Bæði matrikulerað sum ogn hjá Miðvágs bygdasavni hin 17. september 1999.

Jansagerði

Aldargamli prestagarðurin í Miðvági var í Jansagerði á sonevnda "Prestlandinum" á syðra armi á Miðvági.

Prestagarðurin sæst fyrstu ferð skrivliga nevndur í roknskaparbók frá 1583 og verður har nevndur "Ansidegjærde". Skjøl finnast ikki longur aftur enn til 1583, so garðurin kann saktans vera væl eldri enn tað.

Áðurnevnda navn hevur gjørt, at ymsar hugsanir hava verið til navnið í Jansagerði. Fyrsti presturin, sum nevndur er við navnið í Vágum, var Frater Jens, sum var katólskur prestur, og hevur helst verið prestur í Vágum síðst í 1400 árunum og fyrst í 1500 árunum, møguliga nevndur Jan. Næsti presturin var sonur hansara, nevndur Peder Jensøn. Í 1538 gjørdist hann fyrsti lutherski presturin í Vágum. Summi halda, at navnið á prestagarðinum kann koma av hesum, altso, "Jan'sa gerði" (gerði hjá Jan). Onnur hugsan er, at hetta er eitt gerði í eini brekku, og at tað tí hevur verið nevnt eitt "angerði", har "an" merkir mótbrekka. Og aftur annað ástøði er, sum fyrsta navnið "Ansidegjærde" bendir á. At tað einfalt merkir, at gerði var hinumegin vánna, á mótsíðuni – an-síðuni. Við tað at bygdin annars var á hinari síðuni av fjørðinum.

Annars búðu allir prestarnir í Vágum í Jansagerði, og teir eru allir nevndir nágreiniliga aðrastaðni, so tað er ikki neyðugt at endurtaka tað her. Og hevur sum so heldur ikki so nógv við kommunusøgu at gera við tað, at tað ikki er fyrr enn í heilt nýggjari tíð við endan av tíðini hjá Miðvágs kommunu, at komman gjørdist eigari av Jansagerði.

Prestagarðurin í Miðvági brendi hin 15.12.1839, sama ár Engelsted varð vorðin prestur. Í eldinum fórust allar embætisbøkurnar fyri Vága- og Norðstreymoyar prestagjøld fyri 1797. Søguliga sæð var tað størsta ólukkan við tí eldinum. Prestagarðurin sjálvur var eftirfylgjandi bygdur uppaftur, men bøkurnar fingust ikki aftur, og avrit var tíverri ikki av teimum.

Seinasti presturin, sum búði í Jansagerði, var Carl Johansen prestur, sum var prestur í Vágum frá várinum 1893 til heystið 1914.

Eftir at Carl Johansen var farin, vóru høvuðshúsini tikin niður og nýggjur prestagarður bygdir hinumegin vánna, á Dalbø, niðast í Grimsmørk í Miðvági.

Uppsitarahúsini í Jansagerði vórðu í 1920 árunum bygd á grundina av gamla prestagarðinum, við viði av gamla prestagarðinum. So hesi eru tað nærmasta, vit í dag koma til gamla prestagarðin í Jansagerði. Tó at hesi húsini eru bygd í øðrum sniði enn tey gomlu.



Stovuhædd, Jansagerði. Skitsa gjørd eftir uppruna tekning, s.j.



Loftið, Jansagerði. Skitsa gjørd eftir uppruna tekning, s.j.



Teknig av fjósinum í Jansagerði. Nýggur føroyskaður tekstur settur á summastaðni fyri at gera tað betur lesandi.

2. oktober 1917 verður skrivað til uppsitaran, J.J.A. Joensen á Ryggi, kongsbónda og sagt, at pestagarðurin, Jansagerði, er settur til inntøku árið 1917 á 2.250 kr. Inntøkuskatturin til Miðvágs sóknar kommunu av hesum er 118 kr. Tað er fyrsu ferð gamli prestagarðurin í Miðvági er nevndur í skjølunum hjá Miðvágs kommunu. Komandi áratíggjuni sæst ikki nógv til hann, fyrr enn í 1979, tá viðgjørd verður umsókn um at byggja fast í uppsitarahúsini í Jansagerði, sum verður játtað.



Yvirlitstekning av prestagarðinum í Jansagerði. Litir settir á, s.j.

Kommunan keypir Jansagerði

21. mars 2002 var eyka bygdaráðsfundur. Í gerðabókini stendur, at ognin í Jansagerði stóð á sølulista. Í gerðabókini verður sagt: "Jansagerði hoyrir í søguligum høpi saman við Kálvalíð, sum Miðvágs kommuna nýtir sum bygdasavn. Boð er innkomið uppá kr. 375.000,-. Trivnaðarnevndin og fíggjarnevndin mæltu at bjóða uppá húsini og bygdaráðið samtykti málið."

Í apríl 2002 er boðið komið upp á 655.000 kr. Bygdaráðið var ikki sinnað at bjóða hægri enn hetta. Smb. frásøgn var tað ein úr Havnini, sum bjóðaði ímóti kommununi, tí hann ætlaði at keypa húsini til ein son hjá sær. Miðvágs Forngripafelag fór so undir at savnað inn pening, og tað eydnaðist teimum at savna inn 65.000 kr. Harvið kom upphæddin upp á 730.000 kr. Tað var tó kommunan, sum bjóðaði uppá húsini.

Á fundi 9. apríl 2002 verður upplýst, at boðið er komið upp á 665.000 kr. Samtykt varð at bjóða upp til 730.000 kr.

Málið er fyri aftur á fundi 7. mai 2002. Miðvágs kommuna átti hægsta boð uppá kr. 675.000,-. Vit hava í gjár fingið at vita frá Julionnu Klett, uppboðshaldara, at hægri boð kemur ikki. Kommununar partur kemur sostatt at verða kr. 272.500,00. Samtykt varð at keypa.

6. juni 2002 varð Jansagerði, matr. nr. 43c í Miðvági, hús og grundøki 1632 m^2, matrikulerað sum ogn hjá Miðvágs bygdasavni.

Í roknskapinum hjá kommununi 2002 standa 272.500 kr. at verða brúktar til Jansagerði.

Jansagerði. Aftast frá vinstru: Fredrikka Biskupstød, ættað úr Klaksvík, giftist Jósup Josephsen úr Miðvági. T.h. Sofía Petersen, ættað úr Sandavági, giftist Rasmus Heinesen úr Miðvági. Fremst: prestafrúan, Johanna, sonurin Holgar og prestur, Karl Johansen.
Eru í urtagarðinum, frammanfyri prestagarðin.

Umvæling av Jansagerði

19. november 2002 skrivar Føroya fornminnissavn, Tórshavn. Viðvíkjandi umvæling av Jansagerði í Miðvági. Jóannes Stephansson savnshjálpari og undirritaði vóru í Miðvági tann 14. november 2002 fyri at rágeva Miðvágs bygdasavni, hvussu stovurnar báðar í Jansagerði skuldu umvælast. Avtalað varð at senda bygdaráðnum skrivligt tilmæli.

Viðlagt er eitt 3 síður langt tilmæli, sum Mayfinn Norðoy arkitektur hevur undirskrivað og helst gjørt.



Gomlu uppsitarahúsini innan. Skitsa gjørd eftir uppruna tekning, s.j.

Á bygdaráðsfundi 24. august 2004 er til viðgerðar skriv frá Miðvágs Fornminnisfelag um millum annað hølisviðurskifi. Fíggjarnevndin hevur lagt málið fyri bygdaráðið. Samtykt varð, at heita á fornminnisfelagið um at byrja at gera loftið í Jansagerði.

13. januar 2005 skrivar Føroya Fornminnissavn, Tórshavn, viðv. umvæling av Jansagerði. Eftir áheitan frá bygdasavninum hevur byggideildin á Føroya Fornminnssavni gjørt uppskot viðvíkjandi umvæling og afturføring av útsíðunum í Jansagerði. Hjáløgd eru tvey eintøk av uppskoti 1. Annað eintakið er ætlað, at gera rættingar og viðmerkingar í. Rættingarnar verða sendar fornminnissavninum. Savnið rættar og reinteknar síðani tekningarnar. Vinarlig heilsan, Mayfinn Norðoy, arkitektur.

Á fundi 1. juni 2006 verður samtykt at taka undir við uppskotinum hjá fornminnisfelagnum.

Á almennum bygdaráðsfundi 6. mars 2007 er til viðgerðar umsókn frá Miðvágs Fornminnafelag um játtan at gera Jansagerðishúsini liðug. Trivnaðarnevndin mælti til at játta treytað av, at Føroya Fornminnissavn eisini játtar. Fíggjarnevndin hevði kannað hvussu tílik umbygging verður fíggjað. Smb. fornminnissavninum rinda teir 60% og kommunan 40%, um teir játta umsóknini. Samtykt varð so at játta umsóknini, treytað av, at Føroya Fornminnissavn eisini játtar.

Smb. roknskapinum fær kommunan, árini 2006 – 2008, um 100.000 kr. um árið aftur í stuðli frá landinum fyri keypið av Jansagerði og at seta húsini í stand fyri. Og árini 2005 til 2008 brúkti kommunnan í miðal 120.000 kr. um árið til endamálið.

Kirkjugarðar í Miðvági

Elsti kirkjugarðurin í Miðvági, vit vita um, stóð við Kirkjar, niðanfyri núverandi "Gamla kirkjugarð", niðanfyri brúnna og nakað oman við ánni. Niðasti partur av honum skolaði burtur í brimi veturin 1877/78. Avgjørt varð tá at niðurleggja kirkjugarðin og hann varð sambært

Mynd frá umleið 1910. Mitt fyri fremst sæst kálgarður hjá Ólavi Hansen, við Kirkjar. Her segðist fyrsti kirkjugarðurin í Miðvági at hava verið.

frásøgn, allur grivin upp og beinagrindirnar fluttar niðan í nýggja kirkjugarðin og grivnar í felagsgrøv ella felagsøki har.

Seinni gjørdi Ólavur Hansen í Kirkjastovu ein kálgarð niðanfyri vegin, har elsti kirkjugarðurin hevði verið. Kálgarðurin sæst á gomlum myndum av býlinginum við Kirkjar. Elsti kirkjugarðurin hevur so verið áleið har, eystara síða av bygdarhúsinum er nú, oman við teirri nú innilokaðu ánni har.

Gamli kirkjugarður

2. mars 1878 varð núverandi Gamli kirkjugarður við Kirkjar tikin í brúk. Hesin kirkjugarðurin liggur eisini við ánna, men nakað hægri enn tann gamli hevði ligið. Og hevur tað tí verið mett trygari at leggja hann har, sjálvt um tað ikki var langt frá ovaru síðu av, har gamli kirkjugarðurin hevði verið.

Tá vit ikki taka beinangrindirnar frá elsta kirkjugarðinum við, so var tann fyrsti, sum varð grivin í hesum kirkjugarðinum Anna Elisabeth Jacobsdatter einkja eftir Joen Joensen í Miðvági. Hon doyði 28. februar 1878 80 ára gomul, og varð jarðað í tí tá nýggja kirkjugarðinum 2. mars 1878. Tað doyðu annars 11 fólk í Miðvági hetta árið, sum vóru jarðað í kirkjugarðinum.

Tað einasta, vit finna um kirkjugarð í Miðvági í skjølunum hjá Vága prestagjalds kommunu, sum var virksom árini 1873 – 1915, er júst árið 1878, har arbeitt verður við umvælingum á kirkjugarðin.

29. august 1878 er skriv komið til kommununa frá "kirkeværgen i Midvaag" um, at hann metir, at neyðugt er við 6 dagsverkum á 10 tímar pliktarbeiði at bøta um kirkjugarðin í Miðvági. Hetta sýnir, at, hóast at kirkjugarðurin er tikin í brúk í mars hetta árið, so er ikki alt í lagið við honum, ella er hann ikki heilt liðugur. Í roknskapinum 1878-1879 stendur viðmerkt um pliktarbeiði: "Umframt vegarbeðið var í Miðvágs sókn arbeitt 45 tímar í kirkjugarðinum." So umframt møguligt sjálvboðið og lønt arbeiði, so eru 45 tímar av pliktarbeiði hjá kommununi brúktir at bøta um tann tá nýggja kirkjugarðin hetta árið.

Í skjølunum hjá Vága prestagjalds kommunu er einki meira at finna um kirkjugarð fram til 1915.

1. oktober 1915 tekur Miðvágs kommuna við. Fyrstu ferð kirkjugarðurin er umrøddur í skjølunum hjá Miðvágs kommunu er sama ár í gerðabókini fyri fund 27. desember 1915. Hetta er tó ikki beinleiðis í sambandi við kirkjugarðin, men at játtað verður Jóan Paula Ellefsen at byggja eitt íshús 3,8 metur niðanfyri kirkjugarðin.

Fyrstu ferð, útreiðslur verða staðfestar í roknskapinum hjá Miðvágs kommunu í smb. við kirkjugarð, er í roknskapinum 1921/22, tá 100 kr. verða brúkar til kirkjugarðin.

Víðkan av gamla kirkjugarði

31. januar 1923 skrivar Kristian Keiding, prestur í Vágum: "Øll plássini í tí núverandi kirkjugarðinum í Miðvági eru brúkt, og hevur kirkjuráðið á fundi tikið avgerð um at venda sær til forstandarskapið við umbøn um, at kirkjugarðurin verður víðkaður. Kirkjuráðið skjýtur upp, at stykkið klos við kirkjugarðin, sum er kongsjørð, verður nýtt. Sigast kann eisini frá, at stykkið verður góðkent av økislæknanum, sum hevur verið og sæð stykkið."

Viðgerð av hesum skrivi ella svar, sæst ikki í skrivum ella í gerðabókini hjá kommununi um hetta mundið, men tað má hava verið umrøtt kortini. Í roknskapinum 1922/23 sæst, at brúktar eru 504 kr. til kirkjugarðin hetta roknskaparárið, sum er um sjey ferðir hvat vanligt varð at brúka árliga til kirkjugarðin hesa tíðina. Um vit samanlíkna kort frá áðrenn og aftaná, eru pengarnir brúktir til at víðka um kirkjugarðin umleið 4 metrar niðaneftir.

Nýggjur kirkjugarður varð tikin í brúk Niðri á Tjørn í Miðvági í 1935, og eftir tað vóru vanliga øll tey deyðu jarðað har. Men hóast hetta so eru millum 1936 og 1971 14 fólk jarðað í Gamla kirkjugarði við kirkjar. Seinasta skrásetta jarðaferðin har var hin 14. mars 1971 og var tað grøv nr. 362 í hesum kirkjugarðinum. Við einkultum undantaki vóru tað alt gomul fólk, sum helst hava biðið sær pláss frammanundan.

Umsjónarmenn við kirkjugarðarnar í Miðvági

Miðvágur er einasta sókn í Vága prestadømi, sum í langar tíðir hevði fastlønt umsjónarfólk til kirkjugarð. Í hinum sóknunum hevur verið vanligt, at arbeiðsfólk hjá kommununi, ella onnur tímalønt, hava sligið kirkjugarðin eina ella tvær ferð um árið.

Á fundi í forstandarskapinum 9. juli 1926 var til viðgerðar umsókn frá prestinum, at kommunan skuldi gera nakað fyri at seta kirkjugarðin í fyribils stand, soleiðis at alt ikki gróði heilt yvir við ókrúti. Samtykt var at tingast við ymsar persónar og fáa ein ella annan at gera hetta uppá kor, sum man kundi semjast um.

Jákup Pauli á Dalbø

Jákup Pauli Johansen á Dalbø, Miðvági, varð í 1926 settur at røkja kirkjugarðin. Hann er so tann fyrsti, sum hevði tað starvið fast í Miðvági. Fyri hetta fær hann samsýning eftir hvussu nógv hann hevur arbeitt í kirkjugarðinum.

Smb. fólkateljingini 1925 er Jákup Pauli føddur í 1875, er giftur, og har eru tríggjar døtur í húsinum, tann elsta er 14 ára gomul og stendur at vera "expetrise", t.v.s. arbeiðir í handli. Sjálvur fæst Jákup Pauli við nakað av útróðri og eitt sindur av landbrúki.

Jákup Pauli átti eisini ein son. Hann doyði í vanlukku, har 3 bátar úr Miðvági, eftir bráddligt ódnarveður hin 14. november 1923, við neyð og deyð slitu upp land. Tvær bátsmanningar bjargaðu sær á land upp á eina hellu tætt við Miðvág, meðan triði báturin "Proppur" hálvdist beint uttanfyri helluna, ein bjargaðist og 4 sjólótust. Millum teir sjólætnu var Karl, sonur Jákup Paula. Lesast kann meir um hesa hendingina í Siglingarsøguni, bind VI, bls. 147 – 149.

Jákup Pauli Johansen t.v. og sonurin, Karl Johansen t.h.

Í váttanarskrivi, 12. mars1924 til Jákup Paula sigur forstandarskapið í Miðvági um son hansara: "Johan Carl Sigurd Johansen úr Miðvági, undirhelt partvís foreldrini við tað at hann lat teimum inntøkuna. Faðirin er sjúkur og soleiðis ikki fult førur fyri at undirhalda familjuni. Tí kemur tað at merkjast sum ein stórur missur, tað sum drongurin lat og sum nú ikki verður." – Váttanin skal helst brúkast til at søkja um almenna hjálp til familjuna, umframt tað, kommunan møguliga kann lata, sum í mestan mun var arbeiði. Áðurnevnda hending er tí helst ein stór grund til, at Jákup Pauli fær boðið at røkja kirkjugarðin, umframt at hann gjørdi onnur smærri arbeiðir hjá kommununi um hesa tíðina, m.a. gjørdi hann smærri umvælingararbeiði við læknahúsunum og røktaði urtagarðin har.

Samsýningin fyri at røkja kirkjugarðin hevur tó ikki verið til at liva av, so tað er eyka-inntøka. Gjaldið er nakað svingandi upp til 1931, í miðal um 30 kr. um árið. Í 1931 eru eisini 2 kr. goldnar til Kristiannu Johansen og 4 kr. til Jóan Petur Wang, fyri røkt av kirkjugarðinum, hetta fyri okkurt smáting eyka, tey hava gjørt. Í 1932, sum er seinasta árið hjá Jákup Paula, fær hann 25 kr. Hann hevði tá røkt kirkjugarðin í 8 ár.

Jákup Pauli doyði longu árið eftir, 11.4.1933, 52 ára gamal. Smb. kirkjubókini, deyður av lungnabruna. Jarðaður 14.4 í Miðvági.

Oyra Kristin

Kristin Jacobsen í Miðvági, vanliga nevndur Oyra Kristin, varð settur sum røktari av kirkjugarðinum í Miðvági í 1933. Í skrivum ella gerðabók frá hesi tíð er einki at finna um hesa setan. Tó er hann nevndur í roknskapinum fyri 1933, har staðfest verður, at hann fær 31 kr. fyri at røkja kirkjugarðin hetta árið. So metast má, at lønin er galdandi frá 1.1.1933, tí ársløn fyri hetta arbeiði, bæði árið undan og eftir, er 25 kr., sum helst hevur verið fasta samsýningin tá. So hann hevur fingið 6 kr. fyri eykaarbeiði hetta árið.

Kristin Jacobsen var føddur í 1887. Í fólkateljingini 1925, sum er tann nærmasta, vit lættliga sleppa til í hesum førinum, verður sagt, at hann og familja búgva í húsunum Norði í Geil í Miðvági. Konan, Jørgina, er ættað úr Fuglafirði og tey hava fimm børn í húsunum, elsti sonurin er 14 ár. Umframt búgva tvær ógiftar systrar hjá Kristini har eisini. Yrkið hjá Kristini var havnaarbeiðsmaður, t.v.s. hann arbeiddi við at gera havnina í Miðvági tá, og var jarðabrúkari. Sum við undangongumanni hansara í hesum yrkinum, so var yrkið at røkja kirkju- garðarnar eitt eykaarbeiði við tað, at samsýningin ikki var nær nokk til eina ársinntøku, arbeiði var heldur ikki stórt nokk til tað og var mest summararbeiði at sláa kirkjugarðin og halda gøtur og tún í kirkjugarðinum rein fyri ókrút.

Árini 1933 til 1939 er samsýningin, Oyra Kristin fær í miðal 30 kr. um árið, við eykaarbeiði í kirkjugarðinum.

Í avgerð hjá forstandarskapinum 4. mars 1939 sæst, at fyrstu árini Oyra Kristin røkti

kirkjugarðarnar var Rasmus Heinesen gravari; hann sigur nevniliga starvið frá sær í 1939. Nú verður Kristin Jacobsen settur sum gravari eisini.

Í 1935 er nýggi kirkjugarðurin tikin í brúk, so tá er arbeiðsbyrðan vaksin nakað, men ikki samsýnningin, og í 1939 veksur arbeiðsbyrðan enn meira við tað, at Kristin eisini skal vera fastur gravari. Hetta verður so bøtt nakað um í 1940, tá fasta samsýning verður sett til á 80 kr. um árið. 40 kr. fyri hvønn kirkjugarðin. Við eykaarbeiði er miðal ársløninin um 130 kr.

Kristin Jacobsen

Í 1944 søkir Kristin um at fáa føstu samsýningina hækkaða frá 80 kr. um árið til 200 kr. fyri kirkjugarðarnar. Hetta verður samtykt á fundi 12. januar 1945, galdandi frá 1.1.1945. Árini 1945 – 1951 er fasta samsýningin tó nakað meir, 250 kr. um árið, umframt eykaløn.

21. september 1949 verður samtykt at seta Kristin Jacobsen í fast starv við at røkja kirkjugaðrarnar. Sum merkir, at tað ongantíð er gjørt, sjálvt um hann tá hevði røkt starvið í 16 ár. Tað hendir, løgið nokk, eftir at nakrar kvinnur høvdu skrivað til kommununa um at gera gøtur inni í kirkjugarðinum og at pynta meira um og planta trød og runnar og at seta ein fastan mann til hetta. Svarað verður teimum, at tær mugu vita, at ein maður er í hesum starvinum. Men tað hevur so helst gjørt, at teir gáa eftir, at hann ongantíð formliga er settur fast í hetta starvið. Og tað verður so gjørt tá. Um kvinnurnar nevna hetta tilvitað, ella tað er ótilvitað, er ilt at siga.

Í 1952 verður fasta samsýningin hækkað rímuliga nógv til 600 kr. um árið, umframt fyri eykaarbeiði. Frá 1.1.1965 til 1.200 kr., og frá 1.1.1967 til 2.000 kr. um árið.

Eitt notat hjá kommununi dagfest 4. februar 1972 sigur, at árliga arbeiðstíðin hjá Krisitni í øllum trimum kirkjugørðunum var mett til 350 tímar. Um garðarnir og vegirnir skuldu umvælast varð roknað við 1.150 kr. afturat. Á fundi 2. mai sama ár, varð samtykt at hækka løninа hjá Kristini fyri at røkja allar tríggjar kirkjugarðarnar til 3.000 kr. árliga, roknað frá 1. januar 1972. Sagt verður honum frá hesi avgerð í brævi 9. mai 1972, har lagt verður afturat: "Sum tygum kunnugt hava tygum somu skyldur sum frammanundan at umsita báðar kirkjugarðarnar og eisini tann bretska kirkjugarðin, og vóna vit, at tygum framvegis røkja garðarnar eins væl og tygum hava gjørt higartil."

Á fundi í bygdaráðnum 4. desember 1972 er eitt av málunum, at Kristin Jacobsen, ið hevur verið umsjónarmaður við kirkjugarðarnar frá 1933, vegna aldur, nú hevur sagt starvið frá sær til 1. januar 1973. Kristin var nú 85 ára gamal. Samtykt varð at lýsa starvið leyst.

Sostatt røkti Oyra Kristin kirkjugarðarnar í Miðvági í heili 39 ár. Kristin andaðist í 1978, 90 ára gamal. Hann er jarðar í kirkjugarðinum Niðri á Tjørn í Miðvági hin 1.10.1978.

Oyra Luddi

Starvið sum umsjónarmaður varð lýst leyst í desember 1972 til at seta 1. januar 1973. Á fundi í bygdaráðnum 8. januar 1973 verður staðfest, at eingin umsøkjari er. Samtykt varð tí at heita á ein ella annan at taka sær av hesum starvi.

Á fundi 3. apríl 1973 verður sagt, at nú hevur Ludvig Jacobsen játtað at átaka sær hetta starv frá 1. januar 1973 aftaná, at heitt hevur verið á hann. Samtykt varð at seta omanfyri nevnda í starvið frá 1. januar 1973 og er løninin 3.000 kr. árliga. Tað verður so fasta løninin hjá Ludvig til 1978, tá bygdaráðið samtykkir, at hækka føstu løninа til 4.000 kr. um árið.



Ludvig Jacobsen

Ludvig var sonur fyrra umsjónarmannin, og varð vanliga nevndur Oyra Luddi ella Luddi.

Vanlig hevði verið at sláa kirkjugarðarnar við líggja, men 2. desember 1974 samtykkir bygdaráðið, eftir umsókn frá Ludda, at keypa eina sláimaskinu til kirkjugarðsarbeiði. Samtykt verður eisini at prístalsviðgerða lønina og geva frítíðarløn.

Frá 1965 var skipanin, at ein maður burturav røkti lítla økið við minnisvarðan í gamla kirkjugarði. Á fundi 1. desember 1977 verður samtykt, at leggja arbeiðið við at halda økið um minnisvarðan undir arbeiðið hjá umsjónarmanninum við kirkjugarðarnar, Ludvig Jacobsen. Hetta eftir, at Sigmund Frederiksen, sum hevði havt tað yrkið í 13 ár, var givin fyri aldur.

Í desember 1977 hevur Ludvig sent bygdaráðnum skriv um kirkjugarðarnar. Á fundi 4. januar 1978 verður samtykt, at bygdaráðið skal fara at hyggja at kirkjugarðunum saman við Ludvig Jacobsen. 28 apríl sama ár verður samtykt, at hækka grundlønina hjá Ludvig til 5.000 kr. um árið umframt løn fyri eykaarbeiði.

Á fundi 19. februar 1979 varð samtykt, at skúrur skal byggjast norðuri við kirkjugarðin við w.c., vaski og annað, ið er neyðugt í smb. við kirkjugarðin. Eisini varð samtykt, at renovatiónin skal taka sær av at beina fyri avfalli, ið stendst av jarðarferðum.

Frá 1980 var grundlønin 5.000 kr. um árið, umframt løn fyri eykaarbeiði og at grava gravir. Í 1983 verður samtykt, at umsjónarmaðurin, umframt føstu lønina og løn fyri eykaarbeiði, fær 400 kr. pr. grøv sum gravari. Hetta er so lønin restina av tíðini, sum Oyra Luddi er umsjónarmaður við kirkjugarðarnar í Miðvági.

27. juni 1990 viðgerð bygdaráðið skriv frá Oyra Ludda um at gera eina reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Miðvági. Mentunarnevndin mælir til at nýta somu reglugerð, sum nýtt verður til kirkjugarðin við Oyravegin í Klaksvík, við ávísum broytingum. Hetta varð samtykt.

Á fundi í fíggjarnevndini 9. september 1991 er til viðgerðar bræv frá Ludvig Jacobsen, har hann sigur seg frá sum umsjónarmaður við kirkjugarðarnar til 31.12.1991. Umsóknin verður tikin til eftirtektar og heitt verður á bygdaráðið um at søkja eftir nýggjum umsjónarmanni. Tá hevði Oyra Luddi røkt starvið í knapt 18 ár.

Alfred Poulsen

Alfred Poulsen

Á bygdaráðsfundi 22. oktober 1991 var til viðgerðar setan av umsjónarmanni við kirkjugarðarnar. Tíðarfreiðstin at søkja var úti 7.9.1991 og bert ein umsókn var komin til starvið, hon var frá Alfred Poulsen, f. 1937, Miðvági. Fíggjarnevndin mælti til at seta Alfred í starvið frá 1.1.1992, og bygdaráðið samtykti tilmælið. Í november 1994 fær kommunan tilboð um at keypa

eina lítla gravmaskinu til kirkjugarðin, men samtykt varð at svarað, “vit hava gravara”. Út frá roknskapunum hjá kommununi, so hevur arbeiði við kirkjugarðinum bara verið ein lítil partur av arbeiðinum hjá honum, tí hann fær fulla ársløn frá kommununi. Meðan kommunan í miðal í 90-unum brúkar 35.000 kr. um árið í lønum til kirkjugarðin og í nullunum í miðal 50.000 kr. um árið. Alfred gavst sum fastur gravari í juli 2004, tá hann hevði fylt 67 ár.

Jan á Høgabóli f. 1958, var arbeiðsformaður hjá kommununi og fekk eisini umsjónina av kirkjugarðunum summarið 2004, og var gravari til hann gavst hjá kommununi í 2014. Og var soleiðis eisini arbeiðsformaður og gravari í 6 ár undir Vága kommunu.

Heðin Samuelsen hevur frá 2014, sum leiðandi umsjónarmaður fyri vegir og havnir hjá Vága kommunu, eisini havt ábyrgdina av umsjónini við kirkjugørðunum í kommununi.

Hjálpargravarar

Dávur í Kirkjastovu. Olgar David Hansen, f. 1896, d. 1980, var hjálpargravari og gróv saman við Oyra Kristini árini 1958 til 1973, og er sostatt givin um somu tíð, sum Kristin. Teir vóru báðir gamlir menn, tá teir góvust, Dávur 77 og Kristin 85 ár. Dávur var sjómaður í nógv ár, tann seinasti túrurin, hann var til skips, var við “Jupiter” úr Miðvági í 1957. Tað var skjótt aftaná at hann gavst at sigla, at hann fór at grava saman við Kristini. Oyra Kristin og Dávur vóru grannar. Eisini hoyrdu teir til hina Kirkjuligu heimamissiónina, so teir høvdu nógv til felags. Dávur fekk 50 kr. í samsýning fyri hvørja grøv tey seinastu árini. Sagt verður, at penganar hann fekk fyri at grava goymdi hann í einum skápi og lat teir síðan til góðgerðandi endamál. Dávur andaðist 23. juni 1980, 84 ára gamal.

Eyðfinn Christiansen, var hjálpargravari bæði hjá Oyra Ludda og hjá Alfred Poulsen, tó ikki sum fast yrki. Sambært frásøgn, so vóru eingir fastir hjálpargravarar í millumtíðini, frá tí at Dávur gavst og til Mikkjal Davidsen tók við. Tað vóru arbeiðsmenn hjá kommununi, sum hjálptu til við at grava gravirnar sum fyrifallandi arbeiði, og tað skifti alla tíðina. Tó verður hildið, at Eyðfinn helst var oftast. Meinhard Mørk og fleiri aðrir vóru av og á eisini.

Mikkjal Davidsen f. 1947, byrjaði sum gravari í mars 1994 og gróv tey fyrstu 10 árini saman við Alfred Poulsen, sum var formaður fyri tí arbeiðinum. Annars var Mikkjal gravari heilt til hann var 68 ár, eitt ár longur enn hann arbeiddi annað arbeiði hjá kommununi, og gavst soleiðis sum gravari í 2015. T.v.s. at hann var eisini gravari í 7 ár undir Vága kommunu. Hann var øll árini hjálpargravari. Mikkjal skipaði annars fyri arbeiðinum hjá kommunumonnunum í nógv ár; varð tó, sambært honum sjálvum, ongantíð settur í starv sum arbeiðsformaður.

Nýggji kirkjugarður

Í 1935 varð nýggjur kirkjugarður gjørdur Niðri á Tjørn í Miðvági. Knappan kilometur í vegalongd frá táverandi kirkju, og umleið hálvan kilometur frá nærmastu húsunum í bygdini. Kirkjugarðurin Niðri á Tjørn varð tikin í brúk hin 30. september 1935.

Grøv nummar "1" í kirkjugarðinum er grøvin hjá Nikolinu Dagmar Joensen, fødd 6.6. 1904, deyð, 28.9.1935, bert 31 ára gomul. Jarðarferðin var 30. september 1935, sum er fyrsta jarðarferð í kirkjugarðinum. Tað er smb. núverandi uppmerking, rað nr. 11, økið B.

Á fundi í forstandarskapinum hin 6. mars 1931, sum var hildin heima hjá formanninum, Sørin Danielsen, ið var vanligt tá í tíðini, er til viðgerðar skriv frá kirkjuráðnum í Miðvági. Skrivið er m.a. um ílat til rusk úr kirkjugarðinum og um víðkan ella at gera nýggjan kirkjugarð.

Hesa tíðina eru longu røddir frammi um nýggja kirkju. Partvís tí, at gamla kirkjan er í heldur vánaligum standi og tí, at hon eftir hondini er ov lítil eisini. Áðrenn forstandarskapið vil taka støðu til, hvat gerast skal við kirkjugarðin, vilja teir hava at vita, hvat er hent higartil í málinum um nýggja kirkju.

Í brævi til kirkjuráðið 7. mars 1931 verður boðað frá avgerð hjá forstandarskapinum: "Vit halda tað vera neyðugt, at spurningurin um stað til kirkjugarð og grundøki til kirkju verður viðgjørdur samstundis. Soleiðis at vit fáa at vita, hvar kirkjan skal standa, aðrenn avgerð verður tikin um kirkjugarðin. Tað kann ikki vera nakað til hindurs fyri at taka avgerð hvar kirkjan skal standa, tá hetta, so vít vit vita, skal byrjast í nærmastu framtíð."

Málið um nýggja kirkju

Í drúgva málinum og søguna um nýggju kirkjuna í Miðvági kann í júst hesum sambandinum í stuttum sigast, at Løgtingið í 1931 viðgjørdi umsókn frá kirkjuráðnum í Miðvági um nýggja kirkju. Umsókn um tað sama hevði eisini verið í Løgtinginum árið fyri. Løgtingið samtykti, at tað ikki fyri tíðina kundi veita studning til nýggja kirkju. Kirkjuráðið sendi somu umsókn inn árini 1932 og 1933, men við sama úrsliti. Eftir enn eina umsókn í 1934, fimta árið á rað, samtykti Løgtingið at áleggja kirkjuráðnum við stuðli úr kirkjugrunninum at bøta um kirkjuna uttan fyri 400 kr. og at mála kirkjuna innan við at nýta av peninginum, sum longu var samlaður inn til nýggja kirkju. Zacharis Jacobsen, byggimeistari í Havn, hevði tá verið og sýnt kirkjuna. Hann metti, at tá áðurnevnda varð gjørt, var kirkjan í góðum standi "og aftur hugnalig at koma inn í", sum hann málbar seg. Sostatt kom eingin nýggj kirkja á hesum sinni.

Kirkjuráðið gav tó ikki upp, og søkt varð um tað sama fleiri ferðir eftir hetta. Í 1946 samtykti Løgtingið at játta 70.000 kr. í stuðli yvir árini 1947-49 at byggja nýggja kirkju í Miðvági. Árini 1950-51 vórðu játtaðar 34.000 kr. afturat, eisini goldið yvir nøkur ár. Kirkjufólkið legði eisini nógv fyri. Grundin til nýggju kirkjuna varð grivin út og planerað ókeypis og tey høvdu savnað inn 50.000 kr. til byggingina, umframt at gamla kirkjan varð seld fyri 7.000 kr. Og var tað smb. egnari frásøgn Hans Chr. Hansen 'Stoffa', í Miðvági, sum keypti. Og aðrar inntøkur vóru eisini. Kostnaðurin at byggja kirkjuna var í 1951 mettur til 176.000 kr. Grundarsteinurin til kirkjuna varð lagdur 1. sunnudag eftir trinitatis 1948. Kirkjan varð vígd og tikin í brúk hin 28. september 1952. Heini Joensen í Miðvági, vanliga nevndur Bónda Heini teknaði kirkjuna og stóð fyri byggiarbeiðinum.

Leita eftir øki til nýggjan kirkjugarð

Eftir at greitt var seinni í 1931, at Løgtingið ikki fór at stuðla bygging av nýggjari kirkju á hesum sinni, avgjørdi forstandarskapið á fundi 7. november 1931, at fara runt bygdina at

hyggja at hóskandi stað til ein nýggjan kirkjugarð. Sambært gerðabókini varð hugt at trimum støðum, nevniliga:

1. Úti í Prestbø, niðanfyri vegin út á Bakka.
2. Niðasta parti av Tungu, sum var í festinum hjá Joen J.A. Joensen, kongsbónda.
3. Úti við Gil. Hagajørð av Nýpuni, lá upp móti innmarkini í Giltrøðni.

Forstandarskapið var sinnað at brúka seinast nevnda øki. Men full semja var ikki, og varð tí hildið best, at hava almennan fund fyri at íbúgvararnir skuldu fáa høvi at úttala seg, og so kanska hareftir hava atkvøðugreiðslu í allari bygdini.

Um staðarnøvnini 1 – 3 kann nevnast, at 1, Prestbøur, er við Kumlar uttanfyri býlingin, við Kirkjar. 2 er á Tungu, har viðarlundin nú er. 3 er Niðri á Tjørn, har kirkjugarðurin nú er.

Spyrja fólkið

Forstandarskapið samtykti á fundi 30. desember 1931 at senda skriv til allar valbarar persónar í Miðvági, har spurt varð, hvar teir vildu hava kirkjugarðin at liggja.

23. februar 1932 verður skrivað til yvirheilsunevndina og greitt frá verandi støðu: Forstandarskapið hevur samtykt at byggja ein nýggjan kirkjugarð, tí tann gamli er fullur. Í hesum sambandi eru nøkur økir, vit hava hugsað um at brúkt. Nevniliga eitt á Tungu, sum hoyrir til kongsfestið hjá Joen J.A. Joensen. Eitt av prestajørðini á suðursíðuni av fjørðinum. Og eitt úti við Gil, tað er uttangarðs og liggur felags helvtin kongs og helvtin óðalsjørð. Forstandarskapið var ikki heilt samt um, hvat av hesum støðum skuldi veljast, og semja varð tí um at spyrja fólkið, so tey fingu loyvi at siga sína hugsan um tað. Vegna at vit hildu at tað eina stykki, sum var av prestjørðini, varð ov dýrt vegna samansetningin av jørðini í økinum, settu vit bert hini bæði til atkvøðu, nevniliga á Tungu og Úti við Gil. Atkvøðugreiðslan gekk fram á tann hátt, at vit sendu ein lista í hvørt hús, har allir valbarir persónar høvdu rætt til at seta sítt navn í ein hartil settan kassa. Úrslitið vísti, at umleið helvtin av íbúgvunum atkvøddu. Harav 117 atkvøddu fyri "Á Tungu" meðan 31 atkvøddu fyri "Úti við Gil". Síðan vendu vit okkum til Becher, økislæknan í Vestmanna, sum var saman við forstandarskapinum og hugdi at øllum hesum økjunum. Hann sendi okkum síðan eitt tilmæli, sum verður viðlagt. Av tí gongur fram, at hann ikki kann viðmæla nakað av teimum báðum nevndu stykkjunum, men harafturímóti viðmælti tað triðja øki. Nevniliga tað av prestjørðini. Vit hildu tað tí rættast at venda okkum til yvirheilsunevndina, um at koma higar og taka avgerð um, hvat øki er best egnað til endamálið. Vegna at tað hevur skund við at byrja uppá arbeiði, hevði tað verið gott, um hetta ikki tók alt ov langa tíð.

Ætlaður kirkjugarður í Kumlum

Fyrsta ætlanin í Kumlum var at gera nýggja kirkjugarðin niðanfyri vegin. Í 1932 verður tó komið eftir, at tað helst er betur at gera kirkjugarðin omanfyri vegin. Hin 9. juli 1932 verður skrivað til Amtið, har forstandarskapið setur fram hetta nýggja uppskotið. Í brævinum verður sagt, at teir nú heldur vilja gera kirkjugarðin omanfyri vegin, og at hetta øki er líka so væl egnað og nógv bíligari at gera kirkjugarð í enn tað fyrr ætlaða økið. Stykkið er slættari og hevur javnari botn og moldlagið er væl djúpri. Soleiðis, at vit á summum støðum sleppa undan at fylla upp, og garðurin verður bíligari við tað, at vit sleppa undan tí dýra vegginum móti sjónum. Teir siga eisini, at teir sama dag hava tosað við økislækna Becher í Vestmanna, og hann viðmælir nýggja uppskotinum. Um hetta fær undirtøku má byrjast í heyst at gera stykkið klárt.

9. juli 1932 verður skrivað til kirkjuráðið í Miðvági. Forstandarskapið hevur samtykt at søkja um at fáa eitt øki av prestjørðini, uml. 1100 m^2 til nýggjan kirkjugarð. Vit leggja við umsóknina og biða kirkjuráðið um at leggja við eina útsøgn um tykkara hugsan um málið.

Sama dag verður skrivað til Amtið og til próst og sagt, at samtykt er at gera nýggjan kirkjugarð, tí tann gamli er fullur. Vit hava valt eitt stykki av prestjørðini í Miðvági av "Tøðumørkini" og "Kumlumørk" omanfyri vegin út á Bakka. Støddin á økinum er 1100 m^2. Vit loyva okkum tí at søkja um at fáa nevnda stykki helst ókeypis ella fyri niðursettan prís. Um hetta ikki letur seg gera vilja vit keypa tað fyri mettan prís.

9. juli 1932 verður eisini umsókn send Løgtinginum um nýggjan kirkjugarð. Har verður nevnt, afturat áðurnevnda, at ætlaða økið til kirkjugarðin væntast at kosta 500 kr. Garðurin ætlast at gera úr betong, við steinseting undir, longdin á garðinum er 160 metrar, sum mett verður at kosta 600 kr. Til tilfar verður mett at brúka 1.100 kr. Kostnaður fyri arbeiðsformann er mettur til 300 kr. Samlaður kostnaður 2.500 kr. Smb. Løgtingstíðindum 1932 varð umsóknin send tinginum við átekning frá Amtinum og við teirri viðmerking, at Kirkeinspektionen einki hevði ímóti ætlaða økinum til kirkjugarð, um so var at amtslæknin góðkendi øki sum nýtiligt til endamálið. Kirkjunevndin hjá Løgtinginum staðfesti, eftir samrøðu við formannin í forstandarskapinum í Miðvági, at málið hevði skund. Men vegna at útsøgnin frá amtslæknanum ikki enn var komin, avgjørdi Løgtingið at útseta játtanina um stuðul til næsta ár. Tó kann arbeiði byrja so skjótt, sum góðkenning er komin frá amtslæknanum. Hetta varð samtykt 1. oktober 1932 við 18 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

3. januar 1933 verður skrivað til Amtið og spurt, um alt er í lagið, so at arbeiðið kann byrja? Vit fingu eina tilsøgn frá Løgtinginum um stuðul, um amtslæknin og prósturin góðkendu økið. Nakað eftir tað var Becher, lækni, Vestmanna, her vesturi og segði, at hann var her vegna amtslæknan. Síðan hava vit einki hoyrt og spyrja tí hervið, um økið er góðkent til kirkjugarð. Vit hava eisini skrivað til Amtið og til próst um at fáa økið av prestjørðini til kirkjugarð. Vit hava heldur einki hoyrt um tað, og tá vit avgjørt mugu sleppa at byrja arbeiðið hendan veturin loyva vit okkum hervið at biðja um svar skjótast tilber.

7. januar 1933 kemur svar frá Færø Amts Kirkeinspektion, Tórshavn. Teir siga, at málið um nýggjan kirkjugarð í Miðvági var fyri á fundi hin 22. juli 1932, og varð sent til amtslæknan til støðutakan, og at amtslæknin 7. oktober 1932 er gjørdur kunnugur við samtyktina í Løgtinginum um málið. Heitt varð á amtslæknan um at skunda undir málið. Um svar fyriliggur frá amtslæknanum, verður málið lagt fyri limirnar í Kirkeinspektionen at taka støðu til.

Kirkjugarðurin lagdur "Við Gil"

18. januar 1933 hevði amtslæknin loksins verið í Miðvági, saman við próstinum, har teir saman við umboðum fyri forstandarskapið høvdu verið og sæð staðið í Kumlum, har ætlanin var at gera kirkjugarðin. Her sæst, at amtslæknin hevur eina heilt aðra støðu enn økislæknin Becher hevði árið fyri. Har økislæknin vrakaði støðini á Tungu og Við Gil, men mælti til økið á Kumlum, sum forstandarskapið so hevði arbeitt út frá síðan.

22. januar 1933 hevur amtslæknin skrivað frágreiðing um málið til Løgtingið og Amtið. Hann sigur at staðið ætlanin er at gera kirkjugarðin er heldur vátt, og at eitt gil rennur gjøgnum økið, sum má leiðast burtur annan veg, og at væl av tilfari má fyllast í økið fyri at nýta tað til kirkjugarð. Hinvegin varð víst honum á eitt annað stykki, rópt "Við Gil". Tað liggur beint uttanfyri innmørkina, nevnda øki liggur frítt fyri, har er einki grót í og tað er turt. Moldlagið er ríkiligt og tað kann helst, uttan stórvegis kostnað gerast til kirkjugarð. Bæði amtslæknin og prófvsturin vóru samdir um, at hetta økið, hóast tað lá langt frá bygdini, var nógv tað best egnaða til kirkjugarð.

Í skrivi til kommununa 13. februar1933 tekur kirkeinspetionen undir við tilmælinum frá amtslæknanum og prófvsti. Hetta skriv er eisini sent Løgtinginum.

9. juni 1933 verður skriv sent Løgtinginum við umsókn um, at játtaða umsóknin árið fyri



Við reyðum gamli kirkjugarðurin frá 1878 og nýggi kirkjugarðurin frá 1935. Sett á kort frá ár 1900 frá Generalstabben. Sum sæst varð nýggi kirkjugarðurin lagdur uttanfyri bøgarðarnar.

verður endurnýggjað. Arbeiðið er seinkað vegna, at fyrst ávísta økið (á Kumlum) ikki fekk endaliga góðkenning frá myndugleikunum. Tað gjørdi, at vit ikki fingu byrjað arbeiðið seinasta vetur. Eftir at menn eru farnir til summarfiskarí, er tað ómøguligt at fáa sett slíkt arbeiði í gongd nú, tá tað mesta skal verða gjørt við pliktarbeiði.

Í Løgtingstíðindum 1933 sæst, at Løgtingið hevur fingið umsóknina, og at staðfest verður, at arbeiði við at fáa gjørt nýggjan kirkjugarð í Miðvági kann ikki bíða longur. 26. august 1933 samtykti Løgtingið við 14 atkv. fyri og 0 ímóti, at tá arbeiðið við at gera kirkjugarð "Við Gil" er liðugt, góðkent og sýnt, skal kommunan senda uppgerðina fyri neyðuga arbeiði og útreiðslur til Løgtingið. Kirkjugrunnurin vil so endurrinda 3/5 av útreiðslunum til tilfar og formansløn. Forstandarskapið skal ansa eftir, at tað verða gjørd minst 8 dagsverk av pliktarbeiði fyri hvønn dag, formaðurin arbeiðir.

Økið, sum í skjølunum verður rópt "Við Gil" og eisini "Giltrøðin", er partur av samlaða økinum, Niðri á Tjørn. Í onkrum skrivi verður sagt, at trøðin er bert partvís uppdyrkað. Í øðrum skrivi kemur fram, at í økjunum í trøðni, sum ikki vórðu dyrkað, varð mógvur undir og torv skorðið. Og at eigararnir stórtiknir lata kommununi trøðna ókeypis til kirkjugarð, men at trupulleikar stingast upp um torvrættindi í økinum. Í korti frá 1900 sæst, at kirkjugarðurin varð gjørdur beint uttanfyri bøgarðarnar og eisini, at eitt gil rennur gjøgnum økið. So hetta samsvarar alt sera væl.

Stríð um torvrættindi í økinum

Sambært gerðabókini 18. januar 1934 er økið Niðri á Tjørn nú prosjekterað til kirkjugarð. Til viðgerðar var keyp av torvrættindunum í tí prosjekteraða økinum. Eigararnir av torvrættindunum, Jóan Hans Jacobsen og David Hansen, vórðu innkallaðir til tingingar. Eigararnir høvdu hesi tilboð: Jóan Hans Jacobsen bjóðaði sær at selja fyri 287 kr., sum svaraði til skattin hjá honum, og David Hansen bjóðaði sær at selja fyri 300 kr. Forstandarskapið helt hesi tilboð vera órímlig og samtykti at ognartaka torvrættindini.

Skrivað verður til dómaraskrivstovuna í Tórshavn hin 23. februar 1934, har heitt verður á rættin um at velja tveir menn til at meta um virði á torvinum í nevnda økinum. Sagt verður eisini, at økið hava eigaranir samtykt at lata ókeypis, og hava vit tí byrjað arbeiðið. Ósemja er bert um torvrættindini. Vegna at vit longu eru byrjaðir arbeiði við at stika økið inni, vildu vit fegnir fingið hetta gjørt skjótast.

Sambært roknskapinum 1934 so vóru metingarmenninir, sum rætturin útnevndi, Stóri Martin í Vatnsoyrum og Løðu Niklas í Sørvági. Teir fingu 20 kr. í part fyri ómakin. Og til Føroya Rætt vórðu goldnar 5,25 kr. fyri útreiðslur.

Á fundi 8. desember 1934 kemur fram, at Jóan Hans Jacobsen ikki er nøgdur við gjørdu

metingina. Forstandarskapið samtykkir at svara, at ein ikki sær nakra grund til broyting.

10. desember 1934 verður skrivað til sýslumannin um virðismetingina. Hetta tí, at Jóan Hans Jacobsen hevur eisini klagað um metingina til sýsluna. Forstandarskapið gevur tí sýslumanninum frágreiðing um málið: "Vit loyva okkum at siga, at vit finna onga grund til at siga annað, enn at tann gjørda metingin var góð nokk. Vit kunnu nevna, at sýnsmenninir fóru ógvuliga grundiga til verka. Teir kallaðu eigararnar av torvheiðunum tilstaðar og bóðu teir um at skerða eitt sindur av torvi, har teir hildu torv vera. Sum eisini varð gjørt fleiri staðni á økinum. Síðan varð hetta lagt at turka. Og komu metingarmenninir so aftur seinni og hugdu at góðskuni á torvinum. So vit kunnu ikki hugsa okkum, at nøkur ummeting skuldi komið nærri tí veruliga virðinum."

Sigast kann, at meira hendi heldur ikki í tí málinum, sum merkir, at torvrættindini vórðu keypt fyri metingarprísin. Hvør hann var er ikki upplýst, men helst niðanfyri fyrru uppskotini.

Kirkjugarðurin gjørdur og tikin í brúk

31. juli 1934 verður skrivað til Løgtingið og sagt, at kirkjugarðurin, sum byrjaður er uppá at gera, ikki er liðugur enn. Higartil hava vit goldið 120 kr. til sement og 50 kr. í formansløn. Og biðja vit tí Løgtingið um stuðul til næsta ár, møguliga við at fáa endurgoldið ta longu brúktu upphæddina, við tað at vit vænta, at arbeiðið verður liðugt tá.

28. mars 1935 verður skrivað til Amtið og próst um kirkjugarðin í Miðvági. Nýggjur kirkjugarður er í gerð, viðv. veggjum úr steinbetong er ein síðuveggur liðugur, og ætla vit at stika hinar 3 síðurnar við stálhegni fyribils, og so at halda fram við arbeiðinum, tá fiskimenninir koma aftur í heyst. Vegna at gamli kirkjugarðurin er fullur vilja vit heita á um at fáa henda nýggja vígdan, ímóti at eitt hóskandi øki verður sýnt, ruddað og drenað.

Skrivað verður til vinnunevnd løgtingsins hin 18. juli 1935. Arbeiðið við kirkjugarðinum er ikki liðugt enn, og søkja vit tí um at fáa játtaðu upphæddina flutta til fíggjarlógina komandi ár. Vit hava higartil brúkt umleið 1.000 kr. og vænta, at ein líknandi upphædd verður játtað kommununi.

6. august 1935 verður skrivað til Føroya próst, sum svar upp á skriv frá prósti 23. juli h.á. Forstandarskapið skal upplýsa, at innhegningin av kirkjugarðinum er liðug, og eitt hóskandi øki er uppmált fyribils. Arbeiðið heldur fram, tá fiskimenninir koma heim.

Tað er helst stutt eftir hetta, at fyrsti partur av kirkjugarðinum verður vígdur. Sum nevnt, so var fyrsta jarðarferðin í nýggja kirkjugarðinum hin 30. september 1935.

Umsóknin til Løgtingið, sum í tingsetuni 1933 var útsett til arbeiðið við kirkjugarðin í Miðvági var liðugt, góðkent og sýnt, var fyri á tingi 19. august 1934. Í tilmælinum frá kirkjunevndini verður endurtikið tað, sagt var í samtyktini frá 1933, at játtað verður stuðul 3/5 til tilfar og formansløn. Hetta varð samtykt við 15 atkv. fyri og 0 ímóti.

Sjálvt um nógv skriving var aftur og fram til Løgtingið um stuðul, so sæst kommunan ikki at hava fingið nakran stuðul úr Løgtinginum. Grundin er helst tann, at arbeiði dróg út yvir so nógv ár. Og Løgtingið kravdi, at atbeiðið skuldi vera liðugt, góðkent og sýnt, áðrenn Løgtingið kundi veita stuðul. Einasta beinleiðis inntøka, kommunan sæst at hava fingið í smb. við gerð av kirkjugarðinum, eru 117 kr. fyri avlopstilfar, kommunan sjálv seldi í 1936. Hetta árið hevði annars Heini Joensen sýnt arbeiðið og fingið 5 kr. fyri tað, men eingin stuðul er innkomin, kortini, hvørki tá ella árini eftir.

Um vit hyggja í roknskapum og skjølum hjá kommununi komandi árini heilt upp í hálvtrýssini og í Løgtingstíðindum sama tíðarskeið, so sæst einki meir um nakran stuðul til kirkjugarðin í Miðvági frá Løgtinginum ella øðrum pørtum. So staðfestast kann, at Miðvágs kommuna hevur sjálv goldið allar útreiðslur við byggingini av kirkjugarðinum, sum tilsamans varð rímuliga nógv eftir tátíðar metan.

Teir, sum gjørdu kirkjugarðin

Í roknskaparbókunum hjá kommununi síggja vit yvirlit og uppgerð yvir alt arbeiði við at gera kirkjugarðin. Sjálvt um kirkjugarðurin varð tikin í brúk í 1935, so var hann langt frá liðugur, sýna skjølini. Endaliga arbeiðið varð ikki liðugt fyrr enn í 1942. Árið har mesta arbeiði varð gjørt, er í 1936, men eisini onnur ár er rímuliga nógv arbeiði við kirkjugarðinum.

Í 1934 er Rasmus Heinesen settur sum formaður fyri arbeiðinum. Løn hansara er 18 kr., tveir aðrir fáa løn hetta árið, tó bert smáar upphæddir, tað eru Niclas Haraldsen, 3 kr. og Jóan Pauli Næs, 2 kr. Grundin til, at ikki er goldið so nógv í løn er, at meginparturin av arbeiðinum varð gjørt sum pliktarbeiði. Yvirlit yvir pliktarbeiði er tó ikki til.

Roknast kann við, at teir, sum fáa løn fyri arbeiði í kirkjugarðinum, hava eisini gjørt pliktarbeiði, og at lønin er fyri arbeiði útyvir pliktarbeiði, sum vanliga var 2 dagar pr. ár pr. mann. Umframt teir nevndu hava helst aðrir verið við eisini, sum bara hava gjørt pliktarbeiði. Sambært kravinum frá Løgtinginum skuldu í minsta lagið 8 mans arbeiða pliktarbeiði hvønn dag formaðurin var til arbeiðis. Tað kundi tilsamans geva fitt av arbeiðsmegi, serliga tey árini formaðurin arbeiddi meira enn hetta árið. Eftir kríggið var ikki vanligt at hava pliktarbeiði hjá kommununum.

Til arbeiðið í 1934 var sement keypt frá Havnar Timburhandli fyri 123 kr. Og annað tilfar frá Jørgin Gaardlykke fyri 30 kr. Til Pf. Krúnuna í Miðvági vórðu goldnar 41 kr. fyri lastbil teirra.

Tað sýnist tó, sum at verulig gongd kom ikki á arbeiðið fyrr enn árið eftir.

Á fundi í forstandarskapinum hin 10. januar 1935 varð Harald Rasmusen valdur til formann fyri kirkjugarðsarbeiðinum. Sambært roknskapinum 1935 er løn hansara fyri hetta 129 kr.

Teir sum arbeiddu við at gera kirkjugarðin í 1935 vóru Dávid Hansen, 150 kr. Tórstein Niclasen, 46 kr. J.A. Joensen, 38 kr. Aðrir, sum arbeiddi fyri minni upphæddir, vóru: Jóh. E. Johansen, Heini Olsen, Hans M. Hansen, Kristin Jacobsen, Jóhannus Poulsen, Jóhannus Niclasen, Niklas Hansen, Elias Ellefsen, Jóan Pauli Ellefsen og Sámal Jákup Johannesen. Harafturat varð pliktarbeiði eisini gjørt.

Tilfar til kirkjugarðin var í 1935 keypt frá: Maskinverkstaðið í Miðvági, 83 kr. Havnar Timburhandil, 51 kr. Jóhannus Nattestad, 40 kr. og Hjalmar Nielsen, 7 kr.

Lastbilakoyring, bilfelagið Krúnan í Miðvági, 41 kr. Í alt vórðu knapt 700 kr. brúktar til kirkjugarðin í 1935.

Arbeiðið heldur áfram

Í 1936, eftir at kirkjugarðurin varð tikin í brúk árið fyri, verður hildið fram við arbeiðinum við kirkjugarðinum, sum ikki var fult liðugur enn. M.a. varð bert ein veggur stoyptur, og nógv arbeiði var framvegis at gera við at grava upp, drena og fáa góða mold í aftur.

Harald Rasmusen helt fram sum arbeiðsformaður í 1936 og fekk 104 kr. fyri tað.

Í 1936 varð løn goldin fyri arbeiði í kirkjugarðinum til hesar menn: Jóan Pauli Thomsen, Kristin Rasmusen, Sámal J. Johansen og Hans Samuelsen, í miðal 55 kr. hvør.

Restin liggja frá 35 kr. og niðureftir: Jóhannus P. Johannesen, Harald Niclasen, Hans H. Hansen, Ísak Johannesen, Jógvan Haraldsen, Niklas Niclasen, Tummas Pauli Johansen, Petur Heinesen, tveir við navninum Jógvan Joensen, Vensil Nattestad, Jóan Hans Jacobsen, Jóan Pauli Poulsen, Jens P. Johansen, Sigmund Frederiksen, Jóhannus E. Johansen, Napoleum Olsen, Heini Rasmusen, Sámal Kr. Samuelsen og Niels J. Nattestad. Í alt eru 769 kr. goldnar í arbeiðsløn.

Tilfar er keypt frá: Hans Ellefsen, 100 kr. Balslev & Co, 87 kr. Heini Haraldsen, 40 kr.

Jákup K. Joensen, jarnsmiður 38 kr. Maskinverkstaðið, 26 kr. og Dánjal Joensen, 22 kr. Koyring, bilfelagið "Krúnan" í Miðvági, 78 kr.

Hin 8. august 1936 var nakað av tilfari selt fyri í alt 117 kr. Brúkt timbur og møguligt avlop av tilfari. Teir, sum keyptu vóru: Harald Rasmusen, 53 kr. J.H. Samuelsen, 14 kr. Sámal Ellefsen, 11 kr. D.P. Niclasen, 11 kr. Sørin Danielsen, 9 kr. Hans Ellefsen, 6 kr., Kristin Jacobsen, 5 kr. Jens P. Johannesen, 5 kr. og Jákup K. Joensen, 3 kr.

Í 1936 varð arbeitt fyri um 1.300 kr., umframt pliktarbeiði. Hetta er eisini árið har tað mesta av arbeiðinum varð gjørt.

Í 1937 eru bert 151 kr. goldnar fyri arbeiði við kirkjugarðin til Berint Vang, 42 kr., sum helst er formaður, og til Jógvan Samuelsen, Tummas Thomasen, Ísak Johannesen, Andrias S. Johansen, Niklas Hansen og Hans J. Hansen. Tilfar fyri 7 kr. er keypt frá Elias Ellefsen og Jákup K. Joensen.

Á fundi 28. mai 1936 varð annars samtykt at loyva Jákup K. Joensen at brúka ein part av kirkjugarðsøkinum, sum einki varð gjørt við enn.

Kirkjugarðurin umgrivin og drenaður

Sambært skjølunum hjá kommununi varð nógv arbeitt komandi árini við at grava kirkjugarðin út og drena og fylla reina mold blandaða við sandi íaftur, sum var stórarbeiði, tí alt varð gjørt við hond. Árini 1938 til 1942 verður stigvíst arbeitt við hesum. Í 1938 eru bert tríggir mans nevndir at fáa løn við hesum arbeiðinum, teir eru Eliesar Ellefsen, Jóan Pauli Poulsen og Hans Martin Thomasen, sum arbeiða fyri um 15 kr. hvør. Í 1939 arbeiða hesir fyri í miðal 50 kr. hvør: Jóan Pauli Poulsen, Hans Jacob Poulsen, Jógvan Poulsen, Kristin Jacobsen, Petur Jakup Johansen, Pól Poulsen, Jens Pauli Johannesen og Kristian Poulsen.

Í 1940 arbeiða: Jógvan Poulsen, Jóan Pauli Poulsen, Kristian Poulsen, Pól Poulsen og Hans Jakup Poulsen, fyri í miðal 110 kr. hvør, umframt, Jógvan Johansen, Jens Pauli Johansen, Petur Johansen og Hákun Hansen, fyri í miðal 60 kr. hvør. Koyring: Hansias Hansen, 29 kr. Í 1941 er løn bert goldin tveimum monnum: Pól Poulsen og Jógvan Poulsen, um 115 kr. hvør.

Í 1942 er meira ferð aftur á arbeiðinum, tá arbeiða: Kristin Jacobsen, formaður 350 kr. Jógvan Poulsen 289 kr., Sigmund Frederiksen 191 kr., Pól Poulsen 155 kr., Kristin Rasmusen 113 kr., Jákup Gaardlykke 100 kr. og John Johansen 81 kr. Pól Poulsen, Jens Pauli Johannesen, Petur J. Johansen, Hans V. Hansen og Michal Johansen, fyri í miðal 30 kr. hvør. Tilfar er keypt frá Sámal Ellefsen fyri 247 kr.

Við endan av 1942 er fyrsta stóra arbeiði við kirkjugarðinum liðugt, og tað verður ikki gjørt meira í kirkjugarðinum, uttan vanlig røkt komandi árini fram til 1948.

Uppskot um veg og planting í kirkjugarðinum

2. desember 1946 senda nakrar kvinnur í Miðvági kommununi bræv, har heitt verður á kommunustýrið um at bøta um kirkjugarðsviðurskiftini og seta ein mann at gera tað. Tær skjóta eisini upp, at ein høvuðsgøta verður gjørd mitt niðan gjøgnum kirkjugarðin og at smáar stikkgøtur verða gjørdar, tildømis millum hvørji tvey leiðir, og at trø verða plantað fram við garðinum innan. Tær siga eisini, at tær eru tilreiðar at skipa fyri innsavnan til endamálið. Skrivað undir hava: *Cornelia Niclasen, Marie Samuelsen, Henrikke Samuelsen, Alvilda Hansen, Margrið Niclasen, Sigga Rasmusen, Dagmar Joensen, Sofie Højgaard Ellefsen, Anna E. Joensen, Arna á Ryggi, Anna M. Nattestad og Dagmar Joensen, í Húsi.*

Skrivi er fyri á fundi 4. desember 1946. Bræv varð sent til Corneliu Niclasen o.fl. Miðvági. Vegna skriv tykkara frá 2. des. um røkjan av kirkjugarðinum, hevur sóknarstýrið viðtikið at svara, at tað er gott, at tit hava áhuga fyri fríkan av kirkjugarðinum, men kunnu vit upplýsa,

at tað hevur verið okkara ætlan at leggja – íhvørtfall ein høvuðsveg upp gjøgnum garðin. Tá tað enn ikki er gjørt, er tað av teirri orsøk, at hann má allur gravast um og drenast fyrst, tí drenið kemur í fleiri støðum tvørtur undir vegnum. Nú kann tað sigast, at hetta arbeiði gongur alt ov smátt, tað skal viðgangast, men ein grund fyri tí er, at vit ætlaðu tað sum einslags neyðarbeiði til at hava at ávísa fólki, tá trongd var, og betri er altíð at skaffa arbeiði enn beinleiðis at geva hjálp í peningi. Í seinastu tíð hevur ikki verið tørvur til tað, men tað vil nokk vísa seg skjótt, at hent er at hava okkurt at vísa á. Um at planta trød fram við garðinum er at siga, at eitt er at planta, annað er at halda tað viðlíka. Og tað kemur at verða gjørt, sum tey ymisku forstandarskapini hava umsjón til. At vit hava sett mann til at reinsa kirkjugarðin á hvørjum áriðkann ikki vera tykkum ókunnugt. Um at fremja innsavnan til hjálp til hetta er at siga, at tað er óhóskandi at innsamla pening til kommunal mál, men skjóta teir upp heldur at savna inn pening til ein minnisvarða fyri sjólátnar. - Vent verður aftur til hetta málið í partinum um minnisvarðan yvir sjólátnum í Miðvági.

Á fundi 7. januar 1950 setti formaðurin, Sørin Danielsen, fram uppskot um at planta í kirkjugarðinum og upplýsti, at búnaðarráðgevarin vildi vera til hjálpar við at skaffa plantur bíliga. Avgjørt varð at biðja búnaðarráðgevan skaffa hesar plantur. Í skrivi til búnaðarráðgevan verða "hóskandi trø" umbiðin og upplýst, at kirkjugarðurin er 55 x 33 m. til støddar, men grivið er so nær garðinum í øðrum partinum, at 33 x 20 m ikki kunnu plantast. Vit høvdu eisini fegin vilja fingið nakrar rósubuskar. Við tøkk fyri hjálpsemi, Johs. Ravnsfjall, skrivari. Í 1951 verða aftur plantur umbidnar, sum skulu brúkast at seta fram við báðum síðunum av vegnum inni í kirkjugarðinum. So nú er vegurin gjørdur.

Á fundi 16. desember 1949 varð annars samtykt at keypa eitt stykki frá David Hansen sunnanfyri kirkjugarðin fyri ein rímuligan prís, sum sagt verður.

Arbeiði við kirkjugarðin tikið uppaftur

Eftir at steðgur hevði verið við arbeiðinum við kirkjugaðinum síðan 1942 við undantaki av vanligum viðlíkahaldi, verður arbeiði við kirkjugarðinum byrjað aftur í 1949. Hetta árið arbeiða Jens Pauli Johannesen, Jógvan Poulsen, Pól Poulsen, Heini Haraldsen, Elias Poulsen, Jógvan Joensen, Kirkjar, Sámal Johansen, Hansias F. Hansen, Andrias Olsen og Heini Rasmusen fyri í miðal um 150 kr. hvør. Onkur meir onkur minni. Sement er keypt frá Miðvágs Cementídnaði fyri 70 kr. Annars kann metast, at mesta arbeiði helst hevur verið uppgraving av mold og drening í tí partinum, sum ikki enn var tikin í brúk. Men eisini við at gera gonguveg gjøgnum kirkjugarðin.

9. oktober 1950 skrivar kirkeinspektionen og sendir rundskriv, sum er til øll kirkjuráð og forstandarskap og minnir á, at smb. lóg frá 1924 so hoyrir viðlíkhahald av kirkjugarðum undir kirkeinspektionen. Frameftir skulu tí allar ætlanir ella broytingar, sum verða gjørdar á økinum sendast til kirkeinspektionen, áðrenn nakað ítøkiligt stig verður tikið.

Hvussu hetta varð fylgt í vanligum viðlíkahaldi er óvist, men við nýgerð ella stórum broytingum varð kirkeinspektionen vanliga eftirspurd.

Í 1950 er stoyping farin fram, har í hvussu er ein síða er gjørd afturat. Áðrenn var ein síða gjørd og restin hegnað. Sement er keypt frá Stoypivirkinum Føroyar, Tórshavn, fyri 1.028 kr. og tilfar frá J.K. Joensen fyri 90 kr., møguliga jarnbinding. Hetta árið hava 34 mans arbeitt í kirkjugarðinum fyri tilsamans 4.638 kr. Hetta sýnir eisini, at roynt verður at býta abeiðið so "kristiliga" út sum møguligt. So hetta er eisini ein slags arbeiðsloysisstuðul, sum formaðurin í forstandarskapinum eisini nevnir í brævi, endurgivið frammanfyri.

Í 1951 er garðurin kálkaður. Kálk er keypt frá Valdemar Lützen fyri 40 kr. og Jørgin Frans Jørgensen hevur kálkað fyri 31 kr. Seks mans afturat hava arbeitt fyri tilsamans 347 kr., helst jørðarbeiði. Plantur eru útvegaðar til kirkjugarðin frá ríkisumboðsskrivstovuni fyri 151 kr.

og frá Wiener Basaren fyri 11 kr. So planturnar eru bestiltar niðri frá.

Í 1952 verður annars nakað stikað av nýggjum. Hegn er keypt frá Pf. Thomas Dam fyri 742 kr. Tríggir mans hava arbeitt í kirkjugarðinum hetta árið, teir eru, Hans Kr. Hansen, Hans V. Hansen og Petur Jakup Johansen fyri um 120 kr. hvør.

Í 1953 var eitt sindur málað, Jørgin Frans Jørgensen hevur fingið 36 kr. fyri málingaarbeiði. Jákup Martin Jacobsen og Poli F. Jacobsen hava eisini gjørt ymiskt arbeiði í kirkjugarðinum. Í 1954 hava Jóhan Poulsen, Sigmund Frederiksen og Jens Samuelsen gjørt onkur smærri arbeiðir har. Og í 1955 hevur Jørgin Frans Jørgensen málað fyri 11 kr. og Albert Hansen arbeitt fyri 49 kr. Í 1956 og í 1957 arbeiddu Jákup M. Jacobsen, Petur Jakup Johansen, Jens Pauli Johannesen og Hans V. Hansen fyri í miðal 300 kr. hvør hvørt árið. Í 1958 arbeiða 3 mans har og í 1959 fimm mans fyri smærri upphæddir. Sigast skal at hesi arbeiðir frá 1949 til 1959 eru umframt arbeiðið hjá umsjónarmanninum.

Øll sekstiárini eru á sama hátt, smærri arbeiðir hjá kommunumonnum fyri í miðal um 2.000 kr. til 2.500 kr. um árið. Eftir 1959 eru upplýsingar ikki varðveittar um, hvør arbeiddi har.

Øll sjeytiárini brúkar kommunan millum 4.000 og 6.000 kr. um árið umframt lønina til umsjónarmannin, til kirkjugarðarnar. Í 1979 er henda upphædd 10.000 kr. Tað má so vera til eitt sindur størri arbeiði. Í 1979 hevur helst eisini verið arbeitt við at drena.

Áttatiárini er útreiðslan til kirkjugarðarnar eitt sindur ójavnt, flestu árini liggur útreiðslan um 25.000 kr. umframt løn til umsjónarmannin. 1980/81, 1982/83 og 1989 er henda útreiðsla omanfyri 50.000 kr. Og árini 1986 og 1988 um 90.000 kr. hvørt árið, hetta seinasta er helst í samband við, at kirkjugarðurin verður víðkaður.

Í 1990-unum liggur útreiðslan pr. ár um 45.000 kr. + løn til umsjónarmann, uttan 1991, tá útreiðslan er 86.000 kr.

Frá ár 2000 og til seinasta árið hjá kommununi, sum er 2008, liggur útreiðslan til kirkjugarðarnar um 65.000 kr. í miðal um árið, + løn til umsjónarmannin uttan í 2005, tá útreiðslan fyri fyrstu ferð fer uppum 100.000 kr. í eitt ár til 106.000 kr.

Avgerð um gravsteinar, nýtt portur o.a.

Á fundi 27. september 1952 er til viðgerðar bræv frá Sørin Danielsen um gravstein, hann ætlar at seta upp í kirkjugarðinum. Nú er Hans Martin Thomasen formaður í sóknarstýrinum. Avgjørt varð at loyva honum at seta steinin, sum hann sjálvur vil, soleiðis at forsíðan vendir móti vegnum og við fótendan á leiginum. Avgjørt varð eisini, at allir steinar skulu venda forsíðuna móti vegnum.

8. mars 1956 skrivar Føroya Kirkjueftirlit, Tórshavn, rundskriv til øll kommunustýri og kirkjuráð, um hvussu kirkjugarðar skulu gerast og haldast. M.a. stendur, at kirkjugarður skal vera forsvarliga innihegnaður soleiðis, at leysgangandi djór ikki sleppa inn í garðin. Hæddin á garði ella stiki skal ikki vera lægri enn 1,70 m. omanfyri lendið uttanfyri, hæddin innanfyri skal vera minst 1 metur. Jørlagið í kirkjugarðinum má vera so tjúkt, at kisturnar verða fjaldar við minst 1 m. jørð, herí er ikki íroknað dungin omaná frískløgdum grøvum. Neyðuga jørðlagið verður gjørt við fyllu, sum helst skal verða sandur og mold samanblandað. Har neyðugt er mugu dren leggjast, so garðurin er turrur, rør frá hesum skulu liggja beinleiðis oman á sjógv.

Á fundi 31. august 1964 setti Albin Wang sóknarstýrislimur fram uppskot um at gera eitt jarnportur á kirkjugarðin, ístaðin fyri træportrið, ið nú var. Jens Jacob Niclasen var sóknarstýrisformaður. Avgjørt varð at lata J.K. Joensen gera portrið og leggja uppskot fyri sóknarstýrið um útsjónd av portrinum, áðrenn hetta verður gjørt.

Nýggir nummarpelar og neyv skráseting

Meinhard Hansen í Miðvági skrivar hin 3. februar 1974 til bygdaráðið og sigur, at hann hevur í mong ár havt hugsanir um at venda sær til bygdaráðið við bøn um at fáa sett haldbar merkir við tølum við hvørja grøv, nú áðrenn tað er ov seint, og gera tað nú, meðan Kristin Jacobsen livir, tað vildi sanniliga glett seg og eisini bygdarfólkið, sigur hann.

Skrivið er fyri á fundi 4. mars 1974, har samtykt varð at fáa hetta framt og kannað eftir hvat best hóskandi var til hetta endamál. Møttir á fundi vóru John Poulsen fm., Ivan Johannesen næstfm., Albin Wang, Hans Jacob Hansen og Jógvan Hans Joensen. 2. mai 1974 verður skrivað til Klaksvíkar kommunu, har spurt verður, hvar teir fáa pelarnar við nummari á, sum teir brúka til gravirnar í tí nýggja kirkjugarðinum í Klaksvík. Sagt verður eisini, at orsøkin til fyrispurningin er, at vit hava brúkt træpelar í okkara kirkjugarði, men vit halda at hesir farast ov skjótt.

Svar úr Klaksvík er ikki funnið, men kann vera komið kortini, antin við brævi ella við telefonsamrøðu. Í øllum førum varð nú farið yvir at nýta meira haldbarar nummarpelar.

Mál um nummarpelar hava verið tvær ferðir fyri á bygdaráðsfundi seinni. Á fundi 18. apríl 1989, har sagt verður, at gravarin Ludvig Jacobsen biður um loyvi at keypa 100 nummarpelar til kirkjugarðin. Mentunarnevndin mælir til, at Ludvig ger eitt yvirlit yvir gravstøðini, nummarpelarnar verður tosað um aftur í 1990. Fíggjarnevndin tók undur við tilmælinum og bygdaráðið samtykti málið. Á bygdaráðsfundi 28. februar 1990 er aftur umsókn frá gravaranum Ludda Jacobsen, sum biður um loyvi at keypa nummarpelar til kirkjugarðin. Mentunarnevndin mælir til at keypa 50 pelar til verandi kirkjugarð og 25 til tann nýggja, har so hugsað er um nýggjan part av kirkjugarðinum. Fíggjarnevndin viðmælti at keypa, og málið varð samtykt. Í september 1991 játtar fíggjarnevndin Ludda at keypa 50 pelar afturat. Hetta var beint áðrenn Luddi gavst.

Leggjast kann afturat, at vegna hetta umhugsni frá Meinhard Hansen afturí í 1974, undirtøku frá bygdaráðnum, góða minninum hjá Oyra Kristini og seinni Oyra Ludda, og at hetta er fylgt upp líka til dagin í dag, so eru allar gravirnar í kirkjugarðinum Niðri á Tjørn í Miðvági nágreiniliga skrásettar, hvar hvør einasti persónur liggur grivin frá 1935 og til dagin í dag.

Sjálvt um byrjað varð at grava í nýggja partinum av kirkjugarðinum Niðri á Tjørn í februar 1997, so eru tilsamans 66 fólk grivin í eldra partinum árini 1997 til 2016.

Líkkoyring

Leivur Nattestad f. 1928 byrjaði at koyra líkkoyring í Miðvági í 1963, og var tað við egnum bili. Tann fyrsta, hann koyrdi, var Birgja Bina ella Jacobina Haraldsen. Hon fór til gravar hin 20. februar 1963. Og Leivur koyrdi til nær sagt hvørja jarðarferð í Miðvági eftir tað heili 43 ár, til kommunalur líkvognur varð fingin til vega í 2006. Men tá var Leivur eisini vorðin 78 ára gamal. Onkur hevur leysliga mett, at Leivur Nattestad hevur koyrt einari 300 slíkar ferðir. Og Leivur tók einki fyri hetta, men tað var ein tænasta, hann gjørdi sínum bygdafólki, tá heitt varð á hann. Og tað var til hvørja jarðarferð, verður sagt.

Leivur Nattestad

Á almennum bygdaráðsfundi 25. apríl 2006 var til viðgerðar uppskot frá Vestmanna kommunu um at verða við til at keypa

líkvogn. Trivnaðarnevndin og fíggjarnevndin hjá Miðvágs kommunu viðmæltu málinum, og varð samtykt at verða við til at keypa líkvogn. Á fundi 2. november sama ár var til viðgerðar uppskot um reglugerð fyri felags líkvogni, sum varð samtykt.

Líkvognurin varð keyptur í november 2006 saman við Vestmanna, Kvívíkar, Sandavágs og Miðvágs kommunum. Avtalan var, at líkvognurin hevði stød í Vestmanna, og at Vestmanna Kommuna setti bilføraran. Annfinn Bláhamar varð í 2006 settur sum ábyrgdarhavari og skuldi saman við øðrum røkja bilin. Dagligu umsitingina rindaðu kommunurnar lutfalsliga eftir fólkatalinum. Líkvognurin varð keyptur og tilgjørdur av somu íslendsku fyritøku, sum Vestmanna kommuna hevði keypt sløkkiliðsbil frá.

Á bygdaráðsfundi í Miðvági 5. februar 2007 varð sáttmálin um keyp av líkvogninum samtyktur. Í roknskapinum hjá Miðvágs kommunu undir kirkjugarðar hevur kommunan í 2008 brúkt 10.992 kr. til líkvogn, sum er einastu ferð, líkvognurin sæst í roknskapinum.

Nevnast kann, at seinni keyptu Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommuna í felag nýggjan líkvogn. Tástanni kom Sørvágs kommunan við í hetta samstavið.

Ymisk mál

20. september 1976 varð samtykt at keypa uml. 500 m^2 burturav matr. nr. 13 norðuri við kirkjugarðin.

Á fundi í bygdaráðnum 8. mai 1982 varð spurningur um keyp av arbeiðsskúri frá Regin Poulsen til kirkjugarðin til viðgerðar. Samtykt varð at keypa skúrin fyri 30.000 kr., treytað av, at Regin ger skúrin sambært tekning og innanfyri henda prís, sett á fundament við kirkjugarðin.

Uppskot frá kommunufelagnum um felagsreglugerð fyri kirkjugarðar varð samtykt á fundi 26. januar 1987 við uppskoti um, at tilfar til garðin skal vera úr antin gróti ella betong.

Minnisvarði fyri sjólátnar

Sum nevnt frammanfyri, senda nakrar kvinnur í Miðvági kommununi bræv hin 2. desember 1946, har tær heita á kommunustýrið um at bøta um kirkjugarðsviðurskiftini og siga seg vilja skipa fyri innsavnan til endamálið. At savna inn pening til kommunal endamál heldur forstandarskapið tó ikki vera hóskandi. Men í svarskrivi til Corneliu Niclasen v.fl., 4. desember 1946, um júst henda partin, kemur formaðurin Sørin Danielsen sjálvur við einum uppskoti, sum sóknarstýrið tekur undir við: Um tit vilja fremja innsamling er tað okkara hugsan, at tað varð meira hóskandi um tit vildu innsamla pening til ein grav- ella minnisstein fyri allar teir miðvingar, vit hava mist, sum ikki fingu kirkjugarð, og fingið hann uppsettan, antin í tí nýggja, ella í tí gamla kirkjugarðinum. Hetta vildi verið ein virðilig uppgáva at samla inn pening til.

Lítið er at ivast í, at hugsað verður her um allar teir miðvingar, sum fórust undir krígnum, sum hesa tíðina sjálvandi er sera frískt í minnium, men eisini teir mongu, sum vóru farnir áðrenn.

Meira sæst tó ikki at henda við málinum, men at hugsanin framvegis livir um at fáa ein minnisvarða fyri sjólátnum í Miðvági er lítið at ivast í. Tað ganga tó heili 10 ár, til ein sær meira til hetta í skjølunum hjá kommununi.

20. oktober 1956 skrivar Jóhannes Joensen á Palli við Kirkjar bræv um gomlu kirkjugrundina í gamla kirkjugarðinum, har hann biður um loyvi at gera gomlu kirkjugrundina til eitt gravminni yvir sjólátnum. Umsóknin er til viðgerðar á fundi 24. oktober 1956, formaður er tá Hans Martin Thomasen. Stýrið segði seg einki hava ímóti, at hetta varð gjørt men vildi beina honum til kirkjuráðið. Bræv við hesi avgerð er sent honum 26. oktober sama ár.

27. november 1957 er til viðgerðar á sóknarstýrisfundi í Miðvági umsókn frá Jóhannes Joensen til Búnaðarráðið um at fáa 1 sátulendi ókeypis av trød hansara, ið er almen ogn, til at seta ein minnisvarða á yvir teir sjólatnu. Búnaðarráðið hevur sent málið til ummælis.

Í gerðabókini stendur, at stýrið hin 30. mars hevði til viðgerðar mál um minnisvarða, ið ætlast at seta í hina gomlu kirkjugrundina. Stýrið helt tí onga orsøk vera til at viðmæla omanfyri standandi máli.

Í gerðabókini fyri fund 30. mars 1957 stendur tó einki um minnisvarða við Kirkjar, men har er til viðgerðar bræv frá J. Follend, presti, við áheitan um at velja ein ella tveir menn í eina nevnd, sum skal arbeiða fyri einum minnisriti fyri teir sjólætnu. Stýrið helt hetta vera eina góða áheitan og tók væl undir við henni. Valdir vóru, Hans Martin Thomasen, sóknarstýrisformaður, og Jóan Hendrik Samuelsen, lærari.

Tað sæst so einki meira í skjølunum um hetta fyrr enn í 1959, tá ein nevnd, sum nevnir seg "Nevndin fyri minnisvarða yvir teir sjólátnu í Miðvágs sókn" verður sett á stovn, stytt "Minnisvarðanevndin" í flestu skjølunum. Jóhannus Joensen kemur ikki fram aftur í hesum málinum fyrr enn í 1961, tá hann er vorðin limur í Minnisvarðanevndini tvey ár eftir at, nevndin byrjaði arbeiði sítt. Men tað var tó helst hann, sum aftur tendraði neistan fyri hesum arbeiðinum og gjørdi, at nevndin fór til verka. Tí í nýstovnaðu nevndini var ein av nevndarlimunum, Hans Martin Thomasen, sóknarstýrisformaður, umframt fleiri kvinnur í bygdini, har Margrið Niclasen var undangongufólk.

Minnisvarðanevndin

Gerðabókin hjá Minnisvarðanevndini er varðveitt í gamla skjalasavninum hjá Miðvágs kommunu – nú Vága kommunu. Bókin er góðkend sum gerðabók hjá nevndini, sambært blaðið fremst í bókini, dagfest 25. juli 1959. Skrivað undir hava Margrið Niclasen, Hans Martin Thomasen og Kathrina Rasmussen.

Í nevndini sótu í byrjanini: Margrið Niclasen, forkvinna, Hans Martin Thomasen, skrivari, Kathrina Rasmusen, Cornelia Niclasen, Bodil Ellefsen, Marin Margretha Danielsen og Dagmar Joensen-Næs. Nøkur komu afturat seinni, tey vóru: Valborg Joensen í 1960, Jóhannes Joensen í 1961, Alma Frederiksen, Elisabeth Joensen og Sofía Højgaard Ellefsen í 1962. So í alt vóru 12 fólk við í nevndararbeiðinum.

Forkvinnan Margrið Niclasen doyði bráddliga 20. januar 1962. Í hennara stað varð Valborg Joensen vald til forkvinnu. Sofia Højgaard Ellefsen, næstforkvinna, doyði í 1963. Tá var arbeiðið komið so langt, at eingin næstforkvinna varð vald í hennara stað.

Farið at endurgeva nakað úr gerðabókini, sum sigur um arbeiðið hjá nevndini at samla inn pening til minnisvarðan og fáa minnisvarðan gjørdan.

Fyrsti fundurin er, áðrenn tey hava fingið gerðabók, og er tí fyrst førdur á klæddu. Tað er fundur 3. mars 1959, hildin heima hjá Margrið Niclasen. Øll vóru møtt. – Í gerðabókini stendur árið 1958. Her kundi verið líkt til, at árstalið er sett skeift og skal vera 1959. Tað samsvarar í øllum førum betur við restina av gerðabókini. Í gerðabóknini stendur annars um fundin, at tey møttu vóru komin saman fyri at samráðast um at reisa ein minnisvarða yvir teir sjólátnu í Miðvágs sókn. Tað var full semja um at fara undir hetta tiltak, og varð samtykt fyri fyrst at savna inn pening í bygdini og seinni at royna at fáa útsølu í lag. Eisini varð

Margrið Niclasen

samtykt at venda sær til øll hagastýrini í bygdini og biðja um eitt lamb av hvørjum haga. Hesi lomb er ætlanin at burturluta í heyst.

Næsti fundurin í nevndini varð 30. mai 1959 hjá Margrið Niclasen. Viðvíkjandi lombunum, sum umbiðin vórðu, høvdu tey fingið 8 lomb frá hagunum í bygdini. Ætlanin varð at burturluta tey á lutaseðli, og umsókn varð send til fútan um loyvi. Cornelia Niclasen skeyt upp at biða um ull, nú várgongan skjótt byrjar, og senda ullina til spinningar og síðan virka lutir úr henni at hava á ætlaðari útsølu. Innsavnanin í bygdini, sum verið hevði, gav 2.587 kr. Á fundi 3. juli 1959 er upplýst, at lutaseðlarnir eru komnir og eru 2400 í tali. Ætlanin er fyrst at selja í Vágum, og síðan royna at selja restina aðrastaðni í Føroyum. Til formann varð vald Margrið Niclasen og til skrivara Hans Martin Thomasen. So tað er ikki fyrr enn á hesum triðja fundinum, at hetta verður staðfest. Umframt tey var bert Kathrina Rasmussen við á fundinum. Á fjórða fundinum, sum var 26. september vóru øll møtt. Tá var staðfest, at allir lutaseðlarnir vóru ikki seldir enn.

Einasti fundurin í 1960 var 30. januar og øll vóru møtt umframt Valborg Joensen, sum nú eisini var komin í nevndina. Hesaferð var fundurin hildin hjá Dagmar Joensen-Næs. Ullin, tey høvdu biðið um, var nú komin, og var tað 3 posar. Tey samdust um at skilja og nappa ullina og senda hana til spinningar og síðan at binda ullvørur úr henni at hava í útsølu ella til eydnuhjól í heyst. Dagmar Joensen-Næs greiddi frá, at hon hevði havt samráðingar við Janus Kamban um minnisvarðan, og hevði hann sagt seg vilja koma vestur at kanna umstøðurnar. – Tað varð tó ikki Janus Kamban, sum kom at høggja varðan og annað er ikki nevnt um hann í málinum.

Í 1961 er eisini bara ein fundur, og er hann 23. november heima hjá Margrið Niclasen. Hesaferð er Jóhannes Joensen nýggjur limur í nevndini umframt nevndu eru H.M. Thomasen, Kathrina Rasmussen og Bodil Ellefsen møtt. Tvær tekningar til minnisvarða vóru komnar frá Juul Andreasen, steinhøggara, Velbastað. Nevndin samdist um at velja aðra tekningina. Á hesari tekningini var varði við sokli í tveimum pørtum uppeftir, og omaná var 1,25 m. høgur varði við krossi innristum. Allur varðin er 2,5 m. høgur. Semja varð um at hava bazar í vetur, biðja fútan um loyvi og at senda áheitan til bygdafólkið um at lata lutir til tiltakið.

Í 1962 eru fýra fundir. Fyrsti fundurin var 2. mars 1962, hann varð hildin heima hjá Jens Jacob Niclasen, sum var maður Margrið Niclasen. Tað syrgiliga varð hent, at forkvinnan, Margrið Niclasen "doyði knappliga 20. januar 1962", sum tað stendur í gerðabókini. Tí varð neyðugt at velja nýggjan formann. Semja varð um at velja frú Sofíu Højgaard Ellefsen, og tá hon varð spurd, segði hon seg fegin vilja hjálpa til, men bað um loyvi at steðga til týsdagin í næstu viku við svari. Semja var um at fara at kanna hina gomlu kirkjugrundina so skjótt, kavin tiðnar. Næsti fundurin var longu 10. mars, øll nevndin var møtt. Á fundinum varð samtykt at velja Valborg Joensen til forkvinnu og Sofíu Højgaard Ellefsen til næstforkvinnu, og hon var eisini vald til at fyrireika bazarin, sum samtykt varð at hava 29. apríl og at søkja fútan um loyvi. Samstundis varð avgjørt at fara at kanna lendið í gamla kirkjugarði, har

Valborg Joensen seinni Svaðabú

minnisvarðin skal standa. 25. mai var triði fundurin tað árið. Hann var hildin í skúlastovuni í Gamla skúla. Øll nevndin var møtt, og við á fundinum var eisini Juul Andreasen, steinhøggari, Velbastað. Valborg Joensen skeyt upp, at varðin skuldi vera ein fríttstandandi krossur í staðin fyri ætlaðan kross, sum var høgdur inn í stein. Hetta varð samtykt, og heitt varð á Juul Andreasen, um at gera krossin 1,5 m. høgan, um hetta bar til. Síðan varð farið, saman við Juul Andreasen í gamla kirkjugarð, har varðin skuldi standa. 30. august var seinasti fundurin í 1962 hildin í gomlu skúlastovuni. Framløgd varð tekning frá Juul Andreasen. Tað niðasta stykkið var í trimum oman á hvørjum øðrum, har mittasti lutur hevði innhøgda plátu til tekstin, og krossurin stóð ovast. Og var varðin tilsamans 2,85 m. høgur. Nevndin samdist um tekstin, ið er soljóðandi:

"Lívið lótu for land og tjóð
sáran syrgja børn og fljóð
Litu fast á Harran Krist
gevi hann teimum innivist."

Prísurin fyri varðan var 10.000 kr. pluss 2,70 kr. fyri hvønn innhøgdan bókstav, sum var 232,50 kr. afturat. Nevndin varð samd um at biðja Juul Andreasen gera varðan, sum tann framlagda tekningin sýndi og við tí teksti, nevndin var vorðin samd um.

Semja varð eisini um at savna meira pening inn og biðja fútan um loyvi.

Í apríl 1963 er útgreinað rokning komin frá Juul Andreassen, Velbastað, fyri arbeiðið við minnisvarðan.

Minnisvarði	10.000,00 kr.
Stavir 1671 á 2,75 =	4.595,25 "
Minnisplátur	1.853,40 "
Boltar og koyring	150,00 "
Uppseting	463,00 "
Í alt	17.061,65 kr.

6. mai 1962 var bazarur hildin til frama fyri minnisvarðan. Inn komu 7.424,94 kr. Útreiðslur vóru: D.P. Niclasen 291,15 kr. Restorsf bryggjarí 363,50 kr. S.E. Johansen 29,10 kr. Dagblaðið 17 kr. Dimmalætting 15,20 kr. og 16.20 kr. Tils. 732,15 kr. Tilgóðar 6.692,79 kr.

Í 1963 helt nevndin tveir fundir, tann fyrri var 17. mars og varð hildin í gomlu skúlastovuni. Tey flestu vóru møtt. Valborg Joensen byrjaði við at lesa nøvnini upp, ið Follend prestur og J.H. Samuelsen lærari høvdu savnað saman úr kirkjubókini. Nevndin góðtók nøvnini fyribils, men skal lata kønar menn kannað, um nakað er útigloymt.

16. september 1962 skrivar Valborg Joensen, vegna minnisvarðanevndina fyri teir sjólatnu, til sóknarstýrið í Miðvági og biður um at fáa eina grind av jarni gjørda til tann gamla kirkjugarðin. Sóknarstýrið var á fundi 19. oktober 1962 samt um at lata eitt slíkt portur gera fyri kommununar rokning.

13. desember 1963 verður skrivað til sóknarstýrið og søkt um stuðul til minnisvarðan fyri teir sjólátnu. Nevndin hevur savnað inn umleið 15.000 kr. og kemur at resta í um 3.000 kr. Nevndin biður sóknarstýrið um at veita studning til tað, ið írestar. Skrivað undir vegna nevndina hevur H.M. Thomassen, sum eisini situr í sóknarstýrinum. Umsóknin er fyri á fundi í sóknarstýrinum 13. desember 1963, har samtykt verður at stuðla við 3.000 kr. Svar er sent nevndini hin 16. desember.

Sama dag, 16. desember 1963, helt Minnisvarðanevndin fund á kommunuskrivstovuni, seks limir vóru møttir. Formaðurin Valborg Joensen legði fyri við spurninginum um nær minnisvarðin skal vígast. Varðin er nú uppsettur og pláturnar við nøvnumum á teimum sjólátnu eru klárar at seta upp, og jarnportur er komið, og er klárt at seta upp. Og formaðurin upplýsti, at kommunan eftir umsókn hevur játtað at lata 3.000 kr. til varðan, sum gjørdi, at nú var nokk til at rinda allan kostnaðin. Nevndin varð samd um at seta vígsludagin til føstulávintsdagin 9. februar 1964. Nevndin mintist so Sofíu Højgaard Ellefsen, næstforkvinnu, ið andaðist 6. november hetta árið.

Av teimum 12 nevndarlimunum, sum komu við í arbeiði, vóru nú tveir deyðir undir tilgongdini.

Í 1964 vóru tveir fundir. Fyrri fundurin var 18. januar á kommunuskrivstovuni. Møtt vóru, Valborg Joensen, Cornelia Niclasen, Kathrina Rasmusen, Dagmar Joensen-Næs, Johannes Joensen, Hans Martin Thomasen og Høgni Poulsen prestur. Valborg Joensen greiddi frá, at varðin skal vígast føstulávintsdagin 9. februar 1964, og legði hon uppskot fram til stevnuskrá soljóðandi:

1. Sálmurin *"Nú leiti eg til tína náði"* verður sungin.
2. Høgni Poulsen prestur talar.
3. Varðin verður avdúkaður.
4. Kransar lagdir.
5. Nøvn teirra farnu verða lisin upp.
6. Øll drýpa høvur í tøgn 1 minutt.
7. Sálmurin *"Gud signi várt fólk, har tað siglir og rør"* verður sungin.
8. Formaðurin, Valborg Joensen, heldur røðu. Høgni Poulsen prestur endar við bøn.
9. Sálmurin *"Legg tínar sorgir á Harran tín Gud"* verður sungin.

Uppskotið varð samtykt, og samtykt varð, at biðja Tummas Paula Johansen avdúka varðan og at hátíðarhaldið skal byrja kl. 15. Eisini varð samtykt at lýsa avdúkingina í Útvarpi Føroya.

Tummas Pauli Johansen

Aftaná hátíðarhaldið verður borðahald á hotellinum í Miðvági. Prentað verða 500 eintøk av skránni við sálmunum. Tann, sum avdúkaði minnisvarðan var Tummas Pauli Johansen, á Dalbø, f. 1882, vanliga nevndur Boys, d. 1968, 86 ára gamal.

Minnisvarðin varð avdúkaður sunnudagin hin 9. februar 1964. Í Føroya Siglingarsøgu VI, bls. 171 – 182 stendur frágreitt frá minningarhaldinum, har m.a. talan hjá Høgna Poulsen og røðan hjá Valborg Svaðabú (áður Joensen) eru endurgivnar og nøvnini, sum tá stóðu við minnisvarðan, eru endurgivin, umframt sálmarnir, sum vóru sungnir.

Smb. rokning frá Hotel Miðvág vóru 35 fólk til móttøku hin 09.02.1964. Kostnaður 350 kr.

Sigmund Frederiksen hevði, sambært rokning frá 24/3-1964, arbeitt í 176 tímar við økinum til minnisvarðan. Av lønini trekkti hann 100 kr. frá sum gávu.

Minnisvarðin.
Mynd: Sonni Jacobsen, 2018

29. september 1964 hevði nevndin sín seinasta fund. Møtt vóru Valborg Joensen, Hans Martin Thomasen, Dagmar Joensen-Næs, Alma Frederiksen, Katrina Rasmusen, Elisabeh Joensen og Bodil Ellefsen. Roknskapurin varð framlagdur. Varðin v.m. hevur kostað 17.061,65 kr. pluss annan kostnað 1.545,40 kr. Tilsamans 18.607,05 kr. Avlopið var 135,85 kr. Samtykt varð at keypa ein plenuklippara fyri avlopið. Samtykt varð eisini at biða sóknarstýrið taka sær av røktini av varðanum og uttanum. Samstundis varð avgjørt at biða sóknarstýrið seta ein bonk á økinum við varðan. Bræv við hesum orðaljóði varð sent sóknarstýrinum hin 30. september 1964.

Samtykt varð, at nevndin fyribils skal verða sitandi.

Uppgerð 29. september 1964 yvir roknskapin fyri minnisvarða yvir teir sjólátnu.

Inntøkur	
1. Burturluting – lomb	2.586,45 kr.
2. Innsavnan o.a.	4.700,44 “
3. Bazar – netto	6.692,79 “
4. Miðvágs kommuna	3.000,00 “
5. Colonel Andamsons fond	500,00 “
6. Rentur	1.263,22 “
Í alt	18.742,90 kr.
Útreiðslur	
7. Juul Andreasen, varðin o.a.	17.061,65 kr.
8. Tilfar, arb. løn, kransur o.a.	1.545,40 “
9. Avlop, Føroya Banki	135,85 “
Í alt	18.742,90 kr.

11. desember 1964 var skrivið frá Minnisvarðanevndini dagf. 30.9.1964 til viðgerðar í sóknarstýrinum. Umsóknin varð samtykt, og at heitt verður á mannin, sum heldur kirkjugarðarnar báðar, um at halda økið við minnisvarðan eisini.

Viðmerkjast kann um inntøku nr. 5, “Colonel Andamsons fond”, at tað var grunnur til góðgerandi endamál hjá Adamson obersti, ið var ovasti hjá bretsku Pioneer deildunum í Vágum undir krígnum.

Sigmund Frederiksen settur at røkja økið um minnisvarðan

9. august 1965 er málið um at halda økið um minnisvarðan viðlíka fyri á fundi í sóknarstýrinum. Kristin Jacobsen, ið er einsamallur við kirkjugarðarnar, heldur seg ikki vera føran fyri at røkja økið um minnisvarðan. Og hevur sóknarstýrið á fundi 11.12.1964 samtykt at lata eina samsýning uppá 200 kr. árliga fyri hetta yrkið. Samtykt varð at heita á Sigmund Frederiksen um at átaka sær hetta. Skrivað verður til Sigmund Frederiksen, fiskavrakara, hin 13. august 1965 og sagt frá avgerðini. Lagt verður afturat, um tygum ikki vilja átaka tygum hetta, biðjast tygum gera so væl og lata okkum hoyra aftur.

Sigmund Frederiksen

Sigmund Frederiksen, eisini nevndur Kunoyar Sigmund, svarar aftur hin 16. august og sigur, at hann hevur røkt hetta bæði í 1964 og 1965 og heldur, at ein hóskandi árlig samsýning er 300 kr. Annars fer hann framvegis at gera hetta arbeiði við minnisvarðan, sigur hann, sjálvt um hann einki fær fyri tað. Á fundi 20. august 1965 var samtykt at samsýna honum við 300 kr. um árið.

27. juni 1967 skrivar Sigmund Frederiksen og sigur, at hann hevur røkt økið um minnisvarðan fyri 300 kr. um árið, men at hann heldur at hetta er nakað lítið. Hann fær svar aftur frá kommununi hin 18. juli 1967, har sagt verður, at sóknarstýrið á fundi 17. juli hevur samtykt at hækka samsýningina til 500 kr. um árið, men at hann so eisini skal røkja jarnportrið í gamla kirkjugarði. Lønin hjá Sigmund Frederiksen fyri arbeiðið varð hækkað til 700 kr. um árið frá 01.01.1971.

Við skrivi 23. apríl 1976 søkir Sigmund um at fáa eitt less av skervi til arbeiðið við minnisvarðan, sum verður játtað honum, og við skrivi 13. apríl 1977, biðjur Sigmund um nýggjan plenuklippara til plenuna um minnisvarðan. Bygdaráðið samtykkir at svara, at plenuklipparin til kirkjugarðin verður brúktur til minnisvarðan eisini.

Á fundi 24. august 1977 er nevnt í gerðabókini, at Sigmund Frederiksen við skrivi dagfest 8. juli 1977 sigur upp starvið sum umsjónarmaður við minnisvarðan. Sigmund Frederiksen, við Kirkjar, doyði 01.10.1980, 77 ára gamal.

Minnisvarðanevndin framvegis til

Einki varð hoyrt frá nevndini fyri Minnisvarðan síðan 1964. Og hóast nevndin tá samtykti, fyribils at vera sitandi, so hava tey flestu helst væntað, at nevndin fyri langt síðan hevði tikið seg sjálva av. Men 29. januar 1973 skrivar Valborg Svaðabú og sendir inn umsókn um, at útvega eina navnaplátu yvir teir, ið sjólátnir eru í Miðvági, síðan minnisvarðin varð reistur og at seta ein bonk við minnisvarðan.

Málið er fyri á fundi í bygdaráðnum 5. februar 1973 og varð samtykt at heita á minnisvarðanevndina um at fáa eitt yvirlit yvir teir, ið sjólatnir eru síðan minnisvarðin varð reistur. Og varð samtykt at seta ein bonk við minnisvarðan.

24. august 1973 skrivar Minnisvarðanevnin til bygdaráðið. Vegna áheitan frá bygdaráðnum senda vit hervið nøvnini á teimum, ið sjólátnir eru síðan minnisvarðin varð reistur. Av tí at ætlanin er at fáa minnisplátuna lidna til 1. november 1973, minningardag teirra sjólátnu, vóna vit, at bygdaráðið tekur eina skjóta avgerð og játtar umsóknini. Sambært viðtalu við Juul Andreasen, steinhøggara, metir hann sjálva navnaplátuna at fara at kosta o.u. 900 kr. Harafturat kostar hvør bókstavur 5 kr. Leysliga mett fer allur kostnaðurin at verða um 2.700 kr. Skrivað undir vegna minnisvarðanevndina hevur Valborg Svaðabú, sum er forkvinnan, ið áður nevndist Valborg Joensen.

3. september 1973 hevur bygdaráðið fund við Minnisvarðanevndina, har sagt verður, at Minnisvarðanevndin varð boðin við til fundin í smb. við skriv teirra 24. august 1973. Møtt fyri Minnisvarðanevndina vóru: Valborg Svaðabú, Cornelia Niclasen, Elisabeth Joensen, Alma Frederiksen, Sigmund Frederiksen og Cathrina Rasmussen.

John Poulsen bygdaráðsformaður bjóðaði vælkomin og setti ymiskar spurningar í samband við minninsvarðan, yvir tær plátur, ella rættari sagt, nøvnini á plátunum og blivu frágreiðingar givnar frá minnisvarðanevndini, og fór nakað av orðadrátti fram um, hvør ið skal takast við á minnisvarðan, millum annað, um persónar, ið hava fingið grøv í kirkjugarðinum, skulu takast við eisini á minnisvarðan. Síðan fór minnisvarðanendin av fundinum, og bygdaráðið fór undir at viðgera málið.

Bygaráðið var samt um at lata kommununa bera kostnaðin á 2.700 kr., sum umsøkt, tó skal bygdaráðið loyva sær at mæla nevndini til, ikki at taka aðrar persónar við á minnisvarðan enn teir, sum ikki hava fingið grøv í kirkjugarði í Vága sýslu. Svar við hesi avgerð varð send Valborg Svaðabú hin 10. september 1973.

Hans Jakku Hansen legði hin 20. juni 1989 uppskot fram á fundi um at leggja flísar á túnið við minnisvarðan. Mentunarnevndin og fíggjarnevndin tóku undir við málinum, og bygdaráðið samtyktið uppskotið. Sama ár 26. september er til viðgerðar í bygdarráðnum áheitan frá Minnisvarðanevndini um at gjalda eina nýggja navnaplátu. Hetta varð samtykt.

Umsjónarmaðurin við kirkjugarðarnar settur at røkja økið

Á fundi 1. desember 1977 verður samtykt at leggja arbeiðið at halda økið um minnisvarðan undir arbeiðið hjá umsjónarmanninum við kirkjugarðarnar, Ludvig Jacobsen. Hetta eftir, at Sigmund Frederiksen, sum hevði havt hetta yrkið, var givin. Luddi hevði so starvið fram til 1991, tá hann gavst. Umsjónarmaðurin við kirkjugarðarnar hevur so seinni havt hetta yrki eisini. Tann eftir Ludda var Alfred Poulsen, sum tók við 01.01.1992.

Kansteinar og brotflísar um minnisvarðan

3. mai 1989 hevur Tekniska deild hjá Miðvágs kommunu, Tummas Lauritsen arkitektur, saman við Hans Jacob Hansen gjørt uppskot um hamping av túni við minnisvarðan í gamla kirkjugarði. Mett brúk er: Kantsteinar 31 m. Brotflísar 37 m^2. Kostnaðarætlan við arbeiðsløn, 26.810 kr.

Samtykt varð á fundi í bygdaráðnum 20. juni 1989 um at heita á Hans Jacob Hansen um at gera arbeiðið. Hann biðjist tosa við bygdaráðsformannin, Regin Poulsen, áðrenn byrjað verður uppá arbeiðið.

Arbeiðið er helst ikki gjørt fyrr enn í 1990. Tí 27. februar 1990 er avrit av tilboð frá Thorstein Petersen til Hans Jacob Hansen um kostnað fyri kantsteinar og brotflísar. Prísirnir víkja ikki nógv frá kostnaðarætlanini.

Útbygging av kirkjugarðinum

Útbyggingin av kirkjugarðinum byggistig 1 varð gjørt árini 1987 og 1988. Avhending varð framd 14. november 1988. Garantieftirlit var 19. desember 1989, har staðfest varð, at alt arbeiði var gjørt, umframt staðfestir smáir manglar við avhandanina. Tó varð hesin parturin av kirkjugarðinum ikki tikin í brúk fyrr enn 13. februar 1997. Grundin var helst, at hin parturin av kirkjugarðinum var ikki hóskandi fullur fyrr enn tá. Tað hava nevniliga fleiri verið grivin í eldra partinum eisini upp til nýggja tíð. Helst eldri fólk, sum hava biðið um pláss árðenn o.a.

Tann fyrsti, sum varð grivin í útbygda kirkjugarðinum var J. Heini E. Joensen á Týkarheyggi, deyður 08.02.1997, 44 ár. Jarðarferðin, sum var hin fyrsta í hesum partinum av kirkjugarðinum, var 13. februar 1997.

Økið fingið til vega

Fyrstu ferð, ein sær í skjølunum, at umrøtt verður at víðka kirkjugarðin, er á fundi 11. desember 1962, har bygdaráðið hevði fund saman við Útskiftingarnevndini fyri Miðvágs bygd. Fundurin var um, hvat kommunan átti at ogna sær undir útskiftingini til almenn endamál. Útskiftingarformaðurin O. Danielsen upplýsti, at kommunan kann taka 26.000 m^2 av dyrkaðum lendi og 67.000 m^2 av ódyrkaðum. Her varð hugsað um økir, sum kommunan átti at taka til nýggjar vegir, nýggj íbúðarøkir, til havnaútbyggingar, ítróttarvøll o.a. Nevnt verður so eisini: "Víðkan av kirkjugarðinum varð eisini havd á máli." Men hesa tíðina verður hetta seinasta bert umhugsað vegna framtíðar tørv. Tað gingu eisini nærum 20 ár, áðrenn hetta kom upp aftur at venda. Og út frá teimum skjølunum hevur kommunan ikki tikið av møguleikanum í 1962 at ognað sær øki til framtíðarútbygging av kirkjugarðinum, ella í øllum førum ikki nokk til tað.

Á fundi 6. mai 1981 er til viðgerðar støðutøka til møguliga víðkan av kirkjugarðinum. Samtykt at útbyggja kirkjugarðin 20 m. omaneftir og heimeftir á matr. nr. 277b og part av matr. nr. 244 paralelt við verandi garð. Kannast skal, hvat grótgarður kostar og taka støðu til hvussu garðurin rundan um garðin skal gerðast seinri, av gróti ella øðrum tilfari.

Tað gekk annars rímuliga seint við hesum. Men málið livir framvegis, og á tveimum fundum í 1985, ávikavist 30. apríl og 29. mai, verða júst hesi bæði nevndu grundstykkir viðgjørd. Á fyrra fundinum verður viðgjørd umsókn frá Jóhannus Ellingsgaard og Hans Ellefsen um sundurbýti av matr. nr. 277b og 22, sum skulu nýtast til víðkan av kirkjugarðinum. Hetta varð samtykt. Á seinni nevnda fundinum er til viðgerðar umsókn um sundurbýti av matr. nr. 244, har Steingrim Nattestad søkir um sundurbýti. Tað frábytta skal nýtast til kirkjugarð. Hetta varð samtykt. Og hevur kommunan so eftirfylgjandi keypt hesi nevndu stykkir til kirkjugarð.

Í desember 1985 hevur kommunan fingið munnliga játtað lán frá Føroya Sparikassa á eina millión krónur, goldið aftur yvir 10 ár til 12% rentu, ætlað at fíggja keyp av jørð til m.a. kirkjugarð, men eisini til vegir og annað. Samtykt var á fundi 18. september 1985 at taka upp lánið.

Arbeiðið boðið út

Á fundi í bygdaráðnum 30. apríl 1986 varð til viðgerðar tilmæli frá trivnaðarnevndini at víðka kirkjugarðin heimeftir við 15 m. smb. uppskoti frá teknisku nevnd. Samtykt varð at bjóða arbeiðið út, har viðmerkt verður, at kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka. Nú er so upprunaliga uppskotið um 20 metrar tødna til 15 metrar.

Eftir hesa samtyktina varð bíðað eftir, at tekniska deild hjá kommununi varð liðug at gera útbjóðingartilfarið. Hetta tók drúgva tíð, og umleið eitt ár aftaná á fundi 4. mai 1987 heitir Jóhannus Ellefsen á teknisku nevnd um at fáa tilfar til kirkjugarð tilvega innan 14 dagar. Á fundinum ger Sámal Jákup Jørgensen vart við, at hann hevur rykt eftir liðugtgerð av útfyllingartilfarinum til kirkjugarðin, men hettar hevur ikki eydnast at fáa higartil, hóast fleiri áheitanir.

25. mai 1987 skrivar tekniska nevnd hjá Miðvágs kommunu, at málið er tíverri komið nakað í drag, men nú er tað so greitt til útbjóðingar. l. byggistig, sum verður útboðið í hesum

døgum, umfatar vegir, gøtur, dren og gravteigar til uml. 300 gravir, men ikki garðin um økið. Hesin verður gjørdur í seinni byggistigi. Støðið til garðin fram við 1. byggistigi er tó við í útbjóðingini. Eftir ráðum frá royndarstøðini í Kollafirði verður moldin á staðnum blandað við sandi og knústum skeljum í lutfalli, mold 4/7, sandur 2/7 og skjeljar 1/7.

Sama dag, 25. mai, skrivar tekniska nevnd hjá Miðvágs kommunu til avvarðandi nevndir, har ymsar útrokningar eru fyri arbeiðið, sum er ásett at taka 14 mánaðir. Av hesum verður væntað at kommunan skal gjalda út 344.000 kr. í 1987 av samlaða tilboðsprísinum. Mælt verður til at hava útbjóðingina áðrenn summarfrítíðina og lýsa í bløðunum í viku 22. Hava lisitasjón mánadagin 22. juni og taka avgerð á bygdaráðsfundi áðrenn endan av juni. Í útrokningunum kemur tekniska nevnd fram til, at kostnaðurin fyri arbeiðið verður 1.114.325 kr. + 5% til óvissu, 55.716 kr. + 3% til eftirlit, 33.429 kr., sum tilsamans er 1.203.470 kr.

Tíðarætlanin fyri arbeiðið er henda:

Grevstur fyri vegnum: sep., okt. 1987.

Grótfylla, okt., nov., des. 1987.

Frárenningarskipan: Frá oktober 1987 til juni 1988.

Umvelting: apr., mai, jun. 1988.

Sáðing: juli 1988.

Gøtur: jul., aug., sep. 1988.

Asfaltering, liðugtgerð: sep., des. 1988.

Hetta sigur so, at arbeiðið við víðkanini av kirkjugarðinum skal vera liðugt við ársenda 1988.

Tilboð komin inn

4. juni 1987 varð arbeiðið boðið út, og 19. juni 1987 skrivar Pf. Vesturbú byggivirki v/ J. á Plógv, Sandavágur, og gevur tilboð uppá útbygging av kirkjugarði í Miðvági, 1. byggistig. Teir siga, at tilboðið er útroknað sambært móttiknar tekningar, beskrivilsir og mongdarlistar. Maskinir og bilar heimahoyrandi í Miðvági skulu brúkast til arbeiðið sambært bræv. El-arbeiðið skal gerast av Albin Wang. VVS-arbeiðið skal gerast av Pf. Leivur Nattestad. Tilboðið er gjørt soleiðis, at ein tilboðslisti 12 A4-síður, sum tekniska deild hjá Miðvágs kommunu við Tummas Lauritsen arkitekti hevur evnað, er útfylt við tilboðskostnaði fyri hvørt evni sær. Samlaða tilboðið er 1.293.890 kr.

Útgreinað soleiðis:

1. Innrætting av byggiplássi	55.000 kr.
2. Jørðarbeiði	551.000 -
3. Veg- og lendisarbeiði.	
3.1 Vegur nr.1	113.175 -
3.2 Støði til hús, goymslu og garð	127.075 -
3.3 Vegur nr.2	158.533 -
3.4 Gøtur og tún	84.149 -
4. Dren- og frárennigararbeiði	180.027 -
5. Vatnveiting	8.007 -
6. Elarbeiði	15.774 -
Tilsamans	1.293.890 kr.

23. juni 1987 skrivar tekniska deild hjá Miðvágs kommunu, at hesir hava biðið um tilfar til útbjóðingina: Kaj Egon Fagraberg, Miðvági, Pf. Vesturbú, Sandavági og Brynjálvur Nattestad, Miðvági.

Bert 2 tilboð komu inn og tey vóru:

1. Kaj Egon Fagraberg 1.466.650 kr.
2. Pf. Vesturbú 1.293.890 kr.

Aftaná lisitasjónina hevur tekniska deild gjøgnumgingið tilboðini. Tann hægri prísurin hjá tilboði 1 stendst sum heild av hægri eindarprísum fyri vegarbeiði og umvelting av mold. Tekniska deild við Tummas Lauritsen mælir nevndum og Miðvágs bygdarráð til at taka av lægra tilboðnum.

Á fundi í bygdaráðnum 29. juni 1987 var tilmæli frá teknisku deild til viðgerðar. Ein meiriluti í fíggjarnevndini Martin Nielsen og Jóhannus Ellefsen mæla bygdarráðnum til at taka við lægra tilboðnum.

Herleif Hansen tekur støðu á bygdarráðsfundinum. Herleif setti fram uppskot um, at kommunan ger arbeiðið. Atkvøtt varð um hetta, og uppskotið fall. Samtykt varð tí at taka við tilboðnum frá P/f Vesturbú uppá kr. 1.293.890,-. Herleif atkvøddi imóti. Viðmerkt verður, at Kaj Egon Fagraberg, bygdaráðslimur, fór út frá fundinum, meðan hetta málið var til viðgerðar.

6. august 1987 verður skrivað til Pf. Vesturbú v/ Niels Braunschweig, Sandavági og sagt frá, at bygdaráðið hevði á fundi 26.06.87 samtykt at taka av tilboð teirra, dagfest 19.06.87, at víðka kirkjugarðin, 1. byggistig, fyri 1.293.890 kr.

Á fundi 2. september 1987 verður uppskot frá fíggjarnevndini samtykt, at arbeiðið við nýgerð av kirkjugarði fer soleiðis fram, at arbeitt verður fyri uml. kr. 500.000 í 1987 og rest í 1988.

Martin Nielsen, bygdaráðsformaður, mælti til, at hann og ein limur í mentunarnevndini og leiðarin av teknisku deild verða arbeiðsnevnd í arbeiðnum við kirkjugarðin. Hetta varð samtykt. Soleiðis komu Martin Nielsen, Hjørleif Joensen og Tummas Lauritsen at sita í bygginevnini, har Hjørleif Joensen varð valdur nevndarformaður.

Herleif Hansen mælti til, at tekniska nevnd varð bygginevnd og atkvøddi imóti.

Júst nær arbeiðið er byrjað verður ikki upplýst. Eftir tíðarætlanini skuldi tað byrja fyrst í september 1987, men smb. faktura 4. september má tað verða byrjað áðrenn tað, tí tá er longu nokkso fitt av fyrireikingararbeiðinum gjørt. So helst er tað byrjað hálvan ella stutt eftir hálvan august 1987.

4. september 1987 kemur nevniliga fakuri við rokning fyri arbeiði, sum higartil er gjørt. Tað er innrætting av byggiplássi fyri 35.000 kr., jørðarbeiði fyri 112.746 kr. og veg- og lendisarbeiði fyri 37.278 kr. ella tilsamans 185.024 kr.

Byggifundir í 1987

7. september 1987 var fyrsti byggifundur í smb. við víðkan av kirkjugarðinum hildin á byggiplássinum og víðari sama dag á kommunuskrivstovuni. Á fundinum vóru Niels Braunschweig, Vesturbú. Hjørleif Joensen, Miðvágs kommuna (MK) og Tummas Lauritsen, arkitektur hjá MK. Í fundarfrásøgnini stendur m.a.: Niels Braunschweig syrgir fyri, at kálkroynd verður tikin av sandinum, sum Vesturbú hevur fingið at blanda í moldina fyri at fáa greiðu á, um hann er nógv kálkríkur til, at knústar skjeljar kunnu ganga út í moldblandingina.

Uppgrivin mold er løgd á molddumpin við tí fyri eygað at blanda hana har, og síðan koyra hana aftur til gravteigarnar.

Kirkjugarðurin fer illa av arbeiðinum. Niels Braunschweig mælir til at halda vegin viðlíka, meðan arbeiðið fer fram. Tá liðugt er, kann verða grivið omanav vegnum og nýtt topplag verða lagt omaná fibertex.

Arbeiðsstøða. Grevstur fyri vegi 1 er ligugt. Grevstur fyri støði til hús er liðugt. Vesturbú heldur arbeiðið innanfyri 500.000 kr. í 1987. Viðv. tekningum og skitsum, so var semja um, at tíðarætlanin, sum var við í tilfarinum, kann nýtast sum endalig tíðarætlan. T.v.s., at arbeiðið er liðugt við ársenda 1988.

Næsti byggifundur var 21. september 1987 í skúri á byggiplássinum. Har vórðu annars allir byggifundirnir hereftir hildnir. Á hesum fundinum møttu Niels Braunschweig, Vesturbú, Kaj Jørgensen, Vesturbú, Tummas Lauritsen, MK, Kaj Egon Fagraberg, KER, Remi Hansen, KER. Ymisk mál viðv. arbeiðinum verða umrødd, m.a. eitt drenrør á 75 metrar, sum skal leggjast eyka eftir áheitan frá gravaranum. Í vegi 1 og fyri goymslutúni er grótfyllan næstan liðug, og byrjað er at grava út fyri vegi 2. Sagt verður eisini, at Vestubú fekk handað uppskot til sáttmála. Lastbilur hevur arbeitt 14,5 tímar og broyt 14,5 tímar. Smb. notati eru Kaj Egon Fagraberg og Remi Hansen við á fundinum vegna KER, har teir eru ávikavist lastbilaførari og broytførari og ánarar av felagnum. Annars hava 5 arbeiðsmenn verið til arbeiðis.

3. byggifundur var 5. oktober 1987. Við á fundinum vóru: Niels Braunschweig, Vesturbú, Martin Nielsen fm., MK, Hjørleif Joensen, MK *(fm. í Teknisku nevnd og bygginevndini)*, Tummas Lauritsen, MK, Remi Hansen, KER. Tummas Lauritsen skal kanna um til ber at lækka lendið fyri at spara ífyllu. Sagt verður, at í syðra enda av vegi 2 og í gravteigunum har er stutt niður á hellu, uml. 60 – 80 cm. Sostatt má roknast við spreinging fyri gravteigunum har. Skotið verður upp ikki at gera gravteigar í grunna økinum, men bert at javna og sáa. Umframt smálutir um arbeiðsstøðuna annars verður nevnt, at sáttmáli varð undirskrivaður. Tað arbeiða framvegis 5 arbeiðsmenn, 1 lastbilur og 1 broyt. Nevnast kann annars, at 1 lastbilur og 1 broyt vóru við í øllum arbeiðinum.

30. oktober 1987 er eitt kontoútrit yvir arbeiðið hjá Pf. Vesturbú við kirkjugarðinum, sum er ein støðulýsing. Samlaða upphæddin, arbeitt er fyri pr. 27. oktober 1987, er 577.933 kr., sum eru goldnar felagnum. T.v.s., at hetta er longu 78 tús. kr. meira, enn avtalað varð at gera í 1987. Men kommunan góðtekur hetta.

Byggifundur 4 var 22. oktober 1987. Vegur 2 varð liðugt útgrivin og grótfyllingin nærum liðug. Grevsturin fyri gravteigunum var komin gott og væl í helvt. Veðurlagið hevði verið skiftandi síðan seinasta fund, nógv regn, men lítil vindur. Manning og amboð vóru óbroytt. Nevnast kann, at Tummas Lauritsen hevur skrivað allar fundarfrágreiðingarnar, sum eru sendar øllum pørtunum.

Til byggifund nr. 5, 16. november 1987 var ikki nógv nýtt av áhuga. Talið av arbeiðsmonnum, sum hevði verið 5, varð minkað niður til ein.

Á fundi í bygdaráðnum 21. desember 1987 varð til viðgerðar trupulleikin ovast í kirkjugarðinum, har lendið var grunt. Støða skuldi takast til, um lendið skuldi spreingjast út, ella talið av ætlaðum nýggjum gravum við byggistig 1 skuldi lækkast frá 300 gravum til 260 gravir, og nevnda øki so bert vera slættað. Samtykt varð hetta seinna.

Arbeiðið í 1988

Arbeiðið lá stilt frá ársskiftinum til 1. mars 1988. Síðan er at kalla bert grótfylla gjørd, verður sagt í frágreiðing frá byggifundi 7, sum var 7. mars 1988. Á fundinum var eingin frá Vesturbú, tað var tað heldur ikki næsta fundin. Sagt verður, at tað, sum skuldi skjótast fyri at fáa nóg gott dýpi í eystara gravteigi, varð skotið 9. mars. Mesta av grótinum er upptikið og koyrt á støðið til hús og goymslurúm. Henda upplýsing má so verða skrivað í fundarfrágreiðingina eftir fundin, tí hetta skal jú vera hent 2 dagar eftir fundin. Annað, og meira álvarsamt mál á fundinum vóru boð frá bygdaráðsformanninum Martin Nielsen, sum upplýsti, at eigarin av økinum har molddumpurin var, hevði uppsagt sáttmálan, og tessvegna kundi mold ikki koyrast har, til onnur loysn var funnin. Inntil tá varð neyðugt at arbeiða á økjum, sum ikki eru tengd at molddumpinum, sum so mátti vera dreniarbeiði.

Á næsta fundinum, sum var 28. mars 1988 mars kundi Martin Nielsen upplýsa, at hann

hevði tosað við Gudmund Heinesen og fingið játtað, at mold og møl úr kirkjugarðinum kann leggjast omanfyri vegin.

Eitt av arbeiðunum hjá arbeiðstakaranum var at blanda mold til kirkjugarðin á sjálvum molddumpinum. Blandingin var mold 4/7 partar, sandur 2/7 partar, knústar skeljar 1/7 partur. Nú mælti Tekniska deild til, at mold kann blandast beinleiðis niður í gravteigin, uttan at koyrast norð á molddumpin at blandast.

14. apríl 1988 er eitt uppískoyti til fund 8. Sagt verður frá, at uppgrevstur úr gravteigi 1 er farin fram. Sostatt eru viðurskiftini á molddumpinum ikki longur til hindurs fyri liðugtgerð av arbeiðinum. Dentur verður lagdur á, at tíðarætlanin má vinnast aftur og haldast framyvir.

7. apríl 1988 sýnir ein faktura uppgerð frá Pf. Vesturbú, at kostnaðarliga er arbeiðið nú komið gott og væl í helvt. Av tilboðsprísinum uppá 1.293.890 kr. eru 668.745 kr. brúktar, eftir eru 625.146 kr.

Sama dag kemur annar fakturi frá Pf. Vesturbú fyri eykaarbeiði at spreingja 67,5 m^3 av gróti í kirkjugarðinum. Av hesum vóru 30 m3 við í tilboðnum.

Byggifundur 9 var 18. apríl 1988. Har var ikki nógv nýtt av áhuga, uttan at nevnt verður, at liðugt er at fylla í gravteigarnar. Leygardagin 9/4-88 hevur SKB-maskinan hjá Miðvágs kommunu planerað í kirkjugarðinum. Viðv. manning og amboðum er tað nýggja hesaferð, at ein frontlessari hevur eisini arbeitt í nakrar dagar.

Sum viðmerking til byggifund 10 hin 2. mai 1988 verður sagt, at ansast skal eftir, at mold av molddumpinum ikki verður brúkt til annað enn kirkjugarðin, fyrr enn hesin er liðugur. Tí verður dosarin hjá kommununi settur at steingja ovaru moldgoymsluna. Hetta man so merkja, at onkur hevur verið og tikið mold har. Víðari verður sagt, at neyðugt verður at skjóta í gravteigi 1 í ovara enda eitt øki uppá 32 m^3. Borivorgnurin hjá KER verður settur at bora hetta sum skjótast.

11. byggifundur var 30. mai 1988, einki serligt nýtt. Til byggifund 12, sum var 13. juni 1988 verður m.a. sagt, at dosarin stendur framvegis og steingir molddumpin, tá arbeitt ikki verður. Báðir gravteigar eru fullir, tó vænta 2-3 less í ovara enda á teigi 1. Sostatt fer blandingin á molddumpinum at vera liðug.

15. juni 1988 sýnir ein fakturauppgerð frá Pf. Vesturbú, at nú er arbeitt fyri 849.242 kr. Eftir eru 363.998 kr. av tilboðsprísinum, sum nú er lækkaður frá 1.293.890 kr. til 1.213.239 kr. Grundin er, at jørðarbeiðið er lækkað frá 551.350 kr. til 498.254 kr. og dren og frárenningar er lækkað frá 180.027 kr. til 152.472 kr., hetta tí at avgjørt varð ikki at gera gravir í ovara parti av kirkjugarðinum, tí har var ov grunt. Tað minkaði so nakað um arbeiðið.

Byggifundur 13 var 26. juni 1988. Luttakarar: Jonfinn á Plógv, Vesturbú, Jógvan H. Hansen, Vesturbú, Kaj D. Jørgensen, Vesturbú, Remi Hansen, KER, Martin Nielsen, MK, Hjørleif Joensen, MK, Tummas Lauritsen, MK. Ásannað verður, nú endaliga planeringin av gravteigunum er byrjað, at ein munandi nøgd av mold skal til afturat. Sagt verður, at KER hevur koyrt mold frá ovara partinum av moldøkinum oman á blandiøkið. Hesa mold hava dosararnir breitt út. Remi Hansen skal grava hetta upp við hjálp av dosaranum, so moldin kann koyrast heim í kirkjugarðin. Komið er eftir, at serliga í vegi 1 og í gravteigi 1 eru leiðingar illa farnar av koyring við tungum amboðum. Men umvælingararbeiðið er byrjað.

17. juli 1988 sýnir faktura frá Pf. Vesturbú, at arbeitt er fyri 950.668,30 kr. Írestar 262.577,70 kr. Hesin faktura sýnir eisini, at nú eru undirveitararnir byrjaðir. Leivur Nattestad hevur gjørt um helvtina av vatnarbeiðinum og Albin Wang knapt helvtina av elarbeiðinum.

26. august 1988 sýnir faktura uppgerð frá Pf. Vesturbú, at arbeitt er fyri 1.048.000,80 kr. Eftir eru 165.238,20 kr. Undirveitararnir hava ikki gjørt meira enn. Byggifundur 14 var 19. juli 1988, og byggifundur 15 var 5. september, ikki nógv nýtt. Til byggifund 16, sum var 19. september 1988, verður tosað um sáing. Nevnt verður eisini, at í áarførinum sama dag sæst,

Teir tríggir kirkjugarðarnir, frá 1935, 1942 og frá 1988, har hesin seinasti tó ikki varð tikin í brúk fyrr enn í 1997.
Loftmynd: Kortal.fo.
Áskrift s.j.

at neyðugt er at grava opna rennu 15 metur tvørtur um ovara enda á vegi 2 oman við vestaru síðu, og neyðugt er at grava opna veit fram við kirkjugarðsvegnum vestanfyri og inn í Laksá. Til byggifund 17, sum var 3. oktober verður m.a. sagt, at opna veitin fram við kirkjugarðinum vestanfyri og inn í Laksá er gjørd.

Til næstseinasta byggifundin, sum var 17. oktober 1988, verður m.a. sagt, at Vesturbú ger íbinding í landsveg ístand á norðaru síðu. Miðvágs kommuna letur kantsteinar. Kommunan tosar eisini við Eyðin Thomassen frá Landsverkfrøðinginum um málið. Vesturbú javnar ovara enda á gravteigunum, so teir fella betur saman við hinum gravteigunum. Nú er ov seint at sáa, so hetta má gerast til vár.

Hin 31. oktober 1988 var 19. og seinasti byggifundurin í smb. við víðkan av kirkjugarðinum hildin. Møttir vóru Kaj D. Jørgensen, Vesturbú, Jonfinn á Plógv, Vesturbú, Hjørleif Joensen, MK og Tummas Lauritsen, MK. Kantsteinar til íbinding í landsveg skulu gerast áðrenn 15. november. Við tað, at nøkur punkt enn mangla at gera, varð avrátt at útseta avhending við tí fyri eyga, at eingin mangullisti nýtist at vera. Viðvíkjandi kirkjugarðsvegnum varð avrátt, at kommunan nú yvirtekur og ger neyðuga asfaltering.

Arbeiði, sum manglar: Tyrving og íbinding av el. Burturbeining av útgerð og avlopstilfari v.m. og rudding av arbeiðsplássinum. Arbeiðið er annars liðugt burtursær frá tí, sum nevnt er.

Avhandan av kirkjugarðinum

14. november 1988 var avhending av lidna arbeiðinum við at víðka kirkjugarðin í Miðvági, 1. byggistig, sum m.a. umfataði 1800 m^2 av nýggjum kirkjugarði, har tað vórðu lagdir tveir gravteigar 60 x 6,5 m hvør til støddar til tvey rød av gravplássum hvør. Umframt 2 vegir og 2 gøtur. Vegur 1 er vegurin inn í hendan partin av kirkjugarðinum og framvið vestara enda av nýggja kirkjugarðinum. Vegur 2 gongur framvið syðru síðu av nýggja kirkjugarðinum. Gøta 1 og gøta 2 ganga so gjøgnum longdina av kirkjugarðinum framvið gravplássunum. Mitt í syðra raðnum av gravstøðum var gjørt eitt betongtún, 6 x 5 m.

Sambært avhendingarskjali, dagfest henda dagin, 14.11.88, eru bert tveir smáir feilir, eitt stoppkranadeksil manglar, og ein lutur í einum brunni skal vera slættur. Alt annað varð mett gjørt sambært sáttmála.

Skrivað undir hava Hjørleif Joensen, sum byggiharri vegna Miðvágs kommunu. Jonfinn á Plógv, sum arbeiðstakari vegna pf. Vesturbú. Harafturat hevur Tummas Lauritsen skrivað undir sum eftirlit.

17. november 1988 kemur seinasti faktura frá Pf. Vesturbú, Sandavági, við rokning fyri tilboðsarbeiði, sum nú er broytt enn einaferð, hesaferð gott 6.000 kr. upp til 1.219.239 kr. og er nú alt avtalað arbeiði gjørt. Grundin til seinastu broytingina er, at jørðarbeiðið er hækkað frá seinasta tilboðsprísi 498.254 kr. til 504.254 kr.

Endaligu upphæddirnar eru hesar:

Innrætting av byggiplássi, 55.000 kr.

Jørðarbeiði, 504.254 kr. *(Munur upprunatilboð 19/6-87: ÷ 46.746 kr.)*

Veg- og lendisarbeiði, 482.932 kr.

Dren og frárenningarveitingar, 152.472 kr. *(Munur upprunatilboð 19/6-87: ÷ 27.555 kr.)*

Vatnleiðing - Leivur Nattestad, undirveitari, 8.807 kr.

El-arbeiði - Albin Wang, undirveitari, 15.774 kr.

Tilsamans 1.219.239 kr. *(Upprunatilboð 19/6-87: 1.293.890 kr.)*

Á fundi 20. juni 1989 varð til viðgerðar skriv frá Kaj D. Jørgensen, gartnara, Miðvági, við uppskoti um, at gróðurseta trød og runnar við nýggja kirkjugarðin. Hetta vil hjálpa til at halda uppá moldina á teigunum. Málið var samtykt, smb. kostnaðarmeting frá K.D.J. uppá 5.000 kr. Viðmerkt varð í gerðabókina, at Hjørleif Joensen tók ikki undir við málinum orsaka av fíggjarstøðuni.

Garantieftirlit var tann 19. des. 1989. Allir manglar vóru nú gjørdir. Nú er nýtt bygdaráð komið til, og nú er tað Regin Poulsen, sum skrivar undir vegna kommununa, vegna, at hann er formaður í teknisku nevnd og bygginevndini fyri kirkjugarðin. Hjørleif Joensen, sum hevði verið formaður í hesum nevndum, er nú vorðin bygdaráðsformaður. Vegna byggiharran hevur Jonfinn á Plógv skrivað undir og Tummas Lauritsen arkitekur, vegna eftirlitið.

29. mars 1990 verður skrivað til Pf. Føroya Banka, at hervið verður sagt frá, at arbeiðið er liðugtgjørt og yvirtikið av kommununi. Sostatt kann garantiið uppá kr. 130.000,- leysgevast.

Her er talan um garantitíð og tíð har ávísur partur er eftirhildin sum trygd. Tað seinasta av hesi upphædd verður leysgivið til útgjald 29. mars 1990.

Arbeiðið við víðkanini av kirkjugarðinum í Miðvági, byggistig 1, var liðugt 14. november 1988, tá útbyggingin varð handað kommununi.

Nýggi kirkjugarðurin umvældur

Sjálvt um víðkanin av kirkjugarðinum varð liðug í 1988, har góð 1,2 millión krónur vórðu brúktar uppá kirkjugarðin árini 1987-88, og 260 gravstød vórðu fingin tilvega, so lá hesin parturin av kirkjugarðinum ónýttur í samfull 9 ár til 13. februar 1997, tá fyrsta fólk varð grivið í hendan partin av kirkjugarðinum. Sum nevnt í fyrra partinum, var grundin helst, at hin parturin av kirkjugarðinum var ikki hóskandi fullur fyrr enn tá.

Tá nú hetta hevði ligið so leingi, so mátti nakað av umvæling og ábótum gerast, áðrenn hesin parturin nú kundi takast í brúk. Í 1995 verður málið tikið upp.

Málið um umvæling av nýggja kirkjugarðinum er fyrstu ferð fyri á bygdaráðsfundi 7. september 1995. Møtt vóru Marianna Simonsen fm., Marius Joensen, inni í Húsi, Marius Joensen, á Ryggi, Jóannes Klein, Sigrun Nattestad og Paula Nattestad. Samtykt varð at bjóða arbeiðið við nýggja kirkjugarðinum út við lýsing í kunngerðatalvuni. Upplýsast skal, at teir, sum søkja, kunnu venda sær til bygdarðsskrivstovuna fyri fáa nærri frágreiðing um, hvat arbeiðið umfatar.

Á fundi 7. desember 1995 er málið aftur fyri. Evnini tosað varð um vóru: Hvussu skal garðurin gerast? Hvussu nógv skal gerast? Nær skal arbeiðið bjóðast út? Hvør skal hava eftirlitið? Samtykt varð, eftir tilmæli frá fíggjarnevndini, at garðurin verður gjørdur eftir fyriliggjandi ætlan: Miðað verður ímóti at gera ovaru síðu fyrst sambært tekning. Arbeiðið skal bjóðast út fyrst í 1996.

Á fundi 20. mars 1996 eru trý tilboð uppá arbeiði innkomin og verða viðgjørd. Tey eru frá: Brynjálvi Nattestad 98.250 kr., Albin Thomassen, 69.625 kr., og Jan á Høgabóli, 59.500 kr.

Fíggjarnevndin mælti til at taka av lægsta tilboðnum, og at Johannes Klein og Marius í Húsi hava eftirlitið. Hetta varð samtykt.

Ger av garði á eystaru síðu

Á fundi 14. mai 1997 varð ger av garði á eystaru síðu á nýggja kirkjugarðinum til viðgerðar. Heri Samuelsen hevði gjørt uppskot um, hvussu garðurin skuldi gerast við viðmæli frá Føroya Kirkjustjórn. Samtykt varð, at bjóða arbeiðið út at stoypa garð, gera portur og hegna eystursíðina sum skjótast.

Á eyka bygdaráðsfundi 10. juni 1997 er kirkjugarðurin aftur til viðgerðar. Eitt tilboð var innkomið uppá arbeiði í kirkjugarðinum, sum er útboðið. Tilboðið er frá p/f á Høgabóli og er uppá 71.000 kr. pluss portur, hegn, pelar og mvg. Samtykt ikki at taka av tilboðnum. Samtykt varð heldur at tosa við Jan á Høgabóli um at gera arbeiðið bíligari, og varð tað gjørt.

Í kunningarskrivinum frá kommununi við endan av árinum 1997 stendur: "Nýggi kirkjugarðurin er um at vera liðugur. Nú mangla vit bert at mála garðin, so skuldi verið komið á mál." Í sama skrivi fyri 1998 verður sagt: "Nýggi kirkjugarðurin er hampaður og liðugt málaður."

Sum longu nevnt, varð hesin parturin av kirkjugarðinum tikin í brúk 13. februar 1997.

Hermannakirkjugarðurin

Bretski hermannakirkjugarðurin í Miðvági varð bygdur beint vestanfyri kirkjugarðin í Miðvági. Hann er frá 1942. Bretska hermegin tók í fyrsta umfari økið til kirkjugarð uttan at spyrja føroyskar myndugleikar um loyvi. Hetta varð vanligt undir krígnum, og landsmyndugleikarnir høvdu heitt á kommunurnar um ikki at blanda seg uppí hvat hermegin gjørdi. Hetta vegna at landið var í roynd og veru hertikið og var sostatt undantaksstøða í landinum, og valdið hjá donsku og føroysku myndugleikunum avmarkað. Bretar hava tó valt at leggja kirjugarðin beint við síðuna av verandi kirkjugarði í Miðvági. Um hetta, hóast alt, er gjørt eftir óformelt tos við bygdaráðsformannin og prest er einki prógv um, men hugsandi. Herovastin í Vágum, Adamson oberstur, búði hjá presti í prestagarðinum í Miðvági.

Tann fyrsti, sum er grivin í hermannakirkjugarðinum er deyður 25. juli 1942 og tann seinasti, sum er grivin í kirkjugarðinum, er deyður knapt eitt ár áftaná, hin 14. juni 1943. Tað er tó ikki fyrr enn knappar tríggjar og ein hálvan mánað eftir hetta, 27. september 1943, at hermegin á fyrsta sinni skrivar til Miðvágs kommunu og biður um økið til kirkjugarðin. Hetta koma vit aftur til.

Eftir frágreiðing frá gomlum miðvingi, so var eingin garður ella stik um økið, tá teir fyrstu vórðu grivnir. Tað kom ikki fyrr enn seinni. Hann minnist, at hermannaprestur og nógvir hermenn vóru tilstaðar, tá jarðarferð var. Og at hermenn skutu heiðursskot upp í luftina.

Í brævi sum fyrrverandi bretskur hermaður í Vágum, C. Cook, sendi til Føroya nógv ár eftir kríggið, nevnir hann m.a., at ein úr teirra Pioneer kompaníi doyði í eini vanlukku, tá teir bygdu flogvøllin, og varð grivin í oynni.

Til jarðarferðina fekk hann til uppgávu at heiðra tann deyða við at spæla á horn við grøvina.

Í hermannakirkjugarðinum í Miðvági standa 14 gravsteinar yvir 14 gravir. Teir eru flest allir deyðir av vanlukku av ymsum slag.

Fimm av teimum, sum liggja grivnir í hermannakjugarðinum í Miðvági, doyðu hin 9. november 1942, tá eitt Whitley flogfar datt niður á Nakkinum í Suðuroy. Niels Juel Arge skrivar í Stríðsárini 4, at líkini vórðu førd til Miðvágs við vápnaða trolaranum "Bressay". Har tey vórðu grivin í bretska hermannakirkjugarðinum við stórari luttøku av bæði vágafólki og bretskum herdeildum.

Richard Howells, bilførari, 24 ár, doyði úti við Grótholið í Sørvági. Hann skuldi vippa mold omanav, men bakkaði útav vegnum og endaði niðri í fjøruni.

Við allar gravsteinarnar, sum eru úr serligum slagi av marmor, eru plantaðir rósurunnar við enskum rósum. Group Captain Steve J. Lloyd, RAF, varaleiðari í søgudeildini hjá RAF, Bretlandi, sum vitjaði Krígssavnið í 2014, greiddi frá, at hetta var ikki bara tilvild. Her liggur ein vøkur hugsan aftanfyri, og tað er vanligt allastaðni í bretskum hermannakirkjugørðum at hava tað soleiðis, ikki minst teimum, sum ikki eru á bretskari jørð. Hugsanin er, at sum sólin gongur yvir himinin gjøgnum dagin, so skal skuggin av einari enskari rósu í onkrum tíðarbili hvønn dag fella á gravsteinin hjá tí falna.

Í Føroyum eru 3 kirkjugarðar við falnum bretskum hermonnum. Teir eru í Miðvági har 14 eru grivnir, í Tórshavn eru 37 grivnir, í Klaksvík eru 5 grivnir og í Vági er 1 grivin. Gravirnar verða vitjaðar av umboðum frá Commenwealth War Graves Commission (CWBC) umleið triðja hvørt ár.

Tað eru 23.000 bretskir herkirkjugarðar við falnum hermonnum gjøgnum tíðirnar, og eru tað meira enn 1.700.000 gravir kring allan knøttin, sum CWBC hevur ábyrgdina av.

Teir, sum eru grivnir í hermannakirkjugarðinum í Miðvági, eru:

01. George Patrick King, sappørur*, Royal Engineers, d. 25.7.1942, 34 ár.
02. Colin Hinchliffe, meinigur, Royal Army Ordonance Corps, d. 9.9. 1942, 40 ár.
03. Albert Edward Russel, sappørur, Royal Egnineers, d. 20.9.1942, 23 ár.
04. Harry Bell, korporalur, Royal Engineers, d. 25.9.1942, 27 ár.
05. Albert Henry Jenkinson, sersjantur, Pioner Corps, d. 27.10.1942, 39 ár.
06. Richard Howells**, bilførari, Royal Engineers, 28.10.1942, 24 ár.
07. Alfred Gibson, kanónskjútti, Royal Artillery, d. 24.11.1942, 27 ár.
08. Fredrick George Midgley, meinigur, Pioneer Corps, d. 30.3.1943, 36 ár.
09. James McLernan, meinigur, Pioneer Corps, d. 14.6.1943, 32 ár.

*Sappørur er serkønur arbeiðsmaður (handverkari) í byggihermegini.

** Bakkaði útav vegnum niðanfyri grótholið í Sørvági, lastbilurin endaði niðri í fjøruni og maðurin doyði [frásøgn Jóhan á Ørg eldri].

Teir, sum fórust á Nakkinum í Suðuroy 9.11.1942.

10. H.J.G. Haeusler, flogyvirmaður, flogskipari, Royal New Zealand Air Force, 24 ár.
11. R.R. Best, sersjantur, flogstýrimaður, R.A.F., 22 ár.
12. O.G. Davies, flogsersjantur, telegrafistur, skjútti, R.A.F., 22 ár.
13. R. Williamson, sersjantur, telegrafistur, skjútti, R.A.F. (Aldur ókendur).
14. G.P. Turner, sersjantur, Royal Australian Air Force. 33 ár.

Kommunan letur økið sum gávu

Hin 27. september 1943, knappar tríggjar og ein hálvan mánað eftir, at seinasti hermaðurin varð jarðaður í hermannakirkjugarðinum, skrivar Hirings & Claims Office, Sørvági, kaptain Millen, um kirkjugarðin í Miðvági og sigur, at teir fegnir vilja gera kunnugt, at økið, ið tørvast til kirkjugarðin, er um 1581 m^2. Eitt øki meir uppá um 418 m^2 verður neyðugt fyri at gera ein koyriveg til kirkjugarðin. – Sum kuriosum kann nevnast, at skrivstovan hjá Hirings & Claims í Vágum, var á núv. adressu, Kirkjuvegur 6, í Sørvági.

Málið er fyri á fundi í forstandarskapinum 29. september 1943. Samtykt varð at svara, at kommunan vildi geva øki til kirkjugarðin ókeypis til hervaldið og skal taka sær av prísinum við eigararnar. Samtykt varð at bjóða eigarunum, at teir skulu fáa sama gjald, sum hervaldið rindar fyri jørð av sama slag. Tað skuldi undir ongum umstøðum verða minni. Samtykt varð eisini at venda sær til lofverjuleiðaran Laursen, um at skriva eitt bræv fyri kommununa á góðum enskum, sum skal gevast hervaldinum. Har skuldi standa, at gávan var ein viðurkenning fyri tað hervaldið hevur gjørt í kommununi.

Skrivað verður til lofverjuleiðaran Poul Laursen, Tórshavn 30. september 1943, har ynski hjá forstandarskapinum verður fört fram og sagt, at forstandarskapið hevur samtykt at góðkenna uppskot hansara, um at geva hermegini grundøki til kirkjugarðin ókeypis.

30. september1943 verður skrivað til Hirings & Claims Office, Sørvági, kaptain Millen, og sagt frá samtyktini at geva hermegini økið til kirkjugarðin ókeypis. Hetta sum eina viðurkenning av tí hermegin hevur gjørt til gagns fyri bygdina Miðvág síðan hertøkuna. Svar kemur aftur 3. oktober 1943 frá Hirings & Claims Office, House no 75 Sørvági, kaptain Millen. Eg takki fyri móttøkuna av brævi tygara 30. september 1943, har tygum stórtiknir bjóða at geva hermegini hjá hansara hátign tann hernaðarliga kirkjugarðin og vegin til henda. Meðan eg bíði eftir boðum frá hægri stað, vil eg vegna hermegina hjá hansara hátign, siga, at vit seta prís uppá tygara vinarliga tilboð og tankan, sum liggur aftanfyri. Ein frágreiðing um hetta mál er send til hægri myndugleikar, haðani tygum uttan iva koma at hoyra frá í nærmastu framtíð.

Hetta hendi so longu 8. oktober 1943, tá W.L. Vale, oberstur og ovasti fyri hermegina í Føroyum, skrivar bræv til Miðvágs kommunu. Vísandi til bræv tygara dagfest 30. september 1943, adreserað til Hirings & Clims skrivstovuna, Sørvági, ynski eg at bera fram mítt takksemi fyri tygara stórbara tilboð at geva bretsku styrkjunum tann hernaðarliga kirkjugarðin nær Miðvági, sum eg við gleði taki ímóti vegna "The Secretary of State for Wars". Virðingarmest, W.L. Vale.

24. november 1943 verður skrivað til Landsnevnd Føroya Løgtings og biðið um loyvi at geva hermegini økið til kirkjugarð, har eisini verður greitt nærri frá málinum. Nevnt verður m.a. eisini, at støddin á økinum er 58 x 29 metur, og kemur keypspeningurn neyvan at vera omanfyri 1.000 kr. Økið er bert partvís dyrkað.

Men helst heldur bretska hermegin, at tað gongur ov seint. Tí 23. desember 1943 skrivar Civilbeskyttelseskontoret, Tórshavn, Poul Laursen, til Søren Danielsen, formann í forstandarskapinum, og spyr, um einki nýtt er um gávubrævið til hernaðarliga kirkjugarðin í Miðvági? Hermegin hevur spurt, hvussu málið stendur, og vil hann fegin fáa hetta avgreitt skjótast møguligt, og minnir á skriv, hann sendi um hetta 13. november.

Málið er fyri í forstandarskapinum 12. februar 1944. Tingast varð um keyp og skeyti til Heina Heinesen og Sørin Danielsen til brúk fyri tann hernaðarliga kirkjugarðin. Gerast skal skeyti, har tað skal gjaldast Heina Heinesen 75 oyru pr. m^2 og Sørin Danielsen 50 oyru m^2. Tó soleiðis, at gjørdur verður ein keypssáttmáli, hvar eftir tað skal fremjast eitt eftirgjald útyvir skeytið, áljóðandi tí hermegin betalir meira fyri jørð av somu góðsku til onnur.

Nevndi sáttmáli er undirskrivaður sama dag 12.2.1944, har tað m.a. stendur:

"Undertegnede Midvaag Sogns Kommune tilstaar og vitterligjør herved at have købt fra Heine Heinesen Midvaag et Jordstykke "nirri á Tjórn" i Midvaag, som vil være at benytte til Kirkegaard for de britiske militere myndigheder. Arialets Størrelse udgør 1053,94 m^2 og er der samtidig hermed oprettet et Skøde, hvorefter Kommunen køber Arealet for 75 Øre pr. meter2, dog saaledes at saafremt militeret betaler mere for Jord af samme Kvalitet til andet Brug, forpligter Kommunen sig herved til, ved en Efterbetaling at betale Selgeren Heine Heinesen det overskydende Beløb, saaledes at han skal erholde som Betaling, ihvertfald samme Pris, som af Militeret betales til andre for Jord af samme Kvalitet."

Eitt annað varð eisini skrivað til Sørin Danielsen fyri tað øki kommunan keypti frá honum.

Fyri fund 6. juni 1944 í forstandarskapinum stendur, at gávubrævið til teir brestsku myndugleikarnar varð lagt fram og undirskrivað av øllum limunum.

Við hesum varð økið til hernaðarkirkjugarðin handað bretsku hermegini.

Sambært roknskapunum hjá Miðvágs kommunu varð lendið til hermannakirkjugarðin goldið yvir árini 1944-1947 á henda hátt:
- Í 1944: C.B. Kontoret, 62 kr. fyri útreiðslur. Færøernes Retskreds, 21 kr. fyri tinglesing.
- Heini Heinsen, 1944, 160 kr., 1945, 75 kr., 1946, 873 kr. og 1947, 500 kr. Tils. 1.608 kr.
- Sørin Danielsen, 1947, 613 kr.
- Fyri lendið til hermannakirkjugarðin í Miðvági í alt og við øllum: 2.304 kr. Málið endað.

Kirkjugarðurin endar aftur hjá Miðvágs kommunu

Innangarðsútskiftingin í Miðvági var liðug í 1965. Í mai 1966 kemur bygdaráðið í Miðvági eftir, at Matrikulstovan undir útskiftingini hevur kludrað í málinum við hermannakirkjugarðinum, sum Miðvágs kommuna hevði givið bretsku hermegini. Tí nú er hermannakirkjugarðurin, uttan at kommunan hevur vitað av ella er eftirspurd, lagdur saman við kirkjugarðinum hjá Miðvágs kommunu. Tessvegna stendur kommunan uttan at vilja tað, nú sum eigari av hermannakirkjugarðinum.

28. mai 1966 verður skrivað til Matrikulstovuna, Tórshavn, og sagt frá hesum, og at kirkjugarðurin var givin sum bretskur hermannakirkjugarður til bretsku hermegina við gávubrævi dagfest 6. juni 1944, og at hann verður framvegis røktur av bretum.

2. mai 1966 skrivar Matrikulstovan, O. Danielsen og sigur, at freistin fyri at fáa hetta broytt í sambandi við eigindómsdómin er úti, og vil hann mæla kommununi til at søkja um at fáa tann bretska kirkjugarðin frábýttan, og tá hetta er gjørt, lata nevnda gávubræv tinglýsa av nýggjum, so at rætti eigarin kemur í tingbókina.

4. juni 1966 skrivar kommunan til Bretska konsulátið, Bryggjan, Tórshavn, har greitt verður frá málinum, og at eftir at útskiftingin av Miðvágs bygd er lokin, er Miðvágs kommuna komin at standa sum eigari av tí bretska hermannakirkjugarðinum. Hvussu hetta er komið fyri undir útskiftingini duga teir ikki at siga, men sóknarstýrið hevur gjørt útskiftingarnevndina kunnuga við hetta í góðari tíð. 17. september 1966 verður aftur skrivað til bretska konsulátið og víst til telefonsamtalu, har konsulátið sleppur at læna upprunaliga gávubrævið.

7. desember 1966 skrivar Matrikulstovan, Ó. Clementsen, og vísir til brævaskiftið millum kommununa og stovnin og heitir á kommununa um at senda umsókn um sundurbýti av ognini, matr.nr. 213, sum eru kirkjugarðarnir Niðri á Tjørn, til matrikulstovuna.

23. desember 1966 skrivar Matrikulstovan aftur og minnir á málið, tí at bretska konsulatið aftur hevur spurt seg fyri um kirkjugarðin í Miðvági. Og teir leggja við, at tað er Miðvágs kommuna sjálv, ið reist hevur málið í skrivi til Matrikulstovuna dagfest 28. mai 1966.

16. februar 1967 skrivar Matrikulstovan, O. Danielsen, aftur og rykkir kommununa eftir svari, og sigur, at bretska konsulatið ótolnast eftir at fáa málið avgreitt, men at matrikulstovan ongar broytingar kann gera viðvíkjandi ognarviðurskiftunum, uttan so at kommunan, ið nú er eigari, ynskir hetta framt ella verður dømd til at góðtaka broytingina.

Tá øll hesi skriv einki hjálpa hevur bretska konsulátið vent sær til Føroya Landsstýri, sum hin 10. juli 1967 skrivar til kommununa og biður teir senda umsókn til matrikulstovuna um at fáa bretska hermannakirkjugarðin býttan frá matr. nr. 213.

Hetta synist at hjálpa eitt sindur, tí nú verður málið viðgjørt í bygdaráðnum. Málið er fyri á fundi 17. juli 1967 har bygdaráðið samtykkir at svara, at sóknarstýrið einki hevur ímóti frábýti, men at kommunan ikki vil bera nakran kostnað av frábýtinum, tá sóknarstýrið heldur seg einki hava at gera við hetta mál. 21. juli 1967 verður skrivað til Føroya Landsstýri og

greitt frá gongdini í málinum og til grundina fyri støðutakanina hjá bygdaráðnum, sum tikin varð á fundinum 17. juli sama ár.

Føroya Landsstýri svarar hin 4. august 1967 og sigur, at kommunan ikki fær útreiðslur av nevndu umsókn um frábýti av hermannakirkjugarðinum, tá landskassin vil bera útreiðslurnar.

Málið endar so við, at skrivað verður til Matrikulstovuna hin 22. august 1967 og send inn umsókn um frábýti av hermannakirkjugarðinum at verða frábýttur kirkjugarðinum í Miðvági, matr. nr. 213 og fáa egið matrikulnummar, har The Commenwelt War Grave Commission kemur at standa sum eigari av hermannakirkjugarðinum.

12. november 1968 varð hermannakirkjugarðurin í Miðvági aftur tinglýstur sum ogn hjá Commenwealth War Graves Commission og fekk matrikulnummarið 213b, víddin er 295 m^2. Hetta er nógvar ferðir minni enn tað hermegin upprunaliga bað um at fáa til kirkjugarð undir krígnum, men tað komu tíbetur ikki at liggja so nógvir hermenn grivnir har, sum teir kanska hava fryktað tá.

Bretskar vitjanir

Umboð fyri Commenwealth War Graves Commission vitja vanliga einaferð um árið allar hermannakirjugarðar við bretskum hermonnum kring allan heimin. Og teir eru nógvir, so tað eru helst fleiri, sum røkja ta uppgávuna. Tó hin 4. januar 1995 skrivaði bretska konsulatið í Tórshavn og segði frá serligari vitjan. Í døgunum frá 9. til 11. august skuldi David Kennedy ovastin fyri bretsku hernaðargravstøðini kring heimin vitja Føroyar, og saman við honum J. Jones, sum hevði verið her áður. Sagt varð, at hetta var týdningarmikil vitjan og varð hetta fyrstu ferð, at ovasti stjórin kom at vitja. Hjáløgd var skrá fyri ferðina.

Smb. viðløgdu skránni høvdu teir frammanundan vitjað í Íslandi. Í Føroyum skuldu teir vitja hernaðargravir í Tórshavn hin 9. august, 10. august hernaðargravir í Klaksvík og 11. august tíðliga um morgunin hernaðarkirkjugarðin í Miðvági. Og fóru teir so úr Føroyum við flogfari kl. 11.25 til Onglands via Keypmannahavn.

Keldur til partin um kirkjugarðar v.m.

Gerðabøkur, roknskaparbøkur, kopibøkur og skjøl hjá Vága prestagjald kommunu.
Gerðabøkur, roknskaparbøkur, kopibøkur og skjøl hjá Miðvágs kommunu.
Gerðabók og skjøl hjá nevndini fyri Minnisvarða yvir sjólátnar í Miðvági.
Kirkjubøkur, Vága prestagjald.
Løgtingstíðindi, ymsir árgangir.
Stríðsárini 4, Niels Juel Arge.
Føroya Siglingarsøga VI, Páll J. Nolsøe
Steve J. Lloyd, Group Captain, søgudeildin R.A.F.
Johannes Dam Hansen
Hanna Hansen
Mikkjal Davidsen
Jan á Høgabóli
Dagbjørn Hansen
Jóhan M.T. á Ørg

KELDUR

Umframt tað, sum er tilskilað aftanfyri á summum av pørtunum, so eru føstu keldurnar til allar partarnar í hesi bók fylgjandi:

Gerðabøkur, roknskaparbøkur og skjøl hjá Vága prestagjalds kommunu.
Gerðabøkur, roknskaparbøkur og skjøl hjá Miðvágs kommunu.
Løgtingstíðindi, ymsir árgangir.
Miðvingasøga, Mikkjal á Ryggi.
Staðarnøvn í Miðvági, Mikkjal á Ryggi.
Sær er siður á landi, Rasmuss Rasmussen.
Hugrák, Heini Haraldsen.
Loftmyndir: Kortal.fo
Føroysk bløð: Dimmalætting, Sosialurin, Dagblaðið, 14. September, Tingakrossur og Oyggjatíðindi, har tilvísing er í tekstinum.

Sjá eisini serstakar kelduupplýsingar á bls.: 29, 144, 308, 330 og 382.

Navnalisti

Viðvíkjandi navnalistanum skal verða gjørt vart við, at tað snýr seg um nøvn yvir langa tíð, frá 1873 og til 2008, so tað kemur meira enn so fyri, at sama navn, kann umfata meira enn ein persón við sama navni gjøgnum tíðina. Er tað nakað umráðandi, ein vil brúka navnið til, er tí vert at kanna hvørt navnið sær, um tað er sami persónur og somu tíð, ein hugsar um.

Tað kemur eisini meira enn so fyri, at sama navn kann koma fyri meira enn einaferð á somu blaðsíðu. So har kann vera ráðiligt at skimma síðuna ígjøgnum, um navnið er nevnt meira enn einaferð, um tað er okkurt serstakt, ein vil vita um persón ella hending.

A. Jørgensen 198
A.C. Evensen 30
A.P. Bentsen 146
A.W. Skibsted 12
Absalon Djurhuus 79
Absalon Jacobsen 104, 194, 233, 337, 338, 339
Agatha Geil 194
Aibritt á Plógv 121, 122
Aksal Rasmussen 327
Albert Edward Russel 379
Albert Ellefsen 216
Albert Hansen 31, 32, 90, 93, 101, 102, 146, 148, 183, 190, 335, 361
Albert Henry Jenkinson 379
Albert Joensen, 60, 116, 145, 160, 161, 162, 163, 194, 227, 228, 229, 230, 232
Albert Poulsen 24, 49
Albert Thomasen 210
Albert Wang 36
Alberta Jacobsen 68, 190
Albin Jacobsen 81, 82, 84, 87, 327
Albin Thomassen 378
Albin Wang 55, 109, 118, 148, 150, 198, 199, 243, 324, 325, 327, 339, 361, 362, 372, 375, 377, 285
Alen Viderø 190
Alfred Gibson 379
Alfred Gullfoss 341
Alfred Jørgensen 91
Alfred Poulsen 351, 352
Alith Poulsen 74
Allan Heini Gásdal 116, 122
Alma Frederiksen 193, 198, 364, 367, 368, 370
Alma Jacobsen 62, 81
Alvilda Hansen 359
Amalia Wang 77, 190
Amanda Jacobsen 81
Amanda Poulsen 81
Anders H. Jensen 122
Anders Vedelsbøl 305, 306, 307
Andor Ellefsen 288
Andras Johannesen 194
Andrass Heriksen 117
André Niclasen 79
Andrias Joensen 32, 43, 53, 88, 146, 160, 171, 185, 188, 198, 199, 219
Andrias Johansen 93, 327
Andrias Jørgensen 129, 130, 133, 294, 296, 298, 299, 300
Andrias Olsen 184, 327, 335, 360
Andrias S. Johansen 93, 359
Andrias Svabo, 62, 324
Andru Simonsen 285
Ann Mari Falkvard 284
Ann Mouritsen 124
Ann Nielsen 80
Anna Dalsgaard Petersen 39, 83, 114
Anna Danielsen 68
Anna Dionesdattar 332, 333
Anna E. Joensen 359
Anna Elisa Jacobsen 284
Anna Elisa Rasmussen 59
Anna Elisabeth Jacobsdatter 347
Anna Elisabeth Joensen 64, 284
Anna Elisabeth Wang f. Olsen 36
Anna H. Poulsen 67
Anna Hansen 29, 57, 59, 73, 206, 252, 260
Anna Jakobsen f. Kjælnæs 14
Anna Johannesen 333
Anna Johansen 191, 338
Anna Jørgensen 59
Anna K. Hansen 67, 194
Anna Katrina Niclasdatter 332
Anna L. Poulsen 67, 68
Anna Lena Waag f. Joensen 78
Anna M. Nattestad 359
Anna Margreta Samuelsedatter 331
Anna Maria Svabo Jørgensen 306
Anna Nattestad 89
Anna Rasmussen 284
Anna Sofía Nordendal 124
Annelisa Poulsen 63
Annfinn Bláhamar 363
Annfríð Thomassen 59
Annika Niclasen 63

Annika Olsen 213, 214, 216
Annika Thomassen 259, 263, 282, 284
Ansy Fríðgerð Nattestad 64
Anton Haraldsen 92
Anton Olsen 294
Anton Vinge 196
Apsalon Jacobsen 327
Arna á Ryggi 94, 359
Arnbjørn Mortensen 294
Arndis Svabo 59, 62
Arnfinn Joensen 59
Arnhold Jacobsen 190, 238, 285, 286
Árni Dahl 28, 29
Árni Frederiksen, 59, 117, 127
Árni Jacobsen 81, 116, 122, 129, 130, 133
Árni Joensen 143
Árni Samuelsen 146, 148
Arnor Nielsen 148
Ása Heinesen 59, 73
Ása Petersen 113
Asbjørg Weihe 199
Asbjørn Poulsen, 59
Asbjørn Niclasen 59
Asla Andreassen 74
Ásmund Joensen 121, 122
Astrid Lauritsen 253
Atli Petersen 124

Bang 196
Bárur Sandberg Joensen 254, 255
Becher 354, 355
Benedika prinsessa 197
Benthe Christine Pedersdatter Broberg 331
Bergdís Skaalum 166
Berghild Johannesen 59, 254, 259, 260, 263, 284
Bergmann Finnsson 330
Bergur Jørgensen 104
Bergur Jørgensen 129
Berint Vang 359
Berit Nielsen 87
Bernhard 91
Bernhard Johannesen 29
Bertina Poulsen 190
Betrea Jacobsen 303
Betsy Hansen 194
Birgit Nattestad 284
Birita Gunnarsdóttir Kruse 117, 122
Bjarni Árnason Joensen 255
Bjarni Joensen 254
Bjarni Olsen 62
Bjarni Prior 96
Bjørg av Kák Olsen 259, 284
Bodil Ellefsen 190, 365, 368
Borghild Kristina Fagraberg 63
Brian Antoniesen 284
Brynhild Joensen 62, 303
Brynhild Ludvig 114
Brynhild Thomassen 259, 263, 284
Brynjálvur Nattestad 339, 378
Búgvi Heðinson Johannesen 271
Bærent Wang 310
C. Cook 378
C.A. Hillbert 189
C.L. von Tillisch 10
Carl Johansen 333, 343, 345
Carl Mortensen 309
Carl Petersen 287
Carla Joensen 63
Cathrina Rasmussen 370
Chr. E. Lamhauge 107
Chr. Thygesen 177
Christian Andreasen 209
Christian Johannesen 198
Christian Larsen 70, 97, 190, 191, 219, 224, 230, 237
Christian Olsen 238
Christoffur Hansen 89
Colin Hinchliffe 379
Conny Christiansen 284
Conny Davidsen 284
Cook 191
Cornelia Niclasen 359, 363, 365, 367, 370

D. Danielsen 86, 197
D.J. Niclasen 198, 294
D.P. Danielsen 201
D.P. Niclasen 92, 188, 193, 198, 199, 359, 366
Dagbjørn Hansen 382
Dagfinn Petersen 271, 324
Dagmar Andrea Svabo 63, 73
Dagmar Joensen Næs 34, 36, 45, 89, 102, 104, 119, 198, 234, 287, 359, 364, 365, 367, 368
Dagmar Svabo 59
Dan Pauli Niclasen 62
Dania Jastrid Joensen 63
Dánial A. Hansen 94, 166, 212, 216, 277
Dánial Jákup Jørgensen 59
Danial Joensen 63
Dánial Jóhan Niclasen 141
Dánial Nielsen 87, 327
Dánial Pauli Niclasen 222, 228, 327
Daniel P. Niclasen 171, 310
Dánjal Jákup Jørgensen 62
Dánjal Joensen 359
Dánjal Jóhan Niclasen 137
Dánjal Niclasen, Sørvági 190
Dánjal Nielsen 81, 85, 86, 87, 199
Dánjal Pauli Michelsen 25, 27, 34, 334
Dánjal Pauli Niclasen 220
Dánjal Poulsen 81, 87, 88, 114, 205
Dánjal Tavsen 151, 246, 247, 249, 258, 288, 289
David Hansen 90, 327, 360, 356, 358
David Johannesen 59, 80
David Kennedy 382
Dávur Joensen 285
Dina Lauritsen 284

Dinna Selfoss 144
Djóni Hans-Petersen 332
Djóni Johannesen 333, 334, 338
Dora Nielsen 85, 86
Durita Jacobsen 207
Durita Rasmussen 63

E. Mathiassen 91
E. Poulsen 91
E. Rubek Nielsen 193
E.A. Bjørk 330
Eddie Lauritsen 249
Edith á Løgmansbø 259
Edmund Haraldsen 103, 327
Edmund Poulsen 240
Edvard Jacobsen 225, 237, 285
Edvard Johansen 327
Edvard Frederiksen 184, 236, 327
Edward Mitens 184, 230, 330, 336, 337
Eigil Fagraberg 59
Eigil Magnusen 129
Eigil Rasmussen 325
Eiler Haraldsen 254
Eiler Haraldsen 255
Eilif Samuelsen 130, 254, 255, 306
Eilif Weihe 200
Einar Kongsbak 327
Einar Petersen 86, 144
Einar Waag 77
Eirikur Joensen 59
Eivind Mouritsen 103
Eivind Ole Jacobsen 296
Eivind Rasmussen 92
Eivind Wilhelm 142
Ejdesgaard 28
Eli Frederiksen 38
Eli Joensen 149
Elias Ellefsen 43, 49, 58, 91, 148, 149, 150, 171, 172, 192, 198, 238, 239, 327, 330, 335, 358, 359
Elias Haraldsen 184
Elias Joensen 22, 26, 27, 28, 29, 30, 31, 33, 40, 41, 66, 77
Elias Karl Petersen 39
Elias Næs 209, 212, 216, 275
Elias Petersen 249
Elias Poulsen 91, 198, 360
Elias Rasmusen 49
Elias Simonsen 190
Elida Niclasen 125, 129, 130
Eliesar Ellefsen 359
Elin Davidsen 73
Elin Ellefsen 89
Elin Maria Jørgensen 73, 125
Elisabeh Joensen 368
Elisabet Olsen 56
Elisabeth Hansen 67
Elisabeth Joensen 364, 370
Elisabeth Johannesen 194, 282
Elisabeth Johansen 67
Elisabeth Olsen 71, 77, 78
Elisabeth Simonsen 122
Elisabeth Thorsteinsson 285, 286, 305, 306
Elkjær Hansen 196
Elly á Løgmansbø 169
Elsa Margit Davidsen 268, 269, 270
Elsa Maria ‘Essemi’ Fagraberg125
Elsa Maria Rasmussen 59
Else Bloch Heinesen 253
Else Marie Johansen 68
Else Marie Lund 114
Elsebeth ‘Ebba’ Jacobsen 74, 75, 78, 79
Elsebeth Hansa Hansen 63
Elsebeth Johannesen 263, 284
Elsebeth Marie Hansen 190
Emil Johansen 101, 190
Emil Olsen 91, 193, 236, 289, 290, 291
Emil Olsen 327
Emma Dagmar Sandberg Joensen 64
Emma Poulsen 81
Emmy Joensen 122
Engelbrech Poulsen 103, 154, 155, 339
Engelsted 343
Erik Bonnevie 330
Erik Friis 38
Erik Jørgensen 151
Erik Lyhne Smith Jørgensen 149
Erla Jacobsen 248
Erla Thomsen 74
Erling Jacobsen 63
Erling Simonsen 230, 252, 260
Eskild Viderø 190
Esmar Ferdinand Johansen 184
Esmar Johansen 148
Essemi Fagraberg 169
Esther Niclasen 125
Esther Poulsen 81
Eva Klein 275, 276
Everett 191
Evi Danielsen 271
Eyð Eirikstein 59
Eyð Nattestad 64
Eyð Niclasen 122
Eyðbjørn Larsen 210
Eyðdis Harmann Niclasen 303
Eyðfinn Christiansen 352
Eyðfinn Rólant Johannesen 63
Eyðfrí Olesen144, 284
Eyðin Thomassen 278, 376
Eyðna Højgaard Ellefsen 79
Eyðrun Jørgensen 122, 123
Eyðun Ellingsgaard Jacobsen 63
Eyðun Samuelsen 34, 37, 38, 46, 127, 129, 130, 133, 140

F.C. Mason 189
Fía Khaliqhey 122

Finn Landau 196
Finnbogi Niclasen 249
Finnleif Frederiksen 59
Frater Jens 343
Frederik Poulsen 10, 11, 12
Fredrick George Midgley 379
Fredrikka Biskupstød 345
Frida Jørgensen 69, 75, 76
Frida Nielsen 81
Fríða Patursson 260
Frida Poulsen 67
Frida Sørensen 338
Fríðbjørg Jacobsen 258
Fríðbjørg Niclasen 59
Fríðbjørg Winther Hentze 59
Fríðrikkur kongur 197
Frits Witt 130, 136, 295

G.P. Turner 379
Georg Egholm 285, 286, 288, 289, 290, 292, 305
Georg Engelsted 15, 16
Georg F. Hansen 63, 170, 208, 209, 212, 216, 277
Georg H. Hansen 164, 165, 166, 212, 216, 262, 278, 303, 308
Georg Hansen 32, 49, 91, 330
Georg Magnussen 63, 143
George Patrick King 379
Gerhard Hølck Hansen 324
Gert Joensen 199
Godtfred Heinesen 14, 16, 19, 20, 24, 199
Gotfred Joensen 43, 92, 146, 148, 197, 198, 199, 228, 246
Gregorius Poulsen 93
Greta Joensdatter 333
Grøn 82
Gudmund Brun 77
Gudmund Heinesen 91, 325, 327, 375
Gudmund Niclasen 127, 128, 172, 173, 288, 325
Guðrið á Lofti 122, 123, 124
Guðrið Johannesen 80
Guðrun Joensen 284
Gunna Marita Bergitta Johannesen 63
Gunnar Dahl Olsen 219
Gunnar K. Nattestad 205
Gunnar Poulsen 236
Gunnar R. Nattestad 324
Gunnhild Davidsen 59
Gunnhild Vang 62
Gunnvør Hansen 73, 200
Gurli Joensen 284
Gurli Sandberg Joensen 254, 255
Gutti Petersen 114, 121, 253

H. Heinesen 29
H. Hjortdal 197
H. Rasmussen 236
H.C. Andersen 62
H.C. Hansen 196, 197
H.E. Perstein 192
H.J.G. Haeusler 379
H.M. Thomsen 192
H.N. Jacobsen 42, 43, 262
Hákun Hansen 359
Haldur Rasmussen 92
Halgerð Eirikstein 59
Halgir Winther Poulsen 143
Hallgerð Marjun Danielsen 63
Hallgerð Olsen 273, 304, 308
Hallgerð Thomina Hansen 63
Hanna Elisabeth Jacobsen 14
Hanna Gaardlykke 122
Hanna Hansen 150, 382
Hanna Joensen 62
Hanna Johansen 68, 145, 236
Hanna Jørgensen 62
Hanna M. Samuelsen 68
Hanna Maria Niclasen 303, 308
Hanna Sofía Jørgensen 64
Hanna Svabo 123
Hannvør Thomina Johansen 64
Hans a Norði 324, 325, 327
Hans A. Joensen 92
Hans Andrias Djurhuus 27, 28, 29, 30, 40
Hans Anton Jacobsen 63
Hans Arne Ellefsen 92, 133, 163, 164, 165, 173, 198
Hans Arni Nielsen 137, 296, 300
Hans Bogi Ellefsen 255
Hans C. Jensen 93
Hans Chr. Joensen 335, 341
Hans Christoffer Hansen 102, 183, 324, 353, 339
Hans Christoffur Joensen 325
Hans Daniel Joensen 327
Hans Eli Hansen 59, 62, 115
Hans Ellefsen 91, 146, 324, 325, 327, 358, 359, 371
Hans Frederik Hansen 290, 327
Hans Frimod Poulsen 153
Hans H. Hansen 358
Hans Halskov 134
Hans Hansen 49, 66, 246, 285, 324, 327
Hans í Kálvalíð Hansen 208
Hans J. Hansen 91, 126, 359
Hans Jacob Hansen 30, 31, 32, 44, 67, 88, 89, 90, 243, 285, 362, 370
Hans Jacob Joensen 62
Hans Jacob Olsen 95
Hans Jacob Poulsen 49, 68, 327, 359
Hans Jacobsen 339
Hans Jacob Poulsen 49, 88, 184
Hans Joensen, Tórsh. 42
Hans Johansen 31
Hans Jørgensen 12, 24, 30, 31, 49, 51, 92, 101, 116, 120, 123, 127, 129, 130, 132, 133, 134, 136, 137, 140, 143, 165, 183, 202, 253, 289, 290, 291, 292, 296, 297, 302, 306
Hans Kristian Hansen 146, 361
Hans Kristian Joensen 16

Hans Kristoffur Joensen 20, 21
Hans M. Hansen 91, 358
Hans M. Niclasen 129, 130, 133, 140
Hans M. Thomsen 32
Hans Magnussen 279, 281
Hans Marius Jacobsen 30
Hans Marius Næs 63
Hans Martin Niclasen 324
Hans Martin Thomasen 87, 91, 101, 118, 146, 160, 161, 162, 197, 233, 236, 237, 238, 239, 241, 243, 327, 338, 359, 361, 364, 365, 367
Hans Martin Thomasen 368
Hans Mohr Hansen 190
Hans Nielsen 81
Hans Niklái Niclasen 27, 30, 31, 32, 33, 42, 44, 70, 91, 104, 160, 181, 310
Hans O.M. Joensen 148
Hans P. Johansen 236
Hans Petur Hansen 67
Hans Petur Johannesen 91, 332, 333
Hans Poulsen 93, 324, 325
Hans Samuelsen 171, 188, 189, 192, 220, 222, 228, 327, 358
Hans V. Hansen 49, 89, 90, 93, 190, 359, 361
Hans Vilhelm Hansen 101, 184
Hansia Nattestad 259, 260, 263, 282, 284
Hansias F. Hansen 90, 91, 146, 148, 335, 339, 359, 360
Hansias F. Skarðhamar 151, 198
Hansina E. Perstein 68, 193
Hansina Hansen 59
Hansina Jóna Hansen 62
Hansina Samuelsen f. Heinesen 33
Hansine Hansen 49
Hanus Kamban 29
Harald Eirkstein 93, 94, 119, 340
Harald Elias Frimodt Joensen 62
Harald Fr. Haraldsen 31
Harald Hansen 171, 337, 338, 339
Harald Hansen 327
Harald Haraldsen 179
Harald Joensen 31, 59, 309
Harald Johansen 96
Harald Juul Hansen 183, 184
Harald M. Rasmussen Nattestad 324
Harald Marner Johansen 63
Harald Martin Nattestad 62
Harald Niclasen 103, 148, 149, 358
Harald Nicolai Niclasen 219, 220
Harald Rasmusen 52, 53, 90, 170, 171, 219, 358, 359
Harry Bell 379
Harry Ellefsen 62
Hávardur Enni 254, 255
Havgerð Niclasen 121
Havning 47
Heðin Haraldsen 59
Heðin Poulsen 205
Heðin Samuelsen 352
Heine Joensen 102
Heine Niclasen 92
Heini F. Petersen 105, 111, 114, 246, 247, 288
Heini Hansen 183
Heini Haraldsen 12, 53, 89, 219, 358, 360
Heini Heinesen 29, 59, 93, 163, 173, 380, 381
Heini Joensen 31, 52, 175, 192, 193, 327, 353
Heini Johansen 338
Heini Olsen 358
Heini Rasmusen 49, 358, 360
Helena Poulsen 92
Helga Dam 73
Helgi Hansen 246, 247
Helgi Øre 200
Henga Geil 194
Henning Ellefsen 55, 60, 102, 104, 146, 147, 148, 149, 150, 151, 327, 339
Henny Johansen 96
Henrid Napola Johansen 62
Henriette Heinesen 327
Henrik Danielsen 62
Henrik Hansen 190
Henrik Kemp 196
Henrikka Elisabeth Niclasen 78
Henrikka Fríðborg Magnussen 62
Henrikka Niclasen 32, 68, 71
Henrikke Samuelsen 359
Henrikkur prinsur 199
Henry Hansen 190
Hensar Ellingsgaard 126
Hentza Hansen 94, 148, 184
Hentze Poulsen 63
Herálvur Geyti 53
Herdis Hentze 73
Heri Jensen 287
Heri Samuelsen 324
Herleif Hansen 116, 122, 129, 130, 133, 138, 142, 373
Herluf Niclasen 327
Herluf Olsen 236
Herluf Simonsen 287
Herman K. Petersen 134, 136
Hervør Jørgensen 74
Heveran 191
Hildegarð Johansen 194
Hildibjørg Hansen 284
Hilduberg 206
Hildur Enni 255
Hildur Joensen 116, 123, 124
Hildur Ravnsfjall 101
Hilmar Poulsen 198, 324
Hilmar Thomsen 223, 224
Hjalgrím Janusarson 251
Hjalgrim Johansen 184
Hjalgrim Tormansbakka 92, 190
Hjalmar Jacobsen 43
Hjalmar Johansen 63, 200

Hjalmar Nielsen 49, 101, 225, 358
Hjørdis Svabo Samuelsen 68
Hjørleif Joensen 252, 258, 259, 260, 373, 374, 375, 376, 377
Hudson majorur 190
Hugin Skaalum 278
Hugo Poulsen 190
Hugu Fjørðoy 205
Høgni Debes Joensen 267
Høgni Poulsen 105, 126, 199, 367

Ian Joensen 324, 325
Ida Ørnow 235
Ihme Jensen 35
Inge Dorthe Larsen 122
Inger Margrethe Guld 113
Inger R. Jensen 122
Ingibjørg á Ryggi 94, 168
Ingrid drotning 61, 197
Ingrid Johannesen 59
Ingun Joensen 124
Ingvard Jacobsen 335
Inna Nattestad 130, 133, 134, 136, 138, 249, 252, 253, 254, 260, 295
Inna Svabo 132
Irdi Lið Johansen 284
Isabella Jacobsen 81
Ísak B. Jacobsen 134
Ísak Johannesen 184, 358, 359
Ísak Johansen 32, 93
Ivan Johannesen 285, 362

J. Elkjær Larsen 197
J. Follend 364, 366
J. Heini E. Joensen 371
J. Jones 382
J. Niclasen 198
J. Nielsen 190
J.C. Svabo 74
J.E. Adamson 190, 191, 368, 378
J.E. Ellefsen 32
J.E. Johannesen 31, 32
J.E. Johansen 49, 92
J.E. Thomasen 43, 90, 190
J.F. Jacobsen 20
J.F. Kjølbro 272
J.H. Jacobsen 182
J.J. Joensen 31
J.J. Simonsen 97
J.N. Niclasen 91
J.P. Joensen 100
J.P. Vang 44
Jacob Haraldsen 236
Jacob Joensen 91
Jacob Oliver G. Thomasen 310
Jacob P. Hansen 91
Jacob Pauli Nielsen 229
Jacob Sørensen 200
Jacobina Haraldsen 362
Jacobina Nielsen 205
Jacobina Petersen 259, 260, 284
Jacobina Poulsen 205
Jacobina Sigvardsen f. Petersen 37
Jákup á Stongum 157, 277, 278, 281
Jákup Birgir Mohr 251
Jákup Ellefsen 152
Jákup G. Thomasen 327
Jákup Gaardlykke 359
Jákup Haraldsen 327
Jákup í Jákupsstovu 98
Jákup Jakobsen 13, 14, 15, 16, 20, 117, 120
Jákup Jensen 20
Jákup Joensen 54, 91, 92
Jákup Jørgensen 9
Jákup K. Joensen 49, 78, 88, 90, 101, 145, 146, 148, 149, 185, 199, 205, 236, 238, 259, 261, 287, 360, 361
Jákup M. Kjeld 144
Jákup Martin Jacobsen 361
Jákup Niclasen 332
Jákup Pauli Johansen 31, 348, 349
Jákup Reinert Hansen 114
Jákup Suni Lauritsen 213
Jákup Zachariassen 14
James McLernan 379
Jan á Høgaból 352, 378, 382
Jan E. Andersen 294, 296, 300
Janni Gudmundsen 123, 124
Janus Djurhuus 28
Janus Kamban 365
Jastrid Joensen 59
Jastrid Joensen 62
Jenny Hansen 63, 200
Jenny Martha Nordendahl 36
Jenny Nielsen 81
Jens Albert Simonsen 230
Jens Egholm 293
Jens Eli Ellefsen 127, 129, 130, 133, 137, 140, 143, 200, 240
Jens Engelsted 11, 13
Jens Erik Magnussen 59, 62
Jens Erik Nielsen 285, 286
Jens Erik Rasmussen 270
Jens Gaardlykke 324
Jens í Dali 106
Jens Jakku Niclasen 56, 145, 149, 188, 189, 222, 238, 361, 365
Jens P. Johannesen 359
Jens P. Johansen 358
Jens Pauli Joensen 236
Jens Pauli Johannesen 327, 359, 360, 361
Jens Pauli Johansen 359
Jens Rasmussen 58, 150, 225, 228, 236, 327, 335
Jens Rasmussen, Sørvági 187, 188
Jens Samuelsen, 146, 148, 310, 327, 361
Jens Sigvald Johansen 21

Jens Wang 34, 36, 37, 38, 53, 72, 99, 106, 327
Jensia Johansen 236
Jesar Niclasen 332
Jesper Brandt 330
Jetta T. Anderson 284
Jim Sonny Guttesen 282
Jóan Dánjal Olsen 20
Jóan Hans Jacobsen 49, 327, 356, 357, 358
Jóan Hendrik Samuelsen 33, 34, 35, 36, 37, 41, 46, 52, 54, 58, 61, 62, 65, 71, 72, 77, 81, 82, 91, 92, 101, 104, 105, 110, 111, 113, 185, 190, 194, 236, 238, 327, 359, 364, 366
Jóan Hendrik Winther Poulsen 198
Jóan Jacob Næs 327
Jóan Jacob Thomasen 325
Jóan Jakku Olsen 194
Jóan Pauli Ellefsen 31, 33, 43, 49, 50, 171, 175, 192, 310, 348,358
Jóan Pauli Frederiksen 166, 207, 208, 209, 212, 216, 233, 268, 275, 277, 278, 279
Jóan Pauli Hansen 50
Jóan Pauli Haraldsen 91
Jóan Pauli Joensen 324
Jóan Pauli Johannesen 327
Jóan Pauli Jørgensen 49, 92, 146, 327
Jóan Pauli Næs 358
Jóan Pauli Poulsen 49, 358, 359
Jóan Pauli Thomsen 358
Jóan Petur Jacobsen 324
Jóan Petur Wang 32, 55, 78, 171, 310, 349
Jóanes Niclasen 324
Jóannes Dalsgaard 79
Jóannes Eidesgaard 261
Jóannes Hans-Petersen 332, 333, 334
Jóannes Heinesen 114
Jóannes I. Johansen 325
Jóannes Jørgensen 104
Jóannes Klein 166, 207, 209, 210, 211, 212, 213, 215, 216, 251, 264, 275, 277, 279, 377
Jóannes Nielsen 249
Jóannes Petersen 287
Jóannes Rasmusen 51, 236, 324, 325
Jóannes Stephansson 345
Jóannis Debes 106
Jóannis Rasmussen 91
Jóan Pauli (Palli) Joensen 224
Jógvan á Ryggi 94
Jógvan á Ørg 249, 251
Jógvan Abrahamsen 27
Jógvan D. Jakobsen 133, 134, 137, 138, 291, 292, 296
Jógvan Durhuus 142
Jógvan Elias Ellefsen 91, 92
Jógvan Elias Fr. Joensen 327
Jógvan Elias Johannesen 63
Jógvan Ellefsen 31
Jógvan Erland Joensen 93
Jógvan Fróðin Hansen 115
Jógvan Gudmund Johannesen 63
Jógvan H. Hansen, 375
Jógvan Hans Joensen 238, 239, 240, 285, 362
Jógvan Hans Sofus Jacobsen 184
Jógvan Hansen 88
Jógvan Haraldsen 90
Jógvan Haraldsen 358
Jógvan Hendrik Johannesen 184
Jógvan Hendrik Samuelsen 284
Jógvan Isaksen 251
Jógvan Jákup Næs 62
Jógvan Jákup Thomasen 91, 324
Jógvan J.A. Joensen 58, 93, 200, 327, 343, 354, 358
Jógvan Jákup Haraldsen 63
Jógvan Joensen 63, 88, 184, 324, 347, 358
Jógvan Joensen, í Húsi 194
Jógvan Joensen, Kirkjar 360
Jógvan Johansen 62, 359
Jógvan Napoleon Hansen 49
Jógvan Niclasen 332
Jógvan Olsen 124
Jógvan P. Joensen 91
Jógvan Páll Joensen 324
Jógvan Pauli Ellefsen 310
Jógvan Petur Thomsen 190
Jógvan Poulsen 184, 359, 360
Jógvan Ravnsfjall 54, 341
Jógvan Samuelsen 33, 55, 190, 310, 359
Jógvan Sjúrður Hansen 210, 211, 213, 215, 216, 258
Jóhan Elias Johannesen 48
Jóhan Frederik Olsen 63
Johan G. Mikkelsen 10, 29
Johan Joensen 92
Jóhan Johansen 285
Jóhan M.T. á Ørg 379, 382
Jóhan Magnusen 62, 198, 291
Jóhan Petur Joensen 77
Jóhan Poulsen 49, 146, 148, 184, 361
Johan Weihe 183
Jóhanna F. Johannesen 194
Jóhanna Johannesen 333, 334, 337, 338, 339, 340
Johanna Johansen 345
Jóhanna Næs 259, 284, 260,
Jóhanna Sunngerð Johannesen 63
Jóhanna Sørensen 73
Johanne M. Johannesen 68
Johannes Dam Hansen
Jóhannes Ellefsen 166, 207, 277
Johannes F. Joensen 240
Johannes Follend 114
Johannes Fr. Joensen 327
Jóhannes Hansen 122, 123, 327
Johannes Haraldsen 63
Johannes J. Jacobsen 190
Jóhannes Joensen 184, 240, 243, 364, 365, 367
Jóhannes Johannesen 59, 310
Jóhannes Jørgensen 59
Johannes N. Danielsen 93

Johannes N. Johannesen 94
Johannes Pauli Johannesen 335
Jóhannes Rasmussen 20
Johannes Weihe 219
Jóhannus E. Johansen 358
Johannus Ellefsen 63, 208, 209, 212, 216, 277, 279, 324, 373
Jóhannus Ellingsgaard 371
Jóhannus Hansen 124
Jóhannus Haraldsen 327
Jóhannus I. Johansen 324
Jóhannus Jacobsen 341
Jóhannus Joensen 241, 364
Jóhannus M. Nicolajsen 184
Jóhannus N. Haraldsen 49
Jóhannus Nattestad 324, 358
Jóhannus Niclasen 49, 304, 358
Jóhannus Nicolaj Haraldsen 184
Jóhannus P. Johannesen 335, 358
Jóhannus Poulsen 358
Jóhannus Rasmussen 16
Jóhannus Rasmussen 327
Jóhannus Ravnsfjall 145, 160, 162, 163, 194, 229, 236, 360
Johild Hansen 74
John Frederiksen 246
John Jacobsen 81
John Joensen 225
John Johansen 359
John Olivar Edvardsson 324
John Poulsen81, 87, 88, 246, 285, 286, 287, 327, 362, 370
John Reid Djurhuus 282
John Vágoy 327
Johnfinn á Plógv 130, 131, 134, 136, 137, 138, 139, 140, 141, 200, 293, 295, 372, 375, 376
Jón Eirikur Joensen 62, 284
Jón Ellendersen 203
Jón Falkvard 254
Jón Hans Eirikstein 63
Jon Hansen 305
Jón Joensen 253, 285, 288, 290
Jón Nystrøm 294
Jón Svabo Jørgensen 62
Jóna Marita Nattestad 63
Jóna Niclasen 59, 62
Jónberg á Mýrini 107
Jóngerð Purkhús 288, 306
Jonhild Hansen 194
Jónhild Jørgensen 166, 207, 264, 268, 271, 277
Jonli Johannesen 63
Jonn Arni Johansen 255
Jonna Elisa Haraldsen 62
Jónvør Joensen 123, 124
Jónvør Petersen 253
Jórun Haraldsen 274
Jórun Johannesen 59
Jórun Nielsen 86, 87
Josef Hansen 44
Josepha Hattarstein 144, 200
Jósup Hendriksen 205
Jósup Josephsen 345
Judith Falkvard 284
Judith Kirk 194
Julia Johansen 287
Julianna Klett 345
Jutta Hanse 190
Jutta Joensen 74
Jútta Svabo Jørgensen 63
Juul Andreasen 365
Juul Andreasen 366, 368, 369
Jytta Joensen 230
Jørðgrim Joensen 101, 102
Jørgen Bang 196
Jørgen Frans Jacobsen 9, 10, 12, 16, 17, 18, 19, 69, 73, 103, 104, 148, 149, 150, 151, 152, 153, 154, 183, 197, 327, 331, 361
Jørgen Lauridsen 242
Jørgen Lützen 196
Jørgin Gaardlykke 327
Jørgin Johannesen 151
Jørgin Johannesen 152
Jørgina Jacobsen 349

K. Hansen 301
K. Knudsen 294, 298, 300
K.A. Nattestad 92
Kai Kallsberg 288
Kai D. Jørgensen 374, 375, 376, 377
Kaj Egon Fagraberg 372, 373, 374
Kaj Lydersen Kaysfeld 118
Kamma Thomassen 259, 260, 284
Kári á Presttrøðni 63, 324
Kári Dalsgaard Petersen 201, 203
Kári Thorsteinsson 324, 330
Karin Johannesen 66, 67
Karin Thomassen 259, 260, 284
Karl Asker Ørnow 235
Karl Jacobsen 81
Karl Johan Joensen 59
Karl Jóhan Nielsen 86, 118, 119, 144
Karl Johansen 348
Karl Johansen 349
Karl Mohr Johansen 137, 140, 141
Karl Niclasen 254
Karl Nielsen 81, 86
Kartin Hansen 307, 308
Kathrina Hansdatter 332
Kathrina Hansen 122, 123
Kathrina Heinesen 123
Kathrina Rasmussen 364, 365, 367
Katrin á Norði 255
Katrin Joensen 59
Katrina Niclasdatter 332
Katrina Rasmusen 368
Keiding 33

Kell E. Jensen 282
Kem 196
Kem Haraldsen 236
Kevin Holland 124
Kirstin Jórun Jacobsen 62
Kirstin Nielsen 86
Kirstin Poulsen 124
Kirstin Rasmussen 59
Kitty Jóna Tórsteinsdóttir Thomsen 62
Kitty Thomsen 59
Kjartan Hansen 90, 122
Kjelnæs skómakari 15
Klæmint Haraldsen 31,49, 50, 66, 175, 194, 310
Kr. S. Ellefsen 146, 148
Kristensa Jørgina Ellingsgaard Jacobsen 62
Kristian Djuhuus 189
Kristian Jensen 294
Kristian Jóhan Albert Poulsen 184
Kristian Poulsen 49, 190, 359
Kristin Ellefsen 132, 134, 136, 137, 138, 142, 165, 252, 278, 289, 290, 291, 292, 296, 299, 302
Kristin Jacobsen 49, 89, 93, 184, 327, 349, 350, 352, 358, 359, 362
Kristin Poulsen 93
Kristin Rasmusen 49, 310, 358, 359
Kristina Aggrimsdóttir Svabo 128
Kristina Louisa Hansdatter 332, 333
Kristina Samuelsen 69
Kristina Svabo 63, 284
Kristoffur Svabo 91, 93, 149, 172, 190, 198
Laila Haraldsen 144
Laila Nattestad 284
Lars C. Joensen 93, 94
LeBlond majorur 190
Leivur Joensen 251
Leivur Nattestad 142, 243, 294, 296, 300, 362, 372, 375, 377
Lena Magnusen 194
Liljan Niclasen 284
Lina Poulsen 81
Linda Joensen 169, 170, 270, 275
Lisebeth Hansen 49
Lissie Ørnow 235
Lona Johansen 271
Louise Niclasen 44
Ludvig Jacobsen 198, 350, 351, 362, 370
Ludvig Petersen 98, 99, 106, 110
Ludvig Poulsen 23, 49, 50, 184
Lydia Laksafoss 123, 331, 342

M. Hansen 188
M. Poulsen 92
Magna Thomassen 115, 122
Magni Fróði Niclasen 63
Magni Klein 254, 255
Magni Laksafoss 331
Magni Thomasen 294
Magny Haraldsen 258
Mai Halla Prior 271
Majbritt Poulsen 281, 284
Majken Jacobsen 87
Malan Helgadóttir 170, 207, 275, 277
Malan Høgnadóttir 268
Malena Hansdatter 332
Malmberg Simonsen 285
Manfred Thomassen 123
Mannbjørn Wang 104, 129, 156
Maren Margretha Danielsen 194
Margit Svabo Jørgensen 170
Margreta Jacobsen 81
Margreta Súsanna Haraldsen 14
Margretha Danielsen 62, 190
Margretha Helena Johannesen 333
Margretha prinsessa 197
Margretha prinsessa 199
Margrethe Hentze 28
Margrethe Joensen 190
Margrið Niclasen 359, 364, 365
Maria Frederiksen 275
Maria Jacobsen 81
Maria Johannesen 236, 333
Maria Jørgensen 144
Maria Poulsen 103, 149, 279
Maria Samuelsen f. Niclasen 33
Maria Solveig Jacobsen 284
Maria Susanna Jørgensen 9
Maria Z. Hansen 194
Mariann Joensen 284
Marianna Hansen 66, 67
Marianna Joensen 59
Marianna Simonsen 116, 124, 207, 230, 264, 268, 277, 377
Marianna Wang 199
Marie Elisabeth Joensen 190
Marie Samuelsen 359
Marin Elisabeth á Høgabóli 254, 255
Marin Heinesen 80, 121, 122, 123
Marin Johansen 284
Marin Margretha Danielsen 364
Marita Frederiksen 248
Marita Jacobsen 87
Marita Nielsen 74
Marius Dam 305, 307
Marius Joensen, á Ryggi 243, 377
Marius Joensen, inni í Húsi 377
Marius Johannesen 144
Marius Næs 49, 184
Marius Pauli Thomassen 115, 121
Marjun Nattestad 59
Marjun Nielsen 87
Marjun Sofía Niclasen 63
Marna Selfoss 257, 258
Marna Zackariassen 284
Marni av Kák 246, 287
Marni Jacobsen 63
Martha Danielsen 57, 59, 79

Martha Joensen 125, 303
Martha Thomassen 254
Martin Berg 82, 156, 157, 294, 304
Martin Erik Leo 340
Martin Garðalíð 293
Martin Jacobsen 81, 84, 87, 184, 205
Martin Joensen Næs 34, 35, 36, 54, 61, 70, 71, 89, 91, 92, 99, 102, 103, 106, 185, 198, 236, 287
Martin Jóhan Hendrik Davidsen 62
Martin Johannesen 149, 150
Martin Johansen 90, 145, 149, 167, 229
Martin Larsen 255
Martin Leo 134, 138, 142, 291, 294
Martin Malberg á Mýruni 121
Martin Mouritsen 111
Martin Nielsen 81, 86, 127, 128, 130, 132, 134, 136, 137, 138, 140, 142, 205, 256, 289, 290, 292, 296, 302, 356, 373, 374, 375
Martin Pollard 123
Martin Vágoy 63
Martina Jacobsen 81
Mary Hansen 169
Mayfinn Norðoy 345
Mayfinn Norðoy 346
Meinhard Hansen 58, 89, 91, 92, 101, 220, 222, 236, 362
Meinhard Jacobsen 246
Meinhard Johannesen 252, 260
Meinhard Mørk 352
Michael Larsen 255
Michal Johansen 359
Michel Danielsen 24
Mikal Johansen 327
Mikkjal D. á Ryggi 43, 58, 77, 160, 171, 175, 272, 331, 200, 202
Mikkjal Davidsen 352, 382
Mikkjal Hansen 62
Mikkjal Olsen 96
Millen kapt. 379, 380
Mirjam Kjølbro 270, 281
Mogens Heinesen 59
Mogens Heinesen 62
Mogens Skoradal 294
Monrad Sjelten 142
Morenza Jacobsen 205, 327
Mrs. L. Bruce 191
Müller Petersen 194
N. Elkjær Hansen 197
N. Hansen 91
N.S. Johannesen 149
Napoleon Magnussen 166, 170, 209, 212, 216, 271, 274, 277, 209
Napoleon Nolsøe Petersen 39, 83, 84, 110
Napoleum Olsen 358
Neinbjørn Nattestad 59, 62
Niclas Hansen 88, 89, 90, 93, 148, 358, 359
Niclas Haraldsen 51, 88, 89, 93, 148, 149, 150, 358
Niclas Jensen 251
Niclas Joensen 52, 332
Niclas Jørgensen 9, 10, 12, 91, 103, 327, 358
Niclas Niclasen 49
Niclas Rasmusen 49, 356
Niclas Salomon Haraldsen 49, 90, 184
Nicolina Joan Elida Johannesen 64
Nicolina Nielsen 86, 87
Nicolina Randi Hansia Johannesen 64
Niels Bentsen 142
Niels Braunschweig 134, 136, 138, 373, 374
Niels J. Arge 294
Niels J. Nattestad 358
Niels J. Nielsen 27
Niels Jacob Nattestad 183, 184
Niels Jacob Niclasen 190
Niels Jacob Nielsen 14
Niels Jákup Thomsen 144
Niels Joensen 62
Niels Juel Arge 379
Niels Juel Arge 382
Niels Julius Thomassen 324
Niels Malmros 331
Niels Marius Petersen 101, 109, 197, 237, 246, 285
Niels P. Hansen 341
Niels Pauli Danielsen 206
Niels Pauli Hansen 157, 240
Niels Struer 9
Niels Westerby 219, 221, 223, 226, 227
Niklái Haraldsen 149
Niklas Foldbo 251
Nikolina Dagmar Joensen 353
Ninna Nielsen 74
Nyholm Debes 88
Nørager 196
O.G. Davies 379
Odd Medbøe 334
Oddbjørg Johansen 170
Oddbjørn Vágslíð 134, 137, 138, 142, 291, 299
Oddmar Ravnsfjall 63, 105, 122, 123, 203
Oddvør Hansen 101
Offley 191
Óla Jákup Guttesen 20
Ólavur Clementsen 381
Ólavur Hansen 57, 59, 152, 347
Ólavur í Beiti 208, 279
Ólavur Joensen 62
Ólavur Poulsen 87
Olavus Danielsen 106, 371, 381
Ole Hans Poulsen 327
Ole Martin Poulsen 327
Olevine Poulsen 333
Olevine Poulsen 334
Olga Nielsen 81
Olgar David Hansen 352
Óli Hans Poulsen 310
Óli Mikkelsen 288
Olivar á Ryggi 59, 93, 101, 327
Osmund Joensen 108, 109, 115

Osvald Hansen 201
Ovi Poulsen 127, 128, 290, 324
Oydis Joensen 59
P. Dahl 189
P.J. Haraldsen 92
Páll F. Joensen 205
Páll Hansen 325
Páll J. Nolsøe 10, 382
Páll Nólsoy Thomsen 113
Páll Vang 301
Palli Joensen 229
Palli Mikkelsen 88
Paula Joensen 259, 260, 284
Paula Nattestad 59, 80, 257, 260, 263, 264, 270, 341, 377
Paula Svabo 101, 199
Pauli Ellefsen 130, 174, 263, 286, 293
Pauli Frederiksen 236
Pauli Nolsøe 123
Paulus Johansen 90
Peder Areboe 331
Peder Jensøn 343
Per Olesen 271, 273, 304, 305
Perchy Nielsen 102, 147, 148
Peter Elias Petersen 225
Peter Grønsgård 122
Peter Jacob Haraldsen 236
Petur á Steig 224
Petur Heinesen 32, 49, 98, 190, 337, 338, 358
Petur Jacob Johansen 327
Petur Jacob Sigvardsen 34, 37, 38, 76, 108, 142
Petur Jacobsen 81, 87, 327
Petur Jacob Johannesen 184
Petur Jacob Petersen 217
Petur Jacob Johansen 146, 359, 361
Petur Johannesen 310
Petur Johansen 146, 359
Petur Kruse 117, 122, 261
Petur Leivur Davidsen 324
Petur Salomon Hansen 184
Petur Weihe 225, 237, 285
Pól Andreas Poulsen 184
Pól Isaksen 149
Pól Petersen 43, 56, 78, 93, 97
Pól Poulsen 62, 67, 68, 359, 360
Pola Poulsen 59
Poli F. Jacobsen 361
Poul Arni Jacobsen 157, 277, 278, 281
Poul Brønum 134
Poul Hansen 197
Poul Isaksen 49
Poul Joensen 101, 225
Poul Johan Johansen 71
Poul Johannesen 58, 83, 91
Poul Johansen 190, 191
Poul Laursen 380
Poul Ole Jacobsen 21, 333
Poul Petersen 79, 330
Q.M. Willerton 190
R. Morris 191
R. Mortensen 192
R. Williamson 379
R.B. Prip 192
R.R. Best 379
Rachel Joensen 63
Rachel Niclasdatter 9, 10
Ragnhild Poulsen 68, 190
Rasmus Heinesen 49, 53, 219, 345, 350
Rasmus Niclasen 31, 33, 39, 40, 42, 43, 44, 59, 130, 160, 175, 177, 178, 179, 334
Rasmus Poulsen 148, 149, 339
Regin á Loftið 204
Regin Frederiksen 59
Regin Poulsen 252, 259, 260, 261, 293, 294, 295, 296, 298, 299, 300, 302, 363, 370, 377
Remi Hansen 374, 375
Richard á Ryggi 93
Richard Bugatsch 53
Richard Howells 379
Richard Jørgensen 91, 122, 190
Rigmor Heinesen 341
Rói Dahl-Jacobsen 158
Rógvi Egilstoft 111, 113, 120, 122
Rósa Samuelsen 209, 210, 211, 213, 307, 308
Rósely Reynstind 265, 268, 273, 275
Rudolf Jørgensen 59, 62
Rúni Olsen 254
Ruth Johannesen 80, 121
Ruth Poulsen 87
Rutt Myllhamar 124
Rutt Petersen 123, 124
S. Petersen 182
S.E. Johansen 46, 192, 199, 200
S.J. Thomasen 93
Salomon Hansen 310
Salomon Poulsen 148, 157
Sam Olsen 101, 148
Sámal á Vágalið 63
Sámal Birgir Johansen 324
Sámal Ellefsen 88, 89, 90, 93, 101, 109, 146, 149, 190, 310, 327, 335, 359
Sámal Ellingsgaard 310
Sámal J. Thomsen 310
Sámal Jákup Hansen 88
Sámal Jákup Johannesen 50, 358
Sámal Jákup Johansen 48, 49, 88, 358
Sámal Jákup Jørgensen 59, 203, 371
Sámal Jákup Niclasen 16, 17, 19, 20
Sámal Jákup Thomasen 31, 32, 49
Sámal Joensen 92
Sámal Jóhannus Fr. Johannesen 184
Sámal Johansen 146, 236, 310, 327, 360
Sámal Kr. Samuelsen 358
Sámal Matras Kristiansen 330
Sámal Ravnsfjall 62

Samson Gaardlykke 325
Sanna Akselsen 123, 124
Sanna Joensen 121
Sanna Johannesen 259
Sanna Johannesen 260, 284
Sarah Khaliqhey 254, 255
Sigbjørn G. Skúadal 293
Sigga Johansen 236
Sigga Rasmusen 359
Sigmund Frederiksen 31, 38, 54, 58, 89, 90, 93, 98, 100, 102, 106, 146, 148, 182, 222, 310, 327, 351, 358, 359, 361, 367, 369, 370
Signa Frederiksen 59
Signa Joensen 258, 259, 260, 263, 284
Sigrun Juul Samuelsen 115
Sigrun Nattestad 377
Sigrun Olsen 59
Sigurd Hansen (s. Hattarstein) 149, 150, 324, 325, 327
Sigurd Hattarstein 325
Sigurd J. Hansen 93
Sigurd J. Hansen 335
Sigurd Petersen 34, 95, 101, 105, 106, 110, 111, 119, 120, 121, 126, 142
Sigvald Hansen 339
Símun P. Poulsen 239
Símun Thomassen 122, 123, 252, 260
Siri Davidsen 284
Sjúrður Jóhan Guttesen 117
Sjúrður Johansen 194
Skaalum, lærari í Hvalba 15
Sofía Haraldsen 125, 144, 168
Sofía Højgaard Ellefsen 198, 364, 365, 367, 359
Sofía Malena Heinesen 26
Sofía Nattestad 67
Sofía Petersen 345
Sofus M. Jacobsen 245, 246, 247
Sofus Poulsen 93
Sólberg Olsen 59, 324
Sólfríð Nattestad 262
Solok Mikkelsen 237
Sólrun Rasmussen 59
Sonja Frederiksen 121
Sonja Jacobsen 87
Sonja Johannesen 254, 257, 258, 259, 260, 284
Steffan Simonsen 124
Steingrim Nattestad 327, 371
Steingrim Niclasen 292
Steintor Johannesen 335
Steve J. Lloyd 379, 382
Sundal Ellefsen 92
Sune Jacobsen 253, 307, 308
Suni á Ryggi 59
Suni Gaardlykke 291
Suni Joensen 261
Suni Krossá Davidsen 324
Sunneva Haraldsen 150
Sunneva Jacobsen 121
Sunneva Poulsen 190
Sunneva Wang 59
Susan Rummelhoff 123, 124
Súsanna á Stongum 284
Súsanna Fanny Hansen 62
Súsanna Hansen 200
Susanna Hansy Jacobsen 64
Svanna Johansen 255
Svend Erik Knudsen 137, 138
Svend Erik Larsen 255
Svend Krosstein 279
Svend Aage Ellefsen 80, 246, 285
Svenn Brimheim 138, 294, 340
Svenn Erik Knudsen 139
Svenning Rytter 39, 176, 177, 178
Sverri Dahl 337
Sverri Fon 105
Sverri Nattestad 91
Søren Hansen Hjort 16, 20
Søren Olsen 49
Sørin Danielsen 24, 36, 47, 48, 53, 70, 71, 82, 84, 91, 93, 97, 98, 145, 160, 185, 188, 189, 190, 198, 219, 220, 222, 225, 226, 227, 228, 310, 327, 353, 359, 360, 361, 363, 380, 381
Tamplin 191
Terje Hansen 63
Thea Hansen 194
Thomas Dam 201, 339, 361
Thomas Jacob Johansen 68, 184, 327
Thomas Juul Askham 146
Thomas Juul Thomasen 59, 62
Thomas Napoleon Hansen 243, 244, 245, 248, 327
Thomas Thomasen 225, 236
Thomina Poulsen 68, 167
Thopona Johansen 68, 102
Thor Nielsen 225
Thorborg Johannesen 194
Thordis Hansen 199, 341
Thorstein Niclasen 187, 188
Thorstein Petersen 370
Thorstein Thomasen 327
Thurid Hansen 63
Thurid Olsen 122, 123
Tinna Johannesen 69, 167, 168
Tommy Jacobsen 63
Tórður á Presttrøðni 276, 324
Torfinn Hansen 280
Torfinn Jacobsen 59, 62
Torfinn Johansen 63
Tórhallur Simonsen 123, 124
Torkil Haraldsen 80, 122
Torstein Niclasen 91, 148, 324, 325, 327, 358
Torvald Olsen 93
Tróndur Ravnsfjall 274
Trúgvi Jacobsen 129, 130
Trúgvi Samuelsen 240
Trygvi Elias Fagraberg 63
Trygvør Herfríð Nattestad 62

Trøndur Fuglø 128, 131, 132, 133, 134, 136, 137, 138, 139, 142, 286, 289, 290, 291, 293, 294, 296, 300
Tummas Thomassen 310
Tummas Hans Gaardlykke 132
Tummas Jacobsen 30
Tummas Juul Thomsen 106
Tummas Lauritsen 120, 122, 123, 130, 205, 248, 290, 291, 293, 294, 296, 299, 300, 301, 302, 370, 372, 373, 374, 375, 376, 377
Tummas Pauli Johannesen 184
Tummas Pauli Johansen 358, 367
Tummas Sigvald Haraldsen 20
Tummas Thomasen 359
Turid Christiansen 258
Turid Debes Hentze 201
Turid Hattarstein 122
Turid Olsen 203
Taage Kofoed 43
Una Jacobsen 271
Unn Hansen 271
Valborg Joensen (s. Svaðabú) 72, 73, 74, 151, 190, 364, 365, 366, 367, 368, 369
Valborg Svaðabú 370
Valdemar á Løgmansbø 293
Valdemar Lützen 31, 32, 90, 103, 360
Vensil Nattestad 358
Vibeke Elkjær Hansen 196
Victor Joensen 79, 243
Vígdis Thomasen 74
Viggo Johannesen 151, 152
Vilh. Christiansen 197
Vilhelm Johannesen 288, 290
Villborg Sofia Nattestad 63
Virgar Jacobsen 87
W. Petersen 30
W.L. Vale 380
Wensel Nattestad 67
Wensel Petersen 294, 296, 298, 300
William Nielsen 81, 86, 87, 88, 235, 327
Winther Lauritsen 285
Waagstein 107
Zacharias Hansen 217
Zacharias Leitisstein 279, 294
Zacharias Nielsen 13, 15, 20, 81, 101
Zacharias Reynagarð Olsen 63
Zacharias Thomsen 236
Zacharis Jacobsen 353
Zakaris Heinesen 335